Verjurøða ummælarans

Verjurøða ummælarans

Sjálvsmyndan í føroyskum bókmentaummælum 1997-2007

Paula Gaard
Ph.d. – ritgerð
Føroyamálsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya

Permumynd: Bárður Dal Christiansen
Perma: Eyðun Müller Thomsen
Rættlestur: Turið Sigurðardóttir
og Sanna Andrasardóttir Dahl
Ensk týðing: Marita Thomsen
Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

fróðskapur
Tórshavn 2022

There ought to be a law
against you coming around

(Bob Dylan 1965)

criticism is a structure of thought and knowledge
existing in its own right, with some measure of
independence from the art it deals with

(Northrop Frye 1957)

Innihaldsyvirlit

1. Inngangur **9**

Skipan av ritgerðini 15

Skilmarking av hugtøkum 18

2. Granskingarøkið **21**

Upprunin til bókmentaummælið 23

Bókmentaummælið sum granskingarøki 25

Paradoks í bókmentaummælinum sum granskingarøki 27

Ummælarin í verjustøðu – kreppa ella tilverutreyt? 31

Ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi 46

Vitanarglopp 68

3. Mannagongd – endamál, arbeiðsøki og arbeiðsháttur **71**

Endamál 78

Arbeiðsøki og arbeiðsháttur 78

Ummælissøguligt innlit 87

4. Tekstslag **91**

Ummælið sum leikari á tí bókmentaliga økinum 91

Ummælið sum relatiónir millum menniskju 96
Journalistiskt tekstslag 100
Virðismetingin 103
Ummælið sum listaligur tekstur 111
Stílur í ummælum 119
Mimetiskt tekstslag 122
Málburður og stílsnildir 134

5. Ummælaratypur 139
Journalistiskt sjónarhorn 141
Bókmentaligt sjónarhorn 146
Nýggjar ummælaratypur? 151

6. At skapa mentanarligan myndugleika 153
Sjálvsmyndan í tekstinum: *ethos* og *persona* 156
Amboð hjá høvundinum til at hava ræði á sínum lesara 159
Persónligt ethos, stovns-ethos og persona 161

7. Ummælini í tíðarskeiðinum 1997-2007 165
Søguligt baksýni 166
Samfelags- og miðlastøðan 1997-2007 174
Ummæli í útisetu 176
Andrias Justesen og útisetablaðið Føringurin 181
René Hjelm ummælir í Dimmalætting 188
Ummælið sum samrøða – formliga eksperimenterandi ummæli í Braga 192
Útisetaummælarin Jógvan Isaksen ummælir í Sosialinum 198
Páll Isholm ummælir í Dimmalætting 208
Anna Mattsson – eitt eyga uttanífrá 215
Pallsetti ummælarin 220
Arnbjørn Ó. Dalsgarð 222
Oddfríður M. Rasmussen 232
Carl Jóhan Jensen 243
Bókmentakritisk sjálvsmynd? 270
Kim Simonsen 291
Kvinnur verða ummæltar, og kvinnur ummæla 306
Drekkmunsrealisma 312
Ávirkan av kynsmismuni í ummælum á tilnevningar til virðisløn 321
Tríggir kvinnuligir ummælaraprofilar 324
Anna V. Ellingsgaard 327
Turið Sigurðardóttir 334
Kinna Poulsen 348
Kvinnur ummæla kvinnur í Kvinnutíðindi 362
List í sjálvum sær 369

8. Tekstslag paradoksins 387

9. Samandráttur 401
Framtíðargransking 406

10. Summary 409
Future research 414

11. Bókmentir 417
Fylgiskjal 449

12. Leitorð 461

Henda bók er doktararitgerð mín, skrivað á Føroyamálsdeildini, Fróðskaparsetri Føroya árini 2016-2019 og vard á vári 2021. Turið Sigurðardóttir var høvuðsvegleiðari og Ástráður Eysteinsson hjávegleiðari. Í metingarnevndini sótu Malan Marnersdóttir, Dagný Kristjánsdóttir og Erik Skyum-Nielsen. Bert smáar tillagingar eru gjørdar í sambandi við útgávuna.

Granskingarráðið stuðlaði verkætlanini.

Bókin er ognað foreldrum mínum, Kristionnu og Jan Jespersen og góðu ungdómsvinkonuni, Arnvør Martinsdóttur á Torskilsheyggi, sum andaðist, tá granskingartíðarskeiðið var hálvrunnið.

Paula

1. Inngangur

Henda ritgerð, sum hevur fingið heitið *Verjurøða ummælarans,* viðger ummæli av føroyskum føgrum bókmentum, sum eru skrivað í føroysk bløð og tíðarrit. Heitið vísir til ta verjustøðu, sum ummælarin ofta er í, tí hann av rithøvundum verður hildin at misskilja ella mistulka skaldskap. Samstundis skal ummælarin standa til svars fyri dómar, hann fellir um skaldskap í sínari egnu samtíð, av rithøvundum, hann kann rokna við at møta aftur í ymiskum samanhangum í sínum privata gerandisdegi. Harumframt hava nógvar røddir verið frammi seinnu árini um, at ummælini eru í einari trongari støðu vegna broytta miðlastøðu og broyttar valdskipanir í samfelagnum.

Heitið vísir eisini til sjálva ritgerðina sum eina verjurøðu fyri ummælarans virksemi. Farið verður nevniliga til verka út frá teirri grundleggjandi fatan, at ummælið er týdningarmikið tekstslag, og at ummælarin hevur stórt vald í bókmentastovninum, tí hann er við til at seta dagsskránna, tá tað kemur til at virðismeta bókmentir. Svenski ummælarin og bókmentaprofessarin Tomas Forser (1943-2020) sigur, at eingin miðil hevur so stórt vald á mentanarøkinum sum ummælini, tí tey eru við til at stýra ikki bara, hvat verður mett sum góðska, men eisini, hvør til dømis fær mentanarstuðul. Serliga vísir hann á, at ummælarar, sum hava dupulleiklutir, tí teir eisini eru rithøvundar, hava størst vald á mentanarøkinum (Forser 2005).

Í ritgerðini kanni eg ummælini í einum tíðarskeiði í føroyskari ummælarasøgu, árini 1997-2007, tá ummælaravirksemi framvegis var savnað á einum mentanarpalli, sum var einfaldur, tí at tað, sum varð skrivað um bókmentir, var savnað í bløðum og tíðarritum. Hetta var áðrenn Facebook, bloggar og aðrir sosialir miðlar gjørdu, at ein og hvør kann skapa sær sín egna pall og siga sína hugsan um bókmentir.

Kanningin greinar ummælini út frá ástøði um hetta tekstslagið. Dentur verður lagdur á at kanna, hvussu ummælarin skapar sær mentanarligan myndugleika í tekstinum, bæði innihaldsliga við at hyggja at, hvussu hann skapar sær myndugleika við at seta bókmentirnar í bókmentaligt høpi o.s.fr, og tá tað kemur til diskurs ella retorikk, hvussu hann setir sín egna persón á pall í ummælinum og soleiðis skapar sær eina sermerkta rødd.

Ummælaravirksemi í Føroyum verður lýst í søguligum høpi sum ein professionaliseringartilgongd, ið frá byrjan var merkt av einum ráðandi mansveldi, men sum kvinnur so við og við hava vunnið sær pláss í og fingið virknan lut í. Eisini verður ummælið lýst í tí samfelagsliga høpi, at ummæli í útisetu frá byrjan hava havt og framhaldandi í tíðarskeiðinum 1997-2007 hava ein týðandi leiklut í at lyfta góðskuna í føroyskum ummælaravirksemi.

Bókmentaummæli eru partur av størri heild, sum verður kallað bókmentakritikkur (Said 1983:1). Bókmentakritikkur er hugtak, sum røkkur frá tí, sum verður skrivað og undirvíst í um bókmentir á akademiskum stigi, til ummæli, sum leggja seg eftir at gera bókmentir atkomuligar fyri almenningin við at upplýsa um tær, lýsa tær, lutvíst viðgera tær og fella dóm um teirra virði sum tekst.

Ummælini hava sítt sjálvsagda pláss í bókmentaligu ringrásini. Tey eru týðandi liður í móttøkuni av einum verki, sum verður givið út á marknaðin, har tey virka sum millumliður millum rithøvund og lesara í móttøkutilgongdini. Tey eru við til at gera lesaran tilvitaðan um, at ein bók er útkomin, og tey eru við til at avgera, í hvønn mun verkið yvirhøvur verður móttikið.

Sum tekstslag er ummælið journalistiskt við tað, at tað er skrivað í bløð og tíðarrit, og tilvitið um ein móttakara er sterkt til staðar í hesum tekstslag, hvørs endamál er at byggja brýr millum verk og lesarar og at geva lesaranum eina forfatan av einum teksti, áðrenn hann møtir honum. Ummælarin virkar ofta sum duravørður í bókmentastovninum, tí at hann (ella ritstjórnin á blaðnum) velur, hvat verður ummælt og ikki. Ummælarin er ofta tann fyrsti, ið lesur verkið, og hann gevur lesaranum innlit í tekstin, so hann kann taka støðu til, um hann metir hann vera verdan at lesa ella ikki. Ummælarin vegleiðir lesaran ella lærir hann upp at gerast ein góður lesari, og hann sigur sína hugsan um tekstin, so lesarin fær eina hóming av, hvat hann kann vænta sær av einum teksti, áðrenn hann møtir honum. Eitt ummæli kann vera við til at skapa lagnuna hjá einum verki, bæði tá tað kemur til at gera av, hvussu verkið verður móttikið í sínari samtíð, og tá tað kemur til at skapa møguleikar fyri, at tað í framtíðini fær pláss í bókmentasøguni. Her hava mentanar- og bókmentavirðisløgnir eisini ein týðandi leiklut, og ummælini og tann hugburður, sum verður skaptur í tí ráðandi almenna ummælaradiskursinum, kunnu hava stóra ávirkan á, hvørji verk verða innstillað.

Ummælarin kann vera við til at avgera, um ein bók verður keypt og lisin ella ikki. Eitt positivt ummæli kann seta sølutølini fyri eina bók upp, meðan eitt negativt ummæli kann gera, at ein bók als ikki verður keypt og lisin. Tað eru dømi um, at positiv ummæli hava havt sín avgerandi lut í, at bókmentaverk eru komin út, eisini tá rósið ikki snýr seg um høvuðsevnið í tí ummælta verkinum. Ferðamannabókin hjá Jørgen-Frantz Jacobsen (1900-1938) *Færøerne: Natur og Folk* (1936) varð í einum donskum ummæli stórliga róst fyri sínar skaldsligu dygdir. Tað eggjaði høvundin, sum á sjúkralegu skrivaði skaldsøgu sína, til at gera sítt ítasta fyri at skriva *Barbaru* (1939) lidna. Óvæntað rós fyri skaldsliga skriving í yrkisbókini, har skaldsligur stílur ikki var aðalmálið, gav í hesum førinum høvundinum áræði til at skapa sítt skaldsligasta verk. William Heinesen (1900-1991) skrivar:

> Den er simpelthen lagt an som en praktisk håndbog, man kan slå op i, og ingenlunde tænkt som en skønlitterær bog. Det vakte derfor også Jacobsens højlige undring, da en begejstret anmelder ved bogens fremkomst i Danmark stærkt slog til lyd for dens digteriske kvalitet ... disse ord glædede naturligvis bogens forfatter, som dengang lå alvorligt syg i Tórshavn, og de var utvivlsomt med til at

> opflamme ham til at videreføre det digterværk, han netop dengang lå og skrev på, kærligsromanen Barbara, der senere skulle gøre ham så vide kendt som skønlitterær forfatter (Heinesen 1970:u. síðut.).

Negativ ummæli kunnu tó eisini hava positiva ávirkan bæði á sølu av tí ummælta verkinum og á framtíðarvirksemið hjá rithøvundinum, og tí halda rithøvundar ofta, at tað at als ikki fáa nakað ummæli er verri enn at fáa eitt negativt ummæli. Rithøvundurin Marjun Syderbø Kjelnæs (f. 1974) er eitt dømi um hetta, tá eitt speiskt ummæli frá rithøvundinum og ummælaranum Carl Jóhan Jensen (f. 1957) fekk hana til at vilja mótprógva negativa ummælið (Hansen 2016:43-46). Eitt annað dømi um, at eitt negativt ummæli hevur havt positiva ávirkan, er ummælið av fyrstu bókini hjá danska rithøvundinum Jesper Wung-Sung (f. 1971), har ummælarin kallaði hann „lynkineser“, heitið, hann við hesari grundgeving gav barna- og ungdómsbók síni, sum varð innstillað til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins í 2018:

> Inspirationen til denne bogs titel fik jeg fra en journalist, der i forbindelse med min debut som forfatter i 1998, kaldte mig netop det: Lynkineser. Med andre ord var jeg tom larm og hurtig glemt. Jeg kan kun sige tak. Modstand på de helt rigtige tidspunkter er en gave (Wung-Sung 2017:102).

Hóast hesa valdmiklu støðu sína verður ummælið ofta sæð sum ein tekstur við lágari tign, og sum tekstslag er ummælið eitt lítið granskað øki á akademiskum stigi. Í føroyskum høpi er ummælið sum granskingarøki eitt at kalla ótraðkað land.

Jørgen Dines Johansen (1943-2018), ið var professari í bókmentafrøði við Odense Universitet, grundgevur fyri tørvinum á at systematisera tey kriterii, sum verða nýtt til at meta um fagrar bókmentir:

> Den implicitte rolle, som vurderingen spiller i beskæftigelsen med litteratur, er i sig selv grund nok til at gøre den til genstand for undersøgelse, men hertil kommer så, at vurderingerne rent faktisk har en særdeles håndfast praktisk effekt, da de i høj grad er bestemmende for den litterære traditionsformidling (fx inden for uddannelsessystemet) (Johansen 1984:15).

Í tí akademiska heiminum hevur partloysi leingi verið eitt ideal, og lítil ansur hevur verið givin teirri bókmentaligu metingini. Undirvísing í bókmentafrøði á universitetum hevur í longri tíð í stóran mun fevnt um háttaløg sum ævisøguligt og sálarfrøðiligt háttalag, marxismu, strukturalismu, nýkritikk, postkolonialismu, feministiskan bókmentakritikk, o.s.fr., sum eiga sítt sjálvsagda pláss í undirvísingini, meðan tann bókmentaliga metingin við sínum fyritreytum sjáldan fær rúm sum sjálvstøðugt evni. Tað hevur ikki verið siðvenja at biðja tey lesandi grundgeva fyri ella yvirhøvur siga sína egnu hugsan um eina bók, hóast tað fyrsta, sum spurt verður um, tá menniskju tosa um bókmentir, er: „Er bókin góð? Er hon verd at lesa?“.

Hóast bókmentaliga metingin ikki eigur nakran eksplisittan lut í akademiskari siðvenju innan undirvísing í bókmentum, fer kortini ein grundleggjandi og sera týðandi góðskumeting fram í øllum tí bókmentaliga kritikkinum á universitetunum, sum tó ikki verður beinleiðis úttalað. Góðskumetingin fer fram í úrvalinum av tí, sum verður viðgjørt; tí, sum verður kanoniserað og skrivað verður um í bókmentasøgunum, og í mátanum, tað verður viðgjørt uppá. At tað eins og í øllum øðrum løgum í samfelagnum fer ein fjaldur kritikkur fram á akademiskum stigi, er lítið at ivast í, tí bókmentafrøðingar tosa eisini við sínar javnlíkar og eru tilvitaðir um, at ólík bókmentalig góðskukriterii eru virkin. Hesin parturin av bókmentaligu viðgerðini hevur ikki rúm í teirri formaliseraðu undirvísingini í bókmentum á akademiskum stigi. At ummælaravirksemi kortini er eitt natúrligt og týðandi arbeiði fyri nógvar bókmentafrøðingar og -granskarar at gera við síðuna av tí akademiska arbeiðinum, er ein ímynd av teimum fleirtýddu viðurskiftunum kring ummæli.

Tá sjóneyka verður sett á gransking av ummælum, sum eg geri í hesari ritgerð, er tað eitt slag av metakritikki, sum flytur fokus frá bókmentunum sjálvum til viðgerðina og metingina av teimum. Gransking av ummælum innan bókmentaheimin er tí eisini ein sjálvrannsakan av egnum virksemi; tað er bæði ein kanning av tekstinum formliga,

innihaldsliga og stíli viðvíkjandi, men eisini ein greining av, hvussu bókmentir hava verið mettar gjøgnum tíðirnar; hvørji kriterii hava verið og verða nýtt í góðskumetingini av bókmentum. Gransking av ummælinum er tí eisini liður í einari upprðfesting av ummælinum sum tekstslag og sum granskingarøki.

Ummæli hava í mestan mun verið kannað sum hjálpartekstir í bókmentagranskingini og nýtt til at siga nakað um, hvussu bókmentirnar hava verið móttiknar í sínari samtíð. Tað, sum Malan Marnersdóttir (f. 1952), bókmentafrøðingur, professari á Fróðskaparsetri Føroya, sigur um ummælini í 1990, lýsir væl, at ummæli hava verið sædd sum týðandi amboð til at skriva ta tignarligu bókmentasøguna:

> Ummæli eru altíð aktuel, bøkurnar eiga at verða ummældar nakað skjótt eftir, at tær eru komnar. Tey eru prógv um tað, samtíðin heldur um bókina, og eru á tann hátt týdningarmikil amboð í einum øðrum parti av hesum at skriva um tað, hini skriva, og tað er tann hátt virda bókmentasøgan (Marnersdóttir 1990:84).

Í hesari ritgerð verður fokusið skift, og ummælið verður viðgjørt sum tekstur í sjálvum sær ikki bara formliga, innihaldsliga, málsliga og stíli viðvíkjandi, men eisini sum tekstslag og sum parallellsøga hjá bókmentasøguni. Ummælið verður ikki bert sett fram sum tekstur verdur at granska í sjálvum sær, men sum tekstur við eins stórum listaligum potentiali og aðrir fagurbókmentaligir tekstir. Ummælið verður í hesari kanning ikki strangliga mett sum yrkistekstur, men sum eitt breitt og vítt fevnandi tekstslag, ið liggur á markinum millum ymiskar siðvenjur og letur upp fyri alskyns møguleikum, bæði tá tað kemur til at bera boðskapir av ymiskum slag, at føra fram egin áhugamál, og tá tað kemur til kreativa skriving.

Øll søgan hjá ummælinum verður tó ikki søgd í hesi ritgerð, tí hon er avmarkað til at fevna um tíðarskeiðið í føroysku ummælarasøguni, sum liggur nær okkara samtíð, 1997 til 2007, og sum er seinasta tíggjuáraskeiðið, áðrenn internetið og teir sosialu miðlarnir kollveltu miðlaheimin og umstøðurnar hjá ummælinum. Í ritgerðini komi eg nærri inn á grundgevingarnar fyri, hví júst henda avmarking er gjørd. Tíðarskeiðið verður lýst við søguligum tilviti um ummælið sum tekstslag í evropeiskum, norðurlendskum og føroyskum høpi.

Seinastu tjúgu árini er nógv skrivað bæði journalistiskt og vísindaliga um, at bókmentaligt ummælaravirksemi er í kreppustøðu. Valdskipanir í samfelagnum broytast, og tann klassiski ummælarin, sum vit kenna hann; smaksdómarin, sum hevur myndugleika millum fólkið at meta um góðsku, missir sína valdstøðu. Samstundis letur miðlaheimurin upp fyri, at nýggjar ummælaratypur trína á bókmentapallin, har ein og hvør við eins stórum rætti kann siga sína hugsan um bókmentir (Brenson 1998, Zangenberg 2007, McDonald 2007, Kristensen og From 2015, „Et Danmark uden anmeldere“ 2017, Larsen, Dag Eivind Undheim 2017, Lindqvist 2017, Edenborg 2018, Dam 2017). Summi eru svartskygd og tosa um ummælaradeyða (McDonald 2007), at fólkaræðið er hótt (Larsen, Dag Eivind Undheim 2017) og um apokalyptiskar støður (Edenborg 2018). Onnur síggja nýggjar møguleikar í tí broytta miðlaheiminum, har fólkaræðið verður endurnýggjað í lívligari kjaki, og har øll kunnu koma til orðanna (Kristensen og From 2015).

Hóast eingin felags semja tykist vera um, hvørja ávirkan tann viknandi valdstøðan hjá klassiska ummælaranum hevur á ummælaravirksemið, tykist semja vera um, at tann nýggi fleirraddaði miðlaheimurin setir herd krøv til tann einstaka ummælaran um sjálvur at uppfinna sín egna myndugleika. Danski ummælarin og bókmentafrøðingurin Erik Skyum-Nielsen (f. 1952) sigur tó, at er ein ummælararødd sermerkt og myndug, fer hon altíð at verða hoyrd (Skyum-Nielsen 2017). Hesa útsøgn og lykilorðini *sermerkt* og *myndug* komi eg aftur til seinni í ritgerðini.

Skipan av ritgerðini

Eftir inngangin verður í kapitli 2 granskingarøkið kortlagt, og nøkur grundleggjandi paradoks, sum hava merkt granskingina av høvuðseyðkennunum í ummælinum sum tekstslag í okkara grannalondum, verða lýst. Eg vísi síðani á onnur paradoks á granskingarøkinum, sum mynda týðandi tættir í mínari viðgerð av evninum.

Hereftir lýsi eg eina søguliga gongd, har eg seti spurnartekin við „kreppustøðuna“, sum ummælini sigast at vera í í dag, tí tað er ikki nýtt, at ummælarar hava tørv á at verja sín rætt at ummæla. Heldur má tað sigast at vera ein tilverutreyt hjá ummælinum at vera í kreppustøðu.

Ein samanfatandi gjøgnumgongd av tí, sum higartil er sagt um ummælið sum tekstslag í føroyskum høpi, verður síðani løgd fram. Henda gjøgnumgongd verður sett fram í tíðarrøð.

Kapittul 3 er lýsing av granskingargongdini, har eg greiði frá, hvussu og undir hvørjum treytum innsavningin av tilfari er gjørd, og hvussu arbeitt hevur verið við innsavnaða tilfarinum.

Í kapitli 4 verður tekstslagið lýst.

Í kapitli 5 verða ymiskar ummælaratypur lýstar, sum skapa grundarlag undir viðgerðini av tí innsavnaða tilfarinum.

Kapittul 6 er ástøði um sjálvsmyndan, sum skapar grundarlag undir granskingarspurningunum í ritgerðini. Teir eru: Hvussu skapar ummælarin sær mentanarligan myndugleika í tekstinum, og hvussu pallsetir hann seg sjálvan í tekstinum.

Sjeyndi og longsti kapittulin er viðgerðin av innsavnaða tilfarinum. Hann er býttur í partar, sum eru skipaðir evnisliga, har tey 142 innsavnaðu ummælini verða viðgjørd og sett í ein samanhang. Fyrst verður søguliga baksýnið lýst, har víst verður á, hvussu tað føroyska ummælið sum tekstslag vaks fram. Miðlastøðan í tíðarskeiðinum 1997-2007 verður síðani lýst í stuttum. Kapittulin er annars skipaður út frá teimum evnum og rákum, sum settu dagsskránna í tí lýsta tíðarskeiðinum.

Tann fyrsti parturin viðger ummæli í útisetu í søguligum og samfelagsligum høpi. Við útisetu meinast dvøl føroyinga í Danmark, serliga Keypmannahavn, í styttri ella longri tíð. Ummæli í útisetu eru sostatt ummæli, sum útisetar og onnur skriva í útisetabløð og -tíðarrit, og ummæli, sum útisetar skriva í bløð og tíðarrit í Føroyum. Kannaða tíðarskeiðið 1997-2007 er blómaskeið í føroyskum útisetalívi, við tað at búskaparkreppan í Føroyum fyrst í 1990-árunum hevði fört við sær, at ein tíggjundapartur av føroyingum var fluttur av landinum. Útisetaummælararnir verða lýstir í hesum parti. Teir eru ymiskir í skrivistíli, men umboða fyrst og fremst tann akademiska ummælaran/bókmentafrøðingin.

Annar partur er skipaður við støði í einum lykilorði í ritgerðarheitinum, nevniliga „sjálvsmyndan“, skilt á tann hátt, at tað er pallsetingin av ummælaraeg-num, sum fyrst og fremst myndar henda partin. Her verður pallsetti ummælarin lýstur, og víst verður á, hvussu ummælarin skapar sær mentanarligan myndugleika við at pallseta seg sjálvan. Tað er fyrst og fremst rithøvundurin sum ummælari, ið myndar henda partin, og Carl Jóhan Jensen, sum kanska umboðar tað performativa rákið sterkast í hesum tíðarskeiði ikki bara við sínum ummælum, men eisini sínum skaldskapi, fyllir nógv í hesum parti.

Triði partur er skipaður út frá eygleiðing míni, at kvinnur, serliga av monnum, verða ummæltar út frá øðrum fyritreytum enn menn. Kyn spælir ein leiklut í fleiri av ummælunum í hesum tíðarskeiði, og spurningurin, um tað er maður ella kvinna, sum skrivar, hevur í summum førum avgerandi týdning fyri, hvussu ávísar útgávur verða fataðar og viðgjørdar. Við støði í hesari eygleiðing verður evnið „kvinnur verða ummæltar, og kvinnur ummæla“ tikið upp, eisini við tí í huga, at kvinnur frá byrjan ikki tóku lut í hesum virksemi, men í tíðarskeiðinum 1997-2007 hava fingið virkan og týðandi leiklut í føroyskum ummælaravirksemi. Ávís ummæli, sum leggja dent á kyn, verða greinað og samanborin, og tríggir teir virknastu kvinnuligu ummælararprofilarnir í hesum tíðarskeiði verða settir fram og viðgjørdir. Haraftrat verða trý ummæli, skrivað av kvinnum um kvinnur í *Kvinnutíðindi*, viðgjørd.

Seinast verður ummælið sum listaligur tekstur tematiserað við trimum dømum, har rithøvundar ummæla rithøvundar. Hesi ummæli verða sett fram sum dømi um ummæli, ið halda fram í teirri listaligu tilgongd, sum ummæltu tekstirnir byrjaðu. Ummælararnir brodera víðari upp á verkini í samspæli og samrøðu við verkið og rithøvundin sjálvan, og ummælini verða sett fram sum dømi um eitt høvuðsevni í ritgerðini, nevniliga ummælið sum listaligan tekst.

Í kapitli 8 lýsi eg, hvussu tey paradoksini, sum verða sett fram í kapitli 2, koma til sjóndar í tí viðgjørda tilfarinum.

Í kapitli 9 verður tikið saman um ritgerðina, og ein lýsing av teirri framtíðargransking, sum henda ritgerð vónandi kann leggja lunnar undir, verður sett fram.

Skilmarking av hugtøkum

Orðið *sjálvsmyndan*, sum er partur av heitinum á ritgerðini, er nær knýtt at enska hugtakinum „self-representation“, ið Roger D. Cherry, sum hevur undirvíst í retorikki við lærda háskúlan í Ohio, setir fram í greinini „Ethos Versus Persona. Self-Representation in Written Discourse“ (1998). Hugtakið verður nágreinað í kapitli 6.

Í greinini „Kritiker eller anmelder“ (1940) ger danski rithøvundurin og ummælarin Tom Kristensen (1893-1974) mun millum ummælarar og kritikarar. Í mínari viðgerð geri eg eins og donsku bókmentagranskararnir Thomas Bredsdorff (f. 1937), John Chr. Jørgensen (f. 1944) og Finn Klysner (f. 1949) ikki mun á ummælara og kritikara. Teir velja at kalla allan kritikk, sum verður skrivaður í bløðum og tíðarritum, kritikk, hóast teir gera vart við, at tað ofta verður gjørdur munur á kritikki sum tað sjálvstøðugt vegvísandi og ummælum sum tað ósjálvstøðugt tænandi ella terroriserandi (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:11).

Eg nýti fyri tað mesta orðið *ummæli* heldur enn orðið kritikk um teir tekstir, sum eru skrivaðir í bløð og tíðarrit, og *ummælarar* um tey, sum skriva í hesar miðlar. Við at nýta hesi orðini leggi eg í samsvari við býtið (Said 1983:1) hjá bókmentagranskaranum Edward Said (1935-2003) áherðslu á, at talan er um ein part av tí bókmentaliga kritikkinum, nevniliga tann partin, sum er í bløðum og tíðarritum. Tá eg nýti orðið *kritikkur*, kann tað vera sum samheiti fyri ummæli, men tað verður oftast nýtt við tí í huga, at ummæli bert er ein partur av bókmentaliga kritikkinum í bókmentastovninum. Ummæli er tí hyponym undir bókmentakritikki.

Í grannalondum okkara verða orðini nýtt hvørt um annað, og oftast verður orðið kritik/kritikk eisini nýtt um ummæli í bløðum og tíðarritum, burtursæð frá tá talan er um tekstir, sum snúgva seg um júst munin millum ummæli og kritikk. Hetta merkir, at eg vanliga umseti orðið *kritik/kritikk* til *ummæli*, men í ávísum førum, serliga tá ivi er, um høvundurin tosar um kritikk í breiðari høpi, nýti eg orðið *kritikk*. Tá Northrop Frye tosar um kritikk, leggur hann dent á, at hann meinar kritikk í breiðum høpi: „by criticism I mean the whole work of scholarship and taste concerned with literature which is part of what is variously called liberal education, culture, or the study of the humanities“ (Frye 1957/2000:3). Her hevði tað verið misvísandi at umsett *criticism* til *ummæli*, men tá eg t.d. umseti hugsanir úr *Norsk litteraturkritikks historie 1880-2010* (2016), sum snýr seg um ummæli í bløðum og tíðarritum, nýti eg orðið *ummæli*, har hon nýtir orðið kritikk.

Tá eg í greiningini av ummælum tosi um *impressionistisk ummæli*, er tað við støði í lýsingini av hugtakinum, sum bókmentafrøðingurin Uffe Andreasen (f. 1943) og rithøvundurin og bókmentaummælarin Mette Winge (f. 1937) seta fram. Impressionisma vísir her ikki til impressionistiskt háttalag sum eina skipaða impressionistiska lýsing av tí, sum ummælarin hevur upplivað í sínari lesing av tekstinum, men til drøg í einum ummæli, har ummælarin sigur lesaranum frá sínum upplivingum í lesingini av einum verki. Hetta kalla Andreasen og Winge impressionistisk ummæli. Tey eru í ætt við impressionistiskt háttalag, men eru ikki ein skipað impressionistisk greining av einum verki (Andreasen og Winge 1972:19-20). Eisini taki eg støði í tí, sum verður sagt um impressionistisk ummæli í *Gads Litteraturleksikon*, har tey verða lýst sum tað slagið av ummælum, sum endurgevur ummælarans reaktiónir og kensluligu inntrykk av einum verki. Dentur verður lagdur á spontan, subjektiv inntrykk fram um eina objektiva, greinandi tilgongd (*Gads Litteraturleksikon* 1999: 156). Í *The Concise Oxford Dictionary of Literary Terms* verður impressionistiskur kritikkur lýstur sum ein kritikkur, sum heldur seg til at lýsa kritikarans subjektiva aftursvar til eitt bókmentaligt verk heldur enn at vísa til góðskuna í sjálvum tí bókmentaliga verkinum út frá almennum meginreglum (Baldick 1990:108).

2. Granskingarøkið

Hesin parturin hevur til endamáls at staðseta mítt granskingarøki, sum liggur á markinum millum ymiskar fakligar siðvenjur, og at vísa á, hvønn leiklut ummælini hava í teirri samlaðu heildini, sum vit kalla bókmentastovnin. Endamálið er ikki at siga alt, sum er sagt um ummæli frammanundan, men við støði í evropeiskum og serliga norðurlendskum sjónarhorni at kasta ljós á hetta, sum heitið á ritgerðini vísir til, at tað er ein tilverutreyt hjá ummælinum at vera í verjustøðu, og at ummælarin aftur og aftur má prógva sín tilverurætt.

Fyrsti partur er stutt lýsing av upprunanum til bókmentaummælið í evropeiskum høpi.

Annar partur tekur útgangsstøði í norðurlendskari gransking á økinum, har tað serliga eru John Chr. Jørgensen (f. 1944) í Danmark, Sissel Furuseth (f. 1971) í Noregi og Auður Aðalsteinsdóttir (f. 1972) í Íslandi, sum verða tikin fram við teirri grundgeving, at tey standa á odda fyri granskingini í teimum nevndu londunum og umboða so ella so eisini ymiskar siðvenjur. John Chr. Jørgensen, sum skrivaði doktararitgerðina um danska ummælarasøgu *Det danske anmelderis historie* (1994) og hevur skrivað fleiri aðrar bøkur og greinar um ummæli bæði einsamallur og í samstarvi við onnur, hevur í fleiri av tekstum sínum eina journalistiska tilgongd til ummælaravirksemi. Sissel Furuseth, sum hevur leitt granskingarverkætlanina *Norsk*

litteraturkritikks historie 1870-2010[1] (2016), og eisini hevur skrivað annað, bæði bók og greinar, um ummæli, byggir lutvíst á John Chr. Jørgensen, men hevur eina breiða bókmentaliga og bókmentasosiologiska tilgongd t.d. í greinini, sum eg nýti sum grundarlag undir teimum lýstu paradoksunum í hesum kapitli. Í grannalondunum verður *Norsk litteraturkritikks historie 1870-2010* (2016) í dag mett at vera frammarlaga innan gransking av ummælum (Larsen, Svend Erik 2017, Forser 2019) og umrødd sum ein varði.[2] Auður Aðalsteinsdóttir, íslendskur bókmentagranskari, skrivaði doktararitgerð um íslendsk ummæli, *Bókmenntagagnrýni á almennavettvangi* (2016), ið kom út sama ár sum norska ummælarasøgan. Hon byggir í stóran mun sína tilgongd á evropeiska siðvenju, men eisini hon byggir á danska John Chr. Jørgensen. Ritgerðin hjá Auður Aðalsteinsdóttur finst enn bert á íslendskum, og tað avmarkar hennara útbreiðslu í Norðurlondum og eisini tann mun, hon vegna málsligar forðingar verður nýtt í hesari ritgerð.

Økið verður síðani við støði í ástøði hjá Sissel Furuseth sett upp sum eitt granskingarøki, sum er fylt við paradoksum. Eg lýsi tey fimm paradoksini, sum hon setir fram, og leggi fimm afturat, sum eg eri komin fram á í mínari gransking á økinum, soleiðis at granskingarøkið verður lýst við tíggju paradoksum.

Síðani lýsi eg umrøðuna um ummælið sum tekstslag og funktión ummælarans, sum hevur verið merkt av verjustøðu. Henda lýsing tekur útgangsstøði í ummælarum og ástøðingum, sum hava havt stóra ávirkan við tí, sum teir hava skrivað um ummælið og tess støðu og týdning í sínari samtíð. Greinin hjá Matthew Arnold (1822-1888) „The Function of Criticism at the Present Time“ (1865) er ein klassikari, sum við at seta orð á leiklutin hjá ummælaranum at eyðmerkja og hevja skaldskapin í samfelagnum hevur havt stóra ávirkan á tað, sum seinni er skrivað um ummælaran og hansara funktión. Aðrir ummælarar og granskarar hava tikið útgangsstøði í hesari grein, tá teir hava lýst støðu og funktión ummælisins í sínari samtíð, teirra

1 Ein verkætlan, sum í 2009-2015 fekk stuðul frá *Norges forskningsråd*, og sum kom út sum bók í 2016.

2 Víst verður til ráðstevnu í Danmark, har norska kritikksøgan verður sett fram sum fyrimynd, ið Danmark eigur at fylgja https://dansk-norsk.no/arrangementer/kritik (31.07.2019).

millum Northrop Frye (1912-1991), T.S. Eliot (1888-1965), Edward Said (1935-2003) og samtíðarmaður okkara Terry Eagleton (f. 1943). Hesin partur er í høvuðsheitum skipaður í tíðarrød, hóast tematisk innskot eru.

Til seinast verður ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi lýst. Hesin partur tekur útgangsstøði fyrst og fremst í teirri gransking, sum higartil er gjørd av ummælinum sum tekstslagi, men dregur eisini inn okkurt av tí, sum er sagt um ummælið sum slíkt í øðrum samanhangi, t.d. í ummælum. Hetta kann síggjast sum spírar til mína gransking, við tað at sera lítið er granskað á økinum frammanundan. Umrøðan er skipað í tíðarrød.

Upprunin til bókmentaummælið

Viðgerð av skrivaðum verkum hevur verið at finna í minsta lagi síðani Aristoteles, men ummælið sum tekstslag í dagbløðum og tíðarritum veksur ikki fram fyrr enn í 18. øld, tá eitt borgaraligt almenni[3] varð til og ein marknaður fyri tíðindamiðlan í tíðarritum og dagbløðum (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:7).

Tað er í hesum høpi, at tekstslagið skal síggjast: sum eitt tekstslag, borið í heim sum avleiðing av stríði móti einaveldisstatinum. Borgarastættin byrjar at skapa sær eitt serstakt diskursivt stað, har rationell meting og upplýstur kritikkur fær rúm heldur enn almennar yvirlýsingar frá autoriterum áskoðanum. Ein siðilig, upplýst almannahugsan roynir seg ímóti tilvildarligum valdsboðum frá einaveldinum, og tað eru ikki longur sosialt vald, framíhjárættindi og siðvenjur, sum skulu geva einstaklinginum rættin til at tosa og døma, men evnini at taka lut í kjaki og konsensus um alment vit og skil (Eagleton 1984/2005:9).

Undir hesum umstøðum, tá bløð og tíðarrit fyrst í átjandu øld vórðu borin í heim og skaptu ein pall til mentanarliga, sosiala og bókmentaliga samrøðu og kjak, varð tann modernaði ummælarin føddur. Bløðini og tíðarritini skaptu gróðrarbotn undir nýggjum non-fiktivum prosatekstslagi: tí bókmentaligu og politisku

3 Víst verður til Jürgen Habermas, sum setir orð á tað borgaraliga almennið í *Strukturwandel der Öffentlichkeit* (1962).

ritroyndini, og umstøður vórðu skaptar til professionalisering av ummælaravirkseminum. Við tað at miðalstættin nú kundi keypa sær list og fara til konsertir og sjónleik, var tørvur á professionellum smaksdómarum, sum kundu vegleiða brúkararnar um virðið í listini. Hesir ummælarar vóru hildnir at hava lykilin til eina djúpa fatan av virðinum, ta sonnu funktiónina og teir røttu teknikkirnar og formin í listini. Spurningur varð í hesari tíðini ikki settur við almenna virðið í list, ein tankagongd, sum gav endurljóð í heimspekiligu hugsanunum hjá Immanuel Kant (1724-1804), tá hann um somu tíð í *Kritik der Urteilskraft* (1790) setti fram ástøðið um „tað vakra" sum nakað, ið hevur alment gildi (McDonald 2007:53-57).

Í upplýsingarøldini kundi ummælið ikki verða skilt frá almenninum sum stovni; tað var partur av teirri almennu samrøðuni, tí almenna kjakinum í samfelagnum. Kritikkur kundi ikki sigast at vera privatur longur, við tað at ein og hvør dómur, sum sagdur varð út í ein almennan skara, mátti síggjast sum liður í roynd at sannføra og leggja upp til kjak (Eagleton 1984/2005:10).

Samstundis sum støða ummælarans var hevjað upp og kundi tykjast elitér, so bygdi smaksdómurin í ummælinum í upplýsingartíðini á vit og skil. Ein og hvør hevði í prinsippinum teir grundleggjandi førleikarnar at meta um bókmentir, hóast ikki øll vóru eins væl skikkað. Ein og hvør var tí í prinsippinum ummælari, eisini tann professionelli ummælarin, ið var at rokna sum talsmaður hjá tí upplýsta almenninum. Hann orðaði tankar, sum ein og hvør kundi havt hugsað (Eagleton 1984/2005:21).

Í hesum fyrsta tíðarskeiði var kritikkur kortini ikki professionellur eftir modernaðum hugsanarhátti. Ummælini høvdu ikki ein egnan diskurs, sum kundi skiljast frá áskoðanum á moral, mentan og átrúnað, eins og tey ikki kundu sigast at vera beinleiðis bókmentaligt aftursvar til bókmentir. Tey vóru *ad hoc* og impressionistisk og høvdu ikki fastan struktur. Kritikkur var fyrst og fremst mentanarligur og ikki bókmentaligur, og ummælarin var fyrst og fremst mentanarstrategur og ikki professionellur ummælari (Eagleton 1984/2005:18).

Tá Terry Eagleton, enskur bókmentaástøðingur og kritikari, samanber byrjanina til bókmentaummælið við funktiónina hjá ummælinum í dag, sigur hann, at ummælaravirksemið, ið byrjaði sum eitt stríð móti einaræðisstatinum, í dag er nakrir fáir einstaklingar, sum ummæla bøkurnar hjá hvørjum øðrum (Eagleton 1984/2005:107), og hann ger soleiðis mun á umstøðunum, sum ummælini hava at virka undir, í upplýsingarøldini og í dagsins samfelagi, har ummælaravirksemið hevur loyst seg frá tí politiska og samfelagsliga jørðildi, sum var tess tilverutreyt (Eagleton 1984/2005:108).

Ummælið veksur soleiðis fram bæði politiskt sum partur av upplýsingarstevnuni, har kritikkur í breiðum høpi er amboð, og orsakað av einum marknaði, har kritikarin hevur ein leiklut í útbreiðsluni av bókmentum.

Bókmentaummælið sum granskingarøki

Ummælið sum tekstslag hevur havt skiftandi kor í skiftandi mentanarligum, politiskum og miðlasøguligum umstøðum upp gjøgnum tíðirnar, men søgan hjá ummælinum er ein higartil rættiliga tigandi parallellsøga hjá bókmentasøguni skilt á tann hátt, at hon ikki er lýst eins og bókmentasøgan er lýst, bæði í Føroyum og í stóran mun í londunum rundan um okkum. Í 1982 skrivar Ástráður Eysteinsson (f. 1957), íslendskur bókmentagranskari, í grein um íslendsk ummæli í bløðum, at hóast nógv er skrivað um bókmentakritikk í síni heild, er lítið skrivað um ummæli í dagbløðunum (Eysteinsson 1982), og ikki fyrr enn í 2016 kom doktararitgerðin hjá Auður Aðalsteinsdóttur um íslendsk ummæli, har søgan hjá íslendska ummælinum fyrstu ferð verður søgd í akademiskum høpi. Ein norsk kritikksøga kom út í 1990 og ein donsk í 1994, men tá seinasta íkastið til granskingarøkið í Norðurlondum, *Norsk litteraturkritikkhistorie 1870-2010*, sum bókmentagranskararnir Sissel Furuseth, Eirik Vassenden (f. 1971) og Jahn Holljen Thon (1946-2018) góvu út í 2016, kom, skapti tað røring, og í ummæli av bókini ber Svend Erik Larsen, professari í bókmentum á Århus universiteti, fram øvund og samstundis eina vón um, at henda bók kann fáa gongd á eina líknandi danska verkætlan. Hann kallar bókina eitt nýtiligt og slitsterkt pionerarbeiði, sum hann fegin vildi varð fört víðari til Danmarkar (Larsen, Svend Erik 2017). Áðurnevndi svenski professarin í bókmentum Tomas Forser, sum er ummælari og hevur skrivað um svenskan bókmentakritikk, sigur í ummæli av

hesari somu bókini, at verkætlanin er eitt bragd, og at Danmark og Svøríki eru ikki gávað við nøkrum, sum líkist hesum (Forser 2019).

Áðurnevndi norski bókmentagranskarin Sissel Furuseth, sum leiddi granskingarverkætlanina *Norsk Litteraturkritikks Historie 1870-2010*, og sum granskar og undirvísir í bókmentaummælum á universitetinum í Oslo, vísir á, hvussu ymiskar siðvenjurnar hava verið í Danmark og Noregi, tá tað kemur til at viðgera ummælið sum tekstslag. Har siðvenjan í stóran mun í Noregi hevur verið at síggja ummælini sum ein part av bókmentunum og at granska tey í ljósinum av bókmentaheiminum, hevur siðvenjan í Danmark í nógv størri mun verið at viðgera tey sum ein part av mentanarjournalistikkinum í samfelagnum (Furuseth 2013:143-144).

Í Danmark er John Chr. Jørgensen undangongumaður innan gransking av ummælum. Hann hevur í stóran mun definerað viðgerðina av ummælum í tí danska bókmentastovninum, og hann hevur, sum eg havi víst á, havt ávirkan á tað, sum seinni er skrivað um evnið í Norðurlondum.

Sum granskingarøki kann bókmentaummælið flokkast í skurðpunktinum millum fleiri siðvenjur, og Sissel Furuseth setir ummælini upp millum bókmentir, miðlar og universitetsheim við gráum økjum, har hesar siðvenjur møtast (Furuseth 2013:148).

Ummælið verður vanliga fatað sum ein yrkisbókmentaligur tekstur, sum kann lesast og granskast úr normativum sjónarhorni, retoriskt, miðlasøguliga og stovnsliga (institutionelt), og hetta er eisini tað, sum granskaratoymið aftan fyri granskingarverkætlanina, sum gav bókina *Norsk litteraturkritikkshistorie 1870-2010* út í 2016, sambært høvuddunum setti sær fyri at gera (Furuseth og Vassenden 2016:20).

Áðurnevnda Auður Aðalsteinsdóttir, íslendskur granskari, lýsir í doktararitgerðini ummælini sum part av blaðsøguni og ger greitt, at amboð úr bókmentafrøðini ikki einsamøll kunnu greina sereyðkennini hjá ummælinum, men leitast má til fjølmiðlafrøðina og tann partin av mentanarfrøði, sum fæst við virksemið hjá fjølmiðlum (Aðalsteinsdóttir 2016:5).

Ummælið er tekstslag, sum á serligan hátt er treytað av øðrum

tekstsløgum. Tað er ein av fleiri leikarum (aktørum) á bókmentapallinum og er treytað av samspælinum millum hesar leikarar. Komið verður til hesa serligu støðu ummælisins í fjórða kapitli, sum snýr seg um ummælið sum tekstslag.

Paradoks í bókmentaummælinum sum granskingarøki

Granskingarøkið er samansett sosiologiskt fyribrigdi og er merkt av einari rød av paradoksum, sum eyðkenna tað. Sissel Furuseth lýsir bókmentaummælið sum granskingarøki við at seta tað upp sum fimm paradoks (Furuseth 2013:141-144):

1. Bókmentaummæli verða ofta søgd at vera tekstir, sum eru skaptir í einari eliterari mentan, men sum røkka út til ein breiðan lesaraskara. Fleiri av dagsins høvundum kenna tó neyvan hesa fatan aftur, men halda, at ummæli júst eru skrivað í einum tabloidum miðlaveruleika, har ummælisgenrurnar ikki hava høga tign, men eru skrivaðar á klisjéfyltum máli, langt frá á hædd við tað bókmentaliga verkið, sum verður ummælt ella svarar til lesarans bókmentaliga kapital.

2. Ummælið er bæði ein partur av framleiðsluni og av móttøkuni í teirri bókmentaligu ringrásini. Ummælarin er bæði móttakari og framleiðari í teirri bókmentasosiologisku gongdini. Hann er móttakari og orðar fyrst og fremst egnar lesiupplivingar, og hansara útsøgn er aftursvar til annað verk, sum verður mett at vera tann primeri teksturin. Men ein góður ummælari er eisini framleiðari av teksti, ein aktivt skapandi vera í bókmentaheiminum, hann hevur vald at skilmarka og er ígongdsetari og polemikari, sum hevur ávirkan á tað mentanarliga orðaskiftið og eisini á framtíðar skapan av kanon. Sambært økisástøðinum hjá Pierre Bourdieu er hann viðskapari í teirri bókmentaligu framleiðsluni av tí sosiala virðinum í listini.

3. Ein sosiologiskt tilvitaður granskari má taka støðu bæði til ummælið sum abstrakta virðisskipan og sum ítøkiligar manifestatiónir. Tað er ein avbjóðing at halda fast við bæði tað

evnisliga og tað hugsjónarliga stigið; bæði tað serstaka og tað yvirskipaða, tað einstaka dømið og kontekstin, at síggja kritikkin í samfelagnum og samfelagið í kritikkinum. Her eru nógv fyrilit at taka, sum hava við framleiðara og móttakara at gera; tilvitið um hvat slag av ummælara talan er um, hvørjum netverki hann er partur av, hvørjir yvirskipaðir normar og virði liggja sum grundarlag undir tí einstaka tekstinum, hvat verður ummælt, og hvat ikki verður ummælt o.s.fr. Fyri at skilja yvirskipaðu skipanirnar, sum ummælið er partur av, eru ástøðingar gjøgnum tíðirnar komnir við ymiskum amboðum: Weber, Habermas, Sennet, Luhmann og Bourdieu hava birt ástøði um almennið, stovnarnar, økisástøðið, ástøðið um ringrásina – ymiskar makrogreiningar, sum skapa rúmið, ið ummælini og bókmentirnar virka í.

4. Sum framhald av triðja paradoksi má eisini verða minst til, at tað er bæði ein fjaldur kritikkur og ein opin. Ikki allur kritikkur verður skrivaður í bløð og tíðarrit. Eitt óformligt ummælaravirksemi gongur fyri seg í øllum liðum í bókmentastovninum, frá sjálvkritikkinum hjá høvundinum, meðan hann skrivar út frá afturmeldingum frá ritstjórum og vinum, og til ummælararnar, sum skriva í bløð og tíðarrit. Í øllum øðrum liðum fara tó eisini metingar fram, t.d. í innkeypi av bókum til bókasøvnini, í pensumlistum, hjá dómsnevndum, festivalfyriskiparum, granskarum, kanoniseringarmyndugleikum, bókmentasøguhøvundum o.s.fr.. Hóast nógv av hesum er skrivligt, er tað ikki partur av tí útgivna almenna regluliga ummælaravirkseminum.

5. Nakað av tí, sum ger tað avbjóðandi at granska ummæli, er, at tey líka gjarna kunnu hava eitt miðlasosiologiskt perspektiv sum eitt bókmentasosiologiskt perspektiv. Í Danmark og Svøríki hevur tað verið siðvenja at skoða ummælið sum journalistiskan tekst, meðan tað í Noregi hevur verið ein tendensur til at viðgera ummæli sum minni miðlaserstakt og at taka bæði ritroyndir, ritgerðir, kjakgreinar og keipuyrkingar við í ummælishugtakið, samstundis sum tað tá fyrst og fremst verður sæð sum bókmentasøguligt keldutilfar.

Hesi paradoksini, sum Sissel Furuseth greiðir frá, lýsa við fáum orðum nakað av tí, sum ein, ið granskar ummæli, má hava í huga. Tey lýsa andsøgnina í, at ummæli eru elitér, samstundis sum tey hava lága tign, tey eru móttakarar og framleiðarar um somu tíð, tey eru serstøk útsøgn, sum tó umboðar eina yvirskipaða hugsjón um bókmentir, tey eru opinlýs, men liggja eisini fjald í útbúgvingarskipanini, bókmentunum og øllum tí, sum verður sagt millum fólk um bókmentir, og tey eru partur av miðlasøguni og bókmentasøguni samstundis.

Aftur at hesum fimm paradoksunum, leggi eg út frá egnum eygleiðingum av granskingarøkinum eina rað av paradoksum fram. Hesi eru ikki á listanum hjá Sissel Furuseth, men eru eisini viðurskifti, sum tann, ið granskar ummæli, eigur at hava í huga:

6. Ummælið leggur seg eftir objektivum metingarkriterium, men samstundis er tað eitt av høvuðseyðkennunum hjá ummælinum sum tekstslag, at tað hevur eina meting av bókmentum í sær og er per definitión subjektivt.

7. Ummælið hevur lága tign í bókmentastovninum, men er kanska tann parturin av bókmentakritikkinum, sum hevur størstu beinleiðis ávirkanina á sølu og útbreiðslu av bókmentum. Ummælarar virka ofta óbeinleiðis sum duravørðar í bókmentaliga stovninum.

8. Ummælini endursiga ein annan tekst, men siga samstundis okkurt nýtt; okkurt, sum ikki er sagt áður. Hetta paradoksið vísir franski heimspekingurin Michel Foucault (1926-1984) á, tá hann sigur um tann greinandi tekstin:

> whatever the techniques employed, commentary's only role is to say *finally* what has silently been articulated *deep down*. It must – and the paradox is ever-changing yet inescapable – say, for the first time, what has already

been said, and repeat tirelessly what was, nevertheless, never said (Foucault 1970/1972:21).

9. Bókaummælið er bæði yrkistekstur, sum miðlar listina, og ein listaligur tekstur í sjálvum sær. Tað er óloysiliga tongt at tí fagra tekstinum, men er samstundis sjálvstøðugur listaligur tekstur.

10. Sum framhald av níggjunda paradoksi liggur í stríðnum fyri at professionalisera ummælaravirksemi sum egið sjálvstøðugt virksemi eisini eitt paradoks í royndini at avmarka røddirnar, sum kunnu hava sína meining í tí bókmentaliga almenninum, til tær professionellu. Grundarlagið verður máað undan kritikkinum og teirri siðvenjuni, sum hann er sprottin úr og er eitt úrslit av, nevniliga upplýsingarstevnuni, sum vann fram í 18. øld, og farið verður beint ímóti tí ideali, sum Habermas setti fram, tá hann lýsti tað kritiska almennið sum ein stovn við myndugum leikmonnum.[4]

Tvey tey seinastu paradoksini, sum eg vísi á – níggjunda og tíggjunda paradoks – eru grundarlag undir tí, sum lutvíst eru ørindini í hesari ritgerð, nevniliga:

1. Fyri tað fyrsta at viðgera ummælið sum samansett tekstslag, men samstundis at grundgeva fyri tí sum einum listaligum/bókmentaligum tekstslagi,

2. og fyri tað annað at vísa á ta lágu tign, sum ummælini hava í universitetsheiminum, men samstundis at leggja fram gransking av ummælinum sum lið í einari uppraðfesting av ummælinum sum tekstslag og sum granskingarøki.

4 Hetta seinast nevnda paradoksið verður í norskum høpi lýst sum ein møgulig avleiðing av arbeiðinum hjá Kritikerlaget við at professionalisera kritikkin (Furuseth 2016c: 334-335).

At ørindini í mínari verkætlan júst verða lýst sum paradoks, stendur sum ein áhaldandi áminning um, at granskingarøkið ikki er svart/hvítt. At tað ongantíð verður so, at ummælið bara er list og tí ikki miðlan av list – tað er bæði miðlan av list og kann vera list í sjálvum sær. Paradoksini eru eisini ein áminning um, at í stríðnum fyri at professionalisera ummælaravirksemið verður samstundis arbeitt ímóti idealinum um tað fría orðaskiftið, sum kritikkurin í einum samfelag sprettur úr, har øll kunnu hava sína hugsan í tí almenna rúminum. Hetta er eitt kjakevni, sum er nógv frammi í dag, tá tosað verður um nýggjar miðlar og ta demokratisering, sum fer fram við tað, at øll kunnu siga sína hugsan, samstundis sum professionelli ummælarin verður hildin at missa sína tign og sín sjálvsagda myndugleika sum smaksdómari.[5]

Ummælarin í verjustøðu – kreppa ella tilverutreyt?

Í hesum partinum komi eg inn á áðurnevndu kreppuna, sum kritikkurin verður sagdur at vera í, við einum søguligum yvirliti, sum vísir, at tað ikki er ein nýggjur tanki, at ummælið er í kreppustøðu, og ummælarin tí má verja sín tilverurætt.

Í 2007 kom bók út eftir írska bókmentagranskaran Rónán McDonald (f. 1970) við heitinum *The Death of the Critic*, har hann dramatiskt vísir á, at ummælarin, sum vit kenna hann, liggur á deyðastrá. Á permuni á bókini liggur hann niðurstungin á gøtuni. McDonald sigur orsakirnar til deyða ummælarans vera nógvar, men at ein av teimum er tað, sum hendi í kjalarvørrinum av greinini hjá Ronald Barthes „The Death of the Author“ (1967), har hann grundgav móti siðbundnum bókmentakritikki, sum dró ætlanir og ævisøgu høvundsins inn í teksttulkingina, og í staðin talaði fyri, at skrivingin og høvundurin eru óskyld. At høvundurin var deyður merkti, at lesarin varð føddur. Føðing lesarans, sigur McDonald, merkti í stóran mun eisini deyða ummælarans, í øllum førum er tann almenni intellektuelli figururin, sum ein breiður almenningur hyggur upp til sum ein vegleiðara fyri virðisdóminum av einum listaverki,

5 Komið verður nærri inn á hetta í næsta broti.

deyður. Øll eru nú meira og minni ummælarar og kunnu siga sína hugsan um list, og ein hugsan er eins góð og onnur (McDonald 2007:2-4).

Kanska er ummælið sum tekstslag í kreppu sum ongantíð fyrr og ummælarin í vanda fyri at doyggja. Men Rónán McDonald kemur eisini inn á, at hóast umstøðurnar hjá ummælinum skifta, og tann professionelli ummælarin er hóttur av broyttari miðlastøðu, so er tað ikki nakað nýtt at síggja ummælaran sum „inconsequential, secondary and even disreputable, falling short of an honest day's work" (McDonald 2007:8), sum týdningarleysan, illa gitnan og ein, ið ikki er verdur løn sína.

Danski ummælarin Henning Kehler (1891-1979) segði í 1932 speiskliga í røðuni „En Kritikers Bekendelser" soleiðis um deyða ummælisins í Danmark:

> Som bekendt er Litteraturkritikken i Danmark død. Der er kun Tvivl om, naar den døde? Oprindelig blev den vistnok lagt i Graven sammen med Johan Ludvig Heiberg. Saa drog den sit uigenkaldelig sidste Suk med Georg Brandes. Men allerede et Par Aar efter døde den igen...
>
> Men ikke blot ved festlige Lejligheder. Naar en Kritiker nedlægger Pennen for stedse, ringer Kritikkens Dødsklokker. Der gaar næppe en Uge Aaret rundt, hvor ikke en eller anden Dame eller Herre fortæller, at den danske Kritik er død – simsaladimbumbasaladusaladim ... Død Mand bider ikke! siger et gammelt Ord. De forhippede Nekrologer maa vække Mistanke om, at Kritikken er meget mere levende, end de, som staar og lader, som om de skovler Jord paa dens Kiste, skøtter om (Kehler 1932:158).

Lýsingin av ummælaranum á deyðastrá er eitt fyribrigdi, sum eisini sæst aftur í tí, sum er skrivað um ummæli gjøgnum tíðina við, at tað, sum verður sagt um ummælini, ofta er orðað sum eitt slag av verju fyri kritikkin ella við teirri dagsskrá at endurreisa hann, tí hann antin er í vanda fyri at missa ella verður hildin at hava mist sín týdningarmikla leiklut í samfelagnum. Hetta er ein staðfesting av støðuni hjá kritikkinum, ið tykist hava havt tað sum eina tilverutreyt altíð at skula grundgeva fyri sínari tilveru og støðugt vera í verjustøðu.

Matthew Arnold (1822-1888), enskur bókmentakritikari og rithøvundur, slær í síni innan økið ikonisku og nógv siteraðu grein „The Function of Criticism at the Present Time" (1865) fast, at semja er um, at kritikkur hevur lægri virði enn nýskapan; hann heldur fram:

> Everybody, too, would be willing to admit, as a general proposition, that the critical faculty is lower than the inventive. But is it true that criticism is really, in itself, a baneful and injurious employment; is it true that all time given to writing critiques on the works of others would be much better employed if it were given to original composition, of whatever kind this may be? (Arnold 1865/1989:500)

Hann nýtir eisini orðini: „the critical power is at a lower rank than the creative" (Arnold 1989:500), t.e. „tann kritiska megin hevur lægri tign enn tann skapandi", men hóast tann hægsta funktiónin hjá menniskjanum er tann kreativa, sigur hann, at tað ber til at nýta tann frælsa kreativitetin á annan hátt enn bara við at yrkja ella skapa list. Kritikarin hevur sambært Arnold eina týðandi uppgávu í samfelagnum. Tað er hansara skylda at sannføra almenningin um sannleikan og ta høgu mentanina og ongantíð bert fylgja streyminum í samfelagnum. Kritikarin er partleysur, og tað er hansara uppgáva at veita trygd fyri, at tær bestu hugmyndirnar eru við yvirlutan í samfelagnum og soleiðis tryggja, at tað er tað besta, sum verður ført víðari frá einum ættarliði til annað (Arnold 1865/1989). Greinin hjá Arnold kann síggjast sum eitt slag av verjurøðu fyri kritikkinum, har kritikarin verður hevjaður upp á sama stig sum rithøvundurin.

Mentanar- og bókmentagranskarin, palestinin Edward Said (1935-2003), professari við Columbia universitet í New York, setir spurnartekin við, hvussu ein, sum er partur av einari mentan, yvirhøvur kann vera partleysur, hevja seg upp um hana og koma við nøkrum, sum er meira enn bara ein játtan og tilsøgn til eina semju, sum longu er (Said 1983:24). Altso krevst sambært Said nakað heilt serstakt av kritikaranum. Kanska ber ikki til at røkka tí idealinum, sum Matthew

Arnold setir fram. Kanska er talan um eina ómøguliga uppgávu at kritisera í einum samfelag, sum kritikarin er partur av sjálvur. Hetta førir Said fram og nevnir týska bókmentakritikaran, jødan Erich Auerbach (1892-1957), sum flýggjaði úr nasistiska Evropa undir krígnum, skrivaði í Istanbul, og eins og Said sjálvur skrivaði í útlegd, í fjarstøðu frá teirri mentan, sum hann kritiseraði – og hetta lýsir Said sum kanska einastu støðuna, har kritikarin veruliga hevur møguleika at fremja idealið um tann sanna kritikaran, sum er partleysur og kann hevja seg upp um tilsagnir og semjur í einum samfelag í sínari samtíð (Said 1983:5-10). Lýsingin hjá Said av ummælaranum kann síggjast sum ein orsøk til, at kritikarin aftur og aftur má verja sína støðu. Hann hevur eina sera torføra og kanska ómøguliga uppgávu. Loysnin hjá Said er fjarstøðan. Í føroyskum høpi eru hesar hugsanirnar hjá Said áhugaverdar serliga við tí í huga, at nógvir av teimum føroysku ummælarunum hava verið virknastir sum ummælarar, tá teir hava lisið og búð uttanlands. Í ritgerðini komi eg aftur til hesar hugsanir, tá eg í viðgerðini seti fram ummælandi útisetar í Keypmannahavn í tíðarskeiðinum 1997-2007 og seti spurningin, um tað kann hugsast, at teir hava betri møguleikar óheft at meta um føroyskar bókmentir enn ummælarar, sum eru í Føroyum.

Kanadiski bókmentakritikarin og -ástøðingurin Northrop Frye (1912-1991), sum hevði stóra ávirkan á bókmentagranskingina í 20. øld, skrivaði í 1957 upp ímóti Matthew Arnold í grein við sama heiti sum tann, ið Arnold hevði skrivað næstan hundrað ár frammanundan, „The Function of Criticism at the Present Time“. Frye setir spurningin, hvat tað er, sum rættvísger kritikk. Endamálið er sostatt framvegis ein roynd at lýsa funktiónina hjá kritikaranum, og tað verður eins og í greinini hjá Arnold gjørt við einum slagi av verjurøðu fyri kritikkin. Northrop Frye setir kritikkin fram sum vísindi og ber saman við náttúruvísindi, og tað er týðiligt, at hesi vísindi hava ein trupulleika, tí tey mangla eina hugtaksrammu, sum kritikkurin kann arbeiða útfrá. Bókmentaligi kritikkurin hevur tørv á at lyfta seg upp á eitt stig, har hann kann finna útav, hvat tað er, sum skal skipa hesa hugtaksrammu. Funktiónin hjá kritikkinum beint nú er tí, sigur Frye í 1957, at byrja tilgongdina at skipa eina rammu.

Sambært Frye syrgir kritikkurin fyri, at listin ikki fellur antin í ta grøvina at royna at toknast populerlistini ella hinvegin at verða sædd sum mystisk. Leikluturin hjá kritikaranum verður at syrgja fyri, at bókmentir ikki verða ein loyniligur felagsskapur, ið bert er ætlaður teimum innvígdu, sum duga at týða málið í torskiltum yrkingum.

Sambært Frye er hetta júst sereyðkennið hjá kritikkinum – tað, sum kritikkurin kann, sum listin ikki kann. Sereyðkennið hjá kritikkinum er, at hann kann tala, meðan øll list er málleys. Tað ljóðar sum ein andsøgn, sigur hann, at tað bókmentaliga verkið er málleyst, og tað kundi hóskað betur at sagt um myndlist og kanska um tónleik, men ikki um eitt bókmentaligt verk, sum er skapt av orðum. Men bókmentaliga verkið er fyri kritikaran eins og dátur í vísindum; dátur, ið eru ljóðleys fakta. Høvundurin tosar jú ikki beinleiðis til ein lesara – og tá hann ger tað, vísir hann lesaranum (og kritikaranum) misálit, tá tað kemur til førleikar at tulka merking í tekstinum uttan hjálp, og tá er hann hildin uppat at yrkja og er byrjaður at tosa.

Frye leggur upp til, at kritikarin hevur eitt serstakt øki at virka á, og tí má kritikkurin fáast við bókmentir innan fyri ein serstakan karm, sum vísir til síni egnu hugtøk. Kritikkurin skal vera sjálvstøðugur og ikki bert miðil frá høvundi til almenning – ein funktión, sum hann annars eisini nevnir sum eina av sjálvsøgdu funktiónunum hjá kritikkinum (Frye 1957/1989).

Verjurøðan hjá Northrop Frye fyri kritikkinum hevur sostatt til endamáls at vísa á tað, sum er ummælarans sermerkta uppgáva fyri á tann hátt at orða tilverugrundarlagið hjá kritikaranum og rættvísgera hann. Frye leggur upp til eina professionaliseringartilgongd, har ein felags hugtaksramma verður skapað, so bókmentaummælaravirksemi kann metast javnt við onnur vísindi.

T.S. Eliot (1888-1965), enskur/amerikanskur rithøvundur og bókmentakritikari, sigur í 1961 soleiðis um tørvin á at seta orð á tað umráðandi í at lýsa funktiónina og týdningin hjá bókmentakritikkinum: „Of what use, or uses, is literary criticism, is a question worth asking again and again, even if we find no answer satisfactory“ (Eliot 1961/1965:11). Við øðrum orðum er neyðugt, at vit aftur og aftur seta spurnartekin við leiklutin hjá bókmentakritikkinum, hóast vit møguliga ongantíð verða nøgd við svarið.

Eitt av endamálunum við tekstunum hjá Arnold, Said, Frye og

Eliot, sum snúgva seg um funktiónina hjá kritikaranum og bókmentakritikkinum í samtíðini, er at seta orð á sereyðkennini hjá kritikkinum í einari roynd at lyfta kritikkin upp, tí hann so ella so er hóttur og má verja sín leiklut í bókmentastovninum og samfelagnum sum heild. Og tá Terry Eagleton í 1984 aftur sær tørv á at lýsa funktiónina hjá kritikkinum, og við bókini *The Function of Criticism* enn eina ferð letur greinina hjá Matthew Arnold ekkóa, er tað við grundgevingini: „Criticism today lacks all substantive social function. It is either part of the public relations branch of the literary industry, or a matter wholly internal to the academies" (Eagleton 1984/2005:7). Við øðrum orðum vantar kritikkinum sambært Eagleton eina grundleggjandi funktión í samfelagnum. Hann vísir á, at tað hevur ikki altíð verið so og sigur, at skal kritikkurin hava nakra framtíð, so má hann finna aftur til sín upprunaliga leiklut og ikki uppfinna eina nýggja útgávu av honum (Eagleton 1984/2005:123). Svarið hjá Eagleton liggur sostatt í at leita aftur til upprunan hjá kritikkinum; upprunan, sum eg – fyri ein stóran part við støði í bókini hjá Eagleton sjálvum – havi lýst í hesum kapitli, har ummælið ikki var skilt frá almenninum sum stovni, men var partur av tí almenna kjakinum í samfelagnum (Eagleton 1984/2005:10), har smaksdómurin bygdi á vit og skil, og tann professionelli ummælarin var at rokna sum talsmaður hjá einum upplýstum almenni (Eagleton 1984/2005:21).

Í greinini „Resisting the Dangerous Journey: The Crisis of Journalistic Criticism" frá 1995 skrivar Michael Brenson (f. 1942), amerikanskur listasøgufrøðingur, ummælari og kurator, at journalistiski kritikkurin er í kreppu, og hetta sæst aftur í, at so nógv er ósagt bæði á ummælaraøkinum og rundan um tað. Hann tosar um, at mangan verður nógv sagt privat, men ikki alment, og hann tosar um, at ummælaravirksemi ikki hevur verið mett sum nakað serligt og heldur ikki hevur verið sæð sum vert nakra serliga umrøðu í tí akademiska heiminum. Eisini á sjálvum økinum eru krepputekin eitt nú við, at eingin ummælari vil *bara* vera ummælari, men vil fyrst og fremst vera kendur sum t.d. rithøvundur ella okkurt annað, sum er hægri í metum enn at skriva ummæli í bløðum. Hann nevnir sína grein „Resisting the Dangerous Journey" og sigur við hesum, at tað er torført at skriva ummæli í bløðunum av fleiri ymiskum orsøkum millum annað eisini hesari, at tað ikki er høgt í metum, og tað er onkursvegna eisini vandafult. Hann sigur, at tað, at tað valdar ein slík tøgn rundan um ummælaravirksemið, og at tað tykist slíkur vandi at skriva ummæli, er júst ein ábending um, hvussu týdningarmikið tað er (Brenson 1998).

Eisini svenski bókmentafrøðingurin og kritikarin Horace Engdahl (f. 1948) tosar um veikleikar í ummælaravirkseminum í dag. Hann vísir á, at leikluturin, sum ummælarin hevur tikið á seg, er ein meinbogi fyri ummælaravirksemið. Í greinini „Kritikken og dens dobbeltgænger" sigur hann:

> Hvis man tøver med at reflektere over kritikken, er det, fordi den skikkelse, der først fremtræder, når man betragter kritikerens rolle i bøgernes verden, er så lidet værdig: et halvvejs modvilligt mellemled mellem forfatter og publikum, en mægler på den litterære rygtebørs (Engdahl 2014:126).

Horace Engdahl vísir á, at kritikkurin í einari roynd at yvirliva hevur valt at geva seg undir onnur endamál enn tað hjá bókmentunum; til tey menniskjaligu virðini, til mentanina. Hann sigur ikki bara, um ein bók er góð, men eisini hvat hon er góð fyri og vendir sær soleiðis til tørvirnar hjá menniskjum, sum bókmentirnar kanska júst er skrivaðar fyri at yvirvinna (Engdahl 2014:126-127).

Í samrøðu við danska bókmentafrøðingin og táverandi lektara á lærda háskúlanum í Keypmannahavn Marianne Stidsen (f. 1962) sigur Engdahl, at kritikkurin má virka uttan fortreytir (Stidsen 2018:32), uttan tankan um fortreytina fyri ummælini, sum er, at dagblaðið rindar honum fyri at siga lesaranum, um hann skal keypa eina bók ella ikki. Her setir Engdahl enn eitt ideal fram fyri ummælaran, nevniliga, at bert tá hann er leysur av øðrum endamálum enn teimum hjá bókmentunum sjálvum, kemur hansara funktión til sjóndar. Og tá henda funktión ikki er til staðar, er ummælarin ikki sína uppgávu verdur.

Í útsagnunum hjá Engdahl hómast sostatt eisini ein fatan av tí mynduga og professionella ummælaranum í upploysn, og við ávístu dømunum um tørvin á at verja sína støðu, ber til at siga, at hóast

nógv verður tosað um kreppu í kritikkinum, er kanska rættari at siga, at talan er um eina tilverutreyt hjá kritikkinum at vera í verjustøðu.

Tá tosað verður, sum Rónán McDonald ger, um *kritikaradeyðan* á okkara døgum, er tað tí ikki ein nýggjur, óhoyrdur trupulleiki. Men hevur kritikkurin fyrr havt tørv á at staðfesta sín rætt og verja sína støðu, so hevur hann tað kanska ikki minni í dag. Amerikanski bókmentagranskarin Rita Felski (f. 1956) knýtir kreppuna í tí almenna kritikkinum at teirri kreppustøðu, sum hugvísindini eru í í dag, og vísir á, at tørvur er á nýhugsan í bókmentakritikki. Kreppan er ein avleiðing av, at hugvísindini eru undir trýsti og hava tørv á at verja seg sum lærugreina- og granskingarøki. Kritikkinum vantar orð at verja seg við (Felski 2015:1-13). Aftrat hesum hevur nýggja og broytta miðlastøðan havt ávirkan á umstøðurnar hjá kritikkinum, soleiðis at hansara annars sjálvsagdi pallur, bløðini og tíðarritini, ikki longur í sama mun hýsa honum. Hóast tað eisini hevur verið ymiskt gjøgnum tíðirnar, í hvussu stóran mun ummælini hava fingið innivist í bløðum og tíðarritum, so er kritikkurin í dag kanska í dupultari, ja enntá trídupultari verjustøðu. Tað er fyri tað fyrsta ein tilverutreyt hjá kritikaranum at vera í verjustøðu. Fyri tað annað skal hann verja sína tilveru í einum samfelag, sum ikki í eins stóran mun og áður lítur á myndugleikar, og fyri tað triðja verður hann noyddur at finna sær nýggjar vegir út til móttakaran vegna broyttu miðlastøðuna.

Í 2007 skrivar Mikkel Bruun Zangenberg (f. 1968), bókmentafrøðingur og ummælari, soleiðis um ummælarastøðuna í Danmark:

> Der hersker for tiden i Danmark en regulær krise for den litterære kritik. Det er i det mindste min påstand og mit forslag, om end der hersker uenighed om en præcis diagnose for patienten. Er problemet kritikerne selv, der er for subjektive og selviscenesættende, eller bare kedsommeligt refererende og pligtskyldigt vurderende „dette værk er godt/dårligt/mådeligt“ etc) [sic]? Er det litteratur- og kulturredaktørerne, der på en uheldig måde forvalter det de mener er hver enkelt avis' læserskares behov – i en lemfældig form for populisme, der indirekte påvirker dagbladenes kritikere til at skrive i en særlig tonart? Eller er der tværtimod tale om, at selve grunden under den litterære kritik, nemlig en særlig offentligheds-form, der hidrører fra Europa i 1700-tallet, er ved at gå i opløsning? (Zangenberg 2007).

Zangenberg setir spurnartekin við, um tað borgaraliga almennið er í ferð við at fara í upploysn, og hann metir, at ein av teimum stóru trupulleikunum, sum kritikkurin hevur at dragast við, er skilnaðurin millum tað akademiska og tað „vanliga“, millum elitu og populermentan:

> Kritikken synes nu om dage at være spændt ud mellem to ekstreme yderpoler: de små eksklusive tidsskrifter og den rent akademiske kritik på den ene side; og på den anden side dagbladskritikken, og særlig den nytilkomne af slagsen, nemlig såkaldt „almindelige læsere“ der i gratisaviser som „Metro-Express“ og „Urban“ opfordres til selv spontant at kommentere denne og hin bog. Meget hårdt trukket op, får vi da en klassisk dualisme mellem forfinet elite-kultur og en fladpandet populær-kultur, hvor litteraturen bliver klemt og falder ned mellem to stole: spærret inde mellem det for iltfattigt eksklusive og det for bralrende spontane og uvidende (Zangenberg 2007).

Zangenberg hugsar sær, at vegurin úr kreppuni kanska er at finna við at leita júst til tann miðilin, sum sær út til at vera mest hóttur, tíðarritið, og eisini til bloggarnar, sum eru í ætt við tíðarritini:

> Og måske dette problem (denne potentielle mulighed) er særlig akut og jeg havde nær sagt: kritisk i forbindelse med tidsskriftet som genre og medieform? Hvorfor? Fordi tidsskriftet på en mere påtrængende måde end dagbladet på samme tid henvender sig til ganske få læsere, og principielt til alle læsere. Ikke ulig bloggen, der på en mere urovækkende måde svæver mellem det intime og det offentlige. Så måske det især er her, på tidsskrifternes og bloggenes arena, at vi skal spejde efter en udgang af krisen – eller krisens fuldbyrdede, apokalyptiske faces hippocratica (Zangenberg 2007).

Tað var eisini í 2007, at Rónán McDonald gav nevndu bókina, *The Death of the Critic*, út, ein bók, sum Sissel Furuseth vísir til, tá hon

í *Forfatteren som kritiker* setir spurnartekin við, um tað er gjøgnum rithøvundin sum kritikara, at tað er møguligt at lyfta kritikkin út úr teirri kreppu, sum er skapt av einari miðlastøðu, ið krevur, at ummælini í formi og stíli skulu passa inn í tann nýggja veruleikan hjá miðlunum og treytirnar, sum miðlarnir seta (Furuseth 2015:17).

Tíggju ár eftir hesar eygleiðingar hjá Zangenberg og McDonald, í oktober 2017, var grein í danska dagblaðnum *Information,* sum legði fram nýggja kanning, ið vísti, at tey seinastu tíggju árini vóru ummælini fækkað 34 prosent í donskum bløðum og tíðarritum. Ein grein, sum av sonnum skapti kjak um ummæli í Norðurlondum. Í kjalarvørrinum av hesum, sum í svenskari grein verður lýst sum ein mentanarbumba, ið brast í Danmark tann 6. oktober (Edenborg 2018), eru somu kanningar tí gjørdar í Noregi og Svøríki eins og í teimum finnlandssvensku dagbløðunum. Norska kanningin vísir, at ummælini í norskum dagbløðum eru fækkað niður í minni enn helvtina hetta sama tíðarskeiðið, t.e. frá 2007 til 2017 (Larsen, Dag Eivind Undheim 2017), meðan svensku ummælini eru fækkað 21 prosent hetta tíggjuáraskeiðið; ein ábending um sama rák, hóast støðan er eitt sindur minni dómadagskend, sum greinskrivarin málber seg (Edenborg 2018). Í teimum finnlandssvensku miðlunum eru ummælini fækkað 35 prosent hetta tíðarskeiðið (Lindqvist 2017).

Sum eg havi víst á, er tað eitt útbreitt uppáhald, at kritikkurin er í kreppu, og tað hevur í mong ár verið partur av retorikkinum rundan um ummælini, at tey standa á gravarbakka. Kortini eru tað tey, sum vilja vera við, at søgan um deyðan hjá ummælisgenruni er ein endurtøka, sum lítið hald er í, og sum kanska minnir mest um skemt (Furuseth 2016b:551). Ummælið hevur so mangan verið sagt at vera í kreppu fyrr, og hóast minningarorð verða skrivað um ummælini í hesum døgum, so vísir Sissel Furuseth á, at hetta kjakið kann tykjast høpisleyst eitt nú fyri *Norsk kritikerlag*, sum als ongar trupulleikar hevur hvørt einasta ár at finna ein virðiligan kandidat til heiðurslønina „Årets litteraturkritiker" (Furuseth 2016d:551).

Í sínari takkarrøðu í 2018 brúkti ársins norski ummælari Anne Cathrine Straume høvið til at umrøða hetta evnið. Hon heldur tað vera einfalt at lata blaðstjórnirnar fáa skuldina og mælir til, at kritikararnir hyggja inn í seg sjálvar fyri at finna út av, hvussu teir kunnu skriva, so teir seta gongd á tær stóru samrøðurnar. Ábyrgdin liggur sambært henni sostatt hjá ummælaranum sjálvum og ikki hjá miðlunum. Miðlarnir skulu ikki toyggja seg til at royna at fevna kritikkin, og teir kunnu heldur ikki væntast at gera tað. Teir hava onnur fokuspunkt og annað at hugsa um fyri at lívbjarga sær. Nei, ummælararnir mugu laga seg til broyttu umstøðurnar, og teir mugu skapa nóg góðar tekstir, soleiðis at teir eru verdir at prenta ella seta í netmiðlarnar („Årets litteraturkritiker 2018" 2018).

Miðlastøðan trýstir ummælið sum tekstslag meira enn nakrantíð, men hevur samstundis ta ávirkan, at ummælarin má hvessa pennin enn meira og skapa tann myndugleika, sum fær lesaran fyri tað fyrsta at tíma at lesa hann og fyri tað annað at lurta eftir tí, sum hann sigur, og taka tað í álvara. Tá pallurin hjá ummælinum treingist, má ummælarin skapa sín egna pall og staðfesta sín myndugleika at virka á nýggja pallinum.

Tað tykist vera semja um, at ummælið sum tekstslag er á einum vegamóti, har nýggj ella onnur krøv verða sett til tað. Tað fer tí nógv gransking fram í dag, sum roynir at kanna, hvørjar avbjóðingar hetta gevur kritikkinum, og hvørjir møguleikar eru í framtíðini hjá ummælinum sum tekstslagi at fóta sær í einari nýggjari, broyttari miðlastøðu. Ein verkstova, sum virkaði árini 2016 – 2018 í Svøríki – *Kritiklabbet* – hevði til endamáls at kanna listfrøðiligu, teknisku og fíggjarligu fortreytirnar í tí nýggja postdigitala almenninum.[6] Tað var yrkjarin og ummælarin Magnus William-Olsson (f. 1960), sum setti gongd á *Kritiklabbet*, og ymiskir ritstjórar hava verið á útgávunum frá verkstovuni, t.d. søgufrøðingurin, høvundurin og ummælarin, Axel Andersson (f. 1978), sum millum annað hevur hugleitt um ummælið um 100 ár (Andersson 2018).

Annað dømi um gransking, sum fæst við at lýsa, hvussu mentanarkritikkurin og leikluturin hjá kritikaranum broytast í teirri nýggju miðlastøðuni, er granskingarverkætlanin á Keypmannahavnar universiteti, sum Nete Nørgaard Kristensen, professari í miðlafrøði,

6 Sí http://www.kritiklabbet.se/2018/06/30/kritiklabbet-har-avslutat-sin-verksamhet/ (03.07.2019).

leiddi: „From Ivory Tower to Twitter: Rethinking the Cultural Critic in Contemporary Media Culture (FITT)“, fíggjað av *Det Frie Forskningsråd* í tíðarskeiðinum 2015-2019. Granskingin var bæði merkt av og sett í gongd út frá einum tanka um kreppu ella avbjóðingar í mentanarjournalistikkinum:

> FITT investigates the state of the cultural public sphere and its critical discussions, at a time when media institutional and technological developments have enabled advanced public participation, while intellectual authority and enlightenment are also being challenged. These circumstances call for a theoretical rethinking of the cultural critic within a cross-mediated framework and for empirical analyses of how the authority and legitimacy of the cultural critic is becoming increasingly heterogeneous in the media.[7]

Útgangsstøði í hesari verkætlan er positivt á tann hátt, at „kreppan“ ikki verður sædd sum ein hóttan, men sum ein áheitan um nýhugsan.

Á „Erasmus School of History, Culture and Communication“ í Rotterdam er verkætlan í gongd, sum eitur „Constructing Cultural Authority“ – eitt samstarv millum granskarar innan ymiskar listaformar, sum kannar, hvørja ávirkan broytta miðlastøðan hevur á kritikkin:

> By means of a survey, analyses of both literature and pop music reviews and interviews with critics and different audience groups, this study aims to ... shed light on who we grant authority nowadays and why and on what bases [sic] we do this. Who is nowadays considered to be an expert in the cultural field?[8]

Hesar granskingarverkætlanirnar geva ábendingar um, at høvuðsavbjóðingin hjá kritikkinum í dag tykist vera, at tann broytta miðlastøðan noyðir ummælararnar at virka á nýggjum pallum. Í verjurøðunum

7 Sí From Ivory Tower to Twitter: Rethinking the Cultural Critic in Contemporary Media Culture (03.07.2019)

8 Sí https://www.eur.nl/en/eshcc/research/ermecc/projects/constructing-cultural-authority (03.07.2019)

hjá Matthew Arnold, Edward Said, Northrop Frye, T. S. Eliot og Terry Eagleton var tað innihaldið í kritikkinum, sum var sett á breddan, og loysnin lá í at finna inn til sjálvan kjarnan í funktiónini hjá kritikkinum fyri at verja hansara rætt. Eisini Horace Engdahl leitar inn til sjálvan kjarnan í ummælaravirkseminum fyri at staðfesta tilverurættin hjá ummælaranum. At tær nýggju granskingarverkætlanirnar leggja dent á formin og á, at kritikkurin má finna sær nýggjar leiðir út til sín móttakara á nýggjum pallum, er bert ein staðfesting av tí, sum eg longu havi nevnt, at ummælaravirksemi er í dupultari verjustøðu, tí ummælarin skal ikki bert verja sín rætt at virka, men eisini stríðast fyri at finna ummælinum eina leið til lesaran, tá sjálvur pallurin, almennið, er hótt.

Tá alt hetta er sagt, er enn eftir at vísa á, at ummælarin eisini er hóttur av rithøvundunum sjálvum, tí av teimum hevur hann mangan verið illa lýddur. Erik Bjerck Hagen (f. 1961), bókmentaprofessari í Bergen, skrivar í inngangi til bók um ummæli, at tey altíð hava verið umstrídd og hava ikki fingið tað lættari við árunum. Høvundum dámar ikki ummælarar, tí teir síggja altíð okkurt annað í verkunum, enn upphavsmaðurin ætlaði (Hagen 2004).

Tað eru eisini óteljandi dømi um rithøvundar, sum lasta ummælaran í sínum tekstum. Rónán McDonald vísir á, at ummælarin ofta verður sæddur sum ein snultari, og hann tekur dømi úr leikinum *Meðan vit bíða eftir Godot* eftir Samuel Beckett (1906-1989) fyri at vísa á, hvussu ummælarin gjøgnum tíðirnar hevur verið sæddur av høvundum. Í leikinum letur Beckett Estragon kalla Vladimir „ummælara“, tá hann skal finna tað ljótasta orðið at siga um hann í teirra lítla klandursleiki í leikinum (McDonald 2007:8-10).

Í yrkingini „Ballad of a Thin Man“ (1965) fer amerikanski sangarin og yrkjarin, nobelvinnarin Bob Dylan (f. 1941), heldur ikki væl við ummælaranum, sum hann í hesum tekstinum kallar Mr. Jones. Ummælarin verður settur fram sum ein, ið hevur allar førleikar til at ummæla, hann er lisin og hevur tey røttu sambondini við tey røttu fólkini á vitanarstovnunum, men trupulleikin er, at hann skilir ikki, hvat tað er, sum er upp á spæl, tá tað kemur til list. Bob Dylan fer so langt sum at siga, at tað skuldi verið ein lóg, sum forðaði ummælarum at blanda seg uppí:

You walk into the room with your pencil in your hand
You see somebody naked and you say, „Who is that man?“
You try so hard but you don't understand
Just what you'll say when you get home

Because something is happening here
But you don't know what it is
Do you, Mister Jones

(...)

You've been with the professors and they've all liked your looks
With great lawyers you have discussed lepers and crooks
You've been through all of F. Scott Fitzgerald's books
You're very well read it's well known

But something is happening here
But you don't know what it is
Do you, Mister Jones?

(...)

Well, you walk into the room like a camel and then you frown
You put your eyes in your pocket and your nose on the ground
There ought to be a law against you coming around
You should be made to wear earphones

'Cause something is happening here
But you don't know what it is
Do you, Mister Jones?
(Dylan 1965/2014:212).

Føroyskir rithøvundar hava eisini sett ummælaran í ringt ljós. Fjøllistamaðurin Tóroddur Poulsen (f. 1957) kallar ummælarinnuna blinda (Poulsen 1992a), og skaldið Poul F. Joensen (1898-1990)

sigur júst hetta, sum Erik Bjerck Hagen er inni á, um ummælaran í yrkingini „Skaldametarar“ (1967), at hann fær nakað annað burtur úr verkinum, enn høvundurin ætlaði:

Teir jótra sum neyt eitt skaldaverk,
til betur enn skaldið teir duga,
ja, finna hugsjónir, symbolir og gátur,
sum aldri var honum í huga.
(Joensen 1967/1988:48).

Her tosar Poul F. Joensen út frá tí hugsanini, at rithøvundurin hevur fult vald á og tilvit um sítt verk, ein hugsan, sum ikki kann sigast at vera galdandi í dag. Tað er ikki høvundurin, sum hevur síðsta orðið um, hvat verk hansara ella hennara merkir.

Steinbjørn B. Jacobsen (1937-2012) samanber í yrkingini „Ummælarin“ tað at yrkja við at baka drýl, men ummælarin etur drýlarnar, meðan hann alsamt mølmar um breyð. Hann ummælir við øðrum orðum ikki verkið, men tað verk, sum hann kundi hugsað sær at lisið:

Hon hevur bakað drýlar
Hvørki fransbreyð ella rugbreyð
Hann át drýlarnar so dánt
Alsamt mølmandi um breyð
(Jacobsen 2002).

Møguliga liggur í hesari yrking eisini ein tilsiping til, at kvinnuligir rithøvundar verða mettir eftir skeivum mannligum fyritreytum, eitt evni, sum verður tikið upp í viðgerðini av ummælunum árini 1997-2007.

Meinhard Jensen (f. 1971) vísir í ummæli av yrkingasavninum *Karr* (2002), har henda yrkingin er prentað, á, at einastu ferð yrkjarin tykist vera í ringum lag, næstan, er tá hann yrkir um ummælaran. Og rætt hevur hann, sigur Meinhard Jensen, tí ummælarin er bara ein lesari, og hann hevur bara tvey eygu at lesa við og í besta føri tvey oyru at hoyra við. Meinhard Jensen nevnir seg sjálvan „hesin ummælarin“, og við tí leggur hann eisini sama boðskap í, at hann,

hóast hann ummælir, bara er *ein* lesari (Jensen 2002). Fatanin av ummælaranum, sum Meinhard Jensen førir fram, stendur í andsøgn við klassiska ummælaran, sum hevur myndugleika millum fólkið at meta um góðsku í skaldskapi. Henda lýsing av ummælaranum setir orð á lækkanina í tign hjá klassiska ummælaranum, sum eg havi nevnt, og tað, ið verður lýst sum ein av orsøkunum til kreppuna í kritikkinum í dagsins samfelagi.

Ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi

Ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi má síggjast í tí sama lýsta samanhanginum, nevniliga fyrst og fremst tí norðurlendska og so tí evropeiska, og er umrøðan merkt av kreppuretorikki í okkara grannalondum, so er hon tað ikki minni í Føroyum. Her hevur hon tó eina dimensión afturat, sum fyllir og hevur fylt nógv í kjakinum um ummæli í Føroyum til allar tíðir, nevniliga at Føroyar eru so lítlar, og ummælaravirksemi eitt serliga viðbrekið starv, tí tað er so torført at ummæla í Føroyum. Tey, sum ummæla og halda fram við at gera tað, kunnu teljast á aðrari hond. Orsakirnar til hetta kunnu vera ymiskar, men ein av teimum, sum at kalla altíð verður nevnd í tí almenna kjakinum í Føroyum, er, at samfelagið er ov tætt samanbundið, tú kemur ov nær teimum fólkunum, sum tú ummælir, og tí halda nógvir ummælarar í longdini uppat at ummæla ella byrja ongantíð.

Við tí í huga, sum italski bókmentasøgufrøðingurin Franco Moretti (f. 1950) sigur um, at stødd sjáldan bara er stødd, men eisini ávirkar bygnaðin í einum mentanarstovni (Moretti 1998:147), kann júst tað, at ein føroyskur ummælari gevst at ummæla, vera við til at broyta bygnaðin í tí føroyska bókmentastovninum. Moretti vísir við dømi úr bókasavnsheiminum, at tá eitt bókasavn minkar og fer frá at hava eina bók av ávísum slag til at hava onga t.d. útlendska bók, so broytir minkingin grundleggjandi bygnaðin á bókasavninum frá at vera eitt bókasavn, sum hevur útlendskar bøkur, til at vera eitt bókasavn, sum ikki hevur útlendskar bøkur (Moretti 1998:147-148). Dømið vísir, hvussu viðbrekin ein lítil bókmentastovnur er, og føroyski bókmentafrøðingurin Bergur Rønne Moberg (f. 1965) hevur í grein saman við amerikanska bókmentafrøðinginum David Damrosch (f. 1953) nýtt

útsøgnina hjá Moretti um hugtakið „ultraminor“ til at grundgeva fyri, at tað er munur á smáum bókmentaøkjum (minor) og serstakliga smáum bókmentaøkjum (ultraminor), tí munurin á støddini kann ávirka bygnaðin grundleggjandi (Moberg og Damrosch 2017). Moberg og Damrosch vísa á, at danski bókmentaheimurin er ein lítil (minor) og hálvavegna útjaðarabókmentastovnur í Evropa, men hann er eitt stórveldi í mun til tann serstakliga lítla (ultraminor) føroyska bókmentastovnin, ið sær Keypmannahavn sum ein ráðandi mentanarmiðdepil (Moberg og Damrosch 2017:136).

Bergur Rønne Moberg lýsir føroyska mentan sum eina trotmentan, ið førir tað við sær, at strategiir verða mentar, ið leggja upp fyri hesum troti: „Færøerne er ganske vist et samfund uden en stærk og stabil litterær finkultur, men det er også en kultur, der har været medvirkende til at producere strategier, der imødegår denne mangelfuldhed“ (Moberg 2014:128). Hann vísir á, at *hóast* og júst *vegna* hesa trotmentan finnur tann føroyska mentanin sína styrki: „Måske kan man kalde hele den litterære færøske kultur – hvor den står æstetisk stærk – „sofistikeret dilettantisme“ i ordets bedste forstand. Det er en kultur, der finder sin styrke på trods af og på grund af sine mangelfuldheder“ (Moberg 2014:136). Ummælini verða ikki beinleiðis nevnd her, men tey eru kortini partur av ringrásini, sum Bergur Rønne Moberg tosar um, tá hann sigur, at tað føroyska bókmentaøkið er merkt av trotmentan í øllum liðum. Hann nevnir mentanarstovnarnar, bókasøvn, útvarp, sjónvarp, stuðulsskipanir, útgevarar og ymiskar mentanar- og listafelagsskapir og vísir á vantandi tilfeingi á mentanar- og granskingarstovnunum, tað veika almennið, lágu sergreiningina og sera avmarkaða marknaðin (Moberg 2017:199).

Hesar eru í høvuðsheitum fortreytir ummælisins í Føroyum. Men mín gransking vísir, at hóast nevndu viðurskifti – lítilleikan, og at ummælini eru fá í tali í mun til í øðrum londum[9] – kunnu føroysk ummæli í tí viðgjørda tíðarskeiðinum 1997-2007 í mongum lutum berast saman við tey í grannalondum okkara og sigast at hava somu innihaldsligu eyðkenni. Eg vísi tó á, at lítilleikin sæst aftur í

9 Hetta merkir ikki, at ummælini neyðturviliga eru fá í tali í mun til útgávurnar. Kanningin av tí lutfallinum fellur uttan fyri endamálið við hesari ritgerð.

tí sterku metafunktión, sum eyðkennir tey føroysku ummælini, har ummælarar vegna veika siðvenju á ummælaraøkinum á serstakan hátt tykjast muga rættvísgera sín leiklut í ummælunum. Nærri verður komið inn á hetta í viðgerðini í kapitli 7.

Kanningarnar, sum vórðu gjørdar í okkara grannalondum í 2017, har víst varð á, at ummælini eru fækkað frá 2007 til 2017, eru ikki gjørdar í Føroyum, men tað er kanska ikki av leið at siga, at tað er ein tilverutreyt hjá kritikkinum í Føroyum, at hann ongantíð veruliga er komin fyri seg. Bókmentaligur kritikkur í bløðum og tíðarritum í Føroyum hevur altíð hingið á nøkrum heilt fáum eldhugaðum hugsjónarfólkum, og tað ger hann enn í dag. Men hóast tað ongantíð hevur verið nøkur gulløld í Føroyum, har ummælaravirksemið hevur verið eitt høgt virt og væl samsýnt starv, so hava tað verið tíðarskeið, har ummælarar hava fingið hampuliga samsýning fyri at skriva ummæli fyri dagbløðini og tíðarritini, og tað hevur eisini í tíðarskeiðum verið eitt ávíst reglusemi í ummælaravirkseminum í føroyskum bløðum og tíðarritum. Hetta sæst t.d. aftur í bløðunum í tíðarskeiðinum 1997-2007, sum verður viðgjørt seinni í ritgerðini, ið var ein tíð, tá bløðini løgdu seg eftir mentanarjournalistikki (Dalsgarð 2002:71, „Ummæli av ummælinum“ 2017[10])

At føroysku ummælini hava verið hildin at vera innihaldsliga merkt av viðbreknu støðu síni sæst í innganginum til savnið *Føroyski mentunarpallurin*, har Jógvan Isaksen (f. 1950), lektari í bókmentum við Keypmannahavnar universitet, prentar eitt úrval av ummælum sínum frá 1983 og fram. Har sigur hann, at føroyskir ummælarar hava havt lyndi til at lata vera við at koma við atfinningum, og tað, sum skuldi verið gevandi kritikkur, hevur mangan bert verið markleyst rós ella tvætl (Isaksen 1983:12). Í sínum ummæli av bókini heldur rithøvundurin Árni Dahl (f. 1946), at um føroyskir ummælarar vóru í so fagurlátnir, so mundi tað vera tí, at tað, sum kom út, var liður í málstrevi hjá fámentari tjóð og mangan skrivað av málsligum eldhuga heldur enn stórum skaldagávum (Dahl 1985).

10 Kim Simonsen sigur í sendingini „Ummæli av ummælinum“ í Útvarpi Føroya, at tá hann byrjaði at skriva í bløðini, fekst hampulig samsýning fyri at skriva ummæli („Ummæli av ummælinum“ 2017).

Hóast nógv verður kjakast um ummæli í tí almenna rúminum í Føroyum, so er ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi sum nevnt í innganginum eitt at kalla ótraðkað land. Ummælini hava verið granskað sum hjálpartekstir í granskingini av bókmentunum, og hetta sæst aftur á mátanum, tey hava verið skrásett á bókasøvnunum. Tey eru bólkað eftir navninum á høvundinum at verkinum, sum verður ummælt, og ikki eftir navninum á ummælaranum. Hetta sigur nakað um ummælið sum granskingarøki. Tað er ódyrkað, og tað skulu hugburðsbroytingar til fyri at gera leitiarbeiðið høgligari hjá einum granskara á hesum øki, tí hóast nógv ummæli nú eru skrásett inni á leitiskipanini hjá Føroya Landsbókasavni og til ber at finna tey, tí navnið á ummælaranum er sett inn sum leitorð, so kemur tað meira enn so fyri, at navnið á ummælaranum ikki er nevnt í teimum metadátum, sum eru tøppað inn um ummælið av einum verki. Hetta skal ikki lesast sum atfinning móti okkara bókasøvnum, men sum ein lýsing av, hvørja støðu ummælarin hevur havt í tí føroyska bókmentastovninum. Ummælarin hevur einfalt ikki verið mettur sum rithøvundur, men bert miðlari av listaverkinum.

Michel Foucault umrøðir rithøvundarhugtakið í fyrilestrinum „What is an Author?“(1969), har hann setir spurningin, hvat gevur einum, sum skrivar, ta tign at verða kallaður høvundur, og hvat gevur honum myndugleikan at tosa og skilmarka. Hann ger vart við, at vit nýta orðið høvundur til meira enn bara at vísa til ein persón. Hugtakið rithøvundur (author) verður mótsett hugtakinum skrivari (writer) nýtt til at geva ávísari skriving myndugleika og tign (Foucault 1969/1989).

Foucault grundgevur fyri, at eitt rithøvundarnavn er ikki bert liður í einum diskursi. Tað spælir ein ávísan leiklut í einum narrativum diskursi, sum gevur tí eina flokkandi funktión. Tá orðið høvundur verður nýtt, er tað við øðrum orðum ikki í einum vanligum diskursi, men í einum diskursi, sum gevur tí ein ávísan status í samfelagnum og í mentanini (Foucault 1969/1989). At ummælarin ikki verður nevndur ella flokkaður sum høvundur er tí eitt tekin um, at ummælarin hevur lága tign.

Síggja vit ummælaran og hansara skráseting í bókasavnsskipanini frá hesum sjónarhorni, ber til at leggja tað í tað, at kritikarin ikki

hevur støðu sum rithøvundur, men verður bert sæddur sum ein skrivari av onkrum slag ella miðlari av listini. Hetta er í samsvari við tað, sum eg havi víst á, at Matthew Arnold sigur um støðu ummælarans í samfelagnum (Arnold 1865/1989:500). Hann hevur lægri tign enn skaldið, og tað hongur saman við, at ummælarayrkið ikki er eitt virðismett yrki. Eingin fær regluliga løn fyri at ummæla í Føroyum, og verulig løn fyri eitt ummæli er sjáldsom í Føroyum. Henda prestisjulága støðan fylgir ummælunum upp á granskingarstig, har sera lítið er gjørt við hesa grein.

Kortini eru føroysk ummæli ikki einki granskað. Norski bókmentafrøðingurin Anne-Kari Skarðhamar hevði grein í *Scandinavica* í 2012 um ummæli í føroyskum tíðarritum, har hon leggur dent á at lýsa ummælini í teimum ymisku mentanartíðarritunum í Føroyum gjøgnum tíðirnar. Yvirskriftina til greinina, „Critical tact and educational intuition?“, hevur hon tikið úr einum brævi frá William Heinesen til Chr. Matras (1900-1988), sum lýsir eina hóvliga kritiska tilgongd og eina ávaring móti kritiskari hugmóð (Skarðhamar 2012: 272). Tað er áhugavert, at hon velur at viðgera ummælini í tíðarritunum og ikki í dagbløðunum. Hetta kann sjálvandi vera ein natúrlig avmarking, men kann eisini síggjast sum ein ábending um, at ummælini í mentanartíðarritum hóast alt hava havt hægri tign enn ummælini í dagbløðunum. Í øllum førum eru ummælini í dagbløðum ikki tikin við í hennara viðgerð, og endamálið við greinini er ikki bert at viðgera ummæli gjøgnum tíðirnar, men at siga nakað um mentanartíðarritini og teirra skiftandi leiklut í tí kritiska bókmentaalmenninum í Føroyum. Greinin viðger *Varðan* (1921-), *Brá* (1983-1993), *Braga* (1999-2001) og *Outsider Magazin* (2005-2006). *Bragi* og *Outsider Magazin* ganga aftur í mínari viðgerð av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007.

Anne-Kari Skarðhamar vísir í greinini á, at bókmentakritikkur í Føroyum fram til 1930, tá Chr. Matras breyt normin, hevði lyndi til at meta bókmentir einans eftir teirra ávirkan á mentanarstøðuna og tjóðarbyggingina í landinum.[11] Hon vísir á, hvussu teir fyrstu

11 Anne-Kari Skarðhamar hevur ikki ummælaravirksemið hjá Kristini í Geil við, sum er viðgjørt í kapitli 7.

ritstjórarnir á *Varðanum*, Rikard Long og Chr. Matras, høvdu ávirkan, tá tað kom til menning og meting av føroyskum bókmentum.

Skarðhamar skrivar eisini um, hvussu William Heinesen var hugkveiktur av sínum sambandi við tað danska bókmentaumhvørvið. Chr. Matras og William Heinesen lósu regluliga ummæli í danska merkismánaðarritinum fyri bókmentir, list, samfelag og vísindi *Tilskueren* (1884-1939), har Jørgen-Frantz Jacobsen debuteraði sum yrkjari í 1921. Teir skrivaðu í norðurlendsk tíðarrit fyri at fáa føroyskar bókmentir kendar. William Heinesen legði fram yrkingarnar hjá Chr. Matras, og Chr. Matras skrivaði um føroyskan skaldskap. Soleiðis vísir Skarðhamar á tað neyva sambandið, sum føroyskur bókmentakritikkur frá byrjan hevði við tann norðurlendska, serliga danska bókmentastovnin. Hetta verður tikið upp aftur í viðgerðini av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007, við tað at útisetaperspektivið hevði eitt stutt blómaskeið í hesum árum, har ummælandi føroyingar í útisetu eru við til at lyfta støðið í føroyskum ummælaravirksemi.

Tað tjóðarbyggjandi endamálið hjá *Varðanum* at menna tað føroyska málið og styrkja føroyska mentan og samleika varð endurspeglað í bókmentaummælunum, og Skarðhamar vísir á, at ummælararnir vóru rithøvundar, málfrøðingar, gudfrøðingar, lærarar og onnur lærd fólk – flest av teimum menn. Kriterium fyri metingina var, um innihaldið og málið stuðlaði teimum tjóðskaparligu hugsjónunum og eisini tað, sum Anne-Kari nevnir *kensluligan autentisitet* (Skarðhamar 2012:270). Við øðrum orðum skuldu bókmentir vera ektaðar og sannar. Anne-Kari Skarðhamar ger vart við, at flestu føroysku ummælararnir frá byrjan vóru menn, og hetta sjónarhornið verður tikið upp aftur í viðgerðini av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007, við tað at kvinnur so við og við gerast ein partur av hesum virksemi og fáa ein týðandi leiklut í professionaliseringini av føroyskum ummælaravirksemi.

Anne-Kari Skarðhamar setir spurningin, í hvussu stóran mun føroyskir ummælarar eiga at gera mun á teirrra meting av amatør- og yrkisskaldskapi og av eftirslóðandi skaldskapi og eksperimenterandi/nýskapandi skaldskapi. Í hvussu stóran mun skulu ummælini hava sum endamál at stimbra vøkstur í bókmentastovninum, soleiðis at skilja, at føroyskar bókmentir verða møttar við vælkomu, tí tað er so

týdningarmikið, at bókmentastovnurin veksur vegna ta sannroynd, at tann føroyski bókmentastovnurin er so lítil og so nógv minni enn aðrir bókmentastovnar í Norðurlondum. Eigur bókmentakritikkur í Føroyum at uppfylla tey somu kriteriini sum bókmentakritikkur í øðrum Norðurlondum og Evropa annars? Skarðhamar setir spurningarnar við tí í huga, at tað ber til at síggja ein bókmentastovn sum ein miðdepil, meðan ein annar er útjaðari. Hetta samanber hon við, tá onnur lond tosa um landspartaskaldskap og tjóðarskaldskap, og her verður hugsað um, at Føroyar søguliga eru partur av dansk-norska ríkinum og Tórshavn ein útjaðari í mun til Keypmannahavn, sum er miðdepil.

Anne-Kari Skarðhamar vísir á, at Chr. Matras í ummæli av *Fastatøkum* hjá Heðini Brú fer burtur frá tankanum um, at normurin fyri føroyskan bókmentaligan kritikk fyrst og fremst skal vera sosialur ella tjóðskaparligur. Hann kritiserar út frá einum kriterii um listaliga dygd, og t.d. sigur hann, at endin á bókini er veikur, og at persónarnir eru ov lítið veruligir. Hetta ummælið førdi til eitt aftursvar frá Rikardi Long í sama nummari av *Varðanum*. Komið verður aftur til hetta kjak.

Anne-Kari Skarðhamar sigur, at William Heinesen grundgevur fyri at stimbra vøkstur, og Chr. Matras setir spurnartekin við, um ikki føroyskir ummælarar eiga at møta verkunum hjá sonnum yrkjarum við somu mátingum, sum verða nýttar aðrastaðni í heiminum. Heinesen ávarar móti dilettantismu, men vísir á teir sjáldsomu eginleikarnar at vera høviskur í atfinningunum og hugskygdur í leiðbeining, við hansara orðum vísa: „kritisk takt og pedagogisk intuition“, sum eisini er heitið á greinini hjá Anne-Kari Skarðhamar. Sjálvum dámar honum betur blídni og opinleika í metingini av list, tá tað ikki beinleiðis eru menniskjalív upp á spæl.

Anne-Kari Skarðhamar viðger føroysku tíðarritini *Brá*, *Braga* og *Outsider Magazin* og vísir á, at í *Brá* verður ummælt út frá tekstgreinandi og listfrøðiligum kriterium, og tað eru oftast akademikarar, sum ummæla, t.d. áðurnevndu Jógvan Isaksen og Malan Marnersdóttir og Turið Sigurðardóttir (f. 1946), bókmentafrøðingur, professari á Fróðskaparsetri Føroya. Barnabøkurnar verða ummæltar eftir, hvussu viðkomandi temuni eru, máli, persónum, realismu í motivum o.s.fr. Yrkingar verða mettar út frá listfrøðiligum og tematiskum kriterium.

Summir kritikarar ummæla eisini út frá virðum og lívsáskoðan ella lívsfatan.

Bragi, sum kom út tríggjar ferðir árini 1999-2001, helt fram í sama anda sum *Brá*. Ein bólkur av útisetum í Keypmannahavn ritstjórnaði tíðarritinum, og Anne-Kari Skarðhamar vísir á, at tað legði seg eftir at skapa nýggjar bókmentaligar framsagnarhættir. Tað var kritiskt, mentanarliga víðgongt, modernað og opið fyri postmodernaðum áskoðanum.

Outsider Magazin legði hart út í 2005 í sera ambitiøsum tóna og segði seg vera besta tíðarrit nakrantíð í Føroyum. Stevnan var at gera upp við postmodernismuna. Anne-Kari Skarðhamar staðfestir, at blaðið man vera deytt, tá einki er komið út síðani 2006, og heimasíðan er óvirkin.

Anne-Kari Skarðhamar vísir á, at hesa tíðina frá 1982-2006 hevur trupulleikin við dilettantismu mótvegis list, sum Chr. Matras og William Heinesen kjakaðust um, framvegis áhuga í føroyskum bókmentakritikki. Spurningurin í 2012 var framvegis tann sami, sum hann var í tíðini, tá William Heinesen og Chr. Matras vóru í hæddini; nevniliga um bókmentakritikkurin í einum so lítlum samfelag skal vera linari og meira uppbyggjandi enn í einum stórum bókmentastovni. Skarðhamar vísir til Carl Jóhan Jensen, sum ger mun á list og leikfólkalist, tá tað kemur til trupulleikan við kritiskum dómum um føroyskar bókmentir.

Anne-Kari Skarðhamar kemur inn á, at kvinnuligir rithøvundar hava fingið serstakliga harðan dóm frá Carl Jóhan Jensen og sigur, at hann gevur einki rúm fyri „lærandi eggjan“ í sínum ummælum. Hon vísir á, at Carl Jóhan Jensen ger mun á kliché-tekstum og avantgardelist á sama hátt, sum William Heinesen ger mun á amatørum og listafólki. Báðir meta teir út frá listfrøðiligum kriterium, men tónin, teirra „modes of expression“, sum Anne-Kari Skarðhamar tekur til, er sum nátt og dagur so ólíkur. Í viðgerðini av ummælunum hjá Carl Jóhan Jensen og øðrum í kapitli 7 komi eg aftur til hetta, at kvinnuligir rithøvundar hava fingið harðan dóm og eru mettir út frá øðrum fortreytum enn mannligir rithøvundar.

Í niðurstøðu sínari ger Anne-Kari Skarðhamar vart við, at tað liggur ein vansi í tí, um føroyingar ikki meta sínar bókmentir út frá

somu kriterium, sum gjørt verður aðrastaðni, tí vilja føroyingar skapa sínum bókmentum virðing, og vilja teir hava tær týddar til onnur mál, mugu teir gevast við at hálova miðalhampa bókmentum (Skarðhamar 2012). Hon kemur soleiðis í hesari greinini inn á fortreytir fyri meting av bókmentum í føroyskum tíðarritum gjøgnum tíðirnar og leggur støði undir víðari gransking av evninum í føroyskum høpi. Hon setir hol á evni, sum fáa rúm í hesari ritgerð, nevniliga „ummæli í útisetu“ og „kvinnur verða ummæltar, og kvinnur ummæla“. Ummælini í dagblaðunum sluppu ikki upp í part í viðgerðini hjá Anne-Kari Skarðhamar, sum bert hevur tíðarritini við, men tann mangulin verður bøttur í hesari ritgerð.

Umframt greinina hjá Anne-Kari Skarðhamar er gransking, kjak og viðgerð av bókmentaummælum í Føroyum ein táttur, ið spjaddur sæst aftur í bókmentasøgum, í bókmentaligum ritgerðum og ymiskum skrivaðum tilfari sum greinum, inngangum til greinasøvn osfr. Hesi tekstbrot verða lýst í teimum fylgjandi reglubrotunum.

Chr. Matras skrivar um málspurningin í *Varðanum* 1929 og kemur inn á tørvin á ummælaranum í føroyskari mentan og bókmentum:

> Tí halda fólk, sum ongantíð fáa eina trygga leiðbeining viðvíkjandi tí siðmenningarligu stevnuleið, sum Føroyar eiga at halda, seg aloftast at fáa grót fyri breyð úr føroyskum bókmentum… Jú, eins og vit í stjórnmálum (politikki) eru eitt høvuðleyst fólk, so sakna vit í okkara bókheimi hin rætta leiðbeinaran, sum kann sýna okkum virði og vegir (Matras 1929:48).

Her sæst, hvørja hugsan Chr. Matras í 1929 hevur um, hvat ein ummælari er, og hvønn leiklut hann hevur í samfelagnum sum vegvísari ella leiðbeinari, og hann sóknast eftir einum slíkum vegleiðara at læra fólkið at lesa føroyskar bókmentir. Hann sóknast við øðrum orðum eftir einum bókmentakritikara ella einum ummælara.

Chr. Matras skrivar í grein um rithøvundin Martin Joensen, sum varð prentað í bókini *Nøkur mentafólk* um trupulleikan í, at vit eru so fá í Føroyum, at vit eru ov illa mannað til at eiga fólk, sum er fört fyri at meta um virðið á tí, sum skapað verður:

> Nú veit eg væl, at í øðrum londum siga ofta rithøvundar, at teir hava einki lært av bókmentametarum, men eitt er víst, at ikki er tað tað sama hjá summum skrivandi monnum, um slíkir metarar eru til ella ikki. Her í Føroyum, her sum prosabókmentir hava so ilt við at fáa høvdið fyri seg, her hevði tað havt alstóran týdning um menn við skili og hegni kundu at skriva um tað, ið fram kemur (Matras 1973:117).

Chr. Matras sigur síðani, at Martin Joensen kundi fingið annað úrslit úr skrivingarhuga sínum og skrivingargávum, enn hann fekk, um *andliga veðurlagið*, sum hann kallar tað, var betri, um møguleikar at geva út vóru betri, um tað ikki trutu kønir metarar, og „skrivandi menn“ ikki sótu so spjaddir (Matras 1973:117-118). Í orðingini hjá Chr. Matras endurspeglast tað, sum Anne-Kari er inni á, at tað vóru menn, sum skrivaðu og mettu um skaldskap ta fyrstu tíðina.

Jógvan Isaksen skrivar í bókini *At taka dagar ímillum* (1988) um at ummæla. Hann vísir leysliga til ástøðingar og setir spurnartekin við týdningin og leiklutin fyrst og fremst hjá lesingini í einum samfelag og harnæst ummælinum og tess týdningi. Isaksen lýsir her leiklutin hjá ummælaranum og sigur hann vera at seta høvundin í samband við lesararnar eins og at vegleiða, tá tað kemur til góðskuna í bókmentum. Høvuðsuppgávan hjá ummælaranum er sambært Jógvani Isaksen at gera vart við, hvørjar bøkur eru komnar og at gera eina meting av teimum; eitt slag av brúkaravegleiðing (Isaksen 1988:15-32). Hann skrivaði eisini grein í *Braga* (Isaksen 1999b), og eina líknandi grein á donskum/enskum í *Nordisk litteratur* (Isaksen 2000), har hann lýsir ummælarastøðuna í Føroyum og leggur áherðslu á, at tað, sum ger tað serliga torført at ummæla í Føroyum, er, at umstøðurnar eru so smáar. Hann leggur dent á, at orsøkin til at hann hevur hildið fram at ummæla øll tey árini, hann hevur ummælt, er, at hann hevur búð uttanlands og tí ikki hevur verið so nær teimum høvundum, sum hann hevur ummælt. Hesar viðmerkingarnar um útisetu komi eg aftur til í viðgerðini av ummælunum hjá Jógvani Isaksen í kapitli 7.

Í prentaða fyrilestrinum „At skriva um tað, hini skriva“ (Marnersdóttir 1990), ið varpar ljós á ummælini sum tekstslag, kemur Malan Marnersdóttir inn á søguna hjá ummælum í Føroyum. Sum nevnt í

inngangínum vísir hon her á, at ummælini eru nyttuligt amboð, tá bókmentasøgur verða skrivaðar. Hon bendir á, at síðan bøkur byrjaðu at koma út á føroyskum, hava tær næstan altíð fingið umrøðu, og at ummæli endurspegla bæði hugburðin hjá ummælaranum og ta mentanarligu støðuna í landinum í ymiskum tíðarskeiðum. Malan Marnersdóttir nevnir kendu greinina „Against Interpretation" (1966) eftir Susan Sontag og vísir á, at leikluturin hjá ummælaranum ikki er at „umseta" ella tulka listina fyri síðani at skúgva hana til viks, men heldur at stuðla upp undir hana við at siga, *hvussu* hon er list, og *at* hon er tað, hon er, og ikki vísa *hvat* hon er. Malan Marnersdóttir vísir á, at viðhvørt verða bøkur ummæltar út frá tí, sum tær umboða, og nevnir, at um ein kvinna t.d. hevur skrivað eina bók, og ummælaranum ikki dámar kvinnubókmentir, so kann bókin verða kolldømd (Marnersdóttir 1990). Her kemur Malan Marnersdóttir inn á viðurskifti, sum eg komi aftur til í ritgerðini, har kvinnur í ávísum førum verða ummæltar út frá øðrum fortreytum enn menn. Malan Marnersdóttir hevur í nógvum, hon hevur skrivað, kastað ljós á, at tað, sum kvinnur skriva, ofta hevur verið forfjónað, og hesir tankar, hon setir orð á í 1990, um kvinnur, sum verða ummæltar, kunnu tí sigast at leggja støði undir ein tráð í hesari ritgerð, sum er viðgjørdur í kapitli 7.

Turið Sigurðardóttir skrivar grein um mótyrking í Føroyum og nemur soleiðis við spírarnar til eina ummælaramentan í Føroyum uttan tó at røða beinleiðis um ummælið sum tekstslag, ið byrjar við smáum aftursvarum í yrkingarformi, mótyrkingum og aftratyrking í teimum fyrstu føroysku bløðunum (Sigurðardóttir 1994). Soleiðis leggur hon óbeinleiðis lunnar undir gransking av hesum forforminum hjá ummælinum í føroyskum bløðum, sum eg komi aftur til í kapitli 7 í brotinum um søguligt baksýni, hóast hon ikki tosar um ummæli út frá teirri skilmarking av ummælinum, sum henda ritgerð byggir á.

Í grein um ummæli av bókum eftir Marionnu Debes Dahl skrivar Elsa Funding (f. 1942), cand.theol og cand.phil í norðurlendskum/føroyskum máli og bókmentum, stuttan innleiðandi tekst um ummælið sum tekstslag, har hon vísir á, at ummælandi virksemi hevur sítt sjálvsagda pláss í tilvitanarsøguni, og tað líkist frá tí skapandi arbeiðinum. Hóast eingin listadøming verður, um eingin list er, sigur hon, merkir tað ikki, at eitt og hvørt listaverk er týdningarmeiri enn eitt og hvørt ummælisbrot, tí list og kritikkur eru tvey ymisk sløg av virksemi og tekstsløgum, sum hava tilverurætt, tí tey nøkta hvør sín tørv (Funding 1994:180). Her nemur Elsa Funding við eitt evni, sum verður viðgjørt í hesari ritgerð, nevniliga sambandið millum ummælið og skapandi listina og spurningin um, í hvønn mun ummælaravirksemi kann metast sum sjálvstøðugt virksemi.

Martin Næs (f. 1953), fyrrverandi landsbókavørður, skrivar í formæli til *Hvør eigur flaggknappin?* (1995), har hann letur prenta ummæli síni og annað tilfar úr mentanarpolitiskum sjónarhorni, um týdningin av at siga sína hugsan í orðum. Hann sigur, at ikki fyrr enn tú hevur sagt tað, tú hugsar, frættir tú aftur. Og hvør leingist ikki at frætta? Hann sigur, at tað áttu at verið fleiri, sum søgdu sína hugsan, tá ið tað snýr seg um mentanarligar spurningar. Tess skjótari hevði tað gingist okkum at fingið ein mentanarpolitikk, sum vit kundu kjakast um, og kanska verið erpin av (Næs 1995). Her leggur hann dent á samrøðuna um mentanarpolitisk viðurskifti, harímillum samrøðuna um bókmentir, og vísir á, at tað veruliga endamálið við at siga nakað av fyrstan tíð, er tá ið samanum kemur at frætta aftur (Næs 1995:7). Hesin táttur, sum Martin Næs leggur dent á í ummælinum, leggur grundarlag undir lýsingina av tekstslagnum í kapitli 4 í ritgerðini, har ummælið verður lýst sum relatiónir millum menniskju.

Kinna Poulsen (f. 1968), cand.mag. og listaummælari, skrivar um William Heinesen sum ummælara í ummæli av bókini *William ummælir fagrar listir* (2000). Hon kemur inn á, at tað ofta verður havt at føroyskum ummælarum fyri, at teir ikki eru nóg atfinningarsamir ella nóg avgjørdir í sínum meiningum. Her vísir hon á úrveljingina, sum fer fram, longu áðrenn nakað ummæli verður skrivað. Hon vísir á, at William Heinesen var ein hampuligur og fyrikomandi ummælari, og hansara ummæli vóru frálærandi og miðlandi. Men hyggur tú nærri at ummælunum, so er kortini mentanarradikalt bit í teimum (Poulsen 2000a).

Eisini bókmentafrøðingurin Bergur Hansen (nú: Rønne Moberg) skrivar um William Heinesen sum ummælara í sambandi við, at bókin *William ummælir fagrar listir* kemur út. Hann sigur William Heinesen vera ein „trúverdigan og áhugaverdan ummælara", sum nýtir sítt

yvirlit til at seta rithøvundar í ein størri samanhang. Eisini kryddar hann síni ummæli, sigur Bergur Rønne Moberg, við hugsanum um bókmentir og samfelag og dylur ikki sín eginánuga. Hann sigur, at tað næstan er so, at ein í ummælunum hjá Williami Heinesen merkir, at hann sjálvur er rithøvundur (Hansen 2000:167). Henda seinasta viðmerkingin nemur við hugsanir, sum eg viðgeri í hesari ritgerð, tá eg lýsi og viðgeri rithøvundin sum ummælara.

Rithøvundurin Steinbjørn B. Jacobsen skrivar lítlan stubba um ummæli í *Færøsk kulturpolitik ved indgangen til et nyt århundrede*. Har letur hann illa at støðuni og sigur frá sínum royndum sum ritstjóri á *Varðanum* at fáa ungar høvundar at ummæla hvønn annan fyri at fáa eina lívligari samrøðu um bókmentir. Hann sigur kortini, at nøkur ummæli komu burtur úr hesum, men einki veruligt kjak. Her skínur ígjøgnum, at hann eftirlýsir kjak um bókmentir, sum ikki er. Hann vísir enntá á, at í øðrum londum verður tað roknað sum ein fortreyt fyri góðum bókmentum at hava ummæli og lívligt kjak, men í Føroyum má bara staðfestast, at tað áhaldandi koma bøkur út, *hóast* vit ikki hava tað góða og týdningarmikla kjakið um tær í samfelagnum (Jacobsen 2001). Tað er áhugavert, at her sóknast Steinbjørn B. Jacobsen eftir ummælarum, hóast hann í áðurnevndu yrking um ummælaran kritiserar hann fyri ikki at taka bókmentirnar fyri tað, tær eru, men alsamt at mølma um breyð, meðan hann etur drýl, sum tað stendur í yrkingini (Jacobsen 2002). Her sæst ein kloyving millum Steinbjørn B. Jacobsen sum skald og sum ritstjóra og ummælara, ið er áhugaverd og kann sigast óbeinleiðis at leggja grundarlag undir viðgerð mína av rithøvundinum sum ummælara.

Carl Jóhan Jensen, rithøvundur og cand. phil., skrivar í *Sosialinum* í 2006 um Chr. Matras sum ummælara. Hann sigur, at hann er tann í Føroyum, sum fyrst fer at ummæla frá yrkisligum sjónarmiði.[12] Hann metir bókmentir úrveljandi, og tað merkir, at tað, sum verður ummælt, verður mett vert at ummæla. Hetta verður lýst sum ein dygd og kann skiljast sum ein atfinning móti tí, sum ger seg galdandi

12 Eins og Anne-Kari Skarðhamar gloymir Carl Jóhan Jensen tann leiklut, Kristin í Geil hevur havt í føroyskum ummælaravirksemi. Hann verður lýstur í brotinum um søguligt baksýni í kapitli 7.

aðrar tíðir í søgu *Varðans*, tá at kalla allar útgávur verða umrøddar, men sjáldan er nakað ummæli, sum fer í dýpdina við nøkrum, at finna. Carl Jóhan Jensen fer í dýpdina og nærlesur ummælið hjá Chr. Matras av skaldsøguni *Lognbrá*. Hann viðger ummælið bygnaðarliga, vísir á, at tað er tríbýtt, í fyrsta lagi er í ummælinum ein viðgerð av innihaldinum, og Chr. Matras rósar høvundinum, síðani tekur hann brekini í bókini fram, og at enda tekur hann málið í bókini til viðgerðar. Carl Jóhan Jensen greinar síðani trý onnur ummæli eftir Chr. Matras og vísir á, at hann er hvassorðaður, men at hann t.d. í tí tiltikna ummælinum um *Yvir teigar og tún* (1936) kortini metir Hans Andrias Djurhuus sum skald. Trupulleikin liggur í, at tað verður ov illa ritstýrt, tá allar yrkingarnar koma á prent. Komið verður aftur til hetta ummælið. Carl Jóhan Jensen vísir eisini á, at ummælið av Regini Dahl helst er lagaligari, tí at maðurin er blaðungur, bert 19 ár. Sostatt kemur Carl Jóhan Jensen inná, at Chr. Matras ger mun á debutantum og royndum rithøvundum, tá hann ummælir.

Carl Jóhan Jensen sigur, at Chr. Matras hevði tvær orsakir til at ummæla, sum hann gjørdi:

- Ein uppnýgging av føroyskum bókmentum var neyðug
- Málspurningurin var frammarlaga í huga – umráðandi var at skapa málinum víðar ræsur.

Tí er málslig viðgerð ein megintáttur í ummælunum hjá Chr. Matras; endamálið er ikki málreinsan, men málrøkt, t.e. málslig menning við tí endamáli at styrkja og mýkja føroyskt bókmentaliga, gera tað „bakkaført“, sum Carl Jóhan Jensen málber seg. At enda sigur Carl Jóhan Jensen, at hesi gomlu ummæli eru enn viðkomandi, tí vit slítast við somu spurningar í dag (Jensen 2006a). Viðgerðin hjá Carl Jóhan Jensen av Chr. Matras er við til at kasta ljós á nakrar eginleikar ummælarans og virkisøkið hjá ummælinum sum amboð at menna bókmentirnar. Hetta kann eisini sigast at leggja grund undir lýsingina av nøkrum av eginleikum ummælarans og funktiónum ummælisins, sum verða lýst í hesari ritgerð.

Erhard Jacobsen (f. 1949), fyrrverandi landsbókavørður, skrivar

í bloggi um uppgávuna hjá bókasøvnunum at savna og skráseta allar bókmentir og hartil ymiskt tilfar, sum kann lýsa føroyska bókmentasøgu, mentan og siðsøgu og harvið eisini ummælini. Hann umrøðir, at hetta er ein torfør uppgáva í tí nýggja miðlalandslagnum, at bókaummæli verða skrivað á mongum ymiskum pallum, sum t.d. bloggum og heimasíðum og ikki bert í bløðum og tíðarritum, sum annars var vanligt. Her kemur hann eisini inn á broyttu leiklutirnar hjá ummælaranum í einum meira samansettum miðlaheimi, har akademikarin og serfrøðingurin ikki neyðturviliga hevur tann myndugleika, sum hann fyrr hevði (Jacobsen 2011). Hetta er eitt sjónarhorn, sum eisini verður komið meira inn á í hesari ritgerð.

Listfrøðingurin Inger Smærup Sørensen (f. 1977) hevur í lítlum stubba á blogginum *Listin*, sum Kinna Poulsen og hon høvdu eitt skifti, nomið við málið í ummælum. Hon tosar um ummæli av ummæli, og um ummæli av ummæli av ummæli, sum vit ikki síggja ofta. Hesar metatekstligu viðmerkingar eru áhugaverdar og kunnu sigast at vera ein lítil spíri, sum peikar fram móti hesi ritgerð, ið viðger bæði innihald, mál og stíl í ummælinum. Inger Smærup Sørensen ger vart við, at hon ummælir ikki sjálv, men at hon kortini heldur, at ummælið kanska er týdningamesti partur av mentanartilfarinum yvirhøvur. Um málið í ummælum sigur hon, at tað er fult í klisjéum, og at har eru nógv virðislødd orð:

> Tí afturvendandi partur av nógvum atfinningum av ummælum er, at ummælarar brúka klisjéir í ov stóran mun. At ummælarar endurtaka seg sjálvan og at teirra orðfeingi sum heild er ov fátæksligt, og at brúkt verða ov nógv goymd og hálvgoymd virðislødd orð.
>
> Tað er jú soleiðis sæð rætt. Tað er eingin loyna, at ummælarar og vit, sum miðla list, brúka klisjéir…
>
> Tá vit skriva um list, er málið løtt. Tí skulu vit alla tíðina vera kritisk mótvegis málinum og royna at lúka tað ringasta burtur. Men at uppfinna eitt nýtt mál, tað ber ikki ordiliga til, fyri tað fyrsta hevði eitt tílíkt mál blivið óskiljandi, men tað hevði heldur ikki hóska [sic] til listina, sum jú heldur ikki er feil- og klisjéfrí (Sørensen 2013:89).

Rólant Dam (f. 1979), bókmentafrøðingur, skrivar um kritiskan kapital og almenni í Føroyum í grein í *Varðanum* (Dam 2017). Hann tosar um, at tað er so torført at siga, hvat tað veruliga virksemið hjá kritikkinum er, og spyr, um orsøkin til, at tað veit so illa við hjá kritikkinum í Føroyum, hevur við gamalt lista/mentanarpolitiskt kjak og ósemjur at gera. Hann rør framundir, at um so er, kundi sjálvt tað at sett ein kritikara á fíggjarlógina kanska ikki loyst trupulleikan. Í Føroyum kunnu alment kritisku røddirnar teljast á aðrari hond, og tær fáa sjáldan aftursvar. Men veruligi trupulleikin, sigur hann, er ikki ummælini sjálvi, men tað, sum liggur aftanfyri, at eitt veruligt kritiskt almenni vantar í Føroyum: virknir borgarar, sum virðismeta tað at lesa og lurta eftir kritikki, og sum eru til reiðar at taka lut í orðaskiftinum. Spurningurin snýr seg ikki um sjálv ummælini, men um tann samanhangin, sum treytar teirra tilveru. Ummæli verða skrivað í Føroyum, ikki tí at vit hava eitt sterkt, støðugt og sjónligt almenni, men *hóast* vit ikki hava tað, sigur hann. Hann lýsir eftir tí almenna orðaskiftinum, sum ummælini eru ein partur av.

Sostatt tosar Rólant Dam eisini sum ein, ið er í verjustøðu fyri ummælini. Hansara dagsskrá er at vekja eitt kritiskt almenni til lívs í Føroyum, sum, um tað er til staðar, er durvandi til staðar. Hann ávarar og setir spurnartekin við, um teir nýggju talgildu pallarnir eru mentir at loysa bløðini og tíðarritini av. Hetta varskó er sum eitt ekkó av áðurnevnda kjakinum um kreppu í kritikkinum í grannalondum okkara, sum var í bløðunum um somu tíð, sum greinin hjá Rólanti Dam kom út, nevniliga í 2017.

Bergur Djurhuus Hansen (f. 1968), bókmentafrøðingur, skrivar í innganginum til bókina *Listamál* (2017) eftir Kinnu Poulsen, fororð um kritikk, ummæli og Kinnu Poulsen sum ummælara. Hann nemur við, at ummælið sum tekstslag er tíðarbundið, og tað verður sjáldan lisið meira enn eina ferð. Kortini eru ummæli, sum eru so væl skrivað, at tey fáa virði í sjálvum sær. Hann setir í hesum inngangi orð á munin millum kritikk og ummæli. Hann sær ummælið sum eina brúkaravegleiðing, og hann ger mun á kritikki og ummælum við at vísa á, at munurin er longd og dygd (Hansen 2017b). Her sæst soleiðis ein fatan av ummælinum, sum nøkrum, ið vit finna í dagbløðum, meðan kritikkur er at finna í tíðarritum. Hetta markið er tó kámað við blanding av tekstsløgum og við teirri broyttu miðlastøðuni.

Bergur Djurhuus Hansen sigur, at tað fakliga, tað kritiska og tað persónliga verður í ummælunum hjá Kinnu Poulsen blandað saman í eitt egið, hugleiðandi slag av teksti. Hann tekur fram áðurnevnda T. S. Eliot og leggur dent á, at ein ummælari má tora at taka støðu og bera sína hugsan fram uttan at leggja ov nógv í, hvat onnur hugsa, og hvat eftirtíðin fer at hugsa. Hann leggur dent á tann frískliga aktualitetin, sum hoyrir við til ummælið sum tekstslag, nakað, sum ofta manglar í Føroyum, tí ummæli ofta verða skrivað langt eftir, at ein bók er útkomin. Tí eru føroysk ummæli støðugt í vanda fyri at gerast leysliga fagnandi og tíðarleys. Her sæst, at hann setir sum eitt kriterium til ummælið, at tað skal vera tíðarfest og aktuelt, og er tað ikki tað, er tað ein vansi. Hetta verður sjálvandi eisini sagt fyri at leggja dent á júst tað, sum Bergur Djurhuus Hansen metir vera styrkina hjá Kinnu Poulsen sum ummælara: hon er aktuell, beinrakin og hvøss. Hann leggur dent á, at ummæli skulu ikki ráðgeva – ikki undirvísa, men ummæla. Hann sigur, at vanligastu ummælararnir í okkara tíð eru universitetslærdu frøðingarnir, sum við søguligari vitan og hugtøkum greina og taka støðu. Hann bólkar Kinnu sum ein av hesum akademikarum, men hennara ummæli hava eitt avgjørt og beinrakið flog og eru ógvuliga sjáldan tyngd av frøðiheitum og hugtøkum. Hon byggir tó á sín egna hátt á akademiskar hugsanir um listaligu avantgarduna í Evropa. Hann kemur síðani inná, at list sambært hesum hugtakinum ikki er njótan, ikki dagdvølja ella uppaling, men ein afturundirgerð í øllum, sum vit hava funnið okkum til rættis við. List, ið varðveitir, ella list, ið vil vera eitt slag av skýli og vernd í tilveruni hjá samfelagsins borgarum, er ikki góð list, og í avantgarduni verður sundurbýtið í reina list og politiska list merkingarleyst, tí sonn list hevur í sær avbjóðandi, samfelagskollveltandi møguleikar. Kinna Poulsen verður lýst í ætt við hesar hugsanir, og Bergur Djurhuus Hansen lýsir hana sum ein ummælara við listapolitiskari dagsskrá, sum greidliga sæst aftur í hennara niðurstøðum og grundgevingum. Ein ummælara, sum skrivar alla tíðina, er á røttum stað, greinar og tekur støðu, áhaldandi. Og so lýkur hon kravið hjá Eliot: evnini at skriva væl.

Inngangurin hjá Bergi Djurhuus Hansen kann lesast sum eitt slag av verjurøðu fyri ummælaran. Nærri verður komið inn á hetta í kapitli 7, har Kinna Poulsen verður viðgjørd sum ummælari.

Eftir hesa kronologisku gjøgnumgongd av tí, sum er skrivað um ummæli sum slík í greinum, komi eg nú til tað, sum er skrivað um ummæli í ummælum av skaldsligum tekstum. Í sínum ummæli av tekstsavninum *Dagdvølju* (1901) nýtir blaðstjórin á *Tingakrossi*, yrkjarin, týðarin, ummælarin og listamálarin Kristin í Geil (1877-1935) høvið at minna ummælarar á at vera kritiskar og ikki rósa slíkum, sum í øðrum londum hevði verið tveitt í pappírskurvina („Trop“ 1901). Hetta er metafunktión, sum er at finna í sera nógvum føroyskum ummælum og mótummælum. Hon kann skiljast sum ein avleiðing av vantandi virksemi og gransking á ummælaraøkinum, tí ofta sæst í føroyskum ummælum, at ummælarin er sera tilvitaður um sín leiklut, og hann røðir eksplisitt um tankar og avbjóðingar, sum eru í tí at ummæla. Tað sigur nakað um, at vit ikki í samfelagnum og bókmentastovninum hava eina felags fatan av, hvør leikluturin hjá ummælaranum er, hvør uppgáva hansara er og enntá, um hann yvirhøvur hevur nakran rætt ella nakra orsøk at ummæla. Soleiðis endurspeglast í nógvum ummælum og mótummælum júst tørvurin á at rættvísgera ummælaravirksemið, at lýsa funktiónina hjá ummælaranum og hansara leiklut og ikki minst at verja støðu hansara í samfelagnum.

Hetta sæst t.d. í ummælinum hjá Chr. Matras av *Fastatøkum* eftir Heðin Brú:

> Tá ið røtt er um skald við slíkum gávum, sum Heðin Brú hevur, haldi eg tað vera beint at koma við sovorðnum nøskum atfinningum, sum her eru birtar. Eisini man tað vera rætt at nerta við eitt lýti, sum er í „Fastatøkum“ at hansara í øðrum lutum frálíka stíli: hann kemur ov ofta við einum fingri at vísa okkum á, hvat vit skulu halda um tað og tað. Tað er altíð best, tá ið skaldið krógvar seg aftan fyri eina sterka frásøgn og roknar við tí, at lesarin dugir at lesa (Matras 1935:249).

Her kemur Chr. Matras við metaviðmerkingum um, hvussu rætt man vera at ummæla, sum ger hann tað fyri at verja sín leiklut sum ummælari og kanska samstundis birta upp undir kjak um funktiónina hjá ummælaranum.

Í aftursvari til hetta ummæli samanber Rikard Long Chr. Matras

við trøll í dós, tí at hann kritiserar *Fastatøkur*, eitt tað besta verkið, sum er útkomið. Hann heldur, at annað átti heldur at verið kritiserað enn tann besta bókin í føroyskari bókmentasøgu. Hann sigur, at tað bert er út frá tí listaliga, at Matras hevur mett bókina, og hetta eru vit ikki von við í føroyskum bókaummælum. „Um vit einans høvdu sett bókmentir okkara í virði út frá listaligum sjónarmiði, tá hevði lítið verið, sum ikki lá eftir í sandasorli" (Long 1935:250). Her viðmerkir Rikard Long kriterii fyri góðskumeting í tí føroyska bókmentastovninum í metaviðmerking í einum mótummæli. Hann endar tó mótummælið við at siga, at júst bókin hjá Heðini Brú og *Fuglar og fólk* (1935) eftir Sverra Patursson eru bøkur, sum tola kritikk, ið setir listalig krøv og ikki krøv, sum higartil høvdu verið sett í føroyskum ummælum, altso kritikk, ið metir verk eftir, um tey eru gagngóð út frá okkara mentanarstøðu. Hesar bøkur tola at verða dømdar á slíkan hátt.

Aftur í *Varðanum* bindi 17 leggur Rikard Long sum ritstjóri *Varðans* seg út í kjak um bókaummæli hjá Chr. Matras, sum Páll Patursson heldur vera óhøviskt. Chr. Matras var hvassorðaður og ikki so lítið speiskur, tá hann ummælti yrkingasavnið *Yvir teigar og tún* (1936) eftir Hans Andrias Djurhuus. Við myndini, at tað at yrkja er sum at henta ber, samanber hann Hans Andrias Djurhuus við starvsbrøður hansara, sum hava hentað upp í berjablikk, meðan Hans Andrias Djurhuus lættliga hentar upp í ein tunnuposa fyri og annan eftir, tí hann skrivar so nógv. Tað kann ljóða væl, men myndin fær eina speiska vend, tá Chr. Matras sigur, at um vit fara at hyggja niður í posan, er ofta ilt at fáa eyga á berini, tí har er so mangt annað í, sum hevur verið í berja nánd, men ikki er ber. Hetta er harður kritikkur av Hans Andriasi Djurhuus sum ágrýtnum, men sera óvandnum yrkjara (Matras 1936:252). Harði kritikkurin vakti ans í samtíðini og fekk aðrar ummælarar at ressast og svara aftur. Páll Patursson talar at og kallar ummælið „óhøviskar atfinningar" (Patursson 1937:61). At hann nýtir orðið „óhøviskt" endurspeglar ein hugburð til, hvørja ummælaramentan hann ynskir, at vit hava í Føroyum, og kann berast saman við teir áðurnevndu tankar, sum William Heinesen setir fram um, at ummælarin skal vera høviskur í atfinningunum og hugskygdur í leiðbeining, við hansara egnu orðum hava: „kritisk takt og pedagogisk intuition" (Heinesen 2009:78). William Heinesen talaði eisini at ummælinum hjá Chr. Matras av savninum hjá Hans Andriasi Djurhuus og vardi Hans Andrias Djurhuus við at vísa á, at hann var eisini journalistiskt skald og nýtti tann bundna formin til at skriva um evni, sum onnur vildu skrivað um í eini blaðgrein (Heinesen 1937). Hóast Chr. Matras við myndini av óvandna berjahentaranum er speiskur, so letur hann tað ikki vera nakran spurning, um Hans Andrias Djurhuus er góður yrkjari. Tá tíggju ár eru farin, sigur hann, „fara menn at síggja", at Hans Andrias Djurhuus var eitt rætt skald, men Chr. Matras eftirlýsir eina ritstjórn, sum kann sálda berini frá „frasinum" (Matras 1936:252). Í aftursvari til kjakið sigur Rikard Long, at hann heldur ikki ummælið vera óhøviskt og vísir á, at tað altíð verður ójavnt, sum menn døma um skaldskap sum um aðra list. Har kemur so nógv upp í dómin, bæði mansins lyndi og andaliga støða hansara yvirhøvur.

> Um somu tíð, sum føroyskar bókmentir mennast í hvørjum, og vit hava fingið bøkur, ið væl tola sammeting við góðan útlendskan skaldskap, hevði tað verið trongligt, um teir menn skuldu verið typtir, ið vilja venja fólkið til at døma skaldskap ikki bert eftir rímum og øðrum uttanávirði, men eftir vandsemi og upprunasemi, sum er góður dómur aðrastaðni (Long 1937:63).

Her kemur Rikard Long inn á týdningin hjá ummælaravirkseminum, sum er við til at venja fólk at døma bókmentir eftir originaliteti og vandni. Eisini nemur hann við hetta, at tað hevur týdning, at vit byrja at meta føroyskan skaldskap út frá somu kriterium, sum bókmentirnar í øðrum londum verða mettar útfrá.

Jógvan Isaksen skrivar mong ár seinni í ummælinum av *Heiminum forna 1* eftir Annfinn í Skála:

> Tað er lætt at ummæla eina góða bók, tí tú hevur hjartað við í skrivingini, og hjá summum gevur ummælið av eini vánaligari bók málinum eitt serligt flog. Tað er eins og ummælarin rættiliga kann válka sær í, hvussu óbrúkilig, tápulig og kanska skaðilig útgávan er. Ímillum hesi avbrigdini er tann stóra nøgdin av miðalbókum, sum eru tær

> truplastu at skriva um, tí tú vilt hava ta røttu vágina í tína meting. „Hjá dvørgunum [sic] í Niðafjøllum“ liggur og riðar á markinum í neðra (Isaksen 2001).

Her nýtir Jógvan Isaksen metafunktiónina sum eitt slag av verju, og hetta er ein máti at vísa, at hann sum ummælari hevur hugsað um sín leiklut.

Í ummæli av *Páskaódnini* eftir Jóanes Nielsen skrivar Malan Johannesen: „Tá ið eg verði biðin um at ummæla fer hjarta upp at tita“ (Johannesen 1998a), eitt dømi um, at ummælarin ikki er tryggur í sínum leikluti sum ummælari og kennir tað neyðugt at vísa sín ótryggleika í ummælinum. Henda viðmerking er áhugaverd, tá tað kemur til kjakið um kvinnur sum ummælarar, tí hon kann síggjast sum avleiðing av, at tað ikki søguliga hava verið kvinnurnar, sum hava ummælt, og at tað kanska av tí sama fellur einari kvinnu tyngri at taka uppgávuna á seg enn einum manni. Her er í øllum førum talan um ummælara, sum í ummæli sínum setir orð á ábyrgdina og ta stóru uppávuna, ið liggur á ummælaranum.

Líknandi fyrivarni hómast í ummælinum hjá Dagfinni Olsen av *Adventus Domini* eftir Jógvan Isaksen, tá hann sigur: „sum bókaummælari eri eg grønur. Fari tó at loyva mær at siga, at Isaksen her hevur gjørt tað einaferð enn!“ (Olsen, Dagfinn. 2007).

Í áhugaverdum ummælum, sum eg komi aftur til í viðgerðini, skriva cand.mag. Ivan Niclasen (f. 1960), Hugin Eide (f. 1963), bókavørður, og René Hjelm (f. 1967), bókmentafrøðingur, um tað at ummæla í Føroyum. Teir koma inn á, at føroyskir ummælarar duga so illa at kritisera, teir tora ikki at siga sannleikan, tá okkurt er, sum teimum ikki dámar, men siga bara „ikki so galið“ o.s.fr. Teir koma eisini inn á, at tað eru so fáir ummælarar í Føroyum (Niclasen og Eide 2000a). Í øðrum føri er veruligt kjak um, hvat ummæli skulu, nær tey hava sín tilverurætt í tíðarritum, og hvønn leiklut tey hava (Niclasen og Eide 2000b). Hesi ummælini eru dømi um eksperimenterandi ummæli, sum hava ta dagsskrá at seta ummæli á breddan, og metatekstliga funktiónin er partur av hesari dagsskrá. Nærri verður komið inn á hetta í viðgerðini av ummælunum í kapitli 7.

Ein ummælari, sum skrivar nógv um ummælaraleiklutin í sínum ummælum, er bókmentafrøðingurin, rithøvundurin og ummælarin Kim Simonsen (f. 1970). Hetta skrivar hann í ummælinum av yrkingasavinum *2002 nætur* (2004) eftir Sigri Gaïni: „So koma vit til partin, eg haldi lítið um. Tað er at skriva erlig ummæli av yrkingum hjá ungum kenslubornum fólkum. Yrkingar, ið tey hava sent út í heimin við bløðandi hjarta, og sum ein hjartaleysur ummælari kann taka lívið av“ (Simonsen 2004d). Víðari lýsir hann ummælaraleiklutin í hesum sama ummæli og tann torføra bardagan millum at vera fakligur og ikki at taka mótið frá høvundum:

> At vera ummælari er ein bardagi millum ein professionellan fakligan stoltleika, og at siga tað, sum er sømiligt. Í Føroyum eisini ein bardagi um at finna eina erliga rødd, tí øll kennast. Tá tað kemur til tey ungu, skal ummælarin hugsa um at kveikja heldur enn at týna teirra sjálvsálit. Eitt ummæli kann tí vera ein leiðbeinandi rødd í myrkrinum, bæði fyri lesaran og høvundin (Simonsen 2004d).

Hesi bæði reglubrotini eru innskot í ummælið, og tey hava ikki so nógv við sjálvt ummælið av tekstinum at gera, men eru eitt slag av grundgeving fyri, hví Kim Simonsen ummælir, sum hann ger. Tey kunnu lesast sum ein háttur at verja seg sum ummælari og at vísa á, at hann hevur hugsað gjølla um sín leiklut. Í viðgerðini av ummælunum 1997-2007 verður komið aftur til hesa metafunktión, ið eg tulki sum avleiðing av einari ungari bókmenta- og ummælarasiðvenju, har ummælarin hevur tørv á at prógva sítt virði ikki bara við at ummæla og skriva væl, men við eksplisitt at verja sína støðu í sjálvum ummælinum.

Í ummælinum av leikinum eftir rithøvundin og ummælaran Hanus Kamban (f. 1942) *Heystveingir* (2000), sum snýr seg um brøðurnar Janus og Hans Andrias Djurhuus, nýtir Carl Jóhan Jensen høvið at vísa á Chr. Matras sum ummælara. Hetta kann lesast sum ein háttur at seta seg sjálvan sum ummælara við liðina á Chr. Matras og at vísa á ávísar dygdir hjá einum ummælara:

> Samstundis ger ein áður ókend og nærlíka nask atfinningarsemi, ið m.a. Christian Matras slóðaði fyri, av álvara vart við seg við krøvum um dygd og eitt støði í føroyskum bókmentum, ið stendur mát við tað, sum yrkt og skrivað varð í londunum uttan um okkum (Jensen 2000c).

Hetta at vísa á kanska tann kendasta og mest virda ummælaran, sum hevur verið í Føroyum, kann somuleiðis síggjast sum ein máti at javnseta seg við hann og harvið verja sín rætt at ummæla, eins og Chr. Matras gjørdi tað.

Vitanarglopp

Samanumtikið er bókmentaummælið sum granskingarøki samansett, og tað nemur við ymiskar siðvenjur, journalistiska, bókmentaliga eins væl og akademiska. Hóast tað hevur drúgva siðvenju, hevur tað verið merkt av tørvi á at rættvísgera sína tilveru.

Sum granskingarevni er bókmentaummælið merkt av lágari tign, og lítið er gjørt við at granska ummæli á akademiskum stigi. Í Føroyum er ummælið sum granskingarøki eitt at kalla ónomið land, men sum víst er á, er kortini ikki so lítið skrivað um ummæli í ymiskum høpi, bæði sum partur av bókmentagranskingini, í greinum, bløðum og tíðarritum og eisini sum metaviðmerkingar í ummælum.

Tað, sum gongur aftur í umrøðuni av føroyskum ummælum, er í stóran mun *lítilleikin*, og at tað er torført at ummæla í einum so lítlum bókmentaumhvørvi. Føroysk ummæli hava alsamt verið í kreppustøðu; tað ber illa til at tosa um nakra veruliga gulløld í teirri føroysku ummælarasøguni, hóast tað hava verið skiftandi tíðir. Ummælini hava havt betri kor í ávísum umstøðum enn øðrum, og einstaklingar hava gjørt vart við seg og hækkað góðskuna á ummælum ávís tíðarskeið.

Spírar, sum peika fram móti teirri gransking, sum eg í hesari ritgerð leggi fram, eru at hóma í tí, sum er skrivað um ummæli frammanundan. Viðgerðin hjá Anne-Kari Skarðhamar av ummælaravirkseminum í tíðarritunum hevur sum víst á lagt eitt grundarlag undir mína viðgerð og peikar fram ímóti evnum, sum eg taki upp. Anne-Kari hevur tó ikki viðgjørt ummæli í dagbløðum, so her verður eitt vitanarglopp viðgjørt í ritgerðini. Viðgerðin hjá Turið Sigurðardóttur av mótyrking hevur lagt ein spíra til mína viðgerð av undanformunum í føroyskum ummælum og tí ummælaravirksemi,ið fer fram sum partur av bókmentunum. Viðgerðin hjá Carl Jóhan Jensen av metingarkriteriunum hjá Chr. Matras er ein spíri til mína kanning av teimum metingarkriterium, sum skilja ummælararnar í tíðarskeiðinum 1997-2007. Fleiri av teimum evnum, sum verða viðgjørd í hesari ritgerð, eru umrødd í tí, sum er sagt um ummæli frammanundan, t.d. havi eg víst á, at tað áður er nomið leysliga í føroyskum høpi við hugsanina um ummælið sum samskiftisliga gerð, sum byrjan upp á eina samrøðu um bókmentir, og í fleiri førum hevur verið nevnt, at kvinnur hava fingið harðari viðferð enn menn í ummælunum hjá ávísum ummælarum. Hesir tættir verða viðgjørdir nágreiniligari í ritgerðini, og á tann hátt verða vitanarglopp viðgjørd. Tann byrjandi umrøðan hjá Inger Smærup Sørensen av málsliga stílinum í ummælum leggur eisini í føroyskum høpi grundarlag undir mína viðgerð av retorikkinum í ummælunum.

Higartil er tó eingin skipað viðgerð gjørd av nøkrum tíðarskeiði í føroyskari ummælarasøgu, og heldur eingin skipað viðgerð av máli, formi, innihaldi og stíli í føroyskum ummælum, har ummælið verður viðgjørt sum tekstur, ið er verdur at granska í sjálvum sær, ikki bert sum miðlatekstur, men eisini sum ein møguligur listaligur tekstur. Í hesari ritgerð verður farið í dýpdina við einum tíðarskeiði í føroyskari ummælarasøgu. Ummælini verða kannað formliga, innihaldsliga og retoriskt við tí fyri eyga at fáa fatan av, hvørja mynd ummælarin skapar av sær sjálvum í tekstinum út frá tilviti um hetta sermerkta tekstslag.

3. Mannagongd – endamál, arbeiðsøki og arbeiðsháttur

Tá John Chr. Jørgensen, sum setti sjøtil á gransking av ummælum í Norðurlondum, lýsir háttalag í bókmentagransking, leggur hann dent á, at tað er grundleggjandi knýtt at endamálinum við yvirhøvur at granska bókmentir (Jørgensen 1979:13). Tí er avgerandi, at spurningurin um endamálið við granskingini verður svaraður, áðrenn háttalagið verður lýst. Spurningurin um, *hvussu* granskast skal, er óloysiliga tongdur at spurninginum um, *hvat* verður granskað, og *hví* granskað verður. Hetta eru spurningar, sum mugu kallast grundarspurningarnir í bókmentagranskingini. Jørgensen sigur, at útgangsstøðið má vera prinsipielt forvitni og opinleiki, og tað alt avgerandi fyri, um háttalagið er gott, er, at tað er samanhangur millum *arbeiðsøki, arbeiðshátt* og *endamál*. Ein slíkan nærri allýstan samanhang kallar Jørgensen háttalag í bókmentagranskingini. Hildið verður uppá, at tað er samanhangur millum granskarans áhugaøki, granskingarøki, máta at savna tilfar og hansara metingar av tilfarinum. Við metingunum verður soleiðis vent aftur til útgangsstøðið, nevniliga áhugaøkið. Soleiðis gongur háttalagið í ring (Jørgensen 1979:13-15).

Tað er við hesum tonkum hjá John Chr. Jørgensen í huga, at eg fari at lýsa háttalagið í hesari ritgerð og í hesum andanum, at eg sigi, at

háttalag, soleiðis sum eg nýti tað í mínari gransking, er ikki normativt-ávísandi, men deskriptivt-tilbjóðandi[13]. Við hesum meini eg, at tað hevur ikki verið eitt háttalag frá byrjan, sum hevur stýrt hesari granskingarverkætlanini, men áhugamálini, granskingarobjektini, og tí hevur tað ikki verið eitt endamál í fyrstu atløgu at velja eitt háttalag fram um annað, men so við og við í tilgongdini at finna teir arbeiðshættir, sum hava tænt mínari gransking best.

Mín tilgongd hevur frá byrjan verið deskriptiv og ikki normativ. Tað, sum hevur stýrt mínari gransking, hevur verið áhugi fyri at lýsa ummælarastøðuna í Føroyum og ikki at seta ein standard fyri, hvussu ummælarastøðan átti at verið, hvussu ummæli eiga at vera o.s.fr. Hesin áhugi er sprottin úr forvitni um hetta tekstslag, sum fær lítið granskingarrúm og harvið eisini lítið rúm í undirvísing í bókmentum á hægri stigi, men sum kennist týdningarmikið og eisini onkursvegna torført at fara í holt við av ymiskum orsøkum. Eitt er sjálvt handverkið at skriva ummæli, og annað er tann serliga útsetta støðan, sum ummælarin setir seg sjálvan í, tá hann ummælir, kanska serliga í Føroyum, her viðurskiftini eru sera smá. Tað er *lítilleikin*, sum hevur merkt tað, sum higartil er sagt um ummæli í Føroyum, og til at lýsa hesa støðu, vísi eg til ástøði um „minor-“ og „ultraminor-“ bókmentir, sum greiða frá, hvussu ein lítil bókmentastovnur ikki bert er minni enn ein stórur bókmentastovnur, men eisini øðrvísi og ofta eyðkendur av trotmentan.

Granskingarspurningarnir, sum snúgva seg um sjálvsmyndan – hvussu ummælarin setir seg sjálvan fram í tekstinum, og hvussu hann skapar sær myndugleika – taka útgangsstøði í tí performativa rákinum, sum sæst ganga aftur í nógvum ummælum í viðgjørda tíðarskeiðinum. Sum nevnt kann ummælissøgan lýsast sum ein parallellsøga hjá bókmentasøguni, og her sæst um sama mundi rákið í norðurlendskari bókmentasøgu, sum danski bókmentagranskarin og ummælarin Jon Helt Haarder (f. 1963) kallar *performativa biografismu* (Haarder 2014), endurspeglað í ummælarasøguni. Spurningurin er, um tað ikki ber til at siga, at hetta rákið kom til sjóndar í føroyskum ummælum, áðrenn tað sló ígjøgnum í bókmentunum.

13 Sí Jørgensen 1979:18.

Tey evni, sum verða tikin fram, eru sprottin úr mínari lesing av ummælunum, og eru ikki eitt úrval, sum er gjørt frammanundan. Útisetamotivið, sum hevur havt stóran týdning í føroyskum bókmentum frá byrjan, er ein óundansleppandi partur av hesari viðgerð, tí fleiri ummæli, sum verða skrivað í hesum tíðarskeiði, eru skrivað í útisetabløð. Fleiri útisetar skriva eisini í hesum tíðarskeiði fast fyri tey føroysku bløðini *Dimmalætting* og *Sosialin*. Hetta kemst bæði av, at nógvir føroyingar, sum vanligt er, lesa uttanlands, men er eisini ein beinleiðis avleiðing av búskaparkreppuni í Føroyum í 1990-árunum, sum gjørdi, at 10 % av føroyingum fluttu av landinum, og tað styrkir støðuna hjá útisetanum í hesum tíðarskeiði. Í søguligum ljósi gevur tað eisini meining at leggja dent á útisetamotivið í føroyskum ummælaravirksemi, tí frá byrjan hava føroyskar bókmentir verið knýttar at tí arbeiðinum, sum varð gjørt millum føroyingar í Keypmannahavn, og fleiri ummælarar, t.d. Chr. Matras, sum ofta verður tikin fram í ritgerðini, skrivaðu ummæli í útisetu.

Eitt annað evni, sum hevur stungið seg upp í viðgerðini og gjørdist ein neyðugur partur av henni, um hon skuldi vera umboðandi fyri tað, sum rørir seg í tíðarskeiðinum 1997-2007, var kynjaspurningurin í ummælum, eitt evni, sum trokaði seg fram í lesingini av tilfarinum. Evnið hevur longu verið frammi í sambandi við ummæli. Anne-Kari Skarðhamar vísir sum nevnt á, at tað eru mest menn, sum skriva ummæli (Skarðhamar 2012), og bæði Skarðhamar og Malan Marnersdóttir nevna leysliga, at kvinnur fáa serliga harðan dóm frá ávísum monnum (Skarðhamar 2012, Marnersdóttir 1990). Fyri at seta hetta evni í ein ástøðiligan karm vísi eg til ástøðiligt tilfar og greinandi tekstir, sum taka støði í kynjagransking, t.d. verkið eftir franska rithøvundin, heimspekingin og feministin Simone de Beauvoir (1908-1986) *Le Deuxième Sexe* (1949), bókina *How to Suppress Women's Writing* (1983) eftir amerikanska rithøvundin, akademikaran og feministin Joanna Russ (1937-2011) og grein* eftir danska bókmentafrøðingin Pil Dahlerup (f. 1939), ið hevur granskað bókmentaligar kynsleiklutir.

Tað seinasta høvuðsevnið, sum verður tikið upp í viðgerðini av ummælunum hevur við sjálvt tilverugrundarlagið hjá ummælinum

* greinina „Omedvetna attityder hos en recensent“

at gera. Hetta evnið kemur fram í fleiri førum, tá kritikarar, sum eg havi víst á, gjøgnum tíðirnar hava roynt at vart ummælið sum tekstslag, eitt nú Arnold, Frye og Engdahl, nevniliga spurningurin, um ummælið kann roknast sum list. Sum eg havi víst á, verður ummælið í ritgerðini sett fram sum tekstur við eins høgum listaligum potentiali og aðrir tekstir, og hetta verður serliga tikið upp í viðgerðini av trimum ummælum eftir tríggjar rithøvundar, sum umboða tað væl.

Samanberandi háttalag verður nýtt á fleiri stigum í ritgerðini – føroysk ummæli verða sett í samband við ummæli í Norðurlondum og samanborin sínámillum, ummæli av sama verki verða sett upp ímóti hvørjum øðrum fyri at kasta ljós á hvørt annað, ummælaratypur verða settar upp ímóti hvørjari aðrari fyri at varpa ljós á eginleikarnar eins og ávísir ummælarar verða samanbornir fyri at vísa á, hvar teir líkjast, og hvar teir eru ymiskir.

Hóast eg eri partur av tí umhvørvi, sum eg lýsi, og havi áskoðanir um, hvat eitt gott ummæli er, og hvussu ein ideell ummælarastøða hevði verið, havi eg sett mær fyri frá byrjan at halda meg til objektivt at lýsa granskingarsøkið og eitt ávíst tíðarskeið í teirri føroysku ummælarasøguni við bókmentasøguligum og ummælarasøguligum tilviti skilt á tann hátt, at ummælarasøgan og tekstslagsøgan eru grundarlag undir lýsingini. Her eru tó ymisk fyrilit at taka, tí umhvørvið er lítið, sum granskað verður, og tað er neyðugt hjá mær at viðgera ummæli hjá lærarum, starvsfeløgum og eisini hjá mínum vegleiðara, um eg skal, sum eg havi sett mær fyri, skriva umboðandi um ummæli í Føroyum í tíðarskeiðinum 1997-2007. Hetta er ein støða, sum ikki slepst uttanum í einum so lítlum samfelag sum tí føroyska, og tí er hetta ein avmarking í mínum objektiviteti, um eg vil tað ella ei. Eg strembi eftir objektiviteti í mínari lýsing av granskingarøkinum, men tað ein sannroynd, at eg eri skúlað í teirri skipan, sum hevur útbúgvið fleiri av bókmentafrøðingunum, sum ummæla, og tað má síggjast sum ein partur av tí, sum avmarkar mínar møguleikar objektivt at granska ummælini og ummælarastøðuna í Føroyum. Hóast eg velji eitt partleyst sjónarhorn, so eru eyguni, sum kanna granskingarøkið, partur av teirri skipan, sum tey royna at seta seg uttanfyri at kanna. Lars Handesten (f. 1956), danskur bókmentafrøðingur og ummælari, nevnir í bókini *Litteraturen rundt. Aktører i det litterære felt*, at universitetið

er liður í einari langari ketu, sum framleiðir smakk og hættir at skoða og nýta bókmentir (Handesten 2018:155). Hann sigur, at ummælarar eru skúlaðir innan eina akademiska kanon, sum ávirkar teirra mátar at síggja bókmentir (Handesten 2018:125), og eg eri sum granskari í hesi somu støðu.

Tá til stykkis kemur, er hetta ein staðfesting av, at eg sum granskari havi somu avmarkingarnar, sum ummælararnir í tí samfelagnum, sum eg lýsi, hava, tá teir so objektivt sum gjørligt skulu viðgera og meta um eitt bókmentaverk. Eg eri v.ø.o. partur av sama trupulleika, sum kanska er tann størsta avbjóðingin í teirri føroysku ummælaramentanini: at hon er so lítil og trong, og tað ber ikki til at koma uttanum á ein ella annan hátt at viðgera vinir, starvsfelagar og familju. Hinvegin gevur mítt innlit í hetta lítla samfelagið og tey mynstur, sum eru galdandi (og sum eg eisini eri ein partur av), eisini nakrar førleikar at gjøgnumskoða júst hesar strukturar, sum kunnu vera ósjónligir fyri ein uttanfyristandandi. Tað eru tí bæði vansar og fyrimunir við, at eg eri partur av tí umhvørvinum, sum eg lýsi. Tá tað er sagt, havi eg sjálv higartil gjørt lítið við at ummæla, men eg eri so ella so við til at seta normar fyri, hvat góðar bókmentir eru: eg havi í umleið 10 ár undirvíst bæði á fróðskaparsetri og miðnámi í bókmentum, har úrvalið av lisnum tekstum og lestrarlistar eru eitt slag av virðismeting í sær sjálvum, og eri í tilnevningar- og dómsnevndum, sum meta um góðsku í skaldskapi og eru við til at seta standard fyri, hvat góðar bókmentir eru í Norðurlondum í løtuni. Her verður hugsað um tað, sum Mukařovský[14] sigur um, at tann listfrøðiliga funktiónin bara kemur til sjóndar undir ávísum umstøðum, t.e. í ávísum sosialum samanhangi (Mukařovský 1970/1979:3), og at normurin í samfelagnum fyri, hvat góð list er, flytur seg alla tíðina og er tongdur at normum, ið verða settir í høpi, sum ikki altíð eru eyðsýnd. Henda partin av tí bókmentaliga kritikkinum nevnir Gripsrud tann fjalda kritikkin (Gripsrud 1982). Eg eri ein partur av fjalda kritikkinum og taki tann sjónliga kritikkin til viðgerðar.

14 Norski rithøvundurin og bókmentakritikarin Jahn Thon (1946-2018) vísir á, at Mukařovský hevur havt nógv at siga í okkara tíð fyri hetta at skilja ta relationellu áskoðanina innan listfrøðiligar normar sum eitt samansett fyribrigdi, tongt at einari samansettari móttøkutilgongd (Thon 2016:156).

Ein meginspurningur, sum tekur seg upp í granskingini av ummælaraheiminum, er, hvør hevur vald at skilmarka á bókmentapallinum, og hvat gevur viðkomandi henda myndugleika. Hvør kann við myndugleika siga, hvat góðar bókmentir eru, og hvat verður hesin myndugleiki bygdur á? Hvat er tað, sum skapar myndugleika á bókmentaøkinum? Er tað útbúgving, vitan ella evnini at skriva, ella er tað okkurt heilt annað? Spurningar sum hesir skapa grundarlag undir tí, sum eg viðgeri ummælini útfrá. Eitt er vist, og tað er, at myndugleikin er ikki eintýddur, og ummælarin, ið hevur myndugleika vegna sína útbúgving, er sum nevnt hóttur í samfelagnum í dag, sum í minni mun enn fyrr setir sína lít til viðurkendar myndugleikar. Hinvegin vísi eg á, at kreppustøðan hjá ummælinum er, sum eisini nevnt, kanska meira at síggja sum ein tilverutreyt.

Ummælarar hava av høvundum verið sæddir sum snultarar og gjørdir til láturs, og ummælaravirksemi hevur verið hildið at vera eitt ókreativt starv, eitt avleitt virksemi, sum rætt og slætt hevur verið hildið at hava lítlan týdning (McDonald 2007:8). Tað er tó eitt grunduppáhald í hesari ritgerð, at ummælarin hevur týdning í tí bókmentaliga stovninum. Hann hevur ikki bara týdning, men hann hevur eitt virksemi og eitt seroki, sum er ein ómissandi liður í bókmentastovninum. Hann er ikki bert ein listamiðlari, hóast hann eisini er tað, og hann er ikki skald, hóast hann eisini kann vera tað. Ummælarin hevur eina serstaka støðu í bókmentaheiminum, og ummælið sum skapandi list hevur eitt egið virksemisøki, tað hevur ein egnan stíl, ein egnan diskurs, eitt egið endamál og tað hevur sín egna tilverurætt, sum hóast tað er treytað av listini, er ein týðandi partur av teirri bókmentaligu ringrásini[15], sum skapar bókmentastovnin.

Eitt annað grunduppáhald í hesari ritgerð er, at myndugleikin hjá ummælaranum er vorðin heterogenur soleiðis at skilja, at lesarar seta ikki sína lít á ein myndugleika, tí at hann t.d. hevur útbúgving, er knýttur at vitanarstovni ella líknandi, men teir velja sínar myndugleikar út frá egnum áhugamálum. Broytta miðlastøðan við sosialum

15 Viðvíkjandi hugtakinum „tann bókmentaliga ringrásin“ sí Escarpit 1968, Hans Hertel 1972, Handesten 2018.

miðlum, har øll kunnu úttala seg og siga sína hugsan uttan at verða mett av einari ritstjórn, ger hetta møguligt.

Hetta ávirkar, hvussu ummæli verða skrivað í okkara tíð. Formur og innihald flyta seg í samsvari við, at bókmentirnar flyta seg, og heilt niðri á orðastigi ber til at síggja, hvussu *ethos* ella *persona* hjá ummælaranum[16] verður sett fram í tekstinum fyri at skapa myndugleika og vinna trúvirði í lesarans eygum. At høvundar stremba eftir at skapa trúvirði í tekstinum, er sjálvandi ikki nakað nýtt, men hetta at skula kappast við aðrar røddir og vinna sær virðing eyðkennir okkara tíð meira enn tað gjørdi, tá ummæli t.d. vórðu skrivað í 1930-unum, har vit síggja dømi um, at ummælarin nýtir orðið „vit“ um seg sjálvan sum ummælara (Matras 1932). Hann roynir v.ø.o. ikki at skilja seg burtur úr mongdini fyri at skapa myndugleika, hann roynir ikki at pallseta sín egna persón, men tvørturímóti at tosa umboðandi vegna eina alment góðkenda fatan av, hvat góðar bókmentir eru; eina fatan, ið hann sum vitanarpersónur stendur fyri og kann úttala vegna eina ritstjórn ella annan felagsskap, møguliga vegna tjóðina ella kanska vegna ummælarans leiklut í samfelagnum sum ein, ið vegna sína støðu hevur myndugleika. Eisini Kristin í Geil umboðar eitt kollektiv, tá hann nýtir orðið „vi“ um seg sjálvan sum ummælara („Trop“ 1901).

Hetta er eitt uppáhald, sum eg seti sum grundarlag undir uppgávuni; eitt uppáhald, sum hevur undirtøku í gransking av ummælinum og tess broyttu grundkorum í tí bókmentaliga almenninum. Í teirri støðugt skiftandi miðlastøðuni er mentanarligur myndugleiki ikki treytaleyst til staðar vegna útbúgving, starv o.a., men fleiri ymisk sløg av myndugleikum gera seg galdandi á teimum ymisku miðlapallunum, ið eru sum eitt sjálvtøkuborð hjá lesarum at velja sær myndugleika á økinum eftir egnum áhuga og tørvi (Kristensen og From 2015).

Hóast ummælaraprofilarnir í okkara samtíð eru sera ymiskir, síggja vit typur ganga aftur ella stinga seg upp, sum týðiliga gera burturúr at seta seg á pall sum ummælarar, og sum týðiliga seta eitt *ethos* ella ein *persona* fram, sum eru tilvitað um sín leiklut og sína uppgávu at vinna lesarans álit, soleiðis at tær kunnu verða sæddar sum myndugleikar á bókmentapallinum.

16 Hugtøkini verða skilmarkað í kapitli 6 „At skapa mentanarligan myndugleika“.

Endamál

Endamálið við kanningini er:

1. At lýsa ummælið sum tekstslag, tess støðu og leiklut í tí bókmentaliga stovninum.

2. Yvirskipað at lýsa ummælini í einum avmarkaðum tíðarskeiði í Føroyum, sum liggur nær við okkara samtíð, 1997-2007.

3. At kanna og viðgera vald ummæli og ávísar ummælaraprofilar í tíðarskeiðinum 1997-2007 nágreiniliga við serligum atliti at, hvussu ummælarin setir seg sjálvan fram í tekstinum, og hvussu hann í ummælinum bygnaðarliga, innihaldsliga, málsliga og stíli viðvíkjandi skapar sær myndugleika at meta um føroyskar bókmentir.

Arbeiðsøki og arbeiðsháttur

Endamálið verður rokkið við skipað at savna tilfarið frá einum tíðarskeiði, viðgera og bólka hetta tilfarið, sum fevnir um ummæli úr føroyskum bløðum og tíðarritum frá 1997-2007 og kvalitativt viðgera tað og síðani í skrivingini viðgera eitt úrval av ummælunum í dýpdina. Hesin arbeiðsháttur tryggjar, at kanningin hevur gildi og er eftirfarandi. Hann tryggjar tað neyðuga innlitið í granskingarøkið, skapar heildarfatan og álit á granskingarúrslitini við, at øll ummælini frá einum tíðarskeiði eru tikin við í kanningini, sum tó setir fokus á eitt úrval av ummælum við ávísum granskingarspurningum fyri eyga. Granskingarspurningarnir, sum eru settir út frá kanningini av teirri kvantitativu innsavningini og kvalitativu viðgerðini av hvørjum teksti sær, eru tríggir:

1. Til at røkka fyrsta liði av endamálinum kanni eg í fyrsta lagi, hvussu ummælið sum tekstslag verður lýst í granskingarhøpi, í øðrum lagi hvussu støðan hjá ummælinum í tí bókmentaliga stovninum verður lýst í ástøðiligum tekstum um ummæli, og í triðja lagi hvussu ummælarin og hansara leiklutur verður lýstur.

Hetta havi eg gjørt omanfyri (í kapitli 2 um granskingarøkið) við at fara ígjøgnum eitt úrval av ástøðiligum tekstum, sum viðgera ummælið sum tekstslag og ummælarans leiklut í samfelagnum. Tað snýr seg bæði um tekstir eftir eldri ummælarar, sum hava sagt sína hugsan um ummæli, t.d. Matthew Arnold, T. S. Eliot, Northrop Frye, og nýggjari ummælarar og samtíðargranskarar, ið hava kannað ummælið sum tekstslag og ummælaratypur av ymiskum slag, teirra millum John Chr. Jørgensen (1994) og Sissel Furuseth (2015). Hesir tekstirnir eru serliga kannaðir út frá, hvussu støðan hjá ummælum í bókmentastovninum verður lýst, og hvørjar leiklutir ummælarin hevur.

2. Til at røkka øðrum liði av endamálinum havi eg savnað ummælini í tíðarskeiðinum 1997-2007 inn, bólkað tey og viðgjørt tey yvirskipað. Hetta gevur yvirlit yvir eitt tíðarskeið í føroyskari ummælarasøgu.[17]

Hetta verður gjørt við at gera skipaða leiting á bokasavn.fo eftir øllum ummælum, sum eru skrásett í tíðarskeiðinum 1997-2007. Hesin parturin av ritgerðini hevur sostatt mongdarliga ella kvantitativa tilgongd fyri at røkka endamálinum at fáa yvirlit yvir ummælini í einum tíggjuáraskeiði. Leitingin er gjørd við at leita upp á leitorðini „ummæli“ og „bókaummæli“. Tá leitað verður við leitorðinum „ummæli“, koma 3.633 úrslit fram, og tá leitað verður við „bókaummæli“ koma 1427 úrslit. Tekstirnir, sum koma fram, eru skipaðir í tíðarrøð, og eg havi valt allar teir tekstir út, sum eru í tíðarskeiðinum 1997-2007. Í leitingini upp á „ummæli“, koma ummæli av bókum, filmum, myndlist, sjónleikum, fløgum o.ø., og tí er leitingin meira málrættað, tá leitað verður upp á „bókaummæli“/„bókarummæli“.[18] Kortini brúki eg eisini ta breiðaru leitingina fyri

17 Tíðarskeiðið, sum eg havi valt, er sambært landsbókavørðinum tað best skrásetta tíðarskeiðið hjá Landsbókasavninum, tá tað kemur til ummæli. Víst verður til samrøðu við Anniku Smith 13. mars 2017. Tað er samstundis eitt tíðarskeið, tá tað hendir nógv á føroyska miðla- og ummælarapallinum.

18 Eittans ummæli kemur fram, tá leitað verður upp á „bókarummæli“.

at kanna, um okkurt bókaummæli skuldi verið, ið er skrásett sum ummæli og ikki sum bókaummæli.

Landsbókasavnið sær tað sum eina týðandi uppgávu at savna alt tað, sum er útgivið av føroyskum tilfari, haruppií ummæli í dagbløðum og tíðarritum gjøgnum tíðirnar. Hetta sæst millum annað á blogginum hjá Erhardi Jacobsen frá 2011, tá hann sum landsbókavørður sigur, at „eitt tekstaslag, umframt bókmentirnar sjálvar, sum bókasøvnini leggja stóran dent á at savna og skráseta, eru ummæli" (Jacobsen 2011). Sambært Anniku Smith[19], nú landsbókavørði, er tíðarskeiðið 1997-2007 tó enn tað einasta tíðarskeiðið, sum er fullkomiliga skrásett í skipanini hjá Landsbókasavninum.

Landsbókasavnið, sum hevur skyldu til at savna inn og varðveita tjóðarbókaskránna, savnar inn út frá treytini, at alt tað, sum er um Føroyar, eftir føroyingar og á føroyskum, skal skrásetast og varðveitast. Umframt at savna inn allar bøkur, sum eru útgivnar, eru tíðarritini sum frá hevur liðið eisini komin við í skrásetingina og seinni eisini dagbløðini, og greinar eru skrásettar út frá somu treyt, at alt tað, sum er skrivað um Føroyar, av føroyingum og á føroyskum, verður savnað og skrásett. Gjøgnum mong ár er eitt innsavningararbeiði av ummælum eisini farið fram, og Landsbókasavnið hevur í varðveitslu ummæli, sum eru savnað gjøgnum tíðirnar. Nógv av hesum liggur á goymslu á Landsbókasavninum, men er ikki skrásett – enn. Okkurt er tó skrásett, og í 2015 varð avgerð tikin um at savna og skráseta ummæli meira skipað til tjóðarbókaskránna. Tá vórðu eisini treytir settar fyri, hvat skal til, fyri at ein tekstur skal kunna bólkast sum ummæli. Eitt ummæli er sambært kriteriunum ein tekstur úr dagbløðum, tíðarritum og ávísum bloggum eftir fólk, sum t.d. er bókmentafólk. Skilt verður millum ummæli og umrøðu, og eitt ummæli skal vera um bøkur, tónleik, film, listaframsýningar og konsertir, tá tað eru útgávukonsertir. Eitt ummæli skal vera minst 750 orð. Hetta er ein standardur, sum Landsbókasavnið hevur sett við fyrimynd í donskum standardum fyri innsavning av ummælum. Dentur verður tó lagdur á, at hetta bert eru leiðreglur.[20]

19 Í samrøðu í 2017.
20 Víst verður til samrøðu við Anniku Smith, í 2017.

Aftur at hesum kriterium havi eg sjálv nøkur innihaldslig kriterii. Eg skal gera vart við, at tá eg tosi um ummæli, tosi eg bara um ummælini og ikki samrøður um bøkur o.a., sum er útkomið. Eitt ummæli inniheldur sum meginreglu: kunning um tekstin, samandrátt, viðgerð og meting (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:8). Í ávísum førum verða ummæli skrivað, sum hava samrøðu við høvundin sum part av tekstinum. Her havi eg í hvørjum einstøkum føri tikið støðu til, um talan er um ummæli ella rithøvundarsamrøðu út frá nevndu kriterium.

Eftir at internetið var komið, fór Landsbókasavnið í 1997 undir at skráseta ummæli talgilt úr *Dimmalætting*, *Sosialinum* og hinum dagbløðunum og tíðarritunum, og tey vórðu skrásett í skipan bókasavnsins. Hetta arbeiðið er fullfíggjað út frá teirra kriterium, sum eru nevnd omanfyri, fyri, hvat eitt ummæli er, fram til 2007, tá tey góvust við at skráseta hvørt ummæli, tí bløðini vórðu talgild. Øll ummæli frá tíðarskeiðinum 1997-2017 eru v.ø.o. savnað og førd inn í leitiskipanina hjá Landsbókasavninum. Landsbókasavnið hevur skilmarkað og skrásett tey, og hetta nýti eg sum trygd fyri, at eg við at leita upp á tey røttu leitorðini[21] fái øll ummæli frá tíðarskeiðinum við í mína viðgerð, og við tað at teirra kriterii eru breiðari enn míni, geri eg eina sálding afturat fyri bara at hava bókaummælini við.

Eg havi leitað á bokasavn.fo undir „bókaummæli" og eri farin gjøgnum alt tilfarið, sum er dagfest frá og við 1997 til og við árinum 2007. Eg havi valt at avmarka meg til ummæli av føgrum bókmentum: skaldsøgum, stuttsøgusøvnum, yrkingasøvnum og útgivnum leikritum. Tilfarið fevnir um ummæli av útgivnum føroyskum skaldskapi. Týddur skaldskapur er ikki við, og barnabøkur eru ikki við. Onkrar bøkur, sum liggja á markinum millum at vera ungdómsbøkur og vaksnamannabøkur eru við, t.d. havi eg valt at viðgera ummælini av *Søgum úr Port Janua* (1996) eftir Rakel Helmsdal, ið kann bólkast

21 Hesi leitorð eru nýtt í skrásetingini hjá Landsbókasavnium, tá ummæli eru skrásett: Bókaummæli, ummæli, blaðummæli, sjónleikaummæli, leiklistarummæli, tíðarritaummæli, sjónvarpsummæli, blaðummæli, avísummæli, filmsummæli, bókmentaummæli, tónleikaummæli (víst verður til prát við Lauru Vinter, 1. bókavørð 15/2 2018).

sum ungdómsbók, men eisini sum eitt stuttsøgusavn til vaksin. Eisini ummælini av *Heiminum forna* (2000) eftir Annfinn í Skála, sum kom út í tveimum bindum, verða tikin við við teirri grundgeving, at bókin eins nógv er til vaksin sum til ung og stór børn, ein niðurstøða, sum Bergljót av Skarði kemur til í sínum ummæli av seinna bindinum *Ferðin til Zambora* (Skarði 2001).

Orsøkin til ikki at hava týddar bøkur og barnabøkur við er fyrst og fremst, at tað avmarkar tilfarsnøgdina, og avmarkar kanningina til kjarnan av upprunaføroyskum skaldskapi fyri at granska, hvussu ummælarar taka ímóti nýggjum føroyskum skaldskapi. Ummælini av týddum bókum eru týdningarmikil partur av ummælunum í einari samtíð, og við týðing, útgávu og ummælum verður týddur skaldskapur partur av tí føroyska bókmentastovninum. Tó mugu ummæli av týddum bókum sigast at falla í eina aðra deild enn ummæli av nýggjum føroyskum skaldskapi. Týddu bøkurnar hava longu verið gjøgnum eina góðkenningartilgongd í ummælaraheiminum, og tað eru ofta viðurkendar bøkur og klassikarar, sum verða umsett til føroyskt. Tá tað kemur til barnabókmentir, ber eisini til at siga, at tær falla í eina kategori fyri seg, við tað at tær í størri mun enn annar skaldskapur eru skrivaðar við ávísum móttakara fyri eyga og í størri mun enn annar skaldskapur hava uppalandi funktión.

Ein partur av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007 eru ummæli av skaldskapi, sum langt síðani er útkomin. Jógvan Isaksen hevur t.d. skrivað eina rød av ummælum av bókum hjá Heðini Brú og øðrum. Tey falla eisini uttan fyri mítt granskingarøki, tí tey ikki eru ummæli av nýggjum føroyskum skaldskapi. Her havi eg valt bert at taka ummæli við, sum eru skrivað í mesta lagi trý ár eftir, at bókin er útkomin. Ummæli av heildarssøvnum av yrkingum eru ikki tikin við og heldur ikki ummæli av øðrum endurútgávum. Ummæli av ferðafrásagnum eru ikki við, og ummæli, sum eru stutt og mest at rokna sum lýsingar, eru ikki tikin við. Rithøvundarsamrøður falla eisini uttan fyri hesa gransking.

Landsbókasavnið tryggjar, sum nevnt, at yvirlitið er fullfíggjað tíðarskeiðið 1997-2007, hóast ummæli av føroyskum bókmentum ikki annars kunnu sigast at vera væl skrásett. Kortini eri eg í mínari leiting komin fram á nøkur ummæli frá hesum tíðarskeiðinum, sum ikki eru

skrásett. Tað er tí við tí fyrivarni, at tað sjálvsagt kann vera okkurt, sum er gloppið burturímillum, tá tað eru menniskju, sum sita og leita og skráseta, at eg sigi, at eg havi savnað øll ummælini. Hetta ávirkar ikki granskingina sum slíka, tí hóast endamálið í hesum partinum av granskingini at fáa yvirlit yvir ummælini í einum tíðarskeiði, so ávirkar tað ikki heildina nakað merkisvert, um okkurt einstakt ummæli manglar.

Tá innsavningin var liðug, og eg hevði sáldað øll tey ummæli frá, sum ikki livdu upp til tey kriteriini, sum eg hevði sett, vóru 142 ummæli. Hesi 142 ummælini (fylgiskjal 1) eru grundarlag undir kanningini í hesari ritgerð.

Summi ummæli eru prentað í fleiri bløðum. Eg havi valt bert at upplýsa ein miðil fyri hvørt ummæli.

3. Til at røkka triðja liði av endamálinum verða ávísir ummælarar, sum umboða ymiskar ummælaratypur, viðgjørdir í dýpdina, eins og ávís ummæli, sum á onkran hátt hava sett dám á tað viðgjørda tíðarskeiðið, verða viðgjørd nágreiniliga.

Fyri at røkka hesum triðja endamálinum nýti eg kvalitativan arbeiðshátt og lýsi ávísar ummælaraprofilar. Hesir ummælaraprofilar verða settir inn í tann samanhang, sum teir verða hildnir at umboða best, t.d. fylla Carl Jóhan Jensen og Kim Simonsen nógv í kapitlinum um pallsetta ummælaran, og Jógvan Isaksen er ein týðandi figur í kapitlinum um at ummæla í útisetu. Í arbeiðsgongdini havi eg arbeitt við býtinum millum ávikavist journalistin sum ummælara, bókmentafrøðingin sum ummælara og rithøvundin sum ummælara, og hesar skilmarkingar hava týdning í viðgerðini, skilt á tann hátt, at útisetaummælarin fyrst og fremst er umboðaður av bókmentafrøðinginum, pallsetti ummælarin fyrst og fremst er umboðaður av rithøvundinum og kvinnurnar sum ummælarar fyrst og fremst eru umboðaðar av bókmentafrøðinginum. Tað verður gjørt meira burtur úr summum ummælum enn øðrum, t.d. ávísum ummælum, sum umboða ta samansettu heildina av ummælarum í hesum tíðarskeiðinum serliga væl. Gongdin hevur verið tann, at eg fyrst havi viðgjørt øll ummælini fyri at kunna seta viðkomandi granskingarspurningar. Tá

tað kemur til sjálva skrivingina, eru ikki øll ummæli umboðað eins væl. Grundgevingin fyri vali av ávísum ummælum at greina nærri er, at ummælið er serliga áhugavert fyri mínar granskingarspurningar, at tað hevur havt týdning bókmenta- og ummælissøguliga, ella at tað lýsir væl tey evni, eg leggi dent á í viðgerðini.

Eg havi vístá, at ummælið er samansett tekstslag, og at tað verður skilmarkað sum tekstslag, ið liggur á markinum millum ymiskar siðvenjur. Hetta er eisini orsøk til, at tað er ógjørligt at gera eintýddar bólkingar av ummælarum sum umboðandi t.d. rithøvundarummælaran, journalistin ella bókmentafrøðingin sum ummælara. Flestu ummælarar hava fleiri leiklutir og umboða fleiri ummælaratypur samstundis. Í viðgerðini býti eg tí kapitlarnar sundur eftir evni, hóast eg í arbeiðsgongdini havi arbeitt við omanfyrinevndu ummælaratypunum.

Ummælini verða kannað út frá ástøði um tekstslag. Tey verða við øðrum orðum lisin við tilviti um tekstslagssøgu og tekstslagsástøði. Tey verða lisin við tilviti um, hvat ummæli vanliga innihalda, út frá í hvønn mun tey halda seg til tey vanligu tekstslagseyðkennini, ella um tey bróta frá ummælum, sum vit kenna tey. John Chr. Jørgensen sigur, at kanning av ummælum inniheldur kanning av:

- Ummælinum sum teksti, har tað millum annað verður hugt at bygging, grundgeving, áherðslu, listfrøðiligum og ideologiskum sjónarhorni og undirskiltum lesarafortreytum.
- Ummælarans bakgrund við atliti at útbúgving, kunngjørdum endamáli, starvi o.ø.
- Teirri bókmentasøguligu og politisku støðuni, v.ø.o. høvuðsrákum o.ø.
- Miðlinum – eyðkennunum hjá blaðnum ella tíðarritinum, lesaraskara o.ø.
- Árinunum, sum ummælið hevur, t.e. bæði teimum ætlaðu/hugsaðu árinunum, men eisini teimum praktisku árinunum, tá tað snýr seg um meiningarmyndan, stýring av lesaranum og sølu o.s.fr.

(Jørgensen 1994a: 105).

Hesi eyðkenni havi eg havt í huga í mínum arbeiði uttan tó í viðgerðini at leggja dent á øll í hvørjum einstøkum ummæli. John Chr. Jørgensen leggur í hesum frymli áherðslu á, at tað er sum miðlatilfar, at hann greinar ummælini. Eg leggi meg ikki fyrst og fremst eftir at greina ummælini sum miðlatilfar, men sum tekst yvirhøvur. Tað er tó ein sannroynd, at teir tekstirnir, sum eg greini, eru at finna í bløðum og tíðarritum, og í mínari lesing av ummælum eri eg tilvitað um, at tey júst eru skrivað í bløð og tíðarrit og tí í ávísan mun skulu liva upp til tey krøv, sum ein miðlatekstur skal. Tí læni eg hesi punktini frá John Chr. Jørgensen og havi tey við í mínari lesing uttan tó at gera eina skipaða gjøgnumgongd av ummælunum út frá teimum punktunum.

Sum nevnt, eri eg í mínari lesing av ummælum litað av teirri siðvenju, sum eg eri skúlað í. Í innganginum til *Norsk litteraturkritikks Historie 1870-2010* (2016) gera høvundarnir vart við, at teir fremja somu neyvlesingarstrategi, tá teir lesa kritiskar tekstir, sum tá teir lesa fagrar bókmentir, tí teir eiga at verða lisnir við sama nærlagni (Furuseth og Vassenden 2016:21). Hetta er ein siðvenja í norskari ummælissøgu, sum eg taki til mín. Her hevur neyvlestur fyri mín part verið eitt lykilorð; neyvlesturin, sum er ein lykilfunktión í nýkritikkinum, ið eisini er grundarlag undir teirri bókmentaligu siðvenju, sum eg eri skúlað í. Hesin neyvlestur er amboðið, sum eg nýti í møtinum við ummælið sum tekst. Við grundgeving úr gransking av *ethos* og *persona* í føgrum bókmentum og yrkistekstum (Booth 1983, Cherry 1998, Grue 2007), har vístá verður á, at pallsetingin av *ethos* ella *persona* í tekstum ikki er fullkomiliga ymisk frá yrkistekstum til fagrar tekstir, men virkar á sama kontinuum, verður ummælið sum tekstur ikki viðgjørt stórt øðrvísi enn fagrar bókmentir. Innihaldið verður kannað eins og mál, stílur, formur og frásagnarviðurskiftini, við atliti at, hvussu høvundurin setir seg sjálvan fram í tekstinum.

Tá tað kemur til at lesa ummæli, so er eitt av endamálunum við lesingini at avdúka, hvørji metingarkriterii ummælarin nýtir til at kunna siga, hvat góðar bókmentir eru. Hetta verður gjørt við at neyvlesa tekstin fyri at kanna, hvørjar grundgevingar ummælarin nýtir, tá hann kemur til eina niðurstøðu um tekstin, sum hann ummælir. Verða bókmentir mettar út frá, um tær hava listaliga dygd? Verða tær mettar út frá sínum evnum at bera ein boðskap, ella hvørja nyttu

tær kunnu gera í samfelagnum? Ella verða tær mettar eftir sínum evnum at røra ella at undirhalda lesaran o.s.fr.?

Aftur at hesum verður retorikkurin í ummælinum kannaður. Hvussu grundgevur ummælarin fyri sínum niðurstøðum um, hvat góðar bókmentir eru? Grundgevur hann við logiskum frágreiðingum, við at pallseta sítt egna *ethos*, ella *persona*, ella nýtir hann kenslur sum grundgevingar?

Umframt at nýta neyvlestur frá nýkritikkinum og amboð úr retorisku siðvenjuni er neyðugt at síggja ummælini og metingarnar av list sum part av einari størri heild, har bókmentir fáa sítt virði í samskiftinum millum menniskju. Her kemur ástøðið hjá franska samfelagsfrøðinginum Pierre Bourdieu (1930-2002) inn, sum hevur havt stóra ávirkan á bókmentagransking og gransking av list í sosialum samanhangi, serliga ástøðið um mentanarligan kapital (Bourdieu 1992/1996:141-173), og somuleiðis áskoðanin hjá kekkiska bókmenta-, mál- og listafrøðinginum Mukařovský (1891-1975) um, at listfrøðiligt virði altíð kemur til sjóndar í einum ávísum sosialum samanhangi (Mukařovský 1970/1979:3). Mín gransking hevur ikki bókmentasosiologiskt sjónarhorn, og tí eru hesi verk ikki ein partur av sjálvari viðgerðini, men ástøðini eru grundarlag undir sannkenningini av, at listaligt virði ikki er absolutt, og at allar tær mekanismur, sum gera seg galdandi í metingini av einum teksti, ikki kunnu lesast í sjálvum tekstinum.

Tað eru serliga tveir granskingarspurningar, sum hava verið snúningsdepil í kanningini:

- Hvussu skapar ummælarin sær mentanarligan myndugleika í tekstinum?
- Hvussu pallsetir hann seg í tekstinum?

Hesir spurningar krevja bæði innihaldsgreining og diskursgreining, tí ummælarin skapar sær mentanarligan myndugleika bæði í tí, sum hann ber fram innihaldsliga í ummælinum og í háttinum, hann ber tað fram, bæði tá tað kemur til stíl og orðaval, og tá tað kemur til at mynda seg sjálvan í tekstinum.

Spurningarnar havi eg sett við fyrimynd í gransking í ymiskum londum, t.d. gransking hjá Rian Koreman (f. 1986), sum granskar hollendsk ummæli á Erasmus School of History, deildini fyri mentan og samskifti, og setir spurningin, hvussu ummælarar skapa mentanarligan myndugleika[22], og gransking av performativum kritikki í Svøríki (William-Olsson 2013b).

Ástøðiliga grundarlagið er bókmentafrøðiligt. Tað er fyrst og fremst tekstslagssøguligt og tekstslagsástøðiligt, og harumframt er tað tekstfrøðiligt á tann hátt, at formur, innihald og serliga frásagnarviðurskifti verða kannað. Ástøði frá retorikkinum verða tikin við, og bókmentasosiologiskt sjónarhorn verður nýtt á tann hátt, at eitt tilvit um samtekst, har list fær virði í samskiftinum millum menniskju, og harvið sambært Bourdieu í valdstøðum, eisini er til staðar.

Ummælissøguligt innlit

Fyri at lýsa ummælini í árunum 1997-2007 við bókmentasøguligum ella ummælissøguligum tilviti, havi eg eisini gjørt annað innsavningararbeiði enn bert at savna inn ummælini frá hesum tíðarskeiðinum.

Eg havi miðvíst gjøgnumgingið tey fyrstu bløðini: *Føringatíðindi* (1890-1906), *Fuglaframa* (1898-1902) og tey fyrstu árini hjá *Tingakrossi* (1901-1990) og *Dimmalætting (*1878-) o.fl. fyri at kanna, hvussu tey fyrstu ummælini sóu út, hvussu og í hvørjum miðlum tey vóru skrivað.

Eitt minni skipað innsavningararbeiði er farið fram, har eg eri farin ígjøgnum tey ummæli, sum Landsbókasavnið og onnur bókasøvn í landinum hava savnað gjøgnum tíðirnar og skipað í mappur eftir heiti á tí ummælta høvundinum. Hetta innsavningararbeiði hevur skapað breidd í míni vitan um ummæli, tí eg havi sað og lisið nógv ummæli, sum eru skrivað gjøgnum tíðirnar, hóast eg ikki havi givið mær stundir at fara ígjøgnum øll bløð og tíðarrit, sum eru komin út í Føroyum, síðani tær fyrstu føroysku bókmentirnar vórðu útgivnar og tey fyrstu ummælini skrivað. Tað hevði kravt meira tíð og eitt størri arbeiði, enn henda verkætlan gav høvi til, hóast tað kundi verið

22 https://www.eur.nl/en/eshcc/research/ermecc/projects/constructing-cultural-authority (25.01.2019)

serstakliga áhugavert at fingið øll ummæli gjøgnum tíðina skrásett og savnað.

Ein eygleiðing hjá mær í hesum innsavningararbeiði er sum nevnt, at í innsavningini, sum er farin fram á Landsbókasavinum gjøgnum árini, eru ummælini skipað eftir navninum á høvundinum, sum verður ummæltur, og ikki eftir høvundinum, sum hevur skrivað tekstin, ummælaranum. Hetta sigur eitt sindur um, hvørja støðu ummælini og ummælarin hava í bókmentastovninum, har ummælini verða mett sum hjálpartekstir til skaldskap, og har ummælarin ikki hevur status sum rithøvundur, men sum ein, ið skrivar um tað, sum teir veruligu rithøvundarnir skriva.

Hesar eygleiðingar leiða aftur til spurningarnar, sum eg av fyrstan tíð setti mær, nevniliga hvørja støðu ummælið og ummælararnir hava í bókmentastovninum. Í innsavningini eri eg soleiðis konfronterað við hetta sama, sum frá byrjan hevur skapt áhuga hjá mær, at ummælini hava verið sædd sum sekundert tekstslag, og at ummælaravirksemið hevur minni týdning í bókmentastovninum. Í sjálvari metingini av tilfarinum var mín varhugi, at ummælið sum tekstur hevur líka stórt listaligt potentiali sum aðrir tekstir, og tað var mín áhugi og ætlan frá byrjan at lýsa tað sum slíkt. Viðgerðin av tilfarinum staðfestir varhuga og ástøði um, at tekstslagið ikki bara inniheldur kvalifiserða meting av list, men eisini er umboðað av tekstum, sum vilja annað og meira enn tað; bæði at siga nakað um samfelagið, siga nakað um list í sínari heild, bera fram boðskap, føra fram egna poetikk og egnan skaldskap og seinast, men ikki minst, eru tekstir, sum, hóast teir eru viðgerð av øðrum tekstum, kunnu sigast at vera heilstoyptar eindir í sjálvum sær og kunnu standa einsamallir sum listalig avrik. Soleiðis er samsvar millum mítt áhugaøki, granskingarøki, máta at savna tilfar og mínar metingar av tilfarinum og vent verður aftur og aftur til útgangsstøðið, nevniliga áhugaøkið, har háttalagið í bókmentaligari gransking gongur í ring, sum John Chr. Jørgensen vísir á: „Med vurderingerne sluttes således tilbage til udgangspunktet, interesseområdet, og denne metodeopfattelse kan således illustreres grafisk med en cirkel“ (Jørgensen 1979:15).

Skrásetingin gevur ábending um, hvat tað er, sum hevur týdning. Hvørjar høvundar vit rokna sum rithøvundar, og hvørjar skrivarar

vit bara rokna sum skrivarar og ikki sum veruligar rithøvundar. Foucault er sum nevnt inni á hesum í sínari grein „What is an author“, tá hann vísir á, at tað er ikki altíð og í øllum tíðum, at vit krevja eitt høvundarnavn knýtt at einum teksti. Tað er ikki fyrr enn seint í tíðini, at høvundarleikluturin er vorðin so týdningarmikil í okkara samfelag, tá tað kemur til fagrar bókmentir. Tað er ikki fyrr enn í einari mentan sum okkara, at høvundurin er vorðin individualiseraður og hevur fingið ta støðu og tign, sum hann hevur í samfelagnum í dag (Foucault 1969). Og hugsa vit um júst tignina, sum liggur í høvundarnavninum, so kunnu vit bert út frá skrásetingini av ummælum gjøgnum tíðina siga, at hetta er ikki ein tign, sum ummælarar hava havt.

At enda skal nevnast, at onkrar feilskrásetingar eru, og tær hava skapað eitt ávíst høvuðbrýggj um, hvør hevur skrivað ávís ummæli. Talan er um ummæli, sum Jógvan Isaksen hevur skrivað í *Sosialinum* í tíðarskeiðinum, tá Anna Ellingsgaard og Rigmor Dam høvdu ritstjórnarliga ábyrgd av mentanartilfarinum hjá *Sosialinum*. Tað stendur ikki tilskilað, hvør hevur skrivað ummælini av *Tema við slankum* (2007) eftir Sólrúna Michelsen, „Handan rimar“ (Isaksen 2007b), og *Tey eru sum taka mánalýsi í álvara* (2007) eftir Jóanes Nielsen, „Jóanesar opinbering“ (Isaksen 2007c), og av tí sama standa Anna V. Ellingsgaard og Rigmor Dam fyri hesum báðum ummælum í skrásetingini hjá Landsbókasavninum. Við tað at Jógvan Isaksen hevur latið hesi ummæli prentað í bókini *Dulsmál og loynigongir* (2008), má eg ganga út frá, at hann hevur skrivað tey, tí einki navn stendur tilskilað undir ummælunum í *Sosialinum*. Ivamál er tí eisini um ummælið av greina- og søgusavninum eftir Firouz Gaïni *Gávur skulu rindast aftur* (2005), „Soleiðis kann tað ganga“ (Ellingsgaard 2005), sum Anna Ellingsgaard stendur at hava skrivað sambært yvirlitinum hjá Landsbókasavninum, tí hon hevði ritstjórnarliga ábyrgd. Einki navn stendur undir ummælinum.

4. Tekstslag

Ummælið sum tekstslag í bókmentaligum høpi er partur av einari størri heild. Edward Said býtir bókmentakritikk (criticism) í fýra øki, har tann praktiski kritikkurin umboðar ein bólk, altso ummæli og slíkt, sum verður skrivað í bløð/tíðarrit (journalistiskt), akademisk bókmentasøga umboðar annan bólk, bókmentalig virðismeting og tulking umboðar tann triðja (hesin bólkur er prinsipielt eisini akademiskur), og seinasti bólkurin, sum Said setir upp, er bókmentaástøði (Said 1983:1).

Ummælið sum leikari á tí bókmentaliga økinum

Eins og eg havi nomið við, er ummælið liður í samansettum kervi, ið er myndað av ymiskum leikarum á tí bókmentaliga økinum, sum viðvirka til, at ein bók verður framleidd, kemur út á marknaðin og verður móttikin. Ymiskir ástøðingar hava í ymiskum tíðum lýst henda pallin, sum teir ymisku leikararnir virka á.

Franski bókmentagranskarin Robert Escarpit (1918-2000), sum setti ta klassisku bókmentasosiologiina á stovn, lýsir í bókini *Sociologie de la littérature* (1958) ta bókmentaligu ringrásina. Gjøgnum skipaða empiriska kanning av tí bókmentaliga lívinum í samfelagnum lýsir hann ta tilgongdina, sum fer fram, tá ein bók kemur út á marknaðin,

t.v.s. framleiðslu, útbreiðslu og nýtslu av bókini frá høvundi gjøgnum bókamarknaðin og bókasøvn til lesaran. Lisbeth Worsøe-Schmidt (f. 1957), fyrrverandi lektari á deildini fyri kunningarnám við Keypmannahavnar universitet, vísir í grein um nýggjar aktørar á tí danska bókamarknaðinum á, at samfelagsfrøðin hjá Escarpit er ment undir teirri fortreyt, at vit hava eitt bókmentaligt almenni, har rithøvundurin kann fáa afturmeldingar frá sínum lesarum (Worsøe-Schmidt 2018).

Pierre Bourdieu og hansara áskoðan á listina í samfelagnum í bókini *Les Règles de l'art* (1992) hevur havt stóra ávirkan, og somuleiðis hansara ástøði um ta mentanarligu framleiðsluna í samfelagnum, sum er liður í einum stigveldi, har búskaparligur og mentanarligur kapitalur seta dagsskránna. Tað mentanarliga og harvið tað bókmentaliga økið skilir seg frá tí búskaparliga, og her er tað ikki tann, sum hevur størstan búskaparligan kapital, ið hevur hægstan myndugleika, men tann, sum meistrar eina ávísa mentanarliga kotu og norm. Í skipanini hjá Bourdieu ræður virðisrelativisma. Einki absolutt bókmentaligt virði er, men bókmentir fáa virði, tá onkur við høgum mentanarligum kapitali og harvið við valdi skilmarkar tær sum virðismiklar.

Ástøðið hjá Bourdieu verður nýtt til at greina orsøkina til, at sumt, sum verður skrivað, fær virði, meðan annað ikki verður góðtikið sum nakað, ið er vert at skriva um. Í ritgerðini verður hetta ástøði millum annað nýtt til at skilja, at grundleggjandi strukturar í mentanini eru við til at avgera, hvussu kvinnuligir rithøvundar, sum skriva um tað, ið verður fatað sum kvinnulig evni, verða møttir. Í brotinum „Kvinnur verða ummæltar, og kvinnur ummæla" í kapitli 7 komi eg aftur til hetta evni og vísi á, at í summum førum verður mótstøðan móti kvinnuligum rithøvundum og tí, sum verður fatað sum kvinnulig evni í bókmentum, orðað eksplisitt, men í øðrum førum endurspeglast mótstøðan í málinum, har virði og metingar kunnu avdúkast í ótilvitaðum orðavali. Við tað at ummælið sum nevnt er valdmikið tekstslag, fær henda mótstøða, sum sæst í málsligu strukturunum í ummælunum, ávirkan í allari teirri bókmentaligu ringrásini. Hon fær ávirkan á, hvat verður keypt og lisið, og eisini á, hvat verður kanoniserað, innstillað til virðisløn og heiðrað við mentanarstuðli. Ástøði Bourdieu um, at virði ikki er absolutt, men at valdstrukturar í samfelagnum avgera, hvør hevur tann mentanarliga kapitalin og harvið vald at skilmarka, hvat góðar bókmentir eru, varpar ljós á viðurskifti, sum síggjast aftur í tí viðgjørda tilfarinum.

Amerikanski bókmentagranskarin Rita Felski (f. 1956) hevur fört hugtøk hjá franska samfelagsfrøðinginum Bruno Latour (f. 1947) inn í bókmentaligt høpi og nýtt hansara hugtak „Actor-Network Theory" (ANT) og serliga hugtakið „attachment", ið hon førir inn sum eina berandi drívmegi millum leikararnar í tí bókmentaliga økinum, sum sínámillum ávirka hvønn annan. Ástøðið hjá Latour, ið er ein fløt skipan, stendur sum mótvekt til ástøðið hjá Bourdieu, har tað eru valdsharrarnir, ið dominera yvir teimum, sum eru lægri í stigveldinum. Hjá Latour fer tilknýti prinsipielt fram millum allar aktørar á tí bókmentaliga økinum, t.d. tá lesarin verður knýttur at bókmentunum, tí bókmentirnar bjóða nakað, sum lesarin verður gripin av.

Ástøðið hjá Ritu Felski um „attachment" ella tilknýti nýti eg til at varpa ljós á, hvat tað er, sum kann gera, at ummælarar í summum førum ikki verða hugtiknir av tí, teir lesa, tí evnini ella hendingarnar í skaldskapinum ikki tykjast teimum „fangandi". Hetta sæst t.d. aftur í ummæli hjá Jógvani Isaksen av stuttsøgusavni eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs (Isaksen 2004). Eisini verður ástøðið um tilknýti nýtt til at seta orð á tað, sum hendir, tá ein ummælari fellur fyri einum rithøvundi og at kalla øllum, sum hann skrivar. Hetta endurspeglast í mongum førum í teimum impressionistisku ummælunum, har atdráttarmegin millum verk og lesara beinleiðis verður orðað. Ummælini hjá Kinnu Poulsen av Tóroddi Poulsen eru dømi um hetta. Hon ummælir tað mesta, sum hann gevur út, og oftast sæst týðiliga aftur í orðavalinum, at hon er hugtikin av tí, hon lesur.

Í áðurnevndu bókini *Litteraturen rundt. Aktører i det litterære felt* tvinnar Lars Handesten ástøðið hjá Bourdieu og Latour saman, og hóast Erik Skyum-Nielsen kritiserar bókina, sigur hann, at hon fyllir eitt tómrúm og minkar eitt fakligt trot innan danska bókmentasosiologi, sum ikki hevur verið lýst, síðan bókmentafrøðingurin og ummælarin Hans Hertel (f. 1939) í 1972 víðkaði týðing sína av *Sociologie de la littérature* (1958) eftir Robert Escarpit við lýsing av tí danska bókmentastovninum (Skyum-Nielsen 2019).

Handesten vísir á, hvussu myndilin hjá Bourdieu, sum lýsir ein

ávísan kontekst í tí franska samfelagnum í seinnu helvt av 19. øld, ikki longur kann nýtast ókritiskt sum lýsing av okkara samfelag og av leikarunum í tí bókmentaligu ringrásini, men má síggjast sum ein partur av henni. Hann tekur Latour inn og góðskrivar Ritu Felski, at hon hevur gjørt eitt stórt arbeiði við at føra Latour inn í bókmentagranskingina og seta orð á, hvussu vit kunnu brúka hansara Actor Network Theory (ANT) í bókmentagranskingini heldur enn feltástøðið hjá Bourdieu. Handesten velur tó ein millumveg og vísir á, hvør vinningur fæst í bókmentagranskingini av at nýta báðar hvønn um annan og ikki vraka Bourdieu, sum framvegis hevur nógv at lata bókmentagranskingini, hóast hansara ástøði ikki kann standa einsamalt, tí vit hava fingið eina rød av nýggjum leikarum í tað bókmentaliga økið við broyttu miðlastøðuni, síðani Bourdieu setti sítt ástøði fram (Handesten 2018:17-37).

Handesten vísir eisini á, at hugtakið bókmentastovnur, sum vit tosa um sum eina sjálvfylgju í dag, ikki er so gamalt. Tað vaks fram í 1960-árunum. Í lýsingini hjá Habermas av søguni hjá tí borgaraliga almenninum[23] spæla bókmentapallarnir ein stóran leiklut, t.d. kaffihúsini, tíðarritini og tann bókmentaliga samveran í 18. og 19. øld (Handesten 2018:40).

Leikarar á tí bókmentaliga økinum eru eisini bókasøvnini, og Handesten vísir á teirra stóra leiklut í útbreiðsluni av bókmentum. Hann nevnir til dømis, at almennu bókasøvnini í Danmark standa saman um *Littaratursiden.dk*, sum er heimasíða, ið ummælir bøkur (Handesten 2018:151-152).

Handesten ger í sínari lýsing av pørtunum á tí bókmentaliga økinum burturúr at lýsa ummælararan sum ein av leikarunum, eins og hann vísir á høvundin, forleggjaran, lesararan og granskaran, sum allir hava sín týðandi leiklut í heildini, har teir sínámillum ávirka hvønn annan og skapa dynamikk í netverkinum.

At hesir felagsskapir eru ímyndaðir er sjálvsagt, og hetta kemur eisini til sjóndar, tá Handesten vil vera við, at tað eru ikki øll, sum halda, at nakar bókmentastovnur er til, og at hann tí ongan týdning hevur. Hann sigur tó, at ofta eru tað tey, sum av øðrum verða hildin

23 Sí Habermas 1962/2009.

at vera ein partur av bókmentastovninum, sum siga, at hann ikki er til (Handesten 2018:39-40). Hetta sigur eisini nakað um, at tá vit tosa um felagsskapir og netverk, so merkir tað oftast, at onkur er ein partur av felagsskapinum, meðan onnur ikki eru.

Á sama hátt sum Handesten velur at blanda ástøðini, tí tey á hvør sín hátt kasta ljós á leikararnar á bókmentapallinum, blandi eg hesi ástøði, tí tey lýsa á hvør sín hátt týðandi mekanismur, sum gera seg galdandi millum teir ymisku ummælararnar og høvundarnar ella verkini, teir ummæla.

Sissel Furuseth lýsir við støði í ástøði hjá amerikanska professaranum í retorikki Carolyn Miller ummælaravirksemið, sum fer fram í almenninum, har tey, sum taka lut í samrøðuni, hava leiklutir og kunnu samskifta tvørtur um mørk í tíð og rúmi; ein felagsskapur, sum Furuseth við støði í ástøðinum hjá Miller kallar virtuellan ella ímyndaðan felagsskap, sum líkist, men eisini kann fría seg frá, ítøkiligum samfelagsligum sambondum (Furuseth 2016a:463).

Ástøðið hjá Sissel Furuseth um tann ímyndaða felagsskapin verður saman við ástøðinum hjá Bourdieu, Felski og øðrum nýtt til at skilja tann sosiologiska partin av tí, sum fer fram, tá ummæli verða skrivað. Tað verður nýtt til at kasta ljós á, at ummælini standa ikki einsamøll sum tekstir, men gerast partur av einari samrøðu um bókmentir í einum størri høpi, ið kann síggjast sum ein ímyndaður felagsskapur.

Tá alt tað er sagt alment um ummælið sum leikara á tí bókmentaliga økinum, ber illa til at koma uttan um ummælandi útisetan, tá tað føroyska bókmentaliga økið skal lýsast í sínari heild við tað, at útisetin frá byrjan hevur verið ein sera týðandi partur av mentanarpallinum og ein týðandi leikari á tí føroyska bókmentaøkinum. Sum høvuðsstaður Føroya uttan fyri Føroyar hevur Keypmannahavn verið miðstøð fyri føroyskt intellektuelt lív í øldir, og tað seinasta mentanarliga blómaskeiðið í føroyskum útisetalívi fall júst í tí kannaða tíðarskeiðinum, 1997-2007. Komið verður aftur til leiklutin hjá útisetanum í lýsingini av søguliga baksýninum í kapitli 7.

Ummælið sum relatiónir millum menniskju

Leikluturin hjá ummælinum sum partur á tí bókmentaliga økinum er ein týðandi liður í lýsingini hjá fleiri ástøðingum um, hvat tað er, sum eyðkennir ummælið sum tekstslag.

Heitið á greinini hjá danska bókmentafrøðinginum og ummælaranum Erik Skyum-Nielsen „Litterær kritik er omgang med mennesker, trods alt“ leggur áherðslu á tann relationella partin av ummælinum sum tekstslag, at tá til stykkis kemur, er tað at ummæla samskifti við menniskju. Hann sigur, at eitt ummæli er eitt møti millum menniskju á trimum stigum. Fyri tað fyrsta millum tekstin og ummælaran sum lesara, og fyri tað annað millum ummælaran og rithøvundin. Fyri tað triðja er ummælið eitt møti millum ummælaran og lesararnar og harvið eitt ískoyti til ta almennu samrøðuna um bøkur í samfelagnum, lutvíst fyri at seta eina listfrøðiliga og mentanarpolitiska dagsskrá, ella – við orðunum hjá Bourdieu – fyri at ogna sær og staðfesta skilmarkingarvaldið á tí bókmentaliga økinum í samfelagnum (Skyum-Nielsen 2017).

Eisini danski bókmentagranskarin Morten Nøjgaard (f. 1934) setir orð á hesar fortreytirnar hjá ummælinum, nevniliga at kritikkur grundleggjandi er møti millum menniskju. Fortreytin fyri at úttala virðisdóm um eitt verk er, at eitt bókmentaligt verk er tøkt, sum hevur virði og dygdir, ið gerast viðkomandi og verða mett í menniskjans tilviti í møtinum við verkið, og at semja er um, at útsøgnin hevur eitt ávíst alment gildi (Nøjgaard 2003:296-297, 301).

Hetta er ein tvístøða í bókmentakritikkinum: øðrumegin tann subjektiva upplivingin av verkinum, sum ummælið krevur, og hinumegin kravið um eitt alment objektivt gildi í útsøgnini av einum virðisdómi. Sambært Nøjgaard kanst tú hava eina persónliga meining um eitt verk, so leingi tú ikki sigur hana hart. Men í tí tú sigur tína meining, er tað ikki bara tín persónliga meining longur, men ein meining, sum vil einum øðrum menniskja nakað, antin tað er at ávirka tess hugburð ella okkurt annað. Tað er ein samskiftislig gerð (Nøjgaard 2003:301), byrjan til eina samrøðu.

Hesin tankin um, at tekstir sum ummæli, har rithøvundurin sigur sína hugsan, eru byrjanin til eina samrøðu og ein longsil eftir at frætta aftur, verður eisini lýstur í formælinum hjá Martini Næs til savnið av greinum, ummælum og øðrum tekstum *Hvør eigur flaggknappin?* (Næs 1995). Tankin sæst eisini aftur, tá Steinbjørn B. Jacobsen í *Færøsk kulturpolitik ved indgangen til et nyt århundrede* lýsir, hvussu hann í royndini at fáa fólk at ummæla eftirlýsir eitt kjak um bókmentir, sum ikki er (Jacobsen 2001).

Lilian Munk Rösing (f. 1967), danskur bókmentafrøðingur og ummælari, fer so langt í sínari skilmarking av ummælinum sum samskifti, at hon avnoktar tað, sum flestu ástøðingar halda vera tað týdningarmesta innihaldið í ummælinum, smaksdómin, og sigur, at ummælið er liður í einari størri samrøðu um bókmentir:

> For en sådan kritikforståelse arbejder litteraturen og kritikken på samme projekt, og dette projekt er litteraturen selv. Den enkelte anmeldelse må da tænkes som noget der har til formål at indgå i den store dialog om litteraturen, om hvad litteratur er og gør og kan og kan blive. Det er ikke dommen over det enkelte værk der er afgørende, og anmeldelsen er hverken skrevet for at vejlede forfatteren i sit videre virke eller for at vejlede læseren i sit bogindkøb, men for at være fortsat fødselshjælper for litteraturens dialog med sig selv (Rösing 2013).

Ummælið hevur sambært Rösing eina grundleggjandi uppgávu, sum kemur fram um alt annað, ið ummælið inniheldur, greining, viðgerð, smaksdóm osfr. Tað er fyrst og fremst partur av onkrum nógv størri, nevniliga teirri stóru samrøðuni um bókmentir í samfelagnum. Ummælarin verður sæddur sum ein burðarhjálpari, sum fær bókmentirnar at samskifta við seg sjálvar.

Hesin tankin um at vera hjálpari kemur eisini fram í tí, sum Rita Felski í fyrilestrinum „Art and Attunement“ sigur um bókmentakritikkin:

> The artwork cannot act by itself. It needs allies, supporters, helpers. Attunement is a joint achievement. (Felski 2017: frá minutti 50:00) And that our experiences is co-produced in this way does not take away from the value of a work, but makes it possible. (Felski 2017: frá minutti 53:00).

Hetta sama verður eisini lýst í innganginum hjá Felski og Anker í bókini *Critique and Postcritique.* Sagt verður um listina: „While it can

be created by the author, it also requires an act of the interpretation by the critic“ (Anker og Felski 2017:6). Handesten kemur eisini inn á ummælið sum samskifti millum menniskju:

> Men anmeldelser kan også have en anden betydning end blot at anbefale eller advare. De indgår i en løbende diskussion af, hvad god litteratur er, og de er til oplysning for alle dem, som ikke har tid til at læse mange bøger og alligevel gerne vil „følge med“ (Handesten 2018:125).

Horace Engdahl sær kritikaran sum eina brúgv um gjónna millum ta avbyrging, sum rithøvundurin velur í skrivingini, og so lesarans heim. List verður skapað í sosialari avbyrging. Hann lýsir støðuna við orðunum hjá rómverska skaldinum Ovid, at tað at skriva uttan lesara er sum at dansa í myrkri. Nógvir rithøvundar dansa veruliga í myrkri, sigur Engdahl, samstundis sum teir á ein ella annan hátt vilja, at onkur skal lúra eftir teimum og gera listina sjónliga. Tí má mann snýta teir og fullføra ta eggjan, sum teir ikki sjálvir vága at fullføra, og føra skaldskapin aftur til tað menniskjaliga. Listin arbeiðir ímóti at samskifta beinleiðis, og tað er uppgávan hjá ummælaranum at átaka sær skommina at samskifta, sigur Engdahl. Ummælarin verður soleiðis ein janusfigurur (Stidsen 2018:39-41). Hann hevur dupulta samskiftisuppgávu og vendir sær til rithøvund og lesara samstundis.

Næstformaður í norska ummælarafelagnum, *Kritikerlaget*, Jon Rognlien (f. 1960), skrivar soleiðis um funktiónina hjá ummælinum:

> Den frie og uavhengige kritikken fungerer som et lymfesystem i det kulturelle kretsløpet. Slik lymfesystemet i kroppen renser vevet for slagg og overflødig væske, bekjemper sykdommer og transporterer fett fra tarmene og ut til cellene, virker den kvalifiserte, uavhengige kritikken både som en formidler av goder og som renovasjon av det mindre gode (Rognlien 2019).

Funktiónin hjá ummælinum verður her lýst við mynd úr lívfrøðini, har lymfuskipanin syrgir fyri at halda likaminum í javnvág, so tað

góða, sum tí tørvar, verður fört gjøgnum skipanina, meðan tað minni góða, sum likamið ikki hevur tørv á, verður reinsað út. Her sæst eisini valdmikla støða ummælarans. Hann verður lýstur sum eitt slag av duravørði, sum ein, ið er við til at avgera, hvat verður keypt og ikki, og hvat verður lisið og ikki.

Í sínari bók um rithøvundar, sum ummæla, skrivar Sissel Furuseth um sambond í bókmentakritikkinum og kemur inn á tey føri, tá sambandið ikki bert er ein ímyndaður felagsskapur, men ein veruligur felagsskapur, og sigur, at rithøvundar-ummælaravirksemi snýr seg í stóran mun um sambond, sambond millum tekstir og sambond millum rithøvundar (Furuseth 2015:47). Furuseth og Vassenden nevna eisini, at tey í viðgerðini av norsku ummælissøguni mugu hava í huga, at ummælarar eisini menna sína diskursivu strategi við sínum faktisku fysisku felagsskapum, sínum avmarkaða vinanetverki (Furuseth og Vassenden 2016:23). John Chr. Jørgensen skrivar grein um gegnistrupulleikan í bókmentaummælinum og kemur inn á viðurskifti, sum kunnu hava ávirkan á, um ummælini kunnu metast at hava trúviði. Tað kann vera í førum, tá ummælarin hevur „órein“ áhugamál, sum John Chr. Jørgensen málber seg, og ummælini kunnu síggjast sum ein væl skrivað sølulýsing ella sum fyrstahjálp til bókmentirnar heldur enn sum veruligur bókmentakritikkur. Hetta er ein spurningur, sum fær rúm í donskum ummælaravirksemi, og John Chr. Jørgensen vísir á, at danski ummælarin og bókmentaprofessarin Torben Brostrøm (1927-2020) misti loyvið at ummæla Klaus Rifbjerg (1931-2015) í *Information*, tí hann var hildin at vera ógegnigur, og at Erik Svendsen røkti síni vinaløg við at ummæla Jens Chr. Grøndahl, Carsten Jensen og Jens-Martin Eriksen (Jørgensen 2013). Hesin spurningur um gegni er týdningarmikil at gáa um í Danmark, og hann er týdningarmeiri at gáa um í Føroyum, her bókmentastovnurin er enn minni. Hetta er ein vandi, sum má havast í huga í Føroyum, tí hóast tað ber til at tosa um ein ímyndaðan felagsskap í tí føroyska bókmentastovninum, so er veruleikin, at felagsskapurin ofta røkkur út um tað at vera ímyndaður og er ein ítøkiligur felagsskapur. Viðurskriftini eru so smá, at tað er torfört at koma uttanum, at tey, sum fáast við bókmentir í Føroyum, kennast á ymiskum stigum, tí tað slepst illa undan at hittast til tey ymisku bókmentaligu tiltøkini, sum eru í landinum.

Í viðgerðini havi eg sett mær fyri fyrst og fremst at viðgera ummælini sum tekstir og ikki teir sosiologisku strukturar, sum gera seg galdandi í sambandi við, at ummæli verða skrivað. Tekstirnir liva tó ikki avbyrgdir í einum heimi fyri seg, men eru partur av teimum valdstrukturum, sum eg havi verið inni á. At kanna slíkar valdstrukturar hevði tó kravt eitt heilt annað kanningararbeiði, enn eg havi gjørt. Kortini havi eg tann veruleika í huga, at tað ikki bert eru ímyndaðir felgasskapir, sum stýra samskiftinum á tí føroyska bókmentapallinum, men eisini í mongum førum ítøkiligir felagsskapir, og tað er ikki ein sjálvfylgja, at motivini fyri at ummæla eru rein.

Journalistiskt tekstslag

Sum eg havi víst á, vaks ummælið sum tekstslag fram í dagbløðum og tíðarritum í 18. øld, tá eitt borgaraligt almenni varð til, og ein marknaður fyri tíðindamiðlan í tíðarritum og dagbløðum, har kjak og tann almenna samrøðan um list og bókmentir, sum bygdi á fólkaræði og alment vit og skil, setti dagsskránna.

Ummælið sum tekstslag er soleiðis frá byrjan nær knýtt at tí journalistiska tekstinum, og sambært Bredsdorff, Jørgensen og Klysner, ið tilvitað kalla sína bók ókvæmisorðið *Anmelderi* í einari roynd at veita tekstslagnum virðing, sigur hetta niðrandi orðið nakað um upprunan hjá ummælinum; at tað er vaksið fram sum partur av marknaðinum og ikki sum ein partur av listini sjálvari (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:8). Dentur verður lagdur á týdningin, tað hevur at síggja ummælið sum tað, tað er: ein avístekstur, tí alt annað er at gera tí órætt, og vandi er fyri, at tað tá verður sætt antin sum grunn bókmentavísindi ella sum sníkur á listini (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:10).

John Chr. Jørgensen leggur eisini í bókini *Sprogblomster i spinatbedet. En bog om kritikersproget* dent á, at ummælið sum tekstslag er journalistiskt og má laga seg til tær treytir, sum miðlarnir seta, hóast tað er litað av øðrum siðvenjum; teirri akademisku, tí tað ofta eru akademikarar sum ummæla, og teirri bókmentaligu, tí verkið, sum verður ummælt smittar yvir á ummælið. Málið, sum verður nýtt í ummælinum, er merkt ikki bara av journalistiskum máli, men eisini akademiskum máli, tí bókmentaummælarar ofta spretta úr tí akademiska umhvørvinum, og av bókmentaligum máli við tað, at tað verður tillagað málsliga (Jørgensen 1999:15-16). Í øðrum føri lýsir Jørgensen ummælið sum tekstslag og vísir á fimm journalistiskar dygdir, sum eiga at mynda tað, nevniliga sansur fyri formi, sansur fyri tíðindavirði, evni at miðla, evni at skriva stutt og fynd („slagkraft") (Jørgensen 1994b:310-311).

Tá Marianne Stidsen í 2018 nevnir fimm krøv til ummælið sum tekstslag: form, tíðindavirði, miðlan, samanfatan og fynd (Stidsen 2018:465), leggur hon seg upp at hesum somu kriterium fyri ummælini, sum Jørgensen lýsir í 1994, og tað ber boð um, at lýsingin hjá Jørgensen framvegis verður nýtt og hevur gildi í dag.

Í bók fyri m.a. miðnámsskúlar býta Andreasen og Winge ummæli innihaldsliga í fýra øki:

1. Forkunnleika – fakta um verk og rithøvund. Herundir eisini eitt slag av perspektivering ella samanbering við onnur verk og aðrar høvundar.
2. Samandrátt
3. Viðgerð
4. Meting

(Andreasen og Winge 1972:48-53).

Bredsdorff, Jørgensen og Klysner siga, at kanningar úr 1980-árunum vísa, at teir somu innihaldsligu tættirnir ganga aftur í ummælunum, og tað eru hesir somu fýra tættir, sum Andreasen og Winge høvdu lýst 10 ár frammanundan:

1. Upplýsingar um høvund, heiti, vav, forlag osfr.
2. Samandráttur
3. Lýsingar ella viðgerð

4. Metingar og møguligar samanberingar

(Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:8).

Uppaftur tíggju ár seinni sigur John Chr. Jørgensen í grein um ummæli í dagbløðum, at øll væleydnað ummæli hava fimm innihaldslig drøg í felag:

1. Sterka byrjan
2. Undirstrikandi enda
3. Neyva eyðmerking av tí, sum verður ummælt
4. Samandrátt
5. Reaktión/dóm

(Jørgensen 1994a:38).

Hesa lýsing hevur John Chr. Jørgensen úr bókini hjá amerikanska professaranum í samskifti Campbell B. Titchener, *Reviewing the Arts* (1988/2005), ið er skrivað sum amboð hjá journalistum, sum ummæla.

Í bók um málið í ummælum sigur John Chr. Jørgensen, at ummælið má laga seg eftir krøvunum, sum miðlarnir seta, krøvunum um tíðarevstamarkið og avmarkaða plássið. Eitt ummæli er ein upp á seg skjót reaktión, sum er feld niður á upp á seg lítið pláss. Jørgensen nevnir tekstslagið eitt slag av máliskulist, og ummælarin fær sær lesarar við at hava málsligt uppfinnsemi, neyvleika, originalitet, hygni, humor, sannføri og trúvirði (Jørgensen 1999:8).

Tað journalistiska tekstslagið, sigur Jørgensen tjúgu ár seinni í samrøðu við Marianne Stidsen, brúkar munnligt mál. Teksturin kann t.d. byrja við einum aftursvari/framsøgn (replikk), sum vit kenna frá impressionistiskari list (Stidsen 2018:461). Í áðurnevndu bók um málið í ummælum sigur hann, at impressiónin, lýsingin av einari kenslu, kann í ummælinum vera sett fram sum referat, lýsing, greining ella sitat. Sitatið virkar sum skjal og verður t.d. ofta brúkt sum inngangur

til eitt ummæli og sum ein máti at skapa áhuga fyri verkinum og at lýsa tað. Sitatið virkar ofta eisini sum ein grundgeving í metingini og vísir, hvar verkið er best, og hvar tað er vánaligast. Sitatið verður viðhvørt í ummælum nýtt til at gera gjøldur burtur úr verkinum og høvundinum (Jørgensen 1999:23-33).

Samanumtikið er ummælið vaksið fram sum journalistiskt tekstslag, og tað inniheldur ávísar tættir og skal lúka ávís formlig krøv, sum miðlarnir seta, nevniliga krøv um, at tað er stutt, at tað hevur tíðindavirði, og at tað hevur fynd, sum skapar áhuga hjá lesaranum alt fyri eitt.

Virðismetingin

Í lýsingini hjá øllum teimum ymisku nevndu ástøðingunum av ummælinum sum tekstslag er ein av táttunum í ummælinum tann bókmentaliga virðismetingin.

Sum longu nevnt, sigur Jógvan Isaksen, at høvuðsuppgávan hjá ummælaranum er at gera vart við, hvørjar bøkur eru komnar og at gera eina meting av teimum. Hetta sigur hann í greinini „At taka dagar ímillum“, sum ber heiti av hesari sambært honum týdningarmestu funktiónini hjá ummælaranum: at meta um (Isaksen 1988:20).

Í lýsingini hjá Andreasen og Winge av innihaldinum í ummælinum verða nakrir grundleggjandi spurningar settir viðvíkjandi leiklutinum hjá ummælinum. Spurt verður t.d., um ummælarin skal rætta villur í einum verki, um hann skal virka sum ein vegvísari hjá høvundinum, og um hann skal stremba eftir partloysi. Ummælini verða lýst sum ymisk, tá tað kemur til, um tey eru skipað á tann hátt, at tey viðgera verkið nýkritiskt ella eru meira subjektiv og impressionistisk, har eitt persónligt inntrykk setir dám á ummælið (Andreasen og Winge 1972:50-51).

Tá tað kemur til metingina, siga Andreasen og Winge, at summir ummælarar steðga, áðrenn metingin kemur. Metingin er við øðrum orðum ikki við. Kortini liggur ein meting eisini í hesum ummælum, tí ein óbeinleiðis meting liggur í valinum av verki og í viðgerðini sjálvari. Tey vísa á, at í ummælum eru tvey sløg av metingum, internar og eksternar metingar. Eksternar metingar verða gjørdar eftir,

um eitt verk livir upp til ávísar reglur og normar, sum liggja uttan fyri sjálvt verkið, t.d. alment-listfrøðiligar normar, har ummælarin leggur dent á ávísa listaáskoðan. Eksternar metingar kunnu eisini vera moralskar á tann hátt, at eitt verk verður dømt eftir, um tað er humant, um tað er politiskt í samsvari við hugsjónir í samfelagnum og hjá ummælaranum, ella um tað er átrúnaðarligt og umboðar tey virði, sum eru ráðandi í samfelagnum ella í hugsjónunum hjá ummælaranum. Internar metingar eru metingar av verkinum sum einari sjálvstøðugari heild (Andreasen og Winge 1972:51-53).

Hóast ávís drøg oftast eru at finna í ummælum, so er tað ymiskt, hvussu nógv tey fylla, og øll ummæli innihalda ikki altíð øll tey drøgini, sum sambært ástøðingum definera tekstslagið. Kortini vísa flestu ástøðingar á, at smaksdómurin er ein óundansleppandi partur av ummælinum. Í greinini „Den nødvendige smagsdom" skrivar Morten Kyndrup (f. 1952), bókmentafrøðingur, at smaksdómurin er tað, sum ummælini fyrst og fremst snúgva seg um. Kyndrup hevur eina greiða fatan av, hvør uppgávan hjá ummælaranum sum smaksdómari er, og sambært honum er tað ein týdningarmikil funktión hjá ummælaranum at vera duravørður (Kyndrup 2009).

John Chr. Jørgensen sigur, at høvuðsuppgávan hjá ummælinum er at skilja millum, hvat er gott og vánaligt (Jørgensen 1999:7). Ummælið hevur tveir liðir: tíðindastubba, sum er deskriptivur, og so meting, sum er normativ. Alt annað, sum eisini ofta er at finna í ummælunum, samandráttur, (persóns)lýsing, samanberingar, hugleiðing o.s.fr. kallar Jørgensen „ekstentar". Tað kemur við øðrum orðum aftur at tíðindastubbanum og metingini, sum eru teir mest týðandi liðirnir í ummælinum (Jørgensen 1999:8).

John Chr. Jørgensen skrivar um metingina í ummælinum sum bæði implisittar og eksplisittar virðisdómar soleiðis at skilja, at metingin er ikki bara útsagnir sum „henda bókin er góð", men eisini implisittar metingar sum almenn krøv til bókmentir og t.d. tað at vísa á lýti í einum verki (Jørgensen 1971:9).

Atle Christiansen (f. 1964), norskur ummælari og bókmentafrøðingur, sigur, at ummælið er ikki partleysur samandráttur, presentatión ella umrøða ella nakað annað partleyst. Ummælið er kritisk meting av einari bók, og upp á sítt besta roynir tað at orða greiðar dómar um dygdina í teimum ymisku bókunum. Hann sigur, at góðskumetingin er tað, sum ger eitt bókaummæli til eitt bókaummæli, og longu í lýsingini av verkinum, metingini av tí og kjakinum um tað liggur ein dómur, sum ummælarin tað sama kann royna at orða (Christiansen 2010:59).

Spurningurin um, hvat góðar bókmentir eru, liggur sum grundarlag undir øllum hesum, og til hann finst einki einfalt svar. Heldur má spurningurin um, hvat list er, og hvat góð list er, sigast at vera tað, sum alt ummælaravirksemi er grundað á, og tað er samstundis eisini hesin spurningur, sum skapar ónøgd og kjak millum ummælarar. Finnast tað nøkur objektiv kriterii fyri, hvat góð list er, ella er øll metingin latin upp til subjektivu fatanina hjá ummælaranum?

Amerikanski heimspekingurin í listfrøði, sum í sínari listfrøði eisini legði dent á bókmentakritikk, Morris Weitz (1916-1981), vísir á, hvussu ymiskir skúlar út frá einum uppáhaldi um, at fyri at kunna meta um list, mugu vit vita, hvat góð list er, til fánýtis hava roynt at skilmarka list:

> Unless we know what art is, they say, what are its necessary and sufficient properties, we cannot begin to respond to it adequately or to say why one work is good or better than another. Aesthetic theory, thus, is important not only in itself but for the foundations of both appreciation and criticism. Philosophers, critics, and even artists who have written on art, agree that what is primary in aesthetics is a theory about the nature of art (Weitz 1956:27).

Weitz er ikki av teirri fatan, at nakar teoretiskur skúli nakrantíð fer at kunna koma við endaligum boði uppá, hvat list er, tí tað er at royna at lata nakað aftur, sum per definitión er opið:

> aesthetic theory is a logically vain attempt to define what cannot be defined, to state the necessary and sufficient properties of that which has no necessary and sufficient properties, to conceive the

> concept of art as closed when its very use reveals and demands its openness (Weitz 1956:30).

Sambært Weitz ber ikki til at skilmarka list. List er eitt elastiskt hugtak, ein opin bólking av einum fyribrigdi. Tað er ein partur av kjarnanum í hesum fyribrigdi, at tað broytist, at nýtt verður lagt aftur at tí (Weitz 1956:32). Tí listin broytist og flytur seg alla tíðina, og við einari afturlatnari skilmarking tekur tú tað, sum skilmarkar list, frá henni: tað at hon er opin og støðugt broytist:

> What I am arguing, then, is that the very expansive, adventurous character of art, its ever-present changes and novel creations, makes it logically impossible to ensure any set of defining properties. We can, of course, choose to close the concept. But to do this with „art" or „tragedy" or „portraiture," etc., is ludicrous since it forecloses on the very conditions of creativity in the arts (Weitz 1956:32).

Tað snýr seg tí ikki um at skapa eitt afturlatið ástøði um, hvat list er, men at skilja, hvørji kriterii tað eru, sum vit seta fyri, hvat list er, og hvat góð list er, og at vit eru tilvitað um, hvørji kriterii seta dagsskránna:

> the traditional theories of art; because incorporated in everyone of them is a debate over and argument for emphasizing or centering upon some particular feature of art which has been neglected or perverted. If we take the aesthetic theories literally, as we have seen, they all fail; but if we reconstrue them, in terms of their function and point, as serious and argued-for recommendations to concentrate on certain criteria of excellence in art, we shall see that aesthetic theory is far from worthless. Indeed, it becomes as central as anything in aesthetics, in our understanding of art, for it teaches us what to look for and how to look at it in art. What is central and must be articulated in all the theories are their debates over the reasons for excellence in art—debates over emotional depth, profound truths, natural beauty, exactitude, freshness of treatment, and so on, as criteria of evaluation—the whole of which converges on the perennial problem of what makes a work of art good. To understand the role of aesthetic theory is not to conceive it as definition, logically doomed to failure, but to read it as summaries of seriously made recommendations to attend in certain ways to certain features of art (Weitz 1956:35).

Skilmarkingin hjá Weitz av list, sum er ein „óskilmarking", tí hon vísir á tað ógjørliga í at skilmarka nakað, sum per definitión er opið og broytiligt, er tí eitt lýsandi dømi um hetta paradoksið í virðismetingini, sum eg áður í ritgerðini havi víst á: hon strembar eftir objektiviteti, men hevur altíð eina subjektiva dimensión, hon strembar eftir tí almenna, men sprettur altíð úr tí serstaka og persónstongda.

Morten Nøjgaard lýsir tvístøðuna millum almenna gildið í bókmentaliga virðisdóminum og tess subjektivismu. Tann subjektiva upplivingin hjá einum lesara hevur prinsipielt bara gildi fyri einstaklingin, meðan dómsútsøgnin ber eitt krav í sær um at hava alment gildi, tí hví skuldi lesarin annars sett orð á sína uppliving av skaldaverkinum (Nøjgaard 2003:294). Víst verður á munin millum tað privata og tað almenna og tað, at tá tú sigur tína meining um eitt verk, er tað ikki bara tín persónliga meining longur, men ein meining, sum vil einum øðrum menniskja nakað, antin tað er at ávirka tess hugburð ella okkurt annað (Nøjgaard 2003:301).

Nøjgaard vísir á, at henda tvístøða, sum er so sterk í okkara samfelag, ikki var so sterk í eldri tíð, t.d. hjá franska skaldinum og kritikaranum Boileau (*L'art Poétique*, 1674), tá tað var uppgávan hjá ummælaranum at vísa á meistaraverkini í bókmentaheiminum.[24] Eisini í tíðini hjá Brandes var hetta galdandi, og Brandes setti ikki spurnartekin við gildið á virðisdóminum (Nøjgaard 2003:294).

Men bókmentaástøðingar í okkara tíð eru líka vísir í subjektivitetinum í virðisdóminum, sum Brandes var í tí absolutta gildinum í virðisdóminum, og ein virðisrelativisma ger seg galdandi, sigur Morten Nøjgaard (Nøjgaard 2003:295). Jan Mukařovský orðar

24 Somu grundhugsan síggja vit eisini hjá Matthew Arnold (1822-1888) í greinini „The Function of Criticism at the Present Time", at tað er uppgávan hjá ummælaranum at peika á meistaraverkini í sínari samtíð (1865).

hesa virðisrelativismu, tá hann sigur, at listfrøðiligt virði altíð kemur til sjóndar í einum ávísum sosialum samanhangi (Mukařovský 1970/1979:3), og seinni sigur Bourdieu, at virðið liggur ikki í sjálvum verkinum, men í skipanini, har ein og hvør støða fær virði út frá sínum sambandi við aðrar støður:

> The literary (etc.) field is a force-field acting on all those who enter it, and acting in a differential manner according to the position they occupy there (whether, to take the points furthest removed from each other, that of a writer of hit plays or that of an avant-garde poet), and at the same time it is a field of competitive struggles which tend to conserve or transform this force-field. And the position-takings (works, political manifestos or demonstrations, and so on), which one may and should treat for analytical purposes as a 'system' of oppositions, are not the result of some kind of objective collusion, but rather the product and the stake of a permanent conflict. In other words, the generative and unifying principle of this 'system' is the struggle itself (Bourdieu 1992/1996:232).

Lars Handesten endurgevur Bourdieu soleiðis: „Der findes således ikke nogen given litterær værdi, men kun den, som nogen med magt definerer som en værdi og en kvalitet" (Handesten 2018:27). Hetta er ein tanki, sum Wittgenstein eisini hevur orðað: „Der menschliche Blick hat es an sich, dass er die Dinge kostbar machen kann, allerdings werden sie dann auch teurer" (Wittgenstein 1980:1).

Bourdieu kritiserar hugsanarháttin, at smakkur kann vera reinur og hava alment menniskjaligt gildi. Hetta vísa Gjesdal og Lending á í inngangi til norska útgávu av *La Distinction* (1997) eftir Bourdieu, har hann ger vart við, at tað eru ymiskar meiningar um, hvat list er í ymiskum smakkfelagsskapum:

> Bourdieu kritiserer Kant for å overse smakens samfunnsmessige funksjon. Smaken kan ikke være ren, men dreier seg til syvende og sist om å beherske symbolske og kulturelle koder – og dermed om oppretholdelsen av bestemte politiske og økonomiske interesser (Gjesdal og Lending 1995:5).

Tankin, um at smakkur er relativur, gongur ímóti hugsanunum hjá Kant um, at smaksdómurin hevur almentmenniskjaligt gildi og er hevjaður upp um sansaliga girnd:

> Derfor er alle smagsdomme også individuelle: de forbinder nemlig ikke deres prædikat om velbehag med et begreb, men med en enkelt forestilling.
>
> Altså er det ikke lysten, men lystens almengyldighed, der iagttages som forbundet i sindet med den rene bedømmelse af en genstand, der a priori forestilles i en smagsdom som en almen regel for dømmekraften og som gyldig for enhver (Kant 1792/2005:132).

Atle Christiansen sigur, at tað verður sagt um bókmentakritikkin, at hann ikki hevur evni at døma, um bókmentir eru góðar ella vánaligar, men at ummælarin bara endurframleiðir teir bókmentaligu plussfaktorar, sum mentanin hevur lært hann at hyggja eftir, og rósar teimum bókmentunum, ið eru skrivaðar á tann hátt, sum hann hevur lært, at bókmentir skulu skrivast. Atle Christiansen skilir fortreytirnar fyri virðisrelativismu, men sigur, at vit kunnu velja at vera mistrúgvin um alt uttan sjálvan ivan, ella vit kunnu velja at fara inn í okkara mentan og okkara fatanarhættir og kjakast, meta um og døma teir (Christiansen 2010:64-65).

Henda lýsingin hjá Atle Christiansen av bókaummælinum, sum hevur eina praktiska tilgongd, er ein góð lýsing av teimum fortreytum, sum ummælarin hevur. Hann ger væl í at vera tilvitaður um, at metingin av list er nær knýtt at góðskufatan, sum er stýrd av krøvum, ið verða sett til list í mentanini. Men skal hann vera ummælari, má hann liva við hesum treytum og virka undir teimum. Tankin er, at hóast tað ikki ber til at áseta greiðar skilmarkingar fyri, hvat list er, og tað harvið ikki ber til objektivt at meta um list, so ber til hjá einum ummælara at meta um dygd í skaldskapi út frá ávísum kriterium, sum verða sett í samfelagnum.

Sambært Atle Christiansen er ein bók ikki bara góð í sjálvum sær. Góðskan er ein fylgja av, at bókin umboðar eina ávísa dygd í mun til aðrar bøkur og hevdvunnin góðskumál fyri bókmentirnar (Christiansen 2010:64).

Hesar nevndu hugsanir um virðisrelativismu spæla eisini inn, tá eg í mínari viðgerð vísi á, at kvinnuligir rithøvundar verða mettir út frá øðrum fortreytum enn mannligir. Tað er kanska bert ein sjálvfylgja, at tað er torført og tekur langa tíð at broyta fatanir, sum eru ein so grundleggjandi partur av okkara samfelagsskipan og normum, um vit hava í huga tað, sum Atle Christiansen sigur: at ummælarin endurframleiðir tær bókmentaligu dygdir, sum mentanin hevur lært hann at hyggja eftir, og rósar teimum bókmentunum, ið eru skrivaðar á tann hátt, sum hann hevur lært, at bókmentir skulu skrivast.

Tað er og verður ein tvístøða í bókmentakritikkinum, at bókmentir skulu metast út frá objektivum kriterium, men við einum sterkum tilviti um ta subjektivu dimensiónina, sum altíð eisini er partur av metingini. Hetta er eitt av paradoksunum, sum Sissel Furuseth setir fram, og sum eru lýst í kapitli 2 um ummælið sum granskingarøki.

Í grein, sum kom út í sambandi við, at tíggju teir bestu ummælararnir skuldu finnast í Noregi, skrivar Frode Helmich Pedersen (f. 1976), bókmentagranskari við univeristetið í Bergen og ummælari í *Bergens Tidende* og *Morgenbladet*: „Det er noe som tyder på at man selv langt inn i kritikerstandens indre organer har utviklet skepsis mot å skulle felle litteraturkritiske dommer. Det er mildt sagt uheldig, siden det å felle dommer er et ufravikelig sjangerkrav i all litteraturkritikk“ (Pedersen 2019). Í hesum brotinum verður virðisdómurin sæddur sum tað týdningarmesta kriteriið hjá ummælinum sum tekstslag. Dómurin er sambært Frode Helmich Petersen eitt óvikandi tekstslagskrav, og kortini hevur vantrúgvin á at fella dómar funnið leið inn í sjálva ummælaramentanina. Frode Helmich Pedersen kritiserar, at virðisrelativisman hevur sníkt seg inn í grundgevingarnar hjá dómsnevndini, ið varð sett at meta um ummælararnar, tí hon virðismetir, at ummælarar eru skeptiskir og eru varnir, tá teir fella sínar dómar:

> Hva er det juryen her egentlig sier? For meg høres det ut som om den mener det er et stort pluss dersom kritikeren ikke legger noen vekt på sin egen dom, og i alle fall ikke anser at det hviler noen form for nødvendighet over den. Dette er relativismens evinnelige forbannelse – den forteller oss at uansett hvor sikker du er på at en bok er fabelaktig, eller miserabel, så må du for all del huske på at dette bare er *din* oppfatning, og at andres oppfatning er like mye verdt. Men dette strider mot noe helt sentralt ved den estetiske erfaringen selv. Som Immanuel Kant sier det et sted i sin undersøkelse av dømmekraften: Dersom man kommer inn i et vakkert tempel, ville det være absurd å tenke at dette er skjønt *bare for meg*. Det allmenne (i betydningen *intersubjektive*) ligger med andre ord innbakt i selve erfaringen. Hva er en estetisk dom verdt hvis den ikke er fremsatt med overbevisning? Og hvordan kan en estetisk dom ytres med overbevisning uten at den som dømmer selv mener at dommen er berettiget? (Pedersen 2019).

Smaksdómurin, sum hjá mongum ástøðingum er eitt óvikandi tekstslagskrav til ummæli, er sambært hesum ikki høgt í metum í universitetsheiminum. Hetta samsvarar við tað, sum eg havi verið inni á í innganginum, um, at tann bókmentaliga metingin hevur lítið rúm í tí akademiska heiminum. At hesar hugsanir hava lyndi til at troka seg inn í ummælaraheimin, sær Pedersen sum ein vansa.

Í viðgerðini í kapitli 7 eru dømi um akademiskar ummælarar, bókmentafrøðingar, sum halda seg aftur, tá metast skal um dygd í bókmentaummælunum. Turið Sigurðardóttir ger til dømis lítið burtur úr virðisdóminum í sínum ummælum, og tað kann benda á, at rákið er tað sama í tí føroyska sum tí norska universitetsheiminum, har tað verður mett sum ein dygd at vera varin við at fella dómar.

Ummælið sum listaligur tekstur

Sambært Bredsdorff, Jørgensen og Klysner er ummælið vaksið fram sum partur av marknaðinum og ikki sum ein partur av listini sjálvari (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:8). Teir hava sum nevnt í sínari viðgerð av ummælinum lagt dent á, at tað er eitt journalistiskt tekstslag, og at viðgera tað sum annað enn tað, er at gera ummælinum órætt (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:10).

Eg haldi tó uppá, at ummæli eiga og skulu lesast sum annað og meira enn bara eitt journalistiskt tekstslag, at tey júst eiga at verða lisin við teirri sannroynd í huga, at tey liggja á markinum millum

ymiskar siðvenjur, og at tey hava uppborið at verða lisin sum listaligir tekstir á hædd við aðrar fagrar bókmentir.

Tomas Forser sigur soleiðis um ummælið sum tekstslag:

> Så vad är en recension? En text om en annan text inskriven i massmediernas dramaturgiska krav och järnhårda lönelag. Stark eller svag är en sådan text alltid villkorad både av genrehistoriens formspråk och journalistikens nu. Den handlar *om* en annan text. Men den *handlar* också själv och berättar då sin egen historia (Forser 2002:20).

Við øðrum orðum er ummælið ikki bert ein journalistiskur tekstur *um* ein annan tekst, men ein samansettur tekstur, sum sigur sína egnu søgu og hevur sítt egna úttrykk.

Sissel Furuseth vísir á, at ummælini sum tekstslag fram til 1970-árini hava verið sædd sum bókmentasøguligir stuðulstekstir. Men í bók eftir norska skaldið og granskaran Georg Johannesen (1931-2005), sum kom út í 1981, har yrkistekstir verða viðgjørdir við sama nærlagni sum lyrikkur, fær eisini bókaummælið umrøðu sum tekstslag og verður umrøtt sum ein av teimum lyrisku formunum innan yrkistekstir (Furuseth 2016a:457). Furuseth viðurkennir ta miðlasøguligu tulking, at ummæli eru partur av einum journalistiskum diskursi, men hon leggur dent á, at tann lesiháttur ger ikki tekstslagið minni áhugavert at greina retoriskt. Tekstirnir hava sambært Sissel Furuseth nakrar avmarkingar, sum verða settar av miðlunum, og avmarkingarnar gera, at ummælini ofta eru merkt av klisjéum og marknaðarføringarmáli, men hon leggur dent á, at tað kortini er rúm fyri ymiskum sløgum av sjálvpallseting og stílsligum uppfinnsemi í ummælum, og teir klassisku yvirtalingarformarnir verða framvegis nýttir í ymiskum brigdum. Her hava høvundar møguleika fyri at skapa høvundarleiklutir, sum venda sær týðiliga til móttakaran (Furuseth 2016a:457). Út frá hesi tankagond hjá Sissel Furuseth er tað, mótsett tí, sum Bredsdorff, Jørgensen og Klysner siga um, at tað er at gera ummælinum órætt at lesa tað sum nakað annað enn ein journalistiskan tekst, ein missur í lesingini av ummælinum at velja at lesa tað sum journalistiskt tekstslag burturav. Tað er sambært henni at fara ov lætt um tað samansetta tekstslag, sum ummælið er.

John Chr. Jørgensen vísir til danska yrkjaran og ummælaran Tom Kristensen (1893-1974) og Henning Kehler, sum báðir siga, at ummælaravirksemi er ella kann vera list. Har Tom Kristensen sigur, at ummæli kunnu vera eitt minni tekstslag innan listina, er Henning Kehler meira avgjørdur og sigur, at ummælaravirksemi er eitt sjálvstøðugt bókmentaligt tekstslag. John Chr. Jørgensen vísir á, at teir ivaleyst hava somu keldu sum íblástur, nevniliga áskoðanina hjá fiktiva persóninum Gilbert í greinini „The Critic as Artist“ (1891) eftir Oscar Wilde, sum sigur, at kritikkurin er hevjaður upp um listina (Jørgensen 1999:17). Bókin hjá John Chr. Jørgensen, sum lýsir hesar hugsanir, kann sigast at vera liður í gransking, ið skapar ummælinum støðu sum listaligum teksti, tí hann kannar og vísir á tað egna og sermerkta málið, sum ummælið hevur.

Danski rithøvundurin og bókmentaummælarin Poul Borum (1934-1996) var ritstjóri á tíðarritinum *Hvedekorn* frá 1968 til 1993 og medstovnari av *Forfatterskolen* í Keypmannahavn í 1989. Hann skrivar í grein, heldur provokerandi, sum hann sigur sjálvur, at góðir ummælarar eru minst dupult so sjáldsamir at finna sum góðir rithøvundar, allarhelst tí at teir skulu hava dupult so nógvar góðar eginleikar, nevniliga bæði listaligar og kritiskar (Borum 1988). Í hesari útsøgnini liggur tankin um, at ummælarin ikki bara skal hava journalistiskar dygdir, men eisini vera listafólk.

Tá ið áhugi um aldarskiftið 1800-1900 kyknaði í Noregi fyri at professionalisera ummælaravirksemið, vaks fram ein serstakur bókmentakritiskur yrkisstoltleiki, og norska rithøvundafelagið, *Forfatterforeningen,* var frá byrjan drívmegi í royndini at gera ummælaravirksemi til eitt sjálvstøðugt mentanarligt yrki. Her fylgdi eisini áhugin við fyri at royna at gera ummælið til list í sjálvum sær. Eitt ummælararitverk var hildið at vera eins virðiligt og á sama stigi sum tað skaldsliga ritverkið. Henda strembanin eftir tign rakk symbolskari hædd, tá norska tingið í 1916 gjørdi av at veita Carl Nærup (1864-1931), sum setti tónan í nýidealistiskum og impressionistiskum bókmentakritikki, skaldsløn (Furuseth 2016a:83).

Northrop Frye sigur um funktiónina hjá bókmentakritikkinum:

> There is another reason why criticism has to exist. Criticism can talk, and all the arts are dumb ... Poetry is a *disinterested* use of words:

> it does not address a reader directly ... The axiom of criticism must be, not that the poet does not know what he is talking about, but that he cannot talk about what he knows. To defend the right of criticism to exist at all, therefore, is to assume that criticism is a structure of thought and knowledge existing in its own right, with some measure of independence from the art it deals with (Frye 1957/2000:4-5).

Tá Northrop Frye sigur, at uppgávan hjá kritikkinum er at tala, meðan øll list er málleys, tí høvundurin tosar ikki beinleiðis við ein lesara, setir hann ikki bara orð á sereyðkennið hjá kritikkinum at vera tann, sum miðlar lesaranum bókmentirnar, men setir eisini hol á hetta, at sereyðkennið hjá kritikkinum er sjálvstøðugt og krevur tí sítt egna mál. Northrop Frye sigur eisini, at bókmentaligur kritikkur er ein listaformur: „the subject-matter of literary criticism is an art, and criticism is evidently something of an art too" (Frye 1957/2000:3).

Horace Engdahl byrjar fororðini til tekstasavn sítt *Arret efter drømmen* (2009) við orðunum: „Tað fría virkið hjá dømievnunum er eins vakurt og virkið hjá hugflognum, og eins neyðugt" („Dømmekraftens frie virke er lige så smukt som fantasiens, og lige så nødvendigt"). Hann sigur, at tá hann valdi ta kritisku ritroyndina sum sín fremsta stíl, sá hann ikki sínar fyrimyndir, Roland Barthes og Olof Lagercrantz, sum óbeinleiðis rithøvundar, men sum eggjandi og ævintýrhugaðar rithøvundar. Teirra tekstir vóru eins og annar kritikkur treytaðir av bókmentaligum tekstum, men tóktust kortini krevja eins nógv og tann bókmentaliga skapanin. Engdahl sigur, at hann sær í samrøðum, hann gjørdi í 1990-árunum, at tankin um kritikkin sum eitt fak á sama stigi sum vísindini og listin leingi hevur verið livandi í hansara huga (Engdahl 2014:13).

Tá Marianne Stidsen í samrøðu við Engdahl spyr hann um orðingina „tað fría virkið hjá dømievnunum er eins vakurt og virkið hjá hugflognum, og eins neyðugt", svarar hann, at kritikkurin í ávísan mun er eitt virksemi, sum ikki bert er sekundert. Tað er eitt frælst virksemi („grundlagsfri beskæftigelse"), sum er tignarligt og neyðugt, tí tað í ein ávísan mun røkkur út um markið, har listaverkið endar, og fullger tað. Kritikkurin leiðir listaverkið fram til hvíld ella sjálvrannsakan, sum er tí íborin, men sum krevur eitt annað slag av skili og eina aðra trá enn hana, sum gevur seg til kennar í sjálvari listaskapanini. Tað er eingin orsøk til at síggja hetta skynsemi og hesa trá sum minni virðismikla enn ta, sum liggur til grund undir listalívinum (Stidsen 2018:29-30). Eisini her sæst Engdahl sostatt hevja ummælaravirksemið upp á sama stig sum bókmentirnar.[25]

Tá Marianne Stidsen biður Horace Engdahl dýpa sína útsøgn, at „kritikarin má hava ein stílvilja, sum ikki er minni krevjandi enn listafólksins" („Kritikeren må have en stilvilje der ikke er mindre krævende end kunstnerens"), svarar hann millum annað við at siga, at ein kritikari, sum vil vera annað og meira enn ein ummælari ella ein universitetspersónur má stremba eftir einum hugleiðandi yrkjandi skrivihátti, sum nærkast fagurbókmentaligum prosa (Stidsen 2018:29-33). Í hesari útsøgn sæst ein hugburður til ummælið sum listaligan tekst á hædd við aðrar fagrar bókmentir.

Í samrøðu við Egil Helgason í Kiljunni í RÚV, íslendska ríkissjónvarpinum, sigur Pamela Paul, ritstjóri á *New York Times Book Review*, soleiðis um ummælið sum listaligt tekstslag:

> A book review is a kind of piece of writing and of itself it is an art form, I think. In a good book review you feel that there is something at stake. You feel like the reviewer – the critic has engaged with the work, taken it on its own merits, that they have something to say. Not just telling what is in the book but explaining to you why it is meaningful, why it is important or not important. And ultimately it should be fun to read it. It should be entertaining. Books should be interesting, engaging and entertaining and so should a book review (leysliga útskrivað: PG) („Bölvun bókmenntaritstjóra að lesa hægt" 2018: 6:20min).

25 At Engdahl í sama viðfeingi tosar um eina tíð, har mann *bara* (mín áherðsla) tókst við gerandis-„ummælarí" og konventionella bókmentasøguskriving (Stidsen 2018:30), lýsir ein hugburð, sum stríðir ímóti hesum tankum um ummælið sum tekstslag, ið ikki bert er stuðuls-tekstslag hjá bókmentunum, ella í øllum førum, at tað júst bert er tað í einum ávísan mun, sum Engdahl eisini orðar seg.

Tá danskir kritikarar og granskarar í juni 2018 settu støðuna hjá ummælinum á skrá og løgdu fram ynski um at fáa eina danska ummælarasøgu skrivaða, var tað undir ráðstevnuheitinum „Kritik: Karate eller kunst?“ – altso eisini við hesum sama spurninginum, um ummælið kann roknast sum list – ella tað er ítrótt.

Áðurnevnda svenska granskingarverkætlanin, „Kritiklabbet“, sum í samstarvi við forlagið Ariel hevur givið út bøkurnar *Performativ kritik* (2013), *Framtidens kritik* (2018) og *Kritiken i den nya offentligheten* (2018) undir slagorðinum „Ariel litterär kritik – kritik som litteratur, litteratur som kritik“, er partur av tí evropeiska netinum *The Art of Criticism* – eitt evropeiskt samstarv, sum er staðsett í Amsterdam[26]. Í slagorðinum „Kritik som litteratur og litteratur som kritik“ liggur tankin, at bókmentaligur kritikkur er skaldskapur og skal lesast og granskast sum slíkur, og grundhugsanin aftan fyri *Kritiklabbet* var í einum avmarkaðum tíðarskeiði at finna áhugaverdar vegir frameftir fyri ummælini í tí post-talgilda veruleikanum.[27]

Í inngangi til bókina *Performativ kritik* (2013) setir Magnus William-Olsson spurningin, í hvønn mun kritikkurin kann gera krav uppá at vera bókmentir og í hvønn mun bókmentir at vera kritiskar. Hann nevnir her teir skaldskaparformar, sum kunnu sigast at vera eitt slag av yvirgongd millum bókmentirnar og kritikkin – skaldskaparformar, sum eru eitt slag av tulking, og nevnir týðing, ritstjórnan, upplestur og endursøgn, sum alt eru formar, har tulking er í miðdepli (William-Olsson 2013a:5).

Tað eru líknandi tankar, Ástráður Eysteinsson kemur inn á, tá hann lýsir heim týðinganna og vísir á, at tað liggur tulking í týðaravirkseminum, sum kann samanberast við virksemið hjá bókmentagranskara, ið skrivar grein um eitt bókmentaverk, og listafólki, sum tulkar tónleikaverk, leikrit ella dans:

> En er þetta endilega lýsing á texta, til dæmis ljóði, sem er þýtt af einum máli yfir á annað? Getur þetta ekki allt eins verið útlistun á túlkun fræðimanns sem skrifar grein um bókmenntaverk? Eða á túlkun listamanns – söngvara, hljóðfæraleikara, sviðslistamanns – sem túlkar tónsmíð, leikrit eða dansverk? Ellegar lýsing á skáldverki eða myndverki sem er frumunnið en er þó úrvinnsla, túlkun ákveðinna aðstæðna og viðfangsefna? Slíkar spurningar móta samanhengi þýðingaumræðunnar á öndverðri 21. öld. Ýmis mörk hafa orðið óljósari en þau virtust fyrr; eðlilegt þykir að hugsa um sköpun sem endursköpun, ritun sem endurritun (Eysteinsson 2017:326).

26 Sí http://networkcultures.org/artofcriticism/ (28/9-2018).

27 http://www.kritiklabbet.se/2018/06/30/kritiklabbet-har-avslutat-sin-verksamhet/ (28/9-2018).

Magnus William-Olsson samanber kritikk við aðrar tulkingargenrur og skilmarkar hugtakið *performativan kritikk* við at vísa á, hvussu tú ofta ikki skilir eitt verk, fyrr enn tú hevur roynt at tulka tað fyri onkrum øðrum, sum tá ein týðari ikki skilir eitt verk til fulnar, fyrr enn hann hevur týtt tað (William-Olsson 2013b:10). Hann sigur:

> Här tänker jag att översättning är så gott som analogt med andra tolkande konstarter, musicerande ella skådspeleri, till exempel. Et nytt framförande av säg ett musikstycke eller en ny gestaltning av en roll i ett drama, tillåter os att förstå något nytt av verkets potentialitet (William-Olsson 2013b:12).

Bókmentaligur kritikkur er tulkandi list og kann berast saman við aðrar tulkandi listir, ið skapa nakað nýtt, sum ikki var til frammundan, í sínari tulking av listini. Tær eru samstundis eisini skapandi list eins og bókmentir eru skapandi list, hóast tær eru tulking av bókmentum. Magnus William-Olsson sigur eisini í inngangi til bókina *Kritiken i den nya offentligheten,* at hann metir ummælið at vera ein lista- og kunnleikaform: „I femton år har vi inom FSL (Fria Seminaret i Litterär kritik) arbetat med och tänkt över kritiken som konst- och kunskapsform“ (William-Olsson 2018:5).

Horace Engdahl heldur tað tó vera óhepna orðing at kalla kritikk bókmentir, tí kritikkurin júst krevur nakað annað enn samgongufelagin, bókmentirnar: „Er denne kritik så en slags litteratur, som man somme tider siger? Det er en uheldig formulering, eftersom dens særlige forbund med litteraturen forudsætter, at den er noget andet end sin forbundsfælle“ (Engdahl 2014:127).

Hugsanir hjá Kehler, Borum, Frye, Engdahl, William-Olsson v.ø. um, at ummælið hevur sama potentiali sum aðrir tekstir at vera list í sjálvum sær, liggja sum grundarlag undir tí, sum eg komi fram til í mínari viðgerð av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007. Har vísi eg á bæði brot í ummælum, sum hava listaligt virði í sjálvum sær, og taki fram ávís ummæli sum umboð fyri ummæli, ið kunnu standa einsamøll sum skapandi list, hóast tey eru treytað av verkunum, tey viðgera.

Eftir er at nevna, at tað viðhvørt kann vera fullkomið samanfall millum kritikk og bókmentir skilt á tann hátt, at ummæli viðhvørt verða sett inn í eina listaliga rammu sum t.d. eina yrking og prentað sum partur av einum yrkingasavni. Ummæli í yrkingaformi síggjast bæði heilt tíðliga í føroyskari ummælissøgu og eru at finna í tekstum hjá ymiskum rithøvundum upp gjøgnum tíðirnar. Hetta vendi eg aftur til í brotinum „Bókaummæli sum skaldskapur og skaldskapur sum bókaummæli“ í kapitli 4 og í tí søguliga baksýninum, sum verður lýst í kapitli 7. Alexandur Kristiansen hevur t.d. eina yrking í yrkingasavniunm *Báðumegin blátt*, sum eitur „UMMÆLI (yrkingar eftir Chr. Matras)“ og er eitt slag av ummæli av skaldskapinum hjá Chr. Matras í fýra rímaðum ørindum. Onkrir tekstir eftir Tórodd Poulsen, ið hava nøkur av teimum somu eyðkennunum sum ummæli og kunnu hava somu ávirkan sum tey, verða tiknir við í mínari viðgerð, men teir eru ikki partur av tí innsavnaða tilfarinum, sum skapar empiriskt grundarlag undir ritgerðini, tí teir liva ikki upp til tey krøv, sum eg í innsavningini seti til ummælið sum tekstslag.

Samanumtikið er ummælið søguliga nær knýtt at journalistikkinum, men tað er at gera tí órætt at lesa tað sum yrkistekst burturav, tí ummælið er eisini skapandi list. Ummælið ger nakað annað enn listin, og hóast tað umrøðir og tulkar listina, so skapar tað eisini okkurt nýtt. Tað er tí eisini, sum lýst í níggjunda paradoksi, eitt skapandi tekstslag og ikki bara útlegging av einum skapandi tekstslagi.

Stílur í ummælum

Ummælið er samansett tekstslag og liggur á markinum millum ymiskar siðvenjur. Hetta sæst eisini í stílinum í ummælinum. Eg havi nevnt, at Inger Smærup Sørensen sigur, at ummælarin kann ikki finna upp á eitt nýtt mál. Við hesum meinar hon ikki, at ummælarar ikki nýta eitt serstakt mál, tað vísir hon nevniliga á, at teir gera. Teir nýta eitt virðisløtt mál og verða ofta kritiseraðir fyri at nýta ov nógvar klisjéir (Sørensen 2013:89).

Eisini havi eg nevnt, at Sissel Furuseth sigur, at í Noregi hevur størstur dentur fram til 1970-árini verið lagdur á at lýsa ummælið frá tess innihaldssíðu. Í áðurnevndu bókini *Sprogblomster i spinatbedet. En bog om kritikersproget* viðger John Chr. Jørgensen, sum heitið á bókini ber boð um, málsliga stílin í donskum ummælum, og viðmerkir, at eitt slíkt málsligt-stílsligt sjónarhorn ikki er roynt áður (Jørgensen 1999:12). Her vísir John Chr. Jørgensen á, hvussu ummælaramálið er litað fyrst og fremst av journalistiskum máli, akademiskum máli og poetiskum máli (Jørgensen 1999:15). Harafturat er tað litað av dómsmálinum í løgfrøði, av reklamumáli, málinum í tí almenna kjakinum og øðrum máli (Jørgensen 1999:19-20). John Chr. Jørgensen tosar um málfrøðina í ummælaramálinum og um stílin, men heldur tað vera at meta strategiska táttin í ummælinum ov høgt at tosa um retorikkin í ummælum. Í hetta orðaval leggur hann eisini tann hugburð til lýsingina av stílinum í ummælum, at hann ikki roynir at lýsa stílin sum eina fasta skipan, men strembar eftir at geva eina skipaða lýsing av stílstigum, sum ofta koma fyri í ummælum (Jørgensen 1999:21).

Michael Riffaterre (1924-2006), franskur bókmentakritikari, skrivar um diskursin í bókmentakritikkinum. Hann lýsir ikki innihaldssíðuna á ummælinum, men úttrykkið, sum kritikkurin hevur – metamálið. Hann vísir á, at retorikkurin er eyðkendur av, at talan er um eitt avleitt tekstslag, ein tekst, sum viðger annan tekst, og tí altíð hevur endursøgn sum part av sínum úttryksformi. Við øðrum orðum má ummælið endurgeva, umorða og føra víðari ein tekst, sum longu er til frammanundan. Talan er um tulkingar av einum teksti, og ummælið er eitt mimetiskt tekstslag, sum onkursvegna leggur seg upp at tí tekstinum, sum tað viðger og endursigur (Riffaterre 1994).

Furuseth og Vassenden vísa á, at Riffaterre hevur gjørt vart við, at ummælini læna myndburðir og grundgevingarmynstur frá verkinum, sum tey ummæla, og tey kalla hetta *retoriska smittu*, sum tó bert er ein liður í retorikkinum í ummælum (Furuseth og Vassenden 2016:21).

Ein annar, sum hevur viðgjørt retorikkin í kritikkinum, er norski retorikarin Jan Grue (f. 1981). Hann skrivar í grein um retorikkin í filmsummælum, at eitt filmsummæli kann innihalda allar tær tríggjar aristotelsku røðugenrurnar, ta *forensisku* (rættarrøðuna), ta *epideiktisku* (høvisrøðuna) og ta *deliberativu* (ta ráðgevandi røðuna)[28]. Filmsummælið er *forensiskt,* tá ummælarin metir um góðskuna í einum verki og sigur, hvørja genru filmurin hoyrir til. Tað er *epideiktiskt*, tá tey listfrøðiligu virðini í verkinum verða manað fram og lýst, tá ummælarin endurgevur innihaldið. Og so er tað *deliberativt*, tá tað eggjar lesaranum til at lesa verkið ella lata vera við at gera tað (Grue 2007:24).

Sissel Furuseth og Eirik Vassenden vísa til John Chr. Jørgensen, sum heldur tosar um *stíl* í ummælum enn *retorikk* (Jørgensen 1999:21). Tey velja tó at tosa um *retorikkin,* tí hetta hugtak, siga tey, dregur tekstslagið inn, har retorikkur verður sæddur sum luttøka í einum sosialum hugsaðum felagsskapi (Furuseth og Vassenden 2016:21).

Tað eru sostatt ymiskir mátar at tosa um málið og framsetingina av ummælinum. Onkur nevnir tað málsligan stíl, onkur diskurs og onnur retorikk. Endamálið er at kanna málið í ummælinum og mátan, tað verður sett fram uppá, og ikki bara innihaldslig drøg og formlig eyðkenni. Viðgerðin av málsligum stíli, diskursi ella retorikki í ummælinum er lykil, sum letur upp møguleikan at síggja ummælið sum listaligan tekst og sum amboð til at røkka øðrum málum enn bert at siga sína hugsan um eitt nýútkomið verk. Ummælið kann vera ein skapandi tekstur, og tað kann vera liður í strategi hjá ummælaranum at skapa sær mentanarligan myndugleika á bókmentapallinum ella hjá rithøvundinum at seta dagsskránna, tá tað kemur til at seta seg sjálvan fram sum myndugleika og sum týdningarmiklan rithøvund. Hetta er slíkt, sum kann lesast við at kanna stílin í ummælinum og

28 Sí https://snl.no/talesjanger (18.09.2019).

munin á ymiskum mátum at pallseta sín egna persón í einum teksti, ið liggur á markinum millum yrkistekst og skaldsligan tekst, og sum kann vera bæði hesi í senn.

Í viðgerðini nýti eg hugtøk bæði frá John Chr. Jørgensen, sum tosar um stíl í ummælinum, og Jan Grue, sum tosar um retorikkin í ummælinum. Tað týdningarmikla í greiningini er ikki, um tað verður lýst sum stílur ella retorikkur, men at tað kann nýtast sum amboð at kanna, hvussu ummælarin skapar sær myndugleika og pallsetir seg sjálvan í mátanum, hann nýtir málið. Í summum førum komi eg fram til, at orð verða nýtt, sum bera boð um, at ummælarin er partur av einum strukturi, sum hevur røtur í ótilvitaðum mentanarligum munum millum kynini, eitt nú tá Kim Simonsen kritiserar, at „hvørt skáp skal opnast og hvør ein kensla vendast“ í skaldsøgu eftir Dagny Joensen (Simonsen 2005d). Her er málið úttrykk fyri hugburði til kvinnubókmentir og kvinnulig evni í bókmentum. Í øðrum førum vísi eg á, at endurtikna nýtslan av orðinum „eg“ í tekstum hjá Kim Simonsen og Agnari Jógvansson avdúkar, at ummælarin ger meira burturúr at pallseta egnan persón og egin verk enn at tosa um ummælta verkið (Simonsen 2005d, Jógvansson 2005b).

Í lýsing av ummælisins retorikki sigur Sissel Furuseth, at tað serliga eru trinni viðurskifti, sum eru áhugaverd at kanna, og tey eru:

1. í hvønn mun ummælið hermir eftir tí bókmentaliga tekstinum, sum tað ummælir,
2. hvørji mynstur ganga aftur í ummælarasiðvenjuni, og
3. hvussu málið í ummælinum nýtir orðatilfar og lænir myndugleikar frá øðrum diskursum og fakøkjum.

Tað fyrsta viðvíkur ummælinum sum lesing og tulkingarlist, altso sambandinum millum skaldskap og ummæli, tað annað viðvíkur ummælinum sum tekstslagsskipan og egin skriftsiðvenja, og tað triðja viðvíkur ummælinum sum samfelagsviðmerking, altso sambandinum millum ummæli og samfelag (Furuseth 2016a:457-458). Hyggja vit til Foucault, so tosar hann í fyrilestrinum „The Discourse on Language“

(1970) um munin millum tann bókmentaliga tekstin og tann tekstin, sum hann kallar tann sekundera tekstin, ið bæði kann vera týðing av tí primera tekstinum, viðgerð av honum og endurnýtsla. Hann tekur dømið um *Odysseusarkvæði*, sum bæði er týtt, viðgjørt og endurnýtt t.d. í *Ulysses* hjá James Joyce (Foucault 1970/1972:21). Í tekstbrotinum, sum eg havi nýtt sum grundarlag undir tí áttanda paradoksinum í ummælinum sum granskingarøki (kap. 2), sigur Foucault um sekundera tekstin:

> whatever the techniques employed, commentary's only role is to say *finally* what has silently been articulated *deep down*. It must – and the paradox is ever-changing yet inescapable – say, for the first time, what has already been said, and repeat tirelessly what was, nevertheless, never said (Foucault 1970/1972:21).

Foucault tekur útgangsstøði í málinum, men orðar samstundis her tað sambandið, sum er millum tann primera tekstin og tann sekundera og orðar nakað av tí, sum Northrop Frye sum nevnt sigur, at ummælið kann seta orð á listina, sum ikki hevur eitt mál. Foucault sigur, at tann viðmerkjandi teksturin endar ta tigandi útsøgnina í primertekstinum.

Mimetiskt tekstslag

Hyggja vit so aftur at, í hvønn mun ummælið hermir eftir tí bókmentaliga tekstinum, sum verður ummæltur, so endurspeglast í hesum tað sambandið, ið er millum ummælið og bókmentaverkið, sum verður ummælt, á fleiri stigum. Furuseth tosar um impressionistisk ummæli, um retoriska spegling og retoriska smittu (Furuseth 2016a:460), har eyðkenni og ávirkan smitta frá bókmentatekstinum, verða speglað í ummælinum. Vit síggja dømi um slíkar tekstir í føroysku ummælarasøguni, t.d. tá Petur P. Jensen (nú Petur Pólsson) í ummæli av *Sót og søgn* (1997) hjá Tóroddi Poulsen týðiliga letur tekstin smitta yvir á ummælið í málsliga stílinum. Hann fer inn í bókmentaheimin hjá Tóroddi Poulsen og gerst ein partur av honum bæði innihaldsliga og málsliga. Hann letur málsliga stílin smitta sín málsliga stíl og tosar um fiktivu persónarnar, sum var hann ein partur av fiktiónini sjálvur:

> Tað er ein sonn fragd at síggja, hvussu leikurin inni í, rundan um og millum málið ferðast í bókini. Hon stinkar langan veg av, at høvundurin hevur tað gott inni í hesi verð, sum hansara egna mál tykist at hava skapt, langt inni í øllum uppruna og sevju ... Nøkur andlit frá reglunum vitja aftur. Serliga glaður varð eg fyri at hitta Anastasiu aftur. Heilsa henni endiliga (Jensen, Petur P. 1997).

Petur P. Jensen, sum sjálvur er rithøvundur og hevur sín sermerkta stíl, ið kanska ikki líkist so nógv frá stílinum hjá Tóroddi Poulsen, leggur seg upp at stílinum hjá Tóroddi í hesum ummæli og letur seg týðiliga inspirera av objektstekstinum. Hann nýtir lágt stílstig og nýtir orð sum „stinkar", og hann fer inn í fiktiva heimin hjá skaldinum, kallar verkið *Reglur: eitt brotsverk* (1994) „reglurnar" og biður heilsa Anastasiu, sum er ein av persónunum í bókunum. Vit síggja eisini munin á hesum ummæli og so ummælinum av *Soflúgv – og øvugt* (1998) eftir Sigri Gaïni, sum er skrivað árið eftir, har Petur P. Jensen nýtir ein heilt annan og hægri stíl og heldur seg meira til at skriva eitt siðbundið ummæli (Jensen 1998). Hetta er ein staðfesting av, at hann letur seg smitta av stílinum hjá Tóroddi Poulsen, tá hann skrivar um hann.

Eitt annað dømi um retoriska smittu er ummælið hjá Carl Jóhan Jensen av *Burtur* (2006) eftir Bergtóru Hanusardóttur. Carl Jóhan Jensen byrjar ummælið við yvirskriftini „Ein pastisja", og alt tað fyrsta brotið í ummælinum er herming eftir skrivistílinum hjá Bergtóru Hanusardóttur – í hesum føri ein retorisk spegling við ironiskum snari, har smittan er tilvitað og verður nýtt sum spei (Jensen 2006b). Hetta er eitt vanligt stíltak í ummælum, og John Chr. Jørgensen vísir á, hvussu tann málsliga smittan viðhvørt verður til *pastisju* og *parodi* og tekur Erik Skyum-Nielsen, Poul Borum og Hans Hertel sum dømi um ummælarar, ið hava nýtt hetta stíltak (Jørgensen 1999:84-85). Auður Aðalsteinsdóttir vísir á, at satiran er vanligt stíltak í ummælistekstslagnum. Hon vísir á, at øðrumegin er ummælarastarvið ein hevd, sum verður hildin uppi við, at reglur og skyldur verða fylgdar, og hinumegin ræður ein hevd, sum hevur óskipaðar røtur í satirusiðvenjuni, ið er eyðkend av at ganga ímóti virdum ella avhildnum einstaklingum, stovnum, verkum ella stevnum við endurbótum sum grundgeving (Aðalsteinsdóttir 2016:28). Henda hevd sæst ikki bara hjá Carl Jóhan Jensen í tíðarskeiðinum

1997-2007, men eisini hjá Tóroddi Poulsen (1996) og Arnbjørn Ó. Dalsgarð (2003b).

Skaldverkið setir spor í ummælið innihaldsliga, tí ummælið snýr seg um skaldverkið, og í formi og í stíli, tí ummælið hevur lyndi til at leggja seg upp at verkinum, sum tað lýsir. Eisini hava tey narrativini, sum eyðkenna bókmentaligu rákini gjøgnum tíðirnar, lyndi til at ávirka søguna hjá ummælinum, so vit hava tvær parallellar søgur – eina bókmentasøgu og undir liðini á henni eina kritikksøgu, sum so ella so er litað av bókmentasøguni. Furuseth og Vassenden vísa t.d. á, at norska kritikksøgan *Norsk litteraturkritikk fra Tullin til A.H. Winsnes* (1970) er skipað eftir somu tíðarskeiðslýsingum, sum vit kenna frá bókmentasøguni (Furuseth og Vassenden 2016:16).

Í orðingini hjá Turið Sigurðardóttur um ummælið hjá Kristini í Geil av yrkingasavni hjá skaldinum Janusi Djurhuus (1881-1948), sum kom út í 1914 („C“ 1914), sæst sambandið millum bókmentir og ummæli orðað sum, at „fyrsta einmansyrkingasavnið kallar fram nýggja ritgenru, t.e. fyrsta veruliga bókarummælið, nevniliga í *Tingakrossi* hjá Kristini í Geil“ (Sigurðardóttir 2004b: 273). Í orðingini: „savnið kallar fram nýggja ritgenru“ býr tankin um ummælið sum avleitt tekstslag, sum tekstslag, ið er óloysiliga tongt at einum skaldsligum teksti. Men eisini býr í orðingini tankin, at eitt ummæli treytar, at eitt bókmentaligt verk er tøkt, sum hevur virði og dygdir, ið gerast viðkomandi í menniskjans tilviti í møtinum við bókina – eitt tilknýti, sum ummælið hevur til tann skaldsliga tekstin. Carl Jóhan Jensen lýsir hetta tilknýtið og hesa framkallan av ummælinum í sínum ummæli av *Speispei Spei* eftir Tórodd Poulsen. Verkið setir nakað í gongd hjá lesaranum, sum ger, at hann má svara aftur. Hann sigur: „Nú eg legði yrkingasavnið frá mær á borðið, og tann tómi og blanki telduskíggin ger so forbankað vart við seg“ (Jensen 2000).

Ein orsøk til lágu tignina, sum ummælið hevur, er henda grundtreytin hjá tí sum avleitt tekstslag – sum tekstslag, ið uttan mun til hugsanina um autonomi, altíð hevur tað sum sína grundtreyt, at tað ikki stendur fullkomuliga einsamalt, men er avleitt av tí skaldsliga tekstinum og snýr seg um hann, endursigur hann, metir um hann og miðlar hann.

Henda grundtreyt ávirkar eisini ummælið ítøkiliga og sæst aftur á forminum á ummælinum, málinum í tí og eisini í teimum rákum, sum gera seg galdandi í ummælaraheiminum. Ummælið endurspeglar bókmentirnar, og málið, sum verður nýtt í bókmentunum, ávirkar tað einstaka ummælið, eins og rákið, sum er galdandi í bókmentunum, ávirkar ummælini yvirskipað.

Tey rák, sum síggjast í bókmentunum, finna tí ofta eisini sína leið til ummælini. Ein eygleiðing, sum verður lýst í *Norsk litteraturkritikks historie*, er, at impressionistiski stílurin veksur fram í ummælunum, samstundis sum tann sálarfrøðiliga snaringin sæst í bókmentakjakinum í endanum av 19. øld. Individualitetur verður í hesum tíðarskeiði hevjaður upp sum eitt bókmentaligt virði, og tað impressionistiska ummælið verður alt vanligari. Hetta endurspeglar bæði áhugan fyri tí sálarliga og eina broytta miðlastøðu, har tann breiði eftirspurningurin fær ávirkan á, hvussu bókmentakritikkur verður skrivaður (Furuseth 2016a:75-85).

Furuseth er inni á hesum í bókini *Forfatteren som kritiker* og vísir á, hvussu ummælarin brúkar objektstekstin í sínum ummæli. Hon sigur, at ummælarin skiftir ímillum at vera aktivur strategur í nýtsluni av objektstekstinum og at vera ein passivur miðil, ið er ávirkaður av tí tekstinum, sum hann skrivar um (Furuseth 2015:45). Hon kallar tað „lán“ og „herming“ (Furuseth 2015:15) og tosar um, hvussu objektið (listaverkið) definerar metamálið í ummælinum. Eisini her vísir hon til Riffaterre (Furuseth 2015:44).

Performativa rákið, sum hevur verið at síggja í norðurlendskum bókmentum í fleiri áratíggju, er ein av grundgevingum mínum fyri tí, sum er snúningsdepil í viðgerðini av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007, nevniliga sjálvsmyndan í bókmentaummælum, ella pallseting av egnum persóni í ummælum. Eg vísi í viðgerðini á, at hetta rák, sum sæst í bókmentunum í tíðarskeiðinum, gevur endurljóð í bókmentaummælisheiminum um sama mundi. Jon Helt Haarder lýsir rákið soleiðis: “...det fænomen at forfattere nu i flere tiår har installeret sig selv og andre med navns nævnelse i deres tekster og på den måde har deltaget i mig-generationens generelle interesse for ... sig selv“ (Haarder 2014:8).

Bókaummæli sum skaldskapur og skaldskapur sum bókaummæli

Smittan frá skaldsliga tekstinum til ummælið er í føroyskari ummælarasøgu ikki nýggj, hóast hon verður nýtt á nýggjan og serstakan hátt í ummælum sum teimum hjá Peturi Pólsson og Carl Jóhan Jensen. Smittan kann kanska heldur sigast at vera tað, sum sermerkti ummælini frá byrjan í føroyskari ummælarasøgu, tí onkur av teimum fyrstu ummælunum, sum vórðu skrivað í føroysk bløð, vóru aftursvar til yrkingar, sum lesarar ikki tóku undir við og kendu seg noyddar at svara aftur, og hetta varð gjørt við at yrkja upp í yrkingina, sum varð prentað frammanundan. Hetta má sigast at vera nakrir av undanformunum til føroysk ummæli, mótyrkingar, sum vóru skrivaðar fyri at gera viðmerkingar til skaldskapin og meta um hann, altso at fremja ta funktiónina hjá ummælinum, sum sambært flestum ástøðingum er tann fremsta: at meta um skaldskap. Tað er týðiligt, at metingin varð gjørd eftir øðrum kriterium, enn hon verður gjørd í dag, nú fremsta ummælarakriterium er listalig dygd. Tá vóru onnur fyrilit at taka, ofta moralsk, átrúnaðarlig og tjóðskaparlig.

Tað kendasta føroyska dømið um mótyrking, sum hevur ummælisfunktión, er aftursvarið hjá Andrasi Sámalson (seinni: Samuelsen) til vísuna „Vaagen“ hjá J. P. Gregoriussen, sum varð prentað í *Føringatíðindi* 15. februar 1894. Aftursvarið stóð í *Føringatíðindi* 3. mars 1894:

Í „Føringatíðindi“ nummar fýra
har stendur ein ríma prentað;
til yrkjaran havi eg nakað at siga,
antin tað er drongur ella genta.
Men fram kom Vaagen yvir hav;
Tí Harrin tað vildi.

Eg má siga um rímuna
at yrkt er hon nóg væl;
men at hon gevur „Vaagen“ tøkk,
tað er ikki, sum tað skal
(Sámalson 1894).

Samuelsen yrkir átta nýggj ørindi upp í vísuna hjá J. P. Gregoriussen. Hann sigur, at hon er yrkt nóg væl, men trupulleikin er í tí innihaldsliga. Trupulleikin er, at J. P. Gregoriussen endar vísuna við at takka „Vaagen“, sum bar „okkum“ burtur úr vanda. Samuelsen hartar yrkjaran og sigur, at Harrin skuldi fingið tøkkina og ikki skipið. Hetta er eitt av teimum fyrstu ummælunum, sum eru skrivað á føroyskum um føroyskar bókmentir í føroyskum bløðum, og kriteriini fyri metingini eru religiøs/moralsk.

Turið Sigurðardóttir nevnir hetta í grein um *kappyrking* og *mótyrking* og sigur, at til og við romantikkinum var tað ikki óvanligt, at skald svaraðu aftur yrking við yrking, og lyriskur skaldskapur soleiðis tænti sum kjakpallur fyri ymisligastu evni (Sigurðardóttir 1994). Í sniði var mótyrkingin yrking, men innihaldsliga í ætt við onnur tekstsløg, sum meira leggja upp til kjak og mótspæl og júst eru tekstir, sum svara aftur til aðrar tekstir – í ætt við ummælini. Í hesum dømunum um „Vaagen“ kunnu vit siga, at skaldskapur og ummæli nýta sama form og eru partur av sama miðli, annað er tó týðiliga eitt aftursvar til tað fyrra.

Hesin háttur at svara einum teksti aftur og meta um hann, kann, sum eg havi nevnt, síggjast sum eitt slag av undanformi til ummælið í føroyskum høpi. Ikki tí, tað er ikki óvanligt at nýta mótyrking í dag, men nú verður tað helst gjørt við einum sterkari tilviti um, at yrkingin júst skal vera formurin og ikki ummælistekstslagið. Í 1894 var tað kanska eins natúrligt at velja yrkingaformin, við tað at ummælið ikki hevði fingið fótin fyri seg sum tekstslag í føroyskum høpi tá.

Hanus Andreassen (nú Kamban) skrivaði, tá týðingin hjá Axel Torgarð av *Norðlandslúðrinum* hjá Petter Dass, sálmaskaldi, var útkomin, ummæli av týðingini og formaði tað sum yrking í sama ørindislagi sum yrkingin hjá Petter Dass (Andreassen 1999). Ummælið og yrkingin bera heiti eftir reglu úr niðurlagi til „Nornagests rímu“: „Enn gellir lúður í stavni“, sum kann umskrivast „Enn verður tikið reystliga til máls“. Hanus Kamban ummælir her í ørindisformi yrkingina, og tey seinastu fýra ørindini snúgva seg um ta føroysku týðingina og um útgávuna. Bæði virðismeting og áheitan eru við í endanum sum í einum klassiskum ummæli:

(...)
Týðingin henda úr penni er førd
av kvívíkarpresti, ið fyrr var, og gjørd,
sum borin av innblástri lýggjum.
Her er ikki illgongt, tú flýgur avstað
úr sýslu í sýslu, tað tykist, sum kvað
eitt føroyskt skald her av nýggjum

Væl er hon handfarin útgávan, við,
staðanøvn hava føroysk snið,
so kunnugir kennast teir blettir,
her hómast Jóhan Hendriks ráð,
kopphyggin Valdemar tær prentvillur smá
læt lúka, so eingin var eftir.

Tøkk fái Stiðin og Zakarias Wang,
ið ei gloymdu prestin, um smámannin sang,
og framdu tað útgávubragdið.
Og tøkk fái Axel, ið orðkringur bar
tann stimbrandi lúður vestur um hav
og loysti ta týðing úr lagdi.

Hestprent læt lúðurin prenta væl,
og á snøggum papíri, ei dyljast tað skal,
so keyparin ei verður nipin.
Fyri 100 krónur hann fáast kann
so far bert av húsum kvinna sum mann
at ogna tær henda gripin.
(Andreassen 1999).

Í kapitlinum „Fiktionalisert litteraturkritikk“ í bókini *Forfatteren som kritiker* kemur Sissel Furuseth inn á hetta, at ummæli kunnu trína fram í ymiskum formum. Tey eru ikki avmarkað til bløð og tíðarrit. Furuseth vísir til norsk dømi um høvundar, sum metaummæla í sínum skaldskapi, t.d. Erlend Loe og Nicolai Houm. Hon vísir á, at „ummælarin“ her hevur serlig kor, og at tað ger hann onkursvegna betur vardan, tí hann ger ummælið til ein part av fiktiónini (Furuseth 2015:48-49). Hon vísir eisini á, hvussu Nicolai Houm í skaldsøgu síni letur ummælaran verða yvirkoyrdan av einum sporvogni í Berlin á veg til eitt bókmentatiltak, tí hann rennur aftan á franska rithøvundinum Michel Houellebecq og gloymir at hyggja uttan um seg (Furuseth 2015:48). Hetta kann samanberast við tað, sum Jóanes Nielsen ger við ummælaran og rithøvundin Carl Jóhan Jensen í skaldsøguni *Bommhjarta*, tá Carl Jóhan smellur í gólvið og doyr, meðan hann situr sum áhoyrari til kórframførslu av sínum egnu yrkingum (Nielsen 2016:282-285). Eisini vísir Furuseth á, at Knut Hamsun (1859-1952) og Hanne Ørstavik (f. 1969) við 110 ára millumbili bæði hava ummæli sum part av skaldskapinum í sínum útgávum. Bøkurnar hjá Karl Ove Knausgård (f. 1968) eru somuleiðis dømi um skaldskap við longum brotum um aðrar bókmentir, t.d. um skaldskap hjá júst Hamsun (Furuseth 2015:50). Tekstirnir hava nøkur av somu eyðkennum sum ummælini, men kunnu ikki metast sum ummæli út frá teimum kriterium, sum verða sett í hesari ritgerð.

Í Føroyum hevur tað gjøgnum alla ummælarasøguna, sum ummælið av „Vaagen“ er dømi um, verið ein partur av ummælaravirkseminum at ummæla í ymiskum formum. Frá byrjanini var hettta kanska orsakað av, at ummælið sum tekstslag ikki hevði fingið fótin fyri seg. Ummælarin hevði tí ikki nakrar fyrimyndir at halda seg til, og ríman var virkni bókmentaformurin á føroyskum. Í dag má hesin mátin at ummæla meira síggjast sum málslig og innihaldslig smitta, sum dømið hjá Peturi Pólsson lýsir, og sum ein ítrótt hjá høvundum, ið áður vísta dømið hjá Hanusi Kamban lýsir, at nýta sínar listaligu gávur í ummælaravirksemi. Hjá øðrum er tað ein týðandi partur av skaldskapinum sum heild og liður í einum postmodernistiskum máta at toyggja og tamba tekstslagshugtakið. Tóroddur Poulsen er tann føroyski rithøvundurin, sum hevur gjørt mest burtur úr hesum seinasta, og hansara íkast til kjakið um bókmentir í tíðarskeiðinum 1997-2007 verður eisini tikið við í viðgerðini í kapitli 7, hóast hansara „ummæli“ ikki lúka krøvini at verða bólkað sum ummæli.

Fyri at koma aftur til ummælið sum samskiftisliga gerð, sum Nøjgaard og Rösing og fleiri leggja dent á, er tað júst eitt av hesum kriterium hjá ummælinum, sum Tóroddur Poulsen við sínum „ummælaravirksemi“

uppfyllir. Eg seti ummælaravirksemi hansara í gásareygu, tí Tóroddur Poulsen hevur gjørt sera lítið við at ummæla á siðbundnan hátt. Hann hevur tó gjørt nógv við at taka lut í samrøðu á bókmentapallinum um ummælið sum tekstslag, um ummælaran og hansara leiklut, og hann hevur í skaldskapi gjørt nógv við at umrøða annan skaldskap, at mótummæla ummæli av sínum skaldskapi og at parodiera aðrar ummælarar, t.d. Carl Jóhan Jensen í yrkingini „Úr innasta loynikamari uttangarðs-kalla" við undirheitinum „Eg dugi latín!" (Poulsen 1992b) og Kim Simonsen í yrkingini „Pseudsider" (Poulsen, Tóroddur 2006:80). Meira verður komið inn á hetta í lýsingini av teimum báðum sum ummælarum.

Í áður umrødda ummæli sínum av *Sót og søgn* sigur Petur Pólsson:

> Tað eru fáir menn, ið eru so torførir at ummæla – og kanska enn færri, ið lata seg so illa ummæla, sum Tóroddur Poulsen. Ikki bert tí at tað, sum higartil er komið úr hondum hansara, er so einstakt og egið, men eisini tí, at Tóroddur er so bevístur um hesar stakkals ummælararnar, at teir verða teptir, áðrenn teir hava trýst á fyrsta knøttin á telduborðinum. Hetta er kanska eisini ein orsøk til, at undirritaði aldri gjørdist bókaummælari. Men hetta er samstundis eisini nakað, mær dámar sera væl (eisini tí at mær dámar ikki so væl smakkin av egna nalva mínum). Eg vil til hetta høvið vísa til „TAÐ ER AT UMMÆLA" á síðu 47 í bókini. Hon teppir allar umvælingar við sær sjálvari (Jensen, Petur J:1997).

Petur Pólsson sigur, at skaldskapurin hjá Tóroddi Poulsen teppir allar ummælarar, men tað liggur ein andsøgn í útsøgnini, tí samstundis sum Petur Pólsson sigur, at hann ikki gjørdist bókaummælari, so er tað júst tað, hann er her. Hann ummælir og tekur samstundis lut í einari metasamrøðu um at ummæla, sum Tóroddur Poulsen við sínum skaldskapi setir gongd í.

Tóroddur Poulsen mótummælir, setir ummælaran upp á pláss og noyðir hann at vera tilvitaðan um sín leiklut, og hetta sæst aftur í ummælunum av hansara skaldskapi. Eitt annað dømi um hetta er, hvussu Tóroddur í paratekstinum til *Reglur* vísir til eitt gamalt mistak hjá Jógvani Isaksen: „Tóroddur Poulsen er føddur í Havn í 1957 og ikki í 1950, 56, 58 ella 59 sum summi bókmentafólk vilja vera við" (Poulsen 1994). Hetta fær Jógvan Isaksen at brúka eina heila síðu í næsta ummæli av Tóroddi til at svara aftur og bera í bøtuflaka fyri, at hann upplýsti skeivan føðingardag hjá rithøvundinum í einari viðgerð av hansara skaldskapi (Isaksen 1995).

Skaldskapurin hjá Tóroddi Poulsen fær ummælarar at vera tilvitaðar um sín ummælaraleiklut og at vera tilvitaðar um ummælið sum tekstslag. Besta dømi um hetta er kanska ummælið hjá fjøllistamanninum Trygva Danielsen (f. 1991) av *Skriftstøðum* (2016) í Mentanarkaféini hjá Kringvarpinum („Tóroddur á vektini" 2016). Ummælið er samrøða millum Trygva Danielsen og vertin Sissal Kampmann (f. 1974), og her verður tilvitið, sum Tóroddur Poulsen noyðir ummælaran at hava um sín leiklut, úttalað beinleiðis, tá Sissal Kampmann steðgar Trygva Danielsen mitt í ummælinum og minnir hann á, at hann má hugsa seg um, hvussu hann ummælir, tí at tað er Tórodd, hann ummælir. Hetta er avtalað spæl, ein sjónleikur ella eitt metaummæli, sum verður fört fram í trimum ymiskum útgávum, ið vísa, hvussu ymiskt tú kanst fáa burturúr, og hvørjar niðurstøður tú kemur til, alt eftir hvussu tú fert til verka sum ummælari, hvønn leiklut tú tekur á teg, hvørjum brillum tú lesur tekstin við. Tóroddur Poulsen vísir annars eisini, at hann hevur eina meining um ummæli sum tekstslag, tá hann speiskliga kallar hetta slagið av prátandi útvarpsummælum, ið hava verið at hoyra seinastu árini, „sussmælið" („bloggoddur" 2016), sum heldur hann tey vera meira „suss" enn verulig ummæli, og tí væntuliga ikki verd at taka eins nógv í álvara og skrivað ummæli eftir hansara tykki.

Eitt annað dømi um, at Tóroddur Poulsen óbeinleiðis toyggir ummælistekstslagið, er „eftirgangurin" hjá Jóanesi Nielsen í *Sót og søgn*. Tað framgongur í tekstinum hjá Jóanesi Nielsen, at hann er biðin um at skriva eftirorð til *Sót og søgn*, áðrenn hann yvirhøvur hevur sæð verkið. Hann hugleiðir eitt sindur um tekstslagið eftirorð, sum hann sigur seg ikki hava hugsað um sum eitt serligt bókmentaligt tektslag, men meira sum eina brodering. Øðrvísi er við forordunum, sum eru sum eitt slag av portri inn í søguverk og skaldsøgur, og sum mangan eru eitt tað besta við bókunum. Tá Jóanes greiðir frá

uppgávuni, hann hevur fingið frá Tóroddi at skriva eftirorð, hómast ein speiskur tóni, tá Tóroddur ikki vil lata Jóanes síggja handritið frammanundan og letur tað vera „hansara problem“ at finna útav, hvat skal standa í hesum eftirorðum. Tá bókin kemur út, hava eftirorðini fingið heitið „eftirgangur“, eitt orð, sum kann samanberast við „sussmæli“: eitt nýgjørt orð, sum er samansett av „eftirorð“ ella „eftirmæli“ og „inngangur“, men sum ikki er til frammanundan. Soleiðis toyggir Tóroddur Poulsen tekstsløgini og brýtur niður tey yrkisligu mørkini við at hoyggja við teimum yrkisligu hugtøkunum, sum eru amboð hjá høvundum, ummælarum og útgevarum við orðum sum „eftirgangur“ og „sussmæli“. Onkur ummælari undrast á eftirgangin og setir spurning við, um tað er trýstið á rithøvundinum at vera nýskapandi, sum er orsøk til, at eftirgangurin er við, tí bókin hevði verið fult so góð uttan (Reinert 1997). Men í hesum sermerkta teksti hjá Jóanesi Nielsen, ið fær eina lítla speiska vend við heitinum, sum Tóroddur Poulsen gevur honum, skrivar Jóanes Nielsen í veruleikanum okkurt, sum líkist einum ummæli av *Reglum*, har hann lýsir *Reglur* sum eina av teimum bókunum, ið seta mark. Hann lýsir hana sum avantgardlitteratur við stóra A, sum eitt slag av syntesu yvir túsund aðrar bøkur. Umframt at vera endurspegling av modernismuni metir Jóanes Nielsen bókina at vera eina av „balkongunum“ hjá somu modernismu, v.ø.o. veitir hon útsýni yvir modernismuna. *Reglur*, sigur hann, er ein bók, ið spekir gløggar kritikarar (Nielsen 1997a).

Tóroddur Poulsen skrivaði eitt sermerkt ummæli í *Oyggjaskeggja* í 1996 um *Rúm* hjá Carl Jóhan Jensen. Ummælið hevur undirheitið „Bókaummæli“ og er sett upp sum eitt vanligt ummæli við yvirskrift, undiryvirskriftum og orðingum, sum vit hóast sermerktar kenna aftur frá ummælistekstslagnum: „Fyri sløkum átjan árum síðani“, „Á fyriaftanpermuni [sic]“, „Vær endurgevum á blaðsíðu 229“, og „Tó gevur rúmið eitthvørt til umhugsunar“, orðingar, sum bera boð um, at eitt verk verður viðgjørt. Út frá paratekstinum verður lesarin soleiðis leiddur til at lesa tekstin sum eitt vanligt ummæli, men hann verður ørkymlaður, tí teksturin er ólesiligur, á tremur við innihaldsliga tómum orðum. Teksturin kann tí ikki lesast ítøkiliga sum ummæli av bókini *Rúm*, men má skiljast sum ein long og speisk viðmerking til málsliga stílin hjá Carl Jóhan Jensen (Poulsen 1996). Tóroddur Poulsen lýsir óbeinleiðis í hesum „ummælinum“ tað klisjéfylta málið í ummælum, sum Inger Smærup Sørensen hevur bent á (Sørensen 2013:89), og sum verður lýst í teirri norsku ummælarasøguni (Furuseth 2016a:465-468).

Hesin tekstur Tórods, „Bókaummæli“, er í samsvari við nevndu keipuyrkingina, sum eg vendi aftur til í kapitli 7, „Úr innasta loynikamari uttangarðs-kalla“ við undirheitinum „Eg dugi latín!“ í yrkingasavninum *Villur* eftir sama yrkjara (Poulsen 1992b). Yrkingin ger málsliga stílin hjá Carl Jóhan Jensen til láturs og sipar til ummælið hjá honum í *Brá* 1989 av yrkingasavnium *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari* (1987) eftir Jóannes Dalsgaard. Carl Jóhan Jensen heldur lítið um savnið og sigur, at tað umboðar eitt skaldskaparslag, sum hann nevnir máliskuskaldskap. Carl Jóhan Jensen talar hinvegin fyri einum skaldskapi, sum hann nevnir uttangarðsskaldskap, og lýsir hann sum skaldskap, ið yrkir seg undan tí hevdbundna, tømir málið fyri at løða tað av nýggjum og soleiðis leggur afturat og víðkar lívstilvitið hjá sær sjálvum (Jensen 1989). Hetta ummælið vakti ans, og Hanus Kamban (tá Andreassen) skrivaði eitt mótummæli í *Sosialinum*. Hann sigur tað umboða eina skaldskaparsjón, har allur menniskjaligur samhugi og samfelagsligur áhugi er útkólnaður, og tað ger ein ummælara blindan. Mótummælið hevur yvirskriftina „Tá hugmóð verður haft“ (Andreassen 1989) og er kritikkur av Carl Jóhan Jensen sum ummælara. Hesa hugmóð lýsir Tóroddur Poulsen í yrkingini við keipumynd (Poulsen 1992b) í líknandi málsligum stíli sum ummælið um *Rúm* og við einum møguligum boðskapi um, at tað eisini kann vera ein vandi í at fara so langt uttangarðs, at teksturin ikki er skaldskapur longur, men bert orðaskvaldur. Júst hetta er eitt gott dømi um, hvussu Tóroddur Poulsen kemur inn í samrøðuna um ummæli við speiskum viðmerkingum, sum hann ger til ein part av sínum skaldskapi, í hesum føri í einum avskeplaðum mótummæli í yrkingalíki.

Ummælið um *Rúm* kann lesast sum ein slík speisk viðmerking til bókina og stílin hjá Carl Jóhan Jensen, men eisini sum eitt metaummæli; sum ein viðmerking til ummælið sum tekstslag, har høvundurin tømir tekstslagið innihaldsliga, og tað kann verða fylt av nýggjum (Poulsen 1996). Samstundis er júst hetta „ummælið“ eitt

lýsandi dømi um, hvussu ummælið sum tekstslag tekur útgangsstøði í skaldverkinum, hermir eftir tí og avskeplar tað, í hesum føri tilvitað við tí endamáli at koma við einari speiskari viðmerking til verkið.

Málburður og stílsnildir

Fyri at koma aftur til tey trinni viðurskiftini, sum Sissel Furuseth í sínari lýsing av ummælisins retorikki sigur vera áhugaverd at kanna, nevniliga í hvønn mun ummælið hermir eftir tí bókmentaliga tekstinum, sum tað ummælir, hvørji mynstur ganga aftur í ummælarasiðvenjuni, og hvussu málið í ummælinum nýtir orðatilfar og lænir myndugleika frá uttanfyriliggjandi diskursum og fakøkjum, havi eg víst á sambandið millum ummælið og ummælta tekstin við at vísa á málsliga smittu frá bókmentateksti til ummæli. Herundir havi eg lýst samrøðuna um bókmentir, sum brýtur niður mørkini millum tekstsløgini í samskiftinum millum ummæli og bókmentaverk. Tey bæði næstu viðurskiftini, mynstrini, sum ganga aftur í ummælarasiðvenjuni, og málið, ið nýtir orðatilfar og lænir myndugleika frá uttanfyriliggjandi diskursum og fakøkjum, verða viðgjørd undir einum í hesum parti um málburð og stílsnildir.

Umframt tey lýstu tekstslagseyðkennini hjá ummælinum, sum eg longu havi nomið við, eru onnur, sum síggjast aftur í, hvussu ummælið verður sett fram. Hesi eyðkenni eru til dømis mátar hjá ummælaranum at draga lesaran inn í sín heim. John Chr. Jørgensen vísir í bókini *Sprogblomster i spinatbedet* um málsliga stílin í ummælum á fleiri stíltøk, ið ganga aftur, sum skapa identifikatión, og sum dramatisera, t.d. nýtsla av dramatiskari nútíð og boðshátti ella ynskishátti (Jørgensen 1999:38-39). Apostrofan er vanlig, hetta at venda sær beinleiðis til lesaran og skapa eina intima støðu við at kalla hann „tú“ ella „lesarin“ (Jørgensen 1999:40-41). John Chr. Jørgensen tosar um nýtslu av tankastrikum og parentesum og vísir á, at danski ummælarin Lars Bukdahl (f. 1968) t.d. nýtir nógvar parentesir. Hann vísir, hvussu tær skapa nærveru, og at lesarin sleppur at kaga inn í tankagongdir hjá ummælaranum, ið er til staðar sum eitt hugsandi og sjálvtilvitandi, skrivandi menniskja (Jørgensen 1999:46-48). Onnur stíltøk, sum ganga aftur, eru spurnartekin, rópitekin, rím (49-56), orðaspæl, tilsipingar, nýggjyrði og standardorðingar. Eisini aðrir figurar eitt nú myndburðir, samanberingar, kontrastir, pastisjur og endurtøkur verða nógv nýttir í ummælum (Jørgensen 1999:68-85), eins og serstakur setningsbygnaður, argumentatiónsháttur og so hátturin at bera fram metingina. John Chr. Jørgensen tekur dømi úr sínum innsavnaða tilfari frá donskum ummælum í 1999 og vísir á hesi mynstur, sum hann sær ganga aftur. Nógv av tí sama síggja vit eisini í føroyskum ummælum, sum nýta somu mynstur, og fleiri av hesum drøgum verða tikin fram í viðgerðini av ummælum í tíðarskeiðinum 1997-2007. Tær standardorðingar, sum hoyra ummælinum sum tekstslagi til, fangar Tóroddur Poulsen væl í sínum áðurnevnda „ummæli“ av *Rúmi* hjá Carl Jóhan Jensen, tá hann við at seta hesar klisjéir í málinum saman við nonsens-máli fær víst júst á tey málsligu sereyðkenni, sum eru í ummælinum (Poulsen 1996).

Móttøkan av skaldskapi sum kropslig uppliving

Eitt serligt stíltak í ummælum, sum verður lýst í *Norsk litteraturkritikkshistorie 1870-2010*, er, at móttøkan av skaldskapi ofta verður lýst sum ein kropslig uppliving, og at skaldskapurin ofta verður lýstur sum matur, ið verður etin og upptikin í kroppinum í móttøkuni (Vassenden 2016c:582-994). Hetta er eitt stíltak, sum sæst aftur í viðgerðini av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007.

Eirik Vassenden lýsir tað soleiðis: „Møter mellem tekster og lesere er også møter mellem tegn og kropper“ (Vassenden 2016c:584). Erik Bjerk Hagen lýsir, hvussu tær kropsligu reaktiónirnar eru við til at ávirka okkara meting av bókmentum: „Vi kjenner et litterært verk i kroppen like mye som i bevisstheten. Når vi leser, puster vi fortere, eller blir åndeløse av spenning, eller får gåsehud. Vi reagerer med begejstring, likegyldighet eller afsky. Vi ler eller gråter“ (Hagen 2004:26).

Tá vit siga, at smakkur er so ymiskur, hugsa vit kanska ikki um, at vit her eisini tosa í myndamáli og hugsa um tekst sum nakað, sum skal etast og njótast. Hetta er tó vanligt myndamál í gerandismálinum, sum eisini verður nýtt, tá tosað verður yvirskipað um góðsku. Rithøvundurin Sigurð Joensen (1911-1993) nýtir mat (kjøt) sum myndamál, tá hann í ritroyndini „Hugskot uppi yvir einum

hálvpiðaðum háryggi“ tosar um smakk. Hann nýtir myndamálið til at vísa á, at tað er munur á smakki. Myndin lýsir væl, at bæði áhugi og vitan eru fortreytir fyri nøktandi góðskumeting: „Sig ikki, tær dámar kjøt! Sig, tær dámar válgara ella tjógv, men skila til, um tú vilt hava ærtjógv ella lambstjógv; skal tað vera veðurlamb ella gimburlamd? Hvussu vil tú hava tað? Nýturt?“ (Joensen 1987:162). Í viðgerðini vísi eg eisini á, at hesin málburður verður nýttur um góðsku.

Kropslig eyðkenni eru eisini at síggja í føroyskum ummælum. Dømi um at móttøkan av skaldskapi beinleiðis ávirkar lesaran likamliga, sæst t.d. í ummælinum hjá Kinnu Poulsen av *Gudahøvdi* (2017) eftir Jóanes Nielsen, tá hon sigur, at onkur yrking kann fáa lesaran at flenna, meðan onkur onnur vætti eygnakrókin. Tað er kanska ikki undarligt, at kroppurin fyllir nógv í ummælum av Jóanesi Nielsen, tí, sum Kinna Poulsen eisini sigur í ummælinum: „Kroppurin hevur altíð havt sítt demonstrativa pláss í yrkingunum hjá Jóanesi Nielsen“ (Poulsen 2017).

Tá Trygvi Danielsen í 2018 ummælir hetta sama savnið, *Gudahøvd*, kallar hann tekstin í savninum naknan og húðarleysan og sigur, at yrkingin loypur av síðuni og rínur við. Trygvi nýtir orðið „árinarmikið“ og hann lýsir árinini, sum skaldskapurin hjá Jóanesi Nielsen hevur á hann sum lesara, við at siga, at hann fekk gásarhold av yrkingini „Berligt leiði“ (Danielsen 2018).

Carl Jóhan Jensen sigur soleiðis um yrkingasavnið *Trettandi mánaðin* (1978) eftir Jóanes Nielsen knapt 25 ár eftir, at savnið var útkomið: „hesin rái og óhølvaði skaldskapurin sum ein nýrasteinur, ið fór svíðandi gjøgnum tað siðarvaða landræsið til allar hæddir í tilvitinum vóru í einum logareyðum eldi av pínu og ilsku“ (Jensen 2002b). Soleiðis, sigur Carl Jóhan, ávirkaði savnið tey, sum ikki dámdu tað. Lýsingin er enn eitt dømi um, at móttøkan av skaldskapi verður lýst sum ein kropslig kensla.

Myndamál við mati hevur djúpar røtur í skaldskapinum. Í *Bíbliuni* er tað at eta bók ella bókrullu myndburður fyri at gera seg til eitt við boðskapin. Ezekiel profetur etur bókrullu og fær megi til profetagerningin:

> Síðan segði hann við meg: Mansbarn, gloyp hesum her, gloyp hesi bókrulluni og far og tala til Ísraelsmanna! Tá læt eg upp munn mín, og hann læt meg gloypa bókrulluni og segði við meg: Mansbarn, lat kvið tín gloypa henni, fyll indur tíni við hesi bókrulluni, sum eg fái tær! Tá gloypti eg henni, og hon var søt eins og hunangur í munni mínum (*Bíblia*. Ezekiel 3:1-3).

Í *Norðlandslúðrinum* hjá Petter Dass verður matmyndburður nýttur bæði til at lýsa umrøddu yrkingina sum norska og til at venda sær frá útlendskum ovurfínum mati/skaldskapi:

> Men útlendskan mat ikki bjóða vit her
> (...)
> Men hvat halda tit um tann útbloytta seið,
> hann stendur til reiðar, so sigið eitt nei,
> men gerið nú tykkum til góða
> (...)
> Slík skriving sum fylla í búkin ei gekk,
> Men sinnið av henni ein stuttleika fekk
> Og lesarin tvífalda frøi
> (Dass 1999:16-18).

Poul F. Joensen sigur um „skaldametararnar“, at teir jótra (Joensen 1967/1988:48), og Steinbjørn B. Jacobsen sigur í yrking um ummælarar, at ummælarin etur yrkingina sum drýl, alsamt mølmandi um breyð (Jacobsen 2002:39). Í viðgerðini av ummælum frá tíðarskeiðinum 1997-2007 vísi eg til dømi um matmyndamál, sum gongur aftur eisini í føroyskum ummælunum.

Fyri at taka saman um stílin í ummælum kann sigast, at frá byrjanini, áðrenn tilvitið um ummælið sum tekstslag hevði sett síni spor í føroysku miðlunum, til í dag, eru skaldskapur og ummæli samantvinnað á ymiskan hátt í føroyskari ummælarasøgu. Tey fyrstu ummælini vóru ummælandi yrkingar og tekin um, at tekstslagið enn ikki hevði fest røtur. Í dag síggja vit ummælandi yrkingar og avskeplað ummæli í ymiskum líki lið um lið við tey siðbundnu ummælini. Tað er tekin um, at ummælini eru rótfest tekstslag, ið postmodernistarnir við Tóroddi

Poulsen sum høvuðsumboð í hesum høpi í Føroyum, spæla sær við og við nýggjari dagsskrá bróta niður aftur mørkini millum tekstsløgini. Eg havi víst á, at ummælandi skaldskapur ikki er serføroyskt fyribrigdi. Vit síggja ummæli flættað inn í skaldskap hjá t.d. norsku Karl Ove Knausgård og Hanne Ørstavik. Spurningurin er tó, um hesin hátturin at reagera og úttrykkja seg um bókmentir kanska er serliga sterkur í Føroyum; um trotmentanin ger, at ummælini finna sær aðrar leiðir út til lesaran, nevniliga gjøgnum skaldskapin. Hesin hátturin at úttrykkja seg er í andsøgn við aðrar objektivar, intellektuellar og ástøðiligar hættir at ummæla, bæði tí hann er skaldsligur, sansaligur og impressionistiskur, og tí hann gevur ummælaranum aðrar streingir at spæla uppá, tí hann er vardur av teimum fiktivu kørmunum og kann nýta allar snildir.

Í hesum kapitli um tekstslagið havi eg lýst ummælið yvirskipað sum leikara á tí bókmentaliga økinum, eins og eg havi lýst tey sereyðkenni, sum mynda tekstslagið, nevniliga at tað, tá til stykkis kemur, er samskifti millum menniskju, at tað í sínum uppruna er journalistiskt, og at tað hevur sama potentiali sum aðrir tekstir at vera list í sjálvum sær. Harumframt havi eg við dømum lýst serliga stílin í ummælum, har eg havi víst á, hvussu tey ótilvitað og viðhvørt tilvitað herma eftir tekstinum, sum tey viðgera. Eg havi víst á, at mál og stílur í ummælum eru serstøk, og tað ber til at síggja eitt mynstur í, hvussu ummæli nýta mál- og stílsnildir sum endurgávu, apostrofu, tankastriku, parentes, spurnartekin, rópitekin, rím, orðaspæl, tilsipingar, nýggjyrði, myndburð, samanbering, kontrast, pastisju, endurtøku o.s.fr. Eisini havi eg víst á hetta serliga stíltak, sum ofta er at finna í ummælum, at skaldskapur í móttøkuni verður lýstur sum ein kropslig uppliving. Allar hesar lýstu stíl- og málsnildir nýti eg í viðgerðini av teimum innsavnaðu ummælunum, og tær eru við til at avdúka, hvat ein ummælari leggur dent á í sínari viðgerð av einum teksti, hvønn hann fyrst og fremst vendir sær til, hvussu hann sær seg sjálvan sum ummælara o.s.fr. Eisini eru tær við til at avdúka, at í summum førum hevur ummælarin í størri mun enn at ummæla verkið í hyggju at pallseta seg sjálvan, at í øðrum førum kennir ummælarin seg kanska ikki tryggan í ummælaraleiklutinum, og at í uppaftur øðrum førum tosar ummælarin ótilvitað niðrandi um kvinnur og kvinnulig evni í skaldskapi.

5. Ummælaratypur

Í hesum kapitlinum seti eg ymiskar ummælaratypur, sum ástøðingar hava skilmarkað gjøgnum tíðirnar, fram úr tveimum ólíkum sjónarhornum, nevniliga einum journalistiskum og einum bókmentaligum. Orsøkin til hetta býti er, at hesi bæði sjónarhornini seta ymiskar treytir fyri, hvussu ummælarar verða bólkaðir. Úr journalistiskum sjónarhorni verður yvirskipaða bólkingin gjørd út frá skrivistíli í ummælinum, og ummælaratypurnar eru í stóran mun skilmarkaðar út frá, hvussu og í hvønn mun tær uppfylla tey krøv, sum bløðini seta. Tær verða býttar upp eftir, hvønn stíl ummælarin nýtir, hvussu hann lesur bókmentir og eftir, um hann skrivar væl ella minni væl.

Úr bókmentaligum sjónarhorni verður hugt at, hvørja bakgrund ummælarin hevur, hvørja áskoðan hann hevur á bókmentir, og hvørja ætlan hann hevur við sínum ummælum. Úr hesum sjónarhorni verður sjálvsagt eisini hugt at tekstinum, hvussu hann umboðar typurnar, sum verða settar fram, men yvirskipaða bólkingin er gjørd út frá, um ummælarin t.d. er rithøvundur ella bókmentafrøðingur, hvørjar rithøvundar hann ummælir o.s.fr., og ikki fyrst og fremst út frá skrivistíli.

Tað er vanligt at gera mun á ummælum og kritikki fyri at vísa á, at tað er munur á, hvussu og undir hvørjum treytum ummæli í dagbløðum og tíðarritum verða skrivað. Titchener vísir í bókini *Reviewing*

the Arts (1988/2005) á ymiskar skilmarkingar av, hvussu skilt verður millum t.d., um tað er framsetingin í tí einstaka førinum, ella um tað eru førleikarnir hjá tí skrivandi, sum eru avgerandi fyri skilmarkingina, um talan er um ummæli ella bókmentakritikk (Titchener 1988/2005:20).

Í ritgerðini tosi eg um eina professionalisering, sum er farin fram innan føroyskt ummælaravirksemi, frá tí at ummæli vórðu skrivað sum spontan útbrot gjarna í lyriskum formi, til tey fingu ein fastari form og fóru at líkjast teimum ummælum, sum eg viðgeri í ritgerðini, har krøv eru til bæði form og innihald. Professionaliseringin, sum eg tosi um, snýr seg tó ikki um veruliga professionalisering, men um eina førleikatilgongd, sum mennist frá fyrstu undanformum ummælisins, til ummæli, sum leggja seg eftir at lúka krøvini til tekstslagið, samstundis sum tey meira og minni tilvitað troyta teir møguleikar, sum liggja í tí.

Sissel Furuseth vísir á, at munur ofta verður gjørdur á professionellum ummælarum og leikfólki, men hon sigur tó, at ummælaravirksemi hevur ongantíð verið og verður helst ongantíð ein profession í orðsins sanna týdningi. Tað hevði kravt eina serútbúgving (Furuseth 2016c:334). Lars Handesten vísir á, at eingin í Danmark livir av bara at ummæla (Handesten 2018:120). Í Føroyum ber enn minni til at tosa um ummælaravirksemi sum profession. Tá eg viðgeri ymiskar ummælaratypur í Føroyum í tíðarskeiðinum 1997-2007, er í mongum førum torført at bólka ummælararnar, bæði tí at teir ikki arbeiða professionelt sum ummælarar og harvið skriva so mikið fá ummæli í part, at tað í mongum førum er ilt at vísa á eitt ávíst mynstur í ummælarans virksemi, og tí at nógvir av teimum umboða fleiri ummælatypur, sum eru settar fram í ástøðinum.

Eg havi í fyrsta kapitli sagt, at eg í ritgerðini nýti heitið „ummæli“ og „kritikkur“ hvørt um annað, men velji orðið „ummæli“, tá talan útilokandi er um ummæli í bløðum og tíðarritum, og tekstslagið ikki røkkur út um tað. Sum eg havi víst á, sigur Edward Said, at ummælið er bert ein partur av kritikkinum í bókmentastovninum (Said 1983:1). Kortini verður tann munurin, sum mong gera millum ummæli og kritikk, tikin fram í hesum kapitli fyri at vísa á ymisk ástøði um ummælaratypur.

Journalistiskt sjónarhorn

Titchener tosar ikki serstakliga um bókmentakritikk og bókaummæli, men um meting av list sum heild í miðlunum. Hann nevnir bókmentirnar sum ein part av hesum, ið frá journalistiskum sjónarmiði skilir seg burtur úr øllum hinum listagreinunum, millum annað tí at bókmentaummæli í bløðum og tíðarritum í størri mun enn aðrar listagreinar – aloftast sigur hann – verða skrivað av bókmentafólki, sum ikki er partur av ritstjórnini (Titchener 1988/2005:20).

Eitt eyðkenni, sum hevur verið nýtt at gera mun á kritikarum og ummælarum, er tíðin. Eitt ummæli er ein skjót reaktión, men kritikkur er skrivaður sum ein umhugsaður tekstur. Kortini sigur Titchener, at tíðarhugtakið er ikki nóg mikið til at skilja ímillum, tí tað er ikki óvanligt at ummæli, sum verða skrivað beint eftir, at eitt verk er komið út, í eftirtíðini verða mett sum kritiskir tekstir og ikki ummæli. Ein og sami persónur kann skriva bæði ummæli og kritikk, og tí gevur tað heldur ikki altíð meining at gera mun á kritikarum og ummælarum (Titchener 1988/2005:1-2).

Bredsdorff, Jørgensen og Klysner velja at kalla allan kritikk, sum verður skrivaður í bløðum og tíðarritum, kritikk, hóast teir gera vart við, at tað ofta verður gjørdur munur á kritikki sum sjálvstøðugt vegvísandi og ummælum sum ósjálvstøðugt tænandi ella „terroriserandi“, sum teir siga. Teir vísa á, at Tom Kristensen setir í seg, at hann vil kallast ummælari heldur enn kritikari og soleiðis gera seg til fyrsta umboð hjá lesaranum til at føra eina uppliving ella eina kenslu víðari, eina impression. Tom Kristensen gerst soleiðis forsprákari fyri tí impressionistiska ummælinum, sum ikki hevur havt høga tign millum bókmentafólk. Kortini er tað ikki fyri at vísa, at impressiónin er nóg mikið, at Kristensen heldur vil kallast ummælari enn kritikari, men kanska heldur fyri at vinna tí viðkvæma og vælviljandi ummælaranum virðing (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:11).

Kristensen sigur, at hugmyndin er, at kritikarin og ummælarin eru tann sami, men arbeiðsumstøðurnar hava gjørt, at arbeiðið hjá teimum er sera ymiskt. Kritikarin skal staðseta eitt listaverk í tíðini. Hann skal síggja verkið burturfrá, og fyri hann, sigur Kristensen, er tað næstan møguligt at røkka hugsjónini hjá Kant um „ta

áhugaleysu ella uttanveltaðu vælvildina“. Tað hevur minni at siga, hvørja ávirkan kritikkurin hevur í sínari samtíð. Ummælarin, hinvegin, sigur Kristensen, er í núinum. Hann hevur stutta tíð og skal koma við tí fyrsta inntrykkinum, impressiónini, sum skal lokka lesaran til ella ræða hann frá verkinum (Kristensen 1940/1953).

Sum mótsetningur til Kristensen stendur danski bókmentakritikarin Jørgen Bonde Jensen (f. 1937), sum talar fyri grundgevingini fram um impressiónina og ikki vil „smitta“ lesaran, men grundgeva fyri honum og soleiðis gera hann til ein frælsan, kritiskan einstakling (Bredsdorff, Jørgensen og Klysner 1983:11).

Danski bókmentaummælarin Steffen Hejlskov Larsen (1931-2009) setir í 1969 teir donsku dagblaðsummælararnar upp í fimm ummælaratypur:

- tann impressionistiska ummælaran
- tann ideologiska ummælaran
- tann intentionala ummælaran
- menningarummælaran
- upplivingarummælaran

(Larsen 1969:128-40).

Steffen Hejlskov Larsen sigur, at tann *impressionistiski ummælarin* er tann vanligasti í Danmark, og hann tekur Klaus Rifbjerg fram sum dømi. Hann tekur fram eyðkenni hjá hesari ummælaratypuni sum tað at hava málslig evni, og hann tosar um eina entusiasmu, ið virkar áheitandi á lesaran og fær hann at keypa ta ummæltu bókina. Lesarin fær tó ikki í tí impressionistiska ummælinum hjálp til sjálvur at uppliva bókina. Her svíkur tað impressionistiska ummælið, sigur Hejlskov Larsen. Hann setir eisini dømi fram, sum vísir, at tað impressionistiska ummælið metir um uttan at føra fram gildar grundgevingar. Steffen Hejlskov Larsen vísir á, at tann impressionistiski ummælarin verður lisin meira fyri ummælarans skuld enn fyri bókina. Skal ein slíkur ummælari vera álítandi, má lesarin kenna hansara stíl og nýta tað sum rættilykil til at vita, um honum dámar tær ummæltu bøkurnar.

Hejlskov Larsen nevnir Tom Kristensen sum ein ummælara, sum í sínum seinastu ummælaraárum var ein álítandi impressionistiskur ummælari, tí lesararnir kendu hansara stíl og hansara smakk (Larsen 1969:128-131). Impressionistisku ummælaratypuna síggja vit í øllum førum lutvíst í Føroyum í tíðarskeiðinum 1997-2007.

Lesarin veit eisini, hvar hann hevur tann *ideologiska ummælaran*. Hesir ummælarar eru tó ikki lættir at finna í 1969, sigur Steffen Hejlskov Larsen. Tað moraliserandi ummælið sigur lítið um form, men tosar bert um moralin í verkinum. Formur verður fataður sum smyrsl, ið pyntar moralsku útsøgnina í einum verki. Larsen má aftur í tíð fyri at finna hesa ummælaratypuna (Larsen 1969:131-133). Í Føroyum kunnu tey bæði nevndu dømini um mótummæli av yrkingini „Vaagen“, har yrkjarin varð hartaður fyri ikki at geva Gudi æruna fyri, at Vaagen varð bjargað (Sámalson 1894), og ummælið av týðingunum hjá Jakob Jakobsen av stuttsøgunum eftir Maupassant („Tvär smásövur“ 1890), sum vórðu lastaðar fyri at draga ov nógv útlendskt inn í føroyska mentan, nevnast sum dømi um ideologisk ummæli. Somuleiðis er eitt ummæli av bókini *Leikum fagurt* (1963) hjá Heðini Brú, sum fanst at bókini, tí hon var „sálarliga spillandi lestur“ („Ungmannafelagslimur“ 1964), dømi um ideologiskt ummæli.

Tann *intentionali ummælarin* roynir at finna fram til, hvat høvundurin hevur ætlað við sínari skriving, og metir um, í hvønn mun tað eydnast honum. Verkið verður mett út frá krøvunum, sum liggja t.d. í tekstslagnum (Larsen 1969:133-135). Í tíðarskeiðinum 1997-2007 síggjast eyðkenni hjá hesari ummælaratypuni t.d. í ummæli hjá bókmentafrøðinginum Kirsten Brix (f. 1947).

Menningarummælarin metir skaldskap eftir, um hann er í samsvari við gransking og rák í sínari samtíð (Larsen 1969:135-138). Henda ummælaratypan er í tíðarskeiðinum 1997-2007 væl umboðað við fleiri ummælum hjá Kim Simonsen, sum í stóran mun metir skaldskap út frá, um hann livir upp til tað, sum væntast kann av honum í samtíðini.

Uppplivingarummælarin er umboðaður av Villy Sørensen og Torben Brostrøm, og Hejlskov Larsen sigur, at tað djúpt persónliga upplivingarummælið hjá teimum báðum kann hevja seg til list og kanska fáa størri ávirkan enn nógvar bókmentir (Larsen 1969:138-140).

John Chr. Jørgensen spyr, um ummælaratypurnar hjá Steffen Hejlskov Larsen frá 1969 framvegis kunnu nýtast í 1999. Hann vísir á, at býtið, sum Steffen Hejlskov Larsen gjørdi tá, lýsti eitt skifti í ummælarastøðuni í Danmark, har farið var frá tí moralska ummælinum og til eitt innihaldsstýrt og nýggjari listfrøðiliga og formliga stýrt ummælaravirksemi. Hann vísir á, at tær somu ummælaratypurnar í ávísan mun framvegis eru í gildi í Danmark í 1999 (Jørgensen 1999:136-137).

Tað impressionistiska ummælið hevur enn góðar dagar, sigur Jørgensen, men tað ideologiska ummælið er síðan eina framgongd í 1970-árunum aftur verri at fáa eyga á. Hann sigur tó, at tað finnast í hesari tíðini ideologisk ummæli av meira listfrøðiligum slag heldur enn av ideologiskt-politiskum slag (Jørgensen 1999:137).

Nógv er hent í bókmentunum tey seinastu 20 árini, og í dag er tað hugsandi, at tað politiska rákið frá 70-árunum, sum vendir aftur í bókmentunum í nýggjum líki, eisini endurspeglast í ummælunum. Eitt nýtt umhvørvispolitiskt sjónarhorn, sum sæst aftur í klimafiktión (cli-fi) og økokritiskum lesihátti, sæst hugsandi eisini aftur í einari endurføðing av ideologiska ummælaranum. Dømi um ummæli, ið bera boð um hetta, eru ummælini hjá politikaranum, ið er B.A. í føroyskum bókmentum og máli, Ingilín Didriksen Strøm (f. 1991) (Strøm 2020) og bókmentafrøðinginum Guðruni í Jákupsstovu (f. 1993) (Jákupsstovu 2020) í *Varðanum* av ungdómsskaldsøguni *Sum rótskot* eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs. Tey taka undir við dagsskránni hjá rithøvundinum, sum er orðað í eftimæli høvundsins (Kjelnæs 2020:121-122), og føra hana víðari í ummælunum. Tað verður tó ikki kannað nærri í hesari ritgerð, sum bert kannar ein part av júst tí tíðarskeiði í føroyskari ummælarasøgu, sum Jørgensen lýsir í Danmark í bókini *Sprogblomster i spinatbedet* (1999). Kortini er tann ideologiski ummælarin umboðaður í føroyskum ummælum í tíðarskeiðinum 1997-2007 t.d. í onkrum feministiskum ummæli og í ummælum, sum meta bókmentir út frá politiskari hugsjón.

John Chr. Jørgensen sigur, at flestir ummælarar tykjast hella til tað *intentionala ummælið*. Hann vísir á, at intentionala ummælið er skylt við tað, hann nevnir *kritiska liberalismu*, sum er nógv nýtt í Danmark. Ummælarar eru sambært Jørgensen sum heild varnir við at nýta

menningarummælið í hesum tíðarskeiði, har øll rák eru smeltað saman á postmodernistisku pannuni, sum hann tekur til, soleiðis at hugtøk sum *avantgarda* og *siðvenja* ikki longur neyðturviliga eru virðislødd hugtøk. Jørgensen vísir at enda á, at Torben Brostrøm framvegis umboðar upplivingarummælaran í 1999 (Jørgensen 1999:138-139).

Samanumtikið sigur Jørgensen, at tann impressionistiska og tann intentionala ummælaratypan síggjast framvegis í 1999 so væl, at tær næstan eru ósjónligar. Tann fyrra leggur dent á innihaldið í verkinum, meðan tann seinna leggur dent á formin (Jørgensen 1999:139).

Tað, sum sambært Jørgensen í mestan mun eyðkennir ummælaravirksemið í 1999, er, at tað hevur minni við listfrøðiligan hugburð at gera enn við skrivihugburð. Her ber til at gera mun á *sakummælaranum* við tí sakliga málinum og *stílummælaran* við tí tilvitaða skrýdda málinum. Jørgensen ger eisini mun á tí dømandi mótvegis tí undirhaldandi ummælaranum og tí námsfrøðiliga mótvegis tí sannkenningarsøkjandi ummælaranum. Tá tað snýr seg um tann námsfrøðiliga ummælaran, ger Jørgensen mun millum tann frágreiðandi ummælaran, sum vísir á samanhangir og setir í frásjón, og tann dialogiska, sum setir spurningar vegna lesaran og roynir at svara teimum. Hann ger eisini mun á tí speiska ummælaranum og tí álvarsama, á metaforikaranum yvir fyri hugtaksummælaranum. Í øllum hesum nevndu dømum hevur skilnaðurin einki við tær typurnar, sum Hejlskov Larsen setir fram, at gera, men við dagbløðini og tann tóna, tey vilja seta fram. Jørgensen sigur, at hetta er tekin um, at dagbløðini hava sett dagsskránna. Tað, sum telur, er ikki, hvørjum skúla tú hevur gingið á, men um tú dugir at skriva væl innan fyri rammurnar hjá journalistikkinum. Hetta er sambært Jørgensen týdningarmesti skilnaðurin millum ummælarar: um teir skriva væl ella illa (Jørgensen 1999:139-140).

Í viðgerðini í kapitli 7 nemi eg aftur við fleiri av hesum ummælaratypunum, sum Jørgensen setir fram, t.d. *stílummælaran* og *tann námsfrøðiliga ummælaran*. Hesar ummælaratypur mynda ikki viðgerðina sum so, men verða nýttar sum inspiratión og til at seta teir føroysku ummælararnar í eitt størri høpi.

Jørgensen lýsir tilgongdina fram móti tí at skapa sær ein sermerktan stíl í ummælunum sum eina áhaldandi professionaliseringartilgongd,

sum byrjaði tíðliga í 19. øld, og vísir á, at í 1999 hevur tilgongdin førkað seg heilt út í stílin hjá ummælarunum. Í dag er ummælaravirksemi eitt journalistiskt handverk og persónlig úttrykslist (Jørgensen 1999:140). Tað er sjálvt skrivikynstrið, sum definerar tann professionalitetin, sum Jørgensen lýsir.

Jørgensen sigur seg arbeiða bæði deskriptivt og normativt (Jørgensen 1999:11), og hesin seinasti skilnaður, sum hann ger millum ummælarar, at skriva væl ella illa, hoyrir ikki heima í einari ritgerð, har høvundurin hevur sett sær fyri at arbeiða deskriptivt, sum eg havi í hesari ritgerð. Eg nýti tí ikki lýsingarorðini „væl“ og „illa“ um skrivingina hjá ummælarunum, sum verða viðgjørdir, hóast tað í viðgerðini framgongur, á hvønn hátt teir ymisku ummælararnir á sín egna og sermerkta hátt arbeiða innan fyri tær rammur, sum eru settar fyri tekstslagið. Professionaliseringartilgongdin, sum eg lýsi, hevur tó sjálvsagt okkurt við skrivikynstur og tilvit um tekstslag at gera og hongur saman við tí somu tilgongdini, sum Jørgensen lýsir, har arbeitt verður fram móti tí at skapa sær ein sermerktan stíl í ummælunum. Lýsingin av tilgongdini tekur útgangsstøði í, at ummælararnir duga at skriva. Spurningurin er, hvussu teir á hvør sín hátt nýta teir møguleikar, sum liggja í tekstslagnum uttan at førka seg fullkomuliga undan teimum.

Bókmentaligt sjónarhorn

Sæddar úr bókmentaligum sjónarhorni verða ummælaratypurnar ikki settar upp eftir, hvussu tær uppfylla treytirnar, sum verða settar av miðlunum, men út frá bakgrundini hjá ummælaranum, teirri áskoðan, hann hevur á bókmentir, og teirri ætlan, hann hevur við sínum ummælum. T.S. Eliot býtir í greinini „To Criticize the Critic“ (1961) ummælarar í fýra bólkar. Teir eru:

1. Tann professionelli ummælarin, ið hevur ummælaravirksemi sum sítt høvuðs- og kanska sítt einasta arbeiðsøki. Ummælarin, sum Eliot tekur fram sum dømi, er franski Charles Augustin Sainte-Beuve (1804-1869), sum skrivaði viku eftir viku í bløðunum. Eliot sigur, at ofta, men ikki altíð, er tann professionelli ummælarin ein miseydnaður rithøvundur, „a failed creative writer“.
2. Tann eldhugaði ummælarin („Critic with Gusto“). Hesin ummælarin er ikki fyrst og fremst dómari. Hann arbeiðir fyri at føra fram høvundar, sum eru gloymdir ella av órøttum vanvirdir. Hann vísir á hesar høvundar og hjálpir okkum at síggja virðið, sum vit ikki høvdu varnast, og at finna sjarmu, har vit einans høvdu væntað keðsemi.
3. Akademikarin og teoretikarin. Hesar báðar typur umskarast. Hetta er ein breiður bólkur, tí hann røkkur frá universitetslæraranum til tann filosofiska ummælaran.

4. Rithøvundarummælarin, hvørs ummælaravirksemi má sigast at vera ein hjáframleiðsla av hansara skaldsligu skriving. Eliot bólkar seg sjálvan í henda bólkin millum Johnson, Coleridge, Dryden og Racine og fyri ein part Matthew Arnold (Eliot 1961/1965:11-13).

Í hesum býti sæst tann fyrsta ummælaratypan gera mun á tí professionella ummælaranum og leikfólkinum. Sum sagt, kann eingin føroyskur ummælari bólkast sum professionellur ummælari. Onkrir føroyskir ummælarar hava eyðkenni hjá „Critic with Gusto“, og hetta komi eg aftur til í kapitli 7. Triðja og fjórða ummælaratypan hjá T.S. Eliot lýsa høvuðs-ummælaratypurnar í Føroyum: akademikarar og rithøvundar, sum ummæla. Í *Sprogblomster i spinatbedet* (1999) sigur John Chr. Jørgensen, at teir allarflestu bókmentaaummælararnir í Danmark eru akademikarar, og at ein fjórðingur hevur journalistiska bakgrund. Síðani nevnir hann teir fagurbókmentaligu rithøvundarnar, ið nýta ummælið sum eitt høvi at leika frítt bókmentaliga (Jørgensen 1999:16). Hetta býtið passar væl við tær ummælaratypurnar, vit hava í Føroyum í somu tíð, sum John Chr. Jørgensen tosar um, t.v.s. í tíðarskeiðinum 1997-2007, sum eg havi kannað, har akademikarar og rithøvundar fylla mest.

Rithøvundarummælararnir eru í teirri serstøðu sum ummælarar, at teir hava dupultfunktiónir sum ummælarar og høvundar, og tað setir teir í eina serliga valdstøðu.

Í samrøðu við rithøvundan Marionnu Debes Dahl (f. 1947) í *Sosialinum* verður víst á, at Carl Jóhan Jensen, ið hevur virkað sum rithøvundur og ummælari samstundis, hevur sagt, at í Føroyum eru viðurskiftini so smá, at tað endar við at rithøvundar sita og ummæla hvønn annan. Marianna er lutvíst samd og heldur tað vera óheppið, at tey, sum skriva, samstundis sita og ummæla verk hjá øðrum rithøvundum. Tá kann tað skjótt enda í tí, sum sambært henni kallast „Partafelagið Interrós". Við øðrum orðum kann tað enda í, at rithøvundar bara rósa hvør øðrum (Joensen 1997).

Í bók síni *Forfatteren som kritiker* sær Sissel Furuseth hesa ummælaratypu sum nakað heilt serstakt. Hon vísir á, at tað er vanligt, at rithøvundar umrøða skaldskapin hjá hvørjum øðrum, og at tað sær út sum, at essayformurin er tann formurin, sum teir velja fram um aðrar. Men rithøvundar skriva ummæli í ymiskum formum um hvønn annan, sum ummæli í bløðum og tíðarritum, sum einstøk smárit ella høvisyrkingar, sum eftirorð til antologiir ella nýútgivnar klassikarar. Ein orsøk til at rithøvundar skriva ummæli í bløð og tíðarrit, sigur Sissel Furuseth, kann vera fíggjarlig, tí teir liva av einari ótryggari inntøku sum rithøvundar, og tá kann tað vera gott at fáa eina inntøku afturat. Men ummælaravirksemið hjá rithøvundum kann hava aðrar funktiónir. Tað gevur høvundunum møguleika fyri at vinna sær pláss í tí bókmentaliga almenninum. Tað er vanligt, at ummælaravirksemið er størst, í tí at ummælarin er í ferð við at fóta sær sum rithøvundur, og tað minkar ofta aftur, eftir at rithøvundurin er viðurkendur sum fagurbókmentaligur rithøvundur (Furuseth 2015:14-15). Eg havi í kapitli 4 um ummælið sum listaligan tekst og um bókaummæli sum skaldskap og skaldskap sum bókaummæli víst á dømi um føroyskar rithøvundar, sum ummæla hvønn annan í skaldskapi og eftirorðum, og rithøvundurin sum ummælari fyllir nógv í viðgerðini í kapitli 7, serliga í brotinum „Pallsetti ummælarin".

Eirik Vassenden sigur í lýsingini av einum av mætastu norsku ummælarunum, Arne Garborg, rithøvundur, at hann nýtti *faðirsuppgerðina*[29] í sínum ummælum til at føra seg sjálvan fram sum rithøvund:

> Desse „farsoppgjera" kan vi sjå i en lanseringskontekst, der angriparen nyttar den kritiske konfrontasjonen som eit springbrett inn på den litterære scena. Litteraturkritikken er i eit slikt perspektiv like mye å forstå som ei strategisk form som han er ein smaksdrøftande og kvalitetsvurderande sjanger (Vassenden 2016a:50).

29 Sí Bloom 1997.

Vassenden sigur eisini, at talan er um eina *bókmentakritiska sjálvsmynd*, ein sigandi orðing, sum sigur nakað um møguleikan hjá rithøvundinum at nýta ummælið til at skapa sær ein pall.

Malan Marnersdóttir hevur í føroyskum høpi við ástøðinum hjá amerikanska bókmentakritkaranum Harold Bloom (1930-2019) víst á, at í øllum týðandi og sterkum skaldskapi er stríð millum rithøvundin og skaldsligu undangonguyrkjararnar (Marnersdóttir 2000:272). Í viðgerðini verður hetta evnið tikið upp í sambandi við fleiri ummæli, har yngri rithøvundar gera upp við tann skaldskap, sum eldri rithøvundar standa fyri.

Sissel Furuseth vísir eisini til Harold Bloom, sum segði, at stórleiki kennir stórleika og kennir seg standa í skugga hansara: „storhet kan gjenkjenne storhet og føle seg i skyggen av den" (Furuseth 2015:40). Furuseth kemur frá hesi útsøgn til ta niðurstøðu, at tað tykist vera týdningarmesta legitimering av rithøvundinum sum ummælara, at hann, ið sjálvur er rithøvundur, hevur av somu orsøk evni til at gjøgnumskoða, um ein annar eisini er tað.

Í øðrum høpi sigur Furuseth soleiðis um rithøvundarummælaran:

> Når mange aviser ønsker at knytte til seg forfattere som bokanmeldere, kan det være nettopp fordi man antar at lesere har spesiell tiltro til litterære vurderinger som kommer fra personer som har en håndverksmessig nærhet til forfatteryrket (Furuseth 2016a:464).

Her kemur Furuseth inn á tað vald, sum lesarin gevur rithøvundinum sum ummælara, við tað at lesarin hevur serligt álit á rithøvundinum.

Furuseth sigur tó tað sama, sum eg havi víst á, at tað av mongum verður hildið at vera ein óheppin blanding av leiklutum, at rithøvundar ummæla, tí teir eru subjektivir, tá teir ummæla hvønn annan, og av tí sama óegnaðir at ummæla (Furuseth 2015:15).

Furuseth sigur, at tað, sum fyrst og fremst sermerkir rithøvundin

sum ummælara, er ikki hansara ummælarastílur, hóast hann kann skilja seg út, men tann ávirkan, sum høvundarpersónurin fær tillutaða í almenninginum (Furuseth 2015:26). Altso eru ummæli eftir rithøvundar møguliga skrivað í einum serligum stíli, men rithøvundarummælarar eru serliga áhugaverdir sum ummælaratypur, tí teir hava eitt tillutað vald í tí bókmentaliga almenninum, sum kanska er størri enn tað hjá øðrum ummælarum (Furuseth 2015:26).

Henda valdmikla støða er eisini orsøk til viðtøkurnar hjá norska ummælarafelaganum *Kritikerlaget* í 2003, og eina einfaldan av teimum í 2009[30], at ummælarar fyri at varðveita sína høgu tign ikki skuldu hava dupulleiklutir, ið kundu minka um teirra trúvirði sum ummælarar (Furuseth 2016c:334). *Kritikerlaget* hevur eisini víst á[31], at Noreg er ov lítið land til, at rithøvundar kunnu ummæla, tí spurnartekin kann verða sett við rithøvundsins gegni. Hetta er eitt áhugavert sjónarmið, tá hugsað verður um, hvussu nógv minni Føroyar eru, og hvussu nógv størri trupulleikin við rithøvundarummælarum skuldi verið í Føroyum. Í 2019, tá tíggju teir bestu norsku ummælararnir gjøgnum tíðirnar skuldu veljast, helt norski journalisturin og rithøvundurin Fredrik Wandrup (f. 1951), sum var við í dómsnevndini, tað tó vera natúrligt, at ein stórur partur av ummælarunum á einum slíkum lista júst var rithøvundar (Rogne 2019).

Tomas Forser hevur eisini sett spurnartekin við dupulleiklutin hjá rithøvundinum sum ummælara (Forser 2005), og Sissel Furuseth vísir til Tomas Forser, sum er kritiskur, men tó ikki eintýðugt kritiskur mótvegis rithøvundarummælaranum, tí samstundis sum hann sær tann dupulta leiklutin sum eina hóttan, sær hann eisini stílin hjá rithøvundarummælaranum sum eina góða mótvekt til tað flata ummælaravirksemið, ið er farið at eyðkenna fjølmiðlarnar, har pláss er týdningarmeiri enn innihald; tí tað fyrst og fremst snýr seg um at skriva stutt og beinrakið (Furuseth 2015:15-16).

Sissel Furuseth vísir á, at allar ummælaratypur hava sínar styrkir og sínar veikleikar, og tí hava vit tørv á ymiskum ummælaratypum, so vit fáa breidd og dýpd á bókmentaummælaraøkinum. Eitt bókmentaligt almenni hevur tørv á skøldum í tí kritisku samrøðuni, men tað hevur eisini tørv á, at granskarar taka lut (Furuseth 2015:28-29). Hesa breiddina, sum Furuseth lýsir, síggja vit í føroyskum ummælaravirksemi í tíðarskeiðinum 1997-2007, og av tí sama stinga somu spurningar seg eisini upp í viðgerðini í kapitli 7.

30 https://kritikerlaget.no/kritikerlaget/kritikerplakaten (15.07.2019)
31 https://kritikerlaget.no/saker/forfatteren-som-kritiker (15.07.2019)

Nýggjar ummælaratypur?

Bæði Steffen Hejlskov Larsen og John Chr. Jørgensen tosa um ummælaratypur sum nakað, ið ikki er statiskt, men broytist, sum tíðir og rák skifta. Steffen Hejlskov Larsen vísir á, at tann ideologiska ummælaratypan ikki er løtt at finna í 1969, at tað er neyðugt at leita aftur í tíð fyri at finna hana (Larsen 1969:131-133), og John Chr. Jørgensen sigur, at tað ideologiska ummælið var vanligt í 1970-árunum, men er verri at fáa eyga á í 1990-árunum (Jørgensen 1999:137). Sum nevnt vísir Jørgensen eisini á, at í 1990-árunum eru dagbløðini farin at seta dagsskránna í ummælunum soleiðis, at tað, sum telur mest, er, at tú dugir at skriva innan fyri rammurnar hjá journalistikkinum (Jørgensen 1999:139-140). Síðan sosialu miðlarnir nú eru farnir at seta dám á mentanarmiðlanina, er tí eisini hugsandi, at teir fara at framkalla nýggjar ummælaratypur. Í grein um ummælaraleiklutir seta áðurnevnda Nete Nørgaard Kristensen og Unni From (f. 1972), miðlafrøðingur, fram nakrar nýggjar ummælaratypur, sum tær síggja fyri sær mynda og fara at mynda ummælaraheimin í tí nýggja, nógv broytta, miðlaheiminum, og tær leggja upp til uppfylgjandi gransking av hesum ummælaratypum, sum í teirra grein enn bert eru á ástøðiligum stigi:

1. Tann klassiski ummælarin – tann intellektuelli mentanarkritikarin
2. Tann professionelli mentanarjournalisturin
3. Tann miðlaskapti smaksdómarin
4. Tann gerandisligi leikmaðurin, sum gevur sín subjektiva hugburð til kennar og stendur fyri leikmansmyndugleikanum.

Tær báðar seinastu ummælaratypurnar geva teimum rótfestu um-

mælaratypunum mótspæl í tí nýggja miðlalandslagnum og gerast meira og meira ein ráðandi partur av kritikkinum, men tær eru verri at lýsa, tí tær eru ein samansettur bólkur av menniskjum. Hetta ger, at markið millum professionella ummælaran og leikfólkið kámast, og tað ger, at vit noyðast at hyggja at ummælaranum við nýggjum eygum, sum einum samansettum hópi av sera ymiskum persónleikum við ólíkum fortreytum. Hesar fýra typurnar eru í fatanini hjá Kristensen og From ikki neyðturviliga býttar í stigveldi eftir valdstøðu, men eru lýstar fyri at fáa yvirlit yvir typurnar (Kristensen og From 2015).

Eg viðgeri ummæli í tíðarskeiðinum, áðrenn teir sosialu miðlarnir broyttu miðlaheimin, og tí arbeiði eg ikki út frá hesum fýra ummælaratypunum, men tær eru áhugaverdar at hava í huga í greiningini.

Grundleggjandi er greinin um tær nýggju ummælaratypurnar ein viðurkenning av, at ummæli, sum vit kenna tey, eru í kreppu, men hon ásannar eisini, at miðlastøðan skapar nýggjar ummælaratypur, sum finna veg út úr kreppuni við at flyta seg yvir á aðrar pallar. Nýggja støðan herðir krøvini til ummælaran at skapa sær myndugleika.

Samanumtikið eru nógv ástøði um ummælaratypur, og tey taka útgangsstøði í ymiskum umstøðum og frá ymiskum sjónarhornum. Eg taki til mín inspiratión frá ymiskum av hesum typum, men nýti onga teirra til fulnar. Ein orsøk til hetta er, at teir flestu ummælararnir, sum eg viðgeri, hava skrivað fá ummæli, og tað hevði verið at tikið ov rívan til at flokkað hesar ummælarar og algildað út frá í summum førum trimum ella fýra ummælum. Summir hava tó skrivað meira og kunnu av røttum flokkast, men aðrir kunnu bert sigast at hava drøg frá ymiskum ummælaratypum. Tá tað er sagt, er einki meira natúrligt, enn at ummælaratypur liggja á markinum millum ymiskar typur, tí tað, sum fyrst og fremst skilmarkar ummælið sum tekstslag, er, at tað liggur á markinum millum siðvenjur. Ummælararnir arbeiða tí altíð á einum markamóti. Tað er millum annað tað, sum ger tekstslagið áhugavert og gevur tí ta serstøku støðu og tað serstaka vald, tað hevur.

6. At skapa mentanarligan myndugleika

Hesin seinasti kapittulin í ástøðiliga partinum av ritgerðini snýr seg um tað, sum er snúningsdepil í mínum granskingarspurningum: myndugleikan, sum ummælarin skapar sær í tekstinum.

Áðurnevnda bókin *The Death of the Critic* (2007) eftir Rónán McDonald við „melodramatiska“ bókarheitinum, sum Furuseth nevnir tað (Furuseth 2015:17), hevur konnotatiónir til franska bókmentakritikaran og ástøðingin Roland Barthes. Við greinini „The Death of the Author“ (1969) fagnaði hann „deyða“ høvundsins, tí í tí sama varð lesarin føddur (McDonald 2007:2-3). Greinin hjá Barthes var ein uppgerð við ævisøguliga háttalagið, og tí var neyðugt at gera av við høvundin og tað vald, sum hann hevði havt á, hvussu bókmentir vórðu lisnar. Hóast bókin hjá McDonald vísir til Barthes, er hon ikki ein roynd at sleppa av við ummælaran, men tvørturímóti at endurreisa hann, tí hann sambært McDonald hevur mist sína tign. Tað kann tykjast høpisleyst at tosa um deyða ummælarans, nú nýggju miðlarnir hava viðvirkað til, at øll kunnu vera ummælarar; hin vegin snýr tað seg ikki um, at alt ummælaravirksemi er dottið burtur, men at serfrøðingaøldin, har tann serkøni ummælarin, hvørs dómur og smakkur virkaði sum leiðarstjørna fyri fjøldina, at síggja

til er kveistrað burtur av einum almenningi, sum heldur upp á sín førleika at meta um egna mentanarnýtslu (McDonald 2007:4).

Endamálið við bókini er, sum McDonald sigur, ikki at dansa á grøvini hjá ummælaranum, men at vísa á tann týðandi leiklutin, sum tann serkøni hevur sum vegvísari. McDonald vísir á týdningin hjá hesum leikluti; hann vísir á, hvussu ummælarin spakuliga missir sín myndugleika í einum samfelag, sum ikki vil taka við leiðbeining úr erva, men er sera skeptiskt yvir fyri stigveldi, og hvussu hetta hevur ta ávirkan, at akademiskt ummælaravirksemi minkar og leikmans-ummælaravirksemi økist: „the contraction of academic criticism and the expansion of reviewing are both symptoms of the same anti-authoritarianism: a refusal of top-down instruction and a suspicion of hierarchy" (McDonald 2007:4-5).

Í bókini *Forfatteren som kritiker* viðger Sissel Furuseth somu hugsanir sum McDonald um, at deyði høvundsins ikki bara er føðingin hjá lesaranum, men samstundis eisini deyðin hjá ummælaranum, í øllum førum um vit síggja ummælaran sum ein almennan, intellektuellan og vegleiðandi góðskudómara. Furuseth spyr, hvat tað er, sum gevur ummælaranum myndugleika í dag, og um tað er í rithøvundarmyndugleikanum, vit mugu heinta valdið aftur til ummælaraleiklutin (Furuseth 2015:25). Við hesum spurninginum leggur Furuseth upp til, at tað er neyðugt í okkara samfelag at skapa myndugleika, tí hann er ikki til staðar av sær sjálvum. Við spurninginum, um tað er í rithøvundarleiklutinum, at ummælarin kann vinna sína virðing og sítt vald í samfelagnum aftur, nemur hon við tað, sum Foucault vísir á í áður umrødda fyrilestrinum, „What is an Author" (1969), valdið, sum liggur í høvundarnavninum. Við at heingja seg í myndugleikan, sum liggur í styrkini og valdinum í høvundarnavninum, sær Furuseth ein veg fyri ummælið sum tekstslag úr kreppuni.

Zangenberg hevur víst á tíðarritini og bloggarnar sum ein veg út úr kreppuni í kritikkinum:

> For så vidt den litterære kritik i Danmark ... er i en art krise, er det forbundet med udviklingen af en ekstrem medie-mangfoldighed rhizomatisk[32] forbundet på kryds og tværs via uendeligt mange kanaler ... Så måske det især er her, på tidsskrifternes og bloggenes arena, at vi skal spejde efter en udgang af krisen (Zangenberg 2007).

32 Hugtak hjá fronsku heimspekingunum Gilles Deleuze (1925-1995) og Félix Guattari (1930-1992).

Eisini Erik Skyum-Nielsen setir seg kritiskt upp ímóti tankanum um, at framtíðin hjá ummælinum er so døpur. Dagin eftir at kanning varð almannakunngjørd, sum vísti, at ummælini eru fækkað 34 prosent í donskum bløðum seinastu 10 árini – altso júst 10 ár eftir greinina hjá Zangenberg um kreppu í kritikkinum í Norðurlondum, skrivar hann:

> Der tales (eller ævles) for tiden en del om, at kritikere i aviser og tidsskrifter ikke længere besidder samme status som tidligere som domfældende smagsautoriteter, bl.a. fordi den litterære responskultur for længst har spaltet sig i deloffentligheder (Skyum-Nielsen 2017).

Sum áður nevnt, sær Erik Skyum-Nielsen eina avbjóðing hjá ummælinum í einari nýggjari og broyttari miðlastøðu, sum ikki gevur ummælinum rúm. Men hann sær ein útveg gjøgnum ummælaran, sum hevur eina sermerkta og mynduga rødd:

> I den aktuelle situation, hvor atmosfæren føles tyk af populistisk magisterhad, er der noget befriende i at se tilbage på snart 40 år i branchen og med sindsro kunne slå fast, at der altid vil være spalteplads og læsere til en indtryksåben og belæst elsker af god litteratur, hvis vedkommende vel at mærke besidder en distinkt og myndig kritikerstemme (Skyum-Nielsen 2017).

Myndugleikin liggur í ummælararøddini. Hon skal vera sermerkt og myndug, skal hon verða hoyrd.

Lars Bukdahl, sum kanska hevur ta sermerktastu ummælararøddina í Danmark í løtuni, sigur í samrøðuni „Op af skyttegraven" í tíðarritinum *Vagant*, at ein ummælari má skapa myndugleika í skrivingini: „Man starter jo sin karriere i en meget nedgravet skyttegravsposition, fordi man skal ind og erobre nogle områder" (Wiese 2019). Bukdahl greinir her valdsstríðið um myndugleika á ummælisøkinum í krígsmyndamáli: Ummælaravirksemið er hernaður. Ummælarin byrjar

á starvsbreytini niðurgrivin og væl vardur. Men hann noyðist upp úr skotgrøvini í opnan bardaga at vinna land.

Tekstirnir hja McDonald, Furuseth, Skyum-Nielsen, Zangenberg og Wiese vísa allir á, at ummælarin ikki hevur ein sjálvsagdan myndugleika, hóast hann kanska hevur allar teir neyðugu førleikarnar at ummæla. Tíðin, sum vit liva í, er merkt av, at eingin treytaleyst vegna útbúgving ella aðrar vunnar førleikar hevur vald til at skilmarka á mentanarpallinum. Orsøkin er, at almenningurin heldur upp á egnar metanarførleikar. Tí má valdið at skilmarka á mentanarpallinum vinnast. Tað má skapast ikki bert við tilknýti til vitanarstovnar ella týðandi miðlar, men má skapast í tekstinum. Ummælarin má skapa mentanarligan myndugleika í tekstinum. Sissel Furuseth sigur soleiðis í sínari viðgerð av retorikkinum í ummælum: „Kritikeren må altså by frem en personlighet som viser at han har en troverdighet som smaksdommer“ (Furuseth 2016a:464).

Sjálvsmyndan í tekstinum: *ethos* og *persona*

Granskingarspurningurin, hvussu ummælarin skapar sær mentanarligan myndugleika í teksti sínum, verður svaraður við einari kanning av, hvussu ummælarin myndar og pallsetir seg sjálvan í tekstinum.

Roger D. Cherry setir ástøði fram um sjálvsmyndan høvundsins í teksti. Í greinini „Ethos Versus Persona. Self-Representation in Written Discourse“ setir hann eitt uppáhald fram: „I will argue that, like audience representation, self-representation in writing is a subtle and complex multidimensional phenomenon that skilled writers control and manipulate to their rhetorical advantage“ (Cherry 1998:385).

Tað er lætt at eyðmerkja, at pallseting av sjálvinum fer fram í einum teksti, tá høvundurin nýtir persónsfornavnið „eg“ um seg sjálvan; men pallseting í teksti er eitt samansett fyribrigdi, og sambært Cherry (1998:385) er sjálvsmyndan (self-representation) ella sjálvpallseting, eitt raffinerað og samansett fyribrigdi, sum hegnigir høvundar meistra og handfara, so tað tænir teirra retoriska endamáli; hann leggur upp til, at tað eru ymisk sløg av sjálvpallseting ella sjálvsmyndan, og at

tað er munur á, hvussu høvundurin í einum teksti í ymiskum førum setir seg sjálvan á pall í tekstinum, og gjarna eisini ymiskt í einum og sama teksti.

Til at lýsa og bera saman sjálvsmyndan høvundsins í yrkisteksti og skaldsligum teksti setir Cherry tvey hugtøk fram: *ethos*, sum stavar frá retorikkinum og hevur grikskan uppruna, og *persona*, sum stavar frá bókmentafrøðini og hevur rómverskan uppruna. Hann vísir á, at orðini verða nýtt hvørt um annað til at lýsa tað *sjálvið*, sum verður sett fram í einum teksti, men heldur uppá, at tað er týdningarmikið, at skilnaðurin millum hugtøkini verður varðveittur, tí at ein einfalding av hesum hugtøkum førir til skerda lesing av teksti.

Cherry sigur, at høvundar nýta eitt breitt úrval av framferðarháttum at lýsa og skapa sín móttakara- ella lesaraskara. Hann nevnir hugtøkini, sum verða nýtt til at lýsa henda lesaraskara bæði av høvundunum í skapanartilgongdini og í lidnum skrivaðum tekstum: *implied audience*, *unknown audience*, *extended audience* og *universal audience*. Hetta eru orð, sum verða nýtt til at lýsa skapandi evnini og smidleikan í skapanini av einum móttakara í tekstinum. Cherry grundgevur fyri, at eins og móttakarin verður settur fram í tekstinum, so verður eisini høvundurin settur fram í einari roynd, sum sitatið frammanfyri eisini sigur, at manipulera og hava ræði á lesaranum til sín retoriska fyrimun.

Ethos er ein av teimum trimum yvirtalingarformunum í røðulistini hjá Aristoteles: logos, pathos og ethos. *Ethos* er tann yvirtalingarformurin, sum snýr seg um tørvin hjá røðaranum at tekna eina mynd av sær sjálvum sum etiskum persóni, einum, sum hevur praktiskan vísdóm, og hevur umsorgan fyri sínum áhoyrara, við tí fyri eyga at fremja trúvirði og harvið tryggja, at áhoyrarin verður sannførdur: „The three qualities necessary to enable the speaker to convince the audience of his trustworthiness are: practical wisdom, virtue and goodwill“ (Aristotle: xxxvii). Við orðum Cherry ljóðar tað soleiðis: „focus on credibility, on the speaker's securing the trust and respect of an audience by representing him- or herself in the speech as knowledgeable, intelligent, competent, and concerned for the welfare of the audience“ (Cherry 1998:389).

Persona hevur sambært Cherry uppruna í rómverskari leiklist og hevur verið nýtt í bókmentafrøðini til at vísa til eina masku, sum høvundurin nýtir í tí skrivaða tekstinum (Cherry 1998:393). Robert C. Elliot (1914-1981), professari í enskum bókmentum á University of California í San Diego, ið hevur gjørt eina skipaða gjøgnumgongd av tí, sum er sagt um hugtakið *persona* gjøgnum søguna, sigur, at upprunin til hugtakið er ógreiður, men tað er eingin ivi um, at tað vísir til eitt amboð til at umskapa og fjala seg við á pallinum: „Whatever the uncertainties about derivation, there is no question that, in Latin, *persona* refers to a device of transformation and concealment on the theatrical stage" (Elliot 1982:20-21).

Orðið *persona* kemur inn í bókmentafrøðina sum eitt amboð til at loysa høvundin frá fyrstapersónsfrásøgufólkinum. Tað tók tíð, áðrenn skilnaðurin sló ígjøgnum í bókmentagranskingini. Tilvit um skilnaðin veksur fram í 1920-árunum, og í 1940-árunum var tað vorðið ein partur av kritiskari umrøðu (Elliot 1982:9).

Í hvønn mun *sjálvið*, sum verður sett fram í tekstinum, vísir til tann søguliga høvundin, má innan bókmentafrøðina í dag sigast at vera ein týðandi partur av granskingini, sum fæst við at skilmarka tekstsløg og gera skilnað millum skaldsligan tekst og yrkistekst og at flokka tekstir sum skaldsøgur ella ævisøgur.

Robert Elliot lýsir hugtakið *persona* sum eitt heiti, sum verður nýtt í bókmentafrøðini til at skilja millum høvundin – tann søguliga persónin – og *sjálvið*, sum høvundurin skapar í tekstinum; fyribrigdið gerst torgreitt, tá høvundurin brúkar orðið *eg* um ein persón í tekstinum, og enn fløktari, tá høvundurin setir sítt egna navn inn, t.d. sum Chaucer í *The Canterbury Tales* og øðrum verkum, Thomas More í *Utopia* o.s.fr. (Elliot 1982:x).

Hetta sambandið millum fakta og fiktión er ein grund til at nýta ástøðið hjá amerikanska bókmentakritikaranum Wayne Booth (1921-2005) til at lýsa retorikkin í ummælinum. Booth skrivar um retorikk í fiktión, men flótandi markið í frásagnarfrøðini millum fakta og fiktión rættvísger, at sama ástøði verður nýtt í lýsingini av ummælinum, sum er eitt tekstslag á markinum millum yrkistekst og fagurbókmentir.

Amboð hjá høvundinum til at hava ræði á sínum lesara

Wayne Booth er kanska tann, sum stendur fyri tí kendastu lýsingini av sambandinum millum søguliga høvundin og høvundin í tekstinum. Hann nýtir tað í bókmentafrøðini kenda hugtakið *implied author*: „Whether we call this implied author an „official scribe", or adopt the term recently revived by Kathleen Tillotson – the author's „second self"- it is clear that the picture the reader gets of this presence is one of the author's most important effects" (Booth 1983:71).

Tað er í tí bókmentafrøðiliga klassikaranum *The Rhetoric of Fiction* (1983), at Booth setir hetta hugtakið fram. Hann byrjar bókina við at lýsa skaldsligan tekst sum ta list at samskifta við lesaran:

> My subject is the technique of non-didactic fiction, viewed as the art of communicating with readers – the rhetorical resources available to the writer of epic, novel, or short story as he tries, consciously or unconsciously, to impose his fictional world upon the reader (Booth 1983:xiii).

Við retoriskum snildum hjálpir høvundurin lesaranum at fáa fatur á verkinum: „The ostensibly dramatic move is still rhetorical; it is dictated by the effort to help the reader grasp the work" (Booth 1983:xiii). Harafturat er retorikkur amboð hjá høvundinum at hava ræði á lesaranum: „the author's means of controlling his reader" (Booth 1983:xiii).

Booth er upptikin av hesum at fáa ræði á lesaranum og hava myndugleika í skrivingini. Hann tosar um tann eftirgjørda myndugleikan, sum vit t.d. síggja í byrjanini av Jobs bók, tá lesarin fær at vita frá frásøgufólkinum um eginleikar hjá Job, sum hann annars ongan møguleika hevur at vita nakað við vissu um, enntá eginleikar, sum vit ikki kunnu kenna hjá fólki í veruleikanum, sama hvussu væl vit kenna tey, t.d. at Job ikki syndar og ikki í fávitsku skuldsetir Gud. Her hevur frásøgufólkið fingið ein myndugleika í frásøgnini, sum Booth sigur vera tilgjørdan, eftirgjørdan. Eisini í *Ilionskvæðnum* góðtekur lesarin treytir, sum hann ongantíð hevði góðtikið í veruliga lívinum.

Frásøgufólkið fær í báðum hesum førum heimild til at hava ræði yvir okkara trúgv, áhuga og samkenslu (Booth 1983:3-5).

Booth vísir á, at tað er gjøgnum frásøgufólkið, at høvundurin við at nýta kynstur og retoriskar snildir fær myndugleikan til at upplýsa lesaran um viðurskifti, sum hann als ikki hevði góðtikið í tí veruliga lívinum, men sum hann góðtekur um menniskju, ið verða sett fram í fiktiva heiminum. Síðani tann tekstgreinandi lesiháttur loysti seg frá ævisøguliga háttalagnum og farið varð at lesa tekstir nýkritiskt, hevur tað verið vanligt at seta mark millum høvund og frásøgufólk: „until recently, the predominant demand in this century has been for some sort of objectivity“ (Booth 1983:67).

Booth vísir á, at tann fyrimyndarligi høvundurin hevur verið samanborin við tann fyrimyndarliga lesaran, sum sambært klassisistiskari hugsjón er ein almennur lesari og ikki einstaklingur. Booth sigur, at tað er at undirmeta týdningin av sereyðkenninum hjá høvundinum at siga, at hann er almennur og ikki einstaklingur, tí hann skapar í tekstinum ikki bert ein fyrimyndarligan „man in general“, men eina „implied version of „himself““ – eina útgávu av sær sjálvum, sum er øðrvísi enn tann útgávan av sjálvinum, sum aðrir høvundar skapa (Booth 1983:70-71).

Robert Elliot tosar í sínari greining av *persona* í tekstum eisini um munin millum fakta og fiktión og setir spurning við, um annað er reinari enn hitt, tá tað kemur til at siga frá sannleikanum. Hann sigur:

> To be sure, it has always been recognized that neither mode is pure: dramatists and writers of fiction have from the beginning felt free to incorporate historical figures into their work, and ... historians since Herodotus have put oration into the mouths of kings certainly never uttered (Elliot 1982:63).

Munirnir millum skaldsligan tekst og yrkistekst kunnu setast upp á ymiskan hátt, og sum víst er á í sitatinum hjá Elliot omanfyri, hevur munurin ikki neyðturviliga nakað við modus ella skriviháttin at gera. Skaldsligur tekstur og yrkistekstur hava gjøgnum søguna havt og hava enn sera nógv í felag, og eitt høvuðskriterium fyri skilmarkingina millum fakta og fiktión er sjáldan at finna í skriviháttinum, hóast tað gjarna eisini endurspeglast í honum, men sæst fyrst og fremst aftur í, í hvønn mun teksturin vísir til heimin uttan fyri tekstin.

Skilnaðurin millum *ethos* og *persona* er ikki bert við til at geva eina fjølbroyttari mynd av sjálvsmyndan í teksti, men er eisini við til at vísa á ein av teimum grundleggjandi mununum, sum vit gera millum fakta og fiktión, millum yrkistekst og skaldsligan tekst.

Cherry vísir á vansan av, at so nógvir ástøðingar hava blandað hugtøkini *ethos* og *persona* saman, tí at blanda tey er ein einfaldan av teimum ymisku brigdunum av sjálvsmyndan í teksti, m.a. plássinum, sum skilnaðurin millum hugtøkini gevur fyri tí implisitta høvundinum, „the implied author“, hesi eindini, sum aðrir ástøðingar hava givið onnur nøvn. Sambært Cherry er hesin implisitti høvundurin millumlið millum *ethos* og *persona*, og tað gevur meining at halda fast við munin millum hesi tvey, tí so gevur hugtakið implisittur høvundur meining (Cherry 1998:395-396).

Sambandið, sum *ethos* og *persona* hava við tann søguliga persónin, sum høvundurin er, setir Cherry upp á eitt kontinuum, ið vísir, hvørja mimetiska fjarstøðu hesi bæði ólíku hugtøkini hava til søguliga høvundin; eitt kontinuum fyri mimetiska umboðan í tí bókmentaliga tekstinum (Cherry 1998:395-396).

Ethos hoyrir heima í yrkistekstinum og er ein myndan av tí veruliga søguliga høvundinum, sum hann er settur fram í tekstinum, meðan *persona* hoyrir heima í tí fiktiva tekstinum og er ein myndan av tí pallsetta høvundinum, sum hann tekur skap í tekstinum. Millum hesar eindirnar er rúm fyri tí implisitta høvundinum, sum ger av, hvussu vit lesa, tí sum liggur millum *ethos* og *persona* ella millum pallsetingina av tí søguliga høvundinum og tí pallsetta høvundinum (Cherry 1998:395-396).

Persónligt ethos, stovns-ethos og persona

Í grein um retorikkin í filmsummælum skrivar Jan Grue um *ethos* og *persona* við støði í greinini hjá Roger D. Cherry. Jan Grue, rithøvundur, er professari í kvalitativum háttalagi innan sernámsfrøði á lærda háskúlanum í Oslo og retorikari. Hann skrivar um retorikk fyri

Store norske leksikon og hevur verið ritstjóri á tíðarritinum *Rhetorica Scandinavica*, har henda greinin, „Filmanmeldelsens retorikk: personlig ethos, institusjonell ethos og persona“, varð prentað í 2007.

Greinin byggir á gransking av filmsummælunum hjá Thor Ellingsen og Per Haddal í norsku bløðunum *Dagbladet* og *Aftenposten* frá 1970-árunum fram til túsundáraskiftið (Furuseth 2016a:464).

Jan Grue problematiserar amboðini, sum Cherry setir fram til at greina bæði yrkistekst og skaldsligan tekst. Hann sigur, at til dømini sum Cherry nýtir, har hann mest nýtir vísindafólk, sum tosa sína egnu vegna, er hetta kontinuum, sum hann setir fram, nýtiligt. Hann vísir tó á, at í tekstum sum filmsummælum er støðan, serliga viðvíkjandi *ethos*, nógv meira kompliserað enn í vísindaligum tekstum, tí har eru í veruleikanum tvey *ethos*, eitt persónligt og eitt stovns-*ethos* (institutionelt ethos), ið er treytað av *ethos* hjá blaðnum ella tíðarritinum, sum skrivað verður í. Hetta merkir, at ummælarin í veruleikanum bara hevur *persona* at ráða yvir sjálvur og ikki *ethos*, tí hansara persónliga *ethos* verður knýtt at hansara stovns-*ethos*, í tí at hann skrivar í eitt blað, sum hevur sína egnu dagsskrá. Hetta ger so, at ummælarin í veruleikanum eisini er avmarkaður, tá tað kemur til, hvat fyri ein *persona* hann tekur fram í tekstinum, tí hann kann ikki ov nógv vera í stríði við stovns-*ethos* hjá blaðnum (Grue 2007).

Grue heldur, at í filmsummælinum er tað meir enn í øðrum ummælum tørvur á at seta *persona* fram í tekstinum, tí tað verður væntað av filmsummælaranum, at hann óheftur av persónligum smakki skal fevna um allar filmsgenrur, meðan tað innan bókmentir og tónleik er vanligt at fáa sær serkunnleika í at ummæla lyrikk, operu ella rokk. Vit vita, at ein operuummælari kennir sítt fak, men ein filmsummælari má gera tað týðiligt fyri okkum aftur og aftur, at hann kennir sítt fak. Í filmsummælum eru tað sum oftast leikfólk, sum ummæla, og tí mugu tey brúka nógva orku at skapa ein sermerktan og afturkenniligan *persona* í sínum ummælum (Grue 2007:24-25). Lýsingin hjá Jan Grue av *persona* er her tann, at *persona* er eitt sereyðkenni, sum ein ummælari ognar sær so við og við fyri at fáa eina sermerkta rødd, ið er til at kenna aftur. *Persona* er við øðrum orðum júst teir eginleikar, sum Erik Skyum-Nielsen sigur eru partur av tí, sum skal til, fyri at ein ummælari skal verða lisin í dagsins miðlaheimi (Skyum-Nielsen 2017).

Jan Grue problematiserar dømini, sum Cherry nýtir í sínari lýsing av, hvussu *ethos* og *persona* virka á einum kontinuum, tí Cherry ikki tekur hædd fyri tí, sum ger seg galdandi t.d. í filmsummælinum, nevniliga at eitt *ethos* ikki stendur einsamalt, men er knýtt at einum stovns-*ethos*, sum liggur rættiliga fast. Kortini ger Jan Grue sama mun á *ethos* og *persona*, og skilnaðurin millum hugtøkini hevur týdning í lesingini av tekstum. Hann vísir á ein týdningarmiklan merkingarmun millum *ethos* og *persona* í greiningini av tí eg-persóninum, sum verður settur fram bæði í føgrum tekstum og yrkistekstum. Hóast *ethos* og *persona* stava frá siðvenjum úr ávikavist retorikkinum og bókmentafrøðini, so eru bæði týdningarmikil amboð í greiningini av bæði yrkistekstum og føgrum tekstum, ið grundleggjandi mugu sigast at vera ymiskir, men sum bera nógv drøg av hvørjum øðrum sum ein part av sær. Skilnaðurin millum hugtøkini *ethos* og *persona* er tí eisini týdningarmikil liður í greiningini av einum so samansettum tekstslagi sum ummælinum, sum í mongum førum nýtir bæði *ethos* og *persona* í sjálvsmyndanini í tekstinum, kanska serliga í teimum førum talan er um hegnigar høvundar, ella „skilled writers“, sum Cherry nevnir teir (Cherry 1998:385), ið skriva til sín egna fyrimun, eru tilvitaðir um sín leiklut sum ummælarar, og kanska hava aðra dagsskrá aftur at tí bara at siga sína hugsan um eitt verk, t.d. tá rithøvundarummælarar nýta ummælið sum strategiskan form; sum lopfjøl inn á bókmentapallin.

Teir lýstu møguleikar rithøvundsins at skapa sær myndugleika í tekstinum eru partur av viðgerðini av ummælunum í tí greinaða tíðarskeiðnum, 1997-2007. Hesi ástøði eru lykil til greining av, hvussu ummælarin ítøkiliga í tekstinum skapar sær ta tign, sum skal til fyri at vinna lesarans álit, við tað at ummælarin ikki treytaleyst vegna útbúgving ella aðrar førleikar kann sigast at hava hetta vald.

7. Ummælini í tíðarskeiðinum 1997-2007

Í hesum kapitlinum verða ummælini frá tíðarskeiðinum 1997-2007 viðgjørd. Viðgerðin fer fram í ljósinum av tí framlagda ástøðinum og er skipað á tann hátt, at fyrst verður eitt stutt baksýni sett fram, har byrjanin til ummælið í føroyskum høpi verður lýst. Hetta verður gjørt fyri at seta viðgjørda tíðarskeiðið 1997-2007 í søguligt høpi.

Kapittulin er skipaður út frá fýra høvuðstemum, sum mynda partarnar í hesari viðgerð, nevniliga „Ummæli í útisetu“, „Pallsetti ummælarin“, „Kvinnur ummæla, og kvinnur verða ummæltar“ og „List í sjálvum sær“.

Eg havi víst á, at tað mest eru akademikarar/bókmentafrøðingar og rithøvundar, sum ummæla í hesum tíðarskeiði, og yvirskipað ber til at siga, at akademikarar sum ummælarar mynda ummæli í útisetu og partin, har teir kvinnuligu ummælararnir verða lýstir, meðan rithøvundurin sum ummælari myndar partin um pallsetta ummælaran og partin um ummælið sum list í sjálvum sær. Hetta er tó ikki so eintýtt, tí fleiri ummælarar passa inn í fleiri bólkar, t.d. er Kim Simonsen bæði dømi um útisetaummælaran og pallsetta ummælaran, eins og hann samstundis er bæði bókmentafrøðingur og rithøvundur. Hann er bert *eitt* dømi um, at tað er ógjørligt at gera

reinar bólkingar, bæði tá tað kemur til ummælaratypur, og tá tað kemur til evni og tema, tí Kim Simonsen hevur eisini ein týðandi leiklut í brotinum um, hvussu kvinnur verða ummæltar.

Útisetamotivið skipar ein part av viðgerðini við tað, at ummælini, sum útisetar í Keypmannahavn skrivaðu í tíðarskeiðinum 1997-2007, verða viðgjørd fyri seg. Útisetamotivið er tó eisini partur av øðrum brotum, við tað at spurningur verður settur við, hvør, tá til stykkis kemur, er at rokna sum útiseti í tí broytta miðlaheiminum, har tann almenna samrøðan flytur seg yvir á ymiskar talgildar pallar, soleiðis at fatanin av nær- og fjarstøðu verður sett í nýtt perspektiv. Spurningur verður eisini settur við, um støðan sum *uttanveltaður eygleiðari* setir allar partar, sum kunnu roknast sum uttanfyristandandi, í somu støðu, tá tað kemur til vald. Her verður hugsað um kvinnur og teirra støðu í teirri ráðandi bókmentatraditiónini, sum sjáldan verður sædd sum ein fyrimunur, eins og hon verður hjá útisetanum.

Pallsetingin fær rúm í allari viðgerðini, men hon verður serliga tikin fram í viðgerðini av rithøvundarummælum, tí at tað performativa eyðkennir hesar ummælarar. Víst verður á lutvísu dagsskránna hjá rithøvundarummælarunum at føra fram egna poetikk í ummælunum.

Evnið „list í sjálvum sær“ er partur av tí, sum eg havi lýst sum eitt endamál við ritgerðini, at lýsa ummælið sum ein bókmentaform. Tey seinastu trý rithøvundarummælini verða sett fram sum dømi um ummæli, ið á serligan hátt svara listaverkunum, sum tey ummæla, aftur við at halda fram í teirri listaligu siðvenjuni. Víst verður á tey sum dømi um ummæli við listaligari dygd, har ummæli ikki fyrst og fremst kunnu sigast at vera miðlan av list, men kunnu lýsast sum list í sjálvum sær. Tey lýsa tí væl tað níggjunda paradoksið, sum er sett fram í kapitli 2, har ummælið verður lýst sum yrkistekstur, ið miðlar listina, og ein listaligur tekstur í sjálvum sær; ein tekstur, sum er óloysiliga tongdur at tí fagra tekstinum, men samstundis er sjálvstøðugur listaligur tekstur. Hesi ummælini eru um somu tíð við til at peika á ummælið sum sjálvstøðugt tekstslag, ið er vert at granska og viðgera í sjálvum sær.

Søguligt baksýni

Í Føroyum hava ummæli verið skrivað, síðan tey fyrstu bløðini komu

út á føroyskum í 1889. Frá tí, at tær fyrstu nýføroysku bókmentirnar komu út, hava tað soleiðis funnist føroysk ummæli í bløðunum. Ummælini kunnu, eins og Terry Eagleton hevur víst á var galdandi í Onglandi í byrjanini (Eagleton 1984/2005:18), ikki sigast at hava havt ein fastan form í hesum fyrsta tíðarskeiði[33], men vaksa fram sum eitt tilvit um tekstslagið. Talan er um tekstir, sum viðgera aðrar tekstir, t.d. uppíyrkingar og mótyrkingar, tekstir, sum meira kunnu sigast at vera „útbrot“ frá einum lesara, sum var grundleggjandi ósamdur í stevnuni í einum bókmentateksti, t.d. tí hon var moralskt spillandi. Dømi um slíkar tekstir eru sum víst á í kapitli 4 mótyrkingin til vísuna „Vaagen“, har „ummælarin“ hartar yrkjaran fyri ikki at geva Gudi æruna av, at skipið Vaagen varð bjargað úr havsneyð (Sámalson 1894), og ummælið av týðingum hjá Jakob Jakobsen av stuttsøgum eftir Guy de Maupassant (1850-1893), har ummælarin finst at týðaranum fyri at draga útlendskar (franskar) hugsanir inn í tað føroyska („Tvær smásövur“ 1890). Malan Marnersdóttir og Turið Sigurðardóttir hava mett, at ummælarin helst er blaðstjórin á *Føringatíðindi* Rasmus Effersøe (1857-1916) (Marnersdóttir og Sigurðardóttir 2011:460), og tær vísa á, at honum dámar hvørki stavsetingina hjá Jakobsen, søgurnar hjá Maupassant ella týðingina av teimum. Ummælið gevur eina ábending um tað bókmentaliga tykkið í Føroyum um hetta mundið, tí tjúgu ár seinni verður júst Maupassant í ummæli umrøddur sum meistari í søguskriving (Marnersdóttir og Sigurðardóttir 2011:409). Hugsjónin um bókmentir sum tjóðarbyggjandi settu dagsskrá, og samfelagslig atlit vórðu tikin heldur enn meting av listaligari dygd. Støðið varð tikið í tí norrøna, og tann nýggja ljóðfrøðiliga stavsetingin hjá Jakobsen og mentanarlig árin uttanífrá fullu tí ikki í smakk. Hesi útbrot, hesir undanformar ummælisins í føroyskum høpi, bera boð um, at tekstslagið ikki rættiliga hevði fingið fótin fyri seg.

Kortini eru hesa fyrstu tíðina eisini onkur ummæli, sum bera boð um eitt sterkt tilvit um tekstslagið. Turið Sigurðardóttir hevur víst á, at tekstslagið vaknar í Føroyum við ummælinum hjá Kristini í Geil (1877-1935) av *Yrkingum* (1914) hjá Janusi Djurhuus (Sigurðardóttir 2004b: 273), men blaðstjórin á *Tingakrossi*, yrkjarin, týðarin,

33 Sí lýsingina av tekstslagnum í kap. 4.

ummælarin og listamálarin Kristin í Geil, sum ummælti undir dulnevnunum„Anmelder“, „c“, „Trop“ og „x“[34], skrivaði kritisk ummæli heilt frá byrjan í *Føringatíðindi*, *Dúgvuni* og *Tingakrossi*.

Í *Føringatíðindi* í 1899 ummælir hann undir dulnevninum „C“ *Smásangir og sálmar* (1899), ið Føringafelag í Keypmannahavn gav út. Hann kunnar um útgávuna, metir um hana og kemur at enda við eini áheitan á øll føroysk húski um at keypa bókina, tí hon hevur nógv gott í sær. Hann kritiserar tó mál, stíl og úrval av tekstum („C“ 1899). Í *Dúgvuni* ummælir hann sama savn á donskum við undirskriftini „Anmelder“. Hann byrjar eisini her við kunning um tekstin og endar við einari áheitan, men miðjan á ummælinum er ein meira nágreinilig lýsing av savninum. Hann vísir á, at tað er í forminum, at yrkingarnar og sangirnir hava sína styrki, og hann kritiserar, at innihaldsliga eru tekstirnir, sum hálova landi og máli, afturlítandi. Nýggjar tíðir og nýggir sterkir tankar eru ikki til staðar í yrkingunum, sigur hann. Hann „málar“ í ummælinum eina mynd av umhvørvinum í savninum, og tað er ein romantisk og avoldað mynd, sum birtist í huga ummælarans, tá hann lesur tekstirnar. Hann sær tó dygdirnar í savninum og nevnir, at har eru perlur ímillum t.d. eftir Rasmus Effersøe, men hann eftirlýsir veruligan skaldskap og sigur, at hóast sálmarnir eru vakrir og ikki standa aftan fyri teir, sum verða skrivaðir í Danmark, so eru teir ikki skaldskapur. Kristin í Geil setir bókmentalig krøv og eftirlýsir nýggjar tankar, nýggj evni og nýggjar formar, og hann setir føroyskan skaldskap í samband við annað, sum kemur út uttan fyri Føroyar longu her. Ein orsøk til, at Kristin í Geil skrivaði undir dulnevnum kann vera, at hann hevði fleiri leiklutir á bókmentapallinum[35]. Hann yrkti og týddi sjálvur, og í *Smásangum og sálmum*, sum hann her ummælir, átti hann bæði yrkingar og týðingar.

Í *Tingakrossi* í 1901 ummælir Kristin í Geil á donskum undir dulnevninum „Trop“ tekstsavnið *Dagdvølju*. Eisini her kritiserar hann tekstúrval og vísir á, at burtursæð frá tekstum eftir Fríðrik Petersen

34 Dulnevni hjá Kristini í Geil (formliga navn hansara var Christen Holm Isaksen): Um „C“ sí Matras 1998:95. Um„Anmelder“ sí Debes 1982: 220, 271, nota 11. Øll sannlíkindi tala fyri, at „Trop“ og „X“ eisini eru dulnevni hjá Kristini í Geil.

35 Sí lýsing av bókmentapallinum í kap. 4.

og Kvívíks-Jógvan, hevði bókin verið betri, um hon bara innihelt tekstirnar eftir útgevaran sjálvan, Sverra Patursson. Kristin í Geil vísir eisini her á, at formurin er styrkin í teimum flestu tekstunum, og hann undrast á, at føroyingar ikki fylgja við rákum uttan úr heimi. Her sæst, at hann er kunnugur við bókmentarák í Norðurlondum; hann vísir eitt nú óbeinleiðis til fyrilestrarnar hjá Georg Brandes, tá hann tosar um „Evne til at sætte Problemer under Debat“. Hann ger mun á tekstunum, vísir á dygdir og lýti í teimum, summir hava naivt innihald og vánaligt orðaval, meðan aðrir hava „fine og varme Idyller“ og eru „friske og ægte Naturskizzer“, sum hann málber seg. „Friske“ og „ægte“ eru lykilorð, sum eisini síggjast aftur í øðrum ummælum hjá Kristini í Geil, tá hann metir um góðsku. Hetta ummælið er serstakt við tað, at hann nýtir høvið at venda sær til teir føroysku ummælararnar og siga, at teir eru ov lagaligir. Ummælið byrjar soleiðis:

> I Bedømmelsen over hvert nyt Led i vor beskedne og faatallige Litteraturskat, der heldigvis med kortere og kortere Mellemrum ser Dagens Lys, møder man som Regel en Bestræbelse for at slibe alle skarpe og stødende Kanter af, en Omhu for at finde de nænsomste Ord om det, der i al anden Litteratur vilde være henvist til Papirkurven, og samtidig Hang til en ofte uforholdsmæssig højstemt Ros over de bedre Frembringelser. Disse Tendenser forklares let udfra mange i vore særegne Forhold bundende Aarsager, hvoriblandt den mest fremtrædende maaske er Frygten for at skræmme og støde velmenende og uegennyttige Aamtører med en skarp Kritik over de ofte spæde og famlende Forsøg. Imidlertid er det et Spørgsmaal, om denne vidtdrevne Nænsomhed – naar alt kommer til alt – ikke er en Uting, der langtfra at virke udviklende, afføder en vis Ligegladhed og Selvgodhed overfor egne Frembringelser, hvis Spor vil mærkes mere og mere som Tiden gaar og vor Bogskat vokser. Det er derfor næppe ganske af Vejen, at paaminde vore Kritikere om det gamle ord: I ere Jordens Salt...! („Trop“ 1901).

Í ummælinum av tí fyrsta føroyska tíðarritinum, *Búreisingi* (1902), er Kristin í Geil somuleiðis kritiskur mótvegis tí, sum hevur fingið

innivist í blaðnum. Hann viðger inngangin og sigur hann hava eitt „friskt og naturligt Anslag“, og um mál og stíl sigur hann: „Sproget rent og Stilen klar“. Hann heldur tó, at setningsbygnaðurin er í fornsøgustíli, og tað hóskar ikki í modernaðum journalistikki. Modernaður journalistikkur er sostatt idealið, og Kristin í Geil er speiskur og kritiskur mótvegis tekstinum hjá Hammershaimb. Hann rør framundir, at hann hevur fingið innivist vegna ta tign, hann hevur fingið av sínum arbeiði við skriftmálinum: „Hvis ikke dette vort Skriftsprogs hæderkronede Navn netop pyntede så smukt i „Búreisingur's Første-Nr., kunde man for Indholdets Skyld helst have set det udeladt“ („Trop“ 1902).

Kristin í Geil rósar Janusi Djurhuus fyri yrkingina „Ódn“ og setir hann í samband við danska skaldið Johs. V. Jensen við „klangfyldte Vers“ og „ægte følt Vildskab“. Soleiðis sæst hetta sama góðskumetandi orðið ganga aftur: „ektað“. Kristin í Geil rammar ummælið inn í eina lýsing av tíðarritinum sum einum bygningi; einum heimi hjá føroyskum mentanarlívi, sum við hesum fær høvi at vakna. Hann samanber heitið *Búreisingur* við blaðnavnið *Dimmalætting* (1878-), sum eisini var eitt lovandi symbolskt heiti við vón um, at blaðið eins og morgunroðin skuldi boða ein nýggjan dag. Hann endar sína kritisku viðgerð av tíðarritinum við at ynskja, at tað vóru ráð til eina hædd afturat í bygninginum („Trop“ 1902).

Í 1910 skrivar Kristin í Geil um skaldsøguna *Bábelstornið* (1909) eftir Regin í Líð[36], har hann vísir á, at bókin ikki bert er týdningarmikil, tí hon er tann fyrsta skaldsøgan, men eisini tí hon í bókmentaligari dygd er á hædd við tað, sum verður skrivað í Danmark, Noregi og Svøríki. Hann vísir á, at hon ikki er ein „tendens-bók“, at fremstifingur ikki er á lofti, hóast rithøvundurin ikki er heilt sørur fyri at tosa uppií nú og tá, sum hann málber seg, men tað nervar ikki søguna. Persónarnir eru „heilskapaðir menniskjamálningar, sannir og livandi“. Her vísir Kristin í Geil, at hann setir bókmentalig krøv fram um tey uppalandi, søgan skal ikki nervast av hugburðinum hjá rithøvundinum, og persónarnir skulu vera livandi og trúligir. Hann endar ummælið við at siga, at bókin er erlig og sonn, og hon er eitt skaldaverk („X“ 1910).

Í nevnda ummælinum av *Yrkingum* (1914) eftir J. H. O. Djurhuus

36 Dulnevni hjá Rasmusi Rasmussen (1871-1962).

koma kenslurnar hjá ummælaranum fyrstu ferð veruliga til sjóndar í rósandi orðum: „Tann, ið leggur hesa vøkru, lítlu bók frá sær, hugtikin, rørdur í sínum innastu kenslum, vil sanna, at hetta eru *sjáldsamar* stílroyndir“ („C“ 1914). Tað verður týðiligt, at hetta yrkingasavnið fyri ummælaran veruliga er nakað nýtt í føroyskum skaldskapi. Kristin í Geil lýsir tað soleiðis:

> Ongatíð er føroyskt mál nýtt við slíkum kynstri, smidligt sum hevði tað verið skriftmál gjøgnum øldir, lagar tað seg undir hansara hondum eftir teim ymisligastu evnum; hart og treyst sum kneysarnir í Kollinum, Risanum og Kellingini, andafjart sum mjørkafleyr. Her sum ongantíð áður er okkara mál av røttum blivið hin fjøðurhamurin, sum skaldið tørvar, skulu kenslir og tankar, alt tað, ið syngur í sál hansara sleppa á flog („C“ 1914).

Hann rósar ikki bara savninum, men er so hugtikin av skrivikynstrinum hjá Janusi, at tað smittar yvir á ummælið. Tað er sum, at myndamál og háfloygd orð skulu til fyri av sonnum at lýsa skrivistíl Janusar.

Samanumtikið ber til at siga, at lið um lið við tær fyrstu bókmentirnar á føroyskum hava livað „ummæli“, sum meira eru eitt veikt tilvit um tekstslagið „aftursvar“ og „útbrot“ enn beinleiðis ummæli, men tó eisini onkur veruliga kritisk ummæli við sterkum tilviti um tekstslagið, fyrst og fremst umboðað av Kristini í Geil.

Við tíðarritinum *Varðanum* (1921-), gjørdust ummæli fastur táttur, og tað ber til at siga, at við fyrst Kristini í Geil og síðani blaðstjórum *Varðans* Chr. Matras og Rikardi Long byrjaði ein førleika- og professionaliseringartilgongd, har ummælið sum tekstslag í føroyskum høpi fekk støðugt sterkari autonomi. Hetta er ein tilgongd, sum ikki kann sigast at vera komin á mál við tað, at eingin virkar sum „professionellur ummælari“ í orðsins sanna týdningi í Føroyum í dag. Kortini hava tað gjøgnum tíðirnar verið ummælarar, sum eitt langt lív við áhaldandi at ummæla hava ment seg og gjørt seg kendar sum ummælarar í tí almenna rúminum.

Eg havi vísst á, at útisetin frá byrjan hevur verið ein sera týðandi partur av mentanarpallinum og ein týðandi leikari á tí føroyska bókmentaøkinum; at Keypmannahavn hevur verið miðstøð fyri føroyskt intellektuelt lív í øldir. Tann føroyska „bygdin“ í Keypmannahavn átti sítt fyrsta blómaskeið í tjóðskaparromantikkinum frá umleið 1880, tá skaldskapur og útgávuvirksemi spurdist burturúr. Annað blómaskeiðið var undir seinna heimsbardaga, tá virksemið millum føroyingar í Keypmannahavn rúmaði akademiskari blaðútgávu við bókmentaviðgerðum og ummælum.

Størsta kreppan í Føroyum eftir seinna heimsbardaga brast á 6. oktober 1992, tá ið føroyski fíggjarheimurin fór í knús og dró vinnufyritøkur og einstaklingar til botns við sær, m.a. við teirri fylgju, at tíggjundi hvør føroyingur flutti av landinum. Eins og áður leitaði ein stórur partur til Keypmannahavnar, og tað kannaða tíðarskeiðið 1997-2007 gjørdist enn eitt blómaskeið í mentanarvirksemi í útisetu. Í hesum umstøðum spruttu tvey útisetabløð: tað akademiska *Bragi* og tað journalistiska *Føringurin*. Bæði bløðini prentaðu ummæli. Ymsir úisetar skrivaðu eisini fast í bløð í Føroyum hesi árini.

Turið Sigurðardóttir vísir í grein um, hvussu tann føroyski samleikin varð skaptur í tjóðskapartíðini, á týdningin, útisetin hevur havt í føroyskum mentanarlívi:

> Meðan tíðir hava liðið, hava føroyingar, sum ferðaðust burturi í verðini borið nýggjar hugmyndir, háttalag og lutir við sær heimaftur. Føroyingar í útisetu í Keypmannahavn hava í øldir verið millumliður, tá ið nýggjar hugsanir hava verið bornar til Føroya, hugsanir, sum í størri ella minni mun hava fest røtur og breitt seg í føroyskum jørðildi. Tjóðskaparrørslan er dømi um rørslu, sum hevur fingið breiða og varandi ávirkan (Sigurðardóttir 2004a:126).

Frá tí at føroyskar bókmentir vórðu til í tjóðskapartíðini, hevur útisetin havt berandi týdning, og partur av sjálvsfatanini hjá útisetunum í tíðarskeiðinum 1997-2007 tekur støði í leiklutinum, sum útisetar hava spælt fram til tá. Av summum ummælarum verður fatanin av útisetanum sum umboðandi tann intellektuella akademikaran nýtt tilvitað í royndini at skapa sær mentanarligan

myndugleika. Tíðarritið *Outsider Magazin* nýtir søguliga leiklut útisetans í marknaðarføringini av tíðarritinum, sum blaðstjórin Kim Simonsen lýsir sum eitt neyðugt blað, ið skal standa fyri einari umfatandi modernisering av føroyskum bókmentum (Simonsen 2005f:6).

Í lýsingini av søguliga baksýninum er eingin kvinna nevnd, og eg havi eisini vísst á, at Anne-Kari Skarðhamar í sínari lýsing av ummælunum í *Varðanum* ger vart við, at flestu føroysku ummælararnir hava verið menn[37]. Tað sæst eisini aftur í orðingum í summum ummælum, sum hava verið skrivað. William Heinesen kallaði skaldið Poul F. Joensen „lyrikkens enfant terrible“ og sigur um hann:

> Joensens form er ofte noget tilfældig, men man tilgiver ham gerne hans maskuline afsky for pertentlighed, fordi han er saa modig og fyrig i sine angreb paa den i virkeligheden ganske urimelige ansamling af sjakaler og mørkemænd, der gør sig gode dage i det moderne færøske samfund (Heinesen 1950:164).

Í grein um Poul F. Joensen og skaldskap hansara siterar málfrøðingurin Eivind Weyhe (f. 1942) hetta brotið undir yvirskriftini „Maskulin afsky for pertentlighed“. Útsøgnin hjá Williami Heinesen um skaldið er ikki ein niðran av tí kvinnuliga, men mótsett er hon tó ein áherðsla á tað maskulina, sum verður sað sum ein dygd.

Tá hugsað verður um, at meginparturin av ummælarunum søguliga hava verið menn, er tað áhugavert, at næstan helvtin av ummælarunum í tíðarskeiðinum 1997-2007 er kvinnur[38]. Tær ummæla ikki eins nógv og menninir, men hava fingið ein virknan leiklut í professionaliseringartilgongdini, tá vit koma upp til tíðarskeiðið 1997-2007. Nærri verður komið inn á hetta í brotinum um kvinnur, sum verða ummæltar, og kvinnur, sum ummæla.

---

37 Sí kap. 2 um ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi.
38 19 kvinnur ummæla í tíðarskeiðinum 1997-2007 og 40 menn.

Samfelags- og miðlastøðan 1997-2007

Tíðarskeiðið 1997-2007 er serstakt á tann hátt, at tað er tíðin, áðrenn *Facebook*, sum øll yvir 13 ár fingu atgongd til í 2006, kom, og áðrenn bloggar og sosialir miðlar veruliga høvdu fingið fótin fyri seg. Tíðarskeiðið endar, tá áðurnevndu kanningar eru gjørdar, sum vísa, at ummælini í norðurlendsku dagbløðunum frá 2007 til 2017 fækka niður í minni enn helvtina („Et Danmark uden anmeldere" 2017, Larsen, Dag Eivind Undheim 2017, Lindqvist 2017, Edenborg 2018, Dam 2017). Hetta tíðarskeiðið bar sostatt enn til at siga, hvat var til av ummælum úti millum fólkið. Tíðin eftir hetta var merkt av spjaðing í mentanartilfarinum, sum var íkomin av spjøddu miðlastøðuni, og tí ber illa til at samanbera støðuna í hesum tíðarskeiði við støðuna í dag bert góð tíggju ár seinni. Tá kanningarnar, sum eg vísi til, staðfesta, at ummælini eru fækkað í bløðum og tíðarritum tey seinastu tíggju árini, so siga tær bara nakað um, hvussu støðan er í bløðunum, men taka ikki tann veruleika við í sínari meting, at ummælini kortini finnast, hóast tey nú hava funnið sær nýggjar pallar á netmiðlum, heimasíðum, netstøðum, har til ber at geva stjørnur sum t.d. á *Goodreads*, bloggum og sosialum miðlum.

Eftir 2007 er samskiftisstøðan broytt so grundleggjandi, at hon bjóðar hugsanini um, at tað ber til at samskifta um bókmentir í einum felags almenni, av. Henda gongd kann síggjast sum ein demokratisering, tí øll kunnu nú siga sína hugsan. Vandin er tó, at lesarar kunnu enda í sonevndum ekkokømrum, har teir bara møta samsintum á netinum og ongantíð øðrum áskoðanum um bókmentir enn teimum, sum svara til teirra egnu. Samstundis missir serfrøðingurin møguleikan at røkka út til øll á sama hátt, sum tá fólk í størri mun savnaðust um somu miðlaleiðir. Hann missir sín myndugleika, valdið verður spjatt, og fleiri skulu býta „spottljósini" millum sín og kappast um uppmerksemið í almenna samskiftinum.

Henda ovurstóra broytingin í miðlastøðuni ger eina kanning av ummælum í tíðarskeiðinum upp undir broytingina serliga áhugaverda, tí hon letur upp fyri víðari samanberandi gransking av ummælarastøðuni áðrenn og aftaná, og hvat hendir – um nakað – við ummælunum, tá tey flyta seg yvir á aðrar pallar.

Í tíðarskeiðinum 1997-2007 bar sostatt til at savna øll ummælini, tí tey eru prentað í teimum bløðum og tíðarritum, sum komu út hetta tíðarskeiðið. Arnbjørn Ó. Dalsgarð skrivar í bókini *Føroysk blaðsøga 1852-2002* (2002), at búskaparkreppan í Føroyum í nítiárunum og tann stóra fráflytingin til Danmarkar gjørdi, at tann einasta nýggja avísin, sum sá dagsins ljós tey árini, var útgivin í Keypmannahavn. Avísin *Føringurin* kom út aðru hvørja viku í tíðarskeiðinum 1996-1998. Tað vóru teir báðir journalistarnir Øssur Winthereig (f. 1958) og Dánjal Højgaard (f. 1960), sum stóðu aftan fyri útgávuna. Arnbjørn Ó. Dalsgarð sigur, at hóast avísin bert kom út í stutta tíð, so megnaði hon at fylla eitt týðandi rúm í føroyska blaðheiminum hesi árini, og tað er ikki av leið at siga, at hinar føroysku avísirnar ávirkaðust av *Føringinum*, ikki minst journalistiskt, men eisini í raðfestingini av mentanartilfari (Dalsgarð 2002:71). Arnbjørn Ó. Dalsgarð vísir eisini á, at hóast kreppan gjørdi, at fleiri avísir máttu geva skarvin yvir, so hendu framstig við teimum avísunum, sum hóraðu undan. Millum annað økti *Sosialurin* longu um sína útgávu í 1990, og í 1996 gjørdi *Dimmalætting* tað sama (Dalsgarð 2002:71).

Tíðarskeiðið eftir hetta eru avísirnar sostatt vorðnar størri, tær koma oftari út, og journalistisk framstig eru gjørd. Vit síggja ávirkanina, sum sambært Arnbjørn Ó. Dalsgarð sæst í øðrum avísum frá mentanartilfarinum í *Føringinum*, í denti á mentanartilfar í eykabløðum sum t.d. *Vikuskifti* hjá *Sosialinum* og í *Skáa*, *Kryddi* og *Viðskeranum* hjá *Dimmalætting*.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð vísir á, at politiskt løgdu avísirnar seg eftir at vera óheftari enn áður, og í tíðarskeiðinum eftir bankakreppuna, tóktust fjølmiðlarnir at vera á einum máli um, at føroyingar høvdu verið fyri órætti, og at tað átti at fáa avleiðingar. Allar avísirnar átalaðu tann órætt, sum Den Danske Bank, danska fíggjareftirlitið og danska stjórnin høvdu framt móti føroyingum, og undan løgtingsvalinum í 1998 riðu allir teir føroysku fjølmiðlarnir, eisini *Dimmalætting* og *Sosialurin*, á einari tjóðskaparbylgju, sum kanska meira hevði reist seg sum vreiði um framferðina hjá dønum heldur enn av ynskinum at ráða í egnum landi (Dalsgarð 2002:73).

Arnbjørn Ó. Dalsgarð sigur, at *Fregnir* var á mangan hátt øðr-

vísi enn hinar avísirnar, millum annað tí at hon legði størri dent á bakgrunsgreinir og mentanartilfar (Dalsgarð 2002:75). Hann sigur soleiðis um orsøkina til, at *Fregnir* kom á marknaðin:

> Men hóast avísirnar av øllum alvi royndu at liva upp til síni egnu mál viðvíkjandi óheftum tíðindaflutningi, í øllum førum fyrstu tíðina av valskeiðinum hjá fullveldissamgonguni, so vóru tað alsamt fleiri, ið funnust at teimum fyri at renna ørindi fyri donsku stjórnina og føroysku andstøðuna. Tann javnvágin, sum var komin í føroyska avísmarknaðin aftan á bankamálið, tyktist at vera horvin aftur, og longu í 1999 vóru røddir frammi, sum hildu, at tað fór at verða neyðugt við einari nýggjari avís, sum megnaði at fáa aftur hesa javnvág millum fullveldisvongin og sambandsvongin í almenna tíðindaflutninginum. Úrslitið gjørdist so tað, at ein nýggj avís *Fregnir* kom á føroyska marknaðin á vári 2001 (Dalsgarð 2002:73-75).

Umframt hesi bløðini, har ummæli vóru prentað, *Sosialin* (1927-), *Dimmalætting* (1878-), *Fregnir* (2001-2004), *Oyggjatíðindi* (1977-) og útisetablaðið *Føringin* (1996-1998), komu eisini útisetatíðarritini *Oyggjaskeggi* (1948-1998), *Bragi* (1999-2001) og *Outsider Magazin* (2005-2006). *Vencil* (2006-2019), tíðarrit fyri skaldskap á føroyskum, kom eisini út í hesum tíðarskeiði og somuleiðis *Varðin* (1921-), sum tó ikki hevði ummæli av nýggjum fagurbókmentum í tíðarskeiðinum 1997-2007.

Fjølnir, lestrarblað hjá Meginfelagi Føroyskra Studenta, hevði nøkur ummæli í hesum tíðarskeiði, og eitt serblað av *Kvinnutíðindi* kom út um aldarskiftið, sum trý ummæli av føroyskum fagurbókmentum vórðu prentað í.

Ummæli í útisetu

Ein avleiðing av búskaparkreppuni í Føroyum fyrst í 1990-árunum var, at nógvir ummælarar skrivaðu lutvíst í útisetu í tíðarskeiðinum 1997-2007, og teir flestu útisetaummælararnir vóru akademikarar/bókmentafrøðingar ella undir lestri. Tá eg síggi útisetuna sum ein part av funktiónini hjá hesum ummælarum, so er tað við tí í huga, sum Edward Said (1935-2003) sigur í bókini *The World, The Text, and The Critic*, nevniliga, at tað kritiska tilvitið skal kunna annað og meir enn bara at styrkja teir partarnar av mentanini, sum krevja samtykki og semju millum tey, sum eru partur av mentanini. Said setir spurningin, hvussu ein, sum er partur av einari mentan, kann hevja seg upp um hana og koma við nøkrum, sum er meira enn bara játtan og tilsøgn til semju, sum longu er. Tað kritiska tilvitið krevur frástøðu (Said 1983:24-26):

> What does it mean to have a critical consciousness if, as I have been trying to suggest, the intellectual's situation is a worldly one and yet, by virtue of that worldliness itself, the intellectual's social identity should involve something more than strengthening those aspects of the culture that require mere affirmation and orthodox compliancy from its members? (Said 1983:24)

Said harmast um, at kritikkur í samtíðini er ein stovnur, sum áhaldandi og alment váttar virðini í teirri evropeiskt domineraðu elitumentanini, og hansara áheitan um at loysa seg frá ókritiskari váttan av verandi mentanarfatan og snævurskygdari endurtøku av samtyktum virðum snýr seg eyðvitað um meira enn bara tað at flyta seg fysiskt burtur úr tí heimliga og trygga samleikanum, men tað, sum hann tosar um, er eisini viðkomandi, tá tað kemur til spurningin um at ummæla í útisetu, tí útisetin er í útgangsstøði í einari ávísari fjarstøðu frá mentanarfelagsskapinum við tað, at hann júst er fysiskt staddur burturfrá og harvið hevur nakrar fortreytir og møguleikar, ið tann, sum í størri mun er ein partur av mentanini, ikki hevur.

Eitt av bløðunum, sum kom út í tíðarskeiðinum 1997-2007, spælir, sum eg havi víst á, tilvitað upp á tann leiklut, sum útisetin sambært Said hevur, og sum hann hevur havt sum leikari á tí føroyska bókmentaøkinum í ymiskum blómaskeiðum gjøgnum tíðirnar. Heitið á tíðarritinum er *Outsider Magazin*. Tað vóru áðurnevndu Kim Simonsen og Bergur Rønne Moberg, sum vóru blaðstjórar. Eftir innleiðandi tekstin „Eitt neyðugt blað" eftir Kim Simonsen, ábyrgdarblaðstjóra, í fyrstu útgávu kemur grein eftir Berg Rønne Moberg um *outsidaran* sum bókmentaligt grundevni. Bergur vísir á, at tað verður verri og verri at skilmarka,

hvør er uttanfyri, og hvør er innan fyri felagsskapin, tí sjónvarp, telda og fartelefonir virka miðspjaðandi. Hetta er ein tanki, eg komi aftur til í sambandi við spjaðingina á bókmentapallinum. Hann sigur, at tað at skriva er ein *outsidara*støða í sjálvum sær, men dentur verður lagdur á útisetuna, og Bergur Rønne Moberg vísir til grein hjá Kim Simonsen um tann intellektuella *outsidaran* og ta neyðugu útlegdina. Útiseta verður her lýst sum ein produktiv støða (Moberg 2005b:8-9). Kim Simonsen sigur: „Vit eita OUTSIDERmagazin, tí tað er ofta uttanfyri, ið tingini henda" (Simonsen 2005g:57). Ein orsøk til hetta navn er, sigur hann, at intellektuell menniskju eru ofta útlagin. Útisetamotivið gongur aftur allan vegin gjøgnum ritið, og tað er týðiligt, at útisetin verður settur í samband við tann intellektuella. Hetta er máti sum rit at rudda sær sess og at skapa virðing rundan um útisetan. Hann gevur konnotatiónir til nýskapan, víðskygni, lærdóm og „sunna" fjarstøðu.

Ummælararnir í Keypmannahavn í 1997-2007 ummæltu í *Føringinum* og *Braga*, men eisini í *Dimmalætting* og *Sosialinum*. Teir skrivaðu í útisetu, men beint inn í ein føroyskan samanhang við tí fyri eyga at hækka mentanarstøðið í Føroyum. Búskaparkreppan hevði rikið ein tíggjundapart av føroyingar av landinum, og skilligt er, at útisetarnir kenna ábyrgd. Eitt evni, sum verður tikið upp í studentablaðnum *Fjølni* í hesum tíðarskeiði, er „heilaflukt", so tankin livdi um, at tað vóru teir klókastu heilarnir í landinum, sum vóru í útisetu, og at ein ávísur vandi var fyri, at umstøður ikki vóru í Føroyum til at „halda upp á góðu heilarnar" (Hjelm 1997). Tí máttu teir geva sítt íkast til mentanarstøðuna í heimlandinum.

Fyrimunurin av fjarstøðu er drigin fram av fleiri, sum ummæla. Sissel Furuseth vísir á, at ummælarin Nøste Kendisir bleiv einaferð spurd, hvussu hon kundi sita í Finnmark og ummæla bøkur, tá hon ikki hevði atgongd til tey óformligu netverkini hjá høvundum, forlagsfólki o.s.fr. Hon svaraði, at fjarstøðan var meira ein fyrimunur enn ein vansi, tí at so gjørdist hon ikki so lætt ráðaleys í „kennskapar kennskapi" (Furuseth 2008).

Jógvan Isaksen, sum hevur profilerað seg sum útisetaummælari, hevur fleiri ferðir vístá júst somu fyrimunir við at skriva í útisetu

(Isaksen 1999b, 2000).[39] Tað er kanska ikki av leið at siga, at tann professionaliseringartilgongdin, sum eg havi vístá, er farin fram innan føroyskt ummælaravirksemi, síðan tey fyrstu føroysku ummælini vórðu skrivað, fyri ein part hevur havt røtur í útisetu. Ummælið hjá Chr. Matras av yrkingasavninum *Yvir teigar og tún* eftir Hans Andrias Djurhuus (Matras 1936), sum verður tikið fram sum eitt av teimum ummælum, ið settu nýggjan tóna í føroyskum ummælum við at ummæla út frá yrkisligum kriterium (Jensen 2006a, Skarðhamar 2012), varð skrivað í útisetu. Hanus Kamban, sum í mong áratíggju hevur verið við til at menna og mýkja tekstslagið í føroyskum høpi, skrivaði síni fyrstu ummæli í útisetu í 1967, tá hann var blaðstjóri á útisetablaðnum *Fjølni*. At Jógvan Isaksen sær sítt virksemi sum part av einari professionaliseringartilgongd, sæst endurspeglað í grein hansara „Føroyski mentunarpallurin". Hann sigur, at meginparturin av teimum, sum ummæla føroyskar bókmentir, ikki rættiliga eru før fyri at gera tað, og við hesum setir hann nøkur krøv til førleikarnar hjá einum ummælara. Harafturat vísir hann á tørvin at uppfinna eitt nýtt hugtaksmál fyri at kunna ummæla í Føroyum, tí at málinum vantar heiti fyri abstrakt fyribrigdi:

> Hetta førir okkum fram til tørvin av einum samsvarandi føroyskum málamboði, við tað at alt, sum varð skrivað í Føroyum í fleiri hundrað ár, varð skrivað á donskum. Hetta hevur fört við sær, at føroyskt er eitt ótrúliga livandi „objektmál" ... men hinvegin er málið ógvuliga fátækt, tá ið tað viðvíkur „abstraktum", tað finnast eingi orð fyri hugtøk. Tað ger tað mangan torført at gera eina skrivliga sundurgreining av einum bókmentaverki, tí tann skrivandi hevur ilt við at finna tey røttu orðini. Einasti møguleiki er at brúka kend fremmandorð ella metaforar, t.v.s. orðamyndir frá objektmálinum (Isaksen 1983:11-12).

Tá Jógvan Isaksen í sama viðfeingi kritiserar ummælarar, sum ikki hava havt evni ella dirvi til at koma við gevandi kritikki, men kritikk-

39 Í greinini „Fjarstøðan er neyðug" í *Sosialinum* frá 2003 nemur Kim Simonsen eisini við ta neyðugu fjarstøðuna í føroyskum ummælaravirksemi https://www.in.fo/news-detail/fr-st-an-er-ney-ug (07.01.2022).

urin verður til „markleyst rós og tvætl av slagnum: vøkur bók, liggur væl í hondini, o.líkn.“ (Isaksen 1983:12), sipar hann helst til Marius Johannesen, sum var ritstjóri á *Varðanum* um hetta mundið og ivaleyst sá tað sum sína skyldu at umrøða tað mesta, sum kom út á tann føroyska bókamarknaðin. Marius Johannesen ummælir eisini bókina hjá Jógvani Isaksen, og tá er ikki talan um „markleyst rós“. Hann kritiserar bókina, serliga greinina „Føroyski bókmentapallurin“ og hetta, sum Jógvan Isaksen sigur um at ummæla á føroyskum. Marius Johannesen er speiskur og sigur, at Jógvan Isaksen við at nýta fremmant mál hevur hug at erpa sær av tí, hann hevur lært, tí hann er ungur og óroyndur og hevur gjørt lítið annað enn ganga í skúla. Tó, sigur hann, er Jógvan Isaksen ikki liðugur at læra í skúlanum og enn minni í lívinum („M. I.“ 1984:142).

Marius Johannesen heldur ikki, at tí føroyska málinum vantar orð, men at vit hava ríkiligt av orðfeingi. Hann er ikki samdur í, at meginparturin av føroysku ummælarunum ikki er førur fyri at ummæla av hasi orsøk. Heldur kritiserar hann Jógvan Isaksen fyri at vera ov bundnan at fremmandum keldum, sum hann „hálvavegna hevur sett í hálsin“, sum hann málber seg. Hann sigur, at Jógvan Isaksen samstundis nýtir høvið at „høgga niður á navngivnar persónar og koma við ymsum illa umhugsaðum briksli“, og heldur, at hetta hoyrir ikki heima í grein, sum gevur seg út fyri at vera vísindalig („M. I.“ 1984:141).

Í hesum kjakinum hómast ein andsøgn millum tað akademiskt lærda ummælaravirksemið, sum Jógvan Isaksen ger seg til talsmann fyri, og tað hevdbundna heimliga ummælaravirksemið, sum Marius Johannesen stendur fyri. Jógvan Isaksen sipar til eitt akademiskt orðfeingi, sum vantar á føroyskum, fyri at føroyskt skal duga sum bókmenta- og ummælaramál á sama stigi sum onnur mál, meðan Marius Johannesen vísir til allan skaldskapin, sum er útgivin í Føroyum, og sum ber boð um, at vit hava eitt livandi mál („M. I.“ 1984:142). Teir báðir tosa ikki sama mál, kann mann siga, annar tosar sum leikmansummælari um tað føroyska málið, og hin tosar sum ein, ið strembar eftir førleikamenning ella professionalisering í tí føroyska ummælaravirkseminum – eisini á málsligum stigi.

Marius Johannesen fer í verjustøðu vegna føroyska málið, meðan Jógvan Isaksen vil víðka og menna málið sum amboð. Jógvan Isaksen umboðar eitt nýtt ættarlið av skrivandi fólki, har málið er vorðið ein sjálvfylgja á ein hátt, tað ikki var fyri ættarliðið frammanundan, og tolir og eigur at verða ment og mýkt víðari.

Andrias Justesen og útisetablaðið *Føringurin*

Útisetablaðið *Føringurin* var eitt journalistiskt blað, sum kom út í kjalarvørrinum av kreppuni í 1990-árunum. Ein av útisetunum, ið ummælti nógv í *Føringinum*, var Andrias Justesen (f. 1963) exam. art. í norðurlendskum. Journalistiski profilurin hjá blaðnum sæst aftur í skrivistílinum hjá Andriasi Justesen, tí hann skrivar við fynd og lýkur tey journalistisku krøvini um at skriva stutt og fangandi, hóast hann er skúlaður innan bókmentir og ikki fjølmiðlar. Heitið á ummælinum hjá Andriasi Justesen av bókini *Húsið o.a. stutt* hjá Steinbjørn B. Jacobsen, „Mitt í einari krepputíð“, sigur ikki bara nakað um bókina, sum hann ummælir, men eisini um tíðina, hann ummælir í, og sum eg viðgeri. Hetta er tíðin beint eftir áðurnevndu búskaparkreppuna, og sum Andrias Justesen sigur, so eru føroyingar kanska ikki heilt komnir burtur úr henni um hetta mundið. Teir mongu føroyingarnir, sum búleikast í Danmark í kreppuni, skapa síni egnu bløð við mentanartilfari og ummælum, sum eru merkt av vitan um ummælistekstslagið og tilviti um týdningin av ummælaravirksemi. Hetta sæst aftur í búnum og tilvitaðum ummælum, sum fylgja vanligum ummælarasiði. Sum nevnt er ein akademiskur tóni at hóma í fleiri av hesum ummælunum. Andrias Justesen sigur um *Húsið o.a. stutt*: „Kanska er búskaparkreppan, sum vit enn ikki eru heilt komin úr, eitt so mikið turrisligt og upptanlað evni, at tað valla fær borið uppi til skaldsligt flog“ (Justesen 1997b). Hetta er eitt dømi um, hvussu Andrias Justesen metir um tekst við einum ávísum fyrivarni, tá tað kemur til innihaldið í bókini. Hann setir tekstin í samfelagsligan samanhang og verjir harvið Steinbjørn B. Jacobsen móti atfinning fyri vantandi „skaldsligt flog“.

Í greiningum hjá Andriasi Justesen sæst tilvit um aðrar lesihættir enn hansara egnu, og hann setir aðrar møguleikar fyri tulking fram, hóast hann velur ein fram um annan. Hetta sæst í ummælinum av yrkingasavninum hjá Sigri Gaini *Orð og andlit* (1997): „Men yrking-

in kann fatast á ymiskan hátt ... so havi eg hug at tulka tað tann vegin“ (Justesen 1997d). Annað dømi um varsemi í metingini av teksti í ummælum Andriasar er, tá hann í hesum sama ummæli vísir tilvit um, at hann ummælir ungan debutant og bloytir kritikkin við styrkimarkørinum *heldur*: „Tað sum er fylt inn í henda karmin tykir mær *heldur* misjavnt. Samstundis sum tann knappi og ópyntaði formurin er gjøgnumførdur og eyðkennir hetta yrkingasavnið, so er *heldur* lítil megi í ... Ungi aldur yrkjarans fornoktar seg ikki“ (Justesen 1997d, mín áherðsla).

Tá tað kemur til form og longd á teksti, arbeiðir Andrias Justesen í samsvari við vanligar journalistiskar leiðreglur um at taka atlit at tíðindavirði og orða seg stutt og greitt. Hann fylgir forminum, sum Andreasen og Winge seta fram um, hvat eitt ummæli skal innihalda: kunning, samandrátt, viðgerð og meting.

Andrias Justesen skrivar um skaldsøgur, sjónleikir og yrkingar, og hann vísir, at hann kennir til tekstsløgini og metir út frá bókmentafrøðiligum krøvum, sum hann setir til tey ymisku tekstsløgini. Fjølbroytnið í ummælunum hjá Andriasi sæst aftur í hansara málsliga stíli. Hann er varin í ummælinum av ungum debutanti, Sigri Gaïni (f. 1975), sum hann sær dygdir í (Justesen 1997d), og hann er speiskur í ummælinum av sarkastiskari bók *Losi tann Fyrsti* (1997) eftir ein drivnan rithøvund og blaðmann, Ólav í Beiti (f. 1952), ið sambært Andriasi Justesen er tann einasti føroyingurin, sum í telefonbókini kallar seg rithøvund (Justesen 1997c). Hann sigur víðari: „Júst nær hann hevur lagt hetta ok á seg sjálvan, veit eg ikki, men eftir útgávuvirkseminum at døma livir hann væl og virðilig [sic] upp til tittulin“ (Justesen 1997c). Hetta er sera speiskt, við tað at hann óbeinleiðis sigur, at tað er ikki dygdin í skaldskapi hansara, sum rættvísger hetta heiti, men nøgdin. Eisini tá Andrias Justesen nevnir persónarnar í bókini, Svein Svínstoft og Hav Havursgarð, og í klombur setir orðini „navnasymbolikkur á einum silvurfati“, hómast speisemi í ummælinum. Men eisini í hesum ummælinum er Andrias Justesen tó varin í sínum virðisdómi, tí hóast hann í sínum framhaldandi speiska tóna sigur bókina ikki vera nakra stórhending í føroyska bókmentaheiminum, so er hon tó ein bók við einum ávísum aktualitetsvirði, ið ger hana verda at lesa, sigur hann (Justesen 1997c).

Andrias Justesen ger eina heildarmeting av teimum tekstum, sum hann ummælir, og viðger bæði innihald, form og mál. Hann sigur, at Ólavur í Beiti við sínari bók hevur prógvað, at hann dugir at skriva um annað enn seg sjálvan. Somuleiðis hevur hann handalag at fáa setningar at sita, og málið ljóðar so natúrligt, serliga í beinleiðis talu. Í lýsingini av persónunum vinglar stílurin tó, sigur hann, og tekur ítøkiligt dømi úr tekstinum sum grundgeving og heldur speiskliga fyri, at Ólavur kundi havt verið á seðlasavninum á Føroyamálsdeildini og leitað eftir sjaldsomum lýsingarorðum (Justesen 1997c). Andrias Justesen eftirlýsir natúrligan dialog og realistiskt mál, og líknandi kritikk setir hann eisini fram av Steinbjørn B. Jacobsen, tá hann sigur: „Um málið er at siga, at tað sum heild er eitt tilsnøggað talumál ... Onkrastaðni dettur hann tó í ta pedagogisku veitina, sum t.d. tá hann letur eina smágentu siga „sjónband“ í staðin fyri video, sum øll jú siga“ (Justesen 1997b).

At Andrias Justesen er tilvitaður um tekstslag sæst serliga væl aftur í ummælinum av bókini *Ljósini sloknað* (1996) eftir Elina Mortensen, sum hann kritiserar, tí hon hvørki er kærleikssøga ella krígssøga, men roynir at vera bæði í senn. Hann heldur, at um høvundurin hevði valt annað evnið, kundi tað komið ein heilskapað skaldsøga burturúr. Andrias Justesen ger nógv burtur úr at kursivera og skriva við tjúkkari skrift orðið „skaldsøga“ fyri at leggja áherðslu á týdningin, tað hevur at vera tilvitaður um val av tekstslagi og kanska eisini fyri at leggja áherðslu á týdningin í hesum metingarkriterii frá hansara síðu; at hann hevur lisið bókina sum skaldsøgu, men at tað skapar trupulleikar í lesingini, tí hon er ov nógv okkurt annað eisini. Hetta er hansara metingarkriterium, og hann heldur, at hetta verður ein av teimum bókunum, sum eru gloymdar eftir stuttari tíð. Her er dómurin ikki lagaligur, men tað liggur tó eitt lítið varsemi í, at hann sigur „Fyri mær verður bókin hvørki“, og vísir á, at tað er soleiðis, hann sær tað, og hann bendir hóast alt á, at um høvundurin hevði valt eitt evni í staðin fyri tvey, so kundi ein heilskapað skaldsøga spurst burturúr (Justesen 1997a).

Ummælarin nýtir í einstøkum førum orðið „eg“ í sínum ummælum, har hann vísir til sín egna persón, til dømis tá hann sigur, at hann ikki hevur sað nakran av leikunum hjá Steinbjørn B. Jacobsen framførdan

á palli (Justesen 1997b), og tá hann sigur, „so havi eg hug at tulka tað tann vegin“ (Justesen 1997d). Tilvísingin er beinleiðis til ummælaran sum persón, ikki við tí endamáli at peika á seg sjálvan, men at greiða frá fortreytum at lesa og meta um tekstin; sum eitt slag av próvførslu. Hetta er eitt *ethos*, sum skapar trúvirði, tí tað grundgevur sakliga. Tá ummælarin hinvegin í ummælinum av skaldsøguni hjá Ólavi í Beiti sigur „Eg meini tað. Eru orðini ikki júst tað, ein høvundur skal liva av? Ella havi eg púrasta misskilt tekstin?“ (Justesen 1997c), er tónin speiskur og skapar eitt glopp millum ummælaran sjálvan og ta speisku røddina í ummælinum; ein stílur, sum gevur rúm fyri, at ein *persona* trínur á pallin, ein sjálvsmynd av ummælararnum sum einum, ið ikki bara hevur hegni at lesa, men eisini evni at svara aftur í líknandi stíli, sum bókin er skrivað í. Spurningurin hjá Andriasi Justesen, um hann hevur misskilt tekstin, er retoriskur, og í honum liggur ein speisk rødd, sum er ein lýsing av tí *persona*, sum Andrias Justesen setir fram í tekstinum; av hansara serstøku rødd í ummælinum, sum ikki líkist nakrari aðrari, men er við til at lýsa hann sum sermerktan ummælara.

Hesin *persona* trínur eisini á pallin, tá hann við myndamáli setir orð á harðan kritikk av sjónleikunum hjá Steinbjørn B. Jacobsen við at taka orðingar burtur úr skaldskapinum hjá honum um, at tann føroyski veruleikin er sum aldan: upp og niður, upp og niður og nýtir hesa somu myndina til at meta um bókina: „Hesin føroyski veruleiki er eisini galdandi fyri bókina „HÚSIÐ o.a. smátt“; men aldurnar gera lítið brim“ (Justesen 1997b). Hetta er dømi um eitt retoriskt stíltak, har hann letur myndamál orða tann hvassasta kritikkin av bókini, so hann kanska ikki tykist so ógvisligur. Men kritikkurin kann ikki misskiljast; talan er um eitt verk, sum ikki hevur stóran týdning. Hesin sermerkti stílur hjá Andriasi Justesen skapar eina eind afturat í tekstinum, eina eind, sum er ein pallsettur *persona*. Skrivistílurin gloppar dyrnar fyri hesum *persona* at trína á pallin eisini í viðgerðini av persónslýsingunum hjá Steinbjørn B. Jacobsen, har Andrias Justesen setir eina religiøsa mynd av høvundinum fram sum einum skapara, ið hevur møguleika at blása lívsanda í sínar persónar: „bert partvís eydnast høvundinum at blása lívsanda í persónarnar“ (Justesen 1997b).

Hesin *persona* er neyvan ein tilætlað roynd hjá ummælaranum at skapa sær myndugleika í tekstinum, men hann veksur fram í einari sermerktari rødd, sum ikki nýtir metamál til at grundgeva fyri sínum rætti at ummæla skaldskap, men skapar eitt natúrligt álit í skrivingarlagnum. Hetta er ein háttur óbeinleiðis at skapa sær myndugleika í tekstinum, sum kann setast í samband við tann myndugleika, høvundar verða hildnir at hava at meta um tekst, tí teir sjálvir duga handverkið at skriva (Furuseth 2015:40). Andrias Justesen er ikki rithøvundur á tann hátt, sum hetta sipar til, men hann vísir í ummælinum hegni at skriva, og tað kann óbeinleiðis skapa myndugleika í tekstinum.

Andrias Justesen skapar sær eisini myndugleika beinleiðis í tekstinum við at vísa førleikar at seta tað ummælta verkið í frásjón bæði við at kenna til ritverkið hjá høvundinum og við at megna at seta tað í samband við tekstslag og bókmentalig rák. Hann samanber Elina Mortensen við Barbaru Cartland (Justesen 1997a), og hann vísir til, at *Skipið* hjá Steinbjørn B. Jacobsen er skrivað við sama staðaravmarkandi teknikki, sum er nýttur í „Húsinum“ í bókini, sum hann ummælir (Justesen 1997b).

Í ummælinum av skaldsøguni *Losi tann fyrsti* eftir Ólav í Beiti nevnir Andrias Justesen, at útgávurnar hjá Ólavi higartil nærkast játtanarbókmentum. Hann sigur skaldsøguna vera eina lítla framtíðarskaldsøgu, ið tó ikki kann bólkast sum science fiction í vanligari merking, men meira sum satirisk keipumynd av tí politiska veruleikanum í Føroyum (Justesen 1997c). Her skapar Andrias Justesen sær myndugleika við at vísa, at hann umframt at kenna til ritverkið hjá Ólavi í Beiti og kann seta bókina í samband við tað, eisini kennir til tekstsløg, streymar og rák í bókmentafrøðini, sum hann fær bólkað hansara skaldskap undir.

Í ummælinum av yrkingasavninum *Orð og andlit* hjá Sigri Gaïni vísir hann longu í fyrsta setningi á, at hann kennir føroyska útgávusøgu. Hann sigur, at Sigri er komin upp í tann lítla skaran av kvinnum, sum hava givið út yrkingasavn á føroyskum. Harafturat sigur hann yrkingasavnið hava eitt óføroyskt yrkingalag, tí eingin ytri heimur verður lýstur, eingin náttúra er, og so gott sum eingi ítøkilig fyribrigdi verða nevnd. Hann vísir á, at egið er miðdepil í yrkingunum, og at tíðin er miðstatt hugtak gjøgnum savnið. Hetta knýtir hann at heimspekinginum Bergson og leggur soleiðis aftur at sínum myndugleika

við at perspektivera til heimspekina, sum hann heldur seg hóma ein feril av í yrkingunum, eftir at hann longu hevur víst, at hann kennir føroyska útgávusøgu og yrkingarhættir. Hann tekur dømi úr tekstinum og grundgevur fyri sínum perspektiveringum, og tá hann í sama viðfeingi eisini vísir á ymiskar tulkingarhættir, er hetta við til at geva ummælaranum trúvirði og skapa myndugleika (Justesen 1997d). Andrias Justesen nýtir ikki nógv fakheiti fyri at styðja undir sín myndugleika, men tosar t.d. um arketypu (Justesen 1997b).

Andrias Justesen nýtir ikki metamál í sínum ummælum og tykist ikki hava tørv á at rættvísgera sín leiklut sum ummælari. Hann vísir tó, at hann er tilvitaður um tann leiklut, sum hann hevur, tá hann sigur: „lesarin skal eiga til góðar hvussu leikur síðani fer" (Justesen 1997c), sum fyri at vísa medvit um, at hann sum ummælari ikki eigur at oyðileggja lesiupplivingina hjá lesaranum við at siga ov nógv. Hann vísir eisini eina fatan av týdninginum hjá øðrum liðum í bókmentaringrásini, tá hann í ummælinum av Sigri Gaïni rósar forlagnum Fannum, sum hann nú sigur vera vorðið eitt av teimum frægastu á sínum øki (Justesen 1997d).

Samanumtikið vísa ummælini, at Andrias Justesen er akademiskt skúlaður í bókmentalestri. Hann hevur vitan um ummælið sum journalistiskt tekstslag og heldur seg innan teir karmar, sum verða lýstir í ástøði um form og innihald í ummælum. Hann skapar sær myndugleika í tekstinum og vinnur sær við hesum mentanarligan kapital og harvið vald at skilmarka, hvat góðar bókmentir eru. Hetta ger hann við hegni til neyvlestur og evnum at perspektivera. Hann ger lítið av at lýsa egna lesiuppliving, men metir um skaldskapin út frá fakligum kriterium. Kriteriini taka støði í grundleggjandi fatan av tekstsløgum sum, at skaldsøgur skulu ikki hava leysar træðrir, men skulu hanga saman, dialogurin skal vera realistiskur og ikki pedagogiskt lærandi í ávísum talumáli, og persónar skulu „hava lív". Hann skapar eitt *ethos* í tekstinum, sum hevur trúvirði, og sum skapar álit í lesaranum.

Andrias Justesen hevur sín sermerkta stíl, sum sæst aftur í einum løttum og viðhvørt speiskum tóna, og hetta gloppar dyrnar, so ein *persona* kann trína á pall, ein persónur við einum skrivistíli, har myndamál og ein kontantur dómur, sum tó er fakliga grundaður og settur fram við varsemi og virðing fyri tekstinum, seta dám á tekstin. Andrias Justesen tekur sær frælsi til at laga tónan í ummælunum eftir tekstinum, sum hann ummælir, og vísir fjølbroytni í ummælunum, hóast hann fylgir einum føstum formi. Tað kann eisini síggjast sum eitt slag av bókmentaligari smittu[40], at hann er speiskur, tá hann ummælir speiskan høvund (Justesen 1997c).

Andrias Justesen er dømi um tann akademiska, bókmentaliga skúlaða útisetaummælaran, sum hevur sans fyri journalistiskum meginreglum. Hóast ummælini verða nýtt sum amboð at miðla list, geva tey rúm fyri málsligari skapan, sum gera tey skyld við tær skapandi listirnar. Andrias Justesen er eisini dømi um ummælara, hvørs virksemi fellur saman við blómaskeiðinum, sum føroyskt ummælaravirksemi í útisetu hevði árini 1997-2007[41]. Hann ummælti fast í *Føringinum* og hevði eina greiða og týðiliga ummælararødd, sum – fyribils í øllum førum – fór í søguna við útisetablaðnum. Hann stendur tí eftir sum ein ímynd av útisetaummælaranum, sum hevði sín týðandi leiklut árini 1997-2007 at halda føroyskt ummælaravirksemi virkið í einari kreppuraktari tíð. Sæð í ljósinum av tí, sum Arnbjørn Ó. Dalsgarð sigur um leiklutin hjá *Føringinum* sum mentanarslóðandi blaði[42], verður Andrias Justesen partur av hesum slóðandi ráki, sum var við til at leggja eitt støði fyri føroyskt ummælaravirksemi og mentanartilfar í føroyskum bløðum í tíðarskeiðinum.

Havandi í huga ummælaratypurnar hjá Hejlskov Larsen frá 1969[43], sum sambært John Chr. Jørgensen lýstu eitt skifti í ummælarastøðuni í Danmark, har farið var frá tí moralska ummælinum og til eitt innihaldsstýrt og nýggjari listfrøðiliga og formliga stýrt ummælaravirksemi (Jørgensen 1999:136-137), kunnu ummælini hjá Andriasi Justesen í *Føringinum* í tíðarskeiðinum 1997-2007 sigast at vísa, at hetta skifti eisini er farið fram í føroyskum ummælaravirksemi. Tá Andrias Justesen eftirlýsir natúrligan dialog og kritiserar orðfeingið hjá Ólavi í Beiti, umboðar hann tað nýggja ættarliðið í føroyskum um-

40 Sí kap. 4 um ummælið sum mimetiskt tekstslag.
41 Sí kap. 4 um ummælið sum leikari á tí bókmentaliga økinum.
42 Sí kap. 7 um samfelags- og miðlastøðuna 1997-2007.
43 Sí kap. 5.

mælaravirksemi, sum eg havi vísst á, at Jógvan Isaksen eisini ger[44], har málpolitiska áskoðanin á bókmentir ikki longur setir dagsskránna, men bókmentir verða mettar út frá innihaldsligum og formligum kriterium.

René Hjelm ummælir í *Dimmalætting*

Ein útisetaummælari í tíðarskeiðinum 1997-2007 er áðurnevndi bókmentafrøðingurin René Hjelm. Hóast hann ikki skrivaði nógv ummæli í hesum tíðarskeiði, hevur hann leiklut ikki bara sum ummælari, men eisini sum ritstjóri og mentanarmiðlari. Hann hevur búð og virkað tað mesta at sínum lívi í Danmark, og hann hevur royndir innan skrivligt samskifti og mentanarmiðlan, bæði úr Føroyum, Danmark og Týsklandi. Hann hevur ummælt og skrivað annað mentanartilfar og var ritstjóri á lestrarblaðnum hjá Meginfelagi Føroyskra Studenta, *Fjølni*, árini 1996-1998 og á bókmentatíðarritinum *Braga* (1999-2002), ið var útisetarit. Hann er framvegis virkin á sínum egna bloggi[45]. Hann hevði tvey ummæli í *Skáa* hjá *Dimmalætting* í tíðarskeiðinum 1997-2007, annað av stuttsøgusavninum *Pílagrímar* (2001) eftir Hanus Kamban, og hitt av stuttsøgusavninum *Mjørki í heilum* (2001) eftir ymsar høvundar, ið er úrslit av stuttsøgukapping, sum Listastevna Føroya 2001 skrivaði út. Bæði ummælini eru skrivað í 2001 og vísa ein akademiskan ummælara, sum gongur upp í ummælarastarvið. Hann undirbyggir tað, sum hann sigur, við nógvum tilvísingum, og hevur valt at skriva ein námsfrøðiliga eggjandi stíl. Ummælini eru long, og ummælarin fer í dýpdina við lesingini. Tey kunnu ikki sigast at vera journalistisk og lagað til ein miðil, sum krevur, at tú orðar teg stutt, eins og ummælini hjá Andriasi Justesen í *Føringinum* eru.

Í ummælinum av *Pílagrímum* eftir Hanus Kamban skapar René Hjelm sær myndugleika við at festa ummælta bókmentaverkið djúpt í eina breiða vitan um bókmentir. Hann perspektiverar til pílagrímarnar í *The Canterbury Tales* (1476) hjá Chaucer og vísir innlit í hetta bókmentaverk. Hann setir tittulin á bókini í samband við søguna „Tann hvíta mannin" og endursigur innihaldið í henni. Hann

44 Sí kap. 7 um ummæli í útisetu.
45 Sí https://renehjelm.wordpress.com/ (25.10.2020).

perspektiverar við at samanbera við søgur frá romantikkini og við at seta í samband við Freud. Hann vísir á, at talan er í víðari merking um gotiskan stíl og vísir til gotisku eyðkennini. Hann vísir eisini til, at tað eru fantastisk drøg í søguni og nevnir magiska realismu og tekstasamband til *Les Misérables*. Hann metir eisini um søguna, sigur hana vera frálíka og grundgevur millum annað við, at hon kílar seg inn ímillum møguligar tulkingar. Her sæst tann hugburður til skaldskap, at hann er góður, tá hann er margtýddur.

René Hjelm bólkar søgurnar í *Pílagrímum* sum realistiskar søgur við magiskum og fantastiskum drøgum, kærleikssøgur, samfelagsatfinnandi søgur, modernistiskar søgur, hann tosar um psykologiska realismu og vísir á, at myndamálið er samansett og virkar í ymiskum fláum, bæði við myndburði, metonými og sálarkveiking, og hann perpektiverar við at vísa til tekstasamband við William Blake og Baudelaire. Hann lýsir bygnaðin í søgunum og vísir, hvussu hann inniheldur ein part av boðskapinum. Hann grundgevur við einari søgu fyri hesari útsøgn og sigur hana vera vakra, sorgblíða og kenslunemandi. Her kemur lesaraupplivingin fram, sum kortini ikki fyllir so nógv í ummælinum. René Hjelm kritiserar, at tað í onkrari søgu eru bókstavarím, sum órógva, so lesarin dettur burtur úr søgugongdini. Hann kritiserar søguna „Fortuna", tí har hendir ikki nógv. Hon er samrøða millum tveir persónar, sum kundi verið framførd á palli. Hann heldur søguna vera heldur grunna, men rósar kortini Hanusi Kamban fyri, at samrøðan riggar, og at persónarnir hava serdrøg. Her síggjast nøkur metingarkriterii óbeinleiðis lýst í ummælinum: at søgugongdin skal hanga saman, at samrøðan skal hanga saman og persónarnir hava serdrøg.

René Hjelm hevur sín egna stíl. Hann er akademiskur á tann hátt, at hann vísir til sera nógv bókmentafrøðilig hugtøk, og hann vísir, at hann er hollur lesari. Hann viðger bygging, myndamál o.a. í tekstinum, er væl lisin og setir søgurnar í samband við heimsbókmentirnar. Hansara sermerkti stílur kemur til sjóndar í endanum á ummælinum, tá hann tosar um seg sjálvan í triðja persóni. Tað er eitt slag av pallseting, tá hann sigur, at ein av stuttsøgunum var ummælt í bløðunum, áðrenn savnið kom út í sambandi við stuttsøgukappingina, sum Listastevna Føroya 2001 skrivaði út:

> Og harafturat er hon eisini longu ummæld í *Dimmalætting* í oktober – av René Hjelm. Hann sigur m.a. um høvuðspersónin Liselott: „Sálarliga lýsingin av henni er ógvuliga sannførandi og livandi." Men eg havi hug at skoyta uppí (Hjelm 2001b).

Við at umtala seg sum René Hjelm og siga seg hava hug at skoyta okkurt upp í orðini hjá honum, skapar hann eitt glopp í tekstinum millum eitt *ethos*, sum er *eg-ið í tekstinum*, og so ein *persona*, sum er umboðaður við navninum René Hjelm. Hesin skriviháttur hevur ikki einki í felag við pallsettu samrøðuna millum Hugin Eide og Ivan Niclasen, sum eg komi inn á í næsta broti (Niclasen og Eide 2000b), har René Hjelm trínur inn á pallin mitt í ummælinum av yrkingasavninum *Guru* (1999) hjá Peturi Pólsson.

Í ummæli sínum „Mjørki í heilum, men klárt í støðum" av stuttsøgusavninum *Mjørki í heilum* viðger René Hjelm tær søgurnar, sum vunnu 1., 2. og 3. virðisløn, og tær av hinum, ið hann heldur vera bestar. Í hesum úrvali liggur ein virðismeting. Hann greinar eins og í ummælinum av *Pílagrímum* innihald og bygnað sum eina samanhangandi heild og greinar tekstin neyvt. Hann neyvlesur tekstin og kann sigast at lesa tekst við nýkritiskari fyrimynd, hóast hann eisini altíð vísir út um tekstin og til samband við annan skaldskap. Hann lýsir søgurnar í bókini við at bólka tær sum realistiskar søgur, mytiskar søgur, fantastiskar søgur, metasøgur o.s.fr.

René Hjelm tekur ta vinnandi søguna „Angels Place" hjá Hanusi Kamban fram og sigur hana vera snøgga og væl skrivaða. Her eins og í ummælinum av *Pílagrímum* skapar René Hjelm sær myndugleika við at vísa hegni til neyvlestur og at perspektivera til bókmentaligar fyrimyndir og rák. Hann vísir kunnleika til skaldskapin hjá Hanusi Kamban, tí hann ber temu í „Angels Place" saman við annað, sum hann skrivaði í 1980-árunum.

Hann vísir til Cervantes, Borges og Kafka í søguni hjá Meinhardi Jensen „Login í hellinum undir kaffistovuni". Virðisdómurin er ein natúrligur partur av heildini í ummælinum, men tað er viðgerðina og perspektiveringina, dentur í mestan mun er lagdur á.

René Hjelm lesur akademiskt og hevur nógvar tilvísingar til tekstsløg, rák, aðrar høvundar og ritverkið hjá ummæltu høvundunum.

Hann kritiserar og kemur í viðgerðini av hvørjari søgu við einum boði uppá, hvat kundi verið gjørt øðrvísi og hevur her sostatt eisini leiklut sum ein konstruktivur ummælari. Hann tosar eggjandi til dømis um Oddfríð M. Rasmussen og sigur, at hann fer nokk at koma við nógvum spennandi í framtíðini. Vit bíða spent, sigur hann. Í ummælinum av søgusavninum *Mjørki í heilum* sæst í mun til ummælið av *Pílagrímum* eftir Hanus Kamban eisini tilvitið um, at hann ummælir yngri og kanska viðkvæmari høvundar og debutantar.

Eisini í hesum ummælinum eru metaviðmerkingar um tað at ummæla:

> Jú, tað vantar í hjá øllum av hesum spírunum. T.d. er handverkið ikki nóg gott, og harumframt kann málsliga hugflogið mennast nógv. Og mangt afturat. Men gott er – danski ummælarin og rithøvundurin Tom Kristensen hevur jú lært okkum, at „Ein skal ongantíð traðka á einum dunnuunga – hann kann vísa seg at verða ein svanur." (Hjelm 2001a).

Hetta er eitt slag av verju hjá ummælaranum, sum kanska ikki heldur seg hava verið nóg harðan í dóminum, og tað kann eisini lesast sum eitt slag av verju, har ummælarin vísir, at hann er tilvitaður um sín leiklut sum ummælari.

Samanumtikið eru hesi bæði ummælini hjá René Hjelm dømi, sum stinga burtur úr mongdini sum akademisk ummæli í tíðarskeiðinum 1997-2007, har ummælarin vísir, at hann er tilvitaður um sín leiklut sum ummælari og vísir sínar førleikar við at byggja síni orð á nógvar tilvísingar. Hann er tilvitaður um tað vald, hann sum ummælari og ritstjóri við mentanarligum kapitali kann væntast at fáa tillutað. Hetta endurspeglast t.d. í tilvísingini til kenda og virda ummælaran Tom Kristensen. Við orðum Kristensens letur ummælarin ivan koma ungu rithøvundunum til góðar, tí teir kunnu vísa seg at mennast, og ummælarin skal vara seg fyri at køva spíran, áðrenn hann er komin fyri seg. Orðini hjá Kristensen kunnu eisini lesast sum, at ummælarin viðurkennir sítt egna viðbrekni. Ein skundislig hørð meting kann skjótt venda aftur og grava undan myndugleikanum

hjá ummælaranum, um tað seinni vísir seg, at tann lítilsvirdi gerst ein viðurkendur rithøvundur.

René Hjelm hevur eina dagsskrá umframt tað at ummæla. Henda dagsskrá endurspeglast meira og minni í øllum ummælum hansara, bæði hesum báðum nevndu, og tí, sum eg komi til í næsta broti, har hann er partur av eksperimenterandi ummæli í *Braga*, sum hann sjálvur ritstjórnar. Dagsskráin er at seta fram sína hugsan um ummælaravirksemi og at tala fyri, at tað er umráðandi at ummæla og at ummæla rætt ella væl. Hann sigur: „Men eg haldi eisini, at tað er umráðandi at viðfara øll yrkingasøvn rættvíst og sakliga, at leita eftir teimum (røttu) fortreytunum, sum yrkingarnar kunnu lesast á“ (Niclasen og Eide 2000b).

Ummælið sum samrøða – formliga eksperimenterandi ummæli í *Braga*

Eg havi í ritgerðini viðgjørt ummælið sum relatiónir millum menniskju og hetta, at eitt ummæli, tá til stykkis kemur, er byrjan til eina samrøðu[46]. Í útisetaritinum *Braga* eru tvey ummæli, sum eru áhugaverd formliga, tí tey eru sett upp sum samrøða millum tveir ummælarar, sum sínámillum, í teldupostasamskifti, viðgera eina nýútkomna bók. Tað eru teir báðir áðurnevndu Ivan Niclasen og Hugin Eide, sum samskifta. Hesin áhugaverdi eksperimenterandi formurin tekur óbeinleiðis upp evnið um ummælið sum samskiftisliga gerð og spælir sær við tekstslagið. Hugin Eide og Ivan Niclasen sýna her annan hátt at ummæla í føroyskum høpi, har kjak longu er partur av fyrstu lesing. Ummælini hava sterka metatekstliga dimensión, har tað at ummæla í Føroyum verður tikið upp og kritiserað.

Tað fyrra ummælið er um yrkingasavnið *Speispei Spei* (1999) eftir Tórodd Poulsen og er skrivað sum samrøða millum Ivan Niclasen og Hugin Eide. Teir kenna ummælisgenruna, men bjóða henni av í hesum eksperimenteradi forminum. Teir átaka sær hvør sín leiklut í samrøðuni[47], og tað verður eisini tilskilað í byrjanini, at annar er „ein forsyndaður lesari“ og hin „ein meiri sinniligur og yrkingavandur akademikari“, og teir hava havt teldubrævaskifti um nýggjasta savnið hjá Tóroddi Poulsen. Teirra leiklutir í ummælinum eru soleiðis skilmarkaðir frammanundan, og teir umboða tvey ymisk sløg av lesarum við sínum sjónarmiðum. Lýsingin av teimum báðum sæst eisini aftur í ummælinum, har annar er opin og „forsyndaður“, meðan hin er sinniligur.

Hugin Eide er argur um, at Tóroddur Poulsen blívur við í sama spori at venda øllum á høvdið. Hann sigur, at hann helt seg hóma eina hurð inn til yrkjaran í bókini *Sót og søgn* (1997), men so var ikki. Ivan Nicalsen skilir tað, sum Hugin Eide sigur, men svarar aftur við einari mynd av høvundum, sum hava skrivað leingi, har summir ganga á høvuðsvegnum og aðrir á síðugøtunum. Hann ivast ikki í, at Tóroddur Poulsen er fullgreiður um ta poetisku verkætlan, sum hann er í gongd við, og tað er trupult ikki at hava virðing fyri tí, tá hann so staðiliga tvíheldur um hesa verkætlan. Hugin Eide heldur fast í myndina hjá Ivani Niclasen og sigur, at Tóroddur Poulsen má ansa eftir, at síðugøtan ikki gerst ein blindvegur.

Tað, sum er so áhugavert við hesum forminum, er, at tað fyrsta aftursvarið til útsøgnina um savnið hjá Tóroddi Poulsen er longu komið, tá lesarin fær tað, og tað ynskta kjakið um bókmentir er longu byrjað. Hetta kjakið snýr seg um, hvat bókmentir skulu vera. Skulu tær vera almennar og røkka einum breiðum lesaraskara, ella skulu tær vera smalar og halda til á síðugøtunum, har ikki nógv fólk møtir teimum og skilir tær?

Ivan Niclasen kemur inná, at tað hevur týdning, at lesarin sigur frá, hvat honum dámar, at hann sigur sannleikan. Men ein trupulleiki, sum vit hava í Føroyum, er, at lesarin bara sigur sína hugsan, tá ein bók er góð. Hann kritiserar føroyskar mátar at meta um góðsku, har orð sum: „hampuligt“ „ikki so galið“ o.s.fr. verða nýtt. Hann sigur, at tað eru ein til tveir ummælarar í Føroyum, sum siga sína hugsan, og nakrir einstakir uttanlands, og tað er ikki nógv, tá hugsað verður um alt, sum kemur út á føroyskum.

Hugin Eide hálsar at enda um og heldur, at teir mugu ansa eftir, at alt ikki verður tað bera knarr, og so tekur hann onkrar góðar yrkingar í savninum hjá Tóroddi Poulsen fram. Hann siterar og tekur eina reglu fram, sum eftir hansara hugsan er á topp-10-listanum yvir

46 Sí kap. 4 um ummæli sum relatiónir millum menniskju.

47 Hetta merkir ikki, at teir ikki eisini standa fyri teimum sjónarmiðum, sum teir hvør í sínum lagi leggja fram, men í heildini av ummælunum tykist tað vera týðiligt, at talan er um avtalað spæl.

føroyskar lyrikkperlur, og tekur onkra aðra fram, sum hann heldur vera reint møsn. Hann nýtir sostatt sitatini til at grundgeva fyri góðsku og vantandi góðsku. Teir kjakast um góðsku, og Ivan Niclasen sigur: „Jú, vit eiga at vænta okkum tað – kvalitet altso. Haldi eg. Men hinvegin: ... Tað at lívið av og á trínir [sic] inn í tekstin við øllum sínum banaliteti kann sostatt ikki vera óvæntað“ (Niclasen og Eide 2000a). Hetta líkist kjakinum, ið var frammi í sambandi við tað stóra, men „misjavna avrikið“ hjá Hans Andriasi Djurhuus, sum Chr. Matras samanbar við ein ágrýtnan, men óvandnan berjahentara. Hann hentaði so nógv við, ið hevði verið í nánd av berum, men ikki var ber. Chr. Matras kallaði hetta posamat og eftirlýsti bókagrunn, sum kundi ritstjórna, so ikki so nógv mold og grót var millum berini (Matras 1936). Páll Paturson svaraði aftur, at ein, sum kritiseraði Hans Andrias Djurhuus fyri hetta, mundi ikki vita, hvat posamatur hevði havt at siga fyri føroyingar (Patursson 1937). Eisini William Heinesen segði sína hugsan: „hann ikki bert yrkir um lív og deyða, um gleði og sorg, men um alt og øll, og at taka hann til rættis fyri hetta kenst undarliga fáfongt; tú kanst líka so gott hava at einum sangfugli, at hann altíð syngur og ikki av og á ger seg stórbæran og tigur“ (Heinesen 1937). „Lívið við sínum banaliteti“ hjá Ivani Niclasen kann berast saman við „posamatin“, sum Chr. Matras nevnir, og kjakið snýr seg í báðum førum um, hvørt bókmentir skulu vera hábókmentir, ella um tað gerandisliga ikki eisini kann ella eigur at vera ein partur av skaldskapinum.

Í kjakinum um posamat ber til at síggja kjarnan í kjakinum, sum hevur fylt so nógv í umrøðuni av føroyskum bókmentum: hetta, at ummælarar hava havt lyndi til at virðismeta alt, sum er føroyskt, bara tí tað hevur verið so lítið av føroyskum tilfari. Posamatur sipar til tað, sum svangir biddarar fingu, tá teir gingu hús úr húsi, og orðatakið sigur, at posamatur er ódrúgvur, so hugtakið hevur verið nýtt í negativari merking sum okkurt, ið er skjótt horvið. Soleiðis sum Páll Patursson nýtir hugtakið, fær tað positiva merking sum okkurt, ið er nógv betri enn einki hjá tí, sum er svangur. Ummælið endar við speisku viðmerkingini „ikki so galið“, sum vísir aftur til hetta, at føroyingar hava so ilt við at kritisera (Niclasen og Eide 2000a).

Tað seinna ummælið er enn meira serstakt og eksperimenterandi, tí her kemur ein triði limur inn í samrøðuna. Ummælið eitur „Nú søkka vit!“ og er um yrkingasavnið *Guru* hjá Peturi Jensen (nú: Pólsson). Eisini hetta ummælið er sett upp sum ein samrøða millum teir báðar Ivan Niclasen og Hugin Eide. Teir eru hesa ferð samdir um, at yrkingasavnið ikki er gott, og teir halda ikki, at Sprotin skuldi havt givið tað út, tí tað er so óliðugt. Teir eru milt sagt ikki hugtiknir av savninum og fara so langt sum at siga, at hetta er ikki yrkingar, men okkurt slag av rannsakan, sum ung fólk skriva, og sum menniskju flest munnu hava í skuffuni frá ungum árum. Teir spyrja, um ein slíkur tekstur yvirhøvur eigur at verða viðgjørdur í einum tíðarriti sum *Braga* og boðsenda ritstjóranum René Hjelm, sum síðani trínur inn í samrøðuna: „To be or not to be ... a Guru. Eg kenni meg í hvussu so er sum eina kenguru, tá tit soleiðis knappliga bjóða mær at vera special guest í ummailinum hjá tykkum“ (Niclasen og Eide 2000b). Her kemur ein skemtiligur tóni inn við kengurumyndini og orðaspælinum ummæli – „ummail“, tí samrøðan er ein teldupostsamrøða, og ritstjórin svarar, at *Bragi* eigur at ummæla og viðgera so nógv sum til ber, so lesarin finnur metingar og viðgerðir av so stórum parti av føroyskum skaldskapi sum gjørligt, tí tað verður ummælt ov lítið í Føroyum. Men er so einki mark, spyr hann retoriskt:

> Jú, tí hóast vit bert áseta markið við støði í t.d. *hvat* og hvussu *nógv*, ið verður ummælt, ja, so er jú kortini eyðsæð at summi fáa meira umrøðu enn onnur í *Braga*. Men harvið er tó ikki alt sagt, tí meira umráðandi er, *hvussu* ummælt verður, heldur enn *hvat* verður ummælt (Niclasen og Eide 2000b).

Eftir hesa útsøgn yvirtekur ritstjórin ummælið, sum eisini endar við orðunum „Blíðar heilsur (ritstjórin)“. Ummælið skiftir her fullkomiliga kós. René Hjelm heldur fram at tosa um, hvussu ummælt eigur at vera, og her kemur hann inn á hetta, at ummælarar eiga ikki at draga tekstir inn í sín hugaheim, men at lesa tekstir út frá teimum treytum, sum teksturin setir:

> tað er umráðandi, at vit viðfara øll yrkingasøvn rættvíst og sakliga, at leita eftir teimum (røttu) fortreytunum, sum yrkingarnar kunnu ella skulu lesast á. Vit skulu ikki bert toga *Guru* inn í okkara hugaheim,

> men eisini lata yrkingarnar sjálvar sleppa til orðanna. Gera vit ikki tað, sigur ummælið beinanvegin mest um okkum sjálvi, og minst um yrkingarnar. Og lesarin verður við sviðið soð (Niclasen og Eide 2000b).

Hetta ummælið verður eitt dømi um, hvussu ymiskir hesir báðir lesihættir, sum hann nevnir, eru; hvussu ymiskt teir fáa burturúr, og hvussu ymiskt teir døma um tekstin, tí nú vísir René Hjelm á, hvussu hann hevur lisið *Guru*, og innlivingin í tekstin er ein heilt onnur og dómurin ein heilt annar enn tann, sum Hugin Eide og Ivan Niclasen eru komnir fram til.

René Hjelm sigur, at hann eisini helt *Guru* vera „puberterar klichéir" og banalar mótsetningar eins og Hugin Eide og Ivan Niclasen, men hann sigur, at *Guru* er grundað á heilt aðra poetiska verkætlan, enn vit vanliga síggja í føroyskum skaldskapi, so her og har fæst okkurt burturúr, um vit nýta rætta lykilin. Og hann heldur, at ein lykil í lesingini er orðið *camp* og ein annar er orðið *avbygging*. René Hjelm knýtir yrkingasavnið hjá Peturi Pólssyni til enska skaldið P. B. Shelley (1792-1822) og tann sjálvhátíðarliga og ósmædna dámin, sum hann setti fram í *A Defence of Poetry*. René Hjelm spyr retoriskt, sum tað kann hugsast, at *Guru* ger gjøldur burtur úr tí romantiska yrkjaranum, og at savnið roynir at avbyggja guruhugtakið. Hann heldur endamálið hjá *Guru* vera antiautoritert. Perman vitnar um sjálvspei, og hetta ber til at tulka sum *camp*. Hann heldur, at Susan Sontag hevði elskað permuna, um hon enn hevði somu hugsan, sum hon hevði í ritinum „Against Interpretation". Niðurstøðan hjá René Hjelm eftir drúgva viðgerð er, at henda guruin hjá Peturi Pólsson er ein dekonstruktiv guru, sum mælir okkum frá at trúgva autoritetum.

Eftir stendur ummælið sum eitt sera áhugavert eksperiment, ið vísir á, hvussu ymisk ummæli eru og tað umráðandi í at ummæla út frá treytunum, sum teksturin setir. Í hesum pallsetta kjaki um bókmentir og ummæli verður lesarin fluttur frá einum hugsanarhátti til ein heilt annan. Hetta er ein áhugaverdur stílur, sum ikki er óvanligur t.d. í útvarpi, har kjakast verður um list. Vit kenna hann aftur frá *Kvørnini* í Útvarpi Føroya, men í skrivaðum ummælum er hann óvanligur.

Hetta er eitt gott dømi, sum vísir á týdningin av fleiri røddum og vandan við einum einsamøllum myndugleika.

Hyggja vit at, hvussu *ethos* verður sett fram her, so ber til at síggja sambandið millum eitt persónligt *ethos* og eitt stovns-*ethos* í hesum tekstinum, har eitt persónligt *ethos* er umboðað av Ivani Niclasen og Hugini Eide í tekstinum, og eitt stovns-*ethos* er umboðað av blaðstjóranum René Hjelm, sum tekur yvir og setir dagsskránna ikki bara fyri, *hvat* skal ummælast í hansara blaði, men eisini *hvussu* ummælast skal. Og hyggja vit at, hvussu hesir tríggir ummælararnir skapa sær myndugleika í tekstinum, so er stórur munur á, tí René Hjelm trínur í ummælinum av *Guru* hjá Peturi Pólsson inn sum akademikarin, ið skapar sær myndugleika við at nærlesa við hegni, við at vísa til bókmentalig rák og síggja tann stóra bókmentaliga samanhangin, og hann fær bókstavliga seinasta orðið í ummælinum. Tí ber eisini til at siga, at tann yvirskipaði hugburðurin í tekstinum er nær knýttur at tí *ethos*, sum René Hjelm stendur fyri, tó at tríggjar ymiskar hugsanir fáa rúm í ummælinum.

Hetta ummælið er eitt gott dømi um, at tá til stykkis kemur, er ummælið samskifti millum menniskju, sum Nøjgaard, Skyum-Nielsen og Rösing v.fl. hava víst á[48]. Skoða vit hetta ummælið frá sosiologiskum sjónarhorni, lýsir tað væl hugsanirnar hjá Bourdieu um, at tað er tann, sum hevur tann mentanarliga kapitalin, ið hevur vald at skilmarka, hvat góðar bókmentir eru. Í hesum føri er tað René Hjelm. Hann hevur her hægsta myndugleika fyri tað fyrsta, tí hann er skúlaður innan bókmentir, fyri tað annað, tí hann er ritstjóri á blaðnum og hevur vald sum duravørður, og fyri tað triðja, tí hann kennir og meistrar ta mentanarligu kotuna: hann hevur tær góðu grundgevingarnar og kann seta tekstin í samband við heimsbókmentir, bókmentalig rák úti í heimi o.s.fr.

Sum ummælari vísir René Hjelm seg her sum ein, ið metir list út frá evnum at bróta upp úr nýggjum; ein, ið tekur støði í tí kenda og siðbundna, men brýtur normarnar og avbyggir. Hetta ger hann skyldan við avantgarduna. Formliga leggur ummælið seg eisini upp at hesum bókmentahugsanum, soleiðis at bókmentarákið og um-

48 Sí kap. 4 um ummæli sum relatiónir millum menniskju.

mælararákið fylgjast hond í hond sum eitt slag av bókmentaligari smittu.

René Hjelm er tí gott dømi um útisetan í tí týdninginum, sum hann søguliga hevur havt fyri føroyskar bókmentir. Hann er tann akademiski ummælarin. Hann sær tær stóru linjurnar, hann er rótfestur í tí stóra bókmentastovninum, sum kann føra nakað inn í tann lítla. Hugsa vit um føroyska bókmentastovnin sum ørlítlan, „ultraminor“, eins og Bergur Rønne Moberg lýsir hann, ber til at siga, at René Hjelm, sum rótfestur í tí lítla danska bókmentastovninum – „minor“ – er við til at lyfta tann ørlítla bókmentastovnin við at seta bókmentirnar í samband við „major“, tann stóra bókmentastovnin, við evropeiskar bókmentir og heimsbókmentir.

Útisetaummælarin Jógvan Isaksen ummælir í *Sosialinum*

Jógvan Isaksen hevur nógvar leiklutir á tí føroyska bókmentapallinum. Hann er bókmentafrøðingur, universitetslektari, bókaútgevari, ritstjóri, rithøvundur og ummælari. Í hesari ritgerð verður hann flokkaður sum útisetaummælari. Umframt at hann alla sína starvstíð hevur verið staðsettur í Keypmannahavn, hevur hann fleiri ferðir víst á teir fyrimunir, hann hevur sum ummælari í útisetu. Hann nevnir í fleiri førum hesa funktión sum beinleiðis orsøk til, at hann hevur hildið á sum ummælari frá tí, at hann byrjaði sítt ummælaravirksemi miðskeiðis í 1970-árunum.

Jógvan Isaksen byrjaði at ummæla í sosialistiska útisetatíðarritinum *Framanum* (1962-1984) („Bókadagarnir á breddanum“ 2014), og hann er framvegis virkin sum ummælari. Hann man vera virknasti føroyski ummælarin yvirhøvur, og hann hevur havt stóran týdning fyri útbreiðsluna av føroyskum bókmentum. Hetta sæst eisini í tíðarskeiðinum frá 1997-2007, tá hann skrivaði níggju ummæli í tíðindablaðið *Sosialin*, sum eg byggi mína greining á, umframt fleiri ummæli og bókmentaligar viðgerðir, sum ikki lúka treytirnar fyri at vera partur av hesari viðgerð. Hann fekk í 2006 Heiðursgávu landsins fyri sítt virksemi sum ummælari, ritstjóri, bókaútgevari og krimihøvundur. Hansara ummælaravirksemi var liður í grundgevingini fyri heiðursgávuni.

Jógvan Isaksen vísir, at hann er tilvitaður um sín leiklut sum ummælari, millum annað í tí, sum hann millum ár og dag hevur hugleitt alment um sín leiklut sum ummælari. Í samrøðu í *Sosialinum* í 2007 sigur hann, at hann neyvan hevði ummælt, um hann búði í Føroyum, tí at viðurskiftini eru so smá (Olsen, Theodor E. D. 2007:16), og hann hevur skrivað fleiri greinar um tað at ummæla (Isaksen 1988, 1999, 2000), har fokus ofta er hetta sama. Jógvan Isaksen leggur dent á, at orsøkin til, at hann hevur hildið fram at ummæla øll hesi árini, er, at hann hevur búð uttanlands og tí ikki hevur verið so nær teimum høvundum, sum hann hevur ummælt. Tá hugsað verður um teir ymisku leiklutirnar hjá Jógvani Isaksen sum ummælara, forleggjara og rithøvundi, so er hann, hóast hann býr burturfrá, kanska nærri høvundunum, sum hann ummælir, enn aðrir ummælarar, tí hann í mongum førum gevur bøkur teirra út. Hetta reisir spurningin um, hvat kann metast sum fjarstøða, og hvat nærleiki er í hesum høpinum. Jógvan Isaksen hevur eisini fingið kritikk fyri sínar mongu leiklutir á bókmentapallinum. Ólavur í Beiti hevur til dømis kritiserað, at Jógvan Isaksen sjálvur hevur givið bók út, ið hann sum limur í nevndini, sum tilmælir til Norðurlendsku bókmentavirðisløninа, hevur verið við til at tilmæla (Beiti 1998).

Tað er ikki óhugsandi, at kritikkurin frá Ólavi í Beiti er við til at fáa Jógvan Isaksen at skriva grein um at ummæla í Føroyum, har hann júst kemur inn á hetta ógegni, sum hann hevur, og at tað, sum Ólavur í Beiti eisini er inni á, neyvan hevði verið góðkent í øðrum londum. Her er Jógvan Isaksen í verjustøðu og setir orð á, hvat tað er, sum fær hann at ummæla, hóast alt í veruleikanum talar ímóti, at hann skuldi gjørt tað: lønin er lítil ella ongin, tað er lætt at fáa óvinir o.s.fr. Jógvan Isaksen leggur dent á, at fyri hann hevur tað at ummæla verið ein profession, ella eitt kall, og hann ger tað, tí hann trýr uppá, at tað er týdningarmikið, og at tað ger mun (Isaksen 2000). Við hesum virksemi, ið gevur lítla løn umframt hana, hann fær sum universitetslektari, vinnur Jógvan Isaksen sær tó mentanarligan kapital í tí føroyska almenninum; ein kapital, sum gamaní hevur lægri kurs enn tað vísindaliga virksemið á universitetinum, men hann er kortini ikki óbrúkiligur til at hækka hansara virði sum bókmentagranskari og hansara støðu sum tann, ið hevur vald at skilmarka.

Bergur Hansen (nú Rønne Moberg) sigur um Jógvan Isaksen, at hann í roynd síni at bøta hetta, sum hann aftur og aftur hevur nevnt, at tað verður so lítið skrivað um føroyskar bókmentir, hevur verið nærum alfevnandi. Hann sigur um hann, at hann meiri enn nakar annar hevur fingið føroyskar fagurbókmentir fram í almanna- og fjølmiðlaljós (Hansen 1993:242). Her spælir rúgvismikla ummælaravirksemið hjá Jógvani Isaksen ein stóran leiklut.

Jógvan Isaksen var við til at stovna tíðarritið *Brá*, sum føroyskir akademikarar í útisetu góvu út sum eitt alternativ til *Varðan* (Olsen, Theodor E. D 2007).

Í tíðarskeiðinum 1997-2007 ummælti Jógvan Isaksen debutantar og royndar høvundar, og hann ummælti týðingar, til dømis týðingarnar hjá Carl Jóhan Jensen og Eyðuni Andreassen av ávikavist C. S. Lewis og Roald Dahl í felagsummæli („Bardagin móti óreinskapi"). Hóast tað er rúgvismikið, sum Jógvan Isaksen skrivaði í bløðini um skaldskap í hesum tíðarskeiði, so er ein stórur partur av tí bókmentaviðgerðir og ummæli av skaldskapi, sum var útkomin so langt frammanundan, at tey ikki koma við í tað savn av ummælum, sum er grundarlag undir hesari ritgerð.

Jógvan Isaksen hevur givið fleiri bøkur út, har ummælini eru uppafturprentað, *Føroyski mentunarpallurin* (1983), *At taka dagar ímillum* (1988), *Var Kafka klaksvíkingur?* (1996) og *Dulsmál og loynigongir* (2008).

Tá *Føroyski mentunarpallurin* kom út, ummælti Martin Næs tey 27 ummælini í bókini í *Sosialinum*. Martin Næs vísir á, at meginparturin av hesum ummælum eru skrivað í tíðarskeiðinum1979-82, og at við hesum vísir Jógvan Isaksen, at hann hevur verið okkara virknasti bókaummælari hesa tíðina og hevur ummælt, um ikki alt, so ein stóran part av teimum upprunaligu fagurbókmentunum.

Martin Næs kritiserar ummælarastílin hjá Jógvani Isaksen. Hann sigur, at hann heftir seg ikki við umstøðurnar hjá bókmentunum, og at hann ger sera lítið burtur úr teimum málsliga, men viðger tær innihaldsliga. Summi av ummælunum eru ógvuliga positiv og onnur sera negativ, og tey eru bókmentaliga misjøvn til dygdar. Ummælini av bókunum hjá Jens Paula Heinesen eru væl skrivað, og tað sama kann sigast um ummælini av bókunum hjá Hanusi Andreassen (nú Kamban), Heðini Brú, Williami Heinesen og Chr. Matras, sum øll hava tað til felags, at tey eru framúr positiv. Tey eru næstan ein áhaldandi hálovan allan vegin ígjøgnum. Her verða eingi spurnartekin sett við nakað sum helst. Hinvegin, sigur Martin Næs, er ummælið av *Í Grønlandi við Kongshavn* eftir Magnus Dam Jacobsen dømi um ummæli, sum ikki bara er negativt, men eisini illa skrivað, og Martin Næs vísir á, at ein stórur partur av ummælinum er endurgáva av tekstinum hjá Magnusi Dam Jacobsen, sum ummælarin sigur er tað reina tvætl, ið ikki nýtist aðra viðmerking enn at verða endurgivin.

Martin Næs skrivar soleiðis, at ummælini hjá Jógvani Isaksen, sum eru positiv, eru væl skrivað, meðan tey, sum eru negativ, eru illa skrivað. Hann viðmerkir eisini, at Jógvan Isaksen ger ov lítið við at ummæla umstøðurnar kring bókaútgávuna og kritiserar, at hann kallar sína bók *Føroyski mentunarpallurin*, men ger júst einki við at viðgera mentanarpallin. Hann lýsir sambært Martini Næs júst bókmentirnar uttan at lýsa tær sum ein part av mentanarpallinum (Næs 1983).

Tað er áhugavert, at Martin Næs vísir á, hvussu ójøvn ummælini hjá Jógvani Isaksen eru í dygd, og at tað eru tey positivu ummælini, sum eru væl skrivað, meðan tey negativu ummælini ikki eru væl skrivað. Tað ber til at síggja henda ójavna sum eitt slag av bókmentaligari smittu[49], skilt á tann hátt, at tað er natúrligt, at ein tekstur, sum ummælarin er hugtikin av, inspirerar hann til at skriva, og øvut at ein tekstur, sum als ikki hugtekur, drepur allan kreativitet. Tað ber eisini boð um, at Martin Næs í sínari meting av „tí góða ummælinum" vil hava sakliga viðgerð og uppbyggiligan tóna.

Í teimum ummælum, sum Jógvan Isaksen skrivaði í 1997-2007, sæst bókmentalig smitta, sum júst í summum førum lyftir stílin í ávísum ummælum. Eitt gott dømi um hetta er ummælið av yrkingasavninum hjá Jóanesi Nielsen *Tey eru, sum taka mánalýsi í álvara* (2007), har málið hjá Jógvani Isaksen hevur eitt skaldsligt flog, sum ikki sæst í hinum ummælum hansara. Her tosar ummælarin um, at Jóanes Nielsen pikkar ella heldur dukar á dyrnar fyri at opinbera seg í savninum,

49 Sí kap. 4 um mimetiskt tekstslag.

og yvirskriftin „Jóanesar opinbering“ ber boð um eitt ummæli, sum er meira enn bara eitt ummæli av einari bók; tað er skaldsligt og hevur religiøsar undirtónar eins og skaldskapurin hjá Jóanesi Nielsen (Isaksen 2007c).

Ummælini hjá Jógvani Isaksen byrja ofta við ítøkiligum upplýsingum um útgávuna, sum verður ummælt: heiti á útgávuni, høvund, forlag og síðutal og møguliga prís. Síðani kunnar hann um høvundin og setir bókina í ein samanhang. Oftast verður bókin sett í samband við ritverkið hjá høvundinum, og er talan um debutant, ger hann vart við tað.

Jógvan Isaksen brúkar undiryvirskriftir, ofta tvær, tríggjar ella fleiri, vanliga við heitum, sum samsvara við tey evni, sum hann viðger í ummælinum. Málið í ummælunum er lætt, og Jógvan Isaksen ger, sum hann sjálvur eisini sigur (Olsen, Theodor E. D. 2007), burturúr at skriva, so tað er lætt lesiligt. Hann roynir ikki at skriva akademiskt, hóast hann er bókmentafrøðingur, heldur tvørturímóti. Hann roynir at røkka einum almennum lesara. Bera vit Jógvan Isaksen saman við ummælaran René Hjelm, sum hevur ein høgan akademiskan stíl, so sæst munurin á teimum júst við, at Jógvan Isaksen ikki leggur seg eftir at skriva akademiskt. Henda hugburð lýsir hann sjálvur í fororðunum til bókina um Heðin Brú, *Loystur úr fjøtrum*, tá hann sigur, at bókin ikki er ein teoretisk bókmentaviðgerð, men ein roynd at fara gjøgnum skaldskapin hjá Heðini Brú við so einføldum amboðum, sum til ber (Isaksen 2006:10). Hesin hugburður tykist í summum førum seta dám á ummælini hjá Jógvani Isaksen. Tá hann ummælir *Heimin forna* (2000) eftir Annfinn í Skála og setir bókina í samband við skaldskapin hjá C. S. Lewis og J. R. R. Tolkien, grundgevur hann við at vísa á, hvat tað er, sum líkist í teimum bókunum, men tosar ikki um tekstslagið sum so og ger lítið við at perspektivera (Isaksen 2001). Í øðrum førum perspektiverar hann tó við at seta í samband við tekstslag, t.d í ummælinum av bókini *Í morgin er aftur ein dagur* (1998) eftir Oddvør Johansen, har hann metir um, í hvønn mun bókin kann sigast at vera ein kollektiv skaldsøga (Isaksen 1998c).

Í ávísum førum leggur Jógvan Isaksen sær nær at skapa sær mentanarligan myndugleika. Í tematiska innganginum til nevnda ummælið av *Tey eru, sum taka mánalýsi í álvara* eftir Jóanes Nielsen vísir Jógvan Isaksen, at hann kennir skaldskapin hjá Jóanesi og veit, hvat hann plagar at yrkja um (Isaksen 2007c). Í ummæli av *Pentum* eftir sama skald perspektiverar Jógvan Isaksen til skaldskapin hjá Jóanesi Nielsen, eins og hann perspektiverar til William Heinesen og hansara nýtslu av deyðanum sum drívmegi í skaldskapinum, til Bakhtin, Rabelais og tað groteska. Hann siterar tað, sum Hans Magnus Enzenberger sigur um uppgávuna hjá yrking (Isaksen 1998b). Her ger Jógvan Isaksen nógv burturúr at skapa sær mentanarligan myndugleika við at perspektivera til ritverk, føroyskar og útlendskar høvundar og rák.

Í ummæli av *Dalinum fagra* (1999) eftir Gunnar Hoydal skapar Jógvan Isaksen sær myndugleika við at nýta heiti úr bókmentafrøðini. Hann nevnir surrealismu, og at tað eru hallucinatorisk brot í bókini. Hann ber eisini saman við Burroughs og nýtir orðið psykografi, sum ikki er gerandismál (Isaksen 1999a).

Jógvan Isaksen lýsir sjáldan sína egnu lesarauppliving og nýtir sjáldan orðið „eg“ um seg sjálvan. Hann tosar tó um lesarauppliving, men ofta í einum meira almennum diskursi, t.d. sum tá hann sigur um bókina *Í morgin er aftur ein dagur* (1998) hjá Oddvør Johansen, at hon „er ein fjølbroytt og undirhaldandi skaldsøga, sum tú livir teg inn í, og sum tú ert keddur av at leggja frá tær“. Her tosar hann sostatt út frá egnari lesarauppliving, men ballar eg-ið inn í eitt *tú*, sum er meira alment og umboðandi ein lesara og ikki bara Jógvan Isaksen sjálvan sum ummælara (Isaksen 1998c).

Metingarkriterii

Virðismetingin í ummælunum hjá Jógvani Isaksen av prosaskaldskapi er ofta bæði knýtt at tí innihaldsliga og tí formliga, skilt á tann hátt, at Jógvan Isaksen leggur stóran dent á, at ein skaldsøga skal hanga saman. Hetta sæst kanska serliga væl, um hansara ummæli av *Dalinum fagra* (1999) hjá Gunnari Hoydal verður samanborið við ummælið hjá Jonhardi Mikkelsen av somu bók. Jógvan Isaksen ger nógv burtur úr at kritisera bókina. Henni vantar framdrátt í søgugongdini, sigur hann:

> Mangan er tað so, at hóast tað verður sagt frá hendingum, er tað eins og søgan stendur still. Tað er líkasum hon tøvir í sama stað ... Í so máta er „Dalurin fagri“ mitt úr slagnum, tí tað er als ikki óvanligt í føroyskum bókmentum, at skaldsøgur sakna drive, sakna framdrátt (Isaksen 1999a).

Jógvan Isaksen endar ummælið við at siga, at Gunnar Hoydal er lyrikari, sum skrivar prosa, og tí hevur tann episki streymurin í søguni hug at hvørva (Isaksen 1999a).

Jonhard Mikkelsen tosar í sínum ummæli av somu bók um lyrikaran, sum skrivar prosa. Hann sær tað sum eina dygd og ikki sum eitt haft, at søgugongdin hevur lítlan framdrátt, og heldur, at hon fær nakað annað inn í staðin, tí Gunnar „greipar slíkt saman, ið bara ber til í lyrikki“, sum hann orðar seg: „Hesar løtur, tá ið Gunnar byggir upp ferð og spenning, bera teir partar, tá ið spenningurin fánar, og tað verða kyrrindir í søgugongdini“ (Mikkelsen 1999).

Grundleggjandi munurin á metingarkriteriunum hjá Jógvani Isaksen og Jonhardi Mikkelsen er her, at hóast báðir síggja tað sum, at her er ein lyrikari, sum skrivar prosa, so sær Jógvan Isaksen tað sum ein meinboga, tí hann leggur dent á søgugongdina, meðan Jonhard Mikkelsen sær tað sum eina dygd.

Í ummæli sínum av bókini *Í havsins hjarta* (2007) eftir Gunnar Hoydal, kritiserar Jógvan Isaksen eisini søgugongdina, sum ikki hongur nóg væl saman, tí har eru tvær ella tríggjar søgur, sum ongantíð veruliga falla saman, og hann sigur, at „í støðum viknar frásøgnin. Hon gerst meira vatndeyv ... og tað er als ikki sama plúmm í henni sum annars“ (Isaksen 2007a). Tað er eisini tankin um framdrátt í søgugongdini, sum fær Jógvan Isaksen at finnast at bókini hjá Annfinni í Skála, *Heiminum forna* (2000), tí at frásøgnin um somu tíð er ov neyv og ikki nóg neyv: „Stundum ótolnast tú, tí frásøgnin uttan grund tøvir, og stundum er søgan tann bera gongd og eingin dýpd“ (Isaksen 2001). Hetta er sami kritikkur, sum Jógvan Isaksen hevur av skaldsøguni hjá Sonju Schneider *Leiðarljós* (1997): „men tað veitir lesaranum eina kenslu av um somu tíð at fáa nógv at vita – viðhvørt ov nógv – og ov lítið at vita“ (Isaksen 1998a).

Kritikkurin av bókini hjá Marjuni Syderbø Kjelnæs *Ein farri av kolvetni* (2004) er somuleiðis, at partar av henni eru ósamanhangandi. Jógvan Isaksen ber kritikkin siðiliga fram og sigur, at hesir partar ikki áttu at verið prentaðir. Hann ber skrivingina hjá Marjuni Syderbø Kjelnæs saman við tað at sita og finna upp á eina søgu fyri børnum, sum als ikki er ætlað til útgávu. Hetta er hansara máti at siga, at henda søgan ikki átti at komið á prent í tí líki, hon er, tí hon ikki hongur nóg væl saman (Isaksen 2004).

Áherðslan á framdráttin í søgugongdini sum metingarkriterium kann hanga saman við, at Jógvan Isaksen sjálvur skrivar krimiskaldskap, har samansetingin av søgugongdini er alfa og omega.

Virðismetingin í ummælunum hjá Jógvani Isaksen er eisini knýtt at tí, at bókmentir ikki skulu vera boðandi ella lærandi. Hetta sæst, tá hann í sama ummæli av bókini eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs sigur, at tað vælmeinandi viðhvørt hevur yvirvág í mun til tað listaliga, og hann sigur: „Hon er frægast, tá ið hon letur kenslurnar fara við persónunum ... heldur enn tá einhvør boðskapur partú skal fram“ (2004). Nakað tað sama verður sagt um *Leiðarljós* eftir Sonju Schneider: „Her gerst tað fitta, tað lærandi og uppalandi hesum lesaranum ovboðið“ (Isaksen 1998a).

Í ummælinum av *Dalinum fagra* eftir Gunnar Hoydal sæst ein negativur tóni, tá hann setir spurnartekin við, um partar av bókini skulu lesast sum eitt fullveldislíknilsi (Isaksen 1999a), og serliga í ummælinum av *Í havsins hjarta* eftir sama rithøvund, tá fólkafundurin, sum skal haldast á Slættaratindi móti endanum, verður kritiseraður. Her heldur Jógvan Isaksen bókina vera patetiska, og at ein religiøsur tóni er her, sum ikki pyntar hana (Isaksen 2007a). Eins og í ummælinum av Marjuni Syderbø Kjelnæs sæst her hugburðurin til skaldskap, at hann eigur ikki vera tyngdur av ov sterkum boðskapi.

Jógvan Isaksen metir bókmentir út frá kravinum um, at tær skulu vera ektaðar og ikki tilgjørdar. Hetta sæst aftur í ummælinum av *Tema við slankum* (2007) eftir Sólrún Michelsen, har Jógvan Isaksen samanber Sólrún við Oddvør Johansen, men sigur, at hon er fullkomiliga sín

egin. Virðismetingin av bókini liggur í stóran mun í hesari einu orðing, at Sólrún er *sín egin* (Isaksen 2007b).

Jógvan Isaksen nýtir orðið *tilgjørt* í negativari merking, tá hann kritiserar *Dalin fagra* eftir Gunnar Hoydal. Hetta er í samsvari við tey krøv, hann setir til skaldskap, at hann skal vera sannur, ektaður og egin. Tá hann sigur, at „tað ber bara til at fata myndirnar intellektuelt" í *Dalinum fagra* (Isaksen 1999a), liggur í hesum ein tanki um, at myndir skulu kunna siga lesaranum nakað kensluliga – og kanska kropsliga eisini. Tær skulu skapa trúvirði við at vera ektaðar og ikki tykjast *tilgjørdar.* Ein mynd, ið bara kann fatast intellektuelt, krevur vitborið virksemi, og tað verður í summum skaldskaparhugsjónum og í huganum á lesarum, ið vilja hava avbjóðingar til sítt vit, mett sum ein dygd.

Virðismetingin í ummælunum hjá Jógvani Isaksen liggur eisini í, um bókin rørir lesaran ella fangar hann. Hetta er nakað av tí, sum Jógvan Isaksen kritiserar Marjuna Syderbø Kjelnæs fyri í bókini *Ein farri av kolvetni*; at „hendingarnar bera ikki við lesaran". Tað liggur í hesum, at skaldskapur skal røra ella í øllum førum fáa lesaran at vera áhugaðan í persónunum, og tá Jógvan Isaksen sigur, at tað er bara tað, at „lesarin er at kalla líkaglaður, hvat ið viðurferst persónunum", so er tað hvassur kritikkur, eins og tá hann sigur, at onkur søga „vekir áhugan" hjá lesaranum, men ovursniðfundigi bygnaðurin setir fyri ein part fót fyri hesari uppliving (Isaksen 2004). Hvassi kritikkurin av, at lesarin ikki verður fangaður av lesnaðinum kann hava eitt kynsperspektiv skilt á tann hátt, at menn kanska fangast ella keðast av øðrum enn kvinnur. Hetta er jú ein subjektiv meting, sum hevur við tað at gera, hvørjum vit fangast av og ikki, og kann knýtast at ástøðinum um tilknýti, „attachment", sum Rita Felski sær sum eina berandi drívmegi millum leikararnar á tí bókmentaliga økinum.

Í áðurnevnda broti í ummælinum av *Dalinum fagra* eftir Gunnar Hoydal, har Jógvan Isaksen tosar um, at tað bara ber til at fata myndirnar intellektuelt, liggur eisini ein tanki um, at tað hevur týdning, at skaldskapur ikki bert er intellektuellur, men hevur evni til at rína við lesaran kensluliga og/ella kropsliga og á tann hátt skapar eina góða

lesiuppliving. Aðrastaðni í sama ummæli verður nevniliga júst sagt, hvat er tann mest *hjartanemandi* lýsingin í bókini. Her nýtir Jógvan Isaksen eitt kropsligt orð, altso setir hann óbeinleiðis eitt kriterium fram, at bókmentir skulu kunna nema hjartað ella í øllum førum gera nakað við kenslur lesarans (Isaksen 1999a).

Í ummælinum av *Í havsins hjarta* vísir Jógvan Isaksen til egna lesarauppliving, tá hann sigur, at hann í øðrum kapitli fekk hug at lata bókina aftur, og at tað er dráp fyri lesaran at koma ígjøgnum kapitlið, men sigur so, at tað var gott, at hann ikki gjørdi tað, tí tað er nógv gott í skaldsøguni, hóast lesarin væl kundi verið summar partar fyri uttan (Isaksen 2007a).

Samanumtikið hevur Jógvan Isaksen ummælt síðani miðskeiðis í 1970-árunum. Øll árini hevur hann virkað í útisetu. Hann hevur fyri tað mesta skrivað í *Sosialin*, men seinastu tíðina hevur hann eftir ein steðg í nøkur ár ummælt í *Dimmalætting* (Isaksen 2019). Hóast hann var við í ritstjórnini av *Brá* og eisini hevur skrivað ummæli í onnur tíðarrit, so er hansara stílur merktur av, at hann ummælir í ein almennan miðil, sum roynir at røkka einum almennum lesara. Hetta sæst aftur í løttum máli og tóna, og eisini í, at hann, hóast hann er universitetslektari í bókmentum, ikki ger nógv burtur úr at skapa sær myndugleika í tekstinum við at perspektivera til bókmentalig rák o.s.fr. Heldur skapar hann sær myndugleika við útbreiðslu, tí hann velur ein miðil, sum røkkur langt út, og við at skriva so nógv og so regluliga, at hann hevur fingið navn sum ummælari. Øll kunnu lesa hansara ummæli, tí tey eru lætt lisin, og gjøgnum tíðina skapar hann sær ein *persona*, ið fólk kenna aftur sum ein ummælara, ið sigur sína hugsan um tað mesta av tí, sum kemur út av føgrum bókmentum í Føroyum.

Tað kann tykjast sum ein andsøgn til tað, sum sagt hevur verið um Jógvan Isaksen sum forsprákara fyri førleikamenning og professionalisering av føroyskum ummælaravirksemi, eisini á málsligum stigi, at hann júst nýtir eitt einfalt mál og røkkur langt út, men tað er bert ein staðfesting av paradoksi 1, sum verður lýst í kap.2, har víst verður á, at samstundis sum ummælið verður skapt í einari eliterari mentan, røkkur tað út til ein breiðan almennan lesaraskara. Tað er millum hesar pólar, Jógvan Isaksen virkar sum ummælari.

Jógvan Isaksen má sigast at vera fremsta dømi um føroyska útisetaummælaran við tað, at hann hevur skrivað so nógv og yvir eitt so langt áramál, eins og hann er alment kendur sum ummælari. Hóast hann hevur skrivað í fjarstøðu øll árini, er hann júst ein av teimum, sum hava verið lagdir undir at vera ógegnigir vegna sínar mongu leiklutir á bókmentapallinum. Hetta hevur helst havt sína ávirkan á, at hann aftur og aftur hevur havt tørv á at lýsa og kanska rættvísgera sín leiklut og sín myndugleika sum ummælari, við tað at lesarar hava sett spurnartekin við júst fjarstøðuna hjá hesum ummælara, hóast hann er staddur í útisetu. Spurningur kann tí verða settur við, um útisetin per definitión hevur ta neyðugu fjarstøðuna, sum Said tosar um, bert tí at hann landafrøðiliga er í fjarstøðu.

Páll Isholm ummælir í *Dimmalætting*

Mótsett Jógvani Isaksen er Páll Isholm (f. 1972), ið er M.A. í føroyskum og miðlakunnleika, kanska ikki ein, vit í dag fyrst og fremst kenna sum ummælara, men hann hevði kortini ein leiklut sum ummælari í tíðarskeiðinum 1997-2007, tí frá 16. januar til 16. desember 2000 skrivaði hann átta ummæli av føroyskum føgrum bókmentum í *Skáa* í *Dimmalætting*. Hann var í hesum tíðarskeiði í Danmark í lestrarørindum og hoyrir tí við til tann bólkin av føroyingum, sum skrivaði í útisetu. Hann kann sigast at vera partur av nevndu uppraðfesting av mentanartilfari í *Dimmalætting*, sum Pól á Kletti (f. 1959) ritstjórnaði, har ummæli vórðu raðfest. Páll Isholm ummælti fast fyri *Dimmalætting* í eitt ár. Hann hevur ikki ummælt í bløðum og tíðarritum áðrenn og aftan á tíðarskeiðið, sum eg havi kannað, tó at hann hevur umrøtt onkra einstaka bókaútgávu á sínum bloggi seinni[50].

Páll Isholm nýtir ikki metatekst til at rættvísgera sín leiklut, eins og eg havi vísst á í partinum um ummæli sum granskingarøki í Føroyum, at nógvir føroyskir ummælarar gera. Hetta kann tulkast sum, at hann kennir seg tryggan í leiklutinum, hóast hansara tíð sum ummælari var stutt. Hóast Páll Isholm hevur bókmentaliga bakgrund og eisini nýtir hana at skapa myndugleika í sínum ummælum, hevur stílurin

50 Sí http://isholm.blogspot.com/2016/ (04.01.2021).

hjá honum journalistisk eyðkenni skilt á tann hátt, at ummælini hava fastan form, orða seg stutt og greitt og leggja dent á at seta niðurstøður frammarlaga í tekstinum. Tær fáu undiryvirskriftirnar eru umboðandi fyri innihaldið í tekstinum, og í endanum er samanumtøka. Sostatt ber til at siga, at tær báðar greinirnar í útbúgving Páls, bókmentir og miðlar, endurspeglast í ummælarastíli hansara.

Ummælini hjá Pálli Isholm hava tey eyðkennini, sum sambært Andersen og Winge definera tekstslagið: kunnleika til form, fakta um verk og rithøvund við tilhoyrandi perspektivering ella samanbering, samandrátt, viðgerð og meting (Andreasen og Winge 1972:48-53). Ummælið „Tann ódeyðiliga sálin og óendaliga søgan“ av skaldsøguni *Ein ódeyðilig sál* (1999) hjá Jens Paula Heinesen er dømi um hetta. Ummælið byrjar við inngangi, sum hevur persónligt engagement („Tað var við stórum spenningi“), síðani kemur samandráttur av bókini við perspektivering til ritverkið, hareftir kemur greining av tekstinum og at enda virðisdómur og áheitan á lesaran við yvirskriftini „Les bókina!“ (Isholm 2000a).

Næstan øll ummælini enda við orðunum „Samanumtikið kunnu vit siga“. Tað vísir, at Páll Isholm er tilvitaður um lesaran; at hann skal leiðast gjøgnum tekstin fyri at skilja tær týdningarmestu niðurstøðurnar í ummælinum. Samanumtøkurnar, sum ikki eru vanligar í stuttum ummælum, skapa ein feril av skúlauppgávu- og ritgerðardámi.

Tey flestu ummælini hava heiti, ið sipar til tað evnið í tekstinum, sum Páll Isholm tekur fram (Isholm 2000a, 2000c, 2000g). Okkurt hevur heiti eftir tekstslagi (Isholm 2000d), og okkurt eftir, hvussu ummælarin metir um tekstslagið. Her verður hugsað um ummælið, har hann setir spurnartekin við, um talan er um sið- ella skaldsøgu í ummælinum av *Úr támi tíðarinnar* (1999) eftir Sonna Jacobsen (Isholm 2000e).

Eitt stíltak, sum Páll Isholm nýtir, er at byggja ummælið soleiðis upp, at tað byrjar við kritikki og síðani rósan. Í samanumtøkuni verður hetta vent við, soleiðis at rósið kemur fyrst og síðani kritikkurin. Hetta skapar dynamikk í ummælinum (Isholm 2000c).

Ummælini hjá Pálli Isholm eru ein táttur í *Skáa* í *Dimmalætting*, sum lesarin kennir aftur, bæði av innihaldinum og av mátanum, ummælið er sett upp á blaðsíðuni, eins hvørja ferð við mynd av

Pálli og tekstinum „Páll Isholm ummælir“. Hetta gevur lesaranum høvi til at koma at kenna ummælaran og hansara stíl, og tað gevur ummælaranum høvi at skapa sær ein *persona*, eina mynd av sær sjálvum sum ummælara *Dimmalættingar* í hesum tíðarskeiði.

Páll Isholm ger tó ikki nógv burtur úr at skapa ein *persona* í tekstinum. Hann setir fram eitt *ethos*, sum er professionelt og livir upp til journalistiskar reglur heldur enn at vilja bróta frá. Hann tykist stremba eftir einum ávísum objektiviteti; eftir at umboða ein lesaraskara heldur enn at seta sín egna persón fram sum upplivandi lesara. Hansara objektiva tilgongd sæst serliga væl aftur, tá hansara ummæli av *Dalinum fagra* eftir Gunnar Hoydal verður borið saman við onnur ummæli av hesum verki, sum eru í einari grøv ella aðrari í sínum metingum av bókini (Mikkelsen 1999, Isaksen 1999a, Skemmuni 2000). Páll Isholm vísir á tveir ymiskar lesihættir, sum bókin letur upp fyri. Hann vísir á ólíkar lesihættir og fyrimunir og vansar við teimum heldur enn at gera so nógv burtur úr sínari egnu persónligu fatan og uppliving av verkinum: „Hetta skapar tveir hættir at lesa skaldsøguna uppá. Annar, og tann sum flestu føroyingar helst fara at nýta, er tann staðbundni siðsøguligi, hóast hetta neyvan er tann mest gevandi. Hin er tann óhefti skaldsligi lesihátturin“ (Isholm 2000b).

Tað *ethos*, sum Páll Isholm skapar í tekstinum, er skylt við tað vælmeinandi, har ummælarin teknar eina mynd av sær sjálvum í tekstinum sum etiskum, einum, ið hevur praktiskan vísdóm, og einum, sum hevur umsorgan fyri sínum áhoyrara við tí fyri eyga at fremja trúvirði og harvið tryggja, at áhoyrarin verður sannførdur (Aristotle: xxxvii).

Páll Isholm nýtir fakliga próvførslu, og tá hann ivast í, um lesarin kennir tey rák og tey heiti, sum hann setir fram, so greiðir hann frá. Tað sæst til dømis í ummælinum av *Koparskríninum* (2000) hjá Jens Paula Heinesen, tá hann greiðir frá millumtekstleika (Isholm 2000g), og í ummælinum av yrkingasavninum hjá Jóhan Mortensen *Svartur ælabogi* (2000), tá hann greiðir frá haiku-yrking sum tekstslagi (Isholm 2000d). Tann hugsaði móttakarin er ein almennur lesari; ein vanligur lesari, sum ikki neyðturviliga kennir til heiti og rák í bókmentafrøðini. Hetta hongur eisini væl saman við journalistiska stílinum og miðlinum, sum Páll Isholm skrivar síni ummæli í – eitt dagblað, sum hevur breiðan móttakara.

Páll Isholm brúkar orðið „eg“ í sínum ummælum og eisini eitt „tú“, sum vísir til hansara egna persón, men hann setir eitt *ethos* fram, sum umboðar tann almenna lesaran og ikki hansara egnu lesiuppliving. Hetta sæst aftur í orðum sum: „Tú verður drigin við allan vegin frá fyrst til síðst“ (Isholm 2000g). Her nýtir hann eitt „tú“, sum umboðar hansara persón, og hann tosar um lesiupplivingina at vera drigin við í einari søgu, men hann ger lesiuppliving sína almenna bæði við at brúka orðið „tú“ um seg sjálvan, eitt orð, sum kanska eisini stendur fyri óbundna fornavnið „ein“. Páll Isholm gloppar tó í støðum fyri egnari persónligari lesiuppliving og smakki, tá hann í ummælinum av skaldsøguni *Ein ódeyðilig sál* (1999) eftir Jens Paula Heinesen nýtir orðið „eg“ í tí fyrsta setninginum og vísir, at hann persónliga var spentur at sleppa at lesa hesa bókina. Her er altso eitt persónligt *ethos*, sum vísir, at tað kensluliga er rivið við í lesingini: „Tað var við stórum spenningi, eg setti meg at lesa nýggjastu skaldsøguna hjá Jens Paula Heinesen. Hann hevur ótroyttiligur ... ríkað okkum við stuttsøgum og skaldsøgum“ (Isholm 2000a).

Annað dømi um lesiuppliving úr sama ummæli er lýsing av einari kenslu, sum tó eisini í hesum føri, hóast hon hevur uppruna í upplivingini hjá Pálli Isholm av at lesa bókina, verður orðað sum eitt alment „tú“. Hetta er eitt dømi um, hvørja ávirkan bókin hevði á ummælaran, bæði á vit, sansir og kropp: „tú bæði verður bergtikin av frásøgnini og fjálturstungin av sjálvrannsakan“ (Isholm 2000a).

Ummælarans kensla í móttøkuni verður eisini orðað í ummælinum av *Úr támi tíðarinnar* (1999) eftir Sonna Jacobsen: „Móti endanum á bókini kemur eisini meiri skipan á søgutráðin, og lesarin *merkir* spenningin“ (Isholm 2000e, mín áherðsla).

Hóast hetta ger Páll Isholm ikki nógv burtur úr egnari lesiuppliving, men strembar eftir objektiviteti. Hann nýtir orðið „vit“ um seg sjálvan, tá hann tekur samanum: „Samanfatandi kunnu vit siga“ (Isholm 2000e), og í ummælinum av *Koparskríninum* (2000) eftir Jens Paula Heinesen ger hann lesaran til ein part av tilvísingini til sín sjálvs við tí endamáli at skapa kenslu av, at vit hava henda skaldskapin í felag: „vit kenna jú øll skaldsøgurøðina Á ferð inn í eina óendaliga søgu“ (Isholm 2000g). Her tosar Páll Isholm við ein móttakara, sum er ein lesandi persónur, og hann væntar, at hann hevur lisið skaldskapin

hjá Jens Paula Heinesen. Hetta kann tó eisini vera ein háttur at vísa á týdningin hjá skaldskapinum hjá Jens Paula Heinesen, ella at skapa sær myndugleika í tekstinum; ein háttur at vísa, at fyri hann er tað ein sjálvfylgja at fylgja við í tí, sum kemur út av føroyskum skaldskapi, og at lesa tað.

Páll Isholm ummælir tekst út frá einari lesaravæntan um tekstslagið. Hetta er týðiligt í mátanum, hann leggur upp til, at eitt leikrit skal lesast sum tað, tað er: eitt leikrit, sum er ætlað til pallin (Isholm 2000f), og ein siðsøga má lesast sum tað, hon er, og ikki metast út frá kriterium fyri skaldsøgu (Isholm 2000e). Her kann Páll Isholm flokkast millum tær fýra ummælaratypurnar hjá Steffen Hejlskov Larsen sum tann *intentionali ummælarin*, ið roynir at finna fram til, hvat høvundurin hevur ætlað við sínari skriving, og metir um, í hvønn mun tað eydnast honum, eins og verkið verður mett út frá krøvunum, sum liggja í tekstslagnum[51].

Isholm skapar sær myndugleika við at vísa til tekstslag, rák og motiv. Hetta sæst í ummælinum av *Koparskríninum* hjá Jens Paula Heinesen, tá hann samanber bókina við stuttsøguna „Eyðun" eftir Regin í Líð og setir hana í samband við *Raskolnikov* eftir Dostojevskij. Hann grundgevur fyri, hvat tað er, hesar søgur hava í felag, nevniliga at eitt brotsverk verður framt, sum persónurin ikki einsamallur orkar at bera (Isholm 2000g). Í ummælinum av bókini *Suðar dýpið reyða* (1999) eftir Bergtóru Hanusardóttur perspektiverar hann til kvinnurørsluna (Isholm 2000c).

Páll Isholm skapar sær ikki bara myndugleika við at vísa til rák, men átekur sær eisini leiklutin sum undirvísari, tá hann metir, at lesarin kanska ikki kennir tann samanhang, sum teksturin er skrivaður inn í. Nevnt hevur verið, hvussu hann greiðir frá millumtekstleika (Isholm 2000g), og í ummælinum av yrkingasavninum eftir Jóhan Mortensen *Svartur ælabogi* rammar hann ummælið inn í eina gjølliga frágreiðing um, hvat haiku-yrking er, og hann ber hana saman við gamla norrøna yrkingarlist, sum vit kenna úr *Hávamáli* (Isholm 2000d). Hetta er ein háttur at skapa sær myndugleika við at vísa, at hann kennir bókmentasøguna, kennir bókmentalig rák og hevur evni at síggja samanhangir, tá

51 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

hann kann siga, at savnið hjá Jóhan Mortensen er í nútímans haikustíli. Páll Isholm grundgevur við at vísa til dømi um, hvussu yrkingarnar passa inn í haiku-yrkingarkynstrið. Hugsa vit um ummælaratypurnar, sum John Chr. Jørgensen sigur vera at síggja í Danmark um sama mundi, kann Páll Isholm flokkast sum tann frágreiðandi námsfrøðiligi ummælarin, ið vísir á samanhangir og setir í frásjón[52].

Páll Isholm lesur út frá fyritreytunum, sum tekstslagið setir, og kritiserar hann tann ummælta tekstin, so hevur hann altíð okkurt gott at siga eisini. Av tí at hann er fastur ummælari hjá *Skáa* í *Dimmalætting* hetta árið, so ummælir hann eisini alt slag av teksti. Hann ummælir skaldsøgur, yrkingasøvn og sjónleikir, ummælir bæði kvinnur og menn og bæði kendar høvundar og minni kendar høvundar, sum ikki hava verið ummæltir fyrr. Tá hann ummælir Sonna Jacobsen, leggur hann dent á júst hetta, at Sonni hevur givið nakrar bøkur út undan hesari, ið, tað hann veit, ikki hava verið umrøddar áður (Isholm 2000e). Hetta kundi sett Páll Isholm í bólkin sum T.S. Eliot kallar „Critic With Gusto", ummælarin, sum leggur seg eftir at ummæla høvundar, ið ikki eru nógv frammi.

Í so at siga øllum ummælum Páls er virðisdómurin ein týðandi partur, og hann er oftast orðaður í undiryvirskriftini. Hóast ummælini at kalla altíð hava greiðan virðisdóm, verða tey altíð borin fram á hóvligan hátt: „fyri tey, sum eru áhugað í søgu og siðsøgu er hetta góður lesnaður. Sum skaldsøga kundi hon verið meira samanhangandi, og persónarnir betur lýstir" (Isholm 2000e). Páll Isholm gevur her vali av tekstslagi skyldina fyri, at bókin ikki fær tað rætta flogið, tí tað er ein trupulleiki við siðsøguligum skaldsøgum, at einstøku hendingarnar koma til at stýra heildini, sum hann sigur (Isholm 2000e).

Annað dømi er ummælið av leikinum *Nólsoyar Páll* (2000) eftir Steinbjørn B. Jacobsen:

> T.d. verður lívið hjá Pálli norðuri í Vági nærum ikki lýst, og tað gevur kanska eina eitt sindur skeiva mynd av lívinum hjá Nólsoyar

52 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

> Pálli. Heldur ikki fáa vit nakra beinleiðis frásøgn um samanbrestir og rættarmál, sum jú eru týðandi partar av søguni um Nólsoyar Páll. Júst hesar partar vildi eg hildið verið væl egnaðar til sjónleik. Men sjálvsagt er neyðugt at velja og vraka (Isholm 2000h).

Hetta er dømi um, at hann kritiserar við fyrivarni, tí hann roynir altíð at ummæla tekstin út frá tekstsins dagsskrá og ikki sínari egnu.

Í kritikkinum av leikinum *Heystveingir* (2000) eftir Hanus Kamban er Páll Isholm eisini varin og sær, at hann kanska ikki metir tekstin út frá teimum røttu fortreytunum: „Nú veit eg sjálvandi, at ein leikur gjarna skal síggjast á palli, og ikki lesast í bók, og tí kann tað gott vera, at góður leikstjóri og gott leikfólk kunnu geva leikinum nakað annað flog enn sjálvt handritið í fyrsta umfari ber brá av“ (Isholm 2000f). Hetta er eisini liður í prófførslu, har ummælarin við *afturvísing* kommenterar sína egnu meting fyri at vísa á, at hann hevur hugsað um hetta, sum kundi verið kritikkur av hansara meting.

Í kritikkinum av bókini *Suðar dýpið reyða* (1999) eftir Bergtóru Hanusardóttur er eisini eitt *men* frá ummælarans síðu, har ummælarin roynir at skilja ætlanina við verkinum: „Skaldsøgan er heldur endaleys ... Hetta er helst ein roynd hjá rithøvundinum at lata lagnuna og stríðið hjá Sáru vera í andgletti“ (Isholm 2000c).

Hóast Páll Isholm ikki nýtir metaviðmerkingar, sum beinleiðis orða, at hann er tilvitaður um sín leiklut, so skínur tað ígjøgnum og sæst eisini í orðingini: „Meiri skal eg ikki avdúka her“, tí hann vísir, at hann skilir, at hann eigur at lata spenning liggja eftir til lesaran og ikki avdúka alt (Isholm 2000e).

Samanumtikið er Páll Isholm akademiskur ummælari, sum leggur seg eftir at fylgja teimum journalistisku meginreglunum. Hansara útbúgving innan miðlar og bókmentir gevur honum dupultar førleikar at ummæla, og hon endurspeglast eisini í tekstunum. Hann orðar seg stutt og greitt, og hann skapar sær myndugleika við at lesa tekstirnar út frá teimum fortreytum, sum tekstslagið setir, umframt at hann perpektiverar til ritverkið hjá høvundinum, sum hann ummælir, og rák í bókmentafrøðini.

Hann setir eitt *ethos* fram, sum hevur trúvirði, hann er sakligur og varligur í sínum virðisdómum, og hansara *persona* fyllir ikki nógv í ummælunum. Kanska er orsøkin tann, sum Jan Gue (2007) orðar, at hann sum fastur ummælari hetta tíðarskeiðið ikki bert er knýttur at sínum egna *ethos*, men eisini at einum stovns-*ethos*, nevniliga tí, sum miðilin, *Dimmalætting*, stendur fyri.

Páll Isholm umboðar tann akademiska ummælaran, sum hevur journalistiskan og lættan stíl og leggur seg eftir at miðla list til ein breiðan móttakarabólk. Rammurnar eru fastar, og ummælini líkjast øll. Standardiseringin letur ikki upp fyri listaligum frælsi, men er heldur dømi um, at ummælið útilokandi verður nýtt sum amboð at miðla listina uttan at stremba eftir at vera list í sjálvum sær.

Páll Isholm er ummælari, sum ummælti fast fyri ein miðil tað tíðarskeiðið, hann var í útisetu. Eins og Andrias Justesen er hann dømi um ummælara, hvørs virksemi fellur saman við blómaskeiðinum hjá føroyskum ummælaravirksemi í útisetu í tíðarskeiðinum 1997-2007. Meðan Andrias Justesen ummælti fast í útisetablaðnum *Føringinum*, ummælti Páll Isholm fast í *Dimmalætting* og gav soleiðis sítt íkast til føroyskt ummælaravirksemi í Føroyum um aldarskiftið.

Anna Mattsson – eitt eyga uttaníframá

At enda í hesum partinum um at ummæla í útisetu er Anna Mattsson (f. 1966) verd at taka fram. Hon hevur skrivað trý ummæli í føroysku útisetabløðini *Oyggjaskeggja* og *Braga* hetta tíðarskeiðið, men hon má sigast meir enn allir hinir útisetarnir at hava eitt eyga uttaníframá og sum ummælari frælsi frá atliti at familjubondum, tí hon er ikki føroysk, men svenskur rithøvundur, týðari og ummælari. Anna Mattsson hevur exam.art. í føroyskum frá Fróðskaparsetri Føroya, og hon ummælti føroyskar bókmentir í sosialistiska blaðnum *Fríu Føroyar* (1983-1993) fyrst í 1990-árunum, tá hon búði í Føroyum. Skaldsøga hennara *Alexandras rum* (1994) kom út á føroyskum í 1999 við heitinum *Rúm Alexandru* í týðing eftir Tórodd Poulsen, sum var sambúgvi hennara árini í Føroyum. Soleiðis kann hon hóast alt heldur ikki sigast at vera frels frá atliti at øllum bondum í Føroyum, hóast talan ikki júst er um familjubond.

Ummælini hjá Onnu Mattsson í tíðarskeiði okkara eru av trimum yrkingasøvnum eftir trý lutfalsliga ung skøld, Sigri Gaïni, Petur P.

Jensen (nú Pólsson) og Oddfríð M. Rasmussen. Hon hevur leiklutin sum talentleitari í hesum ummælum; ein leiklutur, sum sæst aftur í heitinum á ummæli hennara av yrkingasavninum hjá Sigri Gaïni *Orð og andlit* (1997), „Orð, ið kunnu fáa andlit", har hon vísir á henda unga yrkjaran, ið hevur góð evni at geva orðunum eitt meir heilskapað andlit enn tað, sum sæst í hesum savninum, ið er eitt gott og lovandi debutsavn, men sum tó ikki er nóg búgvið ella upprunaligt (Mattsson 1997b).

Í hesum orðum síggja vit kriteriini, sum Anna Mattsson setir til bókmentir, og lykilorðið er orðið *upprunaligt*. Hon leitar eftir originaliteti. Hetta sæst eisini aftur í ummælinum av savninum *Rás/Sár* (2000) eftir Oddfríð M. Rasmussen, sum hon rósar og sigur, at hann førir „siðin" víðari, hóast tað ikki, sigur hon, er heilt rætt at tosa um „sið", tí savnið er slóðbrótandi, samstundis sum ljómurin er klassiskur. Anna Mattsson nýtir eisini vendingina „tað upprunaliga" í hesum ummæli, tá hon sigur, at „sárið í hesari verð er tað upprunaliga, tað, sum yrkingin spreingir seg fram úr" (Mattsson 2001). Eisini sigur hon, at skaldið setir spurnartekin við hevdbundnan málsligan týdning og við okkara vanliga krav um, at tað einstaka orðið altíð skal sipa til tað sama. Her kemur hon við dømi um eina klisjé: „Tey ungu keypa klæðir/sum onnur skifta hosur/" (Mattsson 2001), sum Oddfríður myndar í yrkingini og fer víðari við, til klisjéin er so bronglað, at einki høpi er í longur, og hon verður til fullkomuliga merkingarleyst mál: „Tngkpklðrsmnnrskfthsr" (Mattsson 2001). Her nýtir Anna Mattsson sitat úr tekstinum sum grundgeving fyri sínari greining. Aðrastaðni nýtir hon sitat úr tekstinum til at grundgeva fyri sínum virðisdómi ella at vísa á, nær eitt verk eydnast best. Hetta ger hon í ummælinum av savninum eftir Sigri Gaïni, tá hon vísir á, hvussu heitið á yrkingini „Brim" bjargar yrkingini, tí hetta orðið er lykilin til at skapa samband millum tann hugtøkiliga og tann gerandisliga veruleikan (Mattsson 1997b). Leitanin hjá Onnu Mattsson eftir talenti sæst aftur í orðingunum um Oddfríð M. Rasmussen sum skaldi, tá hon sigur:

> Hetta er fjórða savn eftir Oddfríð Marna Rasmussen, og tað var væntandi, at hann hevði funnið sína egnu rødd. Tað hevur hann. Og ikki bara tað. Hann nýtir alla røddina. Eins og hvør yrking vóru [sic] eini hús, full av ymiskum rúmum. Oddfríður er í øllum rúmunum (Mattsson 2001).

Hetta, at Oddfríður hevur funnið sína rødd, er eisini eitt góðskukriterium í samsvari við orðið *upprunaligt*, sum Anna Mattsson nýtir í sínum ummælum, tí tann endaliga góðskumetingin av Oddfríði M. Rasmussen er knýtt at hesum, at hann hevur funnið *sína egnu* rødd.

Ummælini hjá Onnu Mattsson eru stutt. Ummælið av savninum eftir Oddfríð M. Rasmussen er tó longri enn tey av søvnunum eftir Petur Pólsson og Sigri Gaïni. Hóast stutt, so innihalda tey alt tað, sum ummæli vanliga innihalda, t.e. kunning um tekstin, samandrátt, viðgerð og meting.

Anna Mattsson skapar sær myndugleika við at vísa, at hon hevur førleikar at seta skaldskapin, sum hon metir um, upp ímóti klassiskum bókmentum og vísa á, at hon sær ávísa ávirkan í tekstinum frá núlivandi høvundum. Hon heldur seg síggja ávirkan frá Tóroddi Poulsen í skaldskapinum hjá Oddfríði M. Rasmussen, og hon perspektiverar *rásina* í savninum hjá honum til yrkingina eftir Regin Dahl „Hvar er rás?" (Mattsson 2001).

Í ummælinum av savninum eftir Sigri Gaïni perspektiverar Anna Mattsson og skapar sær myndugleika við at seta savnið í samband við dekonstruktión, hóast hon sigur, at málið í savninum ikki er dekonstruerað, hvørki syntaktiskt ella semantiskt. Tann sjálvfylgja, sum vit handfara málið við í gerandisdegnum, er tó møguliga dekonstruerað, sigur hon. Myndugleikin liggur í málsligum førleika at meta um málið hjá Sigri Gaïni, sum dugir handverkið og er tilvitað um mál, rytmu og form, men tó ikki megnar at seta saman tann hugtøkiliga og tann gerandisliga veruleikan (Mattsson 1997b). Mattsson vísir, at hon kennir til málslig og bókmentalig rák, hon vísir til dekonstruktión og tosar um setningafrøði og merkingafrøði, sum eru fakorð í málfrøðini, og við hesum skapar hon myndugleika í tekstinum.

Í ummælinum av Peturi Pólsson perspektiverar Anna Mattsson til svenska rithøvundin Birgitta Trotzig (1929-2011), sum sigur, at hon lesur skaldskap ikki fyri at mentast, men fyri at eta hann. Hetta nýtir hon sum tilvísing, tá hon sigur, at savnið hjá Peturi er góður kostur

(Mattsson 1997a). Hetta er áhugaverdur stílur og eitt dømi um, at skaldskapur, sum áður nevnt, í móttøkuni ofta verður umrøddur sum matur.[53]

Mattsson nýtir orðið „eg“ um seg sjálva í ummælunum, men hon er ikki so sjónlig í tekstinum sum upplivandi og sansandi lesari. Hon skapar eitt *ethos*, sum hevur myndugleika at meta um tað nýggja, sum kemur út, og at meta, um teir ungu høvundarnir liva upp til tey bókmentaligu kriteriini, sum hon setir. Hon ger ikki burturúr at pallseta egnan persón í ummælunum og nýtir ikki metaviðmerkingar. Hetta skapar ein dám av, at hon er trygg í sínum leikluti sum ummælari, og fyri at nýta hennara egnu orð um Oddfríð M. Rasmussen sum skald í ummælinum um *Rás/Sár* (2000), so *umber hon seg ikki* sum ummælari (Mattsson 2001).

Anna Mattsson er dømi um útisetaummælara við akademiskum profili, sum tó eisini kann sigast at hava myndugleika sum rithøvundur. Hesin myndugleiki sæst kanska best aftur í hennara evnum at vísa á tað *upprunaliga* og ta *sermerktu røddina*, sum hon metir so høgt í einum yrkjara. Sum viðurkendur rithøvundur kann hon hugsast at hava eina hóming av, hvat skal til fyri at kunna skilja seg burtur úr mongdini sum rithøvundur, og á tann hátt kann hennara støða sum ummælandi rithøvundur vera við til at geva henni myndugleika.

Tað er greitt, at útisetaummælararnir eru ymiskir í skrivistíli. Teir umboða fyrst og fremst tann akademiska ummælaran/bókmentafrøðingin, men fleiri av teimum kundu verið flokkaðir sum rithøvundar. René Hjelm er bókmentafrøðingur, men hann hevur eisini givið yrkingasavn út, Jógvan Isaksen hevur nógvar ymiskar leiklutir á bókmentapallinum, og hóast hann sjálvur fyrst og fremst sær seg sum bókmentafrøðing („Bókadagarnir á breddanum“ 2014), er hann kanska best kendur sum krimihøvundur í dag. Anna Mattsson kundi somuleiðis verið flokkað bæði sum rithøvundur og sum akademiskur ummælari. Hesi hava tó øll tað í felag, at tey skriva um føroyskar bókmentir uttan beinleiðis at vera ein partur av tí føroyska samfelagnum. Eg havi vístá, at ummælini hjá Andriasi Justesen í *Føringinum* vísa, at eitt skifti er

53 Sí. kap. 4.

farið fram í føroyskum ummælaravirksemi frá málpolitiskari áskoðan á bókmentir, til at innihaldslig og formlig krøv nú verða sett til tær. Hetta er ikki bara galdandi fyri ummælini hjá Andriasi Justesen, men fyri ummælaravirksemið í hesum tíðarskeiði sum heild og má síggjast sum liður í teirri lýstu professionaliseringartilgongdini.

Teir flestu av útisetaummælarunum í tíðarskeiðinum 1997-2007 eru síðan tá horvnir úr tí føroyska ummælaralandslagnum. Andrias Justesen flutti til Føroya og hevur ikki ummælt nógv síðan tá, og Páll Isholm flutti somuleiðis heim og hevur ikki verið virkin sum ummælari síðan tá, hóast hann hevur skrivað okkurt ummæli seinni. Anna Mattsson skrivar ikki í føroyskum høpi longur. Ivan Niclasen hevur verið virkin á tí føroyska mentanarpallinum, men ummælir ikki longur. Hugin Eide er ikki virkin á tí føroyska ummælarapallinum longur, men hann arbeiðir framvegis í útisetu sum týðari og útgevari við at breiða føroyskar bókmentir út skilt á tann hátt, at hann seinnu árini hevur týtt føroyskar bøkur til danskt og givið tær út á sínum forlagi Torgard. René Hjelm hevur flutt sítt ummælaravirksemi út á teir tilgildu miðlarnar og bloggar um skaldskap og annað. Tað seinasta ummælið av føroyskum bókmentum, eg dugi at síggja frá hansara hond, er ummælið av *Bókini um tað góða* (2015) eftir Carl Jóhan Jensen á hansara persónliga bloggi í juli 2016[54]. Tann einasti, sum framvegis regluliga ummælir føroyskar bókmentir, er Jógvan Isaksen. Hann hevur seinnu árini ummælt regluliga í *Dimmalætting* og luttekur nú og tá í Kringvarpi Føroya sum ummælari.

Eg havi verið inni á spurninginum um, hvat ein útisetaummælari er, og í arbeiðsskilmarkingini er eingin ivi um, at útisetin er ein, sum hevur bústað uttan fyri Føroyar – oftast í Keypmannahavn – sum skrivar um føroyskar bókmentir í *útisetabløð* og *-tíðarrit* ella í bløð og tíðarrit í Føroyum. Men hugsa vit frameftir og heilt upp í okkara tíð, er útisetaummælarin sum motiv áhugaverdur, tí spurningurin er, hvør í dag kann metast sum útiseti, tá vit illa kunnu tosa um eitt felags almenni longur, og ein spjaðing er farin fram á mentanarpallinum.

54 Sí https://renehjelm.wordpress.com/2016/07/03/ummaelid-um-tad-goda/ (28.12.2020).

Kunnu vit yvirhøvur longur tosa um landafrøðiliga útisetu, ella kann útiseta sigast at vera farin at merkja okkurt heilt annað í dagsins samfelagi? Ber t.d. til at siga, at ein útiseti í dag er ein, sum ikki tekur lut í kjakinum á teimum sosialu miðlunum? Hugsa vit um *outsidaran*, sum onkur útisetaummælari í tíðarskeiðinum 1997-2007 tilvitað nýtir til at skapa sær myndugleika sum tann intellektuelli akademikarin, er kanska eisini áhugavert at seta spurningin, hvør kann metast sum *outsidari* í dag.

Tóroddur Poulsen er komin fyri fleiri ferðir í ritgerðini, hóast hann ikki kann flokkast sum ummælari út frá teimum treytum, eg seti til ummæli í hesari ritgerð, tí hann fæst við ávíst ummælaravirksemi sum part av sínum skaldskapi.[55] Hann hevur í mong á arbeitt í útisetu. Síðan miðlalandslagið grundleggjandi broyttist, og ummælaravirksemi lutvíst hevur flutt seg út á talgildar pallar, ber kanska til at spyrja, í hvønn mun hann kann roknast sum útiseti longur, tí hann tekur lut í kjakinum, sum fer fram um føroyska mentan og bókmentir í sama mun sum føroyingar, ið búgva í Føroyum. Spurningurin er kanska, um tað ikki er so, at tað triðja blómaskeiðið hjá útisetum í Keypmannahavn í tíðarskeiðinum 1997-2007[56], eisini má sigast at vera tað síðsta, tí fortreytirnar eru so grundleggjandi broyttar, at tað gevur lítla meining longur at tosa um landafrøðiliga útisetu, nú tann almenna samrøðan fer fram á internetinum og á ymiskum sosialum miðlum.

Pallsetti ummælarin

Í bókini *Performativ biografisme* lýsir danski bókmentagranskarin Jon Helt Haarder performativa rákið, sum hevur verið at síggja í norðurlendskum bókmentum í fleiri áratíggjur, har rithøvundar pallseta seg sjálvar í sínum tekstum (Haarder 2014:8). Í grein um „pallsetta ummælaran“ lýsir Bergur Djurhuus Hansen eitt skifti til hetta rákið í føroyskum bókmentum við yrkingasavninum *Eru koparrør í himmiríki* (2012) eftir Katrina Ottarsdóttur (Hansen 2017a). Sum nevnt, er

55 Sí kap. 4 um bókaummæli sum skaldskap og skaldskap sum bókaummæli.
56 Sí kap. 7 um søguligt baksýni.

tað ikki ókent, at tey narrativini, sum eyðkenna bókmentarákini, eisini ávirka ummælissøguna[57]. Spurningur kann tó verða settur við, um tað eru bókmentirnar, sum ávirka ummælini, ella um tað eru samfelagslig rák, ið um somu tíð hava ávirkan á bókmentir og ummæli. Undir øllum umstøðum síggjast somu rák í bókmentasøguni og í ummælissøguni. Í innganginum til *Norsk litteraturkritikks historie 1870-2010* verður ummælissøgan sett í samband við parallellsøgur, eitt nú bókmentasøguna, ið ávirkast av somu samfelagsrákum (Furuseth og Vassenden 2016:14-17), og víst verður í øðrum førum á, at rák, sum eru avgerandi fyri listfrøðiligu hugsanina í samtíðini, hava ávirkan á bókmentakritikkin. Dømi verður sett fram um, at nýromantikkin, sum rákið verður nevnt í bókmentasøgunum, ið førdi sálina inn aftur í bókmentirnar, endurspeglast í ummælaravirkseminum hjá norska ummælaranum Carl Nærup (1864-1931) og hansara nýidealistiska ummælarastíli. Í samsvari við bókmentarákið í samtíð síni legði hann dent á tað sálarliga (Furuseth 2016e:81). Samsvarandi ber til at siga, at tað performativa rákið, har rithøvundar pallseta seg sjálvar í sínum tekstum, sæst endurspeglað í føroyskum ummælaravirksemi í tíðarskeiðinum 1997-2007. Spurningurin er, um hetta rák fann sína leið inn í føroyskt ummælaravirksemi, áðrenn tað sást í bókmentunum. Hesin kapittulin um pallsetta ummælaran kastar ljós á tað performativa virksemið hjá føroyskum ummælarum í tíðarskeiðinum 1997-2007. Sigast kann, at er útisetaummælarin fyrst og fremst umboðaður av akademikaranum ella bókmentafrøðinginum sum ummælaratypu, so er pallsetti ummælarin fyrst og fremst umboðaður av rithøvundarummælaranum. Tí snýr hesin kapittulin um pallsetta ummælaran seg eisini um rithøvundarummælaran sum ummælaratypu.

Eins og í Danmark um sama mundið (Jørgensen 1999:15-16) eru teir flestu bókaummælararnir í Føroyum akademikarar í tíðarskeiðinum 1997-2007, men rithøvundarummælararnir fylla eisini nógv í ummælislandslagnum. Ummælararnir, sum eru tiknir fram í hesum kapitli, eru fyrst og fremst rithøvundarummælarar, sum hava gjørt

57 Sí kap. 4 um mimetiskt tekstslag.

nógv vart við seg í tíðarskeiðinum, v.ø.o., teir hava skrivað nógv ummæli.

Eg havi vískt á[58], at rithøvundarummælarar á mangan hátt eru í einari serligari støðu, tí teir hava dupulleiklutir, sum kunnu gera, at teir eru subjektivir og tí verða hildnir óegnaðir at ummæla (Furuseth 2015:15), samstundis sum teir fáa tillutaða eina serliga ávirkan í almenninum (Furuseth 2015:26). Eisini havi eg vískt á, at rithøvundarummælarar hava eina serliga funktión sum ummælarar, tí teir spæla við tekstslagið. Teir skriva ummæli í ymiskum formum, eisini sum part av sínum skaldskapi, og dyrka ofta essayformin. Ummælaravirksemið hjá rithøvundum verður ofta sað sum ein møguleiki at slóða sær veg í tí bókmentaliga almenninum, og tað er vanligt, at ummælaravirksemið er størst, í tí at ummælarin er í ferð við at fóta sær sum rithøvundur, og minkar aftur, eftir at hann er viðurkendur sum fagurbókmentaligur rithøvundur (Furuseth 2015:14-15). Teir eru tí undir einum ávísum illgruna um at misnýta sítt vald sum ummælarar til at føra fram egna poetikk og egnan skaldskap, har ummælið verður nýtt sum lopfjøl inn á bókmentapallin; at teir í ummælunum royna at skapa eina bókmentakritiska sjálvsmynd (Vassenden 2016a:50).

Í hesum kapitlinum verða hesi eyðkennini tikin fram hjá teimum ummælarunum, ið verða settir fram sum umboð fyri rithøvundarummælaran sum ummælaratypu. Í samsvari við endamálið við ritgerðini er hetta liður í kanningini av, hvussu ummælarin skapar sær myndugleika í tekstinum, eins og fleiri av rithøvundarummælunum verða tikin fram sum dømi um, at ummæli ikki bert eru miðlan av list, men eisini eru list í sjálvum sær.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð

Arnbjørn Ó. Dalsgarð (f. 1971) er longu komin fyri fleiri ferðir í hesi ritgerð, og hann er virkin á tí føroyska bókmentapallinum. Hann skrivaði sum nevnt bók um føroysku blaðsøguna, sum kom út í 2002, hann er bókavørður og stuttsøguhøvundur. Hann hevði ein leiklut sum ritstjóri á útisetablaðnum *Oyggjaskeggja* eitt skifti, og hann skrivaði nógv fyri *Fregnir* ta tíð, blaðið kom út. Í tí fyrsta

58 Sí kap. 5 um bókmentaligt sjónarhorn.

blaðnum av *Fregnum*, sum kom út 6. apríl 2001, skrivar Arnbjørn Ó. Dalsgarð í grein við støði í útsøgn hjá Williami Heinesen, at Føroyar eru paradís dilettantanna, og tí er tað kanska serliga torført at vera ummælari í Føroyum. Tú kanst ikki loyva tær at finnast ov nógv ella ov harðliga at øðrum, tí tú ert í støðugum vanda fyri at traðka á tærnar á meginpartinum av Føroya fólki. Arnbjørn Ó. Dalgarð kemur til ta niðurstøðu, at soleiðis má tað vera í einum so lítlum samfelag (Dalsgarð 2001). Hetta kann lesast sum eitt slag av yvirlýsing í hesum blaði, sum kom út í trý ár, hevði fitt av ummælum og hevði ein av Føroya hvassastu ummælarum sum fastan høvund fyri blaðið, nevniliga Carl Jóhan Jensen. Eisini Arnbjørn Ó. Dalsgarð sjálvur hevði onkur hvøss ummæli í blaðnum t.d. av yrkingasavninum *Føroyingar liva ikki av fiski eina* (2003) eftir Steintór Rasmussen.

Ummælini hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð, sum eru skrivað í tíðarskeiðinum 1997-2007, bera ikki boð um, at hann roynir at slóða sær veg sum rithøvundur. Heldur tykist hann vera talsmaður ummælisins skilt á tann hátt, at hann ummælir ikki bara, men leggur dent á týdningin hjá ummælinum, og hann ger burturúr at læra lesaran upp til at skilja týdningin hjá hesum tekstslag. Tó hóskar eygleiðingin hjá Sissel Furuseth um, at ummælaravirksemið hjá rithøvundum oftast er størst, í tí at høvundurin hælar sær spor sum rithøvundur, væl til Arnbjørn Ó. Dalsgarð. Hann ummælir heilt nógv í tíðarskeiðinum 2003-2006, og tað er í 2005, at hann byrjar at fáa stuttsøgur á prent, fyrst í *Míni jólabók* og síðani í tíðarritinum *Vencil*, sum hann fram til 2020 ritstjórnaði saman við Oddfríði M. Rasmussen.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð ger ikki so lítið við at metaummæla í sínum ummælum; hann er tilvitaður um ummælaraleiklutin og tosar um hann í ummælunum. Hetta kann vera ein háttur hjá ummælarum, sum kenna seg ótryggar í leiklutinum, at tosa seg sjálvan upp í lag og at sannføra seg sjálvan og lesaran um, at hann hevur myndugleika at ummæla, men í Arnbjørnsa føri tykist tað sum ein máti at læra føroyingar upp í hesum tekstslagi.

Tá hann ummælir greinasavnið *Dreymar um opin vindeygu* (2003) eftir Kim Simonsen, nýtir hann høvið at tosa til skrivandi føroyingar og fáa teir til at síggja álvarað og dygdina í at tora at seta fram viðkomandi spurningar um eym mál (Dalsgarð 2004). Her sæst eisini ein táttur

av grundarlagnum hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð, tá hann ummælir, tí ummælið er partur av tí almenna kjakinum í samfelagnum, og at umrøða og kjakast um bókmentir er týdningarmikið, eins og tað eisini er týdningarmikið at umrøða og kjakast um onnur viðurskifti í samfelagnum.

Ummæli av yrkingum eftir Steintór Rasmussen

Havandi „yvirlýsingina" hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð í fyrsta nummari av *Fregnum* í huga, er ummælið hjá honum av yrkingasavninum *Føroyingar liva ikki av fiski eina* eftir Steintór Rasmussen, sum hann nevnir „Tráðleysar yrkingar", eitt ummæli, sum má sigast at vera skrivað við tí í huga, at tað ber ikki til altíð at vera bangin fyri at traðka á tærnar á fólki. Ein ummælari má tora at ummæla og siga tað, sum sigast skal, tá tørvur er á tí, uttan at hugsa um avleiðingarnar. Arnbjørn Ó. Dalsgarð byrjar hetta ummælið við einum slagi av metaviðmerking, har hann greiðir frá, at hann einaferð í gáloysni hevur jarðlagt eitt skald, sum ongantíð hevur givið nakra bók út aftur, og hann angrar tað. Við hesari viðmerking vísir Arnbjørn Ó. Dalsgarð, at hann er tilvitaður um sín leiklut sum ummælari, og at hann veit, hvat hann ger, tá hann ummælir og møguliga er hvassorðaður. Hann vísir, at hann er tilvitaður um tað vald, ummælarin hevur á bókmentaøkinum, og at hetta vald at skilmarka kann hava ávirkan á, hvat kemur út á bókamarknaðin. Hesin inngangur ger tó ikki ummælið av yrkingasavninum hjá Steintóri Rasmussen minni sarkastiskt og hvassorðað, men staðfestir, at kritikkurin, sum kemur í ummælinum, er væl umhugsaður.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð sigur í ummælinum, at Steintór Rasmussen hevur skrivað nógv og er ikki óroyndur yrkjari, men hansara royndir síggjast ikki aftur. Yrkingarnar eru einfaldar, onnur hvør byrjar við „eg", og tær minna um Arnbjørnsa egnu yrkingar frá studentatíðini, sum hann hevur tveitt burtur. Ovnýtt innantóm orðafelli, myndamál, og vendingar verða kroyst í nýggj hylki í einari góðvarnari roynd at skapa okkurt nýtt, ektað og óroynt. Um tað var tilætlað, kundi hetta verið „kitsch", skemtiliga smakkleyst, men tá høvundurin roynir at vera álvarsamur og alt annað í senn, er eingin reyður tráður, hvørki í yrkingunum ella savninum, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð.

Virðisdómurin fyllir sera nógv í hesum ummælinum. Arnbjørn Ó. Dalsgarð ger lítið við at greina tekstirnar, men nýtir sitat sum grundgeving fyri góðsku ella vantandi góðsku. Hann nevnir eina yrking og vísir á, hvussu hann við at endurgeva hana fær lýst, hvussu av leið yrkingin er: „Heilt galið sær tað út í yrkingini „Jarðarferðin", har høvundurin at kalla lýsir eina, ja, eina jarðarferð, meðan hann hugleiðir um, ja, eina jarðarferð. Fyri at lýsa hetta, endurgevi eg fyrstu reglu úr hvørjum ørindi" (Dalsgarð 2003b). Hetta er dømi um, at sitatið verður nýtt til at peika á tað, sum ikki riggar í savninum. Tann speiski tónin í ummælinum hómast eisini, tá hann endurtekur „ja, eina jarðarferð".

Fleiri ferðir í ummælinum sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð „tíverri"; at hann tíverri hevur ilt við at fáa eyga á skaldsligu royndir høvundsins, at hetta tíverri ikki er spennandi lestur, og at tað tíverri bara er *ein* góð yrking í savninum. Hetta „tíverri" tykist tó ikki serliga sannførandi, skilt á tann hátt, at høvundurin ikki tykist so harmur, sum hann letst, um, sum hann í innganginum sigur, at muga kolldøma yrkingarnar hjá skaldinum. Um so var, hevði hann kanska valt aðrar orðingar enn, at yrkingarnar minna um tær, sum hann sjálvur skrivaði í studentaskúlanum, og sum hann tíbetur langt síðani hevur tveitt í ruskspannina. Arnbjørn Ó. Dalsgarð heldur, at vístr er skaldið eitt kent navn um „det ganske land", men hann ivast í, hvussu nógv tíma at lesa hugleiðingar „à la" og „de" Steintór Rasmussen. Hesar donsku og fronsku orðingar eru niðrandi, og tær geva ummælinum ein sarkastiskan dám, eins og orðingin í endanum, at heimurin saktans hevði klárað seg uttan tær flestu yrkingarnar hjá Steintóri Rasmussen uttan at gerast fátækari. Tá Arnbjørn Ó. Dalsgarð hevur nýtt júst orðið „niðurgera" í innganginum, so stendur tað lesaranum greitt, at hann er tilvitaður um, at hann lítilsvirðir yrkingarnar, og at tað er vandi fyri, at Steintór Rasmussen ikki fer at geva nakra yrking út aftur eftir hetta ummæli; men um hugsað verður um „yvirlýsingina" í fyrsta nummarinum av *Fregnum*, so er orsøkin allarhelst tann, at hann heldur tað vera týdningarmikið at peika á tað, sum hevur virði, og tað, sum ikki hevur virði. So traðkar tú gamaní á tærnar á teimum flestu av Føroya fólki, men tað má vera so í Føroyum.

Ein glotti er tó sambært Arnbjørn Ó. Dalsgarð í savninum, og tað er yrkingin „Páfuglar", sum hann eisini velur at sitera sum grundgeving.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð skapar sær myndugleika ikki við tilsipingum til bókmentalig rák og annan skaldskap, hóast hann í einum føri nevnir, at tá tað eydnast hjá Steintóri Rasmussen at yrkja, er hann sum ein annar Jóanes Nielsen, og hóast hann vísir, at hann kennir tað, sum Steintór Rasmussen hevur skrivað frammanundan. Hann nýtir orðið „kitsch" eina ferð. Hann sigur „eg" um seg sjálvan, og hann samanber yrkingarnar við sínar egnu. Her fær Arnbjørn Ó. Dalsgarð fram, at hann hevur skrivað yrkingar, men at hann ikki higartil hevur hildið tær vera verdar at geva út. Tað er ein háttur at seta niður á yrkingarnar hjá Steintóri Rasmussen, men tað kann eisini lesast sum ein háttur at trína inn á bókmentapallin sum yrkjari sjálvur, tí við hesum sigur hann, at hann hevur ein ávísan standard sjálvur sum rithøvundur.

Til samanberingar er áhugavert at hyggja at ummælunum hjá Paula Guðjónsson og Kim Simonsen av sama savni. Báðir gera teir meira við at greina savnið og at gera lesaranum greitt, hvat tað er, sum er vansin við yrkingarháttinum hjá Steintóri Rasmussen. Eg komi aftur til ummælið hjá Kim Simonsen, sum eisini er sera tilvitaður um sín leiklut sum ummælari. Hann ger burturúr at føra egna poetikk fram og setir á tann hátt seg sjálvan nógv meira á pall enn Arnbjørn Ó. Dalsgarð ger, hóast ummælini hjá teimum báðum hava eina metafunktión og vísa á týðiligt sjálvstilvit sum ummælarar.

Ummælið hjá Paula Guðjónsson hevur ein meira akademiskan stíl enn tað hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð. Pauli Guðjónsson metir um verkið í byrjanini á ummælinum, tá hann sigur: „Men má tað sigast beinanvegin, at Steintór í savninum ikki megnar at skapa sama huglag, sum eitt nú tá hann ger tónleik" (Guðjónsson 2004). Hann perspektiverar við at vísa, at hann kennir rit- og tónleikaverkið hjá Steintóri Rasmussen, og hann setir nøkur kriterii fram sum grundgeving fyri, at yrkingarnar – tær flestu – ikki eydnast. Hann vísir á, at Steintór Rasmussen í ov stóran mun romantiserar, og hann siterar úr savninum fyri at grundgeva fyri sínum hugsanum:

> Eg hugsi, at endurgevingin her greiðir greitt frá líkari romantisering – dreymurin um at fáa ta farnu tíðina, ið er betri enn (núverandi) veruleikin, aftur. Slík romantisering er veruleikafjar; hon gevur onki til lesaran og lívið – nú. Hon gevur ikki nakað íkast til nakra umhugsan. Romantiseringin er ikki stórt annað enn dagdroyming (Guðjónsson 2004).

Sum yvirskriftirnar „Tóni", „Mál" og „At enda við tveimum villum" bera boð um, viðger Pauli Guðjónsson savnið ikki bara innihaldsliga, men eisini málsliga og tóna viðvíkjandi. Tá tað kemur til tað málsliga, setir Pauli Guðjónsson eisini síni metingarkriterii fram og grundgevur út frá teimum við at vísa á, at Steintór Rasmussen nýtir eina blanding av gerandismáli og hátíðarligum máli, sum ikki hóskar. Hann nýtir ein hátíðarligan, ella rættari siðbundnan, málbúna við klassiskum metaforum, orðasamansetingum og setningsbygnaði, sigur hann, og skapar eitt ónatúrligt mál. Tað skapar frástøðu til lesaran, tí tað brýtur frá hansara natúrliga gerandismáli og eisini frá tí máli, sum hevur verið ráðandi í føroyskum skaldskapi seinastu nógvu árini. Pauli Guðjónsson vísir síðani á, at stórur partur av yrkingasavninum hevur henda siðbundna og klassiska málbúnan og tað romantiserandi og idealiserandi innihaldið. Kortini eru góðar og vælskrivaðar yrkingar eisini í savninum, og tær eru góðar, tí málið er gerandisligt, og yrkingarnar geva í stóran mun assosiatiónir til lesaran og tilveruna sum heild. Tó kritiserar Pauli Guðjónsson endan á einari yrking, sum kemur við niðurstøðu og stýrir lesaranum til at taka støðu heldur enn at hugsa frítt.

Niðurstøðan í ummælinum hjá Paula Guðjónsson av yrkingasavninum hjá Steintóri Rasmussen er nøkulunda tann sama, sum ummælið hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð kemur til, men munurin er tann, at har virðisdómurin fyllir tað mesta í ummælinum hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð, er virðisdómurin í ummælinum hjá Paula Guðjónsson bert niðurstøða av tí, sum fyllir mest í ummælinum, nevniliga greining og viðgerð av tekstinum eins og lýsing av teimum kriterium, sum dómurin er feldur út frá.

Báðir ummælarar koma til ta niðurstøðu, at tær flestu yrkingarnar standa ikki mát við tað, sum kravt verður av skaldskapi, og báðir koma til, at tað hóast alt glógvar í í støðum – Arnbjørn Ó. Dalsgarð sær eina góða yrking, meðan Pauli Guðjónsson sær fýra, og av teimum fýra er ein tann sama, sum Arnbjørn Ó. Dalsgarð sær.

Ummælini eru tó fullkomuliga ymisk. Tað hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð er tilvitað um seg sjálvt, og ummælarin tosar um seg sjálvan og sínar egnu yrkingar, meðan tað hjá Paula Guðjónsson als ikki setir egnan persón á pall. Tað hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð er metatekstligt, sjálvpallsetandi og sarkastiskt, og tað kemur við virðisdómi uttan at koma við millumrokningunum, meðan tað hjá Paula Guðjónsson er greinandi og metandi út frá ásettum kriterium og hevur onga metatekstliga funktión ella nakra tilvísing til egnan persón. Pauli Guðjónsson nýtir orðið „eg" um seg sjálvan, men skiftir og tosar um „lesaran" og ger seg soleiðis til talsmann fyri ein almennan lesara. Ummælið hjá Paula Guðjónsson er akademiskt og grundgevandi, meðan ummælið hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð fyrst og fremst vekur ans stíli viðvíkjandi.

Pauli Guðjónsson úttalar við egnum orðum eina listafatan, sum er skyld við avantgardismuna og vil síggja okkurt nýtt, hava eitt mál, sum brýtur frá siðbundnum skaldskaparmáli og kann vekja okkurt í lesaranum, ið eggjar til umhugsan. Innihaldsliga skal skaldskapurin ikki vera afturlítandi og romantiserandi, men hava okkurt at bera menniskjanum í nútíðini, sum ikki bara er dagdroyming ella dagdvølja.

Munirnir millum Arnbjørn Ó. Dalsgarð og Paula Guðjónsson sum ummælarar vísa á munin millum rithøvundin og akademikaran sum ummælaratypur. Tá tað er sagt, hevur Pauli Guðjónsson eisini skrivað stuttsøgur og yrkingar, sum eru prentaðar í stuttsøgusavninum *Russiskur dansur* (2001) og tíðarritinum *Outsider Magazin*, sum eg komi aftur til, men sum ummælari er hann fyrst og fremst akademikari, meðan Arnbjørn Ó. Dalsgarð í størri mun umboðar rithøvundarummælaran sum ummælaratypu, ið hevur tað sum part av sínum endamáli at pallseta seg sjálvan.

Ummæli av Tóroddi Poulsen

Samanberingin millum ummælini hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð, sum stinga seg burtur úr heildini av føroyskum ummælum við sínum sarkastiska og metatekstsliga stíli, og ummælið hjá Paula Guðjónsson, sum er akademiskt, siðiligt og leggur seg eftir at grundgeva fyri sínum metingum, vísir, at Arnbjørn Ó. Dalsgarð nýtir síni evni at vekja ans og at fella dómar sum ummælari og rithøvundur fram um at virka

sum greinandi, grundgevandi og vegleiðandi metari av tekstinum. Tað er áhugavert, at Arnbjørn Ó. Dalsgarð skrivar eitt annað ummæli í somu útgávu av *Fregnum*, sum bregður nógv frá ummælinum av yrkingasavninum hjá Steintóri Rasmussen, bæði innihaldsliga, og tá tað kemur til stíl. Hetta vísir, at hann letur ummælta verkið og sína áskoðan lita tekstin fram um at lata ein ávísan form stýra ummælinum, eins og t.d. Páll Isholm ger.

Talan er um ummælið av yrkingasavninum *Svøvnlendingur rættar kumpass* (2003) eftir Tórodd Poulsen. Ummælið hevur heitið „Orðligt smør", og yvirskriftin ber boð um eitt áhugavert ummæli stíli viðvíkjandi. Tað byrjar við einari samanbering, har tað at ummæla Tórodd Poulsen er sum at smyrja ísakalt smør á eina nýbakaða franskbreyðflís. Hann nýtir sostatt matmyndamál. Yrkingasavnið verður síðani samanborið við eitt putlispæl, sum lesarin kann leggja, og Arnbjørn Ó. Dalsgarð ber eisini móttøkuna av savninum hjá Tóroddi Poulsen saman við at baka eftir egnari uppskrift. Arnbjørn Ó. Dalsgarð sigur við hesum, at skaldið letur nógv upp í hendurnar á lesaranum, og hetta er, sigur hann, partur av dekonstruktionistiska stílinum hjá Tóroddi Poulsen. Frá byrjan nýtir Arnbjørn Ó. Dalsgarð nógv myndamál, og hann perspektiverar eisini við heilt stutt at lýsa dekonstruktiónina, har yrkingarnar verða til í høvdinum á lesaranum og ikki á hvíta pappírinum. Tú verður, sigur hann, rikin úr øllum vanligum bókmentaligum konventiónum og noyðist at taka støðu til, um hetta, sum høvundurin ger, er loyvt.

Hóast Arnbjørn Ó. Dalsgarð perspektiverar til dekonstruktiónina og vísir, at hann skilir fortreytirnar, sum skaldskapurin hjá Tóroddi Poulsen skal lesast út frá, so skapar hann sær kanska fyrst og fremst myndugleika í hesum ummælinum eins og í tí omanfyri viðgjørda við sínum sermerkta stíli og sínum máta at viðmerkja leiklutin hjá ummælaranum. Hetta er máti at pallseta ummælaran.

Eins og yvirskriftin er myndamálslig, er alt ummælið merkt av myndamáli, og kanska ber til at tosa um bókmentaliga smittu, tí ummælið vísir á, hvussu góður Tóroddur Poulsen er við orðini, og at hansara uppgáva tykist vera at vísa okkum á teir óteljandi møguleikarnar, sum orðini geva okkum. Tað tykist, sum Arnbjørn Ó. Dalsgarð tekur hetta til sín og skrivar skaldsliga á heilt øðrvísi hátt enn

í ummælinum av savninum eftir Steintór Rasmussen. Tað er, sum orðini hjá Tóroddi Poulsen, ið sambært Arnbjørn Ó. Dalsgarð eru sum smør, seta gongd í skaldsliga síðuna hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð og ávirka ummælarastílin. Dømi um skaldsligt mál er: „Yrkingarnar flóta í einum orðahavi, har tú eygleiðir og upplivir brotamyndir, ið geva tær rættin og amboðini til at baka eftir egnari uppskrift“ (Dalsgarð 2003a).

Virðisdómurin er líka greiður sum í ummælinum av yrkingasavninum hjá Steintóri Rasmussen. Hann ikki bara rósar savninum, men ynskir sær, at fleiri føroyingar høvdu dirvi at skriva eins og Tóroddur Poulsen, og hann takkar skaldinum hátíðarliga móti endanum.

Metatekstliga funktiónin er sum sagt aftur til staðar í hesum ummælinum, og ummælarin vísir tilvit um sín leiklut, sum ikki bara er at viðgera eitt verk, ið er líka torført at ummæla, sum tað er at smyrja ísakalt smør á eina nýbakaða franskbreyðflís, men eisini at hugsa um sín móttakarabólk, sum er breiður og ikki bara ein smalur bólkur av bókmentafrøðingum. Alt hetta úttalar ummælarin í innganginum, og tað skapar eitt rúm í tekstinum, sum letur upp fyri ummælaranum, einum *ethos*, sum peikar á seg sjálvt og sín torføra ummælaraleiklut. Hóast ummælarin sum sagt vísir til bókmentarák (dekonstruktión), so skapar hann sær fyrst og fremst myndugleika við sjálvur í veruleikanum at gera nakað av tí sama, sum hann rósar Tóroddi Poulsen fyri: at sleppa konventiónunum og skapa sítt egna rúm til málið at virka frítt í. Arnbjørn Ó. Dalsgarð velur ein frían ummælarastíl. Hann heldur seg ikki fyrst og fremst til journalistiskar reglur um at tosa skilliga, tí hann nýtir myndamál, sum krevur umhugsni, og hann kennir seg ikki bundnan av at gera nógv burturúr at grundgeva sakliga fyri sínum metingum, men velur listaliga frælsa stílin.

At enda nýtir hann meira matmyndamál, og tað er, sum áður viðgjørt í hesari ritgerð[59], sera útbreitt bæði í bókmentum og bókmentaummælum. Eg havi nevnt dømi úr *Bíbliuni* og úr skaldskapinum hjá Petter Dass, og Arnbjørn Ó. Dalsgarð sigur: „Orðini bráðna líkasum, tá tú lesur tey, sum smør, ið hevur staðið í innihita í ein tíma. Og tú smakkar innihaldið í orðunum, sum eru rein, loyst úr kontekstuellari niðurskriving og politiskum málloysi“ (Dalsgarð 2003a).

59 Sí kap. 4 um móttøkuna av skaldskapi sum kropsligari uppliving.

Metatekstliga funktiónin sæst aftur í næstan øllum ummælunum, sum Arnbjørn skrivar í tíðarskeiðinum 1997-2007, og í ummælinum av skaldsøguni hjá Carl Jóhan Jensen sigur hann við einum skálkabrosi: „Eg fari kortini, við teirri ábyrgd, ið liggur á herðum ummælarans, at heita á øll, ið ikki duga at flenna, um ikki at lesa *Ó-søgur um djevulskap*. Men annars kann eg ikki annað enn viðmæla henni“ (Dalsgarð 2006). Tónin er skemtandi, og hetta er enn eitt høvi at peika á leiklut ummælarans og hansara ábyrgd, tá tað kemur til at meta um skaldskap og at viðmæla ella frámæla bøkur, og tað tykist vera ein av funktiónunum, ið Arnbjørn Ó. Dalsgarð sær sum týdningarmiklar fyri seg sum ummælari.

Eg havi út frá øðrum ummælum víst á, at Arnbjørn Ó. Dalsgarð ikki fyrst og fremst leggur seg eftir at greiða frá millumrokningunum, sum føra hann fram til virðismeting av skaldskapinum. Við øðrum orðum leggur hann seg ikki fyrst og fremst eftir grundgevingunum fyri sínari listafatan. Tað er tó ikki so, at vit ikki fáa eina fatan av teimum kriterium, sum Arnbjørn Ó. Dalsgarð setir til skaldskap. Í ummælinum av *Glansbílætasamlarunum* (2005) eftir Jóanes Nielsen verður greitt frá, hvat tað er við bókini, sum ger, at høvundurin enn hevur nakað á mál, áðrenn hann hevur skrivað eina heilt væleydnaða og samanhangandi skaldsøgu. Talan er um, at har er ov nógv av øllum í, ov nógvir persónar, og kortini eru persónarnir ov illa lýstir. Teir eru ov tilgjørdir (Dalsgarð 2005b).

Í ummælinum av yrkingasavninum eftir Steintór Rasmussen fáa vit eina fatan av, at tað hevur týdning, at skaldskapur nertur við okkurt í menniskjanum: „Skaldið megnar ikki at flyta algildar spurningar um eitt nú kærleika, deyða, lív, lagnu, modernitet og alheimsgerð frá sínum egna hugaheimi yvir í lesarans“ (Dalsgarð 2003b). Í ummælinum av *Yrkingum* eftir Oddfríð M. Rasmussen ger Arnbjørn Ó. Dalsgarð burtur úr sínari egnu uppliving av yrkingunum:

> eg havi ofta havt ilt við at fáa nakað burturúr yrkingunum hjá Oddfríði. Stundum hava tær virkað mær speirekandi og sniðfundigar á ein merkiligan og undirskiltan hátt, sum vóru tær skrivaðar til nakrar heilt fáar lesarar. Havi tí eisini upplivað tær sum afturlatnar og at kalla ómøguligar at vinda nakað burturúr (Dalsgarð 2005a).

Eitt krav til skaldskap er í báðum hesum førum, at yrkingarnar mugu kunna flyta seg úr heiminum hjá skaldinum og yvir í heimin hjá lesaranum. Tær mugu kunna upplivast sum opnar, so at lesarin fær nakað burturúr. Og tá Arnbjørn Ó. Dalsgarð rósar hesum nýggja savninum eftir Oddfríð M. Rasmussen, sum hann ummælir, er tað eisini kensluna, sum savnið vekur í honum, hann nevnir, og hetta at koma í samband við tekstin:

> Tað kenst veruliga sum yrkingarnar bløða, og tað er tí ikki heilt av leið við plástrinum á permuni ... Sum nevnt var tað torført at finna veg inn í summar av yrkingunum ... Kortini fekk eg undir lesnaðinum fleiri ferðir eina kenslu av at vera í samrøðu við tekstin, og tað er í sjálvum sær eitt pluss fyri savnið í síni heild (Dalsgarð 2005a).

Tá skaldskapur við øðrum orðum røkkur sínum endamáli, hevur lesarin funnið inn til tekstin, hann hevur fingið okkurt burturúr – eina lesarauppliving – og hann hevur fingið eina kenslu av at vera í samrøðu við tekstin. Henda samrøðan, sum Arnbjørn Ó. Dalsgarð lýsir, kann knýtast at ástøðinum hjá Ritu Felski um „attachment", ella tilknýti, sum hon sær sum eina berandi drívmegi, ið skapar samband millum teir ymisku leikararnar á bókmentapallinum.

Samanumtikið umboðar Arnbjørn Ó. Dalsgarð rithøvundarummælaran sum ummælaratypu fyrst og fremst við, at hann er sjónligur sum ummælari. Hann pallsetir seg sum ummælara og peikar á seg sjálvan sum skrivandi persón. Hann skilir seg frá tí akademiska ummælaranum við, at greining og objektivar grundgevingar ikki fylla nógv í hansara ummælum. Stíli viðvíkjandi skilir hann seg frá tí journalistiska ummælaranum við at nýta myndamál, sum ikki fyrst og fremst hevur til endamáls at miðla listina stutt og greitt, men eisini at vera list í sjálvum sær. Ummælið „Orðligt smør" er dømi um hetta.

Oddfríður M. Rasmussen

Oddfríður M. Rasmussen (f. 1969), lærari og rithøvundur, er ein av teimum ummælarunum, sum hava úttalað seg alment um at ummæla. Í fyrilestri á Mentanarnáttini í juni 2013 segði hann soleiðis um seg sjálvan sum ummælara:

> Hvat eru vit? Hvat kallað [sic] vit okkum sjálv? Eg eri lærari, tí at eg allar arbeiðsdagar í vikuni, alt árið undirvísi í fólkaskúlanum. Eg eri rithøvundur, tí at eg næstan allar dagar í vikuni, alt árið fáist við at skrivað [sic] bókmentir. Í fjør setti eg mær fyri, at eg skuldi ummæla øll yrkignasøvnini [sic], sum komu út, og leggja tey á heimasíðuna hjá Vencli.
> Og eg so gjørdi.
> Kanska eri eg ummælari eisini?
> Líka veit eg!
> Eg meti meg tó ikki sum ein ummælara, og tað haldi eg ikki, at nakar føroyingur við fullum rætti kann kalla seg. Til at vinna sær heitið sum ummælari, so skal onkur gjalda hesum fólki fyri eitt starv, sum eitur ummælari. Tey, ið fáa løn fyri at ummæla í Føroyum er sjáldsamari enn lundi á jólanátt, og tí hava vit ikki ummælarastarvið í Føroyum (Rasmussen 2013).

Út frá hesum hugleiðingum um ummælaravirksemið er tað týðiligt, at Oddfríður M. Rasmussen sær seg sjálvan fyrst og fremst sum lærara og rithøvund og síðani kanska sum ummælara. Hann ivast í, um hann er ummælari, tí hann fær ikki løn fyri at ummæla. Útsøgnin er meira ein roynd at varpa ljós á ummælaraviðurskiftini í Føroyum enn at lýsa seg sjálvan sum skrivandi persón. Kortini er tað áhugavert, at samstundis sum Oddfríður M. Rasmussen ikki metir seg sum ummælara, tí eingin fær løn fyri at ummæla í Føroyum, metir hann seg sum rithøvund, tí hann alt árið fæst við at skriva bókmentir, hóast hann heldur ikki fær løn fyri tað. Um sama skilvísi skal galda í báðum hesum førum, so kann eingin við fullum rætti kalla seg rithøvund í Føroyum og heldur ikki í nógvum øðrum londum. Lýsingin hjá Oddfríði M. Rasmussen av ummælaranum í Føroyum í 2013 er ein staðfesting av, at tann trotmentan, sum eg havi verið inni á ger seg galdandi í tí føroyska bókmentaalmenninum[60], framvegis er ein veruleiki um hetta mundið, og at professionaliseringartilgongdin, sum er farin fram av føroyskum ummælaravirksemi, síðan tey fyrstu

60 Sí kap. 2 um ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi.

ummælini vórðu skrivað[61], ikki er komin á mál. Við útsøgnini „kanska eri eg ummælari eisini? Líka veit eg!“, vísir Oddfríður M. Rasmussen á og kritiserar eina líkasælu, sum ræður, tá tað kemur til at ummæla í Føroyum.

Hóast Oddfríður M. Rasmussen ikki metir seg sum ummælara, er hann í føroyskum høpi ein av teimum, sum hava ummælt nógv, og hann hevur í ávísum tíðarskeiðum sett sær fyri at ummæla nógv. Í tíðarskeiðinum 1997-2007 ummælti Oddfríður M. Rasmussen søgusavn eftir Rakel Helmsdal og yrkingasøvn eftir Tórodd Poulsen og Alexandur Kristiansen í ávikavist útisetablaðnum *Oyggjaskeggja*, *Sosialinum* og *Dimmalætting*. Í øðrum teksti um ummæli lýsir Oddfríður M. Rasmussen tað góða ummælið, sum hann sær tað:

> Hvat er so eitt gott ummæli? Nógvar eru allýsingarnar um hetta at ummæla ... tað er ein, ið objektivt dugir væl at mæla um og grundgeva fyri listaligu dygdum og ódygdum í einum listaverki. Objektiviteturin kann sjálvandi lýsast soleiðis, at hann ikki er meira objektivur enn so, at eitt subjekt ber hann fram (Rasmussen 2011).

Oddfríður M. Rasmussen sær tað ideella ummælið sum eitt, ið strembar eftir objektiviteti og eftir at grundgeva fyri listaligu dygdunum og ódygdunum í einum verki. Hann leggur tó inn í sína lýsing av tí objektiva ummælinum ein iva um møguleikan fyri at kunna virka fullkomiliga objektivt sum ummælari og nemur soleiðis óbeinleiðis við tað, sum eg havi lýst sum tað sætta paradoksið[62], nevniliga at ummælið leggur seg eftir objektivum metingarkriterium, men er samstundis per definitión subjektivt.

Hann sær tó stórar forðingar fyri, at ummælarin fær gjørt sítt arbeiði, tí at forløgini ikki hava bókmentaráðgeving:

> Trupulleikin við bókaútgávum er, at tey privatu forløgini ikki kunnu fíggja bókmentaráðgevum [sic], ið hava til arbeiði at ráðgeva høvundum. Aðrastaðni tekur tað næstan líka drúgva tíð hjá bókmentaráðgevum at viðgera eina bó,m [sic] sum tað tekur rithøvindinum [sic] at skriva hana. Tá ið so ummælarin er fyrsti bókmentaráðgevin, so verður arbeiðið, ið forlagið átti at gjørt, gjørt úti í miðlunum. Tí gerast ummælini ofta ósaklig, niðurgerandi frámæli í staðin fyri væl grundgivin, objektiv ummæli (Rasmussen 2011).

61 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn og 7 um ummæli í útisetu.
62 Sí kap. 2 um paradoks í bókmentaummælinum sum granskingarøki.

Her vísir Oddfríður M. Rasmussen aftur á tilvit um eina trotmentan, sum sæst í fleiri liðum í teirri føroysku bókmentaligu ringrásini við tað, at ikki allir aktørar í nóg stóran mun spæla ein leiklut. Aftur her leggur hann áherðslu á objektivitet, og at væl verður grundgivið í ummælum.

Oddfríður M. Rasmussen finst at tónleikaummælarum í Útvarpi Føroya fyri, at teir gloyma listaverkið og seta seg sjálvar í fokus:

> er tíanverri talan um smakkidómarar, har hesir sokallaðu ummælarar seta seg sjálvar í fokus, og gloyma sjálvt listaverkið. Hvat hevur tað við eina fløgu at gera, at hon ikki er so góð at lurta eftir, meðan koyrt verður í bili, ella at tónleikurin er góður at renna eftir, góður at arbeiða til. Hesi, sum skulu eitast at ummæla, siga ikki hví eitt lag er gott, hvat ger lagið gott fyri hetta tónleikaslagið. Ber ikki til objektivt og við tónleikainnliti at grundgeva fyri, hví eitt lag ella ein fløga er góð, so er ikki talan um eitt ummmæli [sic], men eitt viðmæli ella eitt frámæli, har objektiviteturin ikki kann grundgevast, uttan so at teir/tey, ið mæla um noyðast at krydda síni úttalilsi við egnum fordómum, egnum smakki, sum onki hevur við sjálvt verkið at gera, men sum hevur alt at gera við persónin, ið úttalar seg. Hesi fólkini vilja heldur siga Føroya fólki, hvørji tey eru. Hvussu ofta siga tey ikki: „Eg haldi … mær dámar ikki hatta …“ Slík úttalilsi siga meira um persónin, enn um verkið, ið verður ummælt (2011).

Út frá sínum almennu lýsingum av ummælinum sum tekstslag og ummælarans uppgávu og funktión leggur Oddfríður M. Rasmussen sostatt dent á, at ummæli skulu viðgera sjálvt verkið, og tey skulu grundgeva fyri sínum metingum. Ummælarin skal ikki seta fokus á seg sjálvan sum ummælara, sum upplivandi ella sansandi veru. Tað, sum Oddfríður M. Rasmussen orðar um føroysk útvarpsummæli,

er í samsvari við tað, sum hendir í øðrum londum, og líkist tí, sum eg havi nevnt, at Horace Engdahl sjey ár seinni sigur um, hvønn veg ummæli hava ment seg í okkara samfelag seinnu árini, nevniliga til at vera sjálvupptikin og tosa um alt annað enn at ummæla verkið (Stidsen 2018:34). Oddfríður M. Rasmussen talar her at tí performativa rákinum, sum hevur tikið seg upp innan føroyskt ummælaravirksemi.

Í yrkingini „Einvegis" úr savninum *Kvørkringar* (2002) skrivar Oddfríður M. Rasmussen eisini óbeinleiðis um at ummæla:

> Hví skal eg keypa skógvar nummar 44
> Tí øll onnur brúka skógvar nummar 44?
> Hví skal eg eta kál
> Tí øll onnur eta kál?
> Hví skal eg snakka um bókmentir
> Tí ongin annar snakkar um bókmentir?
> Eg havi ikki oyru
> Tí øll onnur hava oyru
> Men eg havi munn
> Tí øll onnur tiga.
> (Rasmussen 2002b:22).

Tá Høgni Egholm Magnussen (f. 1977) ummælti *Kvørkringar*, tók hann eina reglu úr hesari yrking, lagaði hana til og setti hana sum yvirskrift yvir ummælið „At snakka um bókmentir". Hann javnsetir tað at „snakka um bókmentir" við at siga sína hugsan um bókmentir og meta um góðskuna í teimum, sum er ein av uppgávunum hjá einum ummælara: „Yrkingin ... eggjar kanska til at verða ... meira virkin at gera viðmerkingar og siga sína hugsan um bókmentir – meta um góðskuna" (Magnussen 2002). Yrkingin kann lesast sum ein tulking hjá Oddfríði M. Rasmussen av ummælaraleiklutinum. Ummælarin fylgir ikki við streyminum. Hann hoyrir tað, sum onnur ikki hoyra, og talar, tá tørvur er á tí. Í yrkingini verður tað at ummæla sæð sum ein skylda til at taka lut í tí almenna kjakinum í samfelagnum um bókmentir, um mann er ein av teimum fáu, sum hava evnini til tað. Henda skylda at ummæla endurspeglast eisini í, at Oddfríður M. Rasmussen setti sær fyri at ummæla øll yrkingasøvnini, sum komu út tað eina árið (Rasmussen 2013).

Ummæli av yrkingum eftir Tórodd Poulsen

Í ummælinum av *Húðsemi* (2001) eftir Tórodd Poulsen greiðir Oddfríður M. Rasmussen frá, hvussu hann í spenningi bíðar eftir yrkingasøvnunum hjá Tóroddi Poulsen, hvussu hann gleðir seg, hvørja ferð hann lesur Tórodd, at yrkingasøvn hansara ongantíð líkjast, og lýsir so, hvussu tað er at fáa bókina í hondina: „Tekur tú bókina í hondina, er hon heldur ikki sum aðrar bøkur. Hon er fýrakantað. Kápan er prýdd við vøkrum lillaliti, har tú hómar nøkur sveittahár, kanska á handabakinum" (Rasmussen 2002a). Í hesi reint subjektivu lýsing av teirri lillalittu permuni rósar hann Tóroddi Poulsen fyri, at bøkur hansara ongantíð líkjast. Júst tað sama eyðkennir yrkingasøvnini hjá Oddfríði M. Rasmussen sjálvum. Tey líkjast ikki og eru sera ymisk í formi.

Oddfríður M. Rasmussen endar ummælið við væntanunum, hann hevur til bøkurnar hjá Tóroddi Poulsen, tá tær koma út: „Eg gleði meg longu til eg fái ta næstu bókina millum hendurnar. Bøkurnar hjá Tóroddi smakka altíð so væl aftur við røstum kjøti, øli og snapsi. Tær kunnu eisini lesast afturvið dunnu ella gás og jólaøl" (Rasmussen 2002a). Ummælið fær her ta áðurnevndu kropsligu dimensjónina inn, har bókin næstan bíbilskt verður gjørd til nakað, hann skal fáa millum hendurnar og eta (Bíblia. Ezekiel 3:1-3). Bíbilska myndamálið um at gera seg til eitt við boðskapin gevur eisini meining at nýta her, tí eins og ummælarin hevur etið yrkingasavnið hjá Tóroddi Poulsen, so borðreiðir hann nú sítt ummæli fyri lesaranum við læntum innihaldi úr verkinum, tá hann við at siga, at savnið smakkar væl aftur við røstum kjøti, sipar til allan matin og átið í *Húðsemi*: „putursukurátari ... wienarbreyðslongd ... vellingin" (Poulsen, Tóroddur 2001:19), „himmalsins súpan" (Poulsen, Tóroddur 2001:32), „beyersku pylsuna" (Poulsen, Tóroddur 2001:53), „nýsælendsku seyðarhøvdini" (Poulsen, Tóroddur 2001:54), „laksurin hevur roykt seg" (Poulsen, Tóroddur 2001:65), „áðrenn tú veitst av er døgurðin kaldur" (Poulsen, Tóroddur 2001:69), „greipu av røstum fiski" (Poulsen, Tóroddur 2001:93). Tað, sum í Bíbliuni er ramasta álvara, er tó í ummælinum groteskt skemt,

har ymisk sløg av mati verða reksað upp í einari roynd at halda fram í stílinum hjá Tóroddi Poulsen. Oddfríður M. Rasmussen endar við at endurgeva eina yrking úr savninum:

> Tvøst
> segði hann
>
> tvøst smakkar væl
> tvøst er gott
> og tað rennur upp aftur
>
> spik
> segði hon
> spik
>
> spik er nógv verri.
> (Poulsen, Tóroddur 2001:43).

Her undirstrikar Oddfríður M. Rasmussen matmyndamálið, sum hann í ummælinum hermir eftir, á ein hátt, sum ger, at ummælið fyrst og fremst vendir sær til yrkjaran og ikki til lesaran. Myndamálið hjá Oddfríði M. Rasmussen er tó ógreitt og kann geva ta fatan, at yrkingarnar hjá Tóroddi Poulsen bert eru krydd og ískoyti og ikki høvuðsrættur, hóast tað neyvan er ætlan ummælarans. Hetta er dømi um, at málburðurin í skaldskapinum smittar málburðin í ummælinum, og ummælarin ger seg til eitt við tekstin, so tað sæst heilt ítøkiliga, at ummælið er avleitt tekstlag, ein tekstur sum er avleiddur av skaldsliga tekstinum.

Við at halda seg í sama retorikki sum yrkjarin fer ummælarin óbeinleiðis í samrøðu við hann. Henda samrøða fer fram í einum virtuellum veruleika, einum tykisveruleika, sum Sissel Furuseth nevnir hann við støði í ástøði hjá Carolyn Miller; í einum felagsskapi, sum líkist, men eisini kann fría seg frá, ítøkiligum samfelagsligum sambondum (Furuseth 2016a:463). Ummælarin roynir í hesum føri ikki at byggja brýr millum tekst og lesara, sum Horace Engdahl metir vera eina funktión hjá ummælaranum[63], men skapar heldur ein eksklusivan

63 Sí kap. 4 um ummælið sum relatiónir millum menniskju.

felagsskap millum ummælara og yrkjara. Heldur enn at byggja brúgv til lesaran kann hetta skapa frástøðu til hansara og møguliga skapa eina mynd av ummælaranum í somu sferu sum rithøvundurin. Hetta kann verða gjørt fyri at skapa sær myndugleika sum ummælari ella fyri at rudda sær sess millum rithøvundarnar. Oddfríður M. Rasmussen er her fyri stuttum útbúgvin á Rithøvundaskúlanum í Keypmannahavn, sum hann gekk á frá 1998 til 2000. Ár 2000 var eisini árið, tá hann fekk Mentanarvirðisløn M. A. Jacobsens fyri yrkingasavnið *Rás* (2000). Oddfríður M. Rasmussen er við øðrum orðum í ferð við at ogna sær sess millum teir virdu føroysku rithøvundarnar. At hann heldur seg í sama retorikki sum Tóroddur Poulsen er við til at knýta hann nærri at honum sum yrkjara, og henda „samrøðan", sum fer fram millum yrkjararnar, kann vera við til at styrkja tann ímyndaða felagsskapin, sum setir Oddfríð M. Rasmussen millum rithøvundarnar. Hetta er ein eksklusivur felagsskapur, sum bert tey, ið hava evni til at taka lut í undirskiltu samrøðuni, kunnu vera partur av. Hetta kann lesast sum eitt slag av óbeinleiðis pallseting av ummælaranum. Ummælaraleikluturin er í hesum føri ikki tann námsfrøðiligi, sum John Chr. Jørgensen tosar um, men líkist heldur *stílummælaranum* við tí tilvitaða skrýdda málinum[64].

Oddfríður M. Rasmussen kallar bókina hjá Tóroddi Poulsen eina skapanarsvitu og perspektiverar við at vísa til grikska tragediu. Hann greiðir frá teimum japonsku yrkingaformunum *haiku* og *tanka*. Hann dregur ta bestu haiku-yrkingina fram og vísir eisini á dømi um tanka-yrking. Her er hann tann námsfrøðiligi ummælarin, sum vísir á góðsku og grundgevur við sitatum úr tekstinum.

Hann bendir á metarøddina í yrkingasavninum, perspektiverar til ritverkið og vísir, hvussu Tóroddur Poulsen ummælir seg sjálvan í yrkingunum, áðrenn nakar annar ger tað. Hann ger vart við, at eitt slag av automatskrift, sum beatnikkarnir skrivaðu, hómast í savninum, perspektiverar til eina yrking eftir William S. Burroughs og staðfestir, at Tóroddur Poulsen byggir á herðarnar á øðrum, men er samstundis sín egin. Hann er upprunaligur, sigur Oddfríður M. Rasmussen, og hetta er eitt góðskukriterium, sum hann metir

64 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

skaldskap eftir. Tað sigur hann beinleiðis: „Hetta vil ikki siga, at bókin ikki er upprunalig, tá ið Tóroddur letur seg inspirera av so nógvur [sic] formum, rákum og yrkjarum, tí tað er jú tað, sum skaldskapur er um; at skriva á herarnar [sic] á teimum, sum undanfarin eru“ (Rasmussen 2002a). Oddfríður M. Rasmussen skapar sær myndugleika við at perspektivera til bókmentaligar formar og rák og til ritverkið hjá høvundinum eins og til aðrar høvundar. Hann ger eisini tað, sum hann omanfyri sigur, at ein ummælari skal: grundgevur fyri sínum metingum við at vísa til metingarkriteriini og dømi úr tekstinum um góðsku. Í hesum førinum vísir hann bara á góðsku, tí dómurin av savninum er positivur. Hann finst ikki at nøkrum. Hann vísir at enda á, at Tóroddur Poulsen er tann fyrsti, sum yrkir um oljuna. Hetta verður eisini lýst sum ein dygd, tí hann ger okkurt nýtt, og tað verður mett sum nakað positivt. Oddfríður M. Rasmussen úttalar seg um bókmentir við at vísa, at hann kennir føroyskar bókmentir nóg væl til at síggja, tá okkurt nýtt stingur seg upp.

Oddfríður M. Rasmussen sigur „eg“ um seg sjálvan í ummælinum, og hann lýsir kenslur sínar í møtinum við tekstin, men hann pallsetir ikki ummælaraleiklutin, sum t.d. Arnbjørn Ó. Dalsgarð ger. Tilvitið um egnan leiklut, sum hann lýsir í greinum um at ummæla, sæst ikki beinleiðis í ummælunum, men hugburðurin, sum hann í greinunum lýsir ummælaran at hava, endurspeglast í ummælarastílinum, ið hann eisini sigur kemur frá einum subjekti (Rasmussen 2011). Tað subjektið er sjónligt í ummælinum hjá Oddfríði M. Rasmussen.

Ummæli av yrkingum eftir Alexandur Kristiansen

Í ummælinum av yrkingasavninum *Báðumegin blátt* (2005) eftir Alexandur Kristiansen lýsir Oddfríður M. Rasmussen, hvørja ávirkan yrkingin „Mítt føðiland“ hevur á hann:

> Eg havi valt júst hetta, tí at her skínur ígjøgnum eitt eyðkenni hjá Alexanduri, sum millum annað hevur lært at týða William Carlos Williams. Hann býtir um høvuðssetningin og eykasetningin og gevur hetta umbýtið eina meira hjartaliga ávirkan á meg sum lesara (Rasmussen 2005).

Ávirkanin er kenslulig og næstan eisini kropslig, tí yrkingin rørir hjartað. Ummælarin er subjektivur og sigur, at bókin er „eitt satt upplivilsi at lesa“, og at „hetta er ein frálíka lívgandi bók“. Men Oddfríður M. Rasmussen leggur eisini grundgevingina við. Fyrst sigur hann, hví hann velur at sitera júst eitt ávíst brot úr savninum, og síðani kemur grundgevingin fyri, hví tað hevur ta ávirkan á hann, sum tað hevur, nevniliga at tað hevur við setningsbygnaðin at gera. Høvuðssetningurin og eykasetningurin eru umbýttir, og tað er ítøkiliga tað, sum hevur eina meira hjartaliga ávirkan á hann, og hetta er slíkt, sum Alexandur Kritiansen hevur lært av William Carlos Williams, sigur Oddfríður M. Rasmussen. Oddfríður M. Rasmussen skapar sær myndugleika við at vísa seg sum kenslusama veru fyrst og fremst, síðani við at vísa á, at hann kennir ritverkið og týðaravirksemið hjá Alexanduri Kristiansen við at vísa, at hann skilir, hvussu hann yrkir, tá tað kemur til tað handverksliga heilt niður í smálutir, og við at peika á annan høvund, sum hann gjøgnumskoðar er keldan til júst hetta handverk. Oddfríður M. Rasmussen leggur seg eftir at greina dygdina í skaldskapi objektivt og at grundgeva, og hetta handverkið kennir Oddfríður M. Rasmussen til, tí hann er yrkjari sjálvur og fæst við at seta setningar saman. Orðini hjá Bloom „storhet kan gjenkjenne storhet og føle seg i skyggen av den“, sum Sissel Furuseth vísir til, tá hon sigur, at hetta er við til at legitimera rithøvundarummælaran sum ummælara, ekkóa aftur her. Myndugleikin í ummælinum hjá Oddfríði M. Rasmussen kemst av, at hann sum rithøvundur hevur evni at gjøgnumskoða, um ein annar eisini er rithøvundur (Furuseth 2015:40).

Í sama ummæli vísir Oddfríður M. Rasmussen, at hann er førur fyri at siga frá, tá okkurt nýtt kemur inn í føroyskan skaldskap, tí hann fylgir við, og tað skapar honum myndugleika. Tað ger hann við at vísa á, at orð sum „stættarmunir“ eru við, orð, sum ikki eru frammi í føroyskum skaldskapi nú á døgum. Eisini sigur hann, at Alexandur Kristiansen er einasta skaldið í Føroyum, sum hálovar heimbygd síni og „skoytir bygdalívinum eina reglu“. Her tekur hann dømi um eina rámandi yrking. Hann bendir á sonettuformin í savninum. At vísa á formtættir eyðkennir hann sum ummælara, sum vit eisini síggja í ummælinum av *Húðsemi*, og tað kann síggjast

sum eitt eyðkenni hjá rithøvundinum sum ummælara, tí hann er inni í handverkinum. Hann ger viðmerkingar til málið, at Alexandur Kristiansen skiftir stíl í savninum og siterar sum staðfesting av sínum greiningum og metingum: „Fyri at vísa á málburðin, loyvi eg mær at endurgeva næstseinasta ørindi í seinastu sonettu“ (Rasmussen 2005). Her er ummælarin sum upplivandi lesari nærverandi í tekstinum og gerst partur av tí *ethos*, sum verður sett fram, ið ikki bara skapar sær myndugleika við at vísa til bókmentalig rák, men eisini pallsetir seg sum sansandi veru.

Ummælarin er tilvitaður um sín egna stíl, tá hann sigur: „Málið er lætt og spælandi sum mjúk kvinnuhond á mannaholdi, um eg kann loyva mær at siga so býtt“ (Rasmussen 2005). Her trínur tað siðbundna mansveldið í bókmentastovninum fram beinleiðis, og kynið er partur av *ethos* ummælarans. Annars er tað oftast orðaleyst til staðar. Talan er um mann, ið ummælir mann, og innbygdi lesarin er eisini maður. Hóast hetta kann vera ein styggjandi viðmerking fyri lesaran, tí ummælarin verjir seg við at vísa, at hann veit, at tað, hann sigur, kanska ljóðar býtt, kann orðingin „um eg kann loyva mær at siga so býtt“ eisini síggjast sum ein skemtandi viðmerking, sum vísir tilvit um egnar avmarkingar.

Oddfríður M. Rasmussen gagnnýtir sína vitan um Alexandur Kristiansen og heimsskaldskap til at greina og tulka yrkingarnar. Ummælini hjá Oddfríði M. Rasmussen eru sum heild stutt og innihaldsliga lutfalsliga tung. Tey fylgja sum heild vanligum kriterium, sum verða sett ummælaragenruni; byrja við perspektiverandi inngangi um ritverk, lýsa og greina síðani verkið og enda við virðisdómi. Ummælið av *Báðumegin blátt* endar við einari sterkari áheitan til lesaran um at lesa savnið, og ummælarin kemur við hugskotinum at taka savnið við at ferðast. Áheitanin er sterk, tí ummælarin leggur sál í virðisdómin, tá hann sigur, at savnið var lívgandi fyri hann at lesa.

Samanumtikið umboðar Oddfríður M. Rasmussen rithøvundarummælaran, tí tað er partur av hansara egnu sjálvsmynd, at hann fyrst og fremst er rithøvundur og so kanska eisini ummælari. Hann livir í stóran mun upp til journalistisku kriteriini um at skriva stutt, skilliga og við einum føstum formi. Tað er tó sum rithøvundur, hann skapar sær myndugleika, tá hann vísir, at hann skilir skrivihandverkið. Hann ger seg eisini til eitt við rithøvundarnar, tá hann í ummælinum av *Húðsemi* eftir Tórodd Poulsen yvirtekur matmyndamálið hjá honum og ger seg til eitt við tekstin. Við hesum skapar hann ta fatan, at hann hoyrir heima millum rithøvundarnar. Í málinum hjá Oddfríði M. Rasmussen liggur tó eisini okkurt undirskilt. Tað undirskilta í „samrøðuni“ við rithøvundin í ummælinum av Tóroddi Poulsen kann vera við til at skapa Oddfríði M. Rasmussen mentanarligan kapital, sum gevur honum myndugleika og vald at skilmarka, hvat góðar bókmentir eru, tí hann ger seg til part av einum týdningarmiklum ímyndaðum felagsskapi. Tann undirskilti boðskapurin í lýsingini av málinum hjá Alexanduri Kristiansen sum mjúkari kvinnuhond á mannaholdi ger Oddfríð M. Rasmussen til umboð fyri siðbundna fatan av kynsleiklutum, har menn tosa við menn um bókmentir, meðan kvinnan í hesari samrøðuni er tilfarið, sum rithøvundurin blæsur lív í, og sum ummælarin greinir. Hon er umboðað av sínum kyni, og tosað verður *um* og ikki *við* hana. Henda fatan er liður í tráði, sum verður tikin upp aftur í tí partinum av kapitli 7, ið snýr seg um, hvussu kvinnur verða ummæltar. At Oddfríður M. Rasmussen í sama setningi sigur „um eg kann loyva mær at siga so býtt“, sigur tó eisini nakað um, at hann hóast alt er tilvitaður um, at útsøgnin ikki er í samsvari við feministiska rákið, sum fyri langari tíð síðan hevði vunnið sær pláss undir liðini á øðrum hugsanum í tíðini, hóast hetta rákið, sum komið verður til í kapitli 7, ikki hevði rinið við allar føroyskar ummælarar í tíðarskeiðinum 1997-2007.

Carl Jóhan Jensen

Carl Jóhan Jensen er kanska tann rithøvundarummælarin, sum lýsir best pallsetta ummælaran í føroyskum høpi. Hann gjørdi nógv vart við seg í tíðarskeiðinum 1997-2007. Í hesum broti, sum fyrst og fremst snýr seg um Carl Jóhan Jensen sum ummælara, verða fleiri aðrir ummælarar lýstir við tí fyri eyga at kasta ljós á ummælarastílin hjá Carl Jóhan Jensen, ella rættari: samanberingin vísir teir ymisku eginleikarnar hjá ummælarunum, serliga tá ummæli av somu bók verða borin saman. Carl Jóhan Jensen fær drúgva viðgerð, tí hann hevur skrivað nógv ummæli, og tí at hann á serligan hátt ger vart

við seg sum pallsettur rithøvundarummælari í hesum tíðarskeiði. Nøkur av teimum ummælum, hann skrivaði í hesum tíðarskeiði, liva framvegis í minninum hjá mongum og á manna munni í dag 20 ár seinni.

Carl Jóhan Jensen gav sítt fyrsta yrkingasavn út í 1977 og hevur síðan tað skrivað yrkingar, skaldsøgur, greinar um ymisk mentanarlig evni eins og ummæli av skaldskapi, myndlist, sjónleiki o.ø. Hann hevur skrivað og ummælt í flest føroysk bløð og tíðarrit, sum eru útkomin í hansara tíð sum skrivandi. Tá tíðindablaðið *Fregnir* kom út frá 2001-2004, skrivaði hann fast fyri hetta blað ummæli, rithøvundarsamrøður og annað mentanarligt tilfar umframt ein afturvendandi stubba, sum kallaðist „Fjølmiðlatátturin". Eitt slagorð var við endan á hesum stubba: „sigst so hoyrist" (Jensen 2001a), eitt slagorð, sum hann hevur tikið við sær og nýtir enn, men í broyttum líki, nevniliga sum „spyrst so livst". Á sínum almenna Facebook-vanga skrivar hann regluliga stubbar um ymisk aktuell samfelagsviðurskifti og endar ofta við hesum slagorði (Jensen 2015a)[65]. Stíltakið ger, at fólk kenna tað aftur, sum hann skrivar, og vita, at tað er hann, sum hevur skrivað henda tekstin og ikki onkur annar. Tekststubbarnir byrja ofta við orðinum „Hm..." og eru kritiskar viðmerkingar antin um tíðindaflutning, politikk, málpolitikk ella onnur samtíðarlig samfelagsviðurskifti. Orðingin „spyrst so livst" er umskriving av gomlu fólksligu máliskuni „Livst so spyrst", ein klisjé í gerandismálinum, sum Carl Jóhan Jensen vendir við og gevur øvuta merking. Men hóast talan er um eina klisjé í gerandismálinum, so er orðingin í tekstinum hjá Carl Jóhan Jensen ikki innihaldstóm, men er frá byrjan (í *Fregnum*) eitt slag av áheitan um at taka til orða; eitt slagorð, sum liggur nær tí fólkaræðisligu hugsan, sum lá aftan fyri hugsjónina hjá *Fregnum*. Orðingin er áminning um, at tað hevur týdning at umrøða og seta spurnartekin við alt í samfelagnum, tí bara á tann hátt verður tað liviligt.

Í hesum stubbum síggja vit ein høvund, sum ikki bara hevur kritiskt tilvit, men eisini leggur dent á týdningin hjá kritikkinum í samfelagnum og týdningin av at úttala seg; hesin hugburður endurspeglast í orðunum „sigst so hoyrist" og „spyrst so livst", og vit síggja eisini við hesum, hvussu tilvitaður Carl Jóhan Jensen er ikki bert um egnan stíl, men eisini um tekstsløg. Tá hann rammar ein tekst inn í fastar orðingar, so veit lesarin, hvat tekstslag, talan er um. Talan er oftast um eina kritiska viðmerking, sum ikki skal blandast saman við onnur tekstsløg, sum hann eisini arbeiðir sera tilvitað við, nevniliga skaldsøguna, yrkingina, skjaldrið, samrøðuna, ummælið o.a. Hetta er dømi um, hvussu hann skapar leiktjøld til ymisk sløg av tekstum, so hann kann trína á pallin í ymiskum leiklutum, sum politiskur viðmerkjari, sum ummælari, sum skaldsøguhøvundur, poetur, ella hvat tað skal vera. Hann fullførir hesa pallseting, tá hann tekur á seg leiklutin sum Vilhjálmur við Hoygil og skrivar formæli til skaldsøgu sína *Bókin um tað góða* (2015) í hansara navni og letur hann standa sum tann, ið greiddi bókina til útgávu. Navnið Carl Jóhan Jensen stendur hvørki á permuni ella á tittulblaðnum, men bert í kolofonini undir upplýsingum um rættindi. Í yvirlitinum hjá Landsbókasavnium stendur *Bókin um tað góða* bæði í navninum á Carl Jóhan Jensen og Vilhjálmi við Hoygil.

Tá Kinna Poulsen á listaportali sínum reklamerar fyri bókini, spælir hon við í illusiónini um Vilhjálm við Hoygil sum høvund og sigur debutant nú vera komnan við bók. Hon letur tilvísingina til Carl Jóhan Jensen tó vera til staðar og knýtir nøvnini tí óbeinleiðis at hvørjum øðrum, tá hon letur mynd av Carl Jóhan Jensen fylgja við tekstinum og kommenterar sambandið millum teir við stuðlandi at siga: „Hví mynd er av Carl Jóhan Jensen? Tað veit eg ikki, men myndin er góð" (Poulsen 2015a).

Í samrøðu í *Dimmalætting* spælir Kinna Poulsen ein leiklut í pallsetingini hjá Carl Jóhan Jensen av Vilhjálmi við Hoygil, tá hon ger samrøðu við Vilhjálm í grein við yvirskriftini: „Keyp bókina" (Poulsen 2015b). Bergur Djurhuus Hansen skrivar tvær vikur seinni sum tann professionelli ummælarin við akademiskari fjarstøðu og vísir á henda íspunna persónin Vilhjálm, sum ikki bert er ein persónur í søguni, men sum eisini livir sítt egna íspunna lív á teimum sosialu miðlunum og í *Dimmalætting* (Hansen 2015). Kinna Poulsen arbeiðir í hesari tíðini fyri *Dimmalætting* og hevur ábyrgd av mentanartilfarinum í blaðnum,

65 Orðingin hevur eisini í ymiskum samanhangi fingið øll møgulig hugsandi brigdi, sum eru avleidd av somu klisjé, t.d. „treiskast, so trívst", „árast, so nýggjast" o.s.fr.

og hóast hon er ein av okkara fremstu ummælarum, so virkar hon í hesum føri ikki í leiklutinum sum ummælari, men sum ein, ið spælir við í hesum spæli, sum má sigast at vera eitt reklamubragd hjá Carl Jóhan Jensen fyri *Bókini um tað góða*.

Carl Jóhan Jensen hevur fyrr gjørt ein líknandi vørr fyri at fáa sínar bøkur seldar og hevur seinni sagt frá, hvussu hann, tá *Ó – søgur um djevulskap* (2005) komu út, kendi seg noyddan at gera okkurt serstakt og eitt sindur frekt fyri at vekja ans fyri hesari bókini, sum var komin í so nógvum eintøkum til landið, at hann stúrdi fyri, at hon ikki fór at verða seld. Hann greiðir í samrøðu við Sissal Kampmann í Kringvarpi Føroya frá, hvussu hann, tá sjónvarpið kom á gátt, hugdi beint inn í myndatólið og segði, at hetta var besta skaldsøga í 40 ár. Og tað riggaði, tí fyrsta upplag av bókini varð útselt fyri jól sama ár (Jensen 2018). Anna V. Ellingsgaard hevur tað á orði í sínum ummæli av *Ó – søgum um djevulskap*, at neyvan hevur nøkur bók fingið so nógva umrøðu, áðrenn hon kom út (Ellingsgaard 2005c).

Í nevnda ummælinum av *Bókini um tað góða* vísir Bergur Djurhuus Hansen á, at høvuðspersónurin í skaldsøguni hjá hesum íspunna Vilhjálmi við Hoygil, sum ikki bert er eitt vanligt dulnevni, men ein persónur, sum trínur fram á pall bæði á sosialum miðlum og enntá eisini í *Dimmalætting*, er persónurin K. Hann kann setast í samband við Carl Jóhan Jensen sjálvan, men verður tó stavaður við K í bókini. Bergur Djurhuus Hansen nýtir ta russisku dukkuna (Babushku) sum mynd av teimum ymisku løgunum í bókini, og sigur, at tá til stykkis kemur, er Carl Jóhan Jensen sjálvur tann fyrsta og størsta dukkan, ið við einum heilt serligum slag av *cameo appearance* sjálvur er við í skaldsøguni (Hansen 2015). Hetta er eitt dømi um, at Carl Jóhan Jensen í hesari bókini ikki bert skapar sær leiktjøld til at trína á pallin sum ein annar, men at hann skapar hesi leiktjøld júst til at pallseta seg sjálvan í bókini; hann nýtir v.ø.o. íspunna persónin Vilhjálm við Hoygil til at pallseta veruliga persónin Carl Jóhan Jensen.

Bókin hjá Carl Jóhan Jensen *Ó – søgur um djevulskap* gjørdist í sínari samtíð eitt týðandi verk í føroyskum bókmentum. Hon varð tilnevnd til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins í 2007, hon varð týdd til fleiri mál og fekk nógv ummæli ikki bara í Føroyum, men eisini aðrastaðni.

Spurningurin, sum av góðum grundum enn stendur ósvaraður, er, hvønn leiklut bókin fær í bókmentasøguni. Vit kunnu bert gita okkum til, at ein av orsøkunum til, at bókin eftir øllum at døma longu hevur skrivað seg inn í bókmentasøguna, er hennara serstaka móttøkusøga og snildi mátin hjá høvundinum at føra hana fram á marknaðin. Tað, sum Carl Jóhan Jensen ger, tá hann marknaðarførir *Bókina um tað góða* tíggju ár seinni, er at lata Vilhjálm við Hoygil trína á pall á teimum sosialu miðlunum, áðrenn bókin kemur út fyri at skapa áhuga fyri henni frammanundan. Ein snild, sum er sædd fyrr, og sum ikki er heilt ólík tí, sum norski rithøvundurin og nobelvinnarin Knut Hamsun (1859-1952) gjørdi í sambandi við útgávuna av *Sult*, tá hon skuldi førast út á tann norska marknaðin í 1890.

Hamsun var áðrenn hesa fyrstu skaldsligu útgávu sína kendur sum kritikari og kjakari, og hann skapti sjálvur væntanir til bókina, áðrenn hon kom út, og var soleiðis við til at stýra móttøkuni av henni. Hann læt prenta ein forsmakk av bókini við heitinum „Sult“ í tíðarritið *Ny Jord* í november 1888, ein tekst, sum vakti ans, bæði tí at hann var góður og nýskapandi, men eisini tí at høvundurin var anonymur. Tá bókin kom, fekk hon nógva og drúgva umrøðu og óvanliga nógv ummæli til at vera skrivað av debutanti (Vassenden 2016b:87-88).

Marknaðarføringin av *Sult* er eitt dømi úr einum av okkara grannalondum frá einari aðrari tíð um, hvussu tað ber til hjá einum dugnaligum høvundi, sum kennir spælireglurnar í bókmentaligu ringrásini, og sum hevur tað neyðuga dirvið og tann neyðuga kreativitetin at vera við til at stýra móttøkuni av einum verki; eginleikar, sum Carl Jóhan Jensen hevur víst, at hann hevur og ger sær dælt av í marknaðarføringini av sínum skaldskapi, og sum vit kunnu vænta ikki bara hevur havt ávirkan á sølu og móttøku av verkunum, men eisini á, hvussu bókin verður umrødd í føroyskari bókmentasøguskriving í framtíðini.

Sissel Furuseth vísir við dømum úr norskari bókmentasøgu á, at bókmentakritiskt virksemi hjá høvundum ávirkar kanoniseringartilgongdina av teirra verkum (Furuseth 2015:30-31). Hon sigur, at rithøvundarkritikkurin virkar bæði úteftir við, at ummælarin er við til at kanonisera aðrar høvundar, og inneftir við at rithøvundurin gjøgnum ummælaravirksemið fær møguleika til at bera fram sína

egnu poetikk og soleiðis skapa uppmerksemi fyri sínum egna ritverki (Furuseth 2015:33). Tey lýstu dømini um, hvussu Carl Jóhan Jensen arbeiðir við lýsingarátøkum og pallseting av egnum verkum eru ikki partur av hansara ummælaravirksemi, men kunnu síggjast sum liður í dagsskrá hansara at føra fram egna poetikk, sum eisini sæst aftur í ummælunum.

Nýta vit áðurnevndu bólkingina hjá T. S. Eliot í fýra ummælaratypur, kann Carl Jóhan Jensen sum ummælari setast í tann fjórða bólkin, ið Eliot eisini roknar seg sjálvan uppí, nevniliga sum ummælari, hvørs ummælaravirksemi er hjáveiða av hansara kreativa virksemi (Eliot 1961/1965:13). Carl Jóhan Jensen kundi verið flokkaður í aðrar bólkar, tí hann er eisini akademikari, hevur lisið mál og bókmentir, men við hansara ummælarastíli í huga gevur tað best meining at flokka hann í henda fjórða bólkin millum „rithøvundar, sum ummæla". Carl Jóhan Jensen leggur seg ikki fyrst og fremst eftir akademiskum stíli í sínum ummælum og heldur ikki eftir at fylgja einum journalistiskum frymli, men leggur seg eftir at skriva ummæli, ið standa sterk sum tekstir, sum undirhalda í einum ofta ironiskum stíli, og so er tað eisini týðiligt, at hann leggur eina poetikk fram í sínum ummælum, eina skaldskaparfatan, sum hann metir aðrar bókmentir út frá; eina fatan, ið, sum vera man, er í samsvari við hansara egna skrivihátt sum høvundur. Hann kann samanberast við ummælaratypuna, sum John Chr. Jørgensen lýsir sum *stílummælaran* við tí tilvitaða skrýdda málinum[66]. Hann leggur seg ikki eftir at ummæla út frá teimum fortreytum, ið tekstirnir eru skrivaðir útfrá, sum tann *intentionali ummælarin*, ið Hejlskov Larsen lýsir, ger, men ummælir út frá einari greiðari fatan av, hvat hann metir list vera.

Carl Jóhan Jensen hevur síðani hann var ungur yrkjari regluliga ummælt. Eitt av fyrstu ummælum hansara stóð í *Brá* í 1989. Tað viðgjørdi yrkingasavnið eftir Jóannes Dalsgaard *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari* (1987). Ummælið, sum bar heitið „Málið kemur ikki av sær sjálvum", er serstakt á mangan hátt og brýtur við allar mátar, ummæli hava verið skrivað í Føroyum gjøgnum tíðirnar. Fyri tað

66 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

fyrsta er tað hvassorðað og ironiskt. Ikki tí, tað hava vit fyrr sað í Føroyum, t.d. í ummælunum hjá Chr. Matras og øðrum.

Í sínum ummæli av yrkingasavninum hjá Jóannesi Dalsgaard er Carl Jóhan Jensen ikki bara speiskur, men náðileysur, og tí sigi eg, at hann har brýtur við allan ummælarasið í Føroyum. Ummælið vakti ans í samtíðini. Fólk, sum lósu ummælið, minnast tað enn í dag, og tað skapti eisini eitt mótummmæli. Hanus Andreassen (nú Kamban) svarar aftur við mótummæli, sum hevur yvirskriftina „Tá hugmóð verður haft", har hann í speiskum tóna eggjar Carl Jóhan Jensen til at halda fram at skriva, men gevur honum góð ráð um at leggja seg eftir at hava eitt sindur minni av hugmóð, eitt sindur rúmligari fatan og eitt vet av kærleika, tí ummæli hansara umboðar eina skaldskaparsjón, har allur menniskjaligur samhugi og samfelagsligur áhugi er útkólnaður, og tað ger ummælaran blindan (Andreassen 1989).

Eisini Anne-Kari Skarðhamar lýsir í nevndu grein um ummæli í føroysku tíðarritunum "„Critical Tact and Educational Institution"? Literary Criticism in Faroese Journals" (2012) Carl Jóhan Jensen sum ein ummælara, ið ikki gevur nakað sum helst rúm fyri lærandi tileggjan, og sum skrivar í arrogantum tóna. Hennara fokus er tónin í ummælum, og hon samanber Carl Jóhan Jensen og William Heinesen, sum báðir meta bókmentir út frá listfrøðiligum kriterium, og bendir á munin millum teirra málhugsjón og gjónna av muni millum teirra mátar at málbera sín bókmentaliga kritikk (Skarðhamar 2012:280-281). Her er at siga, at Anne-Kari Skarðhamar velur tveir ummælarar, sum eru í hvør sínum bási, og líkskapurin hevði verið eitt sindur størri, um Carl Jóhan Jensen varð samanborin við Chr. Matras, ið ummælti um somu tíð sum William Heinesen, og sum Carl Jóhan Jensen eisini so ella so setir seg sjálvan í samband við, tá hann í *Sosialinum* í 2006 skrivar grein um Chr. Matras sum ummælara, viðger ummæli hansara og setir seg inn í hansara ummælarastíl (Jensen 2006a). Carl Jóhan Jensen og Chr. Matras eru báðir í sínum skaldskapi ógvuliga málsliga tilvitaðir og gera síni egnu orð, og tá tað kemur til at skriva hvassorðað ummæli við eitt sindur av ironi, so er Carl Jóhan Jensen meira ein eftirkomari hjá Chr. Matras enn hjá Williami Heinesen, sum legði seg eftir hóvsemi. Men Carl Jóhan

Jensen hevur í nógv størri mun, enn Chr. Matras nakrantíð gjørdi, lagt seg eftir tí ironiska stílinum, eitt stíltak, sum als ikki er óvanligt, men sum røkkur hæddunum í føroysku ummælarasøguni við ummælunum hjá Carl Jóhan Jensen av savninum eftir Jóannes Dalsgaard og skaldsøguni *Burtur* (2006) eftir Bergtóru Hanusardóttur mong ár seinni. Tað seinna byrjar við undiryvirskrift, sum ummælarin nevnir „Ein pastisja", men innihaldið í tekstbrotinum er parodisk herming eftir skrivistílinum hjá Bergtóru Hanusardóttur, soleiðis at sjálv undiryvirskriftin, sum ber boð um, at ummælarin heiðrar hetta verk, verður partur av niðrandi stílinum í ummælinum, ið endar við at biðja rithøvundin vælsignaðan gevast at skriva. Meira verður skrivað um hetta í greiningini av ummælinum.

Ein annar stórur munur millum ummælini hjá Chr. Matras og Carl Jóhan Jensen er tað *ethos*, sum tosar. Hetta hevur kanska við persónligu eginleikarnar hjá ummælarunum at gera, men eisini við andan í teimum tíðarskeiðunum, sum teir skriva í. Hanus Kamban rør í mótummælinum av ummælinum av savninum eftir Jóannes Dalsgaard fram undir, at ummælið hevur ta funktión at uppala fólk í at lesa skaldskapin hjá Carl Jóhan Jensen sjálvum (Andreassen 1989) – ein ábending um eina pallseting av egnum skaldskapi, sum gerst sjónligari við árunum og røkkur hæddini við nevndu pallsetingini í *Bókini um tað góða*.

Hanus Kamban vísir á, at ummælið er í tveimum. Tað er eitt ummæli av bókini eftir Jóannes Dalsgaard, men tað er eisini ein grein um føroyskar bókmentir yvirhøvur, sum Carl Jóhan Jensen heldur vera á einum krossvegi. Hanus Kamban sær tørvin á at rættleiða bæði lesarar og Carl Jóhan Jensen eftir allar tær skeivu niðurstøðurnar, hann kemur til í hesari, sum hann sigur, annars áhugaverdu og upplýsandi grein. Hanus Kamban vísir millum annað á, at hugleiðingarnar, sum Carl Jóhan kemur við, kunnu vera ein hjálp til at lesa yrkingarnar hjá Carl Jóhan Jensen, og hóast tað er vanligt at siga okkurt alment um bókmentaheimin í einum ummæli fyri at seta verkið í bókmentaligt høpi, so er hetta ummælið, sum Carl Jóhan Jensen sjálvur kallar „ummæli ella hugleiðingar uppi yvir bókini *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari*" (Jensen 1989), eisini eitt brot við vanliga ummælarahevd, tí tað er týðiligt, at tað, sum er á dagsskránni í greinini, er fyrst og fremst at bera fram sína skaldskaparhugsjón og síðani í aðru syftu at siga okkurt um ummælta verkið (Andreassen 1989). Hetta ber eisini byggingin boð um, tá viðgerðin av bókini fyllir umleið ein triðing av ummælinum, og hon ikki verður tikin upp á tunguna, fyrr enn ummælið er komið gott og væl í helvt.

Hetta ummælið er sostatt eisini serstakt á tann hátt, at tað bert í lítlan mun snýr seg um bókina og í nógv størri mun um fatan ummælarans av, hvat góður skaldskapur er. Ummælið kann lesast sum eitt slag av poetikk. Carl Jóhan Jensen leggur fram eina dagsskrá, eitt metingarkriterium, sum hann týðiliga sjálvur arbeiðir eftir, og sum snýr seg um at vera málsliga nýskapandi. Hann lýsir tvey sløg av skaldskapi, sum hann metir eru ráðandi í Føroyum: „Málisku skaldskap", ið knýtir seg at einum hevdbundnum málkervi, og „uttangarðsskaldskap", ið er tilvitaður um tað málkervi, sum er hansara fyritreyt, men sum hann eisini yrkir seg undan. Tá minni parturin er eftir av ummælinum, kemur Carl Jóhan Jensen inn á bókina eftir Jóannes Dalsgaard og endar við óbeinleiðis at siga, at hetta er ikki veruligur skaldskapur, men máliskuskaldskapur, tí í veruligum skaldskapi kemur málið ikki av sær sjálvum og soleiðis umskrivar Carl Jóhan Jensen heitið á ummæltu bókini *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari* (Jensen 1989).

Hanus Kamban talar sum nevnt speiskliga, men harðliga og kontant at hesum sambært honum hugmóðuga stíli hjá Carl Jóhan Jensen, og Tóroddur Poulsen, sum eisini er nevndur í ummælinum hjá Carl Jóhan Jensen, gevur út parodiska yrking við heitinum „Úr innasta loynikamari uttangarðs-kalla" og undirheitinum: „Eg dugi latín!" í yrkingasavninum *Villur* (1992). Yrkingin ger málsliga stílin hjá Carl Jóhan Jensen til láturs og sipar til sama ummæli í *Brá* av yrkingasavninum *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari*. Tóroddur Poulsen setir stílin og hugsjónirnar hjá Carl Jóhan Jensen í hesum ummælinum upp sum keipumynd (Poulsen 1992b). Hann speirekur málsliga stílin hjá Carl Jóhan Jensen við avskeplaðum orðingum, sum gerast fullkomuliga láturligar:

skjálp verður
nýneistrandi undan gjótisflusi
í ørgrandi físind
og altíð er børtilsskemdur

rusvaldur nilkutur
sum ein nístipípa
brískin og sjørkin
og hálvgum meddandi í greisli
ferst tað í klaffa kann
í boðisblaði á skák

ja – *vrukkin skalt tú nilva*
gjógvspjødda skjálvtakropið
í dansræddum vírikki
annars er rulkur ikki skettin
og í andlitsskørpi niplut
og skjálghentur og fjósandi
tí spjálkið skinklar
meðan tað skroppar og skropnar
sum skubbutur undanlongsul
í bikku á fúki
(Poulsen 1992b).

Yrkingin fylgir øllum formligum reglum í málkervinum og ger tað, sum Carl Jóhan Jensen sigur, at uttangarðsskaldskapur skal: vera tilvitaður um tað málkervi, sum er hennara fortreyt, men arbeiða seg undan tí. Yrkingin finnur møguligar samansetingar bæði á bókstava-, orða- og setningastigi, soleiðis at summi orð kenna vit, men onnur kenna vit ikki, men kunnu siga, summar setningar skilja vit, hóast vit ikki skilja samanhangin, tí fleiri orð eru merkingarleys. Tey eru tekn, sum einki teknmið hava í málkervinum. Tað, sum yrkingin so rámandi lýsir, er, at tað eisini ber til at arbeiða seg ov langt uttangarðs, hóast tú heldur teg innan formliga málkervið, og teksturin verður høpisleysur. Yrkingin er skaldskapur og ikki fyrst og fremst ein viðmerking til ummælið hjá Carl Jóhan Jensen, og hon skal tí kanska lesast sum spæl við orð, men tað ger hana ikki til eina minni sigandi lýsing av, hvat tað er, sum hendir, tá skaldið fer ov langt uttangarðs; tá málsliga nýskapanin og avantgardan missa samband við tær skipanir, sum treyta tær, og gerast merkingarleysar.

Málið í skaldskapinum hjá Carl Jóhan Jensen verður eisini umrøtt

í ummælinum hjá Bergi Djurhuus Hansen „Tá orðini fara á flog“ av skaldsøguni *Rúm* (1995). Ummælið hevur fingið heiti eftir tí, sum er høvuðsfokus og høvuðskritikkur av bókini, nevniliga málinum, og heitið er misvísandi á tann hátt, at tað sær út sum, at hann tosar um eitt verk, sum „hevur flog“, ið vit vanliga seta í samband við okkurt positivt. Men her verður tosað um, at orðini fara á flog, skilt á tann hátt, at tey flákra, so lesarin ikki fær hugsavnað seg um innihaldið í tekstinum. Orðavalið og tann óvanligi setningsbygnaðurin verða søgd at vera orsøk til, at lesarin ikki verður fangaður og letur seg tøla av verkinum. Málið verður við øðrum orðum lýst sum eitt haft, ið ger, at sjálv *søgan* fer í bakgrundina. Hon kann ikki lesast sum undirhald, men má lesast sum tekstur, ið skal granskast og greinast (Hansen 1997).

Skaldskaparhugsjónin, sum Carl Jóhan Jensen førir fram, er, sum Hanus Kamban sigur í mótummælinum, nýggj og slóðbrótandi fyri summi at lesa um, men hetta eru kendir tankar í bókmentaheiminum um avantgardismu og listafatan, sum vil bróta við tað sið- og hevdbundna. Sum ummælaratypa kann Carl Jóhan Jensen tí setast í samband við *menningarummælaran*, sum Hejlskov Larsen lýsir[67], eina ummælaratypu, sum kanska er enn betur umboðað í tíðarskeiðinum 1997-2007 av Kim Simonsen, ið verður lýstur seinni.

At Carl Jóhan Jensen hevur ein egnan sermerktan stíl bæði sum rithøvundur og sum ummælari, sæst kanska best lýst í tí áðurnevnda „ummælinum“, sum Tóroddur Poulsen skrivaði í *Oyggjaskeggja* av bókini *Rúm* (1995) eftir Carl Jóhan Jensen[68], har málsligi stílurin hjá Carl Jóhan parodiskt, men beinrakið verður settur fram.

Eitt bókmentaligt dømi um, at Carl Jóhan Jensen hevur fingið eitt „navn“ sum ummælari, er lýsingin av honum í skaldsøguni *Bommhjarta* (2016) eftir Jóanes Nielsen. Carl Jóhan Jensen verður har sum ummælari lýstur sum ein slaktari, tá tað verður sagt um ummælið, sum hann hevur skrivað, at tað er eitt „lívsneyðugt slakt á tí heilaga bókmentaliga offurstabbanum“ (Nielsen 2016:284). Her hóma vit í íroniska stílinum hjá Jóanesi Nielsen ta støðu og styrki, sum Carl

67 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.
68 Sí kap. 4 um bókaummælið sum skaldskap og skaldskap sum bókaummæli.

Jóhan Jensen hevur vunnið sínum navni sum ummælari upp á gott og ilt.

Fleiri av ummælunum hjá Carl Jóhan Jensen hava skapt øsing í ummælaraheiminum og elvt til kjak millum ummælarar í bløðunum. Tá Carl Jóhan Jensen hevði ummæli av skaldsøguni *Burtur* eftir Bergtóru Hanusardóttur í *Sosialinum* 19. desember 2006, var Hanus Kamban aftur skjótur at svara, og longu 20. desember var mótummæli at lesa í *Sosialinum* um „Esilssparkið" hjá Carl Jóhan Jensen (Kamban 2006b). Carl Jóhan Jensen hevði longu áðrenn hetta verið speiskur móti Bergtóru Hanusardóttur í ummælinum av skaldsøguni *Suðar dýpið reyða* (1999), sum hann ógvuliga sigandi fyri innihaldið í ummælinum valdi at nevna „Mongum brestur ætlan". Ummælið um *Burtur,* „Um blaðlýs og drekkamunsrealismu", ber tó av, tí tað endar við einari áheitan til rithøvundin um at gevast at skriva (Jensen 2006b). Tað, sum hendi, var, at einki er komið út eftir Bergtóru Hanusardóttur síðan hetta ummælið, og tá Hanus Kamban heldur røðu fyri henni á 70-ára føðingardegnum, sum Landsbókasavnið skipar fyri tíggju ár seinni við heitinum „Mentan og kyn í mótburði", hómast kanska ein tilsiping til ummælini hjá Carl Jóhan Jensen í fyrilestrarheitinum (Kamban 2016).

Turið Kjølbro skrivar, tá greinasavnið *Mentir og mentaskapur* eftir Carl Jóhan Jensen kemur út, at hann órógvar tann bókmentaliga støðuhylin (Kjølbro 1999). Vit vita eisini, at ummælini hjá Carl Jóhan Jensen hava gjørt mun. Hetta er ikki ein táttur, sum enn er kannaður í Føroyum – hvørja veruliga ítøkiliga ávirkan ummæli hava havt á høvundar, lesarar, sølutøl o.s.fr., men uttan at leggja meira í tað enn eina staðfesting, er tað ein sannroynd, at Bergtóra Hanusardóttir einki hevur givið út, síðani Carl Jóhan Jensen bað hana gevast í 2006.[69] Og Marjun Syderbø Kjelnæs hevur í samrøðu sagt frá, hvørja ávirkan speiska ummælið hjá Carl Jóhan Jensen av hennara fyrstu bók *Ein farri av kolvetni* (2004) hevði á hana. Ironiski stílurin er lagdur inn í yvirskriftina „Ein farri av skaldskapi", og hóast ummælarin sigur, at Marjun Syderbø Kjelnæs hevur nakað í sær, sum kann blíva til

69 Annað er tað, at Carl Jóhan Jensen hevur heldur ikki skrivað nógv ummæli eftir hetta.

nakað, so kritiserar hann tó hetta „ólidna verkið", og serliga kritiserar hann Bókadeild Føroya Lærarafelags fyri at hava givið tað út (Jensen 2004). Hetta fekk Marjuna Syderbø Kjelnæs at vilja gevast at skriva, men samstundis vakti tað treiskni í henni og vilja til at svara aftur. Hon greiðir frá, at hon tók kritikkin til sín og bað bersøgna kritikaran til ritstjóra á komandi útgávum fyri at fáa tað neyðuga mótspælið undan útgávu (Hansen 2016).

Hetta eru dømi um ítøkiliga ávirkan hjá ummælum, ein táttur, sum ikki verður kannaður í hesari ritgerð, men sum er orðaður í einstøkum førum, tá høvundar greiða frá, hvørja ávirkan eitt ummæli hevur havt á teirra skriving, ella tá lesarar greiða frá, hvørja ávirkan eitt ummæli hevur havt á teirra fatan av einari bók. Her verður so varhugin av, at ummælini hjá Carl Jóhan Jensen hava havt ávirkan, staðfestur. Áhugavert hevði verið at kannað ítøkiligu ávirkan hansara við samrøðum við høvundar, lutfall millum ummæli og sølutøl o.a., men tað hoyrir ikki við til hesa verkætlan.

Tá Carl Jóhan Jensen í 2015 fekk handaða M.A. Jacobsens virðisløn fyri *Bókina um tað góða,* orðaði hann nakrar tankar um list samsvarandi hugsanunum um skaldskap, sum hann longu hevði sett á dagsskrá í ummælinum „Málið kemur ikki av sær sjálvum" (Jensen 1989):

> Og hvat meini eg so við, tá ið eg sigi list?
> Nei, eg meini ikki við undirhald ella annað andligt letiskoyti hjá samtíðini. Hvaðna minni hugsi eg um ta nærum-list, sum fyrst og fremst ger vart við seg í at apa eftir hvørjum, sum tá ella tá er frammi í tíðini, og javnan verður metseld. Tíansheldur at eg sipi til ta raklist, sum trúarliga og politiskt heldur seg upp undir lotið á tí viðtikna, altíð er nær valdinum og skýggjar broyting í øllum líki undir tí yvirlæti at umboða ta breiddina, sum av rættum ella órættum rópar seg upp á fólkahugsan.
> Nei, eg meini við ta listina, sum í sínum hugflogi og síni framseting er so balstýrig, at almannahugsan hevur agg av henni ... Ta listina, ið er illa kend, men tó vil seg sjálva treytaleyst ... Eg meini, skjótt sagt, við ta listina, sum er meiri enn tann sokallaða samvitskan hjá samfelagnum. Eg meini við ta list, sum er ein tornur í almenningseygum,

> ein broddur í síðu vanans og kortini skapar samfelagnum endurnýggjan, eitt broytiligt tilvit um seg sjálvt. Ta listina, meini eg við, at var hon ikki til, tá var hvør tanki og hvørt manntalað orð endurtøka av endurtøku og einki øðrvísi enn ein ormur í kaldaraki etandi sporlið á sær sjálvum. Ja, uttan hesa listina var samleiki eitt skal uttan um einki og sannindi óviðkomandi. Skinflugusurr í einum tómum pakkhúskjallara (Jensen 2015b).

Listafatanin, sum verður lýst her, er í samsvari við ta fatan, ið vit fáa í ummælum Carl Jóhans frá tíðarskeiðinum 1997–2007. Ein listafatan, sum vit kenna aftur frá avantgarduni, ið setir seg upp ímóti klassiska idealinum um at fylgja norminum – hesin spurningurin, um list skal vera í siðvenjuni ella víkja frá henni. Her er eingin ivi um, at Carl Jóhan Jensen stendur fyri listafatan, sum brýtur siðvenjuna, og dómurin í hansara ummælum er merktur av hesi fatan.

Tey tólv ummælini, sum Carl Jóhan Jensen skrivaði í 1997-2007, snúgva seg um skaldskapin hjá Bergtóru Hanusardóttur, Regini Dahl, Hanusi Kamban, Tóroddi Poulsen, Peturi Jensen (nú Pólsson), Oddfríði M. Rasmussen, Jóanesi Nielsen og Marjuni Syderbø Kjelnæs. Hann skrivar sostatt um skaldskap eftir bæði kvinnur og menn, um bæði eldri og viðurkendar høvundar og yngri og minni viðurkendar høvundar og debutantar. Hann skrivar um yrkingar, skaldsøgur eins væl og útgivnar sjónleikir. Havast skal í huga, at henda viðgerð savnar seg um ummæli av føgrum upprunaføroyskum bókmentum og tekur tí ikki ummæli av framførdum sjónleikum, tiltøkum við yrkingaupplestri, konsertum, listaframsýningum o.ø. við, sum Carl Jóhan Jensen eisini skrivar um í hesum tíðarskeiði.

Seks av ummælunum eru í *Fregnum*, sum Carl Jóhan skrivaði regluliga fyri, ta tíð blaðið kom út, og hini seks eru í *Sosialinum* og *Dimmalætting*.

Ummæli av skaldsøguni Suðar dýpið reyða

Ummælið, sum Carl Jóhan Jensen skrivaði um skaldsøguna *Suðar dýpið reyða* (1999) eftir Bergtóru Hanusardóttur fyllir eina heila síðu í *Viðskeranum* í *Dimmalætting*. Tað byrjar við at siga frá, hvør hevur givið bókina út og lýsir síðani bókina. Grundgivið verður tíðliga í

ummælinum fyri, at bókin kann bólkast undir kvinnubókmentir, ikki tí at hon er um eina kvinnu, og heldur ikki tí at hon er skrivað úr kvinnusjónarhorni, men tí hon hevur skillig og greið kvinnupolitisk ørindi, og skaldsøguhøvundinum liggur nógv á hjarta at vísa tann ójavna, ið var millum menn og kvinnur í farnum tíðum. Ein samandráttur verður síðani gjørdur av bókini, sum fyllir næstan triðingin av ummælinum. Síðani kemur viðgerðin ella rættari kritikkurin av frásøgn og persónslýsingum, sjónarhorni, myndum og máli. Kritikkurin av frásøgnini er, at hon er ógreið, tíðargloppini eru stór, tað gongur striltið at hava hald á søgugongdini, hóast høvundurin tykist hava eina hóming av, hvat frásøgutøkni er, sigur hann, tí hon brúkar eitt gamalt stíltak, men frásøgnin hevur lyndi til at flakka. Kritikkurin av persónunum er, at teir ofta ikki eru trúligir, teir eru næstan sum frymlar. Javnan eru kenslur og hugsanir hongdar upp á teir sum frakki á eitt akslatræ, sigur Carl Jóhan Jensen. Tað er verri enn so altíð vist, hvørjum sjónarhorni sagt verður frá, myndirnar eru óvissar og reikandi, og málið er ómiðvíst. Fleiri dømi verða tikin fram um hesi viðurskifti, sum hann viðger og kritiserar. At enda kemur virðisdómurin, sum er, at bókin hevur eitt virðingarvert evni, men lítið bókmentaligt gildi. Munurin millum hug og dug er ov sjónskur, sigur hann, men bókin er ikki verri enn so mangt annað, sum kemur út, t.d. *Ein ódeyðilig sál og aðrar* eftir Jens Paula Heinesen. Tíverri, sigur hann (Jensen 1999).

Grundleggjandi er hetta eitt sakligt ummæli. Tað fylgir vanligum ummælarasiði, hóast tað dømir tekstin harðliga. Tað hevur kunning um verkið, endursøgn, viðgerð, frásjónargerð í tí, at teksturin verður bólkaður sum kvinnubókmentir, og í tí at bókin verður samanborin við aðrar føroyskar bókmentir, eina bók eftir Jens Paula Heinesen. Hóast dómurin er harður, so er bókin viðgjørd við hampiligari virðing, roynt verður at finna okkurt gott í tekstinum, hóast tað mest sum einans eru dømi um, at bókin ikki lýkur tey krøv, sum ummælarin setir til bókmentir. Ítøkiligu krøvini eru, at frásøgnin skal hanga saman, persónarnir skulu vera trúligir, málið skal vera miðvíst, og myndirnar skulu ikki vera reikandi. Tá talan er um eina realistiska skaldsøgu, eru kriteriini, sum ummælarin her setir, ikki órímilig, tí tað, sum eyðkennir ein episkan tekst er júst tríeindin: *persónar*, sum

virka á einum *stað* gjøgnum *tíð*. Og tí eru krøvini til trúligar persónar (talan er um realistiskan tekst) og til frásøgn, sum hongur væl saman, hóskandi. Ummælarin tekur oftast dømini fram, tá tað ikki hevur eydnast høvundinum at fylgja krøvunum, men hann tillagar sína útsøgn við smáum orðum sum „tíverri", og tað er sum, ummælarin vildi ynskt, at teksturin var betur skrivaður. Hetta kann við góðum vilja fatast sum ein lítil eggjan. Eisini sigur Carl Jóhan Jensen evnið vera virðingarvert, hóast listaliga dygdin ikki er nøktandi. Tá tað er sagt, stendur yvirskriftin eftir: „Mongum brestur ætlan". Hon sigur, hvør tann endaliga niðurstøðan er, og har er ummælarin speiskur, og dómurin er avgjørdur, endaligur og tykist ikki serliga eggjandi fyri høvundin. Sambært yvirskriftini ætlaði høvundurin at skriva eina góða skaldsøgu, men tann ætlanin brast.

Kirsten Brix ummælir Suðar dýpið reyða

Til samanberingar kann vísast til, hvussu bókmentafrøðingurin Kirsten Brix ummælir hesa somu bók í „Sára Tummasardóttir – ein tragisk og óhugnalig kvinnulagna". Kirsten Brix er saklig og vísir t.d. á ta forvitnisligu byggingina, tí søgan er ein rammusøga, men hon er eisini kritisk í sínari lesing av bókini. Hon er kritisk yvir fyri frásøgufólkinum, men grundgevur fyri, hvat tað er, sum er galið við sjónarhorninum, tí hon vísir á, at frásøgufólkið er firtið, men at tað er trupult at sannføra lesaran um, at hann eisini skal vera firtin Sárusa vegna. Kirsten Brix kritiserar sjónarhorn og persónar, sum ikki eru nóg neyvt lýstir. Hon kritiserar persónarnar varliga við at siga, at lýsingin av teimum er rættiliga svørt-hvít, meðan Carl Jóhan Jensen nýtir eina samanberandi mynd, tá hann sigur, at kenslurnar og hugsanirnar eru smoygdar oman yvir persónarnar sum ein frakki. Málið og stílurin hjá Carl Jóhan Jensen er litfagrari og skaldsligari, men hann er eisini eitt sindur speiskur. Stílurin hjá Kirsten Brix er akademiskur, grundgevandi og siðiligur og hevur ikki tann skaldsliga dámin, sum Carl Jóhan hevur t.d. við myndamáli. Ein munur á hesum báðum ummælarunum er, at Carl Jóhan Jensen staðfestir veikleikar og vísir til dømi, har frásøgnin ikki hongur saman, har myndirnar eru reikandi o.s.fr., meðan Kirsten Brix ger sær ómak at royna at skilja, hvat endamálið hjá høvundinum er, hvat tað er, høvundurin roynir

at gera, sum so kanska miseydnast. Her umboðar Kirsten Brix tann *intentionala ummælaran*, sum Hejlskov Larsen lýsir, ið roynir at finna fram til, hvat høvundurin hevur ætlað við sínari skriving, og metir um, í hvønn mun tað eydnast honum [70]. Carl Jóhan Jensen ger tað til eina ansvekjandi yvirskrift, at henda ætlan miseydnaðist, meðan Kirsten Brix kritiserar, at søgan ikki er í samsvari við samfelagið, sum hon lýsir, men sigur, at tað er tí, at endamálið hjá høvundinum er ikki at spegla sína samtíð við at lýsa eitt søguligt tíðarskeið, men at lýsa eitt alment menniskjaligt evni sum seksualitet, og at taka tað upp í nútíðina. Kirsten Brix leitar inn til kjarnan í søguni og sigur, at bókin er ein roynd at lýsa tað. Tað, sum Kristen Brix sigur, líkist tí, sum Carl Jóhan Jensen sigur við yvirskriftini „Mongum brestur ætlan". Kirsten Brix sigur ikki beinleiðis, at høvundurin ikki megnar tað, sum hon setti sær fyri, men tá hon sigur, at hetta er ein roynd, so liggur í hesum hetta, at royndin ikki endiliga eydnast, men royndin verður virðismett fyri tað, hon er. Her er Kirsten Brix í veruleikanum eisini hørð, men ógvuliga hóvlig í sínum virðisdómi (Brix 1999b).

Munurin millum hesi bæði ummælini er fyrst og fremst munur millum tónan í ummælinum, tí Carl Jóhan Jensen og Kirsten Brix eru ikki so ósamd í sínum virðisdómi av bókini. Munurin er eisini, at Kirsten Brix er tekstfokuserað í sínari viðgerð, meðan Carl Jóhan Jensen í størri mun ummælir høvundin og hansara evni at skriva, tí tá hann sigur „mongum", so førkar hann fokus frá teksti og yvir á høvund, og hetta er ein grundleggjandi munur millum hesar báðar sera ymisku ummælararnar, sum eisini mugu bólkast ymiskt. Kirsten Brix er ógvuliga týðilig í sínum tekstfokuseraðu grundgevingum. Hon er tann akademiski og námsfrøðiligi ummælarin, sum ger sær ómak at vísa á, júst hvat tað er, sum ikki fungerar í hesari søguni.

Ummæli av Burtur

Ironiski tónin, sum einans hómast í yvirskriftini til ummælið „Mongum brestur ætlan" hjá Carl Jóhan Jensen, verður fullgjørdur í ummælinum sjey ár seinni, tá hann ummælir aðru skaldsøguna eftir Bergtóru Hanusardóttur, *Burtur*. Hetta ummælið líkist ikki tí fyrra,

70 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

sum í formi líkist einum siðbundnum ummæli við kunning, endursøgn, viðgerð, frásjónargerð og virðisdómi. Hetta byrjar við herming eftir skrivistílinum hjá Bergtóru Hanusardóttur undir yvirskriftini „Ein pastisja“. Talan er tó heldur um parodi. Frá byrjan verður bókin soleiðis gjørd til láturs, og lesarin, sum ikki kennir hugtakið *pastisju*, kann fara at ivast í, um Carl Jóhan Jensen endurgevur úr skaldsøguni. Inngangurin skapar tí áhuga fyri bókini; áhuga fyri at kanna, hvussu nógv hetta, sum ummælarin ber fram, líkist tí uppprunaliga tekstinum. Spurningurin, sum birtist í lesaranum, er: skrivar Bergtóra Hanusardóttir soleiðis, sum Carl Jóhan Jensen sigur, at hon ger?

John Chr. Jørgensen nevnir hesa herming í sínari greining av málsliga stílinum í ummælum; ein tilvitað herming, ið ofta endar sum ein parodi við síni kritiskt argandi og speirekandi herming (Jørgensen 1999:84).

Tann sokallaða *pastisjan* hjá Carl Jóhan Jensen er skrivað við nógvum endurtøkum um drekkamunnar, sum vísa til yvirskriftina yvir ummælinum „Um blaðlýs og drekkamunsrealismu“, og hon er skrivað uttan nakað punktum. Hetta gevur henni ein uppreksandi dám, sum ger tekstin enn láturligari og skapar áhuga fyri upprunatekstinum.

Ein undiryvirskrift eitur: „Einki frábregðilsi“. Við øðrum orðum er bókin á ongan hátt forvitnislig. Ummælarin vísir til annað positivt ummæli av henni. Hetta er óivað ummælið hjá Hanusi Kamban (Kamban 2006a). Carl Jóhan Jensen avsannar alt tað positiva, sum er sagt í tí ummælinum, og sigur, at tað beinleiðis er lygn, og hann kallar tað skammrós. Kriteriið, sum Carl Jóhan Jensen her setir til listaliga dygd, er í samsvari við tað, sum hann hevur borið fram frammanundan: Skaldskapur skal bróta frá tí, sum hevur verið frammanundan, og ikki bara halda fram í siðvenjuni.

Hann leggur fram heitið *drekkamunsrealisma*, eitt orð, sum vit ikki kenna frammanundan, men sum er lýst ógvuliga væl í parodiini. Hann knýtir tvær aðrar kvinnur at *drekkamunsrealismu*, Marionnu Debes Dahl og Oddvør Johansen og sigur í sama viðfangi, at hvørki tær ella Bergtóra Hanusardóttir hava boðið inn til líkinda lesigleði. Carl Jóhan Jensen saknar lesigleði, tí bókin er ikki bara keðilig – hon er burtur úr vón og viti keðilig, sigur hann.

Triðja og seinasta yvirskriftin er ein mynd av lesaranum sum lús á einum leyvblað, ið er eitt so trænað og turrpínt umhvørvi, at tað drepur allan lestrarvilja. Einastu ráð at taka er at rópa hart, so at høvundurin skilir tað, at hann skal gevast. „Gevst, fyri Guðs skyld, gevst, gevst!“, eru seinastu orðini í ummælinum. Hetta eru ráðini, Carl Jóhan Jensen gevur høvundinum, og hann kritiserar bókina bæði málsliga og skaldsliga (Jensen 2006).

Bera vit saman ummælini av *Suðar dýpið reyða* og *Burtur*, gevur Carl Jóhan Jensen eingi verulig dømi úr tekstinum sum grundgeving fyri sínum útsagnum í ummælinum av *Burtur*, eins og hann gjørdi í tí fyrra. Hann letur ta sokallaðu *pastisjuna* standa einsamalla sum „dømið úr tekstinum“. Sigast kann, at breyt ummælaravirksemið hjá Carl Jóhan føroyskan ummælarasið við ummælinum av *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari* hjá Jóannesi Dalsgaard, so fer hetta ummælið eitt fet longri, og hesi bæði ummælini – tað av *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari* og tað av *Burtur* – standa sum ein ramma um ummælaravirksemið hjá Carl Jóhan Jensen higartil, tí vit hava ikki sað mong ummæli frá Carl Jóhan Jensen síðan ummælið av *Burtur*, hóast hann hevur skrivað nógv annað síðan tað.

Hóast Carl Jóhan Jensen kanska ger upp við føroyskan ummælarasið, so er hann ikki ein ókend ummælaratypa og kann berast saman við fleiri ummælarar, sum júst nýta ironiska stílin, myndburðin og óhøviska tónan sum amboð, t.d. donsku Hans Brix og Poul Borum, sum ofta skrivaðu grummar parodiir (Jørgensen 1999:84), og norska Dag Solstad, sum bað Bjørg Vik spara lesaran fyri sínar damublaðsstuttsøgur (Solstad 1966). „Ónd ummæli“ eru eitt tekstlag fyri seg, sum Lars Bukdahl hevur skrivað grein um við yvirskriftini „Ondt blæk“, har hann tekur fram ymisk dømi (Bukdahl 2019).

Eins og Carl Jóhan Jensen leggur fram „uttangarðsskaldskap“ og „máliskuskaldskap“ sum hugtøk í ummælinum av *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari*, leggur hann fram „drekkamunsrealismu“ sum hugtak í ummælinum av *Burtur*. Hesi bæði ummælini, sum ramma ummælaravirksemið inn, eru ikonisk í føroyskari ummælarasøgu fyrst og fremst av tí harða og speiska tónanum og tí náðileysa kritikkinum, men eisini tí tey bróta formliga frá øðrum ummælum. Tað fyrra er kanska meira ein framløga av poetikkini hjá Carl Jóhan Jensen enn tað er eitt ummæli, og tað seinna er skrivað á ein slíkan hátt, at tað

er eins nógv ein tekstur, sum vil vera nakað í sjálvum sær við stórum undirhaldsvirði, sum tað er eitt ummæli.

Hanus Kamban ummælir Burtur

Áðurnevnda ummælið, sum Carl Jóhan Jensen sipar til, tá hann sigur, at tað skammrósar skaldsøguni eftir Bergtóru Hanusardóttur, er helst ummælið hjá Hanusi Kamban í *Dimmalætting* 15. november 2006 við heitinum „Svala í sólarrisi", tí hetta er einasta ummæli av bókini, sum var komið frammanundan.

Hanus Kamban byrjar við at lýsa umhvørvið millum føroyskar útisetar í Keypmannahavn nøkur ár undan og nøkur ár eftir 1970, sum er tað umhvørvið, Bergtóra Hanusardóttir lýsir í skaldsøguni. Síðani endursigur hann søguna, og í viðgerðini vísir hann á, at søgan hevur klassiskan bygnað. Hanus Kamban vísir, at hann er tilvitaður um sín leiklut sum ummælari og kemur við einari metaviðmerking um, at hann ikki fer at siga frá staklutum í verkinum, tí tað er góður ummælarasiður. Hann sigur tó bókina vera spennandi, dramatiska og í støðum stuttliga. Hann vísir á, at ein seinkingarteknikkur – ein heldur long, dvøljandi ouvertura – verður nýttur til at skapa henda spenning, har fáar og smáar ábendingar pirka undir lesarans forvitni og byrjandi ivakenslu. Tveir tættir fáa ferð á søgugongdina: øðrumegin trýstið frá einseminum í einari lutvíst fremmandari mentan og hinumegin súgurin frá rúsdrekka. Hanus Kamban grundgevur her fyri, hvat tað er, sum drívur frásøgnina fram.

Hann vísir á tvey høvuðstemu í bókini: møtið millum kynini og møtið millum tvær mentanir, sum verða handfarin við fastleika og heildarkenslu. Dygdin í søgugongdini verður sædd í, at hon er ein heild, og at hon hongur væl saman (fastleikin). Hann vísir síðani á, hvussu listafólk við sínari subjektivu og impressionistisku eygleiðing betur enn sosiologar kunnu lýsa munin millum mentanir.

Hanus Kamban kemur inn á sjónarhornið, sum er hjá báðum kynunum í bókini, og sigur tað vera bókini frásøgutekniskt til fyrimunar. Móti endanum setir Hanus Kamban bókina í frásjón við at vísa til kanningar, sum vísa, at gentur hava lættari við at klára seg í útbúgvingarhøpi, og tá tað kemur til at laga seg til nýggjar umstøður. Bókin er í samsvari við hetta, sigur hann. Hann tekur dømi fram úr bókini um eina flower-power-veitslu, sum er ein góð tíðarlýsing, og her kemur ein impressionistiskur dámur í ummælið, tá hann í klombrum sigur, at tá hann las hesa lýsingina, hoyrdi hann fyri sær sangin „Bridge over troubled water". Ein viðmerking, sum bæði er rós til evnini hjá høvundinum at lýsa eina søguliga tíð, og avdúking av evnunum hjá ummælaranum at liva seg inn í tekstin.

Hanus Kamban rósar tí føroyska málinum, og hvussu tað verður nýtt í skaldsøguni „við heitum hondum" og sigur, at bókin er eitt prógv um, at alt tilfarið, sum liggur í málinum, enn ikki er troytt. Sostatt sigur Hanus Kamban júst tað mótsetta, sum Carl Jóhan Jensen sigur: at Bergtóra hevur nýtt málið á nýggjan hátt, ella í øllum førum hevur hon víðkað tað.

Hann kallar bókina høvuðsverkið hjá Bergtóru Hanusardóttur, bæði í vavi og tematiskari viðgerð, men eisini tí at hetta er fyrstu ferð, hon hevur leitað út um eitt strangliga kvinnuligt sjónarhorn. Her setir Hanus Kamban bókina í frásjón við at seta hana í samband við ritverkið. Hann tekur orðið „sál" fram úr tekstinum fyri at lýsa kjarnan í verkinum sum heild – tað hevur við øðrum orðum sál (Kamban 2006a).

Ummælið hjá Hanusi Kamban av *Burtur* er langt og kann næstan lesast sum ein skaldsligur tekstur í sjálvum sær. Høvundurin er orðaríkur, og tað er týðiligt í framsetingini, at tað er skald, sum skrivar, tí hóast ummælið eisini fylgir øllum teimum reglum, sum eru fyri ummælið sum tekstslag við kunning, endursøgn, viðgerð, frásjónargerð og virðisdómi, hevur ummælið hartil ein skaldsligan dám, og í støðum ein impressionistiskan stíl, sum tó ikki tekur yvir og definerar ummælið, tí ummælið er fyrst og fremst essayistiskt og hevur skaldslig drøg, t.d. tá sagt verður: „Føroyskt er eitt vakurt mál. Í tess natúrliga tilfeingi av laðingarsteinum og klípum er hvørt orð kent og brúkt, handfarið av heitum hondum, so at tað er grógvið við farnum, men livandi gerandisdegi, sagnarskugga, nútíðarlívi" (Kamban 2006a). Journalistisku drøgini síggjast tó aftur í, at hann tekur samfelagslig viðurskifti inn og vísir til kanningar, sum siga, at tilflytaragentur duga betur at laga seg eftir nýggjum korum enn dreingir.

Hanus Kamban skapar sær myndugleika í tekstinum við at greina

neyvt, perspektivera breitt og liva seg inn í søguna og endamálið við bókini, sum er ein tíðarmynd. Hanus Kamban umboðar sostatt her tann *intentionala ummælaran*, sum setir seg inn í, hvør ætlanin við bókini er, og metir hana út frá tí. Hanus Kamban hevur sjálvur á orði, at Bergtóra Hanusardóttir til hennara rós í hesum tekstinum leitar út um eitt strangliga kvinnuligt sjónarhorn. Við hesum viðurkennir hann eisini tað, sum Carl Jóhan Jensen sigur í ummælinum av *Suðar dýpið reyða*, at Bergtóra Hanusardóttir hevur feministiska dagsskrá í sínum skaldskapi. Carl Jóhan Jensen finst sum so ikki at innihaldinum í teirri bókini, men í ummælinum av *Burtur* sæst, at hann týðiliga ikki tekur undir við hesi dagsskrá. Hanus Kamban, hinvegin, setir seg inn í dagsskrá høvundsins og talar fyri, at kvinnulig eins væl og mannlig sjónarhorn verða tikin fram, og at kvinnulig eins væl og mannlig evni eru tað, sum bókmentir snúgva seg um. Carl Jóhan Jensen kemur eisini inn á hetta í ummæli av Hansusi Kamban, sum seinni verður tikið til viðgerðar, at Hanus sympatiserar við kvinnuni (Jensen 2002a). Carl Jóhan Jensen metir bókina út frá heilt øðrum kriterium, nevniliga út frá hugsanum um avantagardismu, og hann leitar eftir, hvat nýtt er í hesum og kemur fram til, at tað er einki nýtt í bókini *Burtur*.

Munurin millum ummælið hjá Carl Jóhan Jensen og Hanusi Kamban er lýsandi dømi um, at tveir ummælarar við góðum ummælarafortreytum koma til fullkomiliga ymiskar niðurstøður, og tað ikki bert, tí teir hava ymiskan smakk, men tí teir seta fullkomiliga ymisk kriterii fyri, hvat góð list er, og tá metingargrundarlagið ikki er tað sama, so verður úrslitið eisini fullkomiliga ymiskt.

Hetta er onkursvegna eisini eitt dømi um tær fortreytir, sum ummælið hevur at virka undir, og sum er lýst í tí sætta paradoksinum[71]. Tað verður mett eftir nøkrum objektivum almennum, bókmentaligum kriterium, men tað er eisini altíð subjektivt og litað av upplivingini hjá persóninum, sum ummælir, og ikki minst av teirri listafatan, sum hann hevur.

Tað er longu nevnt, at ummælið hjá Carl Jóhan Jensen av *Burtur*

71 Sí kap. 2 um paradoks í bókmentaummælinum sum granskingarøki.

vísti aftur positiva ummælinum hjá Hanusi Kamban av bókini, eins og ummælið av *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari* elvdi til eina mótreaktión. Hesa ferð var tað ikki bara Hanus Kamban, sum svaraði aftur, men eisini onnur. Hanus Kamban svaraði sum nevnt aftur longu dagin eftir, at ummælið hjá Carl Jóhan Jensen varð prentað, við stuttum stubba við heitinum „Esilssparkið hjá Carl Jóhan". Hanus Kamban er ógvuliga hvassorðaður her og kallar Carl Jóhan Jensen óreinan, arrogantan og fyltan av undirlutakenslu yvir fyri føroyingum. Tað er undirskilt, at Carl Jóhan Jensen vaks upp við danskt talandi pápa. Hann ger ta meting, at Carl Jóhan Jensen skrivar eitt so bonskt ummæli av Bergtóru Hanusardóttur, tí hann, sum ikki er vaksin upp við „natúrligum" kunnleika til føroyskt mál, ikki tolir, at hon hevur fingið móðurmálið í vøggugávu. Tað sæst, at stubbin er skrivaður í sinnismuni, og tað er skjóta svarið eisini vitni um. Hanus Kamban sigur Carl Jóhan Jensen fara lúnskt til verka, tí hann letur ummælið koma so seint upp undir jól, at eingin fer at fáa tíð at skriva aftur. Men Hanus Kamban er skjótur og fær longu í blaðnum dagin eftir sagt enn eina ferð, at *Burtur* er ein tann besta skaldsøgan, sum er komin á føroyskum tey seinastu árini, og hann biður fólk fara út at keypa hana, so esilssparkið verður umskapt til reklamu (Kamban 2006b).

Ólavur í Beiti reagerar eisini skjótt, og tann 21. desember skrivar hann stubba í *Sosialin*, har hann sóknast eftir svari uppá, um Carl Jóhan Jensen hevur skrivað ummæli av *Burtur* av sínum eintingum, ella um *Sosialurin* hevur biðið um tað. Hann vónar ikki, at *Sosialurin* hevur biðið Carl Jóhan Jensen skrivað eitt slíkt ummæli og síðani prentað tað og heldur, at hevur Carl Jóhan Jensen sjálvur funnið uppá at skriva ummælið, so er hann ikki rættsiktaður. Undir øllum umstøðum heldur hann, at *Sosialurin* átti at flutt eitt slíkt „ummæli" undir lesarabrøvini (Beiti 2006).

Ólavur í Beiti flytur ábyrgdina av hesum ummæli yvir á *Sosialin*. Hann hugsar sum ein ritstjóri og ger mun á ummælum og lesarabrøvum. Hetta er ein sera áhugaverdur skilnaður, tí skilnaðurin sigur nakað um, hvørja hugsan Ólavur í Beiti hevur um ummælið sum tekstslag, sum eina kvalifiseraða meining um eitt verk, ið krevur nakað serligt og hevur eina ávísa tign. Hann ger mun á ummælinum

sum einum teksti við tign og myndugleika, og einum lesarabrævi, ið er áskoðanin hjá einum persóni um eitthvørt, sum ikki krevur eitt ávíst orðalag ella tign og ikki krevur at vera sakligt.

Ummælið má sigast at hava verið byrjan til kjak, tí eisini samfelagsviðmerkjarin og politikarin Sjúrður Skaale (f. 1967) legði upp í kjakið við greinini „Dugir Carli at skriva? Dugir Vígdis at dansa?“:

> Nógv fólk ilskast, tá tey lesa ummæli hjá Carl Jóhan Jensen. Og tað skilji eg væl. Tí hóast hann dugir sítt handverk og kennir føroyskar bókmentir sum fáur, so fer Carli stundum um mark í sínum kritikki. Í staðin fyri at ummæla bøkurnar, ger hann gjøldur burtur úr teimum, og spottar tey, sum skrivað hava. Hann nýtir bøkur, ið hann heldur vera vánaligar, sum íblástur til skemt og satiru.
>
> Men nógv av teimum, ið skelda um hesi ummæli, gera eitt mistak: Í staðin fyri at viðgera ummælini (ella skriva eitt betri ummæli sjálv!), royna tey at siga, at tað er Carli, sum ikki dugir at skriva! (Skaale 2007).

Sjúrður Skaale svarar her „Esilssparkinum“ hjá Hanusi Kamban aftur og kritiserar, at hann setir spurnartekin við førleikarnar hjá Carl Jóhan Jensen at skriva. Sjúrður Skaale rósar *Ó – søgum um djevulskap* og sigur, at hetta er fyrstu ferð í mong ár, at ein føroysk bók hevur veruligan møguleika at vinna Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins.

Marianna Debes Dahl ummælir Burtur

Marianna Debes Dahl (f. 1947) ummælir *Burtur* í *Dimmalætting* 5. januar 2007 undir yvirskriftini „Og hugurin ferðast so víða“. Marianna Debes Dahl skrivar ikki beinleiðis mótummæli til ummælið hjá Carl Jóhan Jensen, men tað er hugsandi, at tað er ummælið hjá honum, sum hevur sett dagsskránna í ummæli hennara, tí hon velur at seta ummæli sítt inn í eina kvinnupolitiska rammu. Tað ber til at siga, at Carl Jóhan Jensen við sínum ummæli og sínari tilsiping til Marionnu Debes Dahl og Oddvør Johansen bað um eitt slíkt aftursvar. Marianna Debes Dahl byrjar við tilsiping til Christine de Pisan (1363-1429), ið hon lýsir sum ta fyrstu tilvitaðu feministisku

røddina í Evropa; eina kvinnu, sum var fíggjarliga sjálvstøðug sum professionellur rithøvundur og vardi kvinnur móti tí grundfestu metingini, at kvinnur eru veikar og óreinar. Marianna Debes Dahl endar ummælið við at takka Bergtóru Hanusardóttur fyri søguna og fyri tað nógva tilfarið í henni, ið er slíkt, sum monnum ikki dámar, og sum teir ikki høvdu skrivað. Tí er tað gott, at tað finnast kvinnur, sum skriva um tað, ið annars ikki varð skrivað á okkara lítla máli til okkara fámenta fólk, sigur Marianna Debes Dahl (Dahl 2007).

Ummælarin er í hesum ummæli serstakliga tilvitaður um bókina sum bók eftir eina kvinnu og bók, skrivaða í einum lítlum samfelag, og hetta er partur av teimum metingarkriterium, ið standa sum grundarlag undir hesum ummæli; vit hava tørv á bókmentum á okkara lítla máli um øll viðurskifti, eisini kvinnulig.

Ummælið hjá Marionnu Debes Dahl er annars skipað við endursøgn, sum í støðum fer niður í smálutir og fyllir tað mesta av ummælinum frá byrjan til endan. Samstundis verður teksturin viðgjørdur, og í viðgerðini verður gjørt burturúr at vísa, hvussu sjónarhornið fremur lesingina og persónslýsingina, og tað verður víst til dømi úr tekstinum. Annars er viðgerðin mest á tematiskum stigi. Perspektiveringin er til kvinnubókmentir, og bókin verður lýst sum umboð fyri kvinnubókmentir og fær sítt virði fyrst og fremst sum ein slík. Soleiðis tekur Marianna Debes Dahl sjónarhornið hjá Hanusi Kamban eitt stig longri og umboðar eitt strangliga feministiskt sjónarhorn. Hon viðger fyrst og fremst innihald og tema og umboðar tann *ideologiska ummælaran*, sum Hejlskov Larsen lýsir[72].

Ummæli av Hanusi Kamban

Stríðið um valdið at skilmarka, hvat góðar bókmentir eru, sæst í muninum millum tey bæði ummælini hjá Carl Jóhan Jensen og Hanusi Kamban av *Burtur* í bløðunum við árslok í 2006, ið meta so ymiskt um hetta verk. Stríðið sæst eisini í ummælunum, sum Carl Jóhan Jensen skrivaði av tveimum bókum eftir Hanus Kamban, nevniliga leikinum *Heystveingir* (2000) í *Sosialinum* og stuttsøgusavninum *Pílagrímar* (2001) í *Fregnum*. Ummælið av *Heystveingjum* kritiserar ikki bert verkið, sum er útkomið,

72 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

men kritiserar grundleggjandi Hanus Kamban sum rithøvund. Carl Jóhan Jensen byrjar ummælið soleiðis:

> Eg havi í skjótt mong ár roynt at gera mær grein fyri, hvat tað er í skrivingini hjá Hanusi Kamban, ið líkasum ger tað til eina viljagerð javnan at lesa tekstir hansara, alt teir kortini eru lagaliga vitbornir og málsliga liðiligir. Eg havi eftir førimuni roynt at fáa skil á, hvat tað er innan í mær, sum fær útloysn í vinkum og hábrøgdum serliga um nøs og munn, tá ið eg eitt eygnablunk eftir loknan lestur siti og vigi eina bók eftir Hanus Kamban í hondunum, áðrenn eg seti hana á bókhillina (Jensen 2000c).

Illviljin og ironiski stílurin eru til staðar frá fyrsta setningi, og ummælið endar við einari eftirskrift, sum sigur, at aftursvar til ummælið ikki verða svarað.

Í longum sarkastiskum inngangi lýsir Carl Jóhan Jensen munin millum teir báðar bókmentaliga og sigur, at Hanus Kamban byggir fagurbókmentaligu skriving sína á ta fyrndargomlu regluna hjá Aristoteles, at skaldskapurin skal vera ein eftirmynd av veruleikanum, meðan Carl Jóhan Jensen sigur, at hann sjálvur heldur við amerikanska yrkjaranum Ted Greenwald og hellir til ta listfrøðiligu grundáskoðan, at skaldskapur eigur at vera um eina tíð, sum er ókomin, og tá hann er bestur um eina tíð, sum høvundurin ongantíð fer at vita av. Hann kallar Hanus Kamban *realist*, og so sigur hann: „Tað, hann skaldar, líkist. Tað, eg sjálvur krutli, líkist ongum (og skal ikki)“ (Jensen 2000c). Men tað er ikki hesin munur millum høvundarnar bókmentaliga, sum er tann stóri trupulleikin hjá Carl Jóhan Jensen við at lesa Hanus Kamban:

> Og í sama viðbragdi sá eg og skilti, at tað er ikki royndskygnið í tekstunum hjá Hanusi Kamban, sum so, ikki tann fagurfrøðiligi munurin og ósambærið millum skrivingina hjá honum og mína egnu, men snaringin, sum royndskygnið fær í skrivingini hjá honum, sum keðir meg so tráliga og so djúpt (Jensen 2000c).

Skaldskapurin hjá Hanusi Kamban verður síðani borin saman við bronsu. Tá tú pikkar á hana, hoyrir tú eitt djúpt, men tómligt ljóð innaní sum turt rugbreyð. Bronsan er heil innan, og skert tú í hana, so er tað sama innaní sum uttaná: turt rugbreyð.

Tað er áhugavert, at ummælið byrjar við orðinum „eg“, tí eins og víst omanfyri eru ørindini hjá ummælaranum ikki bert at ummæla útkomna verkið, men eisini at bera fram egnar hugsanir um skaldskap. Hetta er ein máti at vísa, hvørjum kriterium, mett verður eftir, men tað er eisini ein máti at seta seg sjálvan og sín skaldskap á pall.

Carl Jóhan nýtir orðið „eg“, „meg“ ella „mær“ 28 ferðir í hesum ummælinum, og bara tað vitnar um sjálvpallsetingina.

Carl Jóhan Jensen sigur, at tað er okkurt gott í leikinum málsliga, t.d. megnar hann at endurskapa málið frá samtíðini, og hann megnar at gera mun á málinum hjá fólki av bygd og úr býi. Tíverri bjargar hetta tó ikki einsamalt leikinum, sigur Carl Jóhan Jensen. Ummælarin er sera kritiskur um persónslýsingarnar: „Tað hjálpir heldur ikki, at persónslýsingarnar eru so tunnligar, at vóru tær flettar av gomlum ljósmyndum við har til hoyrandi amboðum, blivu tær ikki tynri“ (Jensen 2000c). Hann speirekur mátan, persónarnir eru gjørdir, við lýsingum sum: „Villi Magnussen er gjørdur til ein ikki minni slættligan eg-gløi-upp-á-meginskaldið-til-eg-næstan-pissi-í-buks-av-hávirðing-unglinga“ (Jensen 2000c). Persónarnir verða sagdir at vera pappírsklipp. Hetta er ein lýsing av fløtum persónum, sum Carl Jóhan Jensen fleiri ferðir hevur nýtt.

Stuttsøgusavnið *Pílagrímar* (2001), sum fekk drúgva og positiva viðgerð í ummælinum hjá akademiska útisetaummælaranum René Hjelm, fær eisini speiska viðferð frá Carl Jóhan Jensen, og har sigur hann í innganginum enn eina ferð, at Hanus Kamban „heldur óheppiliga“ gjørdi vart við seg sum skaldprosahøvundur við leikinum *Heystveingir*. Sum ummælið líður, skilir lesarin, at „forharmilsið“, sum yvirskriftin á ummælinum „Um forharmilsi“ tosar um, eisini er ein lítilsmeting av Hanusi Kamban, sum Carl Jóhan Jensen sigur vera forharmaðan um tey veiku í víðari merking: „Hanus var ærligur og sannhjartaður í parti við tí minnimenta. Við kvinnuni. Við arbeiðsmanninum. Við listafólkunum. Við barninum. Við tí happaða“ (Jensen 2002a).

Carl Jóhan Jensen var í 1997 alment frammi í samrøðu í *Sosialinum*

og segði, at tað, sum kvinnur hava skrivað síðani sjeytiárini er ov vánaligt (Joensen 1997), og Jógvan Isaksen hevur sagt alment, at Carl Jóhan Jensen ger seg stuttligan á kostnaðin hjá øðrum, og at hann heldur, at fleiri, serliga kvinnur, tora ikki at skriva, tí so kemur *Carli* eftir teimum (Olsen, Theodor E. D. 2007). Her sæst Carl Jóhan Jensen argast inná, at Hanus Kamban hevur gjørt seg til talsmann millum annað fyri kvinnur. Hetta er tað, sum ger, at Hanus Kamban fær heitið „forharmilsins apostul" í føroyskum bókmentum frá Carl Jóhan Jensen, og hann setir umrøddu bókina í samband við skriving hansara annars og sigur, at Hanus Kamban í hesum nýggja stuttsøgusavninum er so forharmaður sum ongantíð fyrr (Jensen 2002a).

Hugsanirnar um, hvussu kvinnur verða viðfarnar í ummælunum hjá Carl Jóhan Jensen og í føroyskum skaldskapi sum heild í hesum tíðarskeiði, komi eg aftur til í brotinum í kapitli 7 um kvinnur, sum verða ummæltar, og kvinnur, sum ummæla.

Bókmentakritisk sjálvsmynd?

Eg havi nevnt, at Eirik Vassenden sigur í lýsingini av einum av teimum størstu norsku ummælarunum, sum eisini er rithøvundur, Arne Garborg (1851-1924), at hann nýtti *faðirsuppgerðina* í sínum ummælum til at føra seg sjálvan fram sum rithøvund[73]:

> Desse „farsoppgjera" kan vi sjå i en lanseringskontekst, der angriparen nyttar den kritiske konfrontasjonen som eit springbrett inn på den litterære scena. Litteraturkritikken er i eit slikt perspektiv like mye å forstå som ei strategisk form som han er ein smaksdrøftande og kvalitetsvurderande sjanger (Vassenden 2016a:50).

Endamálið er at skapa eina bókmentakritiska sjálvsmynd og at skapa sær ein pall at trína inn á sjálvur sum rithøvundur. Í nevnda ummæli av *Heystveingjum* eftir Hanus Kamban orðar Carl Jóhan Jensen, hvat tað kann vera, sum skapar eina drívmegi í honum at gera upp við alt tað, sum Hanus Kamban stendur fyri bókmentaliga, realismuna, tá hann sigur, at aldurs- og lyndismunur gera, at so nógv ber ímillum teir

73 Sí kap. 5 um bókmentaligt sjónarhorn.

bókmentaliga (Jensen 2000c). Hóast Carl Jóhan Jensen í ummælinum kemur til ta niðurstøðu, at tað eru onnur viðurskifti, sum gera, at honum ikki dámar skaldskapin, so hevur hann kortini sett orð á munin millum aldur og lyndi. Hetta kann gjarna vera ein orsøk til, at Carl Jóhan Jensen sær tørv á at positionera seg upp ímóti Hanusi Kamban og vil fremja eitt „faðirsmorð" við tí fyri eyga at staðfesta sína egnu skaldskaparhugsan. Samstundis sum hann ger tað, knýtir hann seg sjálvan óbeinleiðis at Regini Dahl, tá hann við ummælinum av *Smámunum* (2000) kallar rithøvundin *undangongumann* og bókina „rárastu hending í hesum saltváta býli okkara". Hann sigur um skaldskapin í *Smámunum*: „Skaldskapurin í nýútgivnu bókini ber í mongum og mørgum dám av hesum, ið fær barokktónleik at taka seg út í huganum sum ein rennandi løk" (Jensen 2000b). Hann viðgongur, at hann óttaðist, at hann, tá hann las savnið frá hesum aldraða undangongumanninum, fór at kenna seg sum Chr. Matras, tá hann ummælti yrkingasavnið *Yvir teigar og tún* eftir Hans Andrias Djurhuus. Carl Jóhan Jensen orðar seg tó ikki á henda hátt, men sigur:

> Eg hugsaði, at eg fór at kenna meg onkursvegna sum Kristian á Brekkumørk á sinni, tá ið hann loysti kjaftbandið á berjaposanum hjá Hans Andriasi í Áarstovu. Eg hálvkvíddi fyri, at her fór eg at finna ymiskt í, sum væl kundi vera í skaldskapar nánd, men ikki var skaldskapur – í øllum førum ikki skaldskapur, ið stóð mát við tað, sum Regin Dahl yrkti í bestu árum (Jensen 2000b).

Carl Jóhan Jensen slóðar sær veg her ikki bara sum eftirfylgjara hjá aldraða undangongumanni sínum, sum hann orðar seg, Regini Dahl, men eisini sum ummælara, ið gongur í fótasporunum hjá Chr. Matras.

Hetta hongur væl saman við, at hóast speiski tónin hjá Carl Jóhan Jensen sæst aftur í ummælum hansara av teimum nakað yngri høvundunum Peturi Pólsson og Oddfríði M. Rasmussen og verkum teirra, *Persona non grata* (2001) og *Kvørkringar* (2002), sum hann ummælir, so er viðferðin av hesum yrkingasøvnum munandi lagaligari enn tann av tekstunum eftir Hanus Kamban.

Í ummælinum av *Persona non grata* eftir Petur Pólsson sigur Carl Jóhan

Jensen, at bókin er eingin góð bók. Kortini eru glottar í savninum. Í fleiri yrkingum eru fyndarrík brot og hegnisliga gjørdar myndir og viðhvørt eisini stuttligar og snøggraktar tilsipingar til eldri skaldskap, sum hann orðar seg. Um Petur Pólsson ætlar sær at menna seg sum tekstsmið, eigur hann tó ongantíð ov skjótt at ásanna, at vandaður skaldskapur krevur tukt og aga av yrkjara sínum, sigur Carl Jóhan Jensen (Jensen 2001b).

Í hesum ummæli er sostatt ein vón og ein eggjan til tann yngra høvundin og ikki ein dómur, sum er endaliga staðfestandi, sum tann um Hanus Kamban er.

Í ummælinum av *Kvørkringum* (2002) eftir Oddfríð M. Rasmussen er dómurin eisini harður, men kortini ikki heilt avgjørdur, tá hann sigur, at *Kvørkringar* er eitt heldur slakt verk, ið ikki átti at verið komið út í tí líki, tað er. Her er kritikkurin linaður við orðinum *heldur* og er vendur móti ritstjórnini og forlagnum.

Ummælarin fær tó enn eina ferð høvi at bera fram sína hugsan um skaldskap:

> Skal sannkenning elva eftir sær annað enn framman undan tilætlaðar staðfestingar av tí, sum longu er hildið at vera sambæriligt og satt, eins og t.d. retorikkurin, sum orðaskiftið á løgtingi og føroyskur tíðindaflutningur spretta úr, krevur tað merkingarskapandi undirstøðukervi at vera niðurbygt, og samstøðupartarnir, orðini og tann orðalagsligi logikkurin, aftur og aftur at endurnýggjast í málsligum samanhangum, sum frá sjónarmiðinum hjá vanafestuni er burturvið, rætt og slætt rangmyndir, um ikki sinnissjúka (Jensen 2001c).

Ummælarin setir seg aftur her óbeinleiðis í samband við Chr. Matras sum ummælara, tá hann sigur: „Hesar yrkingar eru, tær nógvu ið hvussu er, í nánd við skaldskap, men eru alt tað sama ikki skaldskapur“ (Jensen 2001c).

Um javnaldrarnar Tórodd Poulsen og Jóanes Nielsen skrivar Carl Jóhan Jensen sera positiv ummæli. Har er speiski tónin als ikki til staðar, men ein lættur spælandi stílur, sum koppar yvir í skaldskap. Serliga er tað ummælið av yrkingasavninum *Brúgvar av svongum orðum* eftir Jóanes Nielsen, sum er skaldsligt og enntá hevur brot, ið eru sett upp sum yrking.

Ummælini av skaldskapinum eftir Tórodd Poulsen, sum Carl Jóhan Jensen skrivar í tíðarskeiðinum 1997-2007, standa í *Dimmalætting* og *Fregnum*. Ummælið av *Speispei spei* (1999) vísir, at eitt ummæli verður til sum ein beinleiðis avleiðing av lesingini av einum skaldaverki: „Hetta kom mær soleiðis av hissini til hugs nú eg legði seinasta yrkingasavnið hjá Tóroddi Poulsen frá mær á borðið og tann tómi og blanki telduskíggin ger so forbankað vart við seg“ (Jensen 2000a). Carl Jóhan Jensen lýsir her, hvussu hann verður drivin til at ummæla av hesum teksti, hóast hann ikki tykist hava nógv nýtt í sær. Men hyggur tú betur, sigur Carl Jóhan Jensen, ansar tú eftir, at okkurt er øðrvísi í hesum savninum: „Okkurt er sum broytir inntakið av hesum væl kendu hugvíddum og ger tær annarleiðis ... Hetta skiftið gevur bókini eitt egið lag og ein egnan tóna í mun til hinar“ (Jensen 2000a). Metingarkriteriini verða her sett fram, og ummælið útleggur skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen í savninum. Víst verður á ein *innanspenning* í savninum, sum Carl Jóhan Jensen sigur hava eyðkent Tórodd Poulsen. Við *Speispei spei* er Tóroddur farin eitt kvink tann heimspekiliga vegin. Lykilorðini í metingarkriteriunum eru *annarleiðis*, *skifti*, *egið* og *egnan*, og við hesum endurspeglast skaldskaparhugsanin hjá Carl Jóhan Jensen, sum ikki í hesum ummæli hevur nakran tørv á at føra fram sína egnu skaldskaparfatan og seg sjálvan sum ummælara, men útleggur savnið á sín skaldsliga og sermerkta hátt og endar við at siga, at hetta savnið er „enn eitt legg á einari høvundaleið, sum kanska er ein tann týdningarmesta í føroyskum bókmentum í hesi umráðatíð“ (Jensen 2000a). Hugsa vit um tað, sum Northrop Frye sigur, um at listin hevur tørv á kritikkinum, tí hann kann tala, meðan øll list er málleys, (Frye 1957/2000:4-5), er hetta ummælið meira ein grundgeving fyri, at ummælið hjá Carl Jóhan Jensen er list, ella skaldskapur, tí hóast Carl Jóhan Jensen í ummælinum „útleggur“ savnið hjá Tóroddi Poulsen, so virkar ummælarin her ikki sum ein brúgv millum verk og lesara á tann hátt, at hann ger skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen meira atkomuligan fyri lesaran, men hann heldur fram í tí skaldsliga málinum. Er *Speispei spei* eitt *tórodskt* savn,

sum Carl Jóhan Jensen sigur, so er ummælið „Millumstøðuspei“ eitt *car*ljóð*hanskt*[74] ummæli, og í tí liggur hugsanin, at Carl Jóhan Jensen ikki hevur skift frá sínum skaldsliga máli yvir í eitt meira alment mál við rótum nærri tí málkervi, sum gerandismálið veksur úr, men heldur seg stóran part av ummælinum *uttangarðs,* fyri at nýta hansara egna hugtak, og varðveitir skaldsliga ljóðið:

> Fyrri myndliður er stjørnurnar, sum fast tær eru sjónskar, ja beinanvegin „siga alt“, eins og yrkjarin vil vera við, eisini eru úrtøkar og óatkomiligar og ein ímynd av onkrum, sum er ævigt og sum tí í kantskari merking so at siga, hoyrir til eina yvirsansaliga vídd uttan fyri ljósmálan hjá skyni og skilningi (Jensen 2000a).

Í niðurstøðuni skiftir Carl Jóhan Jensen tó yvir í meira gerandisligt mál, tá hann ber sín endaliga dóm av verkinum fram: „Samanumtikið er Speispei spei eitt ógvuliga – um eg so má siga – tórodskt savn, har ymsir nýggir træðrir tó eru lagdir inn, og nýggj litbrigdi koma fram“ (Jensen 2000a).

Í hinum ummælinum av Tóroddi Poulsen, tí av yrkingasavninum *Royggj* (2002), er Carl Jóhan Jensen ikki eins hugtikin, men eingin ivi er um, at skaldskapurin er góðtikin. Carl Jóhan Jensen sigur, at hann fyrr hevur samanborið skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen við eitt træ, sum fær nýggjar greinar hvørt ár. *Royggj* er tó ikki ein slík grein, men ein kvistur.

Carl Jóhan Jensen umrøðir í hesum ummæli tað spei, sum hevur eyðkent skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen, síðani fyrsta yrkingasavn hansara *Botnfall* (1984) kom út, og sigur, at tað hevur onkuntíð verið sagt um hann, at yrkingalagið hjá honum er ironiskt „endaleyst spei spei spei“. Carl Jóhan Jensen vísir kanska til ummælið hjá Ivani Niclasen og Hugini Eide í *Braga* „The spei that killed me“ (Niclasen og Eide 2000a) av savninum *Speispei spei*, sum eg havi umrøtt[75], har høvundarnir troyttast av kósini hjá Tóroddi Poulsen, sum heldur fram

74 Sjálvgjørt (mítt) orð fyri mál, sum ljóðar sum tað, sum Carl Jóhan skrivar/tosar.

75 Sí kap. 7 um ummælið sum samrøðu – formliga eksperimenterandi ummæli í *Braga.*

við at venda tí upp, sum plagar at venda niður – og øvugt. Carl Jóhan Jensen vísir aftur, at speiið hjá Tóroddi Poulsen er av tí slagnum, sum verður lýst í teirri trongu merking hjá spekingum sum Kierkegaard, har tað verður lýst sum *endaleys altøk noktan,* sum ein syndrandi kraft. Carl Jóhan Jensen sigur, at speiið hjá Tóroddi Poulsen er atfinning, satira. Hann hevur viðgjørt tað føroyska samfelagið og føroyska mentan og mál í sínum bókum og lýst, hvussu tvískinnaðir føroyingar vitandi og óvitandi eru í hugburði sínum til føroyska søgu og samtíð (Jensen 2002c).

Í sínum ummæli av Tóroddi Poulsen tvey ár seinni tekur Kim Simonsen júst Kierkegaard og hansara lýsing av speii fram í ummæli av savninum *Svøvnlendingur rættar kumpass* (2003). Ummælið kemur út í tveimum útgávum hjá *Dimmalætting* viku eftir viku (Simonsen 2004a, 2004b). Árið eftir kritiserar Kim Simonsen hvassliga speiið hjá Tóroddi Poulsen í *Eygnamørkum* (2004) og postmodernismuna í ummælinum „Lágmark ella eygnamark“ (Simonsen 2005a). Komið verður aftur til hesi ummæli og Kim Simonsen sum ummælara.

Ummælið hjá Carl Jóhan Jensen av yrkingasavninum *Brúgvar av svongum orðum* (2002) eftir Jóanes Nielsen stóð í *Fregnum*. Tað byrjar við kunning um verkið og sigur, at tað er út ímóti ein fjórðingsøld, síðani Jóanes Nielsen gav sítt fyrsta yrkingasavn *Trettandi mánaðin* (1978) út. Síðani skrivar Carl Jóhan Jensen um tað, sum er hent á politiska pallinum hesa lítlu fjórðingsøldina bæði í Føroyum og úti í heimi.

Eftir drúgva lýsing av politisku viðurskiftunum í Føroyum kemur Carl Jóhan Jensen til tað fyrsta yrkingasavnið, og hann brúkar nógva tíð til at røða um tað og tess týdning, móttøku og ávirkan. Síðani tosar hann um restina av ritverkinum og sær eina gongd frá tí fyrsta savninum og til hetta, sum hann ummælir, og sum hann metir vera tað besta. Hann røðir um tey evni, sum yrkingasavnið tekur upp, og tekur fram tvær yrkingar, sum hann heldur áttu at verið lagdar burturúr ella endurskoðaðar. Hesar báðar yrkingarnar eru minnisyrkingar um J.H.O. Djurhuus og William Heinesen, og Carl Jóhan Jensen heldur tær vera ov nógv merktar av „kenslukroysti“,

sum hann málber seg. Virðisdómurin er tó greiður um savnið allan vegin gjøgnum ummælið: Savnið er gott, og ummælarin endar við at siga, at savnið er ein fragd at lesa.

Ummælið er á allan hátt stórt og trivaligt. Tað er á tremur við myndamáli á ymiskum stigi. Carl Jóhan Jensen lýsir kalda kríggið við myndburði: sum eitt tvíhøvdað veraldarskrímsl, har kommunisman verður lýst (sum Carl Jóhan Jensen sigur, at føroyski hugburðurin er) sum djevulshøvdið, meðan kapitalisman verður lýst sum gudshøvdið. Skaldskapurin hjá Jóanesi Nielsen verður lýstur sum eitt landslag, ein mynd, ið verður nýtt ymiskt í samsvari við, at skaldskapurin hjá Jóanesi Nielsen broytist við tíðini. Tá brigdini í skaldskapinum skifta, verður tað lýst við veðurlags- og ljósbroytingum í landslagnum.

Í ummælinum eru tilsipingar til orðingar úr Bíbliuni, tá sagt verður, at føroyingar ikki vilja lata rembingarnar úti í heimi rína við hjá sær, men at teir í góðum náðum við stúringum og sorgum kundu leggja alin aftur at ævi sínari, ein tilsiping til Matteus 6;27: „Tí hvør tykkara kann við at stúra leggja eina alin aftur at ævi síni?“ (*Bíblia*). Onnur tilsiping til Bíbliuna er møguliga yvirskriftin „Mín bústaður stendur ikki á kletti“, sum kann vera ein tilsiping til líknilsið um tann vituga mannin, sum bygdi hús sítt á hellubotn (Matteus 7;24-27).

Carl Jóhan Jensen perspektiverar til politisk viðurskifti, ið eru broytt, síðani Jóanes Nielsen gav sítt fyrsta savn út, og til ritverkið hjá Jóanesi Nielsen, sum hann kennir væl. Hann vísir til italska miðaldarskaldið Dante og bendir á, at yrking Jóanesar „Hugo“ líkist nógv yrkingini „Lítil ljómur við deyða Silvestre Revueltas“, sum Karsten Hoydal týddi.

Kriterii fyri góðskumetingini, sum beinleiðis verða nevnd í ummælinum, eru, at ein yrking verður róst fyri at vera „heilskapað“, meðan annað verður kritiserað sum „kenslukroyst“. Eitt góðskukriterium, sum verður uppfylt, er, at Jóanes Nielsen, sigur Carl Jóhan Jensen, er partur av einum ráki, ið brýtur eina skriftmálshevd, sum undanfarin ættarlið av mentafólki, eitt nú tey, ið umboðaðu *Varðan*, stóðu fyri. Uppgerðin var longu komin fyri seg við greinaskrivingini hjá Hanusi Kamban og ikki minst bókunum hjá Magnusi Dam Jacobsen *Í Grønlandi við Kongshavn* (1976) og *Skitsum* (1977). Málsliga nýskapanin sást longu í tí fyrsta savninum hjá Jóanesi Nielsen *Trettanda mánaðinum*; ein eldhugi, ið markaði at villskapi í mótmælinum og ein frumleiki serliga í myndamálnýtsluni, sum ikki hevði verið at sað her um leiðir áður.

Tá Carl Jóhan Jensen viðger móttøkuna av skaldskapinum hjá Jóanesi Nielsen, sigur hann, at talumálsstílurin og myndberingarnar, sum tóku støði í nærumhvørvinum, í gerandislívinum á sjógvi sum á landi, gjørdu, at yrkingarnar gingu beint inn hjá lesaranum. Fá onnur yrkingasøvn munnu hava rørt fólk eins og *Trettandi mánaðin*, sigur Carl Jóhan Jensen, og Jóanes Nielsen varð alt fyri eitt landskendur. Ummælið endar við at sitera „Mítt pass er andadrátturin“ úr *Brúgvum av svongum orðum* og so yrkingina „Farvæl“ úr *Trettanda mánaði*. Hetta er eyðkennandi fyri ummælið á tann hátt, at alt, sum verður sagt um *Brúgvar av svongum orðum*, verður sett í samband við ritverkið og tekur støði í tí fyrsta, sum kom úr hondum Jóanesar.

Hóast hetta ummælið hevur tey siðbundnu drøgini kunning, endursøgn, greining, frásjónargerð og virðisdóm í sær, víkur tað frá einum siðbundnum journalistiskum ummæli við sínum ógvuliga sermerkta tóna, sum er líkur Carl Jóhan, tá hann skrivar skaldskap. Tað er í størri mun enn mong onnur føroysk ummæli essayistiskt og liggur á markinum millum at vera yrkisbókmentir og skaldskapur. Ummælið er málandi við sínum lýsingum av skaldskapinum hjá Jóanesi Nielsen sum einum landslag, ið skiftir, tað er tvítýtt í yvirskriftini við tað, at tað fyri ein part er upp til lesaran at gera av, hvat hann skal fáa burtur úr yvirskriftini „Mín bústaður stendur ikki á kletti“, og tað er formliga sett upp sum yrking í støðum og kann tí flokkast millum yrkistekst og fagrar bókmentir:

> Síðani er mangt loysnað sum fyrr var fast.
> Nýggir møguleikar.
> Nýggir vandar.
> Annar hugburður.
> (Jensen 2002b).

Samanumtikið skrivar Carl Jóhan Jensen positivt um javnaldrarnar Jóanes Nielsen og Tórodd Poulsen, hann skrivar ironiskt, men kortini við einum lítlum positivum neista og eggjan til teir yngru

rithøvundarnar Oddfríð M. Rasmussen og Petur Pólsson. Men yvir fyri teimum eldru slóðar Carl Jóhan Jensen sær veg við at útnevna Regin Dahl til *undangongumann* og fremja „faðirsmorð“ móti Hanusi Kamban og teirri realismu, Carl Jóhan Jensen sigur hann standa fyri. Hetta er óivað alt í samsvari við skaldskaparhugsanina hjá Carl Jóhan Jensen, men tað kann eisini síggjast sum strategi, har Carl Jóhan Jensen nýtir bókmentakritikkin til at skapa sær eina sjálvsmynd og ein pall at trína á sum rithøvundur.

Carl Jóhan Jensen stendur eftir sum ein av ummælarunum í tíðarskeiðinum 1997-2007, ið gjørdi nógv vart við seg og var við til at halda lív í einari samrøðu um bókmentir, har tað einstaka ummælið, sum Nøjgaard lýsir tað[76], ikki verður sætt sum ein endaligur dómur. Tað verður sætt sum byrjanin til eina samrøðu um bókmentir, har tann persónliga meiningin er ein samskiftislig gerð; ein meining, sum vil einum øðrum menniskja nakað og er byrjanin til eina samrøðu. Ummælaravirksemið hjá Carl Jóhan Jensen endaði við endan á hesum tíðarskeiði. Hóast hann framvegis skrivar nógv, so eru ikki nógv ummæli komin frá hansara hond síðan tá. Samrøðan, sum millum annað fór fram millum hann og Hanus Kamban, var dømi um, at livandi kjak um, hvat bókmentir skulu, hvør skal skriva tær, og hvør skal hava vald at skilmarka tær, fór fram. Tað er dømi um ein livandi bókmentapall, har ymiskar hugsjónir fingu rúm. Tónin var ikki altíð tann siðiligi og námsfrøðiliga eggjandi, sum William Heinesen stóð fyri[77], men ymiskar skaldskaparhugsjónir livdu lið um lið og høvdu eina rødd í tí almenna rúminum; tann avantgardistiska skaldskaparhugsjónin, sum Carl Jóhan Jensen umboðar, og tann feministiska skaldskaparhugsjónin, sum Marianna Debes Dahl og lutvíst Hanus Kamban og Kirsten Brix umboða. Í brotinum um kvinnur, sum verða ummæltar, og kvinnur, sum ummæla, koma fleiri dømi um, hvussu hesar hugsjónir, ið ikki neyðturviliga útihýsa hvørji aðrari, men leggja høvuðsdent á ymisk viðurskifti, liva lið um lið í tí almenna kjakinum um bókmentir í hesum tíðarskeiði.

76 Sí kap. 4 um ummælið sum relatiónir millum menniskju.
77 Sí kap. 2 um ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi.

Um kynstrið at skriva seg sjálvan inn í bókmentasøguna

Í grein við heitinum „Kynstrið at skriva seg sjálvan inn í bókmentasøguna“ skrivar Kim Simonsen um *Ó-søgur um djevulskap* (2005) eftir Carl Jóhan Jensen. Hann vísir á royndina hjá Carl Jóhan Jensen at seta seg sjálvan á pall og ávirka bókmentaheimin á ein slíkan hátt, at hann fær skrivað seg sjálvan inn í bókmentasøguna, ikki tí at verkið krevur tað, men tí at pallsetingin av bókini longu, áðrenn hon kemur út, roynir at fyrireika lesaran, ummælarar og bókmentasøguskrivarar til at taka ímóti einari bók og at meta hana sum verda at brúka tíð og orku uppá. Kim Simonsen vísir til Søren Ulrik Thomsen, skald og bókmentafrøðing, sum kallar hetta „selvhistorisering“ og sigur sjálvsummæli og sjálvssøguskriving vera sera óheppin fyribrigdi, ið byggja á vanvirðing ella ótta fyri opna kjakinum, kritikkinum og eftirtíðini. Hann kritiserar skrivistílin hjá Carl Jóhan Jensen, sum hann sigur ongantíð hava fingið nakað gott ummæli (Simonsen 2005c).

Hvussu er og ikki, so fekk skaldsøgan *Ó – søgur um djevulskap* góða móttøku, varð umsett til fleiri mál, og ummælarar í Føroyum vóru ikki so ósamdir um, at hetta var eitt gott og týdningarmikið verk. So kunnu vit seta spurningin, hvør orsøkin var, og um tað veruliga er, sum Kim Simonsen í sínari yvirskrift vísir til, at Carl Jóhan Jensen dugdi hatta kynstrið.

Mentanarjournalisturin á *Sosialinum* um hetta mundið Anna V. Ellingsgaard (1966-2015) byrjar sítt ummæli av bókini á henda hátt: „Sjáldan hevur ein føroysk bók verið so nógv umrødd, áðrenn hon yvirhøvur kom út, sum nýggja verkið hjá Carl Jóhan Jensen, *Ó – søgur um djevulskap*. Og tey, ið hava fingið varhuga av, at okkurt serligt er í umbúna, eru á góðari leið“ (Ellingsgaard 2005c). Ummælið hjá Onnu V. Ellingsgaard er ein blandingur millum eitt ummæli og eina rithøvundarsamrøðu, og í endanum á ummælinum kemur Carl Jóhan Jensen sjálvur til orða og greiðir frá orsøkini til, at bókin eftir hansara tykki er týdningarmesta prosaverkið á føroyskum seinastu 30-40 árini, og sambært honum er hon tað, tí hon er tikin upp á eitt heilt annað støði enn føroyskur prosaskaldskapur síðani miðskeiðis í 70-unum, sum mest hevur roynst sum okkurt slag av undirhaldsbókmentum, ið einki veruligt hava at bjóða. *Ó – søgur um djevulskap* stendur eftir høvundsins

tykki mát við altjóða bókmentir, og ein partur av at skriva eitt tílíkt verk hevur verið at royna at broyta hugburðin og væntanirnar til føroyskan prosaskaldskap í vón um at hækka støðið yvirhøvur.

At Carl Jóhan Jensen sleppur til orða uppaftur eina ferð á einum palli, sum er ummælið hjá Onnu V. Ellingsgaard, kann síggjast sum enn ein liður í hansara kynstri at skriva seg inn í bókmentasøguna, men tað er eisini stílurin hjá Onnu V. Ellingsgaard at skriva slík ummæli, sum liggja á markinum millum ummæli og rithøvundarsamrøðu, so hetta er ikki eindømi um slíka pallseting í ummælum hennara.

Rithøvundurin, týðarin og ummælarin Agnar Jógvansson (f. 1979) má sigast at gera Carl Jóhan Jensen eftir við at pallseta seg sjálvan í ummæli av *Ó – søgum um djevulskap*, tí ummælið snýr seg meira um hann enn um skaldsøguna. Hann ber seg saman við Carl Jóhan Jensen, tí hann sigur teir báðar vera málslig flogvit, hann tosar um, hvussu hann eins og Carl Jóhan Jensen eisini hevur skemtað sær við at „nýskapa tað føroyska málið“, sum hann málber seg, og í parentesum gjøgnum alt ummælið vísir hann á ymiskt, sum hann sjálvur hevur skrivað og týtt: „eg havi sjálvur týtt „Camillu“ til føroyskt“, „sum eg eisini havi umsett til føroyskt“, og „sum eg tók heitið á, til aðra av mínum fjakkarasøgum“.

Agnar Jógvansson tekur stílin hjá Carl Jóhan Jensen fram og sigur, at hann ber fram ein nýggjan máta at byggja eina skaldsøgu í føroyskum høpi, og at hann ger tað á fullkomnan hátt (Jógvansson 2007b). Onkursvegna staðfestir Agnar Jógvansson sostatt, at tað hevur eydnast Carl Jóhan Jensen at gera tað, sum hann segði seg royna í bókini: at broyta hugburðin og væntanirnar til føroyskan prosaskaldskap í vón um at hækka støðið.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð sigur í sínum ummæli av bókini, sum hann kallar „Hálov av skaldskapi“, at hon er tann mest krevjandi skaldsøgan, hann hevur lisið. Hann er harumframt ógvuliga hugtikin av málnýtsluni og sigur bókina vera snildisliga samansetta:

> Her er eftir mínum tykki talan um tað higartil mest gjøgnumførda og framúrskarandi dømi í føroyskum prosa um, at tað væl ber til at skriva bókmentir á høgum skaldskaparligum støði á føroyskum. Henda bók eigur at fáa øll, sum hava ivast, at mana allan iva í jørðina. Carl Jóhan Jensen vísir við Ó – søgur um djevulskap, at tað ber til, ikki minst við einum myndamáli, sum er heilt einastandandi, og við einum lýriskum lagi, sum stundum fær tekstin at minna meira um skaldskap á bundnum enn á óbundnum máli (Dalsgarð 2006).

Malan Marnersdóttir ummælti bókina og byrjaði við at seta spurnartekin við staðfestingina hjá Carl Jóhan Jensen, at *Ó – søgur um djevulskap* var týdningarmesta prosaverk í føroyskum bókmentum seinastu áratíggjuni:

> Carl Jóhan Jensen gjørdi hybris, tá hann ósmæðin læt kunngera um alt landið, at bókin, hann hevur skrivað, er „Týdningarmesta prosaverk í føroyskum bókmentum tey seinastu tretivu, fjøruti árini“. Tað er ivaleyst við beráddum huga, at hann hevur lagt eitt 10 ára skotbrá inn í hesa sjálvsmetingina. Tað lovar nøkrum av hinum høvuðsverkunum upp í part. Men hvussu við eitt nú *Reglum. Eitt brotsverk* frá 1994? (Marnersdóttir 2005).

Í hesum ummælinum vísir Malan Marnersdóttir til áðurnevnda ummælið, sum Carl Jóhan Jensen skrivaði í 1989, har hann segði seg vilja yrkja undan tí málsliga sjálvsagda, leggja afturat og við skaldskapinum víðka lívstilvitið hjá sær og lesarum, „sum hava dirvi til at fara í holt við hann“. Við hesum sigur Malan Marnersdóttir, at málburðurin í bókini ikki kemur óvart á nakran, og at hetta var hansara ætlan frá byrjan. Malan Marnersdóttir sigur, at tann, sum fremur hybris, verður raktur av nemesis, og hon heldur, at bókin kundi væl verið styttri. Hon svarar Carl Jóhan Jensen aftur, tá hon sigur: „Hvønn týdning bókin hevur? Tað er ikki einfalt at svara, tí skaldskapur kann ikki og eigur ikki at verða „umsettur“ til eina einfalda meining ella ein lætt fatiligan boðskap. Skaldskapur er júst „ógreiniligur“ (Marnersdóttir 2005). Malan Marnersdóttir svarar eisini Carl Jóhan Jensen aftur í hesum ummæli við at siga: „Akkurát hvussu týdningarmikil bókin er, fer tíðin at vísa. Nú er í hvussu er at staðfesta, at *Ó – søgur um djevulskap* av sonnum er ein góð

bók, stak áhugaverd, samansett og ein spennandi avbjóðing at lesa“ (Marnersdóttir 2005). Malan Marnersdóttir setir sostatt útsagnirnar hjá Carl Jóhan Jensen til viks og metir bókina her og nú og ikki í einum hugsaðum bókmentasøguligum samanhangi, sum Carl Jóhan Jensen roynir (Ellingsgaard 2005c), ein samanhangur, sum Kim Simonsen sigur vera vandamiklan (Simonsen 2005c). Kortini letur Malan Marnersdóttir eins og hinir ummælararnir av *Ó – søgum um djevulskap* orðini hjá Carl Jóhan skapa rammu um ummælið, tí hon bæði byrjar og endar við hansara dagsskrá um, at hetta er týdningarmesta bók. Sostatt hevur Carl Jóhan Jensen megnað at sett dagsskrá fyri, hvussu allir ummælararnir hava ummælt, nevniliga við hansara útsøgn í huga, og tá hevur hann longu sett á breddan henda spurningin, um bókin nú kanska er besta bókin seinastu 30-40 árini, og hóast ummælarar ikki siga, at hon er tað, so er eingin ummælarari, sum avnoktar tankan.

Sissel Furuseth kemur í bókini *Forfatteren som kritiker* við einum dømi um, hvussu ein høvundur viðhvørt sjálvur kann stýra, hvussu hann verður lisin, og hon sigur, at søgan vísir, at ummælarar í stóran mun góðtaka og endurtaka slíkar sjálvsyvirlýsingar og programmorðingar av høvundarmunni (Furuseth 2015:15:49).

Ummælini av *Ó – søgum um djevulskap* hjá Carl Jóhan Jensen eru tí ikki eindømi í søguni um, at ein høvundur hevur megnað at stýra, hvussu hann verður ummæltur og at seta treytirnar fyri ummælini av sínum skaldskapi. Ummælini eru heldur ikki eindømi í føroyskum skaldskapi, tí Kim Simonsen, sum sigur seg ræðast sjálvsummæli og sjálvssøguskriving, hevur fyri ein stóran part megnað við sínari áhaldandi skriving í føroyskum bløðum um bókmentir at stýra, hvussu hann verður ummæltur. Hetta síggja vit fleiri dømi um í sambandi við útgávurnar av hansara skaldskapi. Roynir Carl Jóhan Jensen seg í kynstrinum at skriva seg sjálvan inn í bókmentasøguna, sum Kim Simonsen sigur, so ger Kim Simonsen tað eisini sjálvur.

Ummæli av Kodakmyndum

Ummælaravirksemið og onnur skriving hjá Kim Simonsen setir dagsskránna í ummælinum hjá Paula Guðjónsson av yrkingasavninum *Kodakmyndir frá sjeytiárunum* (2005) eftir Kim Simonsen. Ummælið, sum hevur heitið „Patos úr Gulag o.a.“, stóð í *Dimmalætting* í juli 2005. Tað sæst longu í yvirskriftini, sum byrjar við einum lykilorði í nógvum av tí, sum Kim Simonsen skrivaði í bløðini hesi árini, nevniliga hugtakinum *pathos*. Árið fyri hevði Kim Simonsen millum annað í ummælinum av bókini eftir Sigri Gaïni *2002 nætur*, sum verður nevnt í brotinum um Kim Simonsen sum ummælara, umrøtt hetta hugtak. Pauli Guðjónsson byrjar sítt ummæli soleiðis:

> Herfyri kom út yrkingasavnið *Kodakmyndir frá sjeytiárunum* eftir Kim Simonsen, og var tað sjálvandi spennandi at forvitnast, hvat Kim fór at borðreiða við, tá hann jú í longri tíð hevur sligið hart niður á mest sum alla nútíðar føroyska yrking fyri m.a. vantandi patos – og vil hann meira enn fegin hava modernistiskar bókmentir at síggja dagsins ljós í Føroyum (Guðjónsson 2005).

Ummælið tekur útgangsstøði í tí, sum Kim Simonsen sjálvur hevur sett á breddan í miðlunum, bæði í bókmentagreinum og ummælum, og Pauli Guðjónsson setir spurningin, um Kim Simonsen nú megnar at føra tað inn, sum hann harðliga hevur kritiserað føroyskar bókmentir fyri ikki at eiga:

> Kim heldur patos (næstan) at hava sitið fangi í Gulag, og var tað tí spennandi at vita eftir, um Kim eitt nú hevur fríað Patos úr fangilsi. Um tað er so, at patos hevur vantað í føroyskari yrking, so kann tað verða sagt beinanvegin, at Kim hevur til ein vissan mun loyst Patos úr fangilsi, men tó ikki heilt – mær tykir, at yrkingasavn hansara í støðum er ávirkað av ella ikki heilt hevur megnað at loyst seg frá tí „ráðandi postmodernaða orðaspælinum í Føroyum“, ið hann sjálvur hevur kritiserað (Guðjónsson 2005).

Niðurstøðan er, at Kim Simonsen í ávísan mun megnar tað, hann ætlar, men Pauli Guðjónsson kemur við dømum úr tekstinum, sum vísa á, at hann eisini sjálvur er partur av tí postmodernaða rákinum, sum hann kritiserar, og hevur ikki megnað til fulnar at loysa seg frá tí.

Hóast kanningin av pathos í savninum ikki fyllir alt ummælið hjá Paula Guðjónsson, sum greinar savnið, vísir á tey temu, sum verða lýst

í bókini og tekur dømi fram um tær bestu yrkingarnar í savninum, so er tað kortini ein sannroynd, at tað er virksemið hjá Kim Simonsen annars og ikki bara yrkingasavnið sjálvt, sum setir dagsskránna í ummælinum, og tað endurspeglast í yvirskriftini. Kim megnar sostatt í øllum førum í ein ávísan mun, sum Sissel Furuseth er inni á, at stýra, hvussu hann verður lisin.

Eisini Bergur Rønne Moberg lesur í sínum ummæli „Heima í einari flótandi verð“, sum stóð í *Dimmalætting* í august 2005, yrkingasavnið við teimum hugsjónum í huga, sum Kim Simonsen hevur sett á breddan, áðrenn hann debuterar sum yrkjari sjálvur:

> Kim Simonsen hevur seinastu árini verið av teimum mest markantu bókmentakritikarunum í føroyskum høpi. Hann hevur fyrst og fremst fört fram ein harðan kritikk móti postmodernaðum yrkingarhátti, sum hann heldur minkar til eitt spæl við orðum, genrum o.s.fr.
>
> Nú var tíðin komin til at taka veruleikan í álvara og fáa patos og longsul og gjøgnum hesar poesi innaftur í føroyska yrking, sum Kim Simonsen hevur undirstrikað (Moberg 2005a).

Bergur Rønne Moberg sigur, at nú Kim Simonsen er staddur hinumegin borðið, er upplagt at kanna, um samsvar er millum hansara kritikk av nýføroyskari yrking og egna skaldskap hansara, og heldur, at ymiskt tykist benda á, at so er.

Bergur Rønne Moberg ber Kim Simonsen saman við Chr. Matras, hóast teir eru sera ymiskir, tí savnið snýr seg um evnini „úti og heima“. Hann vísir á, at Kim Simonsen nýtir tað, Moberg nevnir eitt „númodernað“ útiseta- og heimstaðarperspektiv; eitt tema, sum eg havi vístá, at Kim Simonsen hevur sett á dagsskrá í føroyskum mentanarlívi við sínum bókmentatíðarriti *Outsider Magazin*. Her sæst aftur, at Bergur Rønne Moberg lesur savnið við lýstu ætlanunum hjá Kim Simonsen, tí hann lesur tað úr útisetaperspektivinum hjá Kim Simonsen í huga, har útisetin verður lýstur sum tann intellektuelli eygleiðarin, ið við sínum víðskygni kann føra nakað týdningarmikið inn í føroyskt mentanarlív.

Bergur Rønne Moberg vísir á, at størsta fyrimyndin hjá Kim Simonsen er Jóanes Nielsen, og hetta nýtir hann sum fortreyt fyri at samanbera teir báðar. Teir hava einki í felag, tá tað kemur til tað tjóðskaparliga, sigur hann, men teir hava annað í felag, til dømis spontanitetin og frískleikan. Við hesari samanberingini verða Jóanes Nielsen og Kim Simonsen settir upp ímóti postmodernistunum.

> Í einari tíð har føroysk yrking í alt ov stóran mun hevur borið dám av smartgeldari ironi og uppgjørdum kodumáli, sum skammríður tí annars áhugaverda intertekstualitetsperspektivinum, er harðliga brúk fyri bæði Kim Simonsen og Jóanesi Nielsen (Moberg 2005a).

Her hevur Bergur Rønne Moberg sama sjónarmið, sum Kim Simonsen frammanundan hevur sett fram t.d. í ummælinum av Tóroddi Poulsen eitt hálvt ár frammanundan (Simonsen 2005a).

Agnar Jógvansson, sum eisini ummælir *Kodakmyndir frá sjeytiárunum*, setir ikki á sama hátt sítt ummæli upp sum ein ætlan at kanna, um Kim Simonsen nú megnar tað, sum hann kritiserar aðrar høvundar fyri ikki at megna. Hjá Agnari Jógvansson sæst tó eisini dømi um, at Kim Simonsen við sínari skriving stýrir bæði greining og meting:

> Kim hevur sjálvur skrivað fleiri greinir um munin millum modernismu og postmodernismu, har hann hevur vístá, at postmodernisman ikki torir at taka nakað í álvara, og at hon tískil ger alt láturligt, tómt og kenslupúrgað ... Hava vit hetta í huga, kann hendan fyrsta reglan tí sigast at vera ein postmodernistisk snildi, sum arbeiðir ímóti postmodernismuni! Hetta er sanniliga áhugavert, og eg eri vísur í, at hetta man vera fyrstu ferð, at nakar yrkjari nakrantíð hevur roynt slíkt (Jógvansson 2005a).

Reglan í yrkingasavninum, sum Agnar Jógvansson tosar um, er fyrsta regla í yrkingini „minnir um leyvið“: „tá lívið er vakrast er sorgin størst“ (Simonsen 2005e:36), ið hann sigur minnir um orðatakið „tá ið neyðin er størst, er hjálpin næst“. Hon er postmodernististk, tí hon upploysir eitt fótatraðk, sigur Agnar Jógvansson.

Áðrenn Kim Simonsen debuterar sum yrkjari, hevur hann sum

ummælari og bókmentakritikari megnað at ruddað sær eina slóð inn í bókmentaheimin og setir sjálvur reglurnar fyri, hvussu hansara yrkingar skulu lesast og metast. Ummælararnir mugu sigast at taka við treytunum, tó at Pauli Guðjónsson ivast og vísir á, at tað ikki í øllum førum eydnast Kim Simonsen at liva upp til tey krøv, hann setir til aðrar yrkjarar.

Ummæli av Náðisólini

Ummælið hjá Tórfinni Jákupsson „Vit eru í tí, vit skriva" av yrkingasavninum *Náðisólin* (2006) hjá Kim Simonsen, sum stóð í *Dimmalætting*, sigur beinleiðis í inngangi til ummælið, at tað tekur støði í ætlanunum hjá Kim Simonsen:

> Nýggja yrkingasavn Kim Simonsens „Náðisólin", ið m.a. snýr seg um málið, heimstaðin, meining og trúgv, er eitt dømi um, at føroyski yrkingaheimurin í dag er í broyting. Fylgjandi ummæli av savninum tekur støði í poetologiska prosjekti yrkjarans, ið er at skapa eina nýggja føroyska yrking (Jákupsson 2006).

Í samrøðu við Onnu V. Ellingsgaard í grein hennara í *Sosialinum* greiðir Kim Simonsen frá tveimum nýggjum útgávum, sum hann stendur fyri, nevniliga mentanartíðarritinum *Outsider Magazin* og yrkingasavninum *Náðisólin*. Samrøðan tekur støði í hugsanum, sum Kim Simonsen setir fram í grein síni „At tora at siga okkurt vakurt aftur" (Simonsen 2006b). Greinin hjá Onnu V. Ellingsgaard er týðiliga grundarlag undir nógvum av tí, sum Tórfinnur Jákupsson ummælir *Náðisólina* út frá. Kim Simonsen sigur í samrøðuni: „Eg veit væl, at eg kann tykjast konservativur og pínliga naivur í mínum mótmæli móti ráðandi postmodernismuni. Sjálvur haldi eg meg avgjørt umboða nakað nýtt við at tora at siga og skriva nakað vakurt aftur" (Ellingsgaard 2006d). Tórfinnur Jákupsson siterar hetta brotið úr *Sosialinum*, vísir til tað og letur tað leiða til yvirskriftina „Kim sum slóðbrótari". Her vísir hann á verkætlanina hjá Kim Simonsen, sum hyggur frameftir og ikki bert aftureftir, sum hann sigur, at postmodernaða yrkingin ger m.a. við sínum pastisjueyðkennum.

Í ummælinum nýtir Tórfinnur Jákupsson orð, sum Kim Simonsen í greinini hevur nýtt, t.d. hvussu hann nýtir *sentrallyrikkin* og arbeiðir seg burtur frá *postmodernismuni*, og hann nýtir eisini kriterii um pathos, ið Kim Simonsen hevur sett í øðrum ummælum, sum grundarlag undir egnari meting av bókini: „Tað er í óvissuni, at eg haldi, at Kim best megnar at lýsa tað patos, sum hann metir postmodernistisku yrkingina at síggja burtur frá" (Jákupsson 2006). Við orðingini, „sum hann metir" sigur Torfinnur Jákupsson við øðrum orðum, at fyritreytirnar fyri greiningini hjá honum av tekstinum eru tær hjá Kim Simonsen. Tá Kim Simonsen sigur, at hann sjálvur metir seg umboða nakað nýtt í føroyskari yrking, og Tórfinnur Jákupsson letur hann fáa orðið við hesum boðskapi í ummælinum av bókini, er hetta dømi um, at eitt sjálvsummæli hjá Kim Simonsen setir dagsskránna í ummælinum av hansara skaldskapi.

Í ummælinum hjá Agnari Jógvansson av *Náðisólini* „Størstur av øllum er kærleikin", sum stóð í *Dimmalætting*, stendur, at ummælið er ein gjøgnumgongd av poetikkini hjá Kim Simonsen, og hann lesur savnið út frá teirri skaldskaparhugsan, sum Kim Simonsen setti á dagsskránna við útgávuni av *Kodakmyndum fra sjeytiárunum*. Agnar Jógvansson tekur dømi um eina yrking og sigur um hana:

> Hesi gløggu orð, sum eru um kærleika og tað at elska, eru eisini dømi um ein part av poetikkinum hjá Kim Simonsen. Nevniliga, at yrkingalist skal tora at siga okkurt vakurt aftur og ikki bert skal vera postmodernistisk og ironisk, ella „tóroddsk", sum er eitt gott føroyskt lýsingarorð, sum Kim sjálvur hevur funnið uppá, og sum er avleitt av Tóroddi Poulsen, sum er ein annar føroyskur yrkjari, og sum plagar at skriva tvætlut (Jógvansson 2006).

Hetta er dømi um, at Agnar Jógvansson nýtir skaldskaparfatanina, ið Kim Simonsen hevur sett fram, sum metingarkriterium og tekur orðini hjá Kim Simonsen um Tórodd Poulsen og postmodernismu til sín sum part av sínum metingargrundarlagi.

Agnar Jógvansson er sjálvur rithøvundur og týðari og, sum nevnt um ummæli hansara av *Ó – søgum um djevulskap*, nýtir hann ummælarahøvið at siga lesaranum í parentesum í tekstinum, at hann

hevur týtt ymiskt og skrivað ferðafrásagnir (Jógvansson 2007b). Í hesum ummæli nýtir hann eisini høvið, sum snýr seg um poetikkina hjá Kim Simonsen, ið Agnar Jógvansson annars tykist taka væl undir við, at seta fram egna poetikk og vísa á, at hann og franski Jean Genet mótsett Kim Simonsen dyrka tann moralska undirgangin (Jógvansson 2006).

Tað er áhugavert, at Anna V. Ellingsgaard í sínum ummæli av *Náðisólini* við heitinum „Postmodernisman er avblást", sum stóð í *Sosialinum*, ger lítið og einki burtur úr virðisdóminum, ið hon annars í teimum flestu ummælunum leggur dent á. Í brotinum um Onnu V. Ellingsgaard vísi eg á, at hon ger minni burturúr at meta um yrkingasøvn enn skaldsøgur, kanska tí hon ikki kennir seg so trygga í leiklutinum sum ummælari av lyrikki sum av prosa. Tó er tað merkisvert, hvussu kunnandi ummæli hennara av *Náðisólini* er. Lítil viðgerð er í ummælinum, og Kim Simonsen sleppur til orða við tað, at ummælið – sum so ofta hjá Onnu V. Ellingsgaard – er ein blanding millum ummæli og rithøvundarsamrøðu. Ein spurningur, sum kann vera áhugaverdur at seta, er, um tað er truplari enn annars at meta um eitt verk og at leggja tónan sjálvur, tá sum her retorikkurin hjá rithøvundinum um egnan skaldskap fyllir so nógv í ummælunum av honum. Møguliga liggur ein speiskur tóni í ummælinum hjá Onnu V. Ellingsgaard um henda viðmerkjaran og yrkjaran, sum „insisterar uppá at broyta bókmentaheimin", men tað er ikki týðiligt, og Anna V. Ellingsgaard er óvanliga gjøgnumskygd í hesum ummælinum.

Ummælararnir, sum hava skrivað ummæli um yrkingasøvnini hjá Kim Simonsen, hava tilknýti til *Outsider Magazin*. Bergur Rønne Moberg ritstjórnaði blaðnum saman við Kim Simonsen og skrivaði greinar, sum vóru í samsvari við endamálið hjá Kim Simonsen at „skjóta postmodernismuna niður", sum Sámal Matras Kristiansen orðar seg í ummæli av tíðarritinum (Kristiansen 2006). Agnar Jógvansson var nær knýttur at blaðnum og skrivaði ummæli í tað.[78] Hann var

78 Agnar Jógvansson vann sms-kappingina, sum tíðarritið skipaði fyri (Samuelsen 2006).

eisini tann fyrsti, ið gav út á Forlagnum Eksil, sum Kim Simonsen rekur, nevniliga týðingina *Umskapanin* (2007) av *Die Verwandlung* (1915) eftir Franz Kafka (1883-1924). Tórfinnur Jákupsson og Pauli Guðjónsson hava báðir havt egnar yrkingar í *Outsider Magazin*. Tá ið tað kemur til Onnu V. Ellingsgaard, sum var í starvi hjá *Dimmalætting*, ummælir hon eisini savnið, eins og hon skrivar um útgávuna av bæði tíðarritinum og yrkingasavninum *Náðisólin*, ið komu út sama dag. Tað er sostatt eingin veruligur *outsidari*, sum hevur ummælt søvnini hjá Kim Simonsen, men bert fólk, ið so ella so eru knýtt at tíðarritinum hjá Kim Simonsen, og ein mentanarjournalistur, ið hevur tað sum starv, og sum ikki tekur støðu til skaldskapin í ummælinum. Og tó. Skaldskapurin og skaldskaparfrøðin hjá Kim Simonsen fáa skaldsliga viðgerð frá Tóroddi Poulsen. Kinna Poulsen vísir í ummæli av yrkingasavninum eftir Tórodd Poulsen *Hvat hevði Munch verið uttan Dupultkvartettina í Ebenezer* (2006) á tvær speiyrkingar, sum eru mótálop á Kim Simonsen:

> Einki tóroddskt yrkingasavn uttan eina speiska viðmerking til ummælarar og bókmentafólk og hesaferð fellur allur heiðurin til Kim Simonsen, sum fær heilar tvær yrkingar oman yvir seg; „Wannabe" og „Pseudsider", og sum heitini kanska geva ábending um, er hvørgin meint sum nakað heiðurskvæði (Poulsen, Kinna 2006).

Boðskapurin í yrkingini „Wannabe" (Poulsen, Tóroddur 2006:79) liggur í heitinum, og Kim Simonsen verður lýstur sum ein, ið roynir at vera nakað, hann ikki er. Sami boðskapur er eisini í yrkingini „Pseudsider", har Tóroddur Poulsen ger gjøldur burtur úr málsliga stílinum hjá Kim Simonsen og hansara nýtslu av fak- og frøðiheitum:

> PSEUDSIDER
> plussiliga fekk eg hetta innfallið
> at skriva tað ultimativa diktið
> tað kom yvir meg eitt henrívandi eygablikk
> eg sat uppi yvir kompjútarinum og leitaði eftir
> onkrum interessantum begrepum og ismum
> við intuitivari hensikt sum mál

og pregað av dublativari innsikt
(Poulsen, Tóroddur 2006:80).

Hesin hátturin hjá Tóroddi Poulsen at svara aftur upp á uppgerðina hjá Kim Simonsen við hann sum yrkjara fær ein heilt annan virknað enn eitt vanligt ummæli. Sissel Furuseth lýsir hetta slagið av parodi soleiðis:

> Når selvfølelsen rammes, vil det framprovosere hevnreaksjoner, både fysisk og tekstlig. Derfor finnes det nidportretter av kritikere i litteraturen. Den skjønnlitterære hevnen kan oppfattes som særlig infam fordi den er så vanskelig å verge seg mot. På den anden side kan man hevde at den fiksjonaliserte kritikken virker med et visst forbehold, i ly av at den „bare" er diktning og fantasi (Furuseth 2015:49).

Yrkingarnar verða hangandi í luftini sum ein óítøkiligu kritikkur, ið er torførur at verja seg fyri. Keipuyrkingarnar eru dømi um tað, sum Sissel Furuseth í tí fimta paradoksinum setir fram sum eina av avbjóðingunum við at granska ummæli, nevniliga at ummælaravirksemi eins væl kann lýsast frá bókmentasosiologiskum sjónarhorni sum frá miðlasosiologiskum sjónarhorni, har bæði ritroyndir, ritgerðir, kjakgreinir og keipuyrkingar verða tiknar við í ummælishugtakið, samstundis sum tað tá fyrst og fremst verður sað sum bókmentasøguligt keldutilfar. Her gerast keipuyrkingar partur av tí almennu samrøðuni um yrkingarnar hjá Kim Simonsen, hóast tær ikki strangliga í mínum arbeiði verða mettar sum ummæli.

Við heitinum á yrkingini „Pseudsider" spælir Tóroddur Poulsen við *outsidaran*, sum Kim Simonsen ger seg til talsmann fyri bæði í sínum yrkingum og í sínum skrivandi virksemi í *Outsider Magazin*, og setir óbeinleiðis spurnartekin við hansara leiklut sum uttanfyristandandi. Hugsa vit um tað, sum Said leggur í tann uttanveltaða ummælaran, nevniliga at hann við sínari frástøðu kann hava eitt hvassari kritiskt tilvit og evni til annað og meir enn bara at styrkja teir partarnar av mentanini, sum krevja samtykki og eina semju millum tey, sum eru partur av mentanini (Said 1983:24-26)[79], so er tað umhugsanarvert,

79 Sí kap. 7 um ummæli í útisetu.

at tey, sum ummæla Kim Simonsen, júst styrkja teir partarnar av mentanini, ið Kim Simonsen er partur av, og samtykkja hana. Sað í hesum ljósinum umboðar Kim Simonsen ikki eitt *outsidara*-motiv í breiðari merking. Tvørturímóti kann verða hildið uppá, at hann stendur fyri einari *insidara*-mentan, ið ikki bara er merkt av, at rithøvundar og kritikarar ummæla hvønn annan og geva hvørjum øðrum rúm á teimum pallum, ið teir skapa, men at hann eisini skapar sær myndugleika og vald at skilmarka, hvør fær lut í mentanini, og hvat skrivast kann um í hesari mentan. Her verður hugsað um postmodernismuna hjá Tóroddi Poulsen, ið Kim Simonsen finst at, og tað, at skrivað verður um kvinnulig evni í bókmentum, sum Kim Simonsen somuleiðis kritiserar. Komið verður nærri inn á hetta í brotinum um Kim Simonsen sum ummælara og í brotinum um kvinnur, sum verða ummæltar.

Kim Simonsen

Í viðgerðini av Carl Jóhan Jensen sum ummælara havi eg vístá, at hann umboðar pallsetta ummælaran, samstundis sum hann umboðar rithøvundarummælaran, soleiðis sum hann er lýstur í ástøðinum; sum ein ummælari, ið skrivar essayistiskt og ikki leggur seg eftir teimum journalistisku krøvunum. Hann hevur eina dagsskrá, sum røkkur út um bara at ummæla eitt verk, og tað sæst aftur í pallseting av egnari poetikk og í mátanum, hann ruddar sær sess í bókmentaheiminum. Eisini havi eg vístá, hvussu hann í ávísan mun megnar at stýra móttøkuni av sínum skaldskapi. Kim Simonsen megnar, sum eg havi vístá, kanska í enn størri mun enn Carl Jóhan Jensen at stýra móttøkuni av sínum skaldskapi við at arbeiða tilvitað á ymiskum pallum í bókmentaringrásini sum forleggjari, ritstjóri og kjakari.

Kim Simonsen hevur sett spor sum mentanarkjakari í tíðarskeiðinum 1997-2007. Tað sæst millum annað í tí, sum Uni Arge sigur um hann:

> Kim Simonsen heldur, at mangt og hvat, sum átti at verið umrøtt í Føroyum, verður als ikki umrøtt. Bøkur fáa ikki ummæli, og trupult er hjá rithøvundum at menna seg. Tøgnin valdar í alt ov stóran mun, tí føroyingar hava ta fatan, at tað er ófólkaligt at bera fram sína hugsan og kjakast. Men andlig menning er sambært Kim Simonsen

> júst at kritisera og viðgera. Hann vil kritisera og viðgera alt og ikki bara tosa fólki eftir munninum, tí tá heldur øll andlig menning uppat (Arge 2004:103).

Kim Simonsen vil kritisera og ikki tosa fólki eftir munninum, sigur Uni Arge, og í ummæli av greinasavninum *Dreymar um opin vindeygu* (2003) eftir Kim Simonsen kallar Arnbjørn Ó. Dalsgarð hann „L'Enfant Terrible í føroyskum blaðkjaki seinastu árini". Hann sigur, at føroyingar hava lært hann at kenna sum tann bersøgna og ósmædna samfelagsrevsaran (Dalsgarð 2004).

Kim Simonsen slóðar sær veg við *Outsider Magazin* sum tann, ið kemur uttaníframá og setir seg upp ímóti teirri ráðandi tjóðskaparligu valdsskipanini og setir nýggja dagsskrá.

Hann smæðist ikki burtur og hevur sagt meira enn eina ferð, at tað, sum hann ger, er tað besta av sínum slag, sum er gjørt í Føroyum (Simonsen 2006a:2013).

Í tíðarskeiðinum 1997-2007 skrivaði Kim Simonsen ummæli um Alexandur Kristiansen, Tórodd Poulsen, Steintór Rasmussen, Sigri Gaïni, Agnar Jógvansson, Oddvør Johansen, Dagny Joensen og Randi á Ryggi, ið telja við út frá teimum krøvum, sum eg havi sett fyri mína innsavning. Hann hevur umframt tað skrivað nógvar greinar um bókmentir hetta tíðarskeiðið, sum ikki eru tiknar við her. Kim Simonsen ger soleiðis, sum hann sigur, at hann vil: kritiserar og viðger alt og tosar ikki bara fólki eftir munninum (Arge 2004:103). Hann skrivar um eldri og yngri høvundar, um debutantar og skrivar um bæði kvinnur og menn. Øll ummælini stóðu í *Dimmalætting* uttan tað av Alexanduri Kristiansen, sum stóð í *Sosialinum*.

Kim Simonsen vísir, at hann er sera tilvitaður um sín leiklut sum ummælari, og hevur sagt, at honum ikki dámar at ummæla ávísar tekstir, men sær tað sum sína skyldu (Simonsen 2005a, 2005c).

Ummæli av Meditations on Salt

Høvuðsboðskapurin í ummælinum hjá Kim Simonsen av *Meditations on Salt* (2007) eftir Randi á Ryggi[80] endurspeglast í yvirskriftini „Ein flott sjón sum eingin sá" (Simonsen 2007). Boðskapurin er, at Randi á Ryggi skrivar í Føroyum, men hon ikki er føroyingur og er tí fremmand. Tað ger, at hon ongantíð fer at fáa pláss í teimum føroysku bókmentasøgunum, tí tær eru „nationalar" ella „nationalistiskar", sum Kim Simonsen málber seg. Kim spáar um vantandi móttøku av slíkum høvundum, men setir seg sjálvan í serstøðu, tí hóast onnur ikki fara at síggja, at hesir høvundar hava týdning, so ger hann tað. Hann metir seg sum tann einasta, ið sá hetta verk, tá tað kom út. Hann slær „lesarar" og „ummælarar" saman. Við øðrum orðum, ummælarar eru einastu lesarar, ið vert er at tosa um. Bara Kim Simonsen hevur ummælt, sostatt hevur bara Kim Simonsen lisið bókina. Einki bendir á, at Kim Simonsen hevur kannað sølutøl ella bókasavnslán. Á henda hátt setir hann seg sjálvan fram sum tann góða lesaran; sum tann, ið gjøgnumskoðar, og sum tann uttanfyristandandi, ið er tann einasti, sum *sær*. Her skapar hann sær myndugleika við at tosa um seg sjálvan og skapa hugasambond við tann intellektuella *outsidaran*, ið eg havi vísst á, at hann hevur skrivað um í tíðarriti sínum *Outsider Magazin*, og knýtir seg sum ummælari at hesari ímynd. Hetta er í samsvari við tað, sum Said sigur um tann tilvitaða kritikaran, ið hevur ta neyðugu frástøðuna til at seta seg uttan fyri tær tilsagnir og semjur, sum liggja í mentanini[81].

Ummælið byrjar, sum flestu ummælini hjá Kim Simonsen, við einum sitati, ið er áhugavert vegna tað, sum hann nevnir um evnið og innihaldið í tekstinum: tað isolerða og einsamalla. John Chr. Jørgensen nevnir hetta eitt stíltak, ið virkar sum dokument og skapar áhuga. Tað verður brúkt sum inngangur til ummælið og til at lýsa verkið við (Jørgensen 1999:30).

Ummælið er deterministiskt á tann hátt, at ummælarin hevur avgjørt frammanundan, at bókin og høvundurin eru isolerað, og tað fara tey at verða verandi.

Ummælarin letur væl at hesum savni, hann er positivur um samanseting av yrkingum og myndum og rósar listamanninum Ole Wich (f. 1953), sum hevur sett myndirnar upp. Men tær eru ov lítlar og áttu at fylt meira, sigur hann. Hann tekur eina yrking fram um

80 Skaldanavn fyri Randi Ward úr USA, sum var skiftisnæmingur á Fróðskaparsetri Føroya og tók M.A. í fólkalívsfrøði har.

81 Sí kap. 7 um ummæli í útisetu.

aðrar sum ta bestu, og tað er heitisyrkingin. Annars kritiserar hann yrkingarnar fyri at vera ov kámar, ov óklárar, siga ov lítið, og tær eru møguliga eisini ov privatar. Hann kritiserar, at bókin ikki er nóg væl ritstjórnað og hartar fleiri partar rundan um sjálva bókina, bæði útgevara, ritstjórn og enntá eisini móttakara, sum hann spáar ikki fer at lesa ella í øllum førum ikki veruliga at „síggja“ hetta savnið, tí tað er skrivað av útlendingi.

Kim Simonsen nýtir eitt „eg“, tá hann skrivar, og avdúkar, at hann hevur lisið savnið ofta, og at ikki fyrr enn hann hevði lisið tað ofta, fann hann útav, hvat hetta savnið veruliga var. Kim Simonsen kritiserar ritstjórn og stavivillur, men tekur tær ikki fram. Tað kann tí vera torført at taka henda kritikkin fyri fult, tá Kim Simonsen sjálvur í hesum tekstinum hevur fleiri stavi- og slagvillur. Hann skrivar t.d. „gevir“ heldur enn „gevur“ og „við“, tá tað skuldi verið „vit“.

Ummælarin skapar sær myndugleika í hesum tekstinum við at nýta fakorð sum *sentrallyrikk*, men hann ger í hesum ummæli ikki nógv við at seta bókina í bókmentaligan samanhang og at vísa á bókmentalig rák. Hann ger heldur ikki burtur úr at greina tekstirnar. Hann lýsir tó høvuðstemu, sum eru melankoli og veðursjúka og roynir at skapa sær myndugleika við at pallseta egin evni at gjøgnumskoða dygd í teksti og at vera tann einasti, sum sær út um tjóðskaparlig mørk og sær, hvussu bókmentasøgan í framtíðini fer at síggja út. Eisini setir hann seg á pall sum ein, ið hevur skil fyri heildini í teirri bókmentaligu ringrásini. Hann smæðist ikki fyri at kritisera bókmentakervið, og hetta er ein máti at royna at skapa sær myndugleika í tekstinum, tilvitað ella ótilvitað.

Ummælaratypan, sum Kim Simonsen setir seg fram sum, kann partvíst berast saman við „Critic Gusto“, entusiastin, sum T.S. Eliot nevnir í sínari bólking av ummælaratypum; hesin ummælarin er ikki fyrst og fremst dómari, men arbeiðir fyri at føra fram høvundar, sum eru gloymdir ella av óróttum vanvirdir. Ummælarin vísir á hesar høvundar og hjálpir okkum at síggja virði, sum vit ikki høvdu varnast (Eliot 1961/1965:11-13).

Ummæli av Sigri Gaïni

Ummælið hjá Kim Simonsen av yrkingasavninum eftir Sigri Gaïni *2002 nætur* byrjar eisini við sitati úr ummælta savninum og tekur síðani tað mest upplagda motivið í savninum fram: náttina. Virðisdómurin kemur tíðliga, longu í fyrsta reglubroti, tá hann sigur savnið vera tað besta hjá Sigri Gaïni, men at tað enn er langt á mál.

Kim Simonsen tosar í hesum ummælinum um seg sjálvan sum eitt „vit“, ið tosar inkluderandi við ein lesara, ið hevur somu undanfatan sum hann av bókmentaligum motivum: „Náttin er áhugaverd, vita vit“, sigur hann. Hann sigur, at heitið *2002 nætur* kemur *sjálvandi* av søgunum „1001 nátt“, og hann heldur fram í stílinum og væntar, at lesarin hevur somu undanfatan sum hann. Við at vísa, hvussu sjálvsagt alt er fyri hann, skapar hann sær myndugleika. Bera vit tað „vit“, sum Kim Simonsen letur umboða seg í hesum ummælinum, saman við tann kollektiva formin, sum Chr. Matras í 1930-árunum nýtti í ummælinum av týðingini hjá J. H. O. Djurhuus av *Verjurøðu Sokratesar*, verður týðiligt, at kollektivi formurin hjá Kim Simonsen ikki eins og kollektivi formurin hjá Chr. Matras hevur til endamáls at tosa umboðandi vegna ein felagsskap, møguliga vegna tjóðina sum heild: „Eina atfinning verða vit at gera at týðingini; ... og vit vóna, at týðarin heldur áfram við at geva okkum gripir úr grikkskum bókmentum“ (Matras 1932:126). Heldur er tað „vit“, sum Kim Simonsen identifiserar seg við, ein kollektivur formur, ið setir orð á eina bókmentaliga elitu við somu bókmentaligu referansum sum Kim Simonsen. Hetta er ein máti at skapa myndugleika í tekstinum og ein máti at pallseta egnan persón og egnan lesiførleika. Kanska ber til at siga, at har Chr. Matras hevði ein natúrliga tillutaðan myndugleika og tosaði inkluderandi vegna tjóðina, má Kim Simonsen skapa sær myndugleika við at prógva sítt virði sum ummælari. Hetta er eitt dømi um, at tað sæst í ummælunum, sum nevnt varð í innganginum, at valdskipanin í samfelagnum broytist, soleiðis at tann klassiski ummælarin, ið hevur myndugleika millum fólkið at meta um góðsku, missir sína valdstøðu, og má skapa sær hana í tekstinum.

Ein triðing inni í ummælinum kemur Kim Simonsen nærri inn á hugtakið, ið hann hevur sett sum yvirskrift yvir ummælið, *pathos*, og tað tykist eisini vera fremsta endamál við ummælinum at læra lesaran,

við støði í hesum savninum, um hugtakið *pathos*. Tað hevur hann gjørt fyrr, og tað sigur hann eisini í ummælinum: „Eg havi sjálvur skrivað um hetta hugtak í eini greinarød í Dimmalætting og seinni í Varðanum“ (Simonsen 2004d), og restin av ummælinum snýr seg um hetta hugtak.

Her pallsetir og promoverar Kim Simonsen seg sjálvan sum lærumeistaran, sum kann læra lesaran um hetta hugtak, ið, sum hann sigur, stavar frá Aristoteles. Hann sigur hetta vera eitt torskilt og svikaligt hugtak, ið sjálvt ikki nógvir bókmentafrøðingar vita nakað um. Her orðar hann henda málbólkin, sum liggur aftan fyri „vit vita“, men hann setir seg samstundis fram sum ekspert í hesum bólki, tí hann er tann, sum kann greiða hetta torskilta og svikaliga hugtakið fyri bókmentafrøðingunum. Hugtakið er ikki virkið innan modernaða bókmentafrøði enn, sigur Kim Simonsen, og við hesum *enn* liggur ein tanki um, at hann kann vera tann, sum førir hetta hugtak inn í ta modernaðu bókmentafrøðina. Eftir hetta snýr ummælið seg at kalla ikki um savnið hjá Sigri Gaïni longur, men um hugtakið *pathos* og um ummælarans leiklut at læra bæði lesarar og høvundar.

Kim Simonsen sigur soleiðis um ummælarans leiklut:

> So koma vit til partin, sum eg haldi lítið um. Tað er at skriva erlig ummæli av yrkingum hjá ungum kenslubornum fólkum. Yrkingar, ið tey hava sent út í heimin við bløðandi hjarta, og sum ein hjartaleysur ummælari kann taka lívið av.
>
> At vera ummælari er ein bardagi millum ein professionellan fakligan stoltleika, og at siga tað, sum er sømiligt. Í Føroyum eisini ein bardagi um at finna eina erliga rødd, tí øll kennast. Tá tað kemur til tey ungu, skal ummælarin hugsa um at kveikja heldur enn at týna teirra sjálvsálit. Eitt ummæli kann tí vera ein leiðbeinandi rødd í myrkrinum, bæði fyri lesaran og høvundin (Simonsen 2004d).

Her kemur Kim Simonsen inn á námsfrøðiligu ábyrgdina hjá einum ummælara og tey mótstríðandi áhugamál, sum kunnu gera tað torført hjá ummælarum at stýra millum professionalismu og so tað ikki at særa høvundin, men heldur at kveikja ein neista. Hetta kjak hevur sama innihald, sum kjakið, Chr. Matras og William Heinesen høvdu um at ummæla í brøvum sínámillum (Skarðhamar 2012).

Kim Simonsen skapar sær mentanarligan myndugleika við at perspektivera til søgusavnið *1001 nátt*, við at vísa til Aristoteles, Longinus og Schiller. Hann siterar Bob Dylan, og hann endar ummælið við tveimum sitatum eftir Henrik Nordbrandt, sum skulu vera dømi um, hvussu ein góð yrking sær út. Við hesum ynskir hann Sigri Gaïni betri eydnu næstu ferð.

Ummælið stendur eftir meira sum ein sjálvsmynd enn sum eitt ummæli av yrkingasavninum hjá Sigri Gaïni; ein promovering av einari bókmentaligari tankagongd, sum Kim Simonsen ynskir at føra fram, einari poetikk, sum hongur saman við hansara egna ritverki og hansara verkætlan at „tora at siga nakað vakurt aftur“. Dagsskránna fyri, hvat bókmentir skulu, lýsir hann eisini í ummælinum:

> Øll mál rúma poesi, men uppgávan er at vísa okkurt óvæntað og mangan eru góðar yrkingar sera einfaldar, har høvundurin fær fest ein kaoskendan og paradoksalan veruleika á blað. Ein góð yrking er ofta meira konkret enn ungir yrkjarar halda (Simonsen 2004d).

Ummæli av Føroyingar liva ikki av fiski eina

Yvirskriftin til ummælið hjá Kim Simonsen av yrkingasavninum *Føroyingar liva ikki av fiski eina* (2003) eftir Steintór Rasmussen „Yrkingar liva ikki av meiningum eina“ lýsir væl høvuðsboðskapin í hesum ummæli, sum er, at savnið í ov stóran mun er merkt av tí, sum Kim Simonsen kallar *boðskapismu*. Ummælarin leggur út við at siga, at yrkjarin heldur skuldi havt skrivað eitt mergjað lesarabrævv, tí tað hevði hóskað betur til innihaldið í savninum.

Kim Simonsen vísir, at hann er tilvitaður um sín leiklut sum ummælari og ta ávirkan, hann kann hava á rithøvundin. Hann sigur seg vanliga vilja fara væl við einum debutanti, men grundgevur fyri, at Steintór ikki veruliga er debutantur, tí hann hevur sungið og yrkt sangir í so mong ár.

Tilvitið hjá Kim Simonsen sum ummælara kemur eisini til sjóndar í metaviðmerkingum, tá hann sigur seg vilja byrja við tí góða. Kim Simonsen orðar teir tankar, hann hevur gjørt sær um at ummæla eitt verk, sum hann í veruleikanum ikki hevur so nógv gott at siga um. Hann verjir sín harða kritikk við at vísa á, at Steintór Rasmussen

ikki er debutantur, og hann verjir sín rætt at kritisera við at taka tað góða, sum summar yrkingar hóast alt hava upp á hjarta, fyrst.

Kim Simonsen skapar sær mentanarligan myndugleika til at virka sum ummælari við at vísa, at hann er tilvitaður um sín leiklut, og at hann kennir til, hvussu farast skal fram, tá tú tekur uppgávuna sum ummælari á teg. Sum ein, ið kann geva høvundinum góð ráð, vísir hann á, at Steintór Rasmussen skuldi havt valt annað tekstslag. Hann sigur, at hann hevur sitið í nevnd fyri yrkingakapping, har hann fekk høvi at seta seg inní, hvat er gott, og hvat er vánaligt, og at har var hann eisini noyddur at hugsa um egnar meiningar og listfrøði. Hann nýtir fakorð, sum flestir vanligir lesarar ikki skilja, t.d. orðingina *primordialisma*.

Hann tekur afturíaftur hetta, at savnið hevði riggað betur sum grein ella lesarabræv, tí nógvar yrkingar hava eina troyttandi *boðskapismu* og eru í „radikalari" ójavnvág. Formurin verður ofraður, tí orkan verður løgd í at „frelsa okkum", sigur Kim Simonsen. Kim Simonsen kritiserar eina yrking um World Trade Center og brúkar myndina til at siga, at hon rapar, sum var hon World Trade Center sjálv. Orsøkin er, at *boðskapisman* tekur yvir. Her sigur hann, at høvundurin heldur átti at spælt sær við málinum, og tað kann síggjast sum ein andsøgn til tað, sum hann sigur í ummælinum av *Eygnamørkum* eftir Tórodd Poulsen, sum eg komi til seinni, tá hann í veruleikanum sigur tað mótsetta: at yrking ikki fær virði bara av tí málsliga búnanum.

Kim Simonsen ummælir út frá egnari poetikk; út frá, hvat hann heldur bókmentir eru og skulu vera. Tær skulu fylgja nøkrum ávísum reglum, sum hann setir fram, sum vóru tær ein uppskrift. Hann sigur: „Tað er ein regla, at mann ikki skal lata alt henda í seinasta ørindi. Ein eigur heldur ikki at koma við niðurstøðum og at binda sloyfur í modernaðum yrkingum" (Simonsen 2004c).

Ummælarin setir seg fram sum eksperturin, sum veit, hvørjum slagi av setningum, tað verður ávarað ímóti á rithøvundaskúlum, og sum kennir reglurnar fyri, hvussu modernaðar yrkingar skulu skrivast, og Steintór Rasmussen livir ikki upp til krøvini. Harðasti kritikkurin er tó tann, sum er orðaður í yvirskriftini, at yrkingarnar eru ov boðandi.

Kim Simonsen kann her samanberast við ummælatypuna, sum

Steffen Hejlskov Larsen nevnir *menningarummælaran*, ið metir skaldskap eftir, um hann er í samsvari við gransking og rák í sínari samtíð[82].

Ummæli av Agnari Jógvansson

Ummælið av bókini hjá Agnari Jógvansson, *Føroyatraga, ein sera støkkin og óskipað rannsókn inn í mentavald, føroyska samleikan og føroyska málið og onnur útvald smáverk* (2004), sum er útgivin á egnum forlagi, brúkar Kim Simonsen til at bera egnar hugsanir fram. Hann pallsetir her meira sínar politisku tankar og tankar um tjóðskaparligan samleika enn endiliga at sína hugsan um list. „Tað er løgið at síggja Agnar viðgera spurningar um samleika, ið eg sjálvur havi skrivað hópin av greinum um tey seinastu tíggju árini" (Simonsen 2004e). Og hann heldur fram: „Eg eri eisini fyri loysing, men eg haldi ikki, nationalisma er annað enn ein bendilormur" (Simonsen 2004e). Mátin, Kim Simonsen førkar seg út úr ummælinum og fer yvir til at bera egnar hugsanir fram, sæst týðiliga aftur í hansara orðalagi: „Agnar skrivar ... og eg eri fyri tað mesta samdur við hann".

Hann vísir tilvit um ummælið sum tekstslag og sigur, at tað ikki gevur rúm fyri slíkari skriving, men kann ikki lata vera við at koma við beinleiðis áheitanum bæði til Agnar Jógvansson og til lesararnar í ummælinum:

> Hetta kjakevni krevur meira pláss enn í stuttum blaðummæli. Men eg fari at heita á Agnar og aðrar tjóðskaparhugaðar føroyingar um at lesa um tjóðskapareldhug sum fyribrigdi. Lesið t.d. Ernest Gellner, Benedict Anderson, E. J. Hobsbawm. Ein umfatandi, almenn lærubók kom út í fjør (Simonsen 2004e).

Í innganginum til ummælið sigur Kim Simonsen um bókmentir, at tað eru mest bara gamlir bókmentafrøðingar, ið leingjast eftir tí stóru samtíðarskaldsøguni, og at eitt „alvitandi frásøgukynstur", sum hann orðar seg, ikki longur er modernað (Simonsen 2004e). Tá hetta ikki beinleiðis er tilsiping til skrivistílin hjá Agnari Jógvansson, er tað týðiligt, at tað er partur av teirri bókmentafatan, sum Kim Simonsen

82 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

vil hava fram. Hann sigur hetta aftur í ummælinum av skaldsøguni *Hvirlan* eftir Dagny Joensen (Simonsen 2005d). Út frá hesum ber til at siga, at fyri Kim Simonsen er tað tað, sum er modernað, sum hevur virði, og aftur her sæst *menningarummælaratypan*, sum Hejlskov Larsen lýsir, í honum.

Ummælið av bókini eftir Agnar Jógvansson endar við einum virðisdómi: „Mangt kann sigast um Agnar men ikki at hann er keðiligur, tí hann er verdur at lesa“ (Simonsen 2004c).

Ummæli av Alexanduri Kristiansen

Ummælið av yrkingasavninum *Gud er danskari* (2003) eftir Alexandur Kristiansen byrjar við tíðindunum, at Alexandur er komin við nýggjum savni, og síðani kemur eitt sitat, sum vanligt er hjá Kim Simonsen. Sitatið er úr yrkingini „Verðin“ eftir Alexandur Kristiansen frá 2003, og í breyðtekstinum flokkar Kim Simonsen føroysku modernistarnar í 1960-árunum og setir sostatt høvundin inn í ein bókmentaligan samanhang frá byrjan. Hann sigur tó, at Alexandur Kristiansen ikki er so lættur at flokka í sama bólk sum Guðrið Helmsdal, Líggjas í Bø, Heðin Klein, Rói Patursson, Steinbjørn B. Jacobsen o.o. (Simonsen 2003).

Aftur í hesum ummælinum tekur Kim Simonsen Henrik Nordbrandt fram, hesa ferð ikki sum dømi um, hvussu høvundurin skal skriva, sum hann gjørdi í ummælinum av yrkingasavninum eftir Sigri Gaïni, men fyri at bera Alexandur saman við Nordbrandt og siga, at eins og hann er Alexandur ein klassiskur yrkjari. Hann vísir á kunnleikan hjá Alexanduri Kristiansen til heimsyrkjarar og til týðingar hansara av stórum høvundum. Hann reksar tey høvuðsskøldini upp, sum Alexandur hevur týtt, og vísir til, at hetta savnið er eitt 25 ára jubileumssavn.

Kim Simonsen perspektiverar til føroyskar yrkjarar sum Kára P., Róa Patursson og Jóanes Nielsen, og hann setir síni yndisorð á breddan, t.d. avantgardu, pathos og postmodernismu, hóast hann ikki fær knýtt hesi hugtøk at Alexanduri Kristiansen. Hetta er enn eitt dømi um, hvussu Kim Simonsen nýtir høvið at seta síni hjartamál á breddan í ummælum, eisini hóast tey ikki tykjast at hava nakað við tað ummælta verkið at gera.

Í seinasta brotinum kemur Kim Simonsen aftur til Henrik Nordbrandt, sum hann byrjaði ummælið við, og letur snildisliga orðini hjá Alexanduri Kristiansen sjálvum um Nordbrandt lýsa Alexandur sum yrkjara. Har verður hann sera rósandi lýstur sum ein, sum er mitt í nútíðini, men vendir bakið móti einari ivasamari framtíð og lítur inn í tað farandi, tað hvørvandi og tað, ið longu er horvið. Soleiðis fær Kim Simonsen óbeinleiðis sagt, at Alexandur Kristiansen livir upp til síni egnu ideal[83]. Ummælið endar við faktaupplýsingum um, hvussu nógvar síður savnið er, og hvat tað kostar. Tað kann lesast sum eitt slag av áheitan til lesaran, ella sum ein ábending um, at savnið er vert at keypa og lesa. Í øðrum ummælum hjá Kim Simonsen frá hesari tíðini standa hesar faktaupplýsingar undir tekstinum og eru ikki eitt reglubrot í tekstinum, og har verður prísurin ikki uppgivin. Tí ber til at lesa faktaupplýsingarnar sum eitt slag av áheitan.

Samanumtikið er hetta eitt ummæli, sum er minni performativt enn tey flestu av hinum, men tann performativi tátturin er har, og Kim Simonsen megnar at seta síni lykilhugtøk á breddan, hóast hann fyrst og fremst ummælir yrkingasavnið hjá Alexanduri Kristiansen.

Ummæli av Tóroddi Poulsen

Tvey av ummælunum hjá Kim Simonsen hetta tíðarskeiðið eru um Tórodd Poulsen. Annað er um yrkingasavnið *Svøvnlendingur rættar kumpass* (2003), og hitt er um *Eygnamørk* (2004).

Ummælið av *Svøvnlendingur rættar kumpass* er í tveimum og kemur út í *Skáa* í *Dimmalætting* 10. og 17. januar 2004. Hesa ferð byrjar Kim Simonsen ummælið við sitati eftir romantiska heimspekingin og rithøvundin Schlegel (1772-1829), sum sigur, at ironi er formurin hjá paradoksinum, og síðani einum sitati úr savninum hjá Tóroddi Poulsen, sum inniheldur ta regluna, sum ummælið hevur fingið heitið eftir: „Svøvnlendingur rættar kumpass“ (Simonsen 2004a og 2004b). Í yvirskriftini liggur ein vón, sum verður orðað móti endanum á seinna parti av ummælinum, tá Kim Simonsen sigur: „Sjálvt um Schlegel segði ironi vera formin hjá paradoksinum, so haldi eg, at eitt

83 Idealini hjá Alexanduri Kristiansen.

føroyskt postmodernað tíðarskeið er um at vera runnið í føroyskari yrking“ (Simonsen 2004b). Vónin liggur í, at Tóroddur Poulsen er í ferð við at seta eina nýggja kós og „koma sær úr sandgrynnuni, har hann tey seinastu 12-15 árini hevur ligið hálvavegna skipbrotin og sum ein ferðandi havreki í tokutalu“ (Simonsen 2004b).

Dagsskráin hjá Kim Simonsen í hesum báðum ummælum er orðað í undiryvirskriftini til ummælið „Tóroddur Poulsen broytt tónan. Minni ironi hesuferð“, og fyri Kim Simonsen passar hetta inn í sínar ætlanir um, hvønn veg føroyskar bókmentir skulu fara, og hann endar ummælið við einari áheitan: „Og Tóroddur og allir tit eftirapandi andar, heimurin er stórur og vakur“ (Simonsen 2004b). Hendan áheitanin peikar fram ímóti tí verkætlan, sum Kim Simonsen stutt eftir setti á skinnara, nevniliga útgávu av egnum skaldskapi undir slagorðunum „At tora at siga okkurt vakurt aftur“ (Simonsen 2006b, Ellingsgaard 2006d).

Eftir innleiðandi sitatið í fyrra parti av ummælinum pallsetir ummælarin seg og sína lesiuppliving við at byrja við at siga frá, at savnið hevur verið við honum á ferð, fyrst til Týsklands og síðani til París. Hann greiðir víðari frá: „Savnið lá altíð ovarliga í taskuni og hevur sæð bæði Meklembourg-Vorpommern-gamla DDR-statin – og Jardin De Luxembourg og fylgt mær upp eftir trappunum á Montmatre“ (Simonsen 2004a). Soleiðis fær lesarin eisini at vita, hvar Kim Simonsen hevur ferðast, samstundis sum hann sigur, at tað tók honum langa tíð at lesa hetta savnið, tí hann var ikki so hugaður at fara í holt við tað. Hann væntaði sær eitt keðiligt savn við nærum dekadentari ironi. Hann verður tó tikin á bóli, tí høvundurin hevur rættað kumpass, ikki serliga nógv stig, men til endans kann sjálv rættingin vera púra avgerandi, um ein skal nema land, sigur Kim Simonsen (Simonsen 2004a).

Kim Simonsen tosar eisini metamál í hesum ummæli, tá hann sigur, at hesa ferð fer hann at broyta tónan mótvegis Tóroddi (Simonsen 2004a). Vit fáa innlit í teir tankar, Kim Simonsen ger sær sum ummælari, hvønn tóna hann skal nýta o.s.fr. Metahugleiðingarnar um, hvussu hann skal skriva, hvønn tóna hann skal leggja, hvussu hann skal fara við høvundinum, verða settar fram av einum *eg-i*, sum vísir, at tað er sera tilvitað um sín ummælaraleiklut.

Tann vónin, sum var at hóma í ummælinum av savninum *Svøvnlendingur rættar kumpass*, og sum gav Kim Simonsen hald í uppáhaldinum um, at tað postmodernaða rákið var á veg út úr føroyskum bókmentum, fekk eina bráða vend við ummælinum hjá honum av yrkingasavninum eftir Tórodd Poulsen *Eygnamørk* (2004) í *Dimmalætting* eitt ár seinni. Kim Simonsen kallar ummælið „Lágmark ella eygnamark“, og undiryvirskriftin er: „meira krutl frá Tóroddi“. Her leggur ummælarin meting av verkinum inn í yvirskriftina, sum næstan ikki er til at misskilja. Bókin liggur á einum lágmarki, ella er undir lágmarki, og talan er um krutl og klór.

Kim Simonsen setir heilt grundleggjandi spurnartekin við Tórodd Poulsen sum yrkjara. Hann spyr, um Tóroddur er nakað annað enn ironiin, og um nakað veruliga skaldsligt er í tí, sum hann skrivar. Hann byrjar ummælið við spurningunum:

> Er Tóroddur Poulsen undir sínum tjúkku løgum av ironiskum lakki ikki bert ein annar J.J. í Gerði, t.v.s. púra hugnaliga banalur og einkisigandi? Er Tóroddsa yrking, uttan alla ironiina, kanska bert eitt klombur, vit hava sett rundan um ræðuliga lítið? Jú hetta er tíverri rætt, men av og á titar okkurt nýtt fram (Simonsen 2005).

Kim Simonsen spyr, um nakað nýtt er at fáa hjá Tóroddi í savninum *Eygnamørk*, og við hesum avdúkar ummælarin, at hetta er eitt av høvuðskriteriunum, sum hann setir til bókmentir. Kim Simonsen sigur, at Tóroddur Poulsen tematiserar í hesum savninum sum vanligt viðurskifti millum fiktión og aðra fiktión og millum fiktión og veruleika og leggur seg eftir tí ironiska, tí eksentriska, intertekstuella og problematiserar alt, hann skrivar allan vegin. Ein metatilvitan, sum imponerar onkran bókmentafrøðing, sigur Kim Simonsen. Hann nýtir orðið „krutl“ sum part av yvirskriftini og sum heiti á einari undiryvirskrift, og hann setir hetta orðið í samband bæði við skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen og við permuna, sum hann sjálvur hevur gjørt, ella „krutlað“, sum Kim sigur. Hann leitar í orðabókini eftir merkingini av orðinum krutl, sum hann í fluttari merking fær til at merkja „roks“ og sigur, at henda *ljóta* forsíðan er symbolsk fyri alt ritverkið hjá Tóroddi Poulsen, ið mest er merkt av krutli og

ófullfíggjaðum yrkingaroyndum. Hann sigur, at hetta krutlið er slíkt, sum ummælarar og lesarar skulu *noyðast* at lesa. Ummælarin er aftur pallsettur her. Ummælarin, sum hevur eina uppgávu, sum ikki altíð smakkar honum so væl.

Hann sigur um Tórodd Poulsen, at hann er og verður ein postmodernistur, ið – tilvitandi ella ótilvitandi – gongur hesa leið, og lesarin, sum kennir til aðra skriving hjá Kim Simonsen, veit, at við hetta meinar Kim Simonsen einki gott.

Kim Simonsen ber í hesum ummælinum fram sína hugsan um, hvat ein yrking skal: „Eg haldi, ... at ein yrking eigur at skapa eitt klárt abstrakt mál, sum er sterkt og sansaligt og vendir sær til hugflogið" (Simonsen 2005). Hann leggur eftir teimum ummælarum, sum skriva so pent um Tórodd Poulsen, og sigur, at teir brúka málið sum eitt standardargument fyri góðsku. Hann sigur: „Málslig tilvitan er neyðug, men ikki eitt nøktandi prógv fyri nøkrum øðrum, enn at Tóroddur hevur málfilosofiskar – og kanska málnationalistiskar – vinir á teim røttu støðunum" (Simonsen 2005). Her kritiserar Kim Simonsen ummælarar og leggur teir undir at ummæla Tórodd Poulsen út frá felags málfilosofiskum og kanska málpolitiskum hugsjónum.

Turið Sigurðardóttir er ein, sum hevur ummælt Tóródd Poulsen og lagt dent á hansara málsligu førleikar t.d. í viðgerðini av skaldskapinum í grein í *Braga* „Tann sum ikki sigur sum fyrr kann siga tað nógv betur" (Sigurðardóttir 2000). Eg komi til hetta ummæli í brotinum um kvinnur, sum ummæla. Tilsipingarnar hjá Kim Simonsen til „vinir á teim røttu støðunum" og „onkran bókmentafrøðing" kunnu vera til hana, sum er í starvi á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, ið hevur staðið fyri einum aktivum málreinsandi málpolitikki, har nýorðagerð hevur verið ein partur av málpolitisku strategiini.

Kim Simonsen sigur seg vera troyttan av hesum næstan „málnationalistiska fjasinum", sum hann orðar seg, og spyr, um tað er ein nøktandi grundgeving fyri góðsku at fjala okkurt tvætl í onkrum sum ljóðar væl á føroyskum. Hansara svar upp á spurningin er, at tað er tað ikki. Rætt er heldur at spyrja, sigur Kim Simonsen: „Er ein poetiskur spenningur í hesum yrkingunum? Eru myndir, ið halda? Sigur hetta nøkrum nakað, uttan Tóroddi og einum trimum samsintum? Kann lesarin merkja yrkingina bæði intellektuelt og holdsliga?" (Simonsen 2005). Kritikkurin av Tóroddi Poulsen er ikki bert kritikkur av einari skaldskaparhugsan, men eisini pallseting av aðrari skaldskaparhugsan, nevniliga teirri, „sum lesarin kann merkja bæði intellektuelt og holdsliga". Hesir tankar eru í samsvari við tað, sum Kim Simonsen setti fram í ummælinum av *Svøvnlendingur rættar kumpass* eitt ár frammanundan, tá hann eggjaði Tórodd Poulsen og onnur, sum herma eftir honum, til at síggja, at heimurin er stórur og vakur, og í hesum liggur ætlanin hjá Kim Simonsen um at flyta føroyskar bókmentir ein annan veg, nevniliga móti tí, sum hann sjálvur skrivar, og sum er á gáttini til at koma út: „skaldskap, sum torir at siga okkurt vakurt aftur".

Uppgerðin hjá Kim Simonsen við Tórodd Poulsen stendur tí, á sama hátt sum uppgerðin hjá Carl Jóhan Jensen við Hanus Kamban, eins nógv og eitt ummæli av Tóroddi Poulsen eftir sum ein bókmentakritisk sjálvsmynd.

Tá eg í byrjanini á hesum brotinum um pallsetta ummælaran vísti á, at tað ikki er ókent, at tey narrativini, sum eyðkenna bókmentarákini, eisini ávirka ummælissøguna, setti eg spurningin, um tað eru bókmentirnar, ið ávirka ummælini, ella um tað eru samfelagslig rák, sum um somu tíð hava ávirkan á bókmentir og ummæli. Eg vil fara so langt sum at seta spurningin, um tað er hugsandi, at rákið gongur hinvegin; at ummælini ávirka bókmentirnar? Tað er í øllum førum ikki av leið at siga, at tað performativa rákið, sum sæst í føroyskum bókmentum í 10-árunum, hevði sína blómingartíð í føroyskum ummælum longu um aldarskiftið og í 00-árunum í ummælaravirkseminum hjá Carl Jóhan Jensen og Kim Simonsen.

Pallsetti ummælarin er fyrst og fremst umboðaður av rithøvundarummælaranum, men tað performativa sæst eisini aftur í ummælarastílinum hjá René Hjelm, ið er viðgjørdur í brotinum um ummæli í útisetu[84]. Hann nærkast meira akademikaranum ella bókmentafrøðinginum enn rithøvundarummælaranum sum ummælaratypu, hóast hann eisini hevur givið yrkingar út. Tað performativa

84 Sí kap. 7 um René Hjelm og kap. 7 um ummælið sum samrøðu – formliga eksperimenterandi ummæli í *Braga*.

er eisini frammarlaga í ummælarastílinum hjá Kinnu Poulsen, sum nýtir pallsetingina av egnum persóni til at skapa sær myndugleika í tekstinum. Hana komi eg til í brotinum um kvinnur, sum ummæla.

Tað, at so nógvir ummælarar kunnu flokkast í so ymiskar bólkar, sigur kanska ikki so nógv um teir, sum tað sigur um ummælið sum tekstslag. Tað liggur á markinum millum siðvenjur, og júst tað er partur av tí, sum skilmarkar tekstslagið og er orsøk til, at tað verður lýst sum tekstslag paradoksins. Tað hevði tí bæði verið óhugsandi – og at gera tekstslagnum órætt – at strembað eftir at gera neyvar og eintýddar flokkingar av ummælaratypum.

Kvinnur verða ummæltar, og kvinnur ummæla

Í brotinum um útisetaummælaran verður útisetamotivið tikið fram sum serstøk støða, ið kann geva ummælaranum frælsi frá bondum, sum annars kunnu hava ávirkan á hansara ummælaravirksemi. Víst verður til Said, sum leggur áherðslu á, at tað kritiska tilvitið krevur frástøðu. Hann kemur við áheitan um at loysa seg frá ókritiskari váttan av verandi mentanarfatan og snævurskygdari endurtøku av samtyktum virðum. Henda serstaka støða verður við tíðarritinum *Outsider Magazin* av Kim Simonsen nýtt tilvitað í einari roynd at skapa sær myndugleika sum ummælari, og hann pallsetir t.d. í ummælinum „Ein flott sjón sum eingin sá“ (Simonsen 2007) tað gløgga „gestsins eyga“, ið hevur yvirlit yvir, hvat rørir seg í tí føroyska bókmentaheiminum. Í øðrum samanhangi kemur hann við loysn upp á tað, ið hann sær sum ein trupulleika í Føroyum, nevniliga at ummælarar vátta tey postmodernaðu virðini, sum t.d. Tóroddur Poulsen stendur fyri. Hansara loysn snýr seg um at „tora at siga okkurt vakurt aftur“, og tað heldur hann uppá, at hann ger í sínum yrkingasavni *Náðisólin* (2006).

„Gestsins eyga“ verður tikið fram í ummælinum hjá bókmentafrøðinginum Marionnu Hoydal (f. 1968) í *Føringinum* av bókini eftir Ole Wich *Ophav*, har hansara týdningarmikli leiklutur sum uttanveltaður samfelagsatfinnari verður lýstur (Hoydal 1997). Tað er tó ikki undir øllum umstøðum, at tann uttanveltaða støðan kann sigast at vera ein fyrimunur. Í feministiskum ástøði verður leikluturin, sum

kvinnur hava í einum mansstýrdum samfelag, roknaður sum eitt slag av „útisetaleikluti“, men henda støða verður sjáldan sædd sum ein fyrimunur. Støðan, sum kundi verið sædd sum ein valdmikil „útisetastøða“ verður heldur ein forðing, ið hevur avbjóðingar við sær, tá tað kemur til vald. Franski rithøvundurin, heimspekingurin og feministurin Simone de Beauvoir lýsir kvinnuna sum „annað kyn“, ella „kyn nummar tvey“ (Beauvoir 1949/2019:18). Við øðrum orðum er hon kynið, ið verður definerað út frá norminum, ið verður settur av manninum, sum er „fyrsta kyn“. Amerikanski rithøvundurin, akademikarin og feministurin Joanna Russ lýsir kvinnuna sum part av einum av teimum „skeivu“ bólkunum í samfelagnum, ið skriva bókmentir, hóast samfelagið ikki leggur upp til tað, og tá hon skrivar, skapar hon „rætt“ virði, sum einans menn eiga at skapa (Russ 1983:17). Í bók sínari *How to Suppress Women's Writing* (1983) skrivar hon speiskliga í sínum sermerkta skemtandi stíli um mynstur, sum verða nýtt í samfelagnum til at halda skrivandi kvinnum niðri. Hon vísir í innganginum til bókina á, at tann besti mátin at halda kvinnum uttan fyri bókmentaheimin er at geva teimum so passaligt av frælsi til at skriva og vera partur av skriftmentanini, so tað ikki kann sigast, at tær ikki *kunnu* skriva, men kortini so lítið frælsi, sum yvirhøvur gjørligt, so tær lættast kunnu verða bastar sum rithøvundar. Eydnast tað ikki at fáa kvinnur at lata vera við at skriva, sigur hon, verða onnur amboð nýtt til á ymiskan hátt at forða teimum í at halda fram at skriva og koma fram sum rithøvundar. Bókin kom út í 1983, men er framvegis viðkomandi – syrgiliga viðkomandi sigur onkur ummælari í 2018[85], hóast trý tíggjuáraskeið eru gingin – nú skjótt fýra tíggjuáraskeið – síðan hon kom út. Dømi um strategiir, sum typiskt verða nýttar, eru:

- Gev kvinnum lítið álit á seg sjálvar sum rithøvundar við at skapa sosialar strukturar, sum burturfrágreiða, ignorera og undirmeta tað, sum kvinnur skriva, fyri at sleppa av við tað (Russ 1983:17).
- Avnokta, at ein kvinna hevur skrivað tað (Russ 1983:20).

85 Sí https://www.npr.org/2018/04/21/600902444/how-to-suppress-womens-writing-three-decades-old-and-still-sadly-relevant?t=1609863931719 (06.01.2021).

- Kunnger, at tað er tápuligt og ósømiligt, at kvinnur skriva (Russ 1983:25).
- Tala fyri, at hennara standardur hevur lægri virði enn tann mannligi, og at um kvinnan verður partur av tí mannliga standardinum, órógvar hon teir „*quid pro quo*-strukturar“, sum valda har (Russ 1983:39). Við øðrum orðum órógvar hon tær ósøgdu reglurnar, sum halda teirri mansdominerað mentanini uppi.

Kvinnur eru við øðrum orðum lýstar sum tað uttanfyristandandi kynið, og Russ vísir her til Virginiu Woolf, sum í klassisku ritroyndini frá 1929 *A Room of One's Own* lýsti, at tann kvinnuliga lívsroyndin hevur minni virði í bókmentum enn tann mannliga (Russ 1983:41).

Skuldi tað kortini hent, sigur Russ, at onkur kvinna røkkur so langt, at hon verður kanoniserað, verður isolatiónsamboðið nýtt fyri at syrgja fyri, at hon verður lýst sum undantak, so t.d. bara ein kend bók hjá henni verður tikin fram. Hon tekur dømi um, at tað eru fá, ið vita, at Charlotte Brontë (1816-1855) hevur skrivað nakra aðra bók enn *Jane Eyre* (Russ 1983:63).

Tilsamans verða 11 strategiir at kúga kvinnuligar rithøvundar lýstar í bókini hjá Russ, og tað er merkisvert, at fleiri av hesum strategium, ið kundu ljóðað sum skrøgg, koma til sjóndar í ummælum, sum vórðu skrivað um kvinnur í 1997-2007. Vitandi at bøkur sum tann hjá Joanne Russ og feminisman sum heild fyri langari tíð síðani hevði fingið fótafesti ikki bara í umheiminum, men eisini í føroyskari gransking við bókmentagranskarum sum Maluni Marnersdóttur og Turið Sigurðardóttur um hetta mundið, er tað undranarvert, at tað í so lítlan mun sæst aftur í hesum tíðarskeiði. Simone de Beauvoir lýsti tó somu undran, tá hon skrivaði bókina *Le Deuxième Sexe* í 1949, og segði, at hóast kjakið um feminismu hevði fingið nógv blekk at renna, var kortini ikki komið á mál (Beauvoir 1949/2019:13).

Í hesum broti verður kannað, hvussu kvinnur verða ummælar í tíðarskeiðinum 1997-2007. Farið verður niður í smálutir við ummælum, sum beinleiðis orða andstøðuna móti kvinnuligum rithøvundum og kvinnuligum evnum í bókmentum. Sum mótvekt til hetta verða fyrst tríggir teir virknastu kvinnuligu ummælaraprofilarnir hesi árini *lýstir*, nevniliga Anna V. Ellingsgaard, Turið Sigurðardóttir og Kinna Poulsen, og síðani verða trý ummæli, skrivað av kvinnum í *Kvinnutíðindi*, tikin fram og viðgjørd.

Í prosayrkingasavni sínum *Hvít sól* (2015) skrivar rithøvundurin Lív Maria Róadóttir Jæger (f. 1981) speiskliga um hetta, at kvinnur verða sæddar sum býttari enn menn:

> Shopenhauer:
> Eg lesi hann aftur undir opnum himli, ein týsdag í svalari park. Ella í køkinum ein morgun á einum grønum krakki. Eg minnist ikki. Og eg minnist tað væl. Eg hugsi: samtíð er ein vøgga av feilkeldum. Er tíð altíð soleiðis, ein umbering fyri alt, vit meintu? At lesa seg gjøgnum eitt stórsligið verk, at renna seg í láturligar sannførslur um menniskjað; alt frá somu hond. Eg eri býttari enn maður, tí eg eri kvinna (Jæger 2015:49).

Í tekstinum hjá Lív Mariu Róadóttur Jæger liggur eitt tilvit um, at virðismetingin er mentanartreytað, og at kvinnan verður mett út frá øðrum fyritreytum enn maðurin. Yrkingin knýtir hetta at týska heimspekinginum Shopenhauer (1788-1860) við tilsiping til ritroynd hansara um kvinnur og at tankanum um, at minnið er svikaligt. Tað svikaliga minnið er ein av orsøkunum til, at tað, sum er skrivað um skaldskap í samtíðini, fær týdning fyri, hvussu søgan verður rekonstruerað, tá bókmentasøgurnar skulu skrivast. Her spæla ummælini ein leiklut sum søgulig skjøl, og tí er tað ikki líkamikið fyri eftirtíðina, hvussu ein bók verður ummælt í sínari samtíð.

Eg havi nevnt, at Carl Jóhan Jensen hevur sagt alment, at tað, sum kvinnur hava skrivað 1970-1990 er ov vánaligt (Joensen 1997), og at Jógvan Isaksen hevur róð framundir, at Carl Jóhan Jensen er serliga harður sum ummælari mótvegis kvinnuligum rithøvundum (Olsen, Theodor E. D. 2007).

Marianna Debes Dahl svaraði Carl Jóhan Jensen aftur, at tað er ov lætt sloppið bara at sleingja út, at tað, kvinnur hava skrivað, er vánaligt (Joensen 1997), og hennara ummæli av *Burtur* eftir Bergtóru Hanusardóttur „Og hugurin ferðast so víða...“ kann sum áður nevnt

lesast sum eitt mótummæli til harða ummælið hjá Carl Jóhan Jensen av bókini, har hon takkar Bergtóru Hanusardóttur fyri søguna og fyri tað nógva tilfarið í henni, ið er slíkt, sum monnum ikki dámar, og sum teir ikki høvdu skrivað (Dahl 2007). Carl Jóhan Jensen bað Bergtóru Hanusardóttur gevast at skriva og nevndi skaldskapin hjá henni, Oddvør Johansen og Marionnu Debes Dahl *drekkamunsrealismu*.

Kjakið, sum byrjaði, tá Carl Jóhan Jensen í tíðindasendingini *Degi og viku* í Sjónvarpi Føroya fyrst segði hetta um føroyskar kvinnuligar rithøvundar (Joensen 1997), førir til speisku innleiðingina í greinini „Hugur, um hug, frá hugi, til hugs", sum annars skal snúgva seg um bøkur, samfelag og „mentanarliga bendingarlæru". Carl Jóhan Jensen tekur her aftur í aftur kjakið um kvinnubókmentir, hóast hann sigur seg ikki ætla at gera tað, og við sínum speiska tóna sigur hann, at kvinnubókmentirnar gera nógv um seg og fáa ans. Uppibornan ella óuppibornan. Tær fáa ummæli, og tær fáa rós. Høgligir vindar halda teimum uppi, sigur hann, og so tosar hann um kvinnurnar og ummælarar teirra (Jensen, Carl Jóhan 1997). Við orðingini „høgligir vindar halda teimum uppi" sipar Carl Jóhan Jensen óbeinleiðis til feministiska rákið, har kvinnur stuðla hvørji aðrari at skriva.

Í sínum ummæli av *Rúm* eftir Carl Jóhan Jensen hevur Bergur Djurhuus Hansen eina tilsiping til hetta kjakið, tá hann sigur: „Carl Jóhan Jensen hevur uppiborið betur. Ikki fyri sínar viðmerkingar í sjónvarpinum ella aðrastaðni, men fyri tann skaldskapin hann hevur latið úr hondum" (Hansen 1997). Hetta er helst eitt lítið prik til tað, ið Carl Jóhan Jensen segði um kvinnuligar rithøvundar í *Degi og viku*, og sum sipað varð til í grein eina viku frammanundan, at ummælið hjá Bergi kom út (Joensen 1997).

Í sama blaði, sum ummælið hjá Bergi Djurhuus Hansen stóð at lesa, var speisk yrking undir dulnevninum „Hóri" prentað, har áskoðanin hjá Carl Jóhan Jensen á kvinnubókmentir verður gjørd til láturs:

> Kvinnur, tit ið vilja skriva,
> lærið tykkum fyrst at liva,
> finnið dýpið, so sum eg,
> kanska kundi eg víst veg,
> ella onkur annar frægur,
> um tað finst ein slíkur maður.
> („Hóri" 1997).

Dømini vísa á, at kjakið um kvinnubókmentir hevur fylt nógv í tí føroyska almenninum um hesa tíðina.

Í ummæli av skaldsøguni *Táið eg havi málað summarhúsið* (2001) eftir Oddvør Johansen, sum eg komi aftur til seinni, skrivar Turið Sigurðardóttir:

> Tann iterativi hátturin er eyðkendur fyri Oddvørsa penn og hevur samband við, at hon í skriving síni eins og fenomenologarnir leggur dent á á [sic] lýsa tað óansaða men týdningarmikla dagliga virksemi, sum ráðandi diskursur hevur lyndi til at sópa til viks (Sigurðardóttir 2002).

Her nemur Turið Sigurðardóttir við hetta, sum eg havi víst á, at feministisk ástøði leggja áherðslu á, nevniliga, at kvinnur og teirra virksemi er partur av onkrum, sum verður hildið uttan fyri normin. Tann ráðandi diskursurin, sum hevur lyndi til at sópa til viks dagligt virksemi, serliga hjá kvinnum, er væl lýstur í grein eftir Pil Dahlerup frá 1972, her í svenskari týðing, „Omedvetna attityder hos en recensent", sum er vorðin klassisk og varð endurprentað í 2005 (Arping og Nordenstam 2005:8). Í greinini vísir Pil Dahlerup á tvey rámandi dømi um ein og sama ummælara, sum skrivar ummæli av tveimum bókum hjá Cecil Bødker, annað áðrenn hann visti, at Cecil var kvinna, og hitt eftir at hann hevði fingið tað at vita. Bæði ummælini eru at síggja til positiv, men tá Pil Dahlerup kannar orðavalið nærri, so vísir tað seg, at tað er stórur munur á, hvussu ummælini eru skrivað. Í ummælinum, har tilvitið um, at høvundurin er kvinna, er til staðar, verða orðini „lítið" og „smátt" sera nógv nýtt, meðan hetta ikki eru orð, sum verða nýtt í hinum førinum. Dahlerup kannar eisini annað orðaval og vísir á, at orðini, sum verða nýtt, tá ummælarin heldur høvundin vera mann, eru orð sum „gladast", „begejstrad" og „lysande", meðan orðini, sum vera nýtt, tá tilvitið um

ein kvinnuligan høvund er til staðar eru: „*något* utarmade jord“, „*något* sunt och vackert och jordnära“, „ett *visst* sinne för större perspektiv“, „*ingalunda* några profetiska visioner men ändå reflexioner“, alt í einari roynd at bagatellisera góðsku, sigur Dahlerup, sum eisini vísir á, at eingi av hesum modifiserandi orðunum, sum hon leggur áherðslu á, eru at finna í tí fyrra ummælinum. Dahlerup vísir við hesum á, at ótilvitaða málnýtslan í ummælinum ger mun á kvinnum og monnum (Dahlerup 2005:17-24).

Drekkmunsrealisma

Drekkamunsrealisman, hetta hugtakið, sum Carl Jóhan Jensen setti fram í ummælinum av *Burtur* eftir Bergtóru Hanusardóttur (Jensen 2006b), er ikki so lítið skylt við ta lýsing, ið Kim Simonsen setir fram av skrivistílinum hjá Oddvør Johansen í skaldsøguni *Sebastians hús* (2004). Í ummæli sínum av bókini, sum Kim Simonsen sigandi kallar „Diddan og hini á Skálatrød“, sigur hann: „Men Oddvør vantar evni og hegni til at siga frá søgum í modernitetinum, ið ikki enda sum hugnaligt kaffiprát millum havnarkonur yvir av einum føstulávintsbolla frá Frants Restorffs Bakaríi“ (Simonsen 2005b). Útpenslingin av kaffiprátinum, sum sambært ummælaranum ikki er vert at skriva um, minnir ikki sørt um lýsingina hjá Carl Jóhan Jensen av *drekkamunsrealismuni* í ummælinum av *Burtur*[86]. Fyri tað kundi Carl Jóhan Jensen gjarna havt fingið hugskotið frá Kim Simonsen. Men Carl Jóhan Jensen hevði longu drekkamunsprátið á munni, tá hann í 2003 speirekandi – við tilsiping til skaldsøgurød Jens Paula Heinesens *Á ferð inn í eina óendaliga søgu* – nevndi ummæli sítt av ævisøguni *Endurskin av Jákupi doktara* (2001) eftir Marionnu Debes Dahl „Á ferð inn í eitt óendaligt suss“. Soleiðis kolldømir hann stílin og endar við orðunum: „Men kanska fær hann drekkamunn hinumegin“ (Jensen 2003).

Kim Simonsen sigur í ummælinum, at skaldsøgan eftir Oddvør Johansen er ein miðalhampa bók og umboðar vanliga, hampiliga og naiva realismu. Sambært honum roynir Oddvør Johansen at

86 Sí kap. 7 um Carl Jóhan Jensen og ummælið „Um blaðlýs og drekkamunsrealismu“.

líkjast Williami Heinesen, men tað fría, modernistiska og abstrakta hugflogið, sum kanska er í byrjanini av bókini, fellur burtur og ein hvønndagsligur frásøguháttur kemur omanyvir og køvir við banalitetum.

Orðini, sum Kim Simonsen nýtir um ta realismuna, sum Oddvør Johansen stendur fyri, eru orð sum: *vanlig*, *hampulig*, *naiv*, *hvønndagslig*, *banalitetur*, *hampuligheit*, *penheit*, *naivrealisma*, *hugnalig lýsing av smáum anekdotum*, *nostalgi*, *avoldað*, *ómodernað*, *óhjálpið*, *vánaligt*. Kim Simonsen sigur eisini, at Oddvør Johansen *orkar ikki* at halda fast í sjónarhornið (Simonsen 2005b).

Lýsingin av rithøvundinum er tann, at hon er veik, tí hon *orkar ikki*, og skaldskapurin er ov gerandisligur, ov penur og hugnaligur og endar í kaffipráti á bakarínum. Gamaní er *Diddan* ein partur av skaldsøguni hjá Oddvør Johansen, men tað er neyvan ótilvitað, at Kim Simonsen nýtir heitið *Diddan* í sínari yvirskrift, tí hetta, sum hann lýsir, tað veika og óhjálpna, er ikki so lítið *didduligt*.

Í triðja reglubroti av ummælinum við speiska heitinum „Modernaða frambrotið „ultra light““ hjá Kim Simonsen av skaldsøguni *Hvirlan* (2005) eftir Dagny Joensen, sigur hann, at hann fyrr hevur funnist at føroyskum skaldsøgum fyri at gera alt pent, fitt og *biedermeierkent* (Simonsen 2005d). Her vísir Kim Simonsen helst til ummælið hjá sær sjálvum av *Sebastians húsi* hjá Oddvør Johansen.

Hann er speiskur og niðrandi um ta *sokallaðu* realismu, sum Dagny Joensen skrivar, og sigur, at hon liggur onkustaðni millum danska „Ude og hjemme“ og føroysku „Suffíu á Neystalofti (duln.)“[87].

Kim Simonsen setir Dagny Joensen í bókmentaligan samanhang við at bera hana saman við risar frá nýbrotinum sum Ibsen og Strindberg, sum hon ikki livir upp til, men ger hana til umboð fyri tað, ið hann nevnir eina óhepna endurføðing av nýbrotinum í 1970-árunum ella „modernaða frambrotið „ultra light““. Her nýtir hann líknandi orð um Dagny Joensen, sum hann gjørdi um Oddvør Johansen, tí henda útgávan av nýbrotinum er *gerandislig*, *køvislig* og *keðilig* prosa.

87 Suffía á Neystalofti (duln.) er ikki ein føroyskur rithøvundur, men eitt navn, Kim Simonsen hevur funnið uppá.

Hann nýtir síðani orðingar um Dagny Joensen sum, at hon *dugir ikki*, og hon *veit ikki*.

„Drekkmunsrealisman“, sum ikki varð greitt skilmarkað fyrr enn í 2006 í ummælinum hjá Carl Jóhan Jensen av *Burtur*, verður lýst her við tí gerandisliga, og Kim Simonsen sigur: „Frásøgufólkið fer smásnakkandi – um alt og einki – gjøgnum alla bókina, hvørt skáp skal opnast og hvør ein kensla vendast“ (Simonsen 2005d). Tað eru ikki bara drekkamunnarnir í bakarínum, sum fáa toyggið frá Kim Simonsen, men eisini tey gerandisligu tingini í heiminum, sum eru umboðað av *skápinum*. Skápið umboðar nakað kvinnuligt, og tað gera *kenslurnar* eisini, sum fara í sama pott. Kim Simonsen kallar hetta *naivrealismu*, ið hugnaliga prátandi vil lýsa tíðina, tá gentur skuldu út at tæna, fóru í dans og vórðu upp á vegin, sigur hann, og hann sigur, at Dagny Joensen ikki hevur eina sunna frástøðu til henda partin av føroyskari kvinnusøgu. Kim Simonsen vrakar her tað inniliga økið, intimsferuna, og kenslur sum bókmentaligt evni, eitt høvuðsøki hjá óteljandi heimsgitnum rithøvundum sum Jane Austen, Ibsen og Strindberg við fleiri.

Kim Simonsen vísir á klisjéirnar í skaldsøguni og sigur, at tað er bannað at nýta vendingar sum „Guds bestu børnum“ í skaldskapi, tí tað er ein klisjé. Hann sigur um seg sjálvan: „Mín serliga málfatan er, at eg ikki toli ovnýtt innantóm orðafelli ella klisjéir. Ofta halda fólk seg duga væl mál, tí tey brúka deyðar metaforar. Jú eldri, tess fínari er tað fyri hesi“ (Simonsen 2005d). Samstundis sum Kim Simonsen sigur seg hava hesa serligu málfatan, endurnýtir hann ikki bara hugsanir úr ummælinum av *Sebastians húsi* hjá Oddvør Johansen í ummælinum av *Hvirluni* hjá Dagny Joensen, men eisini heilar setningar, ja heil brot og ikki minst klisjéir sum „skaldsøgan vantar pínu“. Hann endurnýtir slíkar orðingar og brot við onkrum smáum broytingum, har hann býtir orðini um, setir punktum fyri komma o.s.fr.:

Ummæli av *Sebastians húsi* eftir Oddvør Johansen í *Dimmalætting* 12. februar 2005	**Ummæli av *Hvirluni* eftir Dagny Joensen í *Dimmalætting* 9. desember 2005**
„Skaldsøgan vantar heilar persónar, pínu og veruligan humor.“	„Skaldsøguni vantar heilar persónar, pínu og humor“
„Persónliga dámar mær væl realistiskar skaldsøgur, ið bæði 19. og 20. øld vóru so ríkar av, ið siga søguna um ættarlið, heimstaðin í broyting, um tey, sum vórðu fødd, doyðu o.s.fr. Men mær dámar ikki stílin hjá Oddvør. Henni vantar eitt grundskeið í modernaðari realismu.“	„Persónliga dámar mær væl realistiskar skaldsøgur, ið okkara tíð aftur er so rík av, ið aftur siga søguna um ættarlið, heimstaðin í broyting, um tey, sum vórðu fødd, doyðu o.s.fr., men mær dámar ikki stílin hjá Dagny, tí her vantar eitt grundskeið at skriva skaldsøgur.“
„Ikki tí, hon fær óivað góða undirtøku frá lesarum. Tað ger Jane Aamund eisini. Men stórar bókmentir er hetta ikki.“	„Eg ivist ikki í, at bókin fær góða undirtøku frá lesarum, tað ger Jane Aamund eisini, men stórar bókmentir eru hetta ikki.“

Umframt hesar endurtøkur, tekur hann uppaftur orðingar sum, at hesar bókmentirnar eru *svartar og hvítar*. Hann siterar eisini við tilvísing brot úr teksti eftir Einar Már Guðmundsson um ta realistisku skaldsøguna eftir 1960, men hevur týtt brotið til føroyskt til tað seinna ummælið, sum er tað av *Hvirluni*. Spurningurin er, um henda endurtøka, ja, endurnýtsla, er partur av niðringini av hesum skrivandi kvinnum; um Kim Simonsen ikki heldur skaldskapin hjá Dagny Joensen vera eitt nýskrivað ummæli verdan. Undir øllum umstøðum er hetta ikki vanligur ummælarasiður. Vísast kann til dømi um, hvussu reaktiónin er, tá okkurt líknandi hendir í Noregi. Norski ummælarin Helge Matland varð 9. november 2021 hongdur út í miðlunum, tí tað varð avdúkað, at hann hevði endurnýtt partar av sínum egna átta ára gamla ummæli, tá hann ummælti framførslu av operuni „La Triviata“ í blaðnum *iTromsø* 25. oktober 2021. Talan var um ummæli av nýggjari framførslu av somu operu í sama blaði. Í greinini verður hetta sett fram sum ein trupulleiki ikki bara hjá ummælaranum, men eisini, kanska serliga, ritstjórnini, tí tað vísir, hvussu lítið verður lagt fyri, tá tað kemur til mentanarjournalistikk. Ritstjórin á blaðnum

umber seg eisini og sigur: „Det er ikke sånn vi ønsker at anmeldelsene i iTromsø skal skrives. Uansett hva bakgrunnen er, så fremstår det som at teksten er kopiert. Det er ugreit både for oss som mediehus, men også for de som har satt opp stykket“. Operasangarin Kristian Krokslett, sum avdúkaði endurnýtsluna, sigur enntá: „Dette er helt bak mål. For dem som sto på scenen i oktober, er anmeldelsen nå ingenting verdt“.[88]

Í hesum báðum ummælum nýtir Kim Simonsen sarkasmu, sum eg havi nevnt er eitt vanligt stíltak í ummælaravirksemi, og sum Carl Jóhan Jensen og Arnbjørn Ó. Dalsgarð eisini nýta. Tey koma undir undirtekstslagið, ið Lars Bukdahl kallar „ónd ummæli“ (Bukdahl 2019).

Við meira og minni ótilvitaðum orðavali sum *vanlig*, *hampulig*, *hvønndagslig*, *hampuligheit*, *penheit* o.s.fr. verður tann standardurin, sum kvinnurnar umboða, lýstur sum minni verdur enn tann hjá monnum, og tað verður eisini orðað beinleiðis, tá hann sigur „mær dámar ikki stílin“. Hyggja vit at teimum strategium, sum sambært Russ verða nýttar til at sleppa av við tað, sum kvinnur skriva, um tað nú, sum hon speiskliga vísir á, er so óheppið, at tær eru komnar yvir um tær fyrstu forðingarnar, sum royna at steðga teimum frá fyrstan tíð, nýtir Kim Simonsen kanska serliga tey bæði amboðini at *undirmeta* tað, sum hesar kvinnur skriva, og at *vísa á, at teirra standardur er lægri enn tann hjá monnum*.

Metakritikkurin er frammarlaga í hesum báðum ummælunum, serliga í ummælinum av *Hvirluni* eftir Dagny Joensen. Kim Simonsen vísir við orðingum sum „Hetta er tíverri mín máti at seta skaldsøguna hjá Dagny inn í ein bókmentasøguligan og listfrøðiligan kontekst“, at hann er tilvitaður um tað, ið hann ger sum ummælari. Og hann fer eitt stig longri í metakritikkinum, tá hann sigur:

> Mangan eru føroysk ummæli ikki ummæli, men ein illsintur málteigur, har ummælarin skal reypa sær, og smoygja egnar nationalistiskar málneurosur yvir høvur høvundans. Er tað nakað, eg hati, so eru tað ummæli, har betrivitandi seta høvund og forlag til undirvísing í at seta komma ella roynir at læra vaksin fólk, at tað ikki eitur t.d. identitetur, men samleiki, neiligt fyri negativt o.s.fr. (Simonsen 2005d).

88 Sí https://www.nrk.no/tromsogfinnmark/kulturanmelder-beskyldt-for-a-kopiere-seg-selv-_-brukte-samme-ord-i-2013-om-_la-traviata_-1.15722822 (13.01.2022).

Hann setir eisini eina metayvirskrift: “ Eingin fragd at lesa (ella at skriva hetta ummæli)“ og sigur: „Tað er mær eingin fragd at skriva ring ummæli. Tvørturímóti. Eg vóni við hesum orðum, at Dagny kann brúka okkurt av hesum, ið eg havi nortið við, so hon kann blíva betri“ (Simonsen 2005d).

Samstundis sum teksturin er ummæli av *Hvirluni*, er hann pallseting av Kim Simonsen sum ummælara. Hann er normativur og setir fram sínar hugsanir um, hvat bókmentir skulu vera, og hvat tær ikki skulu vera. Hann sigur „eg“ um seg sjálvan, og hann nýtir orðini *eg*, *mær*, *mín* 16 ferðir, har orðini vísa beinleiðis til Kim Simonsen sjálvan sum ummælara, hansara hugburð, smakk, skaldskaparfatan o.s.fr. Til samanberingar kann sigast, at hann nevnir Dagny Joensen 12 ferðir í sjálvum tekstinum, 13 ferðir, um upplýsingarnar um bókina undir ummælinum verða taldar við. Ótilvitaða orðavalið er soleiðis ábending um, at ummælaranum liggur fremri í huga at bera fram sína skaldskaparhugsjón enn at lýsa bókina og ta hugsjón, sum liggur aftan fyri ummælta verkið.

Í dupultummæli av bókunum *Hvør var Nimrod?* (2004) eftir Jens Paula Heinesen og *Sebastians húsi* (2004) eftir Oddvør Johansen „Hvat hava „Hvør var Nimrod“ og „Sebastians hús“ til felags“ setir Agnar Jógvansson sína uppliving av at lesa hesar báðar bøkur sama dag saman.

Hetta ummælið er eitt gott dømi um pallseting av egnum *ethos*, tí pallurin, bøkurnar verða settar á, er tann persónliga upplivingin av at hava lisið báðar sama dag. Tað er tilelvingin til at lesa tær saman og samanbera tær. Ummælarans uppliving av lesingini er pallurin.

Ummælið byrjar við orðinum „Eg“, og tað er ein sigandi byrjan, tí orðið „eg“, „meg“ og „mær“ vísandi beinleiðis til ummælaran kemur fyri tretivu ferðir í hesum stutta ummæli. Her er tí eins og í ummælinum hjá Kim Simonsen ótilvitaða málnýtslan ábending

um, at ørindini í ummælinum í størri mun eru at bera fram egna hugsan enn at ummæla verk eftir aðrar rithøvundar. Ummælarin vísir, at hann er tilvitaður um sín leiklut, og sigur: „Eg kundi eisini víst á, at *Sebastians hús* er ein oddvørsk skaldsøga – men eg haldi tað vera synd og óneyðugt at válka sær í slíkum óhepnum útgávum“ (Jógvansson 2005b).

Ummælið endar metatekstliga, tá ummælarin sigur: „Og nú man hesin stubbin vera komin at enda“, og hann leggur aftrat, at Oddvør Johansen átti at givist at skrivað: „Oddvør burdi hildið uppat at skriva, og farið at gjørt okkurt annað – lúkað í havanum ella okkurt sovorðið“ (Jógvansson 2005b). Hann kennir seg soleiðis ikki, sum Russ orðar tað, ov hampiligan at lata seg freista at siga beinleiðis, at ein kvinna ikki átti at skrivað (Russ 1983:39), men orðar beinleiðis tað, sum sambært Russ er fremsta endamálið: at fáa kvinnur at lata vera við at skriva yvirhøvur (Russ 1983:4).

Tað er ikki eitt ókent fyribrigdi, at menn nýta ummæli til at biðja kvinnur gevast at skriva. Carl Jóhan Jensen bað Bergtóru Hanusardóttur gevast, og Dag Solstad bað Bjørg Vik gevast:

> Bjørg Vik er dyktig. I 12 noveller over 208 sider beviser hun det, gang på gang. Den samme opbygning av novellene, de samme virkemidlene, det samme temaet. Og de samme svakhetene: pratsomheten, opregningen av klesplagg, menuer, interiører, den affekterte antydningsteknikken – og damebladfilosofien. Jeg synes ikke hun har krav på opmerksomhet. Det er ikke nok at kunne skrive glatt og elegant. Bjørg Vik tar ikke sitt tema alvorlig nok. Bag glattheten ligger en klisjémessig monden livsopfatning og en ulidelig sentimentalitet. Hun snakker så mye om ærlighet. Hun burde også se at bli det – kunstnerisk ærlig. Gå inn i sitt stoff med andre ord. Inntil så skjer, bør hun spare os for disse damebladnovellene (Solstad 1966).

Agnar Jógvansson tekur áheitanina á kvinnuna eitt fet víðari, tá hann biður hana fara at lúka í urtagarðinum. Urtagarðurin stendur fyri tí kvinnuliga arbeiðinum og er partur av einum øki, sum kvinnan verður hildin at skula halda seg til. Hon skal við øðrum orðum ikki ota seg inn á økið, sum hoyrir monnum til, nevniliga at skriva skaldskap.

Í ummæli av *Vencili* sigur Agnar Jógvansson um teir kvinnuligu høvundarnar:

> Eg havi ongantíð dámt Marjun Kjelnæs, av tí at hon minnir ov nógv um vanligar kvinnu-høvundar, sum skriva um kvinnuproblemir ... Ein fær kensluna av, at boðskapurin er „rím ýlandi úr køkinum, frá manni og børnum, realisera teg sjálva, skríggja, leika í – og far so heimaftur til mann og børn“ Tað eru ov nógvar kvinnur, sum yrkja og skriva við hasum hugburðinum (Jógvansson 2007a).

Innihaldið í skaldskapinum hjá kvinnum verður kritiserað út frá hugburðinum, at skaldskapur skal ikki snúgva seg um kvinnutrupulleikar, og soleiðis liggur í hesum tað, sum Russ sigur vera eina strategi, nevniliga at vísa á, at tann kvinnuligi standardurin hevur lægri virði enn tann mannligi.

Um yrkingarnar hjá Katrini Reinert sigur Agnar Jógvansson: „Eg eri troyttur av at lesa didduyrkingar um, hvussu tað kennist hjá smágentum at blíva vaksnar, ella hvussu nógv tær gráta, fyrstu ferð sjeikurin ger tað liðugt. Hon átti at yrkt um okkurt annað – tí hon dugir“ (Jógvansson 2007a). Um tað var ivi um, hvønn týdning Kim Simonsen legði í heitið á ummælinum av skaldsøguni hjá Oddvør Johansen *Sebastians hús*, „Diddan og hini á Skálatrød“, so er tað hjá Agnari ikki nakar ivi um, at orðið *didduyrkingar* verður nýtt niðrandi um kvinnubókmentir.

Um Vónbjørt Linjonsdóttir (nú Vang) sigur hann, at hon er í øllum førum einki didduskald, men hon er ikki so egin, og Agnar Jógvansson rør framundir, at Vónbjørt hermir eftir Kim Simonsen. Her verður róð fram undir tað, sum sambært Russ er ein strategi, at ein kvinna møguliga ikki hevur skrivað tað sjálv, ella um hon hevur skrivað tað, hevur hon hermt eftir einum manni. Tað er sama strategi, sum Kim Simonsen nýtir, tá hann sigur, at Oddvør Johansen roynir at líkjast Williami Heinesen (Simonsen 2005b).

Agnar Jógvansson sigur, at Maluna Poulsen dámar honum ikki, tí hennara yrkingar eru endaleysar. Annars rósar hann Heðini Klein, Alexanduri Kristiansen og Hanusi Kamban og endar við at nevna seg sjálvan og vóna, at onkur fer at ummæla seg (Jógvansson 2007a).

Um ivi skuldi verið um, hvat hald er í tí, at kvinnur verða ummæltar øðrvísi enn menn, um tær skriva um evni, sum tann ráðandi diskursurin roynir at sópa av vegnum, so standa hesi ummælini hjá Agnari sum eitt konsentrat av einum almennum tendensi til at ikki vilja góðtaka kvinnur og kvinnulig evni sum verd at skriva um.

At tað er ein almennur tendensur, at menn møta kvinnuligum verkum við illvilja, sæst í tí, sum Erik Skyum-Nielsen sigur um danska ummælaran Torben Brostrøm, tá hann ummælti danska rithøvundin Inge Eriksen:

> Da han i 1976 har kæmpet sig igennem Inge Eriksens mammutmurstensroman Victoria og verdensrevolutionen, og læseren af Information nok venter sig en typisk mandlig kritikers vrangvillige modtagelse af en kvindes pioner-arbejde...fortæller Brostrøm stille og roligt om sin oplevelse af bogen (Skyum-Nielsen 2002:378).

Her setir Erik-Skyum Nielsen óbeinleiðis orð á eina siðvenju, sum er vanlig í donskum ummælaravirksemi, nevniliga at kvinnur verða møttar við illvilja og ummæltar eftir øðrum fortreytum enn menn – ofta við fordómum.

Norski ummælarin Dag Solstad bað rithøvundin Bjørg Vik spara lesaran fyri sínar damublaðsstuttsøgur (Solstad 1966), og Agnar Jógvansson og Carl Jóhan Jensen hava beinleiðis biðið kvinnur gevast at skriva. Sum eg havi víst á, kann tað undra, at feministiska rákið ikki hevur fingið betri fótafesti enn tað sama um aldarskiftið, ávikavist í 2005 og 2006. Carl Jóhan Jensen sipar til tað í grein, tá hann tosar um teir áðurnevndu „høgligu“ vindarnar, sum halda kvinnuligum rithøvundum uppi (Jensen, Carl Jóhan 1997), og tað vísir mótstøðuna móti hesum ráki og spenningarnar millum tveir pólar í tíðarskeiðinum 1997-2007: feministiska rákið øðrumegin og eitt anti-feministiskt mótrák hinumegin.

Tað er, sum víst er á, ikki altíð so tilvitað, at tað dominerandi mansveldið trínur fram í ummælunum í hesum tíðarskeiði. Nevnt er, at Oddfríður M. Rasmussen í sínari lýsing av málinum hjá Alexanduri Kristiansen sum „mjúkari kvinnuhond á mannaholdi“ umboðar siðbundna fatan av kynsleiklutum, har menn tosa við menn um bókmentir, meðan kvinnan og hennara hold í hesari samrøðuni er myndamál fyri málsligt listaverk. Hann sigur tó í sama setningi, „um eg kann loyva mær at siga so býtt“, og við hesum vísir hann, at hann er tilvitaður um, at útsøgnin kanska er eitt sindur við síðuna av og umboðar avoldaðar hugsanir um kyn. Eitt annað dømi er, at Martin Næs í ummæli av bókini *Suðar dýpið reyða* (1999) eftir Bergtóru Hanusardóttur skrivar, at hann veit ikki, um hann er førur fyri at ummæla bókina sum maður (Næs 2000). Útsøgnin vísir á eitt tilvit um kynsleiklutir og er dømi um, at kyn spælir ein leiklut í bókmentum og ummælum.

Tá Hanus Kamban í nevndu røðuni „Mentan og kyn í mótburði“ vísir til áðurnevndu Simone de Beauvoir, eina av fremstu feministisku granskarunum í heiminum (Kamban 2016), er tað ein áminning um, at lívfrøðiligt kyn tó ikki nýtist at vera samanfallandi við mentanarligt kyn, tí Hanus Kamban umboðar feministiska rákið her.

Ávirkan av kynsmismuni í ummælum á tilnevningar til virðisløn

Í innganginum varð nevnt, at svenski ummælarin og bókmentaprofessarin Tomas Forser sigur, at eingin miðil hevur so stórt vald á mentanarøkinum sum ummælini, tí tey eru við til at stýra ikki bara, hvat verður mett sum góðska, men eisini, hvør til dømis fær mentanarstuðul (Forser 2005). Eisini havi eg í brotinum um ummælið sum leikara á tí bókmentaliga økinum víst á, at tað eru valdstrukturar í samfelagnum, sum eru við til at avgera, at sumt, sum verður skrivað, fær virði, meðan annað ikki verður góðtikið sum nakað, ið er vert at skriva um. Eg havi víst á, at í summum førum verður mótstøða móti kvinnuligum rithøvundum og tí, sum verður fatað sum kvinnulig evni í bókmentum, orðað eksplisitt, í øðrum førum endurspeglast mótstøðan í málinum, har virði og metingar kunnu avdúkast í ótilvitaðum orðavali. Við tað at ummælið er valdmikið tekstslag, fær henda mótstøða ávirkan í allari teirri bókmentaligu ringrásini á, hvat verður keypt og lisið, hvat verður kanoniserað, tilnevnt til virðisløn og heiðrað við mentanarstuðli.

Tað er ikki partur av arbeiðssetninginum í hesari ritgerð at kanna sambandið millum ummæli av útgivnum verkum og teirra møguleika fyri at verða tilnevnd til virðisløn, hóast tað kundi verið áhugavert kanningarevni. Listin av tilnevndum rithøvundum til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins talar tó sítt greiða mál, við tað at bert fýra ferðir tey góðu 30 árini, føroyingar hava tilnevnt verk, er ein kvinna tilnevnd. Tað er áhugavert, at Oddvør Johansen, sum fekk ráð frá ummælaranum í 2005 um at velja urtagarðin fram um skrivingina, varð tilnevnd í 2001 sum tann fyrsta føroyska kvinnan, men eftir tað skuldu tað ganga 14 ár, áðrenn ein kvinna aftur varð tilnevnd, og tað var Sólrún Michelsen (f. 1948) í 2015. Tað er ikki óhugsandi, at hvassi kritikkurin av kvinnunum fyrst í hesari øldini hevur havt sína ávirkan á, at kvinnubókmentir ikki júst vóru tær, føroyingar fóru út í heimin við.

Eg havi undrast á, at kritikkurin framvegis var so harður móti skrivandi kvinnum í 2006, hóast feminisman fyri langari tíð síðani tóktist hava fingið fótin fyri seg í Føroyum, men skrúva vit tíðina fram til nútíðina, hevur *MeToo*-rákið, sum av álvara kyknaði í oktober 2017, víst, at stríðið um javnrættindi ikki er komið á mál. *MeToo*-rákið hevur havt víðfevndar samfelagsligar fylgjur og hevur eisini ávirkað bókmentaheimin í Norðurlondum. Í Svenska Akademinum fekk tað avleiðingar og skeiklaði álitið á Nobel-virðislønina, ið av somu orsøk ikki varð latin í 2018, og bæði Horace Engdahl og Marianne Stidsen, sum hava ein leiklut í hesari ritgerð, hava verið í andgletti í hesum máli. Tá landsstýrið í 2022 bara varð mannað við monnum, birti tað av nýggjum upp undir javnstøðukjakið í Føroyum, og tað er ein staðfesting av, at kjakið gongur í bylgjum, og at komið verður ikki á mál við javnrættindum í einum.

Í 2019 valdi tann føroyska tilnevningarnevndin at lata vera við at tilnevna nakra bók til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins. Hetta fall ikki í góða jørð hjá forkvinnuni í Demokratia, ritstjóranum Marnu Jacobsen (f. 1954), ið sá hetta sum vanvirðing av kvinnuligum rithøvundum. Hon svaraði hesum millum annað aftur á bókmentatiltakinum „Orð um kyn“ í barrini/kaféini Sirkus 7. mars 2019 við at lesa brot upp úr teimum bókum eftir kvinnur, sum hon metti kundu verið tilnevndar hetta árið, nevniliga Katrina Ottarsdóttur, Sólrún Michelsen, Marjuna Syderbø Kjelnæs, Vónbjørt Vang, Sissal Kampmann og Rannvá Holm Mortensen.

Kjakið um kvinnubókmentir er sostatt framvegis – ella kanska aftur – livandi í tí føroyska almenninum í dag, eins og tað er í grannalondum okkara. Danski rithøvundurin Henriette Rostrup (f. 1970) gjørdi í 2016-2017 eina kanning av kvinnuumboðan í ummælum í teimum stóru donsku bløðunum *Politiken*, *Berlingske*, *Jyllands-Posten*, *Weekendavisen* og *Kristeligt Dagblad*. Tað vísti seg, at tríggjar ferðir so nógvir mannligir sum kvinnuligir rithøvundar vórðu ummæltir av tríggjar ferðir so nógvum mannligum ummælarum sum kvinnuligum, hóast tað komu umleið líka nógv verk út eftir kvinnur sum eftir menn. Harfturat vísir hon til kanning frá 2016, sum avdúkar, at kvinnur lesa meira av fagurbókmentum enn menn. Tí er myndin fullkomiliga skeiklað í ummælaraheiminum, sigur Rostrup, og hon metir tað vera ein fólkaræðisligan trupulleika, at kvinnur eru so ósjónligar og undirumboðaðar í bókmentaheiminum, tí henda skeiklaða myndin skapar ta fatan, at tann mannliga lívsroyndin er týdningarmeiri enn tann kvinnuliga (Rostrup 2017).

Hetta er í samsvari við tað, sum slóðbrótandi íslendski feministurin, bókmentafrøðingurin Helga Kress (f. 1939) segði í greinini „At leita eftir sær sjálvari“, sum varð prentað í 1982. Hon sigur, at kvinnan má leita eftir sær sjálvari í mentanarlívi okkara, tí tær kvinnuligu lívsroyndirnar eru fyri tað mesta fjaldar undir yvirflatuni. Ikki meira enn ein tíggjundapartur av teimum er sjónligur í teirri ráðandi bókmentatraditiónini (Kress 1982:22). Turið Sigurðardóttir, sum verður viðgjørd sum ummælari seinni, týddi greinina, ið var skrivað til *Brá*, til føroyskt, og týðingin kann síggjast sum partur av teirri dagsskrá, hon sum bókmentagranskari, týðari og ummælari hevur virkað útfrá. Greinin varð prentað í fyrstu útgávu av tíðarritinum *Brá*, har fleiri kvinnur ummæltu, millum aðrar Turið Sigurðardóttir, Malan Marnersdóttir, Malan Johannesen og Vár í Ólavsstovu, sum allar framvegis meira og minni vóru virknar sum ummælarar árini 1997-2007.

Tann harði kritikkurin av kvinnum, sum varð orðaður um aldar-

skiftið, livir framvegis í tilvitinum á skrivandi kvinnum. Tað vitna orðini eftir áðurnevndu Lív Mariu Róadóttur Jæger í savninum *Eg skrivi á vátt pappír* um:

og tú
hevur hug at steðga henni og hennara sjógvi
tá bygjurnar stoyta inn

men um tú skrivar í eitt sms til hana
gevst at skriva tú skrivandi
sms'ar hon bara aftur
TÚ KANST IKKI STEÐGA MÆR

tí hon hevur ikki ótta fyri tær
ella degnum

tann skrivandi
katastrofuklár
longu í móðurlívi
(Jæger 2020:95).

Yrkingasavnið varð tilnevnt til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins í 2021 sum tað fjórða føroyska verkið eftir eina kvinnu í góð 30 ár.

Tríggir kvinnuligir ummælaraprofilar

Í 1932 segði Chr. Matras í áður siteraða ummælinum av *Yvir teigar og tún* (1936) eftir Hans Andrias Djurhuus, at tá tíggju ár eru farin, „fara menn at síggja", at Hans Andrias Djurhuus var eitt rætt skald, men Chr. Matras eftirlýsti eina ritstjórn, sum kundi sálda berini frá „frasinum" (Matras 1936:252). Kjakið um, hvørt orðið *maður* merkir maður ella menniskja kemur javnan upp í Føroyum, men tá Matras í 1936 sigur, at „menn" fara at síggja, at Hans Andrias Djurhuus er rætt skald, vísir orðið til menn og ikki menniskju, um hugsað verður um, hvørji tey vóru, sum ummæltu í Føroyum um hetta mundið, tí tað vóru menn.

Eg havi vísst á, at flestu føroysku ummælararnir vóru menn[89]. Men kvinnur eru so við og við vorðnar partur av hesum virksemi og hava fingið ein týðandi leiklut í professionaliseringini av føroyskum ummælaravirksemi. Helga Kress vísti á, at bert ein tíggjundapartur av kvinnuni var sjónligur í teirri ráðandi bókmentatraditiónini, og Henriette Rostrup vísti í 2017 á, at kvinnan bert fyllir ein triðing í donskum ummælaravirksemi. Hetta er kanska dømi um, at okkurt er hent á økinum; at kvinnur hava fingið virknari lut í ráðandi bókmentatraditiónini, hóast komið ikki er á mál, og Rostrup framvegis sær tað sum ein fólkaræðisligan trupulleika (Rostrup 2017).

Tá Carl Jóhan Jensen sigur, at høgligir vindar halda kvinnum uppi, og at tær verða ummæltar og fáa rós (Jensen, Carl Jóhan 1997), so liggur eisini ein ábending í tí um, at kvinnur fara øðrvísi við kvinnum, enn menn gera. Tí er hugsandi, ella í øllum førum vert at kanna, um tað, at kvinnur eru vorðnar partur av ummælaraskaranum, hevur havt ávirkan á, hvussu tær verða ummæltar.

Turið Sigurðardóttir vísir í greinini „Nýggjar tíðir – nýggjur sangur" á, at bókmentasøga altíð er tulking, og at í seinni tíðum hava kvinnur eisini skrivað um bókmentir frá einum sjónarhorni, sum hevur gjørt, at ávísir tættir, eyðkenni og brigdi í bókmentunum hava verið drigin fram og tulkað sum týdningarmikil, sum fyrr hava verið ósjónlig ella mett sum týdningarleys (Sigurðardóttir 2004a:124). Her sæst hetta rákið endurspeglað, sum hon sjálv er partur av, at tað, at kvinnur taka lut í skriftmentanini og ummæla, broytir mentanina og ger, at onnur virði verða tikin fram og hildin hava týdning.

Í innsavnaða tilfarinum frá tíðarskeiðinum 1997-2007 eru 142 ummæli eftir 19 kvinnur og 40 menn.[90] Umleið helvtin er sostatt kvinnur. Til samanberingar eru tveir triðingar av ummælarunum í kanning, sum John Chr. Jørgensen gjørdi av ummælum í Danmark í 1999, menn (Jørgensen 1999:13).

89 Sí kap. 2 um ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi.

90 Tá havi eg ikki talt son Lydiu Didriksen, Rógva Nolsøe (Didriksen og Nolsøe 1997), við, sum hevur skrivað ummælið saman við mammu síni, og Ivan Niclasen og Hugin Eide telja sum tveir persónar, tí í teirra felags ummælum hava teir báðir beinleiðis orðið.

Tær 19 kvinnurnar hava skrivað um 43 útgávur, av teimum 12 útgávur eftir kvinnur, t.e. ein triðingur. Teir 40 menninir hava skrivað 99 ummæli, av teimum eru 26 um útgávur eftir kvinnur, t.e. umleið ein fjórðingur. Hetta merkir, at kvinnurnar í størri mun enn menninir hava ummælt kvinnur.

Í hesum broti verða tríggir kvinnuligir ummælaraprofilar lýstir. Tær tríggjar Anna V. Ellingsgaard, Turið Sigurðardóttir og Kinna Poulsen, sum eru tær kvinnur, ið hava skrivað flest ummæli hetta tíðarskeiðið, hava sett síni spor sum ummælarar, og tær hava sín sermerkta og sera ymiska stíl, hóast tær allar hava tað í felag, at tær umboða akademikaran sum ummælaratypu. Allar hava akademiska bókmentaliga bakgrund, sum á ólíkan hátt endurspeglast í teirra ummælum.

Anna V. Ellingsgaard arbeiddi á tíðindablaðnum *Sosialinum* og skrivaði síni ummæli í tí miðlinum. Hennara persónliga *ethos* er tí nær knýtt at einum stovns-*ethos* og teirri dagsskrá, sum er sett í miðlinum, har krøv eru til form og innihald við tað, at krøvini um tíðarevstamarkið og avmarkaða plássið eru galdandi. Ummælarin má tí hava ans fyri formi og tíðindavirði og hava evni at miðla, skriva stutt og við fynd (Jørgensen 1994b:310-311). Tá er ikki sagt, at hon ikki hevur ávirkan á, hvussu hetta stovns-*ethos* verður skapað, tí hon hevur møguleika at mynda tað arbeiði, sum hon ger. Turið Sigurðardóttir var í starvi sum bókmentafrøðingur á Fróðskaparsetri Føroya, og hennara persónliga *ethos* er nær knýtt at einum stovns-*ethos* sum undirvísari og vegleiðari, og hetta virksemi er nær knýtt at einum akademiskum ideali um objektivitet. Turið Sigurðardóttir er ikki á sama hátt bundin at teim formligu krøvunum sum Anna V. Ellingsgaard, men hevur ábyrgd av at umboða eitt ávíst akademiskt støði. Kinna Poulsen, hinvegin, er ikki á sama hátt í hesum tíðarskeiði knýtt at einum ávísum stovns-*ethos*. Tað ger, at hennara persónliga *ethos* er ikki so heft at einum ávísum stovns-*ethos*. Hennara *persona* fær møguleika at trína fram í tekstinum, tí hennara persónliga *ethos* ikki er stillað av einum stovns-*ethos*.

Hesir tríggir ummælaraprofilarnir hava sostatt ein ávísan myndugleika í kraft av sínari útbúgving innan bókmentir, men tær skapa sær myndugleika í tekstinum á sera ymiskan hátt.

Anna V. Ellingsgaard

Anna V. Ellingsgaard skrivaði í hesum tíðarskeiðinum ummæli av Sólrún Michelsen, Jóanesi Nielsen, Kim Simonsen, Jógvani Isaksen, Jens Paula Heinesen, Carl Jóhan Jensen, Alexanduri Kristiansen og Oddvør Johansen. Hon skrivaði sostatt um eitt breitt úrval av høvundum, bæði kvinnum og monnum, sum skriva ymisk tekstsløg.

Eitt, sum sermerkir ummælini hjá Onnu V. Ellingsgaard, er, at hon í stóran mun hevur samrøðu við høvundin sum part av ummælinum, soleiðis at høvundurin sjálvur sleppur beinleiðis til orða. Summi ummæli havi eg tí, sum nevnt í kapitlinum um háttalag, sáldað frá, tí samrøðan í ov stóran mun setir dagsskrá. Í summum tekstum er einstakt brot úr samrøðu sett inn í tekstin, uttan at hetta tó tekur nakað frá ummælinum, so tað kann sigast at vera eitt ummæli fyrst og fremst og ikki ein rithøvundarsamrøða. Anna V. Ellingsgaard arbeiðir breitt við mentanarjournalistikki, og hon er ikki læst føst í eina tekstslagssiðvenju, men arbeiðir á markinum millum ummæli og samrøðu. At tað mest eru ummæli hennara av viðurkendum rithøvundum, sum eg viðgeri, er tilvildarligt, tí Anna V. Ellingsgaard hevur ummælt alt slag av skaldskapi, bæði viðurkendar rithøvundar og debutantar.

Ummælini hjá Onnu V. Ellingsgaard í hesum tíðarskeiðinum fevna um árini 2004-2006, tá Anna var í starvi sum journalistur. Hon tók í 2008 diplomútbúgving í journalistikki, og journalistiskur arbeiðsháttur sæst aftur í ummælum hennara. Krøvini til tíðarbæri, til tíðarevstamarkið og avmarkaða plássið skapa karmar um ummælini, har ummælarin orðar seg stutt og leggur seg eftir at geva lesaranum greiðar niðurstøður um virðið í tí ummælta verkinum longu í yvirskriftini ella í undiryvirskriftini.

Hon er tilvitað um journalisk stíltøk og byrjar við fangandi samanumtøku av ummælinum, og høvuðsniðurstøðurnar eru at finna í byrjanini av tekstinum. Tað ger tekstin lættan at lesa, og lesarin fær beinanvegin tað, sum flestir lesarar fyrst og fremst vilja vita, tá teir lesa eitt ummæli: virðisdómin. Ummælini eru skrivað á løttum máli og við framdrátti í tekstinum, eitt kriterium, sum Anna er tilvitað um, tí hon sóknast sjálv eftir hesum sum lesari og ummælari.

Byrjanin av ummælinum hjá Onnu V. Ellingsgaard av *Krossmessu* (2005) eftir Jógvan Isaksen er dømi um hennara stíl:

> Má viðganga, at eg eisini í løtum kendi tað svalandi at koma inn í einføldu mannfólkaverðina í Krossmessu, har „frumkenslan hjá veiðimanninum“ kemur upp í sjálvt ein asfaltføroying sum Hannis Martinsson, tá hann fer í grind. Hinvegin, sjálvrættvísi smæðist nú ikki burtur í bókini. Heldur verður tað í løtum ein so ráðandi drívmegi, at tú fert at ivast í, um bókin er eitt propagandarit fyri rættinum hjá føroyingum at drepa grind ella ein krimisøga (Ellingsgaard 2006a).

Anna V. Ellingsgaard hevur her lættan penn, og málið er spælandi við einum veti av sarkasmu í, tá hon tvinnar virðisdómin inn uttan at vera óhøvisk. Í hesum stutta brotinum kemur hon inn á tekstslagið (krimi), lesaraupplivingina, sum í hesum føri eisini er kropslig (kendi tað svalandi), og virðisdómin, sum fýlist á ov sterkan boðskap (ivast í, um bókin er eitt propagandarit), og hetta eru dømi um, at teksturin er tættur og mettaður við upplýsingum hóast lætta skrivistílin. Lættleikin verður skaptur við løttum orðavali og setningsbygnaði við spenningi millum tað positiva, sum verður sett fram, og tað minni positiva, og hetta skapar framdrátt í tekstinum. Við at tvinna ta góðu lesaraupplivingina inn í tann heldur hvassa virðisdómin, fær hon kritiserað, uttan at tykjast sum ein so harður dómari.

Annað dømi um lætta pennin hjá Onnu V. Ellingsgaard er, tá hon við myndamáli kritiserar, at Jens Pauli Heinesen í skaldsøguni *Hvør var Nimrod?* (2004) hevur lyndi til at endurnýta somu gomlu motiv um listamannin: „Og Siv, sum kundi fingið gamla vínið at brúsa eitt sindur aftur, hvørvur líka brádliga, sum hon kom“ (Ellingsgaard 2005a). Hetta er samstundis kritikkur av byggingini í søguni, tí Siv bæði kemur og fer ov brádliga í søgugongdini.

Anna hevur oftast tann almenna lesaran í huga og brúkar sína egnu lesiuppliving sum eitt dømi um eina almenna lesiuppliving. Viðhvørt er hon tó til staðar sjálv sum lesari og lýsir lesiupplivingina, t.d. sum omanfyri, at tað „kendist svalandi“. Aðrastaðni sigur hon: „Sum lesari fært tú“ og „sum lesari troyttast tú“ (Ellingsgaard 2005a). Her er eitt *tú*, sum vísir til hennara egna persón sum upplivandi lesara, men sum tó er sett fram sum umboð fyri ein almennan lesara.

Anna V. Ellingsgaard skapar sær myndugleika í tekstinum við at vísa nærlagni í lesingini skilt á tann hátt, at hon gevur ítøkiligar grundgevingar fyri, hvat tað er, sum riggar í tekstinum, og hvat ikki riggar. Hon peikar t.d. í ummælinum av *Krossmessu* (2005) eftir Jógvan Isaksen á, at realistisku brotini hava brá av dokumentarismu og darva søguna. Hon vísir á, at høvundurin spælir sær við krimitekstslagið, so at lesarin kennir ymiskt aftur frá tekstslagnum. Anna V. Ellingsgaard vísir á, at tað er her, søgan eydnast best, í spælinum við tekstslagið, og ikki tá ein føroyskur veruleiki verður blandaður inní. Hon leggur at enda upp til, at føroyskir filmsleikstjórar kanna bókina fyri hennara framúr góðu visuellu effektir[91]. Málið í ummælinum er sum sagt lætt og spælandi, hon nýtir setningar sum „sum ein annar føroyskur Philip Marlowe“ og „klassiskar cliffhangers“ og tosar um „slíkt sum fær lesaran at smílast afturkennandi at klisjeunum, sum verða nýttar og fáa hug at blaða enn eina síðu“.

Anna V. Ellingsgaard skapar sær soleiðis ikki myndugleika við at vísa til rák, ritverk og tekstsløg, men tað er ein natúrligur partur fyri hana at hava tey í mentu, tá hon ummælir. Tað sæst, tá hon í ummælinum av *Hvør var Nimrod?* tosar um ritverkið hjá Jens Paula Heinesen sum ein natúrligan part av lesing síni:

> So vítt sum eg minnist hava kvalirnar hjá unga listamanninum verið eitt afturvendandi tema í ritverkinum hjá Jens Paula Heinesen, síðan *Frænir eitur ormurin* kom út í 1973. Tí má tað undra, at tað ikki eydnast betri [sic] at geva hesum figurinum meir dýpd og skaldsligt trúvirði (Ellingsgaard 2005a).

Tað sæst, at Anna V. Ellingsgaard kennir ritverkið hjá Jens Paula Heinesen, og at hon nýtir tað sum grundgeving fyri kritikki av, at Jens Pauli Heinesen, sum hevur drúgvar royndir, ikki megnar at skapa dýpd og skaldsligt trúvirði í sínari lýsing av persónunum. Lykilorðini, tá tað kemur til kriterii, eru orðini *dýpd*, sum Anna krevur av persónslýsingini, og *trúvirði*. Persónarnir skulu vera trúligir, og teir skulu hava dýpd.

91 Hetta mugu føroyskir filmsleikstjórar sigast at hava gjørt síðan tað, tí REinvent Studio við Torfinni Jákupsson arbeiðir í løtuni við verkætlanini Trom, sum byggir á krimibøkurnar hjá Jógvani Isaksen.

Í ummælinum av *Sebastians húsi* eftir Oddvør Johansen sigur Anna V. Ellingsgaard soleiðis um frásøgn og persónslýsingar: „Í Sebastians Hús verður úrslitið av hesum frásøguháttinum, at flestu persónarnir verða verandi litleysar pappírsdukkur, har lesarin hvørki minnist, hvussu teir komu inn í myndina, ella hví teir hvurvu aftur“ (Ellingsgaard 2004). Her sæst, hvussu tað er ein samanhangur millum frásøguháttin og møguleikan hjá høvundinum at skapa persónar við trúvirði. Anna V. Ellingsgaard nýtir mynd av pappírsdukkum fyri at lýsa, hvussu persónarnir verða settir fram, ein mynd, sum Carl Jóhan Jensen eisini nýtir í sínum ummælum. Um persónarnar í stuttsøgusavninum *Ein farri av kolvetni* (2004) eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs sigur hann: „Persónarnir eru allir í útskinninum, sum pappírsdukkur“ (Jensen 2004), og persónarnir í leikritinum *Heystveingir* (2000) eftir Hanus Kamban eru tunnir: „Tað hjálpir heldur ikki, at persónslýsingarnar eru so tunnligar, at vórðu tær flettar av gomlum ljósmyndum við har til gjørdum amboðum, blivu tær ikki tynri“ (Jensen 2000c). Hjørdis er eitt pappírsklipp, sigur hann: „evnar teksturin ongantíð at gera hana annað enn eitt pappírsklipp“ (Jensen 2000c), og „Janus Djurhuus fær í leikinum sama dám av pappírsklippi sum dóttirin“ (Jensen 2000c).

Hesin retorikkur gongur aftur í føroyskum ummælum og kann hava røtur í tí, sum Chr. Matras segði, tá hann fanst at Heðini Brú fyri persónslýsingar, ið ikki vóru meira enn ein skuggi: „Væl hevur hann lýst summar av monnunum ... Aðrir eru nóg so kámir, Torkil t.d. er ikki annað enn ein skuggi“ (Matras 1935:248).

Anna V. Ellingsgaard skapar sær sum nevnt myndugleika við at vísa í verki, at hon nýtir tey amboð, ið hon hevur fingið gjøgnum bókmentaliga skúling heldur enn at gera nógv av at greiða frá rákum, tekstsløgum, frásøgusnildum o.s.fr. Tá hon í ummæli av *Krossmessu* eftir Jógvan Isaksen sigur, at tað er týðiligt, at høvundurin kennir sínar krimiklisjéir, letur hon tekstslagsfatanina liggja sum eitt natúrligt grundarlag undir sínari lesing av bókini. Anna V. Elllingsgaard er ikki lærandi og frásigandi, men staðfestandi. Hon brúkar fakheiti, men tey eru ikki fremsti háttur hennara at skapa sær mentanarligan myndugleika. Heldur liggja tey sum styrkimarkørar, ið prógva, at metingar hennara eru grundaðar. Við sínum lætta penni skapar hon sær myndugleika í tekstinum, sum roynir at raka breitt heldur enn smalt. Hennara málbólkur er tann vanligi lesarin, sum situr við avísini. Tað akademiska sæst aftur í lesiførleika og metingarførleika heldur enn í orðavali og í perspektiverandi tilvísingum.

Tá tað er sagt, so eru hesir styrkimarkørar kortini sjónliga til staðar í ummælunum, tá hon perspektiverandi sigur, at Oddvør Johansen bæði nýtir læntar og sjálvgjørdar myndir í skaldsøguni *Sebastians húsi*, og myndirnar, sigur hon, hevur Oddvør lænt frá Williami Heinesen, Isabel Allende og Jóanesi Nielsen (Ellingsgaard 2004).

Her sæst eitt av teimum listfrøðiligu krøvunum, sum Anna V. Ellingsgaard setir til bókmentir. Myndamál kann vera bygt á annað myndamál, men krevur eisini *originalitet*, og kravið um originalitet sæst eisini aftur í orðingini í sama ummæli, tá sagt verður atfinnandi um *Sebastians hús*, at hon flytur eingi listfrøðilig mørk (Ellingsgaard 2004).

Onnur kriterii fyri skaldsøgur, sum Anna nýtir í sínum ummælum, eru, at tað skal vera framdráttur í søgugongdini, umframt at persónarnir skulu hava ein leiklut, sum byggir upp undir samanhang í søgugongdini: „Tí uttan fyri tríkantsdramaið, sum er veruliga framdriftin í bókini, er leikluturin hjá Antinis mest sum útspældur og undarliga ósamanhangandi“ (2005a). Hetta sama kriteriið sæst eisini aftur í eftirlýsingini av, at persónarnir hava eina funktión í skaldsøguheildini í áðurnevnda dømi, tá sagt verður um persónarnar í *Sebastians húsi*, at teir trína inn á pallin í søgugongdini og hvørva aftur, uttan at lesarin leggur tað til merkis. Teir hava í ov lítlan mun eina funktión í tekstinum.

Lesaraupplivingin er eisini frammarlaga í teimum krøvum, sum Anna V. Ellingsgaard setir til skaldsøguna, og hóast lesaraupplivingin er lýst sum ein almenn uppliving við støði í ummælarans uppliving, skilt á tann hátt, at Anna leggur seg ikki eftir at siga frá egnari persónaligari uppliving, so fær upplivingin eisini eina kropsliga funktión, tá hon sigur, at tað *kennist svalandi at* lesa *Krossmessu* og serliga, tá hon lýsir kensluna av at lesa *Hvør var Nimrod?* (2004) eftir Jens Paula Heinesen, og ein impressionistiskur dámur kemur inn í ummælið: „Sum lesari fær tú eina kitlandi forbodna kenslu, sum heldur tú við einum drápsmanni ella eygleiðir ein perversan leik gjøgnum eitt lyklarhol“ (Ellinsgaard 2005a).

Tað seinasta kriteriið, sum eg fari at nevna, er, at Anna V. Ellingsgaard setir tað krav til bókmentir, at tær ikki skulu vera moraliserandi. Hetta sæst í ummælinum av *Sebastians húsi*, tá hon kritiserar eitt brot í bókini, har eitt moraliserandi alvitandi frásøgufólk blandar seg upp í frásøgnina fyri at fáa ein boðskap fram. Tað hóskar ikki í einum modernaðum teksti, uttan so at endamálið er á provokerandi ella sjálvironiskan hátt at sáa iva um sítt egna trúvirði, nakað sum ikki er endamálið í bókini, sigur Anna (Ellingsgaard 2004).

Anna V. Ellingsgaard endar hetta sama ummælið av *Sebastians húsi* við einari lítlari vón, sum tó má lesast sum ein kritikkur: „Kanska verður tað har, høvundurin fer at taka tráðin upp næstu ferð. Og kanska verður tað tá, vit veruliga koma at kenna tey, sum húsaðust í Sebastians Húsi“ (Ellingsgaard 2004). Hetta er á ein hátt ein vón og ein vilji til at síggja, at høvundurin fer at gera tað betur næstu ferð, men hetta er eisini dómur um eina frásøgn, sum ikki megnar at skapa livandi persónar. Her tosar Anna V. Ellingsgaard við dupultari tungu, sum gevur henni møguleika at kritisera strangt og myndugt, men kortini við eggjandi tóna.

Anna V. Ellingsgaard hevur lesaran í huga í sínum ummælum. Hon ger tekstin lættan at lesa og gevur lesaranum fyri tað mesta ein greiðan virðisdóm. Men hon vendir sær eisini óbeinleiðis til høvundin, tá hon sigur: „Kanska verður tað har høvundurin fer at taka tráðin upp næstu ferð“ (Ellingsgaard 2004), tí í hesum liggur bæði ein virðisdómur og ein undirskilt leiðbeining. Her er Anna V. Ellingsgaard ummælarin, sum byggir brýr og kann samanberast við janusfigurin, ið Engdahl lýsir ummælaran sum[92]. Hon samskiftir við tveimum andlitum, við lesaran og rithøvundin samstundis.

Anna V. Ellingsgaard er trúgv móti sínum egna máli og stíli og ikki litað málsliga og stíli viðvíkjandi av verkinum, hon ummælir, sum eg havi víst á, at aðrir ummælarar eru, t.d. Andrias Justesen, sum leggur seg eftir speiska stílinum hjá Ólavi í Beiti, tá hann ummælir hansara skaldskap. Hetta samsvarar við tað, sum John Chr. Jørgensen sigur um ávísar journalistar, sum ummæla: „Andre forbliver trofaste over for deres egen sproglige udrustning og insisterer på at der skal skrives journalistisk prosa i et nyhedsmedium“ (John Chr Jørgensen 1999:16).

92 Sí kap. 4 um ummælið sum relatiónir millum menniskju.

Førleikarnir hjá Onnu V. Ellingsgaard at meta um dygdina í einari søgu, tá tað kemur til bygging, persónlýsingar, trúvirði, frásøgurødd, intrigur o.s.fr., gerast serliga sjónligir í samanberingini við hennara vantandi virðismeting, tá hon ummælir yrkingasøvn. Her leggur hon seg eftir heilt øðrum metingarkriterium og metir sum heild lítið um. Hetta er kanska dømi um, at Anna V. Ellingsgaard er sterkast sum skaldsøguummælari, men at hon eisini heldur seg til at skriva um annað, hóast hon mest ummælir skaldsøgur. Í ummælinum, sum hon kallar „Gud og erotikkur“, av *Báðumegin blátt* (2005) eftir Alexandur Kristiansen (Ellingsgaard 2005) orðar hon seg varisligari, enn hon ger í ummælunum av skaldsøgum. Í hesum ummæli er hon meira yvirskipað og orðar seg stutt. Hon er positiv og frágreiðandi um útgávuna. Ummælið stendur undir heitinum „Nýtt yrkingasavn“, og fokus í hesum ummælinum er eins nógv tíðindavirðið í, at talan er um eitt nýtt savn, sum tað er ein roynd at seta seg kritiskt inn í eitt verk. Smaksdómurin kemur heldur ongantíð, og tí kann kanska diskuterast, í hvønn mun hetta kundi verið bólkað sum tíðindastubbi heldur enn ummæli. Kortini verður savnið viðgjørt, men mest innihaldsliga. Kanska ummælarin kennir seg ikki nóg trygga at fara í holt við at ummæla yrkingarnar bygnaðarliga, tí hon leggur stóran dent á bygging, tá hon ummælir skaldsøgur. Hetta sama ger seg galdandi í áðurnevnda ummæli hennara av yrkingasavninum *Náðisólin* (2006) eftir Kim Simonsen, har eingin veruligur virðisdómur kemur (Ellingsgaard 2006d).

Tað er ikki óvanligt, at ummælarar velja sær eitt tekstslag at ummæla, sum teir kenna seg tryggar í, ella at teir kanska útiloka eitt tekstslag, sum teir ikki kenna, at teir grynna í. Anna V. Ellingsgaard ummælir ikki nógv yrkingasøvn, og tað ger ein royndur ummælari sum Hanus Kamban heldur ikki, meðan Kinna Poulsen leggur seg mest eftir at ummæla yrkingar. Í Føroyum ber tó illa til at spesialisera seg sum ummælari í einum tekstslag. Aðrastaðni er vanligt, at ummælarar dyrka eitt tekstslag og ummæla bara tað.

Samanumtikið er Anna V. Ellingsgaard ein fjøltáttaður ummælari, sum, hóast hon arbeiðir sum mentanarjournalistur, eisini

kann flokkast sum akademiskur ummælari. Hon kennir bókmentafrøðilig tekstsløg og rák, hóast hon ikki leggur seg eftir at skapa sær myndugleika við at vísa so nógv til tey. Tað, at hon ummælir øll tekstsløg og ólíkar høvundar, hóast hon eyðsýniliga er sterkast sum skaldsøguummælari, er helst millum annað orsakað av, at hon er í starvi sum mentanarjournalistur og ikki á sama hátt sum aðrir ummælarar kann velja, hvat hon ummælir.

Anna V. Ellingsgaard er partur av einum bólki av kvinnum, sum hava verið við til at skapa fjølbroytni í tí føroyska ummælaraskaranum, samstundis sum hon er liður í teirri professionaliseringartilgongd, sum kvinnur so við og við eru vorðnar ein natúrligur partur av. Hennara kyn er tó í lítlan mun partur av hennara *ethos* sum ummælari. Eins og aðrir ummælarar, ið ummæla nógv, ummælir hon ólíkar rithøvundar og ymisk tekstsløg og tykist ikki favorisera tekstir eftir kvinnuligar rithøvundar fram um mannligar. Hon ber fram líknandi kritikk av Oddvør Johansen, sum aðrir ummælarar hava gjørt, t.d. tá hon sigur, at Oddvør lænir myndir frá rithøvundum sum Williami Heinesen, Isabel Allende og Jóanesi Nielsen. Hon sigur tó ikki sum Kim Simonsen, at Oddvør *roynir at líkjast* Williami Heinesen (Simonsen 2005b), ið ljóðar meira sum óhjálpin stremban eftir standardinum hjá manninum. Heldur ikki biður hon sum Agnar Jógvansson Oddvør gevast at skriva og fara í urtagarðin, bara tí hon ikki til fulnar røkkur málinum sum rithøvundur, men eggjar rithøvundinum til at fara øðrvísi til verka næstu ferð (Ellingsgaard 2004).

Turið Sigurðardóttir

Sum ummælari stendur Turið Sigurðardóttir (f. 1946) á mangan hátt í andsøgn við tey krøv, sum verða sett til tekstslagið í miðlunum. Havandi journalistiska stílin hjá Onnu V. Ellingsgaard í huga, sum setir niðurstøðurnar fremst og borðreiðir ein smaksdóm fyri lesaranum alt fyri eitt, ger Turið Sigurðardóttir tað mótsetta. Hon arbeiðir seg gjøgnum tekstirnar, sum hon viðger, og smaksdómurin er sjáldan beinleiðis orðaður, men liggur millum reglurnar í teirri nærløgdu greiningini. Turið Sigurðardóttir er akademikari, hon er professari í bókmentum á Fróðskaparsetri Føroya, og hennara akademiska tilgongd sæst aftur í hennara ummælarastíli.

Turið Sigurðardóttir hevur í tíðarskeiðinum 1997-2007 skrivað fleiri bókmentagreinir o.a. í bløð og tíðarrit. Út frá teimum kriterium, sum eg havi sett í mínari innsavning, hevur hon skrivað fýra ummæli hetta tíðarskeiðið av fýra ymiskum høvundum, tveimum kvinnum og tveimum monnum. Her sæst hennara tilvit um at ummæla bæði kvinnur og menn aftur í valinum av tí, hon ummælir.

Turið Sigurðardóttir hevur myndugleika sum professari í bókmentum á Fróðskaparsetri Føroya. Ummælarivirksemi hennara kann síggjast sum ein partur av hennara yrki at arbeiða við og skriva um bókmentir. Í sínum ummælum tykist hon trygg í sínum leikluti sum ummælari, við tað at hon ikki ger burturúr at verja sín rætt at ummæla ella við metaviðmerkingum at kasta ljós á sín leiklut, og ummælið av bókini *Tá eg havi málað summarhúsið* (2001) eftir Oddvør Johansen er dømi um, at hon ikki neyðturviliga hevur tørv á at skapa sær myndugleika í tekstinum við at vísa til bókmentarák og perspektivera á annan hátt. Í hesum ummælinum nærlesur hon tekstin við myndugleika og leiðir lesaran gjøgnum hann. Ummælið varð prentað í tá nýútkomna tíðindablaðið *Fregnir*. Turið Sigurðardóttir greinar bókina og vísir á, at hon sær tveir yvirskipaðar tættir í henni, nevniliga rúsevnistrupulleikan og samfelagsatfinningina. Hon rósar dirvinum at lýsa rúsevnistrupulleikan á fyrsta sinni í Føroyum, og hon kritiserar, at samfelagsrevsingin er skrivað út frá 1. persónfrásøgufólkinum Pidda, sum er ov ungur og óbúgvin til at eiga ta speisku atfinningarsomu røddina. Her kemur Turið Sigurðardóttir við ráðum og sigur, at røddin skuldi kanska heldur verið røddin á einum alvitandi 3. persónsfrásøgufólki.

Hetta er gott dømi um, at Turið Sigurðardóttir ger nógv burtur úr greiningini av tekstinum, og tá hon rósar ella kritiserar, so er tað ítøkilig viðurskifti í bókini, hon rósar ella kritiserar, og kemur sjáldan við yvirskipaðum virðisdómum sum til dømis: „bókin er góð“ ella líknandi.

Turið Sigurðardóttir skapar sær myndugleika í tekstinum við at vísa, at hon er góður lesari, at hon skilir handverkið, sum hon viðger, í ein slíkan mun, at hon kann koma við ráðum um, hvussu tað kundi verið gjørt betur. Í greiningini av *Tá eg havi málað summarhúsið* fer Turið Sigurðardóttir niður í smálutir, tá hon lýsir skriviháttin hjá

Oddvør Johansen, og her vísir hon eisini, at hon hevur ikki bara lisið skaldskapin hjá Oddvør Johansen, hon hevur sett seg væl inn í, hvussu hon skrivar. Hon vísir á, hvussu Oddvør Johansen nýtir nútíðina í tekstinum, og hvussu hetta fær fortíðina at kennast næra. Hon vísir á, hvussu tann *iterativi* hátturin er vanligur í skrivingini hjá Oddvør Johansen, og at hon eins og fenomenologarnir leggur dent á at lýsa tað óansaða, men týdningarmikla dagliga virksemið, sum ráðandi diskursur hevur lyndi til at sópa til viks. Her tosar Turið Sigurðardóttir á høgum akademiskum stigi, og ikki øll skilja, hvat hon tosar um, tá hon tosar um *diskurs* og *fenomeologi*, men hon greiðir frá og undirvísir lesaranum í, hvat iterativur háttur er og vísir, hvussu hetta skapar merking í tekstinum. Turið Sigurðardóttir nýtir her sína akademisku bakgrund til at vísa á, júst hvat tað er í tekstinum, sum skapar tann virknað, sum teksturin hevur, og hon tykist síggja tað sum sína uppgávu at greiða lesaranum frá hesum og at undirvísa honum samstundis. Her líkist hon sostatt ummælaratypuni, sum John Chr. Jørgensen nevnir tann *námsfrøðiliga* ummælaran[93]. Tá hon í einum „eykasetningi" sigur, at Oddvør leggur dent á at lýsa tað óansaða, men týdningarmikla dagliga virksemið, sum ráðandi diskursur hevur lyndi til at sópa til viks, leggur hon ein hugburð um kvinnubókmentir, sum ikki hava fingið rúm í tí ráðandi mansdominerða diskursinum, inn í ummælið. Hóast hon kritiserar Oddvør Johansen, so vísir hon á virðið í teksti hennara, sum hon setir høgt, hóast tann ráðandi bókmentatraditiónin ikki ger tað.

Virðisdómurin verður í ummælum hjá Turið Sigurðardóttur ofta ikki úttalaður beinleiðis, men liggur millum reglurnar og í teirri gjølligu greiningini, sum hon ger av tekstinum. Hon sigur soleiðis um bókina hjá Oddvør Johansen:

> Tann tátturin av bókini, sum snýr seg um undirheimarnar í Havn, er eitt lítið landnám í bókmentum okkara ... Vit hava hópin av stereotýpum lýsingum av rúsi og uttangarðslívi. Í hesari skaldsøguni er lýsingin hvørki idealiserandi ella moraliserandi, men heldur ein lýsing innanífrá (Sigurðardóttir 2002).

93 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

Uttan at koma við beinleiðis virðisløddum orðum rósar Turið Sigurðardóttir bókini fyri at koma við nøkrum nýggjum inn í okkara bókmentir, og fyri at gera tað á ein hátt, sum ikki er sæddur fyrr, nevniliga uttan at vera idealiserandi ella moraliserandi.

Turið Sigurðardóttir sær tað nýggja í bókini, og tað, sum hon leggur serligan dent á, er, at bókin lýsir eitt evni í bókmentum á nýggjan hátt. Og hetta er kanska eitt tað sermerktasta eyðkennið við Turið Sigurðardóttur sum ummælara: hon gjøgnumskoðar nær eitt skald sigur okkurt á ein hátt, sum eingin hevur sagt tað fyrr. Vit síggja júst hetta bókmentaliga kriterii, sum fyllir nógv í ummælinum hjá Turið Sigurðardóttur av bókini hjá Oddvør Johansen, aftur í yvirskriftini av ummælinum av yrkingasavninum eftir Carl Jóhan Jensen *Tímar og rek* „..Okkurt ið eingin enn hevur sagt" (Sigurðardóttir 1998) og eisini í yvirskriftini av greinini um skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen: „Tann sum ikki sigur sum fyrr kann siga tað nógv betur" (Sigurðardóttir 2000). Júst yvirskriftin til greinina um skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen lýsir høvuðskriteriið, sum Turið Sigurardóttir setir til bókmentir, og í hesi yvirskriftini liggur eisini ein virðisdómur um, at list, sum endurnýggjar seg málsliga og ikki sigur sum sagt er fyrr, er dygdargóð list. Hesin hugburður endurspeglast eisini í tí, sum Turið Sigurðardóttir hevur valt at ummæla millum ár og dag, tí hóast hon ummælir breitt, bæði kvinnur og menn, viðurkendar høvundar og debutantar, so hevur hon gjørt nógv við at ummæla Tórodd Poulsen, sum sambært henni er ein, sum „ikki sigur sum fyrr". Hon hevur, sum eg havi víst á, eisini fingið hetta skotið í skógvin í ummæli, sum Kim Simonsen skrivaði av yrkingasavninum eftir Tórodd Poulsen *Eygnamørk*, har hann ilskast inn á málið hjá Tóroddi Poulsen, sum hann kallar *krutl*, men sum tey, ið skriva so positivt um Tórodd Poulsen altíð nevna sum standardargument. Tá Kim Simonsen sigur, at Tóroddur Poulsen imponerar „onkran bókmentafrøðing", so er hesin bókmentafrøðingur helst Turið Sigurðardóttir, sum í sínum ummælum av skaldskapinum hjá Tóroddi Poulsen hevur víst á hansara málsligu nýskapan. Kim Simonsen sigur: „Málslig tilvitan er neyðug, men ikki eitt nøktandi prógv fyri nøkrum øðrum enn, at Tóroddur hevur málfilosofiskar – og kanska málnationalistiskar – vinir á teim røttu støðunum" (Simonsen 2005a). Atfinningarnar

hjá Kim Simonsen eru tekin um, at ummælaravirksemið hjá Turið Sigurðardóttur hevur ávirkan og er við til at seta dagsskrá, og tað er tekin um, at júst hetta kriteriið, sum Turið Sigurðardóttir leggur dent á í sínum ummælaravirksemi, hevur vakt ans millum í øllum førum summar ummælarar.

Hvess míni eygu og mína tungu

Í ummælinum av yrkingasavninum *Rot* (2007) eftir Tórodd Poulsen, „Hvess míni eygu og mína tungu", liggur eisini tilsipingin til, at Tóroddur Poulsen er málsliga skarpur, og tað byrjar við at samanbera hendingina, tá Tóroddur Poulsen gevur eitt yrkingasavn út í Føroyum, við, tá ein nýggjur stórfilmur kemur út. Hendingin, tá ein persónur ognar sær bókina, lesur hana allastaðni, sum til ber og spyr seg sjálvan: „hvat hevur virtuosurin hesa ferð lokkað fram úr tilfeinginum, uml 65.600 føroyskum orðum, og hvussu nógv lagt aftrat teimum?" (Sigurðardóttir 2007). Her er frá byrjan dentur lagdur á málsligu nýskapan Tórods. Turið Sigurðardóttir leggur ikki bara í metingini dent á málið í skaldaverkinum, men skrivar sjálv í høgum málsligum stíli, har hon bæði nýtir orð og setningar úr ummælta verkinum, til dømis í yvirskriftini „Sí guðs laggadropa", har hon tekur orð úr tekstinum og pallsetir tey í ummælinum fyri at peika á málsliga stílin. Hon ger aðrar fyndugar orðasamansetingar í yvirskriftunum, sum seta orð á tema og skrivistíl í yrkingasavninum: „Millum svøvns og vøku", „Veður á vegnum", „Tolandi og gerandi" og „Brekka av gloymsku". Her er talan um høgan málsligan stíl, hon nýtir hvørsfallið (Millum svøvns og vøku), sum annars mest verður nýtt í formaliseraðum máli í føroyskum, hon nýtir orðaspælið hjá Tóroddi Poulsen (Veður á vegnum) og myndamálið (Brekka av gloymsku). Hetta høvuðskriteriið, sum Turið Sigurðardóttir setir til bókmentir, er soleiðis førleikar, sum hon sjálv hevur, og hugsa vit nú aftur um sitatið hjá Bloom, sum Furuseth setti fram um, at stórleiki kennir stórleika (Furuseth 2015:40), so kann hetta fatast sum ein háttur at skapa sær myndugleika og ein háttur í verki at vísa, at hon hevur myndugleika at siga, hvat gott mál er, tí hon dugir sjálv at nýta málið, at spæla við tað og gera nýggjar orðasamansetingar.

Í hesum ummælinum leiðir Turið Sigurðardóttir eisini lesaran gjøgnum tekstin. Tær báðar fyrstu yvirskriftirnar „Millum svøvns og vøku" og „Veður á vegnum" setir hon fram fyri at lýsa tað rúmið, sum skapar rammuna um yrkingarnar í savninum, og við hesum nýtir hon síni egnu orð til at siga, hvat savnið snýr seg um. Í hvørjum broti eru tó eisini tilvísingar til tekstin, og sitat verða sett fram sum skjalprógv og sum grundgevingar. Tað er, sum John Chr. Jørgensen vísir á í *Sprogblomster i spinatbedet (*1999), vanligt at nýta sitat í ummælum av yrkingasøvnum til ymisk endamál, millum annað hetta, sum Turið Sigurðardóttir ger, sum skjalprógv og sum grundgeving. Tað er eisini vanligt at nýta sitat til at vísa á, hvat er gott, og hvat er vánaligt í einum savni, men sæð í ljósinum av, at Turið Sigurðardóttir ikki ger nógv burtur úr beinleiðis virðismeting, er hetta heldur ikki tað, hon nýtir sitatini til. Hon nýtir sitatini saman við sínum egnu orðum til at opinbera fyri lesaranum, hvørji evni eru í savninum, hvørjum tað er gjørt av. Hon tekur á seg leiklutin, sum Northrop Frye orðar, at orða tað, sum yrkingin ikki kann orða sjálv, tí hon er skaldskapur (Frye 1957/2000:4). Ein leiklutur, sum serliga gerst neyðugur í ummælum av yrkingum, ið kunnu vera torskiltar.

Í ummælinum vísir Turið Sigurðardóttir á, at Tóroddur Poulsen viðger klassisk evni í høgum og lágum bókmentum sum einsemi og fremmandakenslu á óhevdbundnan hátt og vísir til dømi í tekstinum. Við hesum vísir hon, at hon hevur vitan um bókmentir, bæði høgar og lágar, og at hon kann seta Tórodd Poulsen inn í ein klassiskan samanhang, hóast hann skrivar óhevdbundið.

Í brotinum undir yvirskriftini „Tolandi og gerandi" vísir hon á, at Tóroddur er maður paradoksins og vísir á fleiri dømi um, hvussu gerandi og tolandi skifta um leiklut í skrivingini hjá honum, tá slipsið misnýtir hálsin. Eisini her vísir Turið Sigurðardóttir sjálv málsligt tilvit um gerðsøgn og tolsøgn, í tí hon sigur, at Tóroddur Poulsen er tilvitaður um málið.

Á mangan hátt ber til at siga, at Turið Sigurðardóttir í sínum ummælaravirksemi nýtir ein vísandi (*showing*) hátt heldur enn ein frásigandi (*telling*) hátt. Heldur enn at siga, at hon kennir klassiskar bókmentir og at reksa tær upp, vísir hon, at hon kann seta Tórodd Poulsen inn í ein klassiskan samanhang. Heldur enn at siga, at hon hevur lisið eitt savn fleiri ferðir, sum ein ummælari sum Kim

Simonsen ger (Simonsen 2004c), so vísir hon í verki, at hon hevur sett seg væl inn í yrkingaheimin, sum hon setir fram fyri lesaranum, t.d. tá hon vísir á, hvussu longsti og seinasti teksturin í bókini hevur sama ákallandi stílin sum yrkingin „góði vegur“, men henda seinasta er um veðrið og sigur „góða veður“. Hetta vísir á ein lesara, sum hevur lisið fleiri ferðir, hugt aftur og fram, kannað, hvat er longsti setningur í savninum, hevur greinað, tulkað og sett saman av nýggjum, og lesarin kann siga sær sjálvum, at slíkt krevur fleiri gjøgnumlesingar. Heldur enn at siga, hvat er gott ella minni gott í skaldskapi, so vísir hon, hvat eyðkennir verkið millum aðrar bókmentir, og eftir er hjá lesaranum sjálvur at seta lýsingarorðið á, um ein bók t.d. er góð ella fantastisk, vánalig ella illa úr hondum greidd, eitt orðaval, sum næstan ikki sæst í ummælunum hjá Turið Sigurðardóttur.

Turið Sigurðardóttir vísir á, at bókin hongur saman sum ein prosess, tí lesarin fær fylgt við yrkingartilgongdini, sum er lívsformur skaldsins. Skaldið umrøðir fyrireikingar til komandi bøkur og gamlar yrkingar sjá sær. Turið Sigurðardóttir sigur, at hetta samband millum yrkingarnar verður víst við, at hann ikki hevur yvirskriftir og teknseting – tí hongur alt ritverkið saman. Hetta ber boð um ein lesara, sum lesur innihald og form sum eina heild og sum lesur meira inn í ein modernistiskan stíl enn bara at staðfesta, at ein yrking er modernað, tí hon ikki nýtir teknseting og stórar bókstavir.

Tá Turið Sigurðardóttir tekur samanum ummælið av yrkingasavninum *Rot*, rósar hon savninum uttan veruliga at siga nakað positivt um bókina. Hon *vísir*, at bókin er samanhangandi, og at hon er verd at lesa, men har er eingi beinleiðis áheitan til lesaran, eingin veruligur smaksdómur, men tó ber til at siga, at alt ummæli er ein smaksdómur, tí Turið Sigurðardóttir hevur tugt og tanlað hetta savnið og borðreitt tað fyri lesaranum, so hann kann smakka og siga tað, sum hann hevur hug til. Soleiðis setir Turið Sigurðardóttir seg sjálva á pall sum ummælara uttan at tosa um seg sjálva yvirhøvur. Hon nýtir ongantíð orðið „eg“ um seg sjálva, tó at hon nýtir orðið „vit“ eina ferð, tá hon tosar um, at savnið er komið í handlarnar, og *føroysklesandi yrkingafjepparar* fara í bókhandlarnar, men hon er nærverandi í tekstinum við høgum málsligum stíli, bókmentaligari tyngd, og uttan at nevna nakra ismu, uttan at vísa til nakað annað skald, uttan nakra navnasletting, er hon ein lærandi og mennandi vegvísari. Í so máta er hetta ummælið eitt gott dømi um eitt nýkritiskt ummæli, har ummælarin nýtir neyvlestur sum amboð og skilir partarnar í savninum út frá heildini í savninum og skilir heildina í savninum út frá pørtunum uttan at vísa til ein ytri bókmentaligan karm. Her sæst hennara leiklutur sum bókmentafrøðingur og undirvísari á Føroyamálsdeildini í ummælinum.

Tá alt hetta er sagt, er Turið Sigurðardóttir júst í hesum ummælinum meira til staðar enn í mongum øðrum ummælum, og tað kann lesast sum ein smaksdómur eisini, tá hon til dømis í byrjanini vísir á, hvussu tað er, tá eitt nýtt savn hjá Tóroddi kemur út. Tú mást lesa tað allastaðni, eisini á vesinum. Hóast Turið Sigurðardóttir ikki nevnir seg sjálva her, so er hetta helst ein (yvirdrivin) lýsing av, hvussu hon hevur tað, og hvat hon ger ella kann finna upp á at gera, tá eitt savn hjá Tóroddi Poulsen er komið út. Hetta er kanska so impressionistiskt, eitt ummæli gerst hjá Turið Sigurðardóttur, sum hevur ein høgan akademiskan stíl og leggur seg eftir objektiviteti í lýsingini av bókmentum.

Okkurt ið eingin enn hevur sagt

Í ummælinum av yrkingasavninum eftir Carl Jóhan Jensen *Tímar og rek* „Okkurt ið eingin enn hevur sagt“ (Sigurðardóttir 1998) er Turið Sigurðardóttir eisini undirvísari. Hon byrjar við at seta savnið í bókmentaligan samanhang, fyrst við at sitera Karsten Hoydal og síðani við at perspektivera við at vísa á, at savnið er eitt møti millum hevd og modernismu, og hetta endurspeglast í forminum, tí onnur hvør yrking er frí í forminum, og onnur hvør er sonetta. Turið Sigurðardóttir greiðir frá sonettuni formliga og søguliga og fer niður í smálutir um, hvussu sonettan er skipað, hvørji ymisk sløg eru, og hvat slag sonetturnar í savninum eru. Hon vísir eisini á, at hetta hevdbundna yrkingasnið er næstan ókent í føroyskum bókmentum. Stílurin er akademiskur, hon tosar um kvenn- og kallrím og vísir á, hvussu Carl Jóhan við at nýta kallrím útihýsir fleiri orðamøguleikum í føroyskum og vísir á, hvussu tað at útihýsa teimum vanligastu bendu formunum av navnorðum og sagnorðum afturfyri gevur høvi at royna aðrar møguleikar til lítar. Aftur her er fokus á tað málsliga – heilt

niður í minstu smálutir, og við at peika á hesi viðurskifti vísir Turið Sigurðardóttir, at hon er innarlaga í málskipanini og setir seg inn í yrkingalist og teir møguleikar, skald hava at troyta málið.

Heldur ikki her síggjast nøkur metandi orð, men Turið Sigurðardóttir vísir, hvussu torføra Carl Jóhan Jensen hevur gjørt sær uppgávuna at yrkja á henda hátt, og tað er við til at skapa eina fatan í lesaranum av einum skaldi, sum arbeiðir við málinum, og sum setir krøv til sín sjálvs. Turið Sigurðardóttir letur lesaran hava seinasta orðið sjálvur at koma til niðurstøðuna, um talan er um gott listaligt handverk. Hetta er ein snild, sum er eyðkend fyri ummælarastílin hjá Turið Sigurðardóttur og hóskar væl inn í hennara akademiska stíl. Hon velur ein objektivan stíl í orðavalinum, har hon tó vísir á góðskuna í verkinum uttan at koma við lýsingarorðunum.

Í hesum ummælinum ger hon tó meira burtur úr perspektiveringini enn í ummælinum av savninum hjá Tóroddi Poulsen, bæði við, sum eg havi nevnt, at vísa til, at savnið er møti millum modernismu og hevd, við í endanum at perspektivera til Vøluspá, og við at seta í samband við dekonstruktión av tí konventionella, ella at avbyggja tað vanabundna, sum hon málber seg. Turið Sigurðardóttir nýtir tó eisini fremmandu akademisku heitini og letur soleiðis ikki iva vera um, at hon knýtir Carl Jóhan Jensen at dekonstruktiónini sum háttalagi, eisini við at vísa á, tá hon greiðir frá bygging og innihaldi, at ein ramma er um verkið, sum minnir um impressionistiska málningalist, har sama motiv verður málað á morgni, kvøldi, degi og nátt. Her perspektiverar hon til impressionismuna og grundgevur við dømum úr tekstinum, har hon peikar á hesi fýra brigdi. Hon er nágreinilig og hon greinar niður í smálutir. Fyri at koma aftur til lýsingina av tekstslagnum og kravið um at skriva stutt og fyndugt fyri at røkka lesaranum, so ger Turið móti øllum journalistiskum reglum um, hvussu eitt ummæli skal skrivast, tí her kunnu ikki øll vera við; onkur lesari missir mótið, meðan ein annar lesur við størsta áhuga. Móttakarin hjá Turið er ikki tann almenni dagblaðslesarin, hóast ummælið stendur í dagblaðnum *Sosialinum*. Móttakarin er ein áhugaður og góður bókmentalesari, sum tó hevur tørv á uppaling í, hvat modernisma er, hvat sonettuformurin er, og hvussu impressionistisk list háttar sær.

Ta einastu ferðina, Turið Sigurðardóttir beinleiðis metir um savnið

í ummælinum, er, tá hon sigur, at tað er ein styrki í savninum, at Carl Jóhan Jensen hevur veruleikasamband, tá hann ger nýggj orð, men samstundis nýtir áður gjørd orð innan teldufrøði, sum hann so setir í samband við til dømis náttúruna og ger nýggjar samansetingar. Einasti veruliga virðisdómur snýr seg um at vera málsliga nýskapandi, og hetta byggir upp undir tað, sum eg havi sagt um, at fremsta góðskukriterium í ummælaravirkseminum hjá Turið Sigurðardóttur er málslig nýskapan.

Sjálv nýtir Turið Sigurðardóttir høgan málsligan stíl, og hon leggur eisini egin føroysk orð aftur at sínum akademiska orðfeingi við orðum sum *margáherðsla* fyri *polysemi*. Aftur her vísir ummælarin, at hann hevur myndugleika at úttala seg um málsliga nýskapan, orðatilfar og orðasamanseting. Tað er eisini málið, Turið Sigurðardóttir sær sum høvuðstema í savninum hjá Carl Jóhan Jensen, bæði tí at hann nýtir málið, sum hann ger, og tí at hann skrivar um málið.

Í hesum ummæli skapar Turið Sigurðardóttir sær myndugleika við at vísa, at hon hevur góðar førleikar at nærlesa og við at greina akademiskt. Hon nýtir fakheiti og vísir, at hon er sera innarlaga í evninum. Hon nýtir ikki orðið „eg“ um seg sjálva og er ikki til staðar í tekstinum sum egin persónur. Hon er objektivur akademiskur lesari, og hon leggur seg ikki fyrst og fremst eftir at røkka lesaranum, men tann lesarin, sum hevur áhuga fyri hesum evni, fær nógv at vita.

Sjeresada um aldamótið 2000

Ummælið av savninum *Søgur úr Port Janua* (1996) eftir Rakel Helmsdal hjá Turið Sigurðardóttur gevur høvi at bera saman ummælarastílin hjá Turið Sigurðardóttur við ummælarastílin hjá øðrum ummælarum, sum hava ummælt somu bók í tí viðgjørda tíðarskeiðinum[94]. Oddfríður M. Rasmussen, Malan Poulsen og William Heinesen (yngri) hava eisini ummælt hetta søgusavnið. William Heinesen skrivar eitt ummæli, har hann nýtir eina útsøgn hjá Jan Erik Vold um at vága at skriva um tey stóru evnini í bókmentum sum lív og deyða, kærleika og list, sum rammu. Ummælið er stutt og lætt, og ummælarin leggur

94 Onnur ummæli av somu bók, sum eru komin út áðrenn 1997, eru ikki tikin við her.

sína meting í yvirskriftina, tá hann kallar tað „Ójavnar søgur úr Port Janua“ (Heinesen 1997). Malan Poulsen skrivaði sítt ummæli av bókini í útisetablaðið *Føringin*, og Oddfríður M. Rasmussen sítt í *Oyggjaskeggja*. Malan Poulsen hevur ein akademiskan stíl, og hon fylgir vanligum reglum fyri, hvussu ummæli verða sett upp. Hon byrjar við inngangi, síðani ger hon samandráttir av søgunum, viðger tær og endar við meting. Hon nýtir ikki metaviðmerkingar og tosar ikki um seg sjálva sum persón. Hon lýsir ikki egna lesiupplivning. Hon kritiserar rættlestur og heldur, at aðrir ummælarar hava misskilt okkurt, tá teir hava kritiserað, at Rakel Helmsdal nýtir fremmand fólkanøvn og orð (Poulsen 1997). Her sipar hon helst til ummælið hjá Ólavi í Beiti av *Leiðarljósi* eftir Sonju Schneider, har hann nýtir høvið til at bera Rakel Helmsdal saman við Sonju Schneider og siga, at tær umboða eitt rák, sum nýtir fremmand nøvn í provokatión móti nýggju navnalóggávuni (Beiti 1997a). Ummælið hjá Oddfríði M. Rasmussen ger burturúr at kritisera málið, sum er illa rættlisið, og hann nýtir høvið at geva Føroya Lærarafelag „eina prædiku“, sum hann sigur. Hann tekur dømi um villur og kritiserar, at Rakel Helmsdal nýtir ov nógv orð – hon skrivar í ov stóran mun fyri at skriva, sigur hann. Hann endar ummælið við einari vón um, at tað verður betri næstu ferð, tí hann sigur, at Rakel Helmsdal hevur lyndi til at vika seg frá tí vanliga skaldsøguheiminum, og tað er gott. Oddfríður M. Rasmussen leitar eftir originaliteti her; onkrum sum brýtur frá. Hann ger ikki burturúr at pallseta seg sjálvan í ummælinum og ger ikki nógv við at perspektivera (Rasmussen 1997).

Hesi trý ummælini leggja dent á ymisk viðurskifti, William Heinesen (y) leggur mestan dent á innihald, Malan Poulsen mestan dent á tematiska viðgerð og Oddfríður M. Rasmussen leitar eftir originaliteti, men ummælið hjá honum druknar í kritikki av stavivillum og einari prædiku til forlagið. Ummælini hava tað til felags, at tey eru stutt, tey gera ikki so nógv burtur úr greiningini, og tey meta um bókina. Malan Marnersdóttir ummælti eisini savnið í *Skúlablaðnum* í 1996, men tað ummælið er ikki tikið við í tí innsavnaða tilfarinum, sum upprunaliga er grundarlag undir viðgerðini í hesari ritgerð. Við samanberingini í huga hevur tað kortini smoygt sær inn.

Ummælið hjá Turið Sigurðardóttur skilir seg frá hinum ummælunum fyrst og fremst, tí tað er nógv longri. Tað fyllir eina heila opnu í *Viðskeranum* í *Dimmalætting*. Harafturat skilir tað seg frá hinum ummælunum við sínum akademiska stíli, tí hóast ummælið hjá Maluni Poulsen er akademiskt, so er tað nógv meira lagað til treytirnar hjá miðlunum um at vera stutt og skrivað á løttum máli. Sæð úr miðlasjónarhorni er ummælið hjá Turið Sigurðardóttur ein long og ástøðiliga tung viðgerð av *Søgum úr Port Janua*.

Ummælið byrjar við sitati eftir John Donne (1572-1631), og síðani kemur perspektiverandi hugleiðing um modernistisk og postmodernistisk eyðkenni mótvegis eyðkennum hjá realismuni. Turið Sigurðardóttir vísir til *Fiskimenn* eftir Martin Joensen, og hon perspektiverar við at vísa til aðrar realistiskar bókmentir eisini, Jens Paula Heinesen og William Heinesen, sum eins og Rakel Helmsdal lata ein bý vera rammu um sína frásøgn[95]. Síðani vísir hon, hvussu Rakel Helmsdal er øðrvísi enn teir. Turið Sigurðardóttir perspektiverar til Herman Bang, Heðin Brú og Edgar Lee Masters í ummælinum.

Turið Sigurðardóttir greiðir frá frásagnarhátti, og akademiski stílurin sæst aftur í, at grundgivið verður fyri øllum við tilvísing til síðutøl. Hon greiðir frá ymisku søgunum í bókini og metir tær í mun til tekstslag; kemur til dømis fram til, at ein søga er ein dømisøga (líknilsi).

Turið Sigurðardóttir hevur eitt ríkt mál, og hon nýtir í hesum ummælinum eisini myndamál. Hon greiðir frá orðatilfarinum við at nýta myndina, at „orðatilfarið, sum er stórt í bókini, er úr ymisligastu goymslum úr málsins húsi“. Stílstigið hjá Turið Sigurðardóttur er høgt, hon nýtir setningar sum: „Sum ein Simbad heimafturkomin av frásagna-úthavi stoytir høvundurin úr fyllishorni av margbroyttum málfongi“ (Sigurðardóttir 1997).

Har aðrir ummælarar hava kritiserað, at nøvnini í bókini eru fremmand, lýsir Turið Sigurðardóttir teirra ymiska uppruna: tey eru romansk og norrøn, og hon greinar nøvnini. Hon ger sum henni vant nógv við tað málsliga, ikki bert sum aðrir ummælarar at kritisera

95 Malan Marnersdóttir ber í ummæli av *Søgum úr Port Janua* í *Skúlablaðnum* nr. 8, 1996 Rakel Helmsdal saman við bók hjá dananum Per Hultberg, sum eisini letur søgurnar fara fram í einum ímyndaðum býi.

stavsetingina, hóast hon eisini ger tað, men vísir, hvussu tað málsliga byggir upp undir tað tematiska í bókini.

Móttakarin av hesum ummælinum er ein, sum er áhugaður í bókmentum. Turið Sigurðardóttir tosar við ein móttakara, sum minnist hvussu ósjónlig og tigandi skaldsøgan *Fiskimenn* hjá Martini Joensen er um tilveru sína sum listaverk. Hetta kann fáa onkran lesara at blaða víðari í dagblaðnum *Dimmalætting*, sum hetta ummælið er prentað í, men tann áhugaði lesarin fær holla undirvísing í føroyskum bókmentum við at lesa ummælið. Sostatt er hetta ummælið enn eitt dømi um tað akademiska ummælið, sum ikki fylgir journalistiskum krøvum um at orða seg stutt til ein breiðan móttakara.

Turið Sigurðardóttir endar ummælið við at greiða frá sitatinum eftir John Donne, sum ummælið byrjar við, og síðani ger hon tað, sum eg havi sagt, at hon vanliga ikki ger í sínum ummælum: úttalar eina beinleiðis virðismeting og appellerar beinleiðis til lesaran:

> Sitatið eftir Donne fremst í ummælinum sipar til tær givnu fyritreytirnar fyri at koma fram at sannleikanum, at orða veruleikan: tað gerst bara við at ota seg á skák rundan um hann; v.ø.o gjøgnum lýsingar, umskrivingar, samanberingar og myndberingar. Tað er í hesum, at søgurnar úr Port Janua skara framúr. Lesið tykkum inn í tær og frøist (Sigurðardóttir 1997).

Turið Sigurðardóttir er speisk í eftirskrift til ummælið, har hon vísir á, at summar av søgunum hava staðið á prenti áður, og at tað er góður siður at kunna lesaran um hetta á bókarkápuni, og hon vísir til onnur ummæli, sum longu hava peikað á allar stavivillurnar, sum hon sigur er herskin biti í bók, sum Lærarafelagið gevur út. Hetta er einastu ferð í hesum viðgjørdu ummælum, at Turið Sigurðardóttir nýtir orðið „eg“. Orðið er ikki sett inn fyri at pallseta persónin í ummælinum, men sníkir seg inn í speiskari viðmerking, har ummælarin ikki vil taka á tunguna tað orðið, sum bókin sigur á s. 71, at ein snigil ger, tá hann skríður.

Tað er áhugavert, at sum andsøgn til langa og ástøðiliga tunga ummælið hjá Turið Sigurðardóttur stendur niðast á síðuni eitt lítið ummæli, sum fýra gentur úr 2.b í Studentaskúlanum í Hoydølum hava skrivað, har virðisdómurin bæði í yvirskriftini og í endanum á hesum ørstutta ummæli er: „Hon er genial“.

Ummælið av Rakel Helmsdal er gott dømi um, at Turið er ein ummælari, sum stendur í andsøgn við rákið, sum er innan ummæli í dag, har stjørnur og terningar verða nýtt til at meta um list, og har millumrokningarnar og grundgevingarnar verða lopnar um, so tú kanst kunna teg um eina bók, bara við at hyggja at stjørnum ella terningum. Í hesum ummælinum stendur eitt sitat í byrjanini, sum skal vísa seg at vera partur av virðisdóminum í ummælinum, men lesarin fær ikki at vita, fyrr enn hann hevur lisið seg gjøgnum ein heila opnu í *Dimmalætting*, at sitatið er ein lýsing av tí, sum er so gott við savninum hjá Rakel Helmsdal. Virðisdómurin kemur, men lesarin skal fyrst lesa greiningar og viðgerð annars av bókini, og boðskapurin tykist vera, at tað er týdningarmeiri enn smaksdómurin.

Samanumtikið er Turið ein akademiskur ummælari, ið strembar eftir objektiviteti. Hon skrivar sjáldan sína virðismeting í lýsingarorðum um bókina, sum hon ummælir. Tó nýtir hon ein egnan stíl, ein høgan akademiskan og málsligan stíl, har hon letur virðismetingina skína út millum reglurnar, millum tær gjølligu greiningarnar av verkunum. Hon er næstan fullkomiliga fráverandi sum upplivandi og sansandi persónur í ummælunum og nýtir at kalla ongantíð persónsfornavnið „eg“. Hon skrivar í dagbløðini, men leggur seg ikki eftir at uppfylla journalistisk kriterii. Tað kriteriið, sum er tað týdningarmesta hjá teimum allarflestu ástøðingum, sum greina ummælið sum genru, nevniliga virðismetingin[96], er so at siga fráverandi í ummælunum hjá Turið Sigurðardóttur, tó at hon leggur alt á borðið, so tað er klárt hjá lesaranum at taka støðu sjálvur og úttala lýsingarorðini, um hann hevur tørv á tí. Sjálv hevur Turið Sigurðardóttir sum ummælari ikki tørv á at úttala virðisdómin beinleiðis. Hon er vegleiðari, undirvísari og brúgv millum verk og tess lesara.

Ummælaravirksemið hjá Turið Sigurðardóttur er partur av hennara virki sum bókmentagranskari og undirvísari á Føroyamálsdeildini, og tað sæst eisini aftur í hennara ummælarastíli. Sum granskari og

96 Sí kap. 4 um virðismetingina.

týðari hevur hon arbeitt breitt við at viðgera og týða verk bæði eftir kvinnur og menn. Við greinini hjá Helgu Kress í huga um, at kvinnan má leita eftir sær sjálvari í teirri ráðandi bókmentatraditiónini, sum Turið Sigurðardóttir týddi til føroyskt, kann hon sigast at hava arbeitt fyri at gera kvinnuna sjónligari á bókmentaøkinum bæði við at ummæla í bløðum og tíðarritum og við at ummæla bæði kvinnur og menn. Í tíðarskeiðinum 1997-2007 ummælir hon tvey av hvørjum. Í ummælunum favoriserar hon ikki skaldskap eftir kvinnur, men viðger hann við sama nærlagni og somu virðing sum skaldskap eftir menn. Dømið um, at hon sær virði í slíkum, sum ráðandi diskursur hevur lyndi til at sópa til viks, sigur nakað um, at hon sum ummælari sær onnur og nýggj virði í bókmentum enn menninir, sum hava ummælt og alt fram henda diskurs; virði, sum t.d. Kim Simonsen og Carl Jóhan Jensen hava bólkað sum „kaffiprát“ og „drekkamunsrealismu“.

Turið Sigurðardóttir er partur av teirri professionaliseringartilgongd, sum er farin fram í føroyskum ummælararvirksemi gjøgnum árini, og tá hugsað verður um, at Jógvan Isaksen í 1983 segði, at meginparturin av teimum, sum ummæla føroyskar bókmentir, ikki rættiliga eru før fyri at gera tað, og vísti á tørvin at uppfinna eitt nýtt hugtaksmál fyri at kunna ummæla í Føroyum, tí at málinum vantar heiti fyri abstrakt fyribrigdi (Isaksen 1983:11-12)[97], kann Turið Sigurðardóttir sigast at hava verið við til at lyfta støðið ikki bara innihaldsliga, men eisini, sum víst hevur verið á í greiningini av ummælunum, júst málsliga.

Kinna Poulsen

Tað er áhugavert, at ummælarin, sum kann sigast at hava tikið við eftir Turið Sigurðardóttur at ummæla Tórodd Poulsen, Kinna Poulsen (f. 1968), er kanska tann ummælarin, sum líkist henni minst, tá tað kemur til ummælarastíl. Har Turið strembar eftir partloysi, er subjektiva virðismetingin av listini ein týðandi partur av ummælunum hjá Kinnu Poulsen. Har Turið Sigurðardóttir er fráverandi sum upplivandi og sansandi lesari í tekstinum, er Kinna Poulsen til staðar í tekstinum og lýsir sínar egnu persónligu lesarakenslur. Har Turið Sigurðardóttir at kalla ikki nýtir orðið „eg“ í sínum ummælum,

97 Sí kap. 7 um ummæli í útisetu.

pallsetir Kinna Poulsen seg sum ummælari í tekstinum og tosar ikki bara um seg sjálva við persónsfornavninum „eg“, men nevnir seg sjálva eisini „ummælarin“, „tygara ummælari“ o.s.fr.

Kinna Poulsen hevur arbeitt breitt sum mentanarmiðlari seinastu góðu tjúgu árini, og tað granskaða tíðarskeiðið fellur saman við byrjanini av hennara ummælaravirksemi, einum virksemi, ið hevur hildið fram til dagin í dag. Hon er cand.mag. í donskum og listasøgu og hevur í lestrartíðini og seinni við síðuna av sínum arbeiði sum miðnámsskúlalektari verið virkin sum ummælari og kurator. Hon er ein av okkara virknastu ummælarum, og síðan 2014 hevur hon verið ritstjóri og høvundur á sínum egna listaportali, ið miðlar og ber tíðindi um list. Tað ger, at hennara virksemi hevur stóra útbreiðslu. Kinna Poulsen hevur fylgt við tíðini og flutt síni ummæli út á teir talgildu pallarnar. Lýsingin av henni sum ummælari í tíðarskeiðinum 1997-2007 er tí ikki neyðturviliga umboðandi fyri alt hennara ummælaravirksemi. Sum ummælari er Kinna Poulsen fyrst og fremst myndlistaummælari, men hon ummælir eisini bókmentir, og tað er hennara fyrsta tíð sum bókmentaummælari, ið her verður viðgjørd.

At Kinna Poulsen hevur serligan áhuga í skaldskapinum hjá Tóroddi Poulsen sæst aftur í teimum bókmentaummælum, hon hevur skrivað í tíðarskeiðinum 1997-2007, har seks av níggju ummælum eru um yrkingasøvn eftir Tórodd Poulsen. Eitt av teimum er tó eitt trífalt ummæli av Tóroddi Poulsen, Jóanesi Nielsen og Oddfríði M. Rasmussen. Ummælini standa ávikavist í tíðindabløðunum *Dimmalætting*, *Sosialinum* og *Fregnum*. Sum ummælandi kvinna er Kinna Poulsen sostatt eisini ólík hinum báðum við tað, at hon onga kvinnu ummælir í hesum tíðarskeiði. Hon kann tí ikki nýtast sum grundgeving fyri teimum „høgligu vindum“, sum eg havi víst á, at Carl Jóhan Jensen sigur halda teimum skrivandi kvinnunum uppi. Tvørturímóti mótprógvar hon í hesari fyrstu ummælaratíð síni uppáhaldið um, at kvinnur skriva og ummæla fyri at halda hvørji aðrari uppi.

Kinna hevur fleiri ferðir úttalað seg alment um at ummæla. Í 2011 skrivar hon í sambandi við listabloggin, sum hon og Inger Smærup Sørensen høvdu saman í nøkur ár, um sína bakgrund sum ummælari, og hvat tað er við hesum tekstslagi, sum hon er so serliga hugtikin av:

> Mær dámar sjálv so sera væl ummæli og eg lesi nógv ummæli hvønn dag, eins og eg á universitetinum á sinni skrivaði ritgerð um ummæli (eg greinaði ummælini, sum danski ummælarin, Tom Kristensen, skrivaði um bøkur hjá Karen Blixen). Ein orsøk til, at mær dámar so væl ummæli er, at sjangran í praksis er so ómetaliga rúmlig og at ummæli umframt at innihalda lýsing, meting og vanliga forbrúkaravegleiðing eisini eru tíðargreinar, ið kunnu rúma mentanarpolitiskum og mentanarstovnsligum eygleiðingum, ja í grundini eru ummæli rættiliga víttfevnandi og tað er ikki løgið, tí tey skulu helst avspegla listina og listin fevnir víða (Poulsen 2011).

Hon greiðir í øðrum høpi frá sínari søgu sum ummælari, nær hon byrjaði, og hvussu hon sær seg sjálva sum ummælara:

> Sjálv havi eg verið ummælari síðan 1996, tá eg byrjaði at skriva fyri útisetablaðið Oyggjaskeggja í Keypmannahavn og havi síðan havt greinar og innlegg her og der í fjølmiðlunum. Eg havi hildið meg verið amatør, eitt slag av áhugaummælara, tí eg havi ongantíð arbeitt fast á nøkrum miðli, havi havt ummælaríið aftrat ymsum størvum, men freelance ummælarar gerast alt meira vanligir, eisini í bløðum uttanlands, ið ikki hava ráð at hava fastsettar ummælarar. Seinastu 3 árini havi eg saman við Inger Smærup Sørensen havt listabloggin og hann inniheldur m.a. ummæli. Eg havi primert ummælt myndlist og poesi, men havi eisini viðgjørt list og mentan í eini breiðari merking (Poulsen 2013).

Kinna Poulsen hevur eisini alment gjørt sær tankar um, hvat slag av ummælara, hon vil vera. Hon vil ikki vera ein, sum bara rósar og fagnar, men ein, sum finst at:

> tí vil eg við hesum uppleggi nýta høvið at royna at fremja søk okkara neiligu. Tað er so lætt at rósa og fagna og so nógv verri at finnast at. Vit skulu fegnast um tey negativu ummælini, eisini um vit halda tey vera skeiv, tí tað eru serliga tey ummælini, sum gera nakað fyri tankavirksemið og fyri listakjakið (Poulsen 2013).

Hon sigur, at hon hóast atfinningar frá fólki ætlar at halda fram at ummæla, bæði bókmentir og myndlist: „Tó at tað onkuntíð er óstuttligt, tá fólk halda uppat at heilsa og serliga, tá tey ringja og hótta, so ætli eg mær at halda fram í sama lag við at ummæla“ (Poulsen 2011). Tvey ár seinni sigur hon aftur:

> Eg ætli at ummæla, viðmerkja, viðgera og hugleiða um list við vón um, at fólk í staðin fyri at gerast fornermað og óð og taka ummæli sum tann endaliga og forkromaða dómin, heldur fata ummæli sum eitt upplegg til kjak. Eg havi sagt tað áður og endurtaki gjarna, at eitt ummæli byggir á eina subjektiva meting og kann eftir míni meting ongantíð vera meira enn eitt upplegg til kjak (Poulsen 2013).

Kinna Poulsen endar við at peika á júst hetta, sum eg havi verið inni á, at endamálið við ummælinum, tá til stykkis kemur, er at leggja upp til kjak. Og sambært Kinnu Poulsen hevur ummælið og hetta kjakið um list eina týdningarmikla uppgávu, tí tað mennir og flytur menniskju: „Eg haldi sjálv, at listaviðgerð, listakjak og ummæli eru ómetaliga umráðandi, tí tað flytir [sic] og mennir okkum“ (Poulsen 2013).

At Kinna Poulsen er tilvitað um sín leiklut sum ummælari, er tað eingin ivi um. Hetta endurspeglast í hennara ummælum, sum ofta hava eitt metatekstligt íkast, har hon umrøðir seg sjálva sum „ummælarin“ (Poulsen 2003), og meira hátíðarliga sum „tygara ummælari“: „Tað keðiliga er, at tygara ummælari slettis ikki dámar hesa permuna“ (Poulsen, Kinna 2001).

Aðrar metatekstligar viðmerkingar síggjast eisini, t.d. tá hon byrjar ummæli sítt av yrkingasavninum *Gráir týdningar* (2003) eftir Oddfríð M. Rasmussen: „Tað er ikki tespiligt hjá einum ummælara at muga viðganga, at hon ikki skilir tað, sum ummælast skal ... Allíkavæl má eg byrja hetta ummælið við at viðganga, at tað eru partar av verkinum, talan er um her, ið eg møguliga ikki skilji“ (Poulsen 2003). Byrjanin til hetta ummælið ljóðar eyðmjúkt, tá hon sigur, at tað eru partar av savninum, sum hon møguliga ikki skilir, men endamálið er at siga, at júst ein slíkur lesari, ein, sum ikki heldur seg skilja alt frá byrjan, er rætti lesarin av modernistisku yrkingini, sum er tilvitað í sínum gátuføri.

Kinna Poulsen nýtir orðið „eg“ um seg sjálva, og hon nýtir orðið „okkum“ og tekur lesaran við: „Latið okkum fara inn í yrkingasavnið við opnum sinni arm í arm við T. S. Eliot, sum helt at yrkingin kann bera boð um nakað, áðrenn hon er fatað“ (Poulsen 2003). Ummælið byrjar við einum metatekstligum lagi, sum skapar tilvit um ummælaran og um Kinnu Poulsen sum ummælara. Hon lýsir seg sjálva sum ein lesara, sum við eyðmýkt fer inn í eitt verk, og sum ummælari tekur hon í hondina á lesaranum og leiðir hann gjøgnum verkið – saman við T.S. Eliot og hansara hugsanum um modernistiskar bókmentir. Hon tekur við øðrum orðum uppgávuna á seg sum vegleiðari og sum tann, sum skal hjálpa lesaranum at fata verkið. Hon avvápnar lesaran við at siga seg møguliga ikki skilja partar av verkinum heldur, soleiðis at hann kann kenna seg tryggan, hóast hann ikki skilir alt frá byrjan. Tað er jú meiningin, tá talan er um modernistiskar tekstir, fær hann at vita. Hetta er snildisliga gjørt, tí hon byrjar við at tosa um ikki at skilja tað, sum hon ummælir. Síðani broytir hon tað til, at tað eru partar av savninum, sum hon møguliga ikki skilir, fyri síðani at avdúka, at júst hetta ger hana til tann ideella lesaran. Snildisliga fær hon pallsett seg sjálva sum tann góða lesaran, ið tekur í hondina á lesaranum og er á hansara stigi. Hetta er serstakur háttur at skapa sær myndugleika í tekstinum. Hon perspektiverar við frágreiðing um modernismu, við tilsiping til Magritte, og hon ber saman yrkingar hjá Oddfríði M. Rasmussen, Jóanesi Nielsen og Tóroddi Poulsen. Soleiðis skapar hon sær myndugleika við at vísa, at hon kennir bókmentarákini, og at hon er inni í skaldskapinum hjá teimum føroysku modernistunum. Yvirskriftin er, sum vanligt er hjá Kinnu, ein herming eftir yvirskriftini í savninum, tó við einum kreativum snari, sum skapar røring og sum vísir til evni, ið hon tekur upp í ummælinum. „Gráir týdningar av sonnum“ hevur dupultan týdning, tí tað kann merkja: „gráir týdningar, sanniliga!“ Ella: „gráir týdningar av tí, sum er satt“, og hetta peikar á evnið, sum hon tekur upp í ummælinum um, at „grovasta lygnin er besta poesiin í yrkingasavninum“, sum hon málber seg (Poulsen 2003).

Ummælið hjá Kinnu Poulsen av yrkingasavninum *Blóðroyndir* (2000) eftir Tórodd Poulsen eitur „Intensiv bloyðroynd“, altso nýtir hon heitið á savninum, men leggur eitt virðisløtt orð afturat, sum sigur nakað um dygdirnar í savninum.

Ummælið av *Speispei spei* (1999) eftir Tórodd Poulsen hevur eisini fingið heiti eftir ummælta yrkingasavninum, men her er eitt spurnartekin sett við endan, sum leggur áherðslu á, at Kinna Poulsen í ummælinum setir spurningin, um tað seinasta speiið vendir móti teimum báðum fyrru, so tey missa virðið, og spurningurin er, um hetta nú bara er spei.

Ein annar háttur, Kinna Poulsen nýtir í sínum ummælum at skapa samband við lesaran og at pallseta seg sjálva sum ummælara, er at greiða frá egnum lesaraupplivingum, at greiða frá, hvussu hon fekk fatur á savninum, hvar hon var, tá hon las tað, hvussu umstøðurnar vóru o.s.fr. Í ummælinum av yrkingasavninum *Blóðroyndir* eftir Tórodd Poulsen, byrjar hon við at lýsa, hvussu bókin kom til hennara:

> Bókin kom bóltandi inn um hurðina í áðni og small so hart í gólvið, at eg vaknaði. Skelkin fekk eg aftaná morgunmatin, tá brævbjálvin var upplatin og bókaperman opinberaði seg. Ógvuslig orð kanska, men neyðug í hesum føri fyri at lýsa ta bestu permuna á nakrari føroyskari bók í ár (Poulsen 2000b).

Ummælið av *Speispei spei* byrjar eisini við sjálvpallseting, har Kinna Poulsen sigur, hvar og nær hon las savnið fyrstu ferð:

> Fyrstu ferð, eg las yrkingasavnið „Speispei spei“, var júst ta náttina herfyri, tá allur himmalin uddi í stjørnuskotum. Sum eg stóð í túninum og gánaði og ynskti, kom mær til hugs, at stjørnuskotini ikki vóru heilt ólík yrkingunum, sum eg júst hevði lisið (Poulsen 1999b).

Trífalda ummælið av yrkingasøvnunum *Brúgvar av svongum orðum* (2002) eftir Jóanes Nielsen, *Kvørkringar* (2002) eftir Oddfríð M. Rasmussen og *Royggj* (2002) eftir Tórodd Poulsen byrjar við søgu um pakkan við bókunum, sum er so stórur og týdningarmikil, at postmaðurin ikki fekk hann gjøgnum brævrivuna, ein søga, sum hongur

saman við yvirskriftini „Yrkingamarglæti“ og yvirskipaðu metingini av hesum trimum bókum:

> Tað kundi gera tað sama hvussu tann neyðars postmaðurin trýsti og manereraði. Eftir skavinum at døma fekst pakkin ikki inn gjøgnum brævrivuna, so eg mátti sjálv skunda mær yvir at lata hurðina upp fyri at taka ímóti pakkanum, sum til mína stóru fragd var frá Bókamiðsøluni.
>
> Heili trý glitrandi, spildurnýggj yrkingasøvn, sum umgangandi setti [sic] meg í somu átrokandi tvístøðu, sum tá eg sum barn hevði fingið fleiri bommposar í senn. Tí hvar skuldi eg byrja? Mínar hugsanir tá endaðu vanliga við eini skjótari avgerð um at eta øll bommini í senn og sama mannagongd varð brúkt henda dagin, yrkingasøvnini komu (Poulsen 2002).

Bera vit henda inngangin saman við inngangin hjá Turið Sigurðardóttur av móttøkuni av yrkingasavninum *Rot* eftir Tórodd Poulsen, síggjast teir grundleggjandi munirnir millum hesar báðar ummælararnar í, at báðar lýsa eina ummælarinnu, sum er so spent at sleppa at lesa ta nýútkomnu bókina, at hon næstan ikki veit, hvat hon skal gera av sær sjálvari. Stóri munurin sæst í tí persónliga sjónarhorninum hjá Kinnu Poulsen og tí almenna sjónarhorninum hjá Turið Sigurðardóttur, sum nýtir orðið „vit“ um seg sjálva her, umboðandi føroysklesandi yrkingafjepparar: „Tá ið nýtt verk hjá Tóroddi Poulsen hevur heimspremieru, hava føroysktlesandi yrkingafjepparar framíhjárættindi. Vit fara í bókhandil í fríløtuni, í døgurðatímanum, kaffisteðginum ella eftir arbeiðstíð, 1 eintak, nei takk, bara ein posa“ (Sigurðardóttir 2007).

Ummælið hjá Kinnu Poulsen av *Húðsemi* (2001) eftir Tórodd Poulsen byrjar eisini við at skapa ein pall til sjálva fysisku móttøkuna av yrkingasavninum:

> Útsjóndin á bókini ørkymlaði. Tann følna ljósavioletta perman hóskaði í so væl til tey ljósareyðu, rósuformaðu ljósini á borðinum. Tí tók tað nokkso langa tíð áðrenn hon var upplatin. Men nú liggur hon á einum øðrum borði saman við øllum hinum lisnu, millum stjørnurnar hjá Tove, søgurnar hjá Anker og reglurnar hjá Marius. Hon líkist yvirhøvur ikki hinum og tað er gott (Poulsen, Kinna 2001).

Her er tað útsjóndin á savninum, ið skapar karmin, og sum vanligt skrivar Kinna Poulsen um permuna. Hetta ger hon oftast fyrst í ummælinum og nýtir gjarna fitt av plássi til tað. Tað hongur eisini saman við, at tað er sum myndlistaummælari, at hon fyrst og fremst hevur gjørt vart við seg.

Lisna bókin, sigur Kinna Poulsen, liggur nú saman við hinum lisnu. At hon velur at nevna Tove Askham, Anker Mortensen og Marius Olsen, sum hava gjørt permur til aðrar bøkur hjá Tóroddi Poulsen, við fornavni, er ein máti at skapa sær myndugleika. Við hesum fær lesarin eina kenslu av, at hon kennir listafólkini so væl, at hon kann nýta teirra fornavn. Tað kann tó eisini vera fyri at taka frástøðu frá tí akademiska stílinum og skapa samband við lesaran. Við at siga, at tað er gott, at bókin hjá Tóroddi Poulsen ikki líkist hinum, fær Kinna Poulsen borið fram tað, sum er hennara fremsta kriterium fyri metingina av list, nevniliga at skaldskapurin megnar at skapa nakað nýtt. Og okkurt nýtt og øðrvísi er í hesari bókini, sigur hon, men tað umboðar ikki „nakað veruligt nýbrot í Tóroddska skaldskapinum, men eitt gott og virðiligt framhald av Blóðroyndum“ (Poulsen, Kinna 2001).

Lýsingin av fysisku móttøkuni av bókini er sostatt umboðandi fyri virðisdómin í ummælinum. Tann bókin, sum mundi horvið millum rósureyðu ljósini á borðinum, er einki nýbrot (Poulsen, Kinna 2001), meðan tann, sum kom bóltandi inn um dyrnar og gav ummælaranum ein skelk, tá hon læt brævbjálvan upp (Poulsen 2000b), er eitt nýbrot.

Horace Engdahl hevur meira enn eina ferð úttalað seg alment um, at ummælaravirksemi í dag ikki hevur nógv við veruligan kritikk at gera. Hann sigur í greinini „Kritikken og dens dobbeltgænger“, at ummælarin í dag hevur valt at liva í tí sosiala kroppinum fyri at yvirliva (Engdahl 2014:127), og í samrøðu við Marianne Stidsen sigur hann, at ummælini eru vorðin:

> selvoptaget fabuleren af den art, som er blevet så almindelig i kritik i dag. Man taler om, hvad man gjorde, da man gik hen for

> at læse bogen. Man beretter om sin mormor. Man taler lidt om sine veninder, og man runder af med nogle replikker, som man har hørt en kendt person sige. Det er en måde, hvorpå man får skrevet en underholdende artikel, som egentlig ikke har en pind med kritik at gøre, men som måske er blevet den normale måde at skrive kritik på i dag (Stidsen 2018:34).

Ein kann freistast til at hugsa, at hesin persónligi og pallsetti stílurin hjá Kinnu Poulsen, ið ger júst hetta, sum Horace Engdahl nevnir, at tosa um, hvat hon gjørdi, tá hon las bókina, er ein roynd at „yvirliva", fyri at nýta orðingina hjá Engdahl. Persónligu søgurnar í ummælunum hjá Kinnu Poulsen eru kortini ikki leysar og grunnar lýsingar av, hvat ummælarinnan gjørdi, tá hon las bókina, men verða, sum eg havi víst á, nýttar sum myndburður í virðisdóminum í ummælinum.

Heldur tykist Kinna Poulsen at hava valt ein impressionistiskan stíl, sum er í samsvari við Tom Kristensen og tað, sum hann sigur um ummælaran, at hann hevur stutta tíð og skal koma við tí fyrsta inntrykkinum, impressiónini, ið skal lokka lesaran til ella ræða hann frá verkinum (Kristensen 1940/1953).

Kinna Poulsen hevur fleiri ferðir sagt alment, at hon sær so stórt í ummælinum sum tekstslag, tí at ummæli umframt at innihalda lýsing, meting og vanliga brúkaravegleiðing eisini eru tíðargreinar, ið kunnu rúma mentanarpolitiskum og mentanarstovnsligum eygleiðingum (Poulsen 2011) og tí, at ummæli eru eitt rúmligt metatekstslag, sum kann *brúkast* til so nógv („Ummæli av ummælinum" 2017). Her sigur Kinna Poulsen beinleiðis, at hennara dagsskrá sum ummælari ikki bara er at ummæla eitt verk, men eisini at siga nakað um list sum heild og um samfelagið, hon og vit liva í.

Kinna Poulsen sigur, at ummælið kann nýtast mentanarpolitiskt og til at gera viðmerkingar til viðurskifti í samfelagnum, tað kann viðgera list og verða nýtt til pedagogiskt at greiða frá ymsum viðurskiftum. Tað kann eisini verða nýtt til at tulka tey ymisku listasløgini. Kinna Poulsen samanber ummælið við yrkingina sum tekstslag, tí henda lítla greinin kann innihalda so nógv. Hon kann bera fram ein listfrøðiligan hugburð ella ein polistiskan hugburð. Tað er ein konsentreraður tekstur, sum hevur evnini til at breiða okkurt, sum er smalt, t.d. yrkingina, út til fleiri fólk. („Ummæli av ummælinum" 2017). Her vísir Kinna Poulsen, at eitt av aðalmálunum í hennara ummælaravirksemi er at breiða ein boðskap millum annað um list og mentanarpolitikk út. At Kinna Poulsen hugsar um lesaran sæst í tí lætta, persónliga og subjektiva stílinum, og Kinna Poulsen hevur sum eingin annar føroyskur ummælari megnað at flutt seg yvir á teir talgildu miðlarnar við at nýta ymiskar pallar og ikki bara bløðini. Tá hon hevur skrivað eitt innlegg á sínum egna listaportali, breiðir hon tað ofta út á teimum sosialu miðlunum, so tað røkkur út til fleiri.

Eg havi nevnt[98], at Bergur Djurhuus Hansen, bókmentafrøðingur og lektari á Føroyamáldeildini á Fróðskaparsetri Føroya, í inngangi til bók við ummælum hjá Kinnu Poulsen lýsir hana sum ummælara. Talan er um yvirskipaða lýsing og ikki gjøgnumgongd av hennara ummælum, men hann lýsir Kinnu Poulsen við at nevna hennara sermerkta stíl, og við at vísa á, at tað fakliga, tað kritiska og tað persónliga í ummælum hennara verður blandað saman í eitt egið, hugleiðandi slag av teksti (Hansen 2017b).

Í dømunum omanfyri sæst, hvussu tað persónliga verður flættað inn í tað fakliga, har tann persónliga søgan ofta verður nýtt sum mynd av lesingini og av virðismetingini av savninum. Hetta er nakað av tí, sum ger, at Kinna Poulsen fær ein sermerktan stíl, og tað er í hesum høpinum, at ein *persona* trínur fram í hennara ummælum; í møtinum millum tað persónliga, tað fakliga og tað kritiska; ein *persona*, sum lesarin kennir aftur, og sum hann kann identifisera seg við ella taka frástøðu frá.

Í bókmentaummælunum, sum Kinna Poulsen hevur skrivað í tíðarskeiðinum 1997-2007, endurspeglast hesar hugsanir í hennara virðismeting av bókmentum serliga við, at hon leggur dent á, at list skal vera *egin* og *slóðbrótandi*. Í ummælinum av yrkingasavninum *Gráir týdningar* eftir Oddfríð M. Rasmussen skrivar Kinna Poulsen soleiðis: „Og hóast Oddfríður er minst líka óharmoniskur og óruddiligur, sum hann plagar at vera í tí nýggja savninum, so merkist hansara egni tóni týðiligari enn áður" (Poulsen 2003). Her metir Kinna Poulsen um

98 Sí kap. 2 um ummælið sum granskingarøki í føroyskum høpi.

yrkingarnar og leggur dent á originalitet. Í einum sitati omanfyri er longu víst á, at hon í virðismetingini av *Húðsemi* eftir Tórodd Poulsen sigur, at hóast okkurt nýtt og øðrvísi er í savninum, so umboðar tað ikki nakað veruligt nýbrot í tóroddska skaldskapinum, men eitt gott og virðligt framhald av savninum *Blóðroyndir* (Poulsen, Kinna 2001). Eisini her verður dentur lagdur á at menna originalitet og helst hvørja ferð bróta upp úr nýggjum. Í trífalda ummælinum av søvnum hjá Jóanesi Nielsen, Oddfríði M. Rasmussen og Tóroddi Poulsen vísir Kinna Poulsen á, at myndamálið hjá Jóanesi Nielsen er originalt og „virkuliga væleydnað" (Poulsen 2002).

At Kinna Poulsen ikki smæðist við at úttala sín virðisdóm sæst í hesari orðing, og tað endurspeglast eisini í hennara nýtslu av sitatum í ummælunum. Í viðgerðini av Turið Sigurðardóttur sum ummælara vísti eg á, at hon nýtir sitat úr bókmentaverkinum til at grundgeva fyri sínum greiningum. Kinna Poulsen nýtir sitat øðrvísi. Hon endar t.d. ofta eitt ummæli við einum sitati, sum henni dámar væl, og hon nýtir sitat sum grundgeving fyri sínum virðisdómi, t.d. í ummælinum av yrkingasavninum *Gráir týdningar* eftir Oddfríð M. Rasmussen, tá hon sigur, at hon heldur, at bæði partar og heild høvdu staðið seg betur, um savnið var munandi stytt. So hevði tað eisini verið lættari at borið eyga við tær smáu gráu perlurnar, og hon tekur eina av hesum perlum fram og endar við at sitera hana (Poulsen 2003).

Virðismetingin hjá Kinnu Poulsen sæst eisini í hennara selektiva ummælaravirksemi á bókmentaøkinum í hesum tíðarskeiði; í tí, sum hon velur at ummæla, og tí, sum hon ikki ummælir. Hon ummælir mest yrkingasøvn eftir Tórodd Poulsen, men eisini onnur yrkingasøvn. Eingin debutantur er umboðaður og eingin kvinna. Tað, sum hon seinni sigur um, at hon vil royna at fremja søk teirra neiligu og finnast at, tí tað er so lætt bara at rósa og fagna (Poulsen 2013), sæst ikki aftur í hesum fyrstu bókmentaummælum hennara, tí hon er sera positiv í sínum virðisdómum. Kanska hetta júst kemst av tí, at hon er selektiv, og virðisdómurin tí í stóran mun liggur í vali og frávali av tilfari, sum verður ummælt.

Eg havi nevnt, at tað er partur av háttinum hjá Kinnu Poulsen at skapa sær mentanarligan myndugleika at pallseta seg sum ein lesara, ið skilir, hvussu modernaðar yrkingar skulu lesast (Poulsen 2003), og at tað eisini er ein háttur hjá henni at skapa sær myndugleika, tá hon fer niður á støðið hjá lesaranum og vil leiða hann gjøgnum tekstin, eins og hon við persónligum og gerandisligum søgum sigur, hvussu, hvar og nær hon las bókina. Hetta er eitt stíltak, sum skapar eitt slag av nærveru og kann vinna lesarans áhuga, tí hann kennir seg aftur í einari líknandi støðu.

Kinna Poulsen skapar sær eisini myndugleika við at vísa til bókmentalig rák, aðrar bókmentir og seta tekstin í størri høpi, hóast hon ofta ger tað á ein hátt, so tað sær gerandisligt út, sum í dømínum omanfyri, har hon sigur, at bøkurnar hjá Tove, Anker og Marius liggja á borðinum (Poulsen, Kinna 2001). Í veruleikanum kann hetta vera við til at skapa enn størri kenslu í lesaranum av myndugleika á økinum, tá ummælarin tosar um listafólk við at nýta teirra fornavn. Tað kann skapa kenslu av einum áhugaðum lesara, sum hevur bøkurnar liggjandi á køks- ella stovuborðinum, og sum møguliga kennir listafólkini persónliga. Hesin perósnligi stílurin kann tó eisini skapa eina fjarstøðu til lesaran, ið ikki kemur í tankar um, hvørji hesi fólkini, sum hon er upp á fornavn við, eru, eins og tað kann geva lesaranum varhuga av einum møguligum gegnistrupulleika hjá ummælaranum. Hetta er ein trupulleiki, sum eg havi víst á[99], at John Chr. Jørgensen viðger (Jørgensen 2013).

Áðurnevndu dømi vísa, at Kinna Poulsen skapar sær mentanarligan myndugleika við at vísa til rák og aðrar høvundar og listamenn, tá hon í ummælinum av *Gráum týdningum* eftir Oddfríð M. Rasmussen perspektiverar til Magritte og ber tekstir hjá Oddfríði saman við tekstir eftir Jóanes Nielsen og Tórodd Poulsen (Poulsen 2003). Í ummælinum av *Speispei spei* eftir Tórodd Poulsen perspektiverar hon eisini til Stéphane Malarmé, Hans Andrias Djurhuus og Regin Dahl (Poulsen 1999b).

Pallsetingin av einum *persona* er eisini partur av háttinum, Kinna Poulsen skapar sær myndugleika. Hetta ger hon ikki bara í sjálvum tekstinum, tá hon tosar um seg sjálva, nevnir seg „ummælaran" og „tygara ummælara", men eisini í teimum mongu tekstunum og

99 Sí kap. 4 um ummælið sum relatiónir millum menniskju.

samrøðunum, har hon tosar um seg sjálva sum ummælara. Nevndi inngangurin, sum Bergur Djurhuus Hansen, ið vegna sítt starv og bókmentaliga virksemi í samfelagnum annars hevur stóran mentanarligan kapital, skrivaði til útgávu av ummælum, er eisini partur av pallsetingini av ummælaranum Kinnu Poulsen, sum er við til at skapa henni myndugleika og enn betri møguleikar at fáa ella varðveita skilmarkingarvaldið á bókmentapallinum. Her sigur Bergur Djurhuus Hansen um hana, at hon hevur eitt beinrakið flog, hon er ógvuliga sjáldan tyngd av frøðiheitum og hugtøkum, hon byggir á sín egna hátt á akademiskar hugsanir og hon hevur evnini at skriva væl (Hansen 17b:8-10). Henda blástempling av Kinnu Poulsen sum ummælara skapar ein annan myndugleika, enn um hon, sum Jógvan Isaksen ger í sínum útgávum, hevði skrivað inngangin til síni útgivnu ummæli sjálv.

Tað er áhugavert, at eitt ummæli stingur burturúr millum ummælini, sum Kinna Poulsen skrivaði í tíðarskeiðinum 1997-2007. Tað staðfestir bara, at Kinna Poulsen hevur ein egnan stíl, sum lesarin kennir aftur.

Ummælið, sum brýtur frá, er um *Dalin fagra* eftir Gunnar Hoydal. Í tí ummælinum setir Kinna Poulsen eitt heilt annað og meira varið *ethos* fram, og hennara pallsetti *persona* er ikki týðiligur í hesum ummæli, sum hann er í øllum hinum ummælunum. Formurin á hesum ummælinum er nógv siðbundnari, her er eingin persónlig søga, eingin inngangur, sum Kinna annars oftast skrivar. Virðisdómurin er har, men hann er varnari, og tónin er ein annar: „Tað eru ógvuliga nógv slík dømi í bókini. Viðhvørt nakað nógv av tí góða, og tá tykjast hendinga orðingar konstrueraðar. Men tær allarflestu eru sera beinraknar og trúverdigar“ (Poulsen 1999a). Møguliga er orsøkin til henda strammari og hevdbundna stílin og tann varna dómin tann, at hon ummælir eitt viðurkent skald, sum er nógv eldri enn hon, og, sum Kinna Poulsen eisini er inni á, leggur aftur at skaldskapinum hjá Karsteni Hoydal, ið er viðurkent og virðismett skald. Virðingin fyri skaldinum sæst í tekstinum; ein virðing fyri høvundinum, ið ikki er at síggja í hinum ummælunum, sum eg havi viðgjørt: „Vit skulu tó ikki gera nógv burturúr bókmentaligum samanberingum ella høvuðbrýggj yvirhøvur viðvíkjandi eyðmerking av søguligu

persónunum. Sigur rithøvundurin, at bókin er ein skaldsøga, mugu vit trúgva honum og viðgera hana sum skaldsøgu“ (Poulsen 1999a). Onnur frágreiðing kann vera, at Kinna Poulsen ikki kennir seg eins trygga við at ummæla eina skaldsøgu sum at ummæla modernaðar yrkingar, ið týðiliga eru tað tekstslagið, ið hon hevur valt at ummæla fram um annan skaldskap.

Tá tað kemur til at skapa sær myndugleika, til tað persónliga *ethos* og tann ráðandi *persona*, sum Kinna Poulsen annars setir á pall í sínum ummælum, nýtir hon í hesum ummæli av *Dalinum fagra* eftir Gunnar Hoydal orðið „vit“ um seg sjálva[100] og ger seg soleiðis til eitt við fjøldina, sum lesur og metir um Gunnar Hoydal sum skald.

Tann triðja frágreiðingin kann vera, at ummælið er skrivað tíðliga í ummælara-yrkisleið hennara. Hetta er, sum eg dugi at síggja, tað fyrsta bókmentaummælið, hon skrivaði. Tað kann eisini vera orsøk til, at stílurin, ið sermerkir hennara ummæli seinni, ikki sæst í hesum fyrsta ummælinum. Tann niðurstøðan er kanska ikki heilt av leið, tí í ummælinum av *Speispei spei* eftir Tórodd Poulsen, sum er prentað bert tvær vikur seinni, er hon eisini minni persónlig og metatekstlig, enn hon seinni verður, tó at hon byrjar við einari persónligari søgu um, hvar og nær hon las yrkingasavnið, og hon tosar eisini um seg sjálva sum „lesaran“ (Poulsen 1999b). Hetta ummælið ber minni brá av pallseting av ummælaranum, enn ummælini, sum eru skrivað seinni, gera. Tó skal sigast, at í ummælinum av *Speispei spei* eftir Tórodd Poulsen, ið hon kennir væl persónliga, og sum er skrivað sama ár sum ummælið av *Dalinum fagra*, er tónin lættur og ikki so hátíðarligur sum í ummælinum av *Dalinum fagra*. Aftur at tí er ummælið av *Dalinum fagra* tað einasta av ummælunum hjá Kinnu Poulsen í hesum tíðarskeiði, sum hevur neyvt sama heiti sum ummælta verkið. Hetta endurspeglar eisini, at tann *persona*, ið seinni gerst týðiligur í hennara ummælum, ikki er vorðin eyðsýndur enn.

Samanumtikið umboðar Kinna Poulsen tann akademiska ummælaran, sum hevur ein subjektivan, impressionistiskan dám. Hon bregður frá teimum flestu av hinum akademisku ummælarunum í hesum tíðarskeiði við einum eyðmerktum persónligum vinkli. Við

100 Sí sitat omanfyri.

áhaldandi at pallseta sín egna *persona* bæði í ummælunum og tí almenna rúminum røkkur hon einum breiðum lesaraskara. Kinna Poulsen hevur eyðkenni hjá tí *impressionistiska ummælaranum*, sum Hejlskov Larsen lýsir. Lesarin má kenna henda ummælaran og hansara stíl fyri at vita, um hann er samdur í subjektiva kritikkinum. Hejlskov Larsen nevnir Tom Kristensen sum ein ummælara, sum í sínum seinastu ummælaraárum var ein álítandi impressionistiskur ummælari, tí lesararnir kendu hansara stíl og hansara smakk (Larsen 1969:128-131). Hetta eru eisini orð, ið kunnu sigast um Kinnu Poulsen sum ummælara.

Kinna Poulsen er partur av professionaliseringartilgongdini av føroyskum ummælaravirksemi, og hennara impressionistisku og persónligu, men samstundis akademisku ummæli eru við til at skapa fjølbroytni í tí føroyska ummælaraskaranum. Hon er dømi um kvinnuligan ummælara árini 1997-2007, sum hvørki arbeiðir við feministiskari dagsskrá ella tykist at hámeta virði, ið verða sædd sum kvinnulig. Tá hon í hesum tíðarskeiði als ikki ummælir skrivandi kvinnur, stendur hennara bókmentaummælaravirksemi sum ein mótvekt til og sum ein afturvísing av uppáhaldinum hjá Carl Jóhan Jensen um teir høgligu vindarnar, ið halda kvinnubókmentum uppi.

Kvinnur ummæla kvinnur í *Kvinnutíðindi*

Tríggjar kvinnur skriva ummæli av bókmentum eftir kvinnur í serútgávu av tíðarritinum *Kvinnutíðindi* (1999) í tíðarskeiðinum 1997-2007. Hesi trý ummælini kunnu sigast at standa sum mótvekt til fleiri av sarkastisku ummælunum hjá monnum av kvinnubókmentum.

Tríggir akademikarar hava skrivað hesi ummælini. Guðrun Gaard (f. 1947), Vár í Ólavsstovu (1958-2021) og Kirsten Brix (f. 1947). Tær ummæla somu rithøvundar, sum hava fingið *drekkamunsrealismu*hugtakið knýtt at sær, Marionnu Debes Dahl og Oddvør Johansen. Kirsten Brix ummælir í *Kvinnutíðindi* Minu Reinert, men omanfyri havi eg greinað ummæli hennara av bókini *Suðar dýpið reyða* eftir Bergtóru Hanusardóttur og borið ummælið saman við ummælið hjá Carl Jóhan Jensen av somu bók[101].

Ummælini eru saklig og objektiv skilt á tann hátt, at tey viðgera

101 Sí kap. 7, har Kirsten Brix ummælir *Suðar dýpið reyða.*

tekstirnar, nýta neyvlestur sum amboð, tey perspektivera og eru kritisk, men tilvitað um at kritisera konstruktivt. Tey eru soleiðis merkt av teirri akademisku bakgrundini hjá ummælarunum. Ummælararnir hava myndugleika vegna sína útbúgving, men skapa sær eisini myndugleika í tekstinum við at perspektivera til bókmentalig rák og tekstsløg og við at vísa hegni til neyvlestur.

Hyggja vit at ummælunum av bókini hjá Marionnu Debes Dahl *Úti á leysum oyggjum (*1997), snúgva tey flestu seg um tann innihaldsliga partin av bókini.

Í ummælinum „Alt er ein ferð“ av *Úti á leysum oyggjum* heldur Aref Olsen Marionnu vera djarva at viðgera síni egnu barnaár og leggja tey fram fyri almenningin (Olsen 1998). Malan Johannesen, hinvegin, heldur í ummælinum „Faðirmorð við einum orði“, at høvundurin skuldi verið djarvari og sigur, at hon skal heldur leypa á bláman og síðani koma við søguni. Hon er vónbrotin av, at endurminningarsøgurnar ikki fara niður á botn í evnunum, sum verða sett fram (Johannesen 1998b). Ólavur í Beiti heldur í ummælinum „Kensluborin og sterk lívsminni“ bókina vera frálíka. Hann sigur, at hetta er fyrsta bók hjá Marionnu, sum hann hevur lisið, og sigur seg eiga fleiri bøkur eftir Marionnu Debes Dahl, men meira fyri at víðka bókarúgvuna enn at lesa. Hann er áhugaður í at fáa søgur at vita um landslæknan. Í virðisdóminum av bókini sigur hann, at hann helt ikki, at hon á nakran hátt var troyttandi at lesa (Beiti 1997c). Henda útsøgn sigur eitt sindur um tær lágu væntanir, Ólavur í Beiti hevði til bókina.

Ummælið hjá Guðruni Gaard av *Úti á leysum oyggjum* stóð í *Kvinnutíðindi*. Stílurin er akademiskur, tí Guðrun Gaard tekur útgangsstøði í endurminningarskaldskapi sum tekstslagi, sum hon greiðir frá í ummælinum. Hon setir spurnartekin við sambandið millum høvund og frásøgufólk og við, um talan er um skaldsøgu ella ikki, tá vit hava við endurminningarskaldskap at gera. Hetta er tað, sum Guðrun Gaard ger øðrvísi enn hinir ummælararnir; hon sær endurminningarnar sum skaldskap og ikki bara sum persónligar søgur um Marionnu Debes Dahl og pápa hennara landslæknan.

Kortini leggur hon út við einum persónligum vinkli, sum ikki er so

vanligur í akademiskum ummælum, men sum hongur saman við, at talan er um endurminningarskaldskap, og júst sambandið, sum hon eisini nevnir, ið er millum høvuðspersónin í tekstinum og høvundin sjálvan. Hon sigur enntá, at hon og Marianna Debes Dahl eru gamlar vinkonur. Hetta er ein áhugaverd útsøgn, tá hugsað verður um, at idealið er, at tað er ein armslongd millum ummælara og høvund, eitt ideal, sum næstan er ógjørligt at halda í hevd í Føroyum.

Ummælarin rósar bókini fyri at vera skipað sum minnisbrot og ikki ein roynd at gera lívið til eina episka heild. Her nýtir ummælarin faklig orð, sum bera boð um hennara akademisku bakgrund. Hóast tann akademiska vinkulin, sum ikki sæst hjá hinum ummælarunum, er ummælið ikki fakliga tungt, men tvørturímóti lætt lesiligt og lætt at skilja, og persónliga søgan í byrjanini skapar innliving í lesaranum. Myndugleiki verður skaptur í tekstinum við at perspektivera til tekstslag og við neyvlestri, har t.d. munur verður gjørdur á teimum ymisku frásøgufólkunum í bókini, so hvørt sum høvuðspersónurin mennist (Gaard 1999).

Ummælið av skaldsøguni hjá Oddvør Johansen *Í morgin er aftur ein dagur* (1998) eftir Vár í Ólavsstovu byrjar við kunning um bókina og um tey evni, sum verða lýst í henni. Síðani kemur samandráttur, har greining av frásøgufólki, evnum, tema og øðrum er flættað inn í tekstin. Hon tekur dømi úr tekstinum.

Vár í Ólavsstovu perspektiverar til *Ditte menneskebarn* eftir Martin Andersen Nexø og vísir á, at fjálgleikin og næstrakærleikin hjá undirstættini í samfelagnum endurspeglast í persónslýsingunum og sýna hugburð høvundsins. Hon tosar um, hvat persónarnir umboða. Ummælarin eftirlýsir tó djypri persónslýsingar og kritiserar, at tað er nakað bláoygt, at kærleikin sigrar í bókini. Ov nógvir persónar eru í bókini, og frásøguviðurskiftini eru fløkt, sigur ummælarin. Hóast hetta er høvundurin komin væl frá bókini, og tú keðir teg ikki, tá tú lesur, sigur hon.

Ummælið inniheldur soleiðis kunning um tekstin, samandrátt, greining og virðismeting. Harafturat er ein vegleiðing til høvundin ein partur av ummælinum, og ummælarin sær seg sjálvan í leiklutinum sum ein, ið skal vísa høvundinum, hvussu tað kundi verið gjørt betur.

Til dømis kemur Vár í Ólavsstovu við hugskotinum at hava yvirlit yvir persónarnar aftast í bókini.

Ummælarin brúkar orðið „tú“ um seg sjálva og tosar soleiðis um seg sjálva sum ein almennan lesara: „tú keðir teg ikki“. Við einum slíkum almennum *ethos* ger ummælarin ikki burtur úr egnari lesiuppliving, men tosar alment um sína uppliving av bókini. Vár í Ólavsstovu brúkar eisini orðið „vit“, og her inkluderar hon ein lesara, sum kennir persónslýsingarnar aftur frá Nexø. Út frá hesum kann sigast, at hennara ideelli móttakari er akademikarin ella bókmentakennarin, sum hevur lisið bókmentir og kann samanbera við annan skaldskap. Orðavalið er lutvíst akademiskt, tí ummælarin nýtir orð sum alvitandi frásøgufólk og mikro og makro (Ólavsstovu 1999).

Ummælið hjá Kirsten Brix av *Duldum leiðum* (1996) eftir Minu Reinert byrjar við at staðfesta, at tekstslagið er krimiskaldskapur. Síðani kemur samandráttur av tekstinum, og hetta er tilskilað í yvirskriftini. Referatið er drúgt, og greining av persónunum verður gjørd til part av samandráttinum.

Ummælarin perspektiverar til Jógvan lsaksen, og við at leggja eitt „tíbetur“ inn í tekstin fær hon eina virðismeting inn, tá hon sigur, at tíbetur stendur okkurt opið í endanum; alt fellur ikki upp á pláss.

Kirsten Brix nýtir orðið „eg“ um seg sjálva og sigur „eg skal royna at“, og „eg havi roynt sum frægast“. Talan er sostatt um eitt varið og lítillátið *ethos*, sum hevur ein undirspældan leiklut, tí ummælarin er á allan hátt kompetentur og átti ikki at havt tørv á at seta sítt ljós undir skeppuna. Kirsten Brix hevur, tá hetta ummælið varð skrivað, undirvíst í rúma tíð, givið út og er í gongd við at skriva doktararitgerð um skaldskapin hjá Regini í Líð, har greiningarførleikar eru fremsta amboð. Ein slík sjálvsmyndan í tekstinum kann tó vera álitisvekjandi, tí hon vísir á ein ummælara, sum ikki fer lætt um starvið, og sum ikki sleingir greiningar um seg, men viðger tekstin við virðing. Hetta gevur Kirsten Brix eisini myndugleika til at vera kritisk, og hon brúkar hetta sum grundgeving fyri at siga, at hon er farin gjøgnum søgugongdina alla og kann við myndugleika vísa á veikleikan í bókini: at høvundurin vil alt ov nógv í senn. Kirsten Brix grundgevur eisini fyri, hvat tað er, sum hon heldur vera

ov nógv, bæði í søgugongdini, persónslýsingini og í hugleiðingum um alskyns evni í bókini.

Kritikkurin av myndamálinum í bókini er harður: myndir eru konstrueraðar og patetiskar, og her grundgevur ummælarin við dømum úr tekstinum. Við dømi úr tekstinum vísir hon eisini á, hvar frásøgnin ikki er sannførandi. Hon kritiserar frásøgufólkið og grundgevur gjølla fyri kritikkinum við at vísa til, hvussu frásøgufólkið virkar í filmi í mun til teksti, og brúkar hetta sum grundgeving fyri kritikkinum.

Kirsten Brix vísir tó eisini á, at tað hevur eydnast høvundinum væl at fáa eina heild burtur úr samrøðu og hugleiðing, og eisini her sannførir hon lesaran við dømum úr tekstinum. Hon sigur tað vera eina styrki í bókini, at persónarnir eru meira rundir, enn teir mangan eru innan krimitekstslagið.

Samanumtikið heldur Kirsten Brix, at bókin hevur lýti, men eisini dygdir, sum kundu trinið betur fram, um bókin var væl ritsjórnað. Hetta nýtir Kirsten Brix sum høvi til at siga nakað yvirskipað um tað, sum hon heldur vera løgið við, at skrivandi fólk skulu vera tey einastu, sum ikki fáa útbúgving líka sum øll onnur listafólk. Sum um *orðið* ikki hevur tørv á líka nógvari professionalismu sum leir og nótar, um tað skal vera list, sigur hon.

Kirsten Brix kemur við uppskotum um, hvussu vit kundu skipað skrivivirksemi, har eitt umhvørvi var fyri høvundar at skriva í Føroyum, og endar við at siga, at tað er ikki tí, at mann kann læra til at blíva ein góður høvundur. Talentið skal jú til, men at skriva er kortini eisini eitt handverk (Brix 1999a).

Her nýtir Kirsten Brix sostatt ummælið sum pall til at siga, at nakað liggur henni á hjarta viðvíkjandi umstøðunum hjá teimum skrivandi í Føroyum. Tað er áhugavert, at hon í veruleikanum sigur nakað, sum líkist tí, sum Kim Simonsen sigur í ummælunum av Oddvør Johansen og Dagny Joensen: at teimum vantar eitt grundskeið í ávikavist modernaðari realismu (Simonsen 2005b) og at skriva skaldsøgur (Simonsen 2005d). Grundleggjandi munurin er tó, at meðan Kim Simonsen staðfestir ein tørv hjá jústhesum báðum kvinnum, so setir Kirsten Brix tað upp sum ein almennan yvirskipaðan trupulleika.
Samanumtikið standa hesi trý ummælini sum mótvekt til tað, sum

Carl Jóhan Jensen, Kim Simonsen og Agnar Jógvansson siga um kvinnubókmentir og um tveir av teimum somu høvundunum, sum Guðrun Gaard, Vár í Ólavsstovu og Kirsten Brix ummæla. Tað liggur ein staðfesting í, at ummælini eru prentað í *Kvinnutíðindi* við Kvinnufelagnum í Havn sum útgevara, og ummælini eru eisini sum heild øðrvísi enn tey hjá teimum trimum monnunum. Hóast Guðrun Gaard eisini er rithøvundur, so eru tær tríggjar akademikarar, og tað endurspeglast meira og minni í ummælunum. Teir tríggir nevndu kallkynsummælararnir eru eisini akademikarar, men kanska fyrst og fremst rithøvundar og nýta møguliga ummælini av kvinnunum til at rudda sær sess sum høvundar; til at taka frástøðu frá realistiskum skaldskapi, ið tekur útgangsstøði í gerandisdegnum hjá kvinnum. Menninir góðtaka ikki tilverutreytina hjá skaldskapinum hjá hesum kvinnum og vilja hava tær antin at skriva um okkurt annað ella at gevast við at skriva. Kvinnurnar góðtaka tilverutreytirnar hjá skaldskapinum og kritisera út frá tí. Tær eru kritiskar, men góðtaka treytirnar, tekstirnir eru skrivaðir út frá.

Tað er áhugavert, at henda serútgávan av *Kvinnutíðindi*, sum Guðrun Gaard, Vár í Ólavsstovu og Kirsten Brix ummæla í, skuldi vísa seg at vera higartil seinasta blaðið hjá *Kvinnutíðindi*. Er tíðin farin frá einum slíkum blað? Ella vitna ummælini av kvinnum um, at vit enn hava tørv á einum blaði sum *Kvinnutíðindi*, ið seinast kom út um aldarskiftið?

Carl Jóhan Jensen er speiskur, tá hann sigur um kvinnuligar høvundar og ummælarar teirra:

> Fund-, ikki fyndvísar. Høgligir vindar halda teimum uppi. Uppi í luftini, men ikki alt ov høgt uppi. Tær danda. Lagaligar. Dansa aftur og fram uppi yvir nærindisvíddum hugans við mjúkum rørslum og snúningum sum pappírsdrekar ein sólskinsdag. Og tær hava serar gávur at taka drekar sínar á flog. Ymsar skrivandi kvinnur í Føroyum og ummælarar teirra (Jensen, Carl Jóhan 1997).

Hetta kann lesast sum ein beinleiðis viðmerking til tað, at kvinnur ummæla kvinnur, sum tær til dømis gera í *Kvinnutíðindi*.
Vit síggja í mongum førum menn siga, at kvinnur skuldu gjørt okkurt

annað, enn tær gera. Kim Simonsen sigur, at Sigri Gaïni skuldi yrkt sum Henrik Nordbrandt (Simonsen 2004d), Carl Jóhan Jensen sigur, at Bergtóra Hanusardóttir skuldi givist at skivað (Jensen 2006b) og Agnar Jógvansson sigur, at Oddvør Johansen skuldi farið og arbeitt í urtagarðinum (Jógvansson 2005b).

Sjáldan síggja vit kvinnur siga tað sama um menn, men eina ferð í tíðarskeiðinum 1997-2007 síggja vit Maluna Marnersdóttur venda retorikkinum. Hon sigur um Gunnar Hoydal:

> Mundi hann vera liðugur við endurminningarnar hjápápanum [sic]. Mundi hann ikki sjálvur fara at skriva ta stóru samfelagsskaldsøguna um seinnu helvt av 20. øld, sum hann hevur sóknast eftir? Og so kom *Havsins hjarta*. Og sjálvandi. Mamman og familjan hjá henni vóru eftir. Ikki bara mamman, eisini omma og abbi hennara, altso langomma og langabbi høvundin fáa sína søgu (Marnersdóttir 2007).

Her er týðiligt, at Malan Marnersdóttir heldur, at Gunnar Hoydal átti at skrivað um okkurt annað.

Í sambandi við spurningin, um tørvur enn í dag er á einum kvinnublaði, har kvinnur ummæla kvinnur, er tað áhugavert, sum eg áður havi vístá[102], at Horace Engdahl kritiserar tað rák, sum er komið inn í ummælaravirksemi í dag, og sigur:

> Man beretter om sin mormor. Man taler lidt om sine veninder, og man runder af med nogle replikker, som man har hørt en kendt person sige. Det er en måde, hvorpå man får skrevet en underholdende artikel, som egentlig ikke har en pind med kritik at gøre, men som måske er blevet den normale måde at skrive kritik på i dag (Stidsen 2018:34).

Kvinnubókmentir og kvinnuligir ummælarar eru ikki fokus í hesari útsøgnini hjá Horace Engdahl, men tað er hugvekjandi, at orð hansara um tann spilta stílin í ummælunum í dag hava ikki so lítið av

102 Sí kap. 7 um Kinnu Poulsen sum ummælara.

kynsdiskriminerandi undirtónum í sær, við tað at tað júst eru *omman* og *vinkonurnar*, ið standa fyri skotum. Hugburðurin til skrivandi kvinnur tykist ikki vera broyttur: tað eru kvinnurnar, sum standa fyri tí spilta kritikkinum.

Fyri at taka samanum kapittulin um ummæltar og ummælandi kvinnur og spurningin, um tað er munur á, hvussu kvinnur og menn ummæla kvinnur, er svarið kanska, sum vera man, at menn eru ymiskir, og kvinnur eru ymiskar, og tí ber ikki til at skera alt yvir ein kamb. Men hyggja vit at teimum monnum, sum vanvirða kvinnulig evni í bókmentum, so er greitt, at tann stóri munurin er, at kvinnurnar góðtaka tær fortreytir, sum hesir menn ikki góðtaka, og tí verða ummælini øðrvísi. Ummælini eftir kvinnurnar eru sum oftast ikki lagaligari, tí tær kritisera eisini hvørja aðra hvassliga, hóast tær velja ein eggjandi tóna heldur enn ein vanvirðandi tóna. Í so máta ger henda kanningin útsøgnina hjá Carl Jóhan Jensen um teir høgligu vindarnar, sum halda kvinnunum uppi, altso, at kvinnur gera tað lætt hjá hvørji aðrari at vera rithøvundar, til skammar. Tónin er virðiligari og í einum eggjandi tóna, sum William Heinesen talaði fyri, men krikkurin er har framvegis, hóast tær ikki biðja hvørja aðra gevast at skriva, sum sambært Russ er endamálið í teirri ráðandi mansdomineraðu bókmentasiðvenjuni.

List í sjálvum sær

Ummælaravirksemi verður nýtt til annað enn bert at viðgera og til- ella fráráða eina bók. Tískil er tað ikki av ongum, at Sissel Furuseth lýsir rithøvundarummælararnar sum ein ummælarabólk, ið kann hava óhepnar dupulleiklutir við at nýta sítt ummælaravirksemi til at rudda sær sess í bókmentaalmenninum og fóta sær sum fagurbókmentaligir rithøvundar (Furuseth 2015:14-15).

Rithøvundarummælarar hava ofta eitt tillutað vald í bókmentaalmenninum, sum kanska er størri enn tað hjá øðrum ummælarum (Furuseth 2015:26), og hugsanin um, at rithøvundar ikki eiga at ummæla rithøvundar í sínari egna ættarliði, tí egináhugamálini á økinum kunnu vera ov stór, er ikki óvanlig. Sjálvt ummælarar og bókmentafrøðingar, sum seta spurnartekin við dupulleiklutin hjá rit-

høvundinum sum ummælara (Forser 2005), eru, sum eg havi vísk á[103], tó ikki eintýðugt kritiskir. Tí hóast dupulti leikluturin er ein hóttan, so er ummælarastílurin hjá rithøvundarummælarum í mongum førum ein góð mótvekt móti tí flata ummælaravirkseminum, sum er farið at eyðkenna tíðindaflutningin, har pláss er týdningarmeiri enn innihaldið – at skriva stutt og beinrakið, sigur Sissel Furuseth (Furuseth 2015:15-16). Rithøvundarummæli kunnu vera undirhaldandi, og skaldskapur kann spyrjast burturúr. Harafturat spyr Sissel Furuseth, sum eg havi vísk á[104], um tað ikki júst er í rithøvundarummælaranum, at vit skulu síggja útvegin úr teirri kreppu, sum ummælini verða søgd at vera í; um tað ikki er í rithøvundarmyndugleikanum, at vit mugu vinna ummælaraleiklutinum valdið aftur (Furuseth 2015:25).

Í hesum kapitlinum verða trý rithøvundarummæli sett fram sum dømi um ummæli, ið stinga burtur úr mongdini av ummælum frá tíðarskeiðinum 1997-2007, tí tey á serligan hátt halda fram í listaliga stílinum í teimum verkum, sum tey ummæla. Tey hava tær fortreytir, sum Sissel Furuseth metir kunnu lyfta tekstslagið, og standa harvið sum mótvekt til tað ummælaravirksemi, ið verður sett fram sum ein orsøk til miðlaskaptu kreppuna, ummæli eru í. Tey trý ummælini, ummælið hjá Heðini M. Klein av skaldsøguni *Í havsins hjarta* (2007) eftir Gunnar Hoydal, ummælið hjá Gunnari Hoydal av skaldsøguni *Páskaódnin* (1997) eftir Jóanes Nielsen og ummælið hjá Alexanduri Kristiansen av yrkingasavninum *Pentur* (1998) eftir Jóanes Nielsen, eru dømi um tekstir við listaligari tyngd, ið ger, at tey kunnu virka sum sjálvstøðugir tekstir, hóast teir taka støði í øðrum teksti. Samanburður verður gjørdur við ummæli eftir aðrar ummælarar um somu tekstir, tá hann kastar ljós á týðandi evni.

Heðin M. Klein ummælir Gunnar Hoydal

Eitt av teimum ummælunum, sum eg eri komin fram á, ið ikki eru skrásett hjá Landsbókasavninum, er ummælið hjá Heðini M. Klein (f. 1950) av skaldsøguni *Í havsins hjarta* (2007) eftir Gunnar Hoydal. Bókin er eitt av høvuðsverkunum, sum komu út í Føroyum í tíðarskeiðinum

103 Sí kap. 5 um bókmentaligt sjónarhorn.
104 Sí kap. 6 um at skapa mentanarligan myndugleika.

1997-2007, og tað sæst aftur í, at hon fekk fleiri ummæli enn flestar aðrar bøkur – heili fimm trivalig ummæli, sum Heðin M. Klein, Jógvan Isaksen, Malan Marnersdóttir, Bergljót av Skarði og Guðrun Gaard hava skrivað. Ummælið hjá Heðini M. Klein eitur: „Havsins aldandi pulsur“, og tað skilir seg frá hinum ummælunum við at vera merkt av, at tað er rithøvundur, og kanska yrkjari, sum hevur skrivað tað. Hini ummælini eru í størri mun merkt av, at tey eru skrivað av bókmentafrøðingum.

Ummælið hjá Heðini M. Klein er skaldsligt í framsetingini, yvirskriftin er ein umskriving av titlinum á bókini, sum verður til „Havsins aldandi pulsur“, ein dýping av hjartanum sum myndburði. Eginleikar hjartans verða tiknir fram; hesin likamslutur, sum ásetir pulsin, og sum syrgir fyri, at lív er: „Tað eru sterkar kenslur, sum bylgjast aftur og fram og upp og niður í havsins aldandi hjarta, í bráðskiftinum millum fortíð og nútíð og millum realia og fiktión“ (Klein 2007). Ummælarin nýtir skaldsligar orðingar og myndburðir:

> Mær tykir, at Gunnar Hoydal hevur tikið eitt ódnartak, at endurminnast, endavenda, skipa og gjøgnumkomponera alt tað mikla tilfarið, sum hann higartil hevur tikist við sum rithøvundur, saman við tí, sum enn hevur ligið úti undir væðingini upp á hugans ovastalofti. Tað hevur eydnast honum at fáa tað at ljóma og darra í eini organiskari heild (Klein 2007).

Hugurin verður samanborin við eini hús, har tað, sum liggur longst burtur í minninum, verður samanborið við væðingina – ovastaloftið. Lýsingin av, hvussu verkið hevur eydnast høvundinum, verður lýst við orðum úr tónleiki; ummælarin sigur, at høvundurin fær tað at *ljóma* og *darra* og ber bókina saman við eitt symfoniskt verk, eina polyfoni.

Her sæst, at ummælarin er rithøvundur/yrkjari. Hann nýtir skaldsligt mál; ger samanberingar og skapar myndburðir, sum lyfta tekstin upp um hetta bara at vera ein tekstur um ein annan tekst. Hann nýtir stavrím, tá hann tosar um føroyskar studentar, sum komu saman í einum trongum kjallararúmi at mynda landsins *framtíð og frama*.

Virðismetingin sæst í teimum ávístu virðisløddu orðingunum í tekstinum um at fáa tað at eydnast og at blása lívsanda í persónarnar, og

hon sæst eisini aftur í orðinum, sum stendur einsamalt í einum setningi: „Tíbetur“. Tíbetur, sigur hann, er Gunnar Hoydal í skaldsøguni í sínum persónslýsingum eftir føroyskum máti opinskáraður og naskur, tí hetta er tað, sum gevur endurminningarpartinum tað kjølfesti og ta fiktiónstyngd, sigur Heðin M. Klein, sum flytur hann burtur úr tí privata yvir í tað alment menniskjaliga, sum krevst til at minna okkum á, at hetta er skaldskapur, ið krevur at liva sítt egna lív og hevur sínar egnu lógir. Eitt góðskukriterium er sostatt, at bókin megnar at flyta seg úr tí privata og yvir í tað alment menniskjaliga.

Heðin M. Klein endar ummælið við einum lyfti til lesaran: „Tit, sum fara at lesa bókina, kunnu gleða tykkum“, og hann javnsetir síðani høvundin við skaparan, sum kann blása lívsanda í menniskjuni: „Bæði í tí ljósa og tí dapra, í neyðini og í bjartskygni evnar høvundurin at blása lívsanda í høvuðspersónar sínar, so teir á bókabløðunum vakna til lívs, vekja áhuga lesarans og røra hjørtu okkara“ (Klein 2007).

Heðin M. Klein telur bókina upp í høvuðsverkini millum skaldsøgur á føroyskum, og soleiðis ger hann bókina til ein part av tí føroyska bókmentastovninum og letur tað hava týdning, at hon er føroysk.

Bera vit ummælið hjá Heðini M. Klein saman við ummælið hjá Maluni Marnersdóttur av somu skaldsøgu, hevur ummælið hjá henni fingið heitið „Stovnsfæið“ eftir hugtaki frá danska yrkjaranum og ummælaranum Per Højholt (1928-2004), sum snýr seg um, at høvundar eiga at halda seg frá at skriva um endurminningarkjarnan. Við hesum sæst ein grundleggjandi munur á metingarkriterium. Har Heðin M. Klein tekur ímóti hesi skaldsøgu, ið eigur sítt natúrliga pláss sum eitt av høvuðsverkunum í føroyskum skaldskapi, nýtir Malan Marnersdóttir eitt metingarkriterium uttanífrá – úr danska bókmentaheiminum, og setir tað sum yvirskrift í sínum ummæli. Malan Marnersdóttir nýtir hetta sum høvuðskriterium fyri sínari lesing og meting av bókini, at bókin grundleggjandi ikki ger tað, sum hon skal. Hon kallar seg skaldsøgu, men er ov nær knýtt at veruleikanum, og tað ger, at persónarnir ikki fáa lív, sigur Malan Marnersdóttir. Hetta stendur í andsøgn við tað, sum Heðin M. Klein

í einum religiøsum tóna sigur um persónarnar, at teir hava fingið lívsanda íblástan.

Heðin M. Klein tulkar brotið úr bókini, har sagt verður um ommuna, at hon tekur alt uppaftur, sum hon longu hevði sagt fleiri ferðir, sum sjálvspei hjá høvundinum (Klein 2007), meðan Malan Marnersdóttir troyttast av, at Gunnar Hoydal sigur „somu søgu“ aftur hesa ferð (Marnersdóttir 2007).

Ummælið hjá Maluni Marnersdóttur er merkt av, at ummælarinnan ikki fekk tað, sum hon hevði vónað og kanska serliga væntað av hesi skaldsøgu:

> Síðani *Dalin fagra* havi eg spent bíðað eftir, hvat Gunnar Hoydal nú fór at skriva. Mundi hann vera liðugur við endurminningarnar hjá pápanum? Mundi hann ikki sjálvur fara at skriva ta stóru samfelagsskaldsøguna um seinnu helvt av 20. øld, sum hann hevur sóknast eftir? (Marnersdóttir 2007).

Her avdúkar Malan Marnersdóttir, at hon eftirlýsir okkurt heilt serligt, og tað staðfestir hon eisini í endanum á ummælinum, tá hon spyr: „Hvussu við eini meira íspunnari søgu?“.

Hetta er eisini tað, sum hon sigur vera álvarsamasta vónbrot sítt, nevniliga at *Í Havsins hjarta* er meira ein frágreiðing enn ein skaldsøga. Hennara vónbrot og avvísing av bókini í tí líki, sum hon er útkomin, endurspeglast kanska best í teirri sannroynd, at Malan Marnersdóttir gjøgnum alt ummælið endurgevur heitið á bókini skeivt. Hon kallar bókina *Havsins hjarta* og ikki Í havsins hjarta, sum hon eitur. Hetta er neyvan tilvitað, men tað kundi tað verið.

Bergljót av Skarði lesur ikki bókina út frá ytri kriterium og út frá tí, sum hon hevði væntað og vónað, men góðtekur fortreytirnar, sum høvundurin hevur sett. Hetta orðar hon eisini beinleiðis og ger sær ómak at royna at bólka hana sum skaldsøgu:

> og lesarin má eisini virða, at hetta er ein skaldsøga, sum tað stendur á tittulblaðnum og ikki ein søgubók ... Bókin hevur undirheitið skaldsøga. Hvat slag av skaldsøgu er hetta so? Ivalest lýkur hon

> treytirnar fyri at vera ein lyklasøga ... Samstundis er hon sjálvævisøgulig (Skarði 2007).

Spurningurin er, um ummælarin lesur sambært fortreytunum, sum verkið setir, ella um hann setir aðrar premissur ella onnur krøv til tekstin. Tað er í hesum grundhugsanum, at ummælini hjá Maluni Marnersdóttur øðrumegin og Heðini M. Klein og serliga Bergljót av Skarði fara hvør sín veg. Bergljót av Skarði keypir treytirnar, sum skaldsøgan setir, um at vera skaldsøga, meðan Malan Marnersdóttir ikki gongur við til premissurnar hjá bókini og eftirlýsir eina veruliga fiktiva bók. Bergljót av Skarði nærlesur bókina út frá hennara fortreytum, meðan Malan Marnersdóttir kemur við ráðum til høvundin um at fara frá tí endurminnandi stílinum, sum Gunnar Hoydal longu hevur gjørt nógv við frammanundan, millum annað við skaldsøgunum *Undir Suðurstjørnunum* (1991) og *Dalinum fagra* (1999).

Har Malan Marnersdóttir sigur, at søgur um pápan longu eru kendar úr hinum skaldsøgunum (Marnersdóttir 2007), so sigur Bergljót av Skarði, at vit fáa eina nýggja version av ferðini hjá frásøgumanninum til Suðuramerika (Skarði 2007). Meðan Malan Marnersdóttir sigur, at lýsingin av kostskúlatíðini kemur eitt sindur inn undir húðina, men so heldur ikki meira, tí søgan loysist upp (Marnersdóttir 2007), sigur Bergljót av Skarði, at eingin fyrr hevur skrivað um tann stranga kostskúlan í føroyskum bókmentum, nakað sum er vanligt í enskum bókmentum (Skarði 2007). Malan Marnersdóttir skapar sær her myndugleika við at vísa á onnur rák, og at tørvur er á at skifta kós og skriva meira fiktivt, meðan Bergljót av Skarði skapar sær myndugleika við at vísa á tað nýggja, sum kemur inn í føroyskar bókmentir við hesari bókini og at perspektivera hetta til enska hevd. Malan Marnersdóttir hevur eyðkenni hjá *menningarummælaranum*, og Bergljót av Skarði hevur eyðkenni hjá tí *intentionala ummælaranum*[105].

Eg havi í viðgerðini av ummælunum hjá Jógvani Isaksen nomið við, at hann kritiserar serligar partar av skaldsøguni *Í havsins hjarta*

105 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

hjá Gunnari Hoydal, nevniliga teir partarnar, sum eru um ta eldru tíðina. Hann sigur soleiðis um skrivingina:

> Skrivingin hjá Gunnari Hoydal tekur sum heild støði í egnum royndum, og tað er eisini her, at hon er sterkast og mest áhugaverd. Tá ið hann so fer hundrað á aftur í tíðina og vil lýsa eini donsk prestahjún í Føroyum, roynir at fara inn í hugan á hesum fólkum, so viknar frásøgnin. Hon gerst meiri vatndeyv, fer í støðum at líkjast eini fólkalívslýsing, og tað er als ikki sama plúmm í henni sum annars (Isaksen 2007a).

Lesur tú ummælið hjá Berljót av Skarði eftirfylgjandi, loypur tað í eyguni, hvussu nógv øðrvísi hetta ummæli er enn tað hjá Jógvani Isaksen.

> Tann nýggja skaldsøgan hjá Gunnari Hoydal „Í havsins hjarta“ er sera væl skrivað, serliga teir partarnir av bókini, sum fyri tað mesta eru um eldri tíð ... Sum tíðin líður, og vit nærkast okkara egnu tíð, verður nertiræðslan meira eyðsýnd. Setningarnir gerast styttri og meiri varnir, teksturin verður meiri skrásetandi og minni metandi og njótandi og skapandi. Persónslýsingarnar kámari og meiri undirskiltar. Speisemi sum verja ímóti nútíðini og egnum kenslum er eisini sjónskari í teimum pørtum av bókini, sum er um okkum sjálvi (Skarði 2007)

Jógvan Isaksen og Bergljót av Skarði eru grundleggjandi ósamd um, hvør styrkin við bókini er, og kriteriini fyri góðsku verða eisini í báðum førum lutvíst lýst. Kriteriið hjá Jógvani Isaksen er í samsvari við kritikkin hjá Maluni Marnersdóttur, tá hann sigur, at partar av bókini líkjast einari fólkalívslýsing. Eg kann illa ímynda mær, at Jógvan Isaksen sær nakað galið við einari fólkalívslýsing, men hann heldur ikki, at hon hoyrir heima í einari skaldsøgu. Kriteriini hjá Bergljót av Skarði eru onnur; hon hevur góðtikið tekstslagið og teir ymisku frásagnarstílirnar og setir krøv til tað meira skapandi, og sambært hennara hugsanarhátti er tað skapandi ikki neyðturviliga tongt at, um skaldskapurin liggur nær veruleikanum ella ikki, men

um skaldskapurin megnar at fara frá tí meiri skrásetandi og til tað meiri metandi, njótandi og skapandi.

Guðrun Gaard, sum í sínum ummæli liggur onkrastaðni ímillum hesar báðar hugsanir, sigur bókina vera eina „hugfangandi skaldsøgu“, og við yvirskriftini vísir hon, at hon góðtekur samansetingina, hóast stíllegan er skiftandi og umboðar bæði listaliga skapta fiktión á høgum stigi og tekst, sum er turrisliga dokumentariskur. Guðrun Gaard nevnir, ógvuliga sigandi fyri metingina, sítt ummæli við einum myndburði „Eitt marglitt bregdað band“ (Gaard 2007).

Bergljót av Skarði ikki bara góðtekur samansetta stílin, men fagnar skriviháttinum: „Tað er undrunarvert [sic], so væl Gunnar dugir at skriva fleiri søgur í senn og fáa tær at hanga saman“ (Skarði 2007).

Guðrun Gaard setir í sínum ummæli orð á tað, sum ummælarar kritisera bókina fyri, nevniliga endan, har fólkafundur verður hildin á Slættaratindi:

> Tveir fólkafundir taka samanum hana at enda ... Hin seinni ... er meira lýstur sum ein vónrík gonga inn í framtíðina. Lagið har kann tykjast í so patoskent, tí at okkara modernaða politiska sakligheit og øðrvísi globaløkonomiska tankagongd krevur annað lag, men tað veldst jú um eyguni, sum síggja! (Gaard 2007).

Guðrun Gaard setir orð á tað, sum skilir ummælararnar í virðisdómi teirra av endanum á søguni, og hóast hon eisini kritiserar, at politiski boðskapurin ella politiska metingin í støðum fær ein, kanska tilætlaðan, góðvarnan dám, so vísir hon á, at tað veldst um eygað, sum sær. Tað sama er galdandi fyri ummælararnar; tað er ymiskt, hvussu eygað sær júst henda táttin í skaldsøguni. Jógvan Isaksen heldur endan á bókina vera *patetiskan*, og at ein religiøsur tóni er her, sum ikki pyntar bókina. Hann sigur í brotinum, sum hann við einari bíbilskari tilvísing eisini nevnir „Fjallaprædikuna“:

> Lýsingin er ikki sørt patetisk, og lesarin kennir tað næstan, sum hann er ávegis á ein vekingarfund, har eitthvørt umboð fyri frelsaran skal tala ... Eftir mínum tykki pyntar religiøsi tónin ikki, men fyri høvundin er sjálvstýrismálið greidliga tann avgerandi tilveruspurningurin, sum alt annað melur uttan um. Fyri hendan lesaran eru tað lýsingarnar av øllum hinum, sum bera bókina (Isaksen 2007a).

Í hesum kritikkinum fjalir Jógvan Isaksen ikki, at hann og Gunnar Hoydal eru grundleggjandi ósamdir, tá tað kemur til, hvussu týdningarmikið sjálvstýrismálið er, og at politiski boðskapurin í bókini lýtir hana. Hinvegin er tað ikki óhugsandi, at ein av orsøkunum til, at Heðin M. Klein rósar verkinum til skýggja, er, at skaldsøgan skrivar seg inn í eina søgufatan, sum hóskar væl inn í politisku fatan hansara. Bergljót av Skarði endar sítt ummæli av bókini við sitatinum úr bókini „hví landið ikki vil vera land“ og góðtekur ella tekur undir við tí tjóðskaparligar boðskapinum í bókini, sum byggir á eina heildarfatan av menningini í tí føroyska samfelagnum, ella rættari, sum setir spurnartekin við, hví so lítil menning hevur verið í tí føroyska samfelagnum. Hetta merkir ikki, at Bergljót av Skarði als ikki kritiserar bókina. Tað ger hon. Hon kritiserar nertiræðsluna í lýsingini av nútíðini, og at lesarin kennir seg hildnan fyri gjøldur av at skula lesa um landið og hitt landið og so sjálvur skula seta Føroyar og Danmark inn í staðin. Grundleggjandi tekur hon tó undir við premissunum, sum bókin setir. Móttøkan av skaldsøguni *Í havsins hjarta* er gott dømi í føroyskum bókmentum um, at tjóðskaparlig hugsjón litar ummælini. Hóast eingin av hesum ummælarum kann bólkast sum *ideologiskur ummælari*[106], so er hetta dømi um, at politisk hugsjón myndar part av virðisdóminum av verkinum.

Móttøkan av skaldsøguni *Í havsins hjarta* er lýsandi dømi um, at ummælarakriterii eru avgerandi fyri, hvussu ein bók verður ummælt, og eitt framúr dømi um mótsetningin millum tað almenna gildið og subjektivismuna í dóminum, sum Nøjgaard sigur í grein um bókmentaliga meting (Nøjgaard 2003:293); at ummælarar við eins góðum førleikum at ummæla kunnu vera grundleggjandi ósamdir í sínum virðisdómi. Tey, sum hava ummælt bókina, eru høgt útbúnir bókmentafrøðingar, og tað er ikki so, at útbúgvingin einsamøll

106 Sí kap. 5 um journalistiskt sjónarhorn.

stýrir, hvørjum kriterii ummælt verður eftir. Hetta er eisini gott dømi um tað, sum Oddfríður M. Rasmussen sigur um tað at ummæla objektivt sum ein subjektiv vera og at stremba eftir at grundgeva fyri sínum metingum (Rasmussen 2011). Virðisdómurin gevur nevniliga meining fyri lesaran, tá hann skilir metingarkriteriini, og ger hann tað, kann hann vera samdur ella ósamdur við ummælaran út frá hesum kriterium.

Ummælararnir skapa sær myndugleika hvør í sínum lagi við at vísa til ritverk, bókmentarák, skrivihátt o.s.fr. Allir ummælarar vísa, at teir kenna ritverkið hjá Gunnari Hoydal frammanundan og kunnu seta tað ummælta verkið í samband við tað. Malan Marnersdóttir skapar sær harumframt myndugleika við at vísa tilvit um, hvat høvundar, sum skriva fagrar bókmentir, eiga at skriva um. Bergljót av Skarði skapar sær myndugleika við at vísa seg sum ein gløggan lesara, ið setir seg inn í tekstin og góðtekur premissurnar í tekstinum. Guðrun Gaard skapar sær myndugleika við á objektivan hátt at síggja báðar síðurnar, at vísa á listaliga dygd og á, at frásøgnin í støðum gerst ov pathoskend. Hon góðtekur tó heildina. Jógvan Isaksen skapar sær myndugleika við at vísa førleikar at meta um bygging og skrivistíl. Her spælir tað eisini ein leiklut, at hann er skaldsøguhøvundur sjálvur og júst fæst við skaldskap – krimiskaldskap – sum „plúmm“ er í. Hetta er ein orðing, hann nýtir, og ein eginleiki, sum sambært honum manglar, í hvussu er í støðum í bókini hjá Gunnari Hoydal.

Hóast Jógvan Isaksen og Guðrun Gaard kunnu bólkast sum rithøvundar, tann seinna sum barnabókahøvundur, so brýtur Heðin M. Klein sum rithøvundarummælari frá øllum hinum, ið ummæla skaldsøguna eftir Gunnar Hoydal, hóast Heðin M. Klein eisini skrivar eitt klassiskt ummæli, tá tað kemur til bygging og innihald. Hann kunnar um verkið, greinar, perspektiverar og skapar sær myndugleika við at vísa til formligar fyrimyndir, tá hann kallar verkið eitt symfoniskt verk, og rák, tá hann vísir á ekspressionistiskar lýsingar. Hansara stílur er sum áður nevnt í stóran mun merktur av myndamáli og skaldsligum máli yvirhøvur á høgum stílstigi og við stavrími. Fram um alt tykist hann áhugaður í at seta orð saman og at seta orð á kensluna í bókini. Hetta sæst best endurspeglað í yvriskriftini, har hann dýpir myndburðin í skaldsøguheitinum við at gera havsins hjarta til havsins aldandi puls.

Gunnar Hoydal ummælir Jóanes Nielsen

Í ummælinum hjá Gunnari Hoydal (1941-2021) av *Páskaódnini* (1997) eftir Jóanes Nielsen sæst bæði í viðgerðini av innihaldinum og skrivistílinum og í skriviháttinum í ummælinum sjálvum, at tað er rithøvundur, sum ummælir. Gunnar Hoydal vísir í viðgerðini av bókini á, at tað, sum eyðkennir hana, er tann málsliga og myndaskapandi orkan, og hann nýtir hendingina í byrjanini av bókini, tá Havnará flýtur yvir, sum mynd fyri skrivistílin hjá Jóanesi Nielsen: „tað, sum eyðkennir bókina, er tann málsliga og myndaskapandi orkan, ið næstan sum Havnará sjálv spríkjur [sic] út millum reglurnar og brotini“ (Hoydal 1998). Hetta er skaldsligt mál við dupultýdningi, har brotini bæði eru tekstbrot og aldubrot. Yvirhøvur eyðkennir eitt lætt og skaldsligt mál ummælið, eisini í endanum, tá Gunnar Hoydal aftur lænir eina mynd frá Jóanesi, sum einastaðni sigur, at tær bøkur, ið ikki fanga tey stóru rákini, ta breiðu streymandi ánna, ið ósmæðin rennur tvørtur um landamørkini, áttu heldur at verið trø, ið gjørdu sína nyttu á jørðini. Hesa myndina setir Gunnar Hoydal í samband við skaldskapin hjá Jóanesi Nielsen:

> Tað eru stór krøv at seta, og eg ivist í, um „Páskaódnin“ sum skaldsøga er nóg heilskapað til at renna út um hesi mørkini. Men har eru so nógv føgur bløð á greinunum, og tú hevði ongantíð varnast tey, hevði hann ikki við sínum stóra hjarta umskapað træið og gjørt tað til bók hjá okkum at lesa (Hoydal 1998).

Myndin verður útbygd, og varliga verður samstundis samanumtøkan av virðisdóminum í ummælinum gjørd. Kritikkurin hjá Gunnari Hoydal av bókini er nevniliga, at Jóanes er lyriskt skald. Hann er ikki episkur, í øllum førum ikki í teirri klassisku merkingini. Hann skapar í myndum og brotum, í teimum glógvandi løtunum, og tað eru tær løturnar, hann lýsir sum tey føgru bløðini á greinunum. Gunnar Hoydal vísir eisini á, at Jóanes Nielsen dugir at skriva prosa í stuttum formi, og hann dregur kapittulin „Ein lítil halgisøga“ fram,

endurgevur hana og sigur, at hon er so vøkur, at hon átti at verið lisin hvørt ár upp undir jól. Eisini hon er eitt av føgru bløðunum á trænum. Veikleikin er samansetingin, sigur Gunnar Hoydal, og ofta verða persónarnir sleptir, áðrenn teir eru heilir og hava fest seg.

Ummælarastílurin hjá Gunnari Hoydal er eisini sermerktur og skaldsligur, tá hann metir um lýsingina hjá Jóanesi av tí elskandi menniskjanum:

> Og tað elskandi menniskja? Her er romantikkurin hjá Jóanesi ikki tann sveimandi kærleikin og tann fjari longsulin, men tað heilaga, sum er beint fyri eygunum. Sum tað livandi kynið í konufólki. Har vakna keldurnar, aðrar stóráir fara upp um bakkarnar, og Jóanes er fúlur upp á ein so hjartagrípandi og óskyldigan máta, at einglarnir mugu smílast og fáa hug at mussa hvønnannan, meðan fanarnir standa útivið og gráta (Hoydal 1998).

Gunnar Hoydal nýtir her aftur á skaldsligan hátt myndina av ánni til at lýsa skrivistílin hjá Jóanesi Nielsen, og leggur eina meting inn, sum fyrst og fremst liggur í orðinum *hjartagrípandi*, men eisini í stuttligu myndini av einglunum, sum fáa hug at mussa hvønnannan, meðan fanarnir gráta. Hesin stílur er ikki heilt óávirkaður av orðafarinum hjá Jóanesi Nielsen, og harvið sæst ikki bara ein skaldsligur dámur í tekstinum hjá Gunnari Hoydal, sum er hansara egni, men ein, sum er lagaður til skaldsliga málið hjá Jóanesi Nielsen sjálvum, og til ber at tosa um bókmentaliga ávirkan ella smittu; tað ummælta verkið smittar yvir á stílin í ummælinum á samtykkjandi hátt og ikki eins og aðrastaðni sum keipa og spei.

Hetta ummælið, sum Gunnar Hoydal í 1998 skrivaði av *Páskaódnini*, er næstan sum ein fyriboðan um tey ummæli, sum hann sjálvur árið eftir fekk av *Dalinum fagra*. Eg havi longu lutvíst verið inn á virðismetingini av bókini í lýsingini av Pálli Isholm og Jógvani Isaksen sum ummælarum. Jógvan Isaksen sigur: „Spurningurin er, um Gunnar Hoydal ikki er lyrikarin, ið skrivar prosa, og tí er sterkastur í tí støku myndini, meðan tann episki streymurin hevur hug at hvørva“ (Isaksen 1999a). Tað er, sum Gunnarsa egnu orð um Jóanes Nielsen

runga í ummælinum hjá Jógvani Isaksen av Gunnari Hoydal árið eftir.

Bera vit ummælið hjá Gunnari Hoydal saman við onnur ummæli av *Páskaódnini* hjá Jóanesi Nielsen, er tað í serstøðu, tá tað kemur til stíl. Ólavur í Beiti skrivaði eisini eitt ummæli av bókini, „Páskaódn og páskaóhumska“, sum snýr seg meira um viðurskifti, sum hava við framleiðslu, útgávu og ritsjórn at gera, enn við sjálvan tekstin. Høvundurin Jóanes Nielsen verður lagdur undir at brúka Ebbu Hentze til at koma sær fram; at fáa hana at hjálpa til, so hann kann verða tilnevndur til virðisløn. Í mótummæli vísir Jóanes Nielsen ábreiðsluni aftur. Hann kallar mótummælið „Viðmerking til eitt „ummæli““ og sipar við gásareygunum til ummælið hjá Ólavi í Beiti, sum hann frá einum bókmentaligum sjónarhorni ikki heldur vera nakað at rópa hurrá fyri (Nielsen 1997b).

Hini ummælini av bókini hava Sonja Jógvansdóttir, Sjúrður Gullbein og Eyðun Jacobsen skrivað. Í sínum virðisdómi av bókini sigur Sjúrður Gullbein (f. 1968) eisini um Jóanes Nielsen, at tað er myndamálið, sum Jóanes dugir best. Júst henda reglan úr ummælinum lýsir væl munin millum skaldsligu lýsingina hjá Gunnari Hoydal av skrivistíli Jóanesar og tann gerandisliga dámin, sum er í ummælinum hjá Sjúrði Gullbein:

> Skulu vit taka tað fyrst, sum Jóanes eftir mínum tykki dugir nógv best, so er tað myndamálið. Hann er heldur ikki yrkjari fyri einki. Hann dugir at lýsa vanligar gerandismyndir við líka so vanligum gerandisorðum, og kortini situr tað ofta ótrúliga væl. Tað er so einfalt og líkatil, at tað verður næstan menniskjaligt. Sólin er ikki yndisliga fagurreyð ella okkurt annað fínt – nei, hon er bara reyð sum kettjup. Verðsgóð! (Gullbein 1997).

Sonja Jógvansdóttir (f. 1977) skrivar eitt ummæli, sum hevur impressionistiskan dám og letur seg ríva við av tí, sum hon lesur úr bókini. Hetta sæst bæði aftur í forminum á ummælinum, sum er langt og frítt í forminum, og í, at hon av evni, sum hon er serstakliga áhugað í sjálv, gloymir seg burtur úr skaldsøguni og fer at umrøða

sjálvt evnið. Hetta brotið endar hon við at siga: „Nú fór eg av breytini eina løtu“ (Jógvansdóttir 1997).

Málsligi stílurin hjá Sonju Jógvansdóttur er gerandisligur, og hann sæst kanska best aftur í lýsingini av kapitlinum „Ein lítil halgisøga“, sum Gunnar Hoydal eisini tekur fram:

> Harafturímóti tykist „Ein lítil halgisøga“ sum eitt hæddarpunkt í søguni, ella í øllum føri seinna helvt av hesum kapittlinum [sic]. Í byrjanini hoyra vit um bukkur og lort. Rættiliga stuttligt er tað í støðum ... Vit sýggja [sic] ein so ófantaliga menniskjaligan Oskar Íslending (Jógvansdóttir 1997).

Impressionistiski stílurin hjá Sonju Jógvansdóttur sæst eisini aftur í hennara lýsing av, hvussu hon upplivdi bókina, til dømis at hon var „rættiliga paff eftir at hava lisið skaldsøguna“. Gunnar Hoydal sigur um Jóanes, at hann er lyrikari, og Sonja Jógvansdóttir sigur nakað tað sama á ein gerandisligan hátt: „Noyðist áðrenn eg fari víðari skoyta uppí, at mær dámar betur yrkingar Jóanesar enn blaðgreinar, skald- og stuttsøgur hansara“ (Jógvansdóttir 1997).

Eyðun Jacobsen, skrivar eisini eitt ummæli av bókini og kemur mest inn á skrivistíl í sínum ummæli, ið nevnist „Ein rættilig narrifisa“. Hann sigur í stuttum, at hann las bókina spentur, men var skuffaður, tí bókin ikki livir upp til tað, sum hon leggur upp til: at vera krimisøga (Jacobsen 1998). Hann kritiserar eisini byggingina í bókini fyri ikki at hanga nóg væl saman.

Samanumtikið er størsti munurin á teimum ymisku ummælunum av *Páskaódnini* ikki metingarkriteriini og metingin sum heild av bókini, men skrivistílurin. Tað eru ikki bókmentafrøðingar fyrst og fremst, sum hava ummælt hesa bókina, eins og tá talan er um *Í havsins hjarta*. Hetta sæst eisini aftur í ummælarastílinum, sum er meira gerandisligur, impressionistiskur og minni akademiskur vísandi til bókmentarák. Málsliga stílstigið er lægri, og metingin fyllir nógv. Hetta er í samsvari við gerandisliga skrivistílin hjá Jóanesi Nielsen, sum er ein fólksligur rithøvundur, ið hevur ein breiðan lesaraskara.

Tað ummælið, sum stingur burturúr, er ummælið hjá Gunnari Hoydal. Orsøkin er hansara skaldsligi stílur, har framsetingin sjálv er eins týdningarmikil og innihaldið. Hetta skapar eitt tilvit um sjálvt ummælið og gevur tí eina støðu sum sjálvstøðugur tekstur. Ummælið er viðgerð av list, men er um somu tíð ein tekstur, sum hevur listaligt virði í sjálvum sær.

Alexandur Kristiansen ummælir Jóanes Nielsen

Ummælið hjá Alexanduri Kristiansen (f. 1949) „Við báðum beinum mitt í lívinum“ av *Pentum* (1998) eftir Jóanes Nielsen er eisini dømi um eitt rithøvundarummæli, sum hevur listaligt virði sum tekstur í sjálvum sær. Tað byrjar við at seta spurnartekin við tað, sum ofta verður sagt, at yrkingar ikki verða lisnar. Tær eru nevniliga ein partur av okkum frá fyrsta degi við ramsum og skjøldrum, og summar yrkingar verða lisnar, nevniliga tær hjá Jóanesi Nielsen. Alexandur Kristiansen sigur orsøkina vera, at yrkingarnar hjá Jóanesi Nielsen eru viðkomandi fyri onnur menniskju, og tey kenna seg aftur. Hann torir, har onnur tiga, og hann ikki er bangin fyri at skemta og seta seg sjálvan í veð.

Alexandur Kristiansen brúkar long sitat sum grundgeving fyri sínum útsagnum – ikki til at vísa á góðsku, men til at dýpa sínar útsagnir. T.d. setir hann yrkingina „Krúnraka tær“, har yrkjaraegið vamlast við sín egna kropp, sum dømi um sjálvironiina hjá Jóanesi Nielsen. Alexandur Kristiansen setir eisini sitat fram eftir danska bókmentafrøðingin Carl Roos (1884-1962), sum vísir á tað umráðandi í júst tí, at eitt skald er frítt og kann tosa um alt. Tað kann siga tað, sum tey flestu blúgv goyma inni við seg sjálv.

Alexandur Kristiansen setir fram eina mynd, sum kom til hansara, eftir at hann hevði lisið savnið. Myndin er av Jóanesi. Hann leitar sær ikki eins og aðrir yrkjarar inn undir væðingina, út í onkran útbygning, karnapp ella kvist, har teir fáast við sínar abstraktu yrkingar og minni penu sonettur, ella har teir júka upp í saman sínar sálmar ella sangir við ella uttan skil. Jóanes Nielsen heldur seg til miðjuna av húsinum, sigur Alexandur Kristiansen. Hann heldur til í teimum rúmunum, har tað veruliga lívið verður livað, og hann hevur sína gongd millum køkin, kummuna og kamarið, og ger kanska eitt rend

út á altanina viðhvørt. Hetta er bæði ein stuttlig og sera lýsandi mynd av Jóanesi Nielsen sum yrkjara, og lýsingin er eisini borin fram av einum listamanni:

> Hann hevur sína gongd millum køkin, kummuna og kamarið, ger kanska eitt rend út á altanina viðhvørt, skal hann hava íblástur til eina yrking um hitt veruliga lívið, ið livað verður úti á havinum ella á kaiini ella í gøtunum í heimbýi hansara. Ikki tí, har úti kann hann eisini finna upp á at lata seg úr stivlunum og stevna út í myrka einsemið millum stjørnurnar. Men hann hvørvur ongantíð heilt, kemur altíð afturíaftur. Tí her eru onnur *k*, ið draga: kjallarin, kloakkirnar, ja, sjálvt krossurin, ið tykist lýsa av nógv størri kærleika og virðing fyri lívinum hjá honum enn í nøkrum katedrali (Kristiansen 1999).

Henda lýsing av skaldsliga heiminum hjá Jóanesi er listalig í sjálvum sær, sett upp sum ein søga, har stavrímini seta dagsskránna og út frá hesum k-unum verður listaheimurin hjá Jóanesi Nielsen málaður.

Lýsingin er eisini áhugaverd, tá hugsað verður um ummælið hjá Heðini M. Klein av *Í havsins hjarta* hjá Gunnari Hoydal, tí hann nýtir sama myndatilfar, tá hann sigur, at Gunnar hevur funnið sítt tilfar til bókina úti undir væðingini uppi á hugans ovastalofti (Klein 2007).

Alexandur Kristiansen viðger í ummælinum listafatanina hjá Jóanesi Nielsen, sum skínur ígjøgnum í fyrstu yrkingini í savninum. Her sigur Jóanes Nielsen nakað, sum hann sambært Alexanduri Kristiansen fleiri ferðir áður hevur nortið við: hvussu yrkingar skulu síggja út. Jóanes Nielsen sigur sína hugsan um sálmabókina og „møsnið hjá kirkjuskaldunum“, og við einum smíli sigur Alexandur Kritsiansen, at Jóanes Nielsen verður kanska sjálvur at síggja í eini komandi útgávu av sálmabókini. Tá sipar hann til yrkingina „Upp í lógvan av halleluja“.

Alexander Kristiansen finst at, at Jóanes Nielsen bæði í sínum yrkingum og í øðrum, sum hann hevur skrivað um skaldskap, setir niður á formin, sum aðrir yrkjarar nýta, og at hann ikki virðir búnan, sum yrkingar eru klæddar í, men bara heldur tað vera innihaldið, sum telur. Her er Alexandur Kristiansen grundleggjandi ósamdur

og sigur, at Jóanes gloymir, at tað er búnin, ein yrkjari klæðir sínar yrkingar í, sum ger tær til fagrasta skaldskap. Tað er málið ella búnin, sum ger undurverkið. Alexandur Kristiansen heldur, at búnin hevur minst líka nógv at siga sum innihaldið, um ikki meir. Men samsvar skal vera millum málbúna og innihald, sigur hann, og tekur dømi um yrking eftir Chr. Matras, sum innihaldsliga er banal, men hon er latin í ein snøggan form, og skaldskapur, tá hann er allarbestur, spyrst burturúr.

Her setir Alexandur sum rithøvundur og yrkjari fram sína poetikk og ta dagsskrá, sum hann arbeiðir eftir, og hann nýtir ummælið til at lýsa sína skaldskaparhugsan neyvt:

> Orðini skulu veljast og setast saman á ein slíkan hátt, at poesiurin ótarnaður kann streyma ígjøgnum tey. Og ikki er neyðugt at brúka sjáldsom ella heimagjørd orð til tess at fáa skaldskap burturúr, tí føroyska málið er so ríkt og vakurt, at tað næstan syngur seg sjálvt. Heldur kann hitt virka darvandi (Kristiansen 1999).

Tað føroyska málið hevur nóg mikið av møguleikum – eingin orsøk er at leita út um tað og finna sjáldsom ella heimagjørd orð, fyri at skaldskapur skal spyrjast burturúr. Tað kann hinvegin virka darvandi, so skaldskapurin ikki ótarnaður kann streyma gjøgnum orðini, sigur Alexandur Kristiansen. Hetta eru áhugaverdir tankar, tá hugsað verður um ta skaldskaparfatan, sum Carl Jóhan Jensen tíggju ár frammanundan setti fram í ummælinum „Málið kemur ikki av sær sjálvum“ (1989). Alexandur Kristiansen og Carl Jóhan Jensen eru samdir um týdningin av málsliga búnanum í metingini av skaldskapi, men teir eru grundleggjandi ósamdir í, um neyðugt er at leita út um verandi málskipan fyri at skapa skaldskap. Carl Jóhan Jensen leggur fram hugtakið *uttangarðsskaldskap* og í tað leggur hann eitt krav til skaldskap, at hann má leita málsliga út um garðarnar fyri at kunna skapa nakað nýtt (Jensen 1989).

Tað er hugburðin hjá Jóanesi Nielsen til formin, Alexandur Kristiansen kritiserar, og ikki skaldskapin. Hann sigur nevniliga, at hóast henda hugburð Jóanesar, so dugir Jóanes Nielsen júst at klæða sínar yrkingar í skaldsligan búna:

> Eisini Jóanes hevur hesi serligu evnini at lata sínar yrkingar í fagrar búnar, tó at hansara hugburður til yrkingina ikki júst er tann sami sum hjá omanfyri nevndu. Og hóast hann sigur seg vilja hava orð, ið stinka, so fær hann kortini alla óhumsku og allan lort at anga – og brúsa sum leyvið á kunnleikans træ (Kristiansen 1999).

Samanumtikið er ummælið hjá Alexanduri Kristiansen eitt rithøvundarummæli burturav. Ein ummælari, sum ikki er rithøvundur sjálvur, hevði ikki skrivað eitt slíkt ummæli. Tað er skaldsligt, í brotum er tað list í sjálvum sær, og tað hevur ein brodd, samstundis sum tað eisini er skemtandi og lætt. Fram um alt er tað eitt rithøvundarummæli, tí ummælarin nýtir høvið at seta fram egna poetikk, har hann setir fram eina skaldskaparhugsan um, at skaldskapurin ótarnaður skal kunna streyma gjøgnum orðini og ikki verða tarnaður av sjáldsomum og heimagjørdum orðum.

Broddurin og skemtiligi stílurin í ummælinum, sum eisini letur seg ávirka av stílinum hjá Jóanesi Nielsen við tilsipingum til gummistivlarnar[107] og kvinnulýsingarnar, sæst í endanum á ummælinum: „Takk fyri penturnar, Jóanes, og blíðan byr inn í komandi øldina, veri ta seg til gongu í gummistivlum ella við fullari ferð sum saðil í einum Tour de France fyri kvinnur“ (Kristiansen 1999). Eisini sæst í endanum, at áheitanin er til rithøvundin og ikki til lesaran. Tað er ein ábending um hetta, at høvundar ofta skriva til sínar felagar í ondini og kjakast í sínum ummælum um list fram um at síggja seg sum smaksdómarar og leiðbeinarar beinleiðis hjá lesaranum.

Tey trý rithøvundarummælini, ið eru viðgjørd í hesum brotinum, tæna sum dømi um, at ummælið er listaligur tekstur, ið er verdur at granska í sjálvum sær.

107 Tilsipingin er til skaldsøguna *Gummistivlarnir eru tær einastu tempulsúlurnar sum vit eiga í Føroyum* (1991).

8. Tekstslag paradoksins

Ummælið sum tekstslag liggur á markinum millum siðvenjur, og í kapitli 2 vísti eg á, at ummælið sum granskingarøki er fylt við paradoksum, sum geva granskaranum avbjóðingar. Eg havi eisini í ritgerðini nevnt, at júst tann sannroynd, at hetta granskingarøkið og ummælið sum tekstslag er so samansett og merkt av mótsetningum, er orsøk til, at tað ikki er lætt – og heldur ikki rætt – at gera greiðar og eintýddar bólkingar av teimum ummælum og ummælarum, sum mynda tekstslagið og granskingarøkið. Tey tíggju paradoksini[108], fimm, sum Sissel Furuseth hevur eygleitt, og fimm, sum eg eri komin framá, hava á ymiskan hátt litað arbeiðið við ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007. Í hesum kapitlinum verður tikið afturíaftur og hugt at, hvussu paradoksini koma til sjóndar í greiningini av ummælunum.

1. Bókmentaummæli verða ofta søgd at vera tekstir, sum eru skaptir í einari eliterari mentan, men sum røkka út til ein breiðan lesaraskara. Fleiri av dagsins høvundum kenna tó neyvan hesa fatan aftur, men halda, at ummæli júst eru skrivað í einum tabloidum miðlaveruleika, har ummælisgenrurnar

108 Sí kap. 2 um paradoks í bókmentaummælinum sum granskingarøki.

ikki hava høga tign, men eru skrivaðar á klisjéfyltum máli, langt frá á hædd við tað bókmentaliga verkið, sum verður ummælt ella svarar til lesarans bókmentaliga kapital.

Hetta fyrsta paradoksið hjá Sissel Furuseth hevur við markamótið millum bókmentir og miðlar at gera og er úrslit av, at bókmenta-ummælið er partur av fleiri siðvenjum samstundis. Í viðgerðini av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007 havi eg vístá, at tað gerst týðiligt, at ummælaravirksemið hjá Jógvani Isaksen stendur og vigar á markamótinum, sum skapar hetta paradoksið, tá hann talar fyri førleikamenning og professionalisering av føroyskum ummælaravirksemi – eisini á málsligum stigi – samstundis sum hann júst nýtir eitt einfalt mál, ið røkkur langt út og rakar breitt. Hann er partur av mentanarelituni, sum stríðist fyri at skapa einum tekstslagi, sum søguliga hevur lága tign, virðing, samstundis sum hann lagar seg til tann breiða lesaraskaran, ið kanska ikki skilir tað mál, elitan tosar. Málið skal við øðrum orðum mýkjast í báðar ættir samstundis. Tað skal vinna sær virðing í teirri elituni, sum skapar tað, samstundis sum tað skal skapa sær myndugleika í fjøldini, ið setir onnur krøv og hevur onnur virði enn elitan.

Hetta fyrsta paradoksið kann tó ikki sigast at vera galdandi í sama mun í føroyskum ummælaravirksemi sum aðrastaðni. Hetta kemst av, at føroyskir miðlar kanska ikki seta so høg krøv til, at ein tekstur skal vera lesivinarligur, við tað at gravgangurin eftir at sleppa framat í miðlunum ikki er so stórur, og tað tí er lætt at sleppa framat í miðlunum í Føroyum. Hetta endurspeglast í, at ummæli, sum verða prentað í dagbløðini, ofta ikki eru so lesivinarlig. Dømi eru um fleiri ummæli í hesum tíðarskeiði, sum er long og drúgv og als ikki fylgja teimum krøvum, ið miðlar vanliga seta. Hetta kann hava tað við sær, at ummælararnir missa sínar lesarar. Dømi um ummæli, sum eru long og innihaldsliga tung – fleiri eisini málsliga avbjóðandi – eru ummæli eftir Carl Jóhan Jensen, Turið Sigurðardóttur og René Hjelm. Summi av teimum kunnu tykjast elitér og missa sambandið við tann vanliga lesaran. Tey fáa rúm í bløðum, sum hava ein breiðan lesaraskara fyri eyga, hóast tey kanska høvdu hóskað betur í onkrum smalri tíðarriti.

2. Ummælið er bæði partur av framleiðsluni og móttøkuni í teirri bókmentaligu ringrásini. Ummælarin er bæði móttakari og framleiðari í teirri bókmentasosiologisku gongdini. Hann er móttakari og orðar fyrst og fremst egnar lesiupplivingar, og hansara útsøgn er aftursvar til annað verk, sum verður mett at vera tann primeri teksturin. Men ein góður ummælari er eisini framleiðari av teksti, ein aktivt skapandi vera í bókmentaheiminum, hann hevur vald at skilmarka og er ígongdsetari og polemikari, sum hevur ávirkan á tað mentanarliga orðaskiftið og eisini á framtíðar skapan av kanon. Sambært økisástøðinum hjá Pierre Bourdieu er hann viðskapari í teirri bókmentaligu framleiðsluni av tí sosiala virðinum í listini.

Hetta paradoksið, sum Furuseth setti fram, tekur seg upp á markamótinum millum bókmentirnar og tað samfelagið, sum tær fáa virði í. Eg havi nevnt fleiri ástøðingar, ið vísa á, at list fær virði í einum ávísum sosialum samanhangi. Til dømis orðar Mukařovský hesa virðisrelativismu, tá hann sigur, at listfrøðiligt virði altíð kemur til sjóndar í einum ávísum sosialum samanhangi (Mukařovský 1970/1979:3). Lars Handesten sigur soleiðis við støði í ástøði hjá Bourdieu: „Der findes således ikke nogen given litterær værdi, men kun den, som nogen med magt definerer som en værdi og en kvalitet“ (Handesten 2018:27). Ummælarin er við øðrum orðum móttakari av tí virði, sum bókmentirnar hava í sjálvum sær, men hann er eisini við til at áseta virðið í teimum. Ummælini staðfesta ikki virði, sum eru í tekstum frammanundan, men skapa virði í tekstum ella gera tekstir virðisleysar. Hetta kemur til sjóndar í mótstríðandi ummælum t.d. av tekstum eftir Tórodd Poulsen, sum semja ikki er um. Kim Simonsen setir spurnartekin við, um tekstirnir yvirhøvur hava virði, ella um teir bara eru krutl, samstundis sum hann vísir á, at aðrir ummælarar hava skapt virði í tekstum Tórods við at taka fram hansara málsliga nýskapandi dygdir. Hetta er dømi um, at ummælarar ikki bert eru móttakarar í teirri bókmentaligu ringrásini, men eisini framleiðarar og skaparar av virðum.

Útsøgnin hjá Carl Jóhan Jensen, at „høgligir vindar“ halda kvinnu-

bókmentum uppi,[109] er eisini dømi um, at hann viðurkennir, at bókmentaligt virði ikki er absolutt, men verður skapað í samfelagnum, millum annað av ummælarum, sum halda hvørjum øðrum uppi. Skaldsøgan *Burtur* eftir Bergtóru Hanusardóttur hevur einki virði í ummælinum hjá Carl Jóhan Jensen, men fær høgt virði í ummælinum hjá Hanusi Kamban[110]. Mótstríðandi ummælini føra til hvassorðað kjak, tí ummælararnir vita, at teir ikki bara eru móttakarar, men eisini skaparar av bókmentaligum virðum í samfelagnum.

Tað, at eg í ritgerðini havi tikið ummælini fram og víst á útsagnirnar um bókmentir, er somuleiðis staðfesting av hesum paradoksi, og heildarmyndin vísir væl, at ummælini eru ikki bert lesaraupplivingar av tí skapandi bókmentaliga virkseminum í tíðarskeiðinum 1997-2007. Ummælini eru partur av tí skapandi virkseminum í tíðarskeiðinum, og tey eru við til at skapa tað, sum verður hildið at hava virði.

3. Ein sosiologiskt tilvitaður granskari má taka støðu bæði til ummælið sum abstrakta virðisskipan og sum ítøkiligar manifestatiónir. Tað er ein avbjóðing at halda fast við bæði tað evnisliga og tað hugsjónarliga stigið; bæði tað serstaka og tað yvirskipaða, tað einstaka dømi og kontekstin, at síggja kritikkin í samfelagnum og samfelagið í kritikkinum. Her eru nógv fyrilit at taka, sum hava við framleiðara og móttakara at gera; tilvitið um hvat slag av ummælara talan er um, hvørjum netverki hann er partur av, hvørjir yvirskipaðir normar og virði liggja sum grundarlag undir tí einstaka tekstinum, hvat verður ummælt, og hvat ikki verður ummælt o.s.fr. Fyri at skilja yvirskipaðu skipanirnar, sum ummælið er partur av, eru ástøðingar gjøgnum tíðirnar komnir við ymiskum amboðum: Weber, Habermas, Sennet, Luhmann og Bourdieu hava birt ástøði um almennið, stovnarnar, økisástøðið, ástøðið um ringrásina – ymiskar makrogreiningar, sum skapa rúmið, sum ummælini og bókmentirnar virka í.

109 Sí kap. 7 um kvinnur, sum verða ummæltar.
110 Sí kap. 7 um móttøkuna av *Burtur*.

Tað triðja paradoksið hjá Furuseth kom til sjóndar í mínum arbeiði við tí granskaða tilfarinum millum annað, tá bólkingarnar av ummælum og ummælarum skuldu gerast. Tað ber ikki til at gera eintýddar bólkingar av ummælarum, tí teir flestu eru partur av ymiskum samanhangum, eitt nú eru rithøvundarummælararnir í summum førum eisini bókmentafrøðingar. Aðrar lyklastøður, sum geva ummælarum ávíst vald, sum t.d. útisetastøðan, stendur heldur ikki einsamøll, tí ein útiseti er samstundis eisini akademikari, rithøvundur, kvinna o.s.fr. Atlitini til abstraktu virðisskipanina eru tí sera nógv, og tey síggjast í hesum samanhangi. Talan er eisini um familju- og vinarbond, og her er Anna Mattsson tikin fram sum dømi um uttanveltaðan ummælara, tí hon ikki hevur familjubond í Føroyum. Hon var tó í hesum tíðarskeiði sambúgvi hjá Tóroddi Poulsen, og tað gevur granskaranum onnur fyrilit at taka.

Kvinnurnar verða, um tær vilja tað ella ei, partur av tí, sum Simone de Beauvoir sær sum „kyn nummar tvey“ og eru tí eisini í „útisetastøðu“, tá tað kemur til vald. Henda støðan verður tó sjáldan sædd sum ein fyrimunur, og tá kvinnur ummæla í *Kvinnutíðindi*, eru tær partur av einum netverki, ið hevur eina dagsskrá, sum ger, at tað ikki ber til at síggja hesi ummæli strangliga sum ítøkiligar manifestatiónir. Hesi ummælini mugu eisini síggjast sum partur av einari abstraktari virðisskipan, nevniliga feminismuni, sum hevur tað endamál at skapa javnrættindi og gera kvinnurnar sjónligari á øllum økjum í samfelagnum.

Tað er eisini partur av virðisskipanini, at sumt ikki verður ummælt, ella at ávísir ummælarar velja at ummæla eins nógvar kvinnur og menn, og at summir ummælarar velja at kasta seg yvir ávísar rithøvundar og føra teirra skaldskap fram. Hetta er slíkt, eg sum granskari havi havt í huga, hóast tað ikki gjørdist partur av hesari ritgerð at lýsa t.d., hvat av tí útgivna tilfarinum í hesum tíðarskeiði einki ummæli fekk og tí datt burturímillum í teirri almennu samrøðuni. Eg havi kortini víst á, at summir ummælarar møguliga hava eina dagsskrá, tá teir ummæla kvinnur, t.d. Turið Sigurðardóttir, Hanus Kamban, Kirsten Brix, umframt tær kvinnur, sum ummæla í *Kvinnutíðindi*.

Tá ummælini av *Í Havsins hjarta* eftir Gunnar Hoydal peika í

ymsar ættir í virðisdóminum, og politiskar hugsjónir helst ávirka virðisdómin[111], er hetta somuleiðis dømi um, at ummælini eru ikki bert einstakar ítøkiligar manifestatiónir, men virka sum partur av einari abstraktari virðisskipan.

4. Sum framhald av triðja paradoksi, má eisini verða minst til, at tað er bæði ein fjaldur kritikkur og ein opin. Ikki allur kritikkur verður skrivaður í bløð og tíðarrit. Eitt óformligt ummælaravirksemi gongur fyri seg í øllum liðum í bókmentastovninum, frá sjálvkritikkinum hjá høvundinum, meðan hann skrivar út frá afturmeldingum frá ritstjórum og vinum, og til ummælararnar, sum skriva í bløð og tíðarrit. Í øllum øðrum liðum fara tó eisini metingar fram, t.d. í innkeypi av bókum til bókasøvnini, í pensumlistum, hjá dómsnevndum, festivalfyriskiparum, granskarum, kanoniseringarmyndugleikum, bókmentasøguhøvundum o.s.fr. Hóast nógv av hesum er skrivligt, er tað ikki partur av tí útgivna almenna regluliga ummælaravirkseminum.

Tann fjaldi kritikkurin, ið er lýstur í tí fjórða paradoksinum hjá Furuseth, er ikki í brennidepli í hesari ritgerð. Tó hevur hann alla tíðina verið til staðar í mínum huga sum granskara. Í ritgerðini kemur tað fram, tá eg vísi á mínar avmarkingar sum granskari, tí at eg eri partur av teirri bókmentaligu ringrásini, ið eg lýsi. Eg eri ávirkað av teimum virðum, sum óbeinleiðis eru ald fram í teirri skipan, eg eri skúlað í, t.d. við pensumlistum og teirri kanon, ið er vorðin partur av mínari forfatan av evropeiskum, norðurlendskum og føroyskum bókmentum.

Tilvitið um tann fjalda kritikkin kemur eisini til sjóndar, tá eg vísi á, at av teimum góðu 30 tilnevningunum, sum eru gjørdar til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, eru bert fýra kvinnur. Hetta er dømi um tað, sum fer fram í tí fjalda kritikkinum, har bókmentalig virði verða skapað. Ójavnvágin er kanska avleiðing av tí, sum fer fram í tí lýsta opna kritikkinum av kvinnubókmentum í tíðarskeiðinum

111 Sí kap. 7, har Heðin M. Klein ummælir Gunnar Hoydal.

1997-2007. Tann fjaldi kritikkurin er ikki minni valdmikil, tí í hesum føri er tað hann, sum skilmarkar, hvat *veruliga* hevur virði. Hvat er vert at fáa virðisløn. Í 2019, tá eingin føroysk tilnevning varð gjørd, var boðskapurin í tí fjalda tí, at verkini eftir tær nevndu kvinnurnar, Katrina Ottarsdóttur, Sólrún Michelsen, Marjuna Syderbø Kjelnæs, Vónbjørt Vang, Sissal Kampmann og Rannvá Holm Mortensen ikki vóru virðislønina verd.

Tann fjaldi kritikkurin liggur eisini í summum av teimum gloppunum, eg havi víst á, í tekstum, har ótilvitað orðaval setir orð á virði, ið liggja fjald í okkara samfelagsskipan. Dømi um hetta er, at ummælarar við at nevna sín egna persón oftari enn navnið á rithøvundinum á tí ummælta verkinum avdúka eina tilvitaða ella ótilvitaða ætlan at føra fram egnan skaldskap og egnar skaldskaparhugsjónir fram um at ummæla teir tekstir, sum eru til umrøðu. Hetta eyðkennir ummælini hjá Kim Simonsen og Agnari Jógvansson av ávikavist Dagny Joensen og Oddvør Johansen[112]. Í hesum fjalda kritikkinum liggur m.a. virðismetingin, at tað hevur lítlan týdning at skriva um gerandislig og kvinnulig viðurskifti, og at tann realisma, sum kvinnur standa fyri, hevur lægri tign enn tann modernisman, tær verða sagdar ikki at duga at skriva.

Fjaldur kritikkur sæst somuleiðis í ávísan mun í ritgerðini, tá eg vísi á, at ummælarar á bókasøvnunum hava verið bólkaðir eftir navninum á rithøvundinum og ikki ummælaranum[113] og tí verða sæddir sum minni týdningarmiklir. Her endurspeglast bókmentalig virði í arbeiðinum, sum ótilvitað hevur verið gjørt á teimum stovnum, ið hava savnað og syrgt fyri at varðveitt tað, sum er skrivað um Føroyar, av føroyingum og á føroyskum.

5. Nakað av tí, sum ger tað avbjóðandi at granska ummæli, er, at tey líka gjarna kunnu hava eitt miðlasosiologiskt perspektiv sum eitt bókmentasosiologiskt perspektiv. Í Danmark og Svøríki hevur tað verið siðvenja at skoða ummælið sum journalistiskan tekst, meðan tað í Noregi hevur verið ein tendensur

112 Sí kap. 7 um drekkamunsrealismu.
113 Sí kap. 3 um ummælarasøguligt innlit.

til at viðgera ummæli sum minni miðlaserstakt og at taka bæði ritroyndir, ritgerðir, kjakgreinir og keipuyrkingar við í ummælishugtakið, samstundis sum tað tá fyrst og fremst verður sað sum bókmentasøguligt keldutilfar.

Tað fimta og seinasta paradoksið hjá Furuseth hevur somuleiðis alsamt verið í mínum hugsanum sum granskara og hevur skapað eitt sindur av høvuðbrýggi um, hvar skilmarkingin í innsavningini av tilfari skuldi gerast. Eg valdi tó at halda meg strangliga til, at tað innsavnaða empiriska tilfarið er ummæli, sum eru skrivað í bløð og tíðarrit. Ritroyndir, ritgerðir, kjakgreinir og keipumyndir eru við øðrum orðum ikki partur av innsavnaða tilfarinum. Kortini andar tað fimta paradoksið í nakkan á ritgerðini við tað, at eg havi drigið bæði keipumyndir hjá Tóroddi Poulsen og ritroynd eftir Carl Jóhan Jensen og annað inn í lýsingina av ávísum rákum, sum gjørdu um seg hesi árini. Lýsingin av Kim Simonsen sum *pseudsidara*-yrkjara í yrkingini hjá Tóroddi Poulsen er ein[114], og metingin av kvinnubókmentum í ritroyndini hjá Carl Jóhan Jensen „Hugur, um hug, frá hugi, til hugs" er ein[115]. Hetta eru dømi um, at skalt tú sum granskari royna at skapa eina mynd av virðismetingini av bókmentum í einum tíðarskeiði, verður myndin fátækari, um tú einans velur eitt miðlasosiologiskt perspektiv. Tað bókmentasosiologiska perspektivið leggur okkurt aftrat ummælunum og er onkursvegna eisini, sum eg havi vístá, í serstøðu, tí keipuyrkingin við „bara" at vera yrking og hugflog ofta kann siga meira og vera meira ágangandi enn eitt ummæli[116].

6. Ummælið leggur seg eftir objektivum metingarkriterium, men samstundis er tað eitt av høvuðseyðkennunum hjá ummælinum sum tekstslag, at tað hevur eina meting av bókmentum í sær og er per definitión subjektivt.

Tað sætta paradoksið sæst aftur í at kalla øllum teimum viðgjørdu

114 Sí kap. 7 um ummæli av *Náðisólini*.
115 Sí kap. 7 um kvinnur, sum verða ummæltar, og kvinnur, sum ummæla.
116 Sí kap. 7 um mmmæli av *Náðisólini*.

ummælunum, men kanska best í viðgerðini av Oddfríði M. Rasmussen, tí hann sjálvur setir orð á, at tann góði ummælarin er ein, ið objektivt dugir at grundgeva fyri dygdum og ódygdum í einum listaverki á ein slíkan hátt, at hann tó ikki er meira objektivur enn so, at tað er eitt subjekt, sum ber tað fram (Rasmussen 2011). Oddfríður M. Rasmussen setir soleiðis orð á ta skilmarking av list, sum eg eisini havi vístá, at Morris Weitz ger; ein skilmarking, sum er ein „óskilmarking", tí hon vísir á tað ógjørliga í at skilmarka nakað, sum per definitión er opið og broytiligt[117]. Hetta er dømi um, at hon strembar eftir objektiviteti, men hevur altíð eina subjektiva dimensión, at hon strembar eftir tí almenna, men sprettur altíð úr tí serstaka og persónstongda. Hetta sæst eisini endurspeglað í sjálvum ummælunum hjá Oddfríði M. Rasmussen. Hann sigur „eg" um seg sjálvan í ummælinum, og hann lýsir kenslur sínar í møtinum við tekstin. Hesin hugburður hansara til ummælaran endurspeglast í ummælarastílinum, tá hann grundgevur objektivt, samstundis sum subjektið er sjónligt.

Tað sætta paradoksið sæst eisini – lutvíst við sínari fráveru – í viðgerðini av Turið Sigurðardóttur við, at so lítil áherðsla er løgd á tann subjektiva táttin í ummælinum, at hon at kalla ikki úttalar nakrar virðisdómar beinleiðis. Hinvegin sæst tað týðiliga í øllum teimum mongu ummælunum, har tann persónstongda upplivingin hjá ummælaranum er frammarlaga, t.d. tá sagt verður, at eitt verk er „keðiligt", sum Kim Simonsen sigur um skaldsøguna *Hvirlan* eftir Dagny Joensen[118]. Eisini sæst tað, tá Jógvan Isaksen sigur um stuttsøgusavnið *Ein farri av kolvetni* eftir Marjuna Syderbø Kjelnæs, at „lesarin ikki verður fangaður av lesnaðinum" (Isaksen 2004)[119], samstundis sum ummælið væntast at verða fatað og góðtikið sum ein almennur dómur. Nøjgaard lýsir væl henda partin av paradoksinum, tá hann sigur, at tann subjektiva upplivingin hjá einum lesara hevur prinsipielt bara gildi fyri einstaklingin, meðan dómsútsøgnin ber eitt krav í sær um at hava alment gildi (Nøjgaard 2003:294).

117 Sí kap. 4 um virðismetingina.
118 Sí kap. 7 um drekkamunsrealismu.
119 Sí kap. 7 um metingarkriterii.

7. Ummælið hevur lága tign í bókmentastovninum, men er kanska tann parturin av bókmentakritikkinum, sum hevur størstu beinleiðis ávirkanina á sølu og útbreiðslu av bókmentum. Ummælarar virka ofta óbeinleiðis sum duravørðar í bókmentaliga stovninum.

Tað sjeynda paradoksið er áminning um, at hetta tekstslag, sum ikki hevur høga tign, kortini er eitt tað valdmiklasta á bókmentaøkinum. Hetta er kanska tann parturin, sum er torførastur at grundgeva fyri og at vísa á í einari viðgerð, sum ikki kannar lutfall millum útgávur, ummæli og sølutøl. Kortini kemur hetta paradoksið til sjóndar í viðgerðini, t.d. tá Jógvan Isaksen sigur, at hansara ummælaravirksemi er sum eitt kall, tí tað gevur lítla og onga løn[120]. Eg havi tó vístá, at hann gjøgnum árini hevur vunnið sær mentanarligan kapital við áhaldandi at ummæla, og soleiðis sæst eisini tað sjeynda paradoksið endurspeglað í spenninginum millum teir ymisku kapitalarnar, tann peningaliga og tann mentanarliga, sum ikki altíð hanga saman.

Tann lága tignin endurspeglast við tað, at ummælið á bókasøvnunum ikki er bólkað undir navninum á ummælaranum, men navninum á rithøvundinum, sum verður ummæltur. Hon endurspeglast eisini í teirri metafunktión, sum eg havi vístér so ráðandi í ummælaravirkseminum árini 1997-2007, har ummælarin aftur og aftur kennir tørv á at grundgeva fyri sínum rætti at ummæla, samstundis sum hann hevur sterkt tilvit um sítt vald at skilmarka.

8. Ummælini endursiga ein annan tekst, men siga samstundis okkurt nýtt; okkurt, sum ikki er sagt áður. Hetta paradoksið vísir franski heimspekingurin Michel Foucault (1926-1984) á, tá hann sigur um tann greinandi tekstin:

> whatever the techniques employed, commentary's only role is to say *finally* what has silently been articulated *deep down*. It must – and the paradox is ever-changing yet inescapable – say, for the first time, what has already been said, and repeat tirelessly what was, nevertheless, never said (Foucault 1970/1972:21).

120 Sí kap. 7 um útisetaummælaran Jógvan Isaksen.

Hetta áttanda paradoksið kemur fram gjøgnum alla viðgerðina, tí alt tað, sum ikki er sagt beinleiðis í bókmentunum, verður orðað gjøgnum ummælini. Her hugsi eg serliga um *útsøgnina* í ummælinum, t.e. formin og tað, ummælið er sum egin útsøgn. Kortini er tað eisini so, at ummælið leggur aftrat bókmentaverkinum. „Havsins hjarta" er t.d. „havsins aldandi pulsur" í ummælinum hjá Heðini M. Klein[121]. Hesar útsagnir hava grundleggjandi somu merking, men tær siga kortini ikki tað sama. Tað liggja hjámerkingar í aðrari útsøgnini, sum ikki fylgir við yvir í hina. Tað er ikki eitt til eitt samband millum orðingarnar. Útsøgnin í ummælinum hevur eitt annað mál, ein annan lesaraskara, og hon nýtir ein annan miðil.

Áttanda paradoks sæst serliga í teimum ummælum, sum útleggja torførar tekstir. Ummælið hjá Turið Sigurðardóttur av yrkingasavninum *Rot* (2007) eftir Tórodd Poulsen er dømi um tekst, ið setir orð á tað, sum Tóroddur Poulsen – kanska fyri summi nokk so gátuført – sigur. Hon setir vanlig skiljandi orð á slíkt, sum annars tykist óskiljandi. Tað er áhugavert, at tað ber til at siga, at Carl Jóhan Jensen ger tað mótsetta í sínum ummælum, tá hann t.d. við parodi ger realistiska tekstin hjá Bergtóru Hanusardóttur *Burtur* gátuføran. Somuleiðis er hansara útlegging av Jóanesi Nielsen í ummælinum av yrkingasavninum *Brúgvar av svongum orðum* kanska torførari at lesa enn yrkingarnar hjá Jóanesi. Paradoksið sæst aftur í, at útsagnirnar eru *um* tað sama, samstundis sum tær ikki *eru* tað sama. Útsøgnin er ymisk, torleikastigið er ymiskt og málbólkarnir eru ymiskir, eins og miðlarnir eru ymiskir.

9. Bókaummælið er bæði yrkistekstur, sum miðlar listina, og ein listaligur tekstur í sjálvum sær. Tað er óloysiliga tongt at tí fagra tekstinum, men er samstundis sjálvstøðugur listaligur tekstur.

121 Sí kap. 7, har Heðin M. Klein ummælir Gunnar Hoydal.

Níggjunda paradoks hongur saman við bæði øðrum og áttanda paradoksi. Annað paradoks snýr seg um, at ummælið er ein framleiðandi tekstur, eins væl og hann er ein endurgevandi tekstur, og áttanda paradoks snýr seg um, at ummælið hevur eina útsøgn, sum fullkomiliga er sín egna, hóast hon sigur okkurt, sum er sagt, umaftur ella á annan hátt. Níggjunda paradoks kann sigast at vera treytað av teimum fyrru við tað, at um ummælið skal vera listaligur tekstur, má tað vera nýggj framleiðsla av teksti, og tað má hava sína egnu útsøgn. Níggjunda paradoks leggur tað aftrat, at ummælið eisini er listaligur tekstur, og her er umráðandi at hava í huga, at ummælið ikki per definión er listaligur tekstur, men at tað liggur í náttúruni á tekstslagnum, at tað *kann* vera tað. Hetta eru somu treytir, sum aðrar bókmentir virka undir. Eitt yrkingasavn kann vera list, men tað kann eisini ikki vera tað. Hetta er orsøk til, at eg í ritgerðini havi valt at taka tríggjar tekstir fram í kapitli 7 sum dømi um ummæli, ið hava potentiali til at vera list í sjálvum sær. Hesir tekstir hava sína egnu útsøgn, sum skapar onnur hugasambond enn tann ummælti teksturin, t.d. tí tey nýta ríkt myndamál. Aftrat tí, at hava sína egnu útsøgn, eru tey heilstoyptir tekstir í sjálvum sær, ið hóast teir viðgera annan tekst, standa sterkir einsamallir. Onnur ummæli eru eisini av hesum slag, sum eg havi vístá, t.d. ummælið hjá Carl Jóhan Jensen av yrkingasavninum eftir Jóanes Nielsen *Brúgvar av svongum orðum*[122], eins og skaldslig eyðkenni eru í ummælinum hjá Hanusi Kamban av *Burtur* eftir Bergtóru Hanusardóttur[123].

So ella so hongur hetta paradoksið eisini saman við sjeynda paradoksi við tað, at tann lága tign, ummælið hevur havt, og sum Matthew Arnold vísti á, hongur saman við, at ummælið ikki hevur verið mett sum skapandi list[124]. Tá eg í ritgerðini tali fyri ummælinum sum listaligum teksti, so er tað við hesum somu paradoksum í huga, tí tað er partur av professionaliseringartilgongdini, sum skal vinna ummælinum størri virðing og hægri virði, at tala fyri ummælinum sum list.

122 Sí kap. 7 um bókmentakritiska sjálvsmynd.
123 Sí kap. 7, har Hanus Kamban ummælir *Burtur*.
124 Sí kap. 2 um ummælaran í verjustøðu – kreppa ella tilverutreyt?

10. Sum framhald av níggjunda paradoksi liggur í stríðnum fyri at professionalisera ummælaravirksemi sum egið sjálvstøðugt virksemi eisini eitt paradoks í royndini at avmarka røddirnar, sum kunnu hava sína meining í tí bókmentaliga almenninum, til tær professionellu. Grundarlagið verður máað undan kritikkinum og teirri siðvenjuni, sum hann er sprottin úr og er eitt úrslit av, nevniliga upplýsingarstevnuni, sum vann fram í 18. øld, og farið verður beint ímóti tí ideali, sum Habermas setti fram, tá hann lýsti tað kritiska almennið sum ein stovn við myndugum leikmonnum.

Tíggjunda paradoks byrjar, har tað níggjunda sleppir, tí tað tíggjunda paradoksið er júst paradoksið av tí, sum hendir við ummælaravirkseminum í teirri løtu, tað verður gjørt til eitt professionelt starv, har bara fá kunnu taka lut. Sum lýst í søguliga partinum av ummælinum sum tekstslag er ummælið sprottið úr upplýsingarstevnuni. Borgarastættin skapti sær eitt serstakt diskursivt stað, har skynsom meting og upplýstur kritikkur fingu rúm heldur enn almennar yvirlýsingar frá autoriterum áskoðanum, og har siðilig, upplýst almannahugsan royndi seg ímóti tilvildarligum valdsboðum frá einaveldinum. Tað vóru ikki longur sosialt vald, framíhjárættindi og siðvenjur, sum skuldu geva einstaklinginum rættin til at tosa og døma, men evnini at taka lut í kjaki og konsensus um alment vit og skil (Eagleton 1984/2005:9). Professionalisering av hesum virksemi við tí fyri eyga at leggja tað í hendurnar á nøkrum fáum myndugleikum er tí at arbeiða ímóti teirri fatan, sum ummælið grundleggjandi snýr seg um, nevniliga at taka lut í teirri almennu samrøðuni um bókmentir. At henda støða ummælisins er at meta sum eitt paradoks er bert enn ein staðfesting av hesum samansetta tekstslagi, sum hoyrir heima á markamótum. Tað er á markamótunum, at tað hevur sína styrki. Tað er har, tað hevur sítt vald.

9. Samandráttur

Í hesari ritgerð, sum eitur „Verjurøða ummælarans“, er víst á, at bókmentaummælið sum tekstslag er í trongari støðu í dagsins samfelagi, tí at miðlarnir eru í støðugari broyting, og valdskipanir broytast. Ummælarin má skapa sær myndugleika fyri at verða hoyrdur og viðurkendur sum ein, ið hevur myndugleika og vald at skilmarka, hvat góðar bókmentir eru.

Víst er eisini á, at tað ikki er nakað nýtt, at ummælarin má prógva sítt virði og verja sína støðu sum slíkur, tí ummælarin hevur altíð verið meira og minni hóttur. Ummælaravirksemi hevur verið fatað sum sekundert arbeiði og ikki roknað sum list. Ummælarin er ofta illa lýddur av rithøvundum, og arbeiðsumstøðurnar hjá ummælaranum broytast javnan. Samfelagsrák og miðlastøður skifta, og ummælarin má geva seg undir tær treytir, sum miðlarnir seta. Tann nýggja avbjóðingin er teir sosialu miðlarnir, sum spjaða ummælaravirksemið út á ymiskar pallar, og torført er at halda skil á kjakinum, sum fer fram um bókmentir.

Harafturat er víst á, at ummælið er tekstslag paradoksins. Tíggju paradoks eru sett fram, ið lýsa ummælið sum granskingarøki. Við støði í hesum paradoksum setti eg mær fyri í fyrsta lagi at viðgera ummælið sum samansett tekstslag, men samstundis at grundgeva fyri tí sum einum listaligum/bókmentaligum teksti. Í øðrum lagi setti

eg mær fyri at vísa á ta lágu tign, ummælið hevur, men samstundis at leggja fram gransking, sum er liður í einari upprøðfesting av ummælinum sum tekstslagi og sum granskingarøki.

Tað havi eg gjørt við at greina og bólka øll ummælini í tíðarskeiðinum 1997-2007 og vísa á listalig eyðkenni í tekstunum og harvið grundgeva fyri, at ummælið er miðlan av einum listaligum teksti, men hevur eisini potentiali til at vera list í sjálvum sær. Í verki vísir viðgerðin, at ummælið er tekstslag, sum er vert at granska á akademiskum stigi.

Farið er til verka út frá teirri grundleggjandi fatan, at ummælið er týdningarmikið tekstslag, og at ummælarin hevur stórt vald í bókmentastovninum, tí hann er við til at seta dagsskránna, tá tað kemur til at virðismeta bókmentir.

Endamálið við kanningini er:

1. At lýsa ummælið sum tekstslag, tess støðu og leiklut í tí bókmentaliga stovninum.
2. Yvirskipað at lýsa ummælini í einum avmarkaðum tíðarskeiði í Føroyum, sum liggur nær við okkara samtíð, 1997-2007.
3. At kanna og viðgera vald ummæli og ávísar ummælaraprofilar í tíðarskeiðinum 1997-2007 nágreiniliga við serligum atliti at, hvussu ummælarin setir seg sjálvan fram í tekstinum, og hvussu hann í ummælinum bygnaðarliga, innihaldsliga, málsliga og stíli viðvíkjandi skapar sær myndugleika at meta um føroyskar bókmentir.

Granskingarspurningarnir, sum hava verið snúningsdepil í kanningini eru:

1. Hvussu skapar ummælarin sær mentanarligan myndugleika í tekstinum?
2. Hvussu pallsetir hann seg í tekstinum?

Vístur er á, at føroyskt ummælaravirksemi byrjaði, tá tey fyrstu bløðini komu út á føroyskum um aldarskiftið 1900, og hóast tey ikki kunnu sigast at hava fingið sín fasta form frá byrjan, vóru dømi um ummæli, sum vitna um tilvit um tekstslagið, at síggja longu tá. Føroyskt ummælaravirksemi er í ritgerðini lýst sum ein professionaliseringartilgongd, ið er farin fram sum førleikamenning, samstundis sum fleiri ummælarar, bókmentafrøðingar, journalistar og rithøvundar, hava tikið lut í virkseminum. Tó kann henda professionaliseringin ikki sigast at vera komin á mál.

Í viðgerðini av ummælunum í tíðarskeiðinum 1997-2007, sum er seinasta tíggjuáraskeið áðrenn sosialu miðlarnir – og higartil í Føroyum serliga Facebook – kollveltu miðlaheimin, er vístur á, at ummælaravirksemið er fjølbroytt, hóast ávísir ummælaraprofilar gera mest vart við seg og seta dagsskránna.

Fleiri ummælarar við akademiskum profili ummæla í útisetu seint í seinastu øld og seta ein standard fyri akademisk ummæli, t.d. Jógvan Isaksen, sum heldur fram hetta tíðarskeiðið við sínum ummælaravirksemi í útisetu. Hann er bókmentafrøðingur og universitetslektari. Hann ummælir í *Sosialinum* og røkkur einum breiðum lesaraskara við sínum almenna stíli. Andrias Justesen ummælir í útisetablaðnum *Føringinum* við sínum akademiska, men lætta penni, og René Hjelm ummælir við einum akademiskum stíli í útisetatíðarritinum *Braga* og í *Dimmalætting* – hann er ein ummælari, sum vísir sterkt tilvit um uppgávuna hjá ummælinum í bókmentastovninum og um ummælið sum tekstslag. Útisetaummælararnir eru ymiskir í skrivistíli, men felags fyri teir er, at teir skriva um føroyskar bókmentir uttan beinleiðis at vera partur av tí føroyska samfelagnum. Útisetan verður tematiserað við útisetatíðarritinum *Outsider Magazin* sum ein lyklastøða, ið gevur tí intellektuella eygleiðaranum serligar fortreytir at síggja og meta um bókmentaligt virði. Hesa støðu nýtir Kim Simonsen tilvitað í einari roynd at skapa sær myndugleika sum ummælari.

Pallsetti ummælarin verður lýstur og settur í samband við performativa rákið í norðurlendskum bókmentum um sama mundi, har rithøvundar pallseta seg sjálvar í sínum tekstum. Pallsetti ummælarin er fyrst og fremst umboðaður av rithøvundarummælaranum sum ummælaratypu. Rithøvundarummælararnir hava nýggja dagsskrá, sum er at rudda sær sess sum høvundar við ummælinum sum amboð. Tónin er

ofta harður, og metingarkriteriini verða ofta sett fram í ummælunum. Í fleiri førum fyllir lýsingin av egnari poetikk meira enn viðgerðin av ummælta verkinum. Talan er fyrst og fremst um rithøvundarnar og ummælararnar Carl Jóhan Jensen og Kim Simonsen, sum sláa nøvn síni sum ummælarar føst hetta tíðarskeiðið. Teir umboða eitt nýtt slag av ummælarum í tí føroyska bókmentastovninum, har pallseting av egnum *persona* er liður í strategi at skapa sær myndugleika.

Nakrir spenningar millum ymiskar skaldskaparhugsjónir endurspeglast eisini í ummælunum í hesum tíðarskeiði. Kjakið millum Hanus Kamban og Carl Jóhan Jensen og onnur hevur bæði listfrøðiligt og kvinnupolitiskt innihald. Kjakið gongur longri aftur enn bara til tað, sum verður lýst í hesari ritgerð, og tað gerst afturvendandi táttur í ummælum teirra. Kjakið er dømi um livandi samrøðu í tí almenna rúminum um, hvat bókmentir skulu, hvør skal skriva tær, og hvør skal hava vald at skilmarka tær. Tað endurspeglar ein livandi bókmentapall, har ymiskar hugsjónir fingu rúm.

Spenningar síggjast eisini aftur í uppgerðum, har rithøvundar nýta ummæli til at gera upp við aðrar rithøvundar og teirra skaldskaparfatan fyri sjálvir at rudda sær slóð inn á bókmentapallin sum høvundar. Carl Jóhan Jensen ger upp við Hanus Kamban og førir í sama viðfangi sína poetikk fram um *uttangarðsskaldskap*, sum tó er eitt hugtak, ið hann setti fram longu í 1989. Kim Simonsen ger upp við skaldskaparfatanina hjá Tóroddi Poulsen og førir sína poetikk fram um, at postmodernisman er á veg út, og tørvur er á at „tora at siga okkurt vakurt aftur“.

Ummælarafelagsskapir hómast, ið hava ávirkan á teir valdstrukturar, sum gera seg galdandi á bókmentapallinum. Kim Simonsen gevur egnan skaldskap út, samstundis sum hann ritstjórnar tíðarritinum *Outsider Magazin*, og tey, sum ummæla skaldskapin hjá Kim Simonsen, burtursæð frá mentanarjournalistinum í *Sosialinum*, eru somu fólk, sum skriva í *Outsider Magazin* og eru nær knýtt at ritstjórnini annars.

Í hesum tíðarskeiðinum sæst eitt lívligt kjak um kvinnubókmentir í miðlunum og ummælunum, sum verða skrivað. Carl Jóhan Jensen setir hugtakið *drekkamunsrealismu* á breddan og setir Bergtóru Hanusardóttur, Marionnu Debes Dahl og Oddvør Johansen í tann bólkin av kvinnum, sum skrivar hetta slagið av realismu, og kritikkurin er náðileysur. Eisini Kim Simonsen kritiserar í sama anda realistiskar bókmentir, har „hvørt skáp skal opnast og hvør kensla vendast“, sum hann málber seg, og skaldskapurin er ein *sokallað* realisma, ið er gerandislig og keðilig. Agnar Jógvansson fer eitt stig longri og nevnir skaldskapin, sum snýr seg um kvinnur og teirra trupulleikar, *didduskaldskap*. Hesar útsagnir verða lýstar sum meira og minni tilvitað strategi at halda kvinnuligum sjónarhornum og kvinnuligum evnum uttan fyri ta ráðandi bókmentatraditiónina.

Tríggjar kvinnur við akademiskari útbúgving, sum skriva um kvinnuligar rithøvundar í *Kvinnutíðindi*, Guðrun Gaard, Vár í Ólavsstovu og Kirsten Brix, umboða feministiska mótrákið saman við Marionnu Debes Dahl, Hanusi Kamban og Turið Sigurðardóttur.

Víst er á, at tað frá byrjan vóru menn, sum ummæltu, men at kvinnurnar so við og við eru vorðnar ein týdningarmikil partur av føroyskum ummælaravirksemi og teirri professionaliseringartilgongd, ið er farin fram. Hetta sæst lutvíst aftur í, at virði, sum tann mansdominerða bókmentatraditiónin hevur havt lyndi til at skúgva til viks, verða sett høgt. Tríggir kvinnuligir akademiskir ummælararprofilar, sum eru liður í professionaliseringartilgongdini, gera á ymiskan hátt vart við seg. Anna Ellingsgaard ummælir verk eftir bæði kvinnuligar og mannligar rithøvundar, men hennara kyn er í lítlan mun partur av hennara *ethos* sum ummælari. Turið Sigurðardóttir ummælir eins nógvar kvinnuligar og mannligar rithøvundar. Hennara feministiska dagsskrá sæst aftur í hesum býti og er í ávísum førum eisini endurspeglað í ummælunum. Kinna Poulsen hevur ikki feministiska dagsskrá, og hon ummælir hesi árini bara skaldskap eftir mannligar rithøvundar. Anna V. Ellingsgaard arbeiðir sum mentanarjournalistur, men hennara hollu bókmentaligu førleikar lita tekstin, serliga tá tað kemur til at meta um skaldsøguskriving. Turið Sigurðardóttir er ein akademiskur ummælari, ið leggur seg eftir einum objektivum stíli. Stílstigið er høgt, og virðisdómarnir mugu lesast millum reglurnar, tí teir verða sjáldan úttalaðir beinleiðis. Kinna Poulsen hevur ein impressionistiskan dám í sínum ummælum, ið annars eisini eru akademiskt grundað. Hon pallsetir ein *persona*, sum ger, at subjektiviteturin er sterkt til staðar í ummælum hennara.

Samanumtikið ber til at siga, at serliga trý øki skapa tær størstu

ósemjurnar um, hvussu bókmentir skulu metast í granskaða tíðarskeiðinum. Talan er um feministiska mótvegis antifeministiskari dagsskrá, estetiska mótvegis tjóðskaparligari dagsskrá, og spurningurin, tá tað kemur til sjálvt málið, í hvønn mun list tekur støði í tí gerandisliga og kann úttrykkjast við gerandismálinum, ella um hon alsamt skal arbeiða seg undan tí gerandisliga og skapa nýtt listarligt mál.

Tríggir rithøvundarummælarar, Heðin M. Klein, Gunnar Hoydal og Alexandur Kritstiansen, eru at enda lýstir. Teir hava bert skrivað eitt ummæli í part hetta tíðarskeiðið, men ummælini lýsa ta skapandi drívmegina, ið eisini er ein partur av ummælinum sum tekstslagi, serliga tá rithøvundar sita við penninum. Hesi ummæli verða saman við øðrum rithøvundarummælum sett fram sum dømi um, at ummæli eru ikki bert miðlan av list, men eru list í sjálvum sær.

Seinast, men ikki minst, er víst á, at føroysk ummæli hava eina sterka metafunktión. Hetta er kanska ikki óvanligt at síggja aðrastaðni, men tað er ikki ein funktión, sum aðrir granskarar hava lagt dent á. Eg havi tulkað ta sterku metafunktiónina í føroyskum ummælum lutvíst sum ein máta at verja sín rætt at ummæla. Viðhvørt er metakritikkurin ein roynd at umbera seg, viðhvørt er hann ein roynd at skapa sær myndugleika, og viðhvørt er hann ein háttur at tosa seg sjálvan upp í lag: at hugsa hart um alt tað, sum tú hugsar um, tá tú ummælir. Hetta síggi eg sum eitt tekin um ta veiku siðvenjuna í Føroyum at ummæla. Kanska er metakritikkurin eisini eitt krepputekin, hóast tað ikki gevur nógva meining at tosa um kreppu í føroyskum ummælaravirksemi, ið hevur tað sum tilverutreyt, at ummælini eru í einari veikari støðu, og at ummælarin støðugt má verja sín tilverurætt. Hetta er samstundis eisini eitt tekin um, at tann trotmentan, sum hevur eyðkent tann ørlítla føroyska bókmentastovnin, framvegis sæst endurspeglað í ummælunum, hóast ein førleikamenning er farin fram.

Framtíðargransking

Tíðarskeiðið 1997-2007 sær út sum eitt lívligt tíðarskeið í føroyskari ummælissøgu, har lutfalsliga nógv og fjølbroytt ummæli eru skrivað, ið endurspegla bókmentaligar streymar og spenningar millum skaldskaparhugsjónir í samtíðini. Til samanberingar kann vísast til eygleiðingarnar hjá norska rithøvundinum Tomas Espedal (f. 1961), at 1990-árini vóru ein gylt tíð í ummælaravirkseminum í Noregi; ein tíð, har ummælaraumhvørvið var sterkt, og har ummælararnir vóru tilvitaðir um tað vald, teir høvdu at seta dagsskránna í menningini av bókmentum. Espedal er sannførdur um, at bókmentaumhvørvið er viknað nógv síðan 1990-árini („Hagesalongen VI – Forfatterne og kritikken med Tomas Espedal“. 2021:29min). Tað sterka tilvitið um leiklut ummælarans í menningini av bókmentum, sum Espedal nevnir, sæst eisini í føroyskum ummælaravirksemi í hesari tíðini, kanska best í ummælunum hjá Kim Simonsen. Eftir er tó at kanna, um tað er so, sum Espedal sigur um støðuna í Noregi, at kritikkurin eisini er viknaður í Føroyum síðan tað viðgjørda tíðarskeiðið.

Undir øllum umstøðum hoyrir tað við til lýsingina av tíðarskeiðinum í Føroyum, at teir flestu ummælaraprofilarnir, sum ummæltu hetta tíðarskeiðið, eru givnir at ummæla. Anna V. Ellingsgaard, ið var í hæddini sum ummælari hetta tíðarskeiðið, andaðist í 2015. Aðrir ummælarar eru farnir undir ymiskt annað virksemi og hava lagt ummælið á hillina. Sissel Furuseth sigur, at tað er vanligt, at rithøvundar gevast at ummæla, tá teir hava fingið sær eitt navn á bókmentapallinum, og tað er møguligt, at hetta er tað, ið ger seg galdandi fyri Carl Jóhan Jensen og aðrar við.

Jógvan Isaksen, sum hevur ummælt síðani í 1970-árunum, er framvegis virkin og hevur seinastu tíðina ummælt regluliga fyri *Dimmalætting*. Kinna Poulsen er ein av teimum fáu, sum hava megnað at flyta sítt ummælaravirksemi yvir á teir talgildu miðlarnar, og hon ummælir enn bæði í bløðunum og á sínum egna portali. Oddfríður M. Rasmussen hevur eisini ummælt á blogginum hjá *Vencili*, sum hann ritstjórnaði saman við Arnbjørn Ó. Dalsgarð, inntil teir í 2019 valdu at leggja hetta virksemi niður.

Ein annar profilur, Tóroddur Poulsen, „ummælir“ og kritiserar framhaldandi ummælararnar í sínum skaldskapi, hóast hann ikki ummælir í teirri merking, sum hevur fingið rúm í hesari ritgerð. Eisini hann flytur seg út á teir talgildu pallarnar við bloggi og sínum ymisku profilum á netinum.

Spurningurin er, um nýggir ummælarar eru komnir í staðin fyri

teir, sum eru givnir at ummæla, og um teir hava flutt seg yvir á aðrar pallar og átikið sær nýggjar leiklutir. Tað er ein avbjóðing at fylgja við í tí nýggja landslagnum í miðlaheimunum, og summi síggja tað sum eina hóttan móti ummælinum sum tekstslagi, meðan onnur síggja tað sum ein gyltan møguleika at fáa idealið hjá Habermas um eitt kritiskt almenni við myndugum leikfólki fört út í lívið. Aftur onnur óttast, at vit sita í okkara egnu ekkokømrum og hoyra tað, vit eru von at hoyra, og síggja tað, vit eru von at síggja og kanska vilja síggja.

Eg setti mær fyri frá byrjan at lýsa føroyska ummælissøgu, men sá skjótt, at skuldi ritgerðin ikki vera ov yvirskipað, noyddist eg at velja at fokusera meira ítøkiliga. Eg valdi at viðgera tíðarskeiðið 1997-2007 í sínari heild, tó at langt frá alt er sagt um hetta tíðarskeiðið. Mín viðgerð er merkt av teimum spurningum, eg setti mær, og tí eru nógv sjónarhorn eisini frá hesari tíðini framvegis ógranskað.

Tá ljós verður kastað á okkurt, merkir tað, at annað legst í myrkur, og soleiðis er eisini við hesari kanningini. Tann táttur, sum er hennara styrki, nevniliga at hon er fokuserað og viðger eitt tíðarskeið út frá nøkrum ávísum granskingarspurningum í sínari heild, er samstundis hennara veikleiki, tí hon letur alt tað, sum ikki gjørdist ein partur av hesum, liggja eftir úti í myrkrinum. Og tá er talan bæði um tíðarskeið og søgu, sum ikki eru lýst, og eisini sjónarhorn, ið ikki fingu innivist við teimum spurningum, sum eg setti mær fyri at svara. Kanningin skapar tó nýggj granskingarop og leggur upp til, at eitt framhaldandi arbeiði verður gjørt.

Nú er ein kanning gjørd av ummælaravirkseminum í tíðarskeiðinum 1997-2007, tíðini sum leiðir upp til okkara talgildu tíð, har almenni pallurin syndrast og verður bygdur upp á ymiskum nýggjum pallum. Eftir framhaldandi gransking á økinum bíða spurningar sum: eru nýggir ummælarar komnir á breddan, og eru teir øðrvísi enn teir, sum vit síggja í bløðum og tíðarritum? Broytist ummælið sum tekstslag, tá tað flytur úr bløðunum og yvir á bloggar og sosialar miðlar?

Tann føroyska ummælissøgan er enn ikki skrivað. Henni hava vit eisini tørv á fyri at kunna siga við størri vissu, hvaðani vit komu, og hvagar vit eru á veg, tá tað kemur til føroyskt ummælaravirksemi.

10. Summary

This thesis titled "The Critic's Apology" finds that the literary review genre is facing multiple challenges in today's society, because media landscapes and power structures are in constant flux. Literary critics must construct their authority in order to be heard and acknowledged as figures with the authority and power to define good literature.

Having to prove their worth and defend their position as critics is, however, nothing new to literary critics, who, to a degree, have always been a threatened species. Reviewing has been perceived as secondary work, not an art form. Literary critics are often unpopular with authors and their working conditions change frequently. Social trends and media positions shift, and literary critics have to yield to the conditions imposed by the media. The new challenge is how social media scatters reviewing across different platforms making it difficult to get an overview of the debate around literature.

This dissertation argues that literary reviewing is the genre of paradoxes. The dissertation sets out ten paradoxes that describe literary reviews as an area of research. With these paradoxes as a starting point, I first endeavoured to analyse literary reviews as a composite genre, while in parallel engaging with them as art/literary texts. Secondly, I set out to demonstrate the low status of reviews,

while presenting research that is part of a revaluation of reviews as a genre and area of research.

I have gone about this by analysing and categorising all Faroese literary reviews from the period 1997-2007. I have sought to identify any artistic characteristics in these texts in support of the argument that reviews are a form of communication of art texts, but also have the potential to constitute art in their own right. This examination demonstrates that reviews are a genre that merits academic research.

The assumption underlying this research is that literary reviews are important as a genre, and that the literary critic holds a powerful position in the literary institution, because the position to a great extent sets the agenda on how literature is appreciated.

The aim of the study is:

1. To trace the literary review as a genre and explore the position it holds and the role it plays in the literary institution.
2. To offer a general account of the literary reviews in the Faroe Islands in a set period close to the present: 1997-2007.
3. To analyse selected literary reviews and specific literary critic profiles from the period 1997-2007 in detail with a particular focus on how literary critics present themselves in their texts and how they, in the review structure, content, language use and style, constructed their own authority to judge Faroese literature.

This analysis was centred on the following research questions:

1. How do literary critics construct cultural authority for themselves in their texts?
2. How do they stage their persona in the texts?

The analysis found that Faroese reviewing began when the first papers

were published in Faroese at the turn of the 20th century. Although it cannot be said that they took on a fixed form from the outset, early examples of reviews testify to an awareness of the genre even back then. In this thesis Faroese literary reviewing is described as a process of professionalization, which occurred as a gradual acquisition and enhancement of skills and competences, all the while a growing number of literary critics, literary scholars, journalists and authors joined in. It should be noted, however, that this professionalization cannot be said to have reached completion.

This examination of literary reviews dating from the period of 1997-2007, which is the last decade before social media – and in the Faroe Islands particularly Facebook – revolutionised the media sphere, reveals diversity in reviewing, even though certain literary critic profiles draw most attention and set the agenda.

Several literary critics with academic profiles publish reviews as part of a Faroese diaspora in the late 20th century and set a standard for academic reviews, e.g. Jógvan Isaksen, who continues reviewing from abroad during this period. He is a literary scholar and lectures at university. He reviews in *Sosialurin* and reaches a broad readership with his colloquial style. Andrias Justesen reviews in the diaspora periodical *Føringurin* with his academic, but light pen, while René Hjelm reviews in academic style in the diaspora periodical *Bragi* and in *Dimmalætting* – he is a literary critic, who demonstrates acute awareness of the function of reviews in the literary institution and of reviews as a genre. The diaspora reviewers vary in their style of writing, but they share the position of writing about Faroese literature, without directly being part of the Faroese society. Exile is thematized in diaspora publications like *Outsider Magazin* as a key position, which affords the intellectual observer special condition to perceive and assess literary quality. Kim Simonsen consciously utilizes this position in an attempt to build authority as a critic.

The staged critic is described and linked to a performative turn in Nordic literature around the same period, where authors stage themselves in their texts. The *staged critic* is mainly represented by authors who double as critics (author-critics). Author-critics have a new agenda, to break into the literary scene and to this end they

instrumentalise the literary review. The tone is frequently harsh and they often spell out assessment criteria in their reviews. In several instances, descriptions of the author-critic's own poetics take up more space than the discussion of the work reviewed. This is first and foremost the case of authors and literary critics Carl Jóhan Jensen and Kim Simonsen, who make a name for themselves as literary critics during this decade. They represent a new type of literary critic in the Faroese literary institution, where the staging of the literary critic's own *persona* is part of a strategy to construct authority.

Tensions between different literary ideals are also evident in this period. The debate between Hanus Kamban and Carl Jóhan Jensen and others, touches on both aesthetic and gender politics. These discussions date further back than the period covered here, and become a recurring fixture in their reviews. This debate is an example of lively conversation during this period, which considers the purpose of literature, who should be writing it and who should have the power to categorise it. The debate reflects a vivid literary scene that encompassed differing views.

There are also palpable tensions in confrontations where writers use reviews to challenge other writers and their perception of literature, in order to establish themselves on the literary scene as authors. Carl Jóhan Jensen challenges Hanus Kamban and in the same sweep promotes his own poetics about '*uttangarðsskaldskapur',* loosely translated as 'literature beyond the village walls', which, however, is a concept he already put forward in 1989. Kim Simonsen, in turn, challenges Tóroddur Poulsen's concept of literature and promotes his own poetics about post-modernism being on its way out and the need to "dare to say something beautiful again".

In this period, we also discern communities of literary critics who influence the power structures on the literary stage. Kim Simonsen publishes his own literature while also editing *Outsider Magazin,* and the same people who review Kim Simonsen's authorship apart from the the cultural journalist at *Sosialurin*, also write in *Outsider Magazin* and have close ties to the editorship in general.

During the period under study, there is a lively debate about women's literature both in literary reviews and in the media. Carl Jóhan Jensen sparks a debate about the concept *'drekkamunsrealisma',* loosely translatable as 'shall I pop the kettle on? realism'. He groups Bergtóra Hanusardóttur, Marianna Debes Dahl and Oddvør Johansen into the category of women, who write this type of realism and the critique is merciless. In the same spirit Kim Simonsen also critiques realistic literature where "every closet has to be opened and every feeling picked apart," as he puts it, and terms this literature 'so-called' realism, which is everyday and boring. Agnar Jógvansson ups the ante calling literature about women and their issues, '*didduskaldskapur',* 'little girl literature'. These statements are analysed as a, to varying degrees, conscious strategy to exclude women's points of view and women's topics from the dominant literary tradition.

A feministic counter-current is represented by three women with academic degrees, who write about women writers in *Kvinnutíðindi*, Guðrun Gaard, Vár í Ólavsstovu and Kirsten Brix, along with Marianna Debes Dahl, Hanus Kamban and Turið Sigurðardóttir.

This research indicates that the literary review initially was a male-dominated genre, but that women gradually have become a significant part of Faroese reviewing and the professionalization process that has taken place. This is partly refelcted in newfound appreciation of values, which the male-dominated literary tradition has tended to marginalise.

Three women literary critics, who are part of the professionalization process, make their mark in different ways. Anna Ellingsgaard reviews both women and men writers, but her gender is not in the forefront of her *ethos* as a critic. Turið Sigurðardóttir reviews as many women as men. Her feminist agenda is reflected in this distribution and sometimes shines through her reviews. Kinna Poulsen does not have a feminist agenda and during these years she only reviews male authors. Anna V. Ellingsgaard worked as a cultural journalist, but her refined literary skills colour her texts, particularly when she reviews novels. Turið Sigurðardóttir is an academic literary critic who strives for an objective style. Her texts are highly stylized and any value judgements must be found between the lines, they are rarely directly pronounced. Kinna Poulsen's reviews have an impressionistic air, which is academically grounded. She stages a *persona*, which means that subjectivity has a strong presence in her reviews.

Overall, one can say that particularly three areas generate the most controversy regarding how literature should be assessed in the researched period. Namely feminist versus anti-feminist agendas, aesthetic versus nationalist agendas, and the question, with regards to language use, to what extend art can be based on the everyday and be expressed in everyday language, or whether it should continually strive to distance itself from the everyday and create new artistic language.

Finally, three authors cum critics are described, Heðin M. Klein, Gunnar Hoydal and Alexandur Kritstiansen. They have only published one review each during this period; however, their texts epitomize the creative force that is also part of literary reviews as a genre, particularly when authors are at the pen. These reviews are held up as examples that reviews not only communicate art, but *are* art.

Last but not least, this work finds that Faroese reviews have a marked metafunction. This is not unusual elsewhere, however, it is not a function other researchers have emphasised much. I have interpreted the marked metafunction in Faroese reviews partly as a way of defending one's right to review. At times metacritique is an attempt to apologise, at times it is an attempt to construct one's authority, and at times it is a way of talking oneself into something: thinking out loud about all the aspects you consider when reviewing. I perceive this as an indication of the weak reviewing tradition in the Faroe Islands. Perhaps this metacritique is also a sign of crisis, though it makes little sense to speak of any crisis in Faroese reviewing, as it is a condition of its very existence that literary reviews are in a weak position and that literary critics constantly have to defend their right to exist. At the same time, this is also an indication that the culture of deprivation, which has characterised the minute Faroese literary institution, continues to be reflected in reviews, in spite of the ongoing process of capacity building.

Future research

The period 1997-2007 appears to be lively time in the history of Faroese reviewing with relatively numerous and diverse reviews, which reflect literary currents and tensions between contemporary literary outlooks. As a comparison one might consider the observations of Norwegian author Tomas Espedal (born 1961), that the 1990s were a golden period in Norwegian literary reviewing; a time where the reviewer scene was strong, and reviewers were conscious of their power to set the agenda in literary development. Espedal is convinced that the literary reviewer scene has weakened considerably since the 1990s ("Hagesalongen VI – Forfatterne og kritikken med Tomas Espedal". 2021:29min). The acute awareness of the role played by reviewers in developing literature, which Espedal mentions, is also present in reviewing during the research period, perhaps most palpably in Kim Simonsens's reviews. One outstanding research task, however, is to elucidate whether Espedal's observations about Norway also hold true in the Faroe Islands and if critique has also weakened in the Faroe Islands since the studied period. At any rate, part and parcel of the account of this period that most of its literary critic profiles have since stopped reviewing. Anna V. Ellingsgaard, who was at her peak as a literary critic during this period, passed away in 2015, while other literary critics shifted their attention to other activities. According to Sissel Furuseth, it is common for authors to stop reviewing once they have made a name for themselves on the literary scene, and this may be the case of Carl Jóhan Jensen and others with him.

Jógvan Isaksen, who has been reviewing since the 1970s, remains active and now regularly reviews for the newspaper *Dimmalætting*. Kinna Poulsen is one of the few who has managed to transfer her reviewing activity to digital media and she reviews both for printed media and on her own portal. Oddfríður M. Rasmussen has also reviewed on the blog *Vencil,* which he edited along with Arnbjørn Ó. Dalsgarð until they chose to end this activity in 2019.

Another profile, Tóroddur Poulsen, continually "reviews" and critiques literary critics in his literature, though he does not review in the sense covered in this dissertation. He too is moving into the digital sphere with his blog and various online profiles.

The question is whether new literary critics have taken the places of those who have ceased reviewing, and whether they have moved on to other platforms and taken on new roles. It is challenging to keep

abreast of the new media landscape, some perceive this as a threat to literary reviews as a genre, while for others it is a golden opportunity to realise Habermas' ideal of a critical public sphere made up of authoritative laypersons. Yet others fear that we are sitting in our own echo chambers hearing what we are used to hearing and seeing what we are used to seeing, and perhaps want to see.

Initially I set out to examine the whole history of Faroese literary reviews, however, I quickly realised that if the dissertation were not to become too general, I would have to select a more specific focus. I chose to examine the period of 1997-2007 in its entirety, yet much more could be said about it. My research was shaped by the questions I asked myself; hence many perspectives on this decade remain unstudied.

Shining a light on one thing invariably means leaving another in the dark, so it is with this study too. The characteristic that is its strength, namely that it focuses and offers a comprehensive examination of a set period guided by specific research questions, is also its weakness, as it leaves everything beyond this focus in the dark. The exclusions encompass unexamined periods and history, as well as angles outside the scope of the questions I set out to answer. Even so, this dissertation opens up new lines of research and lays a foundation for continued work.

We now have a study on literary reviewing in the period 1997-2007, the time leading up to our digital era with its shattered public platform under reconstruction on myriad new platforms. Awaiting further research are questions such as: have new literary critics entered the scene, and do they differ from the ones we see in newspapers and magazines? Do literary reviews as a genre change as they shift from newspapers over to blogs and social media?

Moreover, the history of Faroese literary reviewing has yet to be written. We need it in order to be able to say with greater certainty where we come from and where we are heading in Faroese literary reviewing.

11. Bókmentir

Aðalsteinsdóttir, Auður. 2016. *Bókmenntagagnrýni á almannavettvangi. Vald og virkni ritdóma á íslensku bókmenntasviði.* Reykjavík, Háskóli Íslands, Hugvísindasvið Íslensku- og menningardeild.

Andersson, Axel. 2018. „Kritiken om 100 år". *Framtidens kritik. Två ess*äer. Ariel litterär kritik [9]:7-73.

Andreasen, Uffe og Winge, Mette. 1972. *Kritiske tekster I.* Gyldendal.

Andreassen, Hanus. 1989. „Tá hugmóð verður haft". *Sosialurin* nr. 97. 26. august.

Andreassen, Hanus. 1999. „Enn gellir lúður í stavni". *Sosialurin* nr. 240. 16. desember:15.

Anker Elizabeth S. og Felski, Rita. 2017. „Introduction". *Critique and Postcritique.* Elizabeth S. Anker og Rita Felski (ritstj.). Duke University Press.

„Anmelder". 1899. „Litteratur". *Dúgvan* nr. 5, 6. árg. 11. mai.

Arge, Uni. 2004. *Komin er nú onnur øld*. Tórshavn, Tjarnardeild.

Aristotle. *The „Art" of Rhetoric*. E.Capps et al. (ritstj.) https://ryanfb.github.io/loebolus-data/L193.pdf (20.02.2019).

Arnold, Matthew. 1989. „The Function of Criticism at the Present Time" (1865). *Literary Criticism and Theory*. Robert Con Davis og Laurie Finke (ritstj.). Longman:499-515.

Arping, Åsa og Nordenstram, Anna. 2005. „Förord". *Feministiska litteraturanalyser 1972-2002*. Åsa Arping og Anna Nordenstram (ritstj.). Studentlitteratur. Lund:7-13.

Baldick, Chris. 1990. *The Concise Oxford Dictionary og Literary Terms*. Oxford og New York, Oxford University Press.

Barthes, Roland. 1975. *The Pleasure of the Text*. Richard Miller týddi. New Tork, Hill & Wang.

Beauvoir, Simone de. 2019. *Det andet køn*. Bind 1: Kendsgerninger og myter. Upprunaliga útgivin í 1949. Týðing: Karen Stougaard Hansen og Mette Olesen. Gyldendal.

Beiti, Ólavur í. 1997a. „Leiðarljós – aftur eitt fjart suð". *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 99, 31. mai:2.

Beiti, Ólavur í. 1997b. „Páskaódn og páskaóhumska". *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 232, 6. desember:2.

Beiti, Ólavur í. 1997c. „Kensluborin og sterk lívsminni". *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 237, 13. desember:2.

Beiti, Ólavur í. 1998. „Ongantíð áður havi eg hoyrt so vælnøgdan og fegnan útgevara". *Sosialurin* nr. 238. 15. desember:20.

Beiti, Ólavur í. 2006. „Sosialurin eigur at kenna mørk". *Sosialurin* nr. 247, 21. desember:11.

Bíblia http://biblia.fo/index.php?l=fo (13.11.2018).

bloggoddur. 2016a. Sí Poulsen, Tóroddur. 2016.

Bloom, Harold. 1997. *The Anxiety of Influence. A Theory of Poetry*. Second Edition. Upprunaliga útgivin í 1973. New York & Oxford, Oxford University Press.

Booth, Wayne C. 1983. *The Rhetoric of Fiction*. Onnur útgáva. The University of Chicago Press.

Borum, Poul. 1988. „Som svar på deres ærede". *Passage – Tidsskrift for Litteratur Og Kritik* 3, nr. 5.

Bourdieu, Pierre. 1996. *The Rules of Art*. Susan Emanuel týddi. Upprunaliga útgivin sum *Les Règles de l'art* (1992). Polity Press.

„Bókadagarnir á breddanum". 2014. Mentanarsending hjá KVF. Suni Merkistein og Rannvá Gaard Fossaberg leggja til rættis. https://kvf.fo/mentanarkafein?sid=33132 (27.12.2020).

Bredsdorff, Thomas, Jørgensen, John Chr. og Klysner, Finn. 1983. „Anmeldelsen er en avisartikel. Forhistorie om kritik og anmelderi". *Anmelderi*. Thomas Bredsdorff, John Chr. Jørgensen og Finn Klysner (ritstj.). Forfatterne og A/S Fremad af 1979:7-13.

Brenson, Michael. 1998. „Resisting the Dangerous Journey: The Crisis of Journalistic Criticism". *The Crisis of Criticism*. Maurice Berger (ritstj.). New York, The New Press:100-131.

Brix, Kirsten. 1999a. „Duldar leiðir". *Kvinnutíðindi*:55-56.

Brix, Kirsten. 1999b. „Sára Tummasardóttir – ein tragisk og óhugnalig kvinnulagna". *Sosialurin* nr. 243, 21. desember:11.

Bukdahl, Lars. 2019. „Ondt blæk". *Weekendavisen* #33, 16. august.

„Bölvun bókmenntaritstjóra að lesa hægt“. 2018. Kiljan í RUV. Egill Helgason í samrøðu við Pamela Paul. http://www.ruv.is/frett/bolvun-bokmenntaritstjora-ad-lesa-haegt (21.09.2018).

„C“. 1899. „Smásangir og sálmar“. *Føringatíðindi* nr. 9, 10. árg. 4. mai.

„C“. 1914. „J.H.O. Djurhuus: Yrkingar“. *Tingakrossur* nr. 22, 14. árg. 27. mai.

Cherry, Roger D. 1998. „Ethos Versus Persona. Self-Representation in Written Discourse“. *Written Communication.* Vol 15. No 3, 3.juli:384-410.

Christiansen, Atle. 2010. *Kritikarboka*. Fakbokforlaget.

Dahl, Árni. 1985. „Bókaummæli.“ *Fróðskaparrit* 33. bók. Annales Societatis Scientiarum Færoensis:63-68.

Dahl, Marianna Debes. 2007. „Og hugurin ferðast so víða...“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 4, 5. januar:44-45.

Dahlerup, Pil. 2005. „Omedvetna attityder hos en recensent“. *Feministiska litteraturanalyser 1972-2002*. Åsa Arping og Anna Nordenstram (ritstj.). Lund, Studentlitteratur:17-24.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2001. „Paradís dilettantanna“. *Fregnir* nr. 1, 6. apríl.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2002. *Føroysk blaðsøga 1852-2002*. Sprotin.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2003a. „Orðligt smør“. *Fregnir* nr. 40, 12. desember:12.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2003b. „Tráðleysar yrkingar“. *Fregnir* nr. 40, 12. desember:13.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2004. „Neyðugt ósmædni“. *Fregnir* 23.-29. januar:13.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2005a. „Nýggjar yrkingar frá Oddfríði“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 237, 9.desember:45.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2005b. „Glansbílætasamlararnir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 242, 15.desember:45.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2006. „Hálov av skaldskapi“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 10, 13.januar:45.

Dam, Rólant. 2017. „Tá ið heimstaðir hugans í ódnini halla. Um kritiskan kapital og almenni í Føroyum“. *Varðin* nr. 84, bind 1:12-26.

Danielsen, Trygvi. 2018. „Gudahøvd“. *Varðin* 85, 1. bd:183-188.

Dass, Petter. 1999. *Norðlandslúðurin*. Axel Tórgarð týddi. Stiðin.

Debes, Hans Jacob. 1982. *Nú er tann stundin....* Føroya Skúlabókagrunnur.

Didriksen, Lydia og Nolsøe, Rógvi. 1997. „Leiðarljós – ein ótrúliga spennandi bók“. *Føringurin* 25. september:2.

Dylan, Bob. 2014. „Ballad of a Thin Man“ (1965). *The Lyrics*. (Christopher Ricks, Lisa Nemrow, and Julie Nemrow (ritstj.). A CBS COMPANY:212-213.

Eagleton, Terry. 2005. *The Function of Criticism*. Upprunaliga útgivin í 1984. Verso.

Edenborg, Carl-Michael. 2018. „Den vikande kritiken“ *Aftonbladet.* 13. februar. https://www.aftonbladet.se/a/8wO1a2 (02.03.2018).

Eliot, T. S. 1965. „To Criticize the Critic“ (1961). *To Criticize the Critic and Other Writings by T. S. Eliot*. Lincoln and London, University of Nebraska Press:11-26.

Ellingsgaard, Anna V. 2004. „Køkutombola í Sebastians Húsi“ *Sosialurin* nr. 239. 14. desember: 9.

Ellingsgaard, Anna V. 2005a. „Listamaður í tríkantsdrama“. *Sosialurin* nr. 81. 30. apríl: 38

Ellingsgaard, Anna V. 2005b. „Gud og erotikkur“. *Sosialurin* nr. 110. 14. juni.

Ellingsgaard, Anna V. 2005c. „Djevulsettur menniskjaskapur“. *Sosialurin* nr. 232. 2. desember: 30-31.

Ellingsgaard, Anna V. 2005d. „Soleiðis kann tað ganga“. *Sosialurin* nr. 237, 9. desember:32.

Ellingsgaard, Anna V. 2006a. „Ein føroyskur Marlowe fer í grind“. Sosialurin nr. 35. 17. februar: 31.

Ellingsgaard, Anna V. 2006b. „Meir og betri skaldskap á føroyskum“. *Sosialurin* nr. 84, 2. mai:6.

Ellingsgaard, Anna V. 2006c. „Postmodernisma er avblást“. *Sosialurin* nr. 105. 2. juni.

Ellingsgaard, Anna V. 2006d. „Kim saknar vakurleikan“. *Sosialurin* nr. 114. 16. juni:34-35.

Elliot, Robert C. 1982. *The Literary Persona*. Chicago and London, The University of Chicago Press.

Engdahl, Horace. 2014. „Kritikken og dens dobbeltgænger“. *Arret efter drømmen. Essay.* Upprunaliga útgivin á svenskum sum Ärret efter drömmen (2009). Birgitte Steffen Nielsen umsetti til danskt. Jensen & Dalgaard:125-130.

Escarpit, Robert. 1968 (1958). *Litteratursociologi*. W&Wserien 255.

„Et Danmark uden anmeldere“. *Information*. https://www.information.dk/serie/danmark-uden-anmeldere-0 (18.01.2018).

Eysteinsson, Ástráður. 1982. „Bókmenntagagnrýni dagblaðanna“. *Tímarit Máls og menningar.* 43:431-455.

Eysteinsson, Ástráður. 2017. *Orðaskil. Í heimi Þýðinga*. Bókmenta- og listafræðistofnun Háskóla Íslands og Háskólaútgáfan.

Felski, Rita. 2015. *The Limits of Critique.* The University of Chicago Press. Chicago.

Felski, Rita. 2017. „Art and Attunement“. Fyrilestur á Oxford universiteti 19. desember https://podcasts.ox.ac.uk/art-and-attunement-professor-rita-felski-university-virginia-and-southern-denmark (29.08.2019).

Forser, Tomas. 2002. *Kritik av kritiken. 1900-talets svenska litteraturkritik*. Anthropos.

Forser, Tomas. 2005. „I vinnarhålet“ *Kultur.* 17. febr. https://www.expressen.se/kultur/i-vinnarhalet/ (15.07.2019).

Forser, Tomas. 2019. „Norskt storverk om litteraturkritik äntligen klart“. *Göteborgs-Posten*. 12. februar. https://www.gp.se/kultur/norskt-storverk-om-litteraturkritik-%C3%A4ntligen-klart-1.13248534?fbclid=IwAR3o-Z6zhZOhEZg58M3lqbImTT1tO7ROqT0PW7YhmKu6GGseStW0sZesbXE (01.04.2019).

Foucault, Michel. 1972. „The Discourse on Language“ (1970). *The Archaeology of Knowledge and the Discourse on Language*. Translated from the French by A. M. Sheridan Smith. New York, Pantheon Books:215-237.

Foucault, Michel. 1989. „What is an Author?“ (1969). *Literary Criticism and Theory*. Robert Con Davis og Laurie Finke (ritstj.). Longman:720-732.

Frye, Northrop. 1989. „The Function of Criticism at the Present Time“ (1957). *Literary Criticism and Theory*. Robert Con Davis og Laurie Finke (ritstj.). Longman:656-667.

Frye, Northrop. 2000. *Anatomy of Criticism*. Upprunaliga útgivin í 1957. Princeton University Press.

Funding, Elsa. 1994. „Ummæli um bøkur Marionnu Debes Dahl“. *Vinalagið, náttúran og samfelagið. Tættir í ritverki Marionnu Debes Dahl*. Lagt til rættis Malan Marnersdóttir. Mentunargrunnur Studentafelagsins:180-204.

Furuseth, Sissel. 2008. „Kritikk som retorisk handling“. *kunstkritikk.no*. 23. september. https://kunstkritikk.no/kritikk-som-retorisk-handling/ (15.03.2019).

Furuseth, Sissel. 2013. „Fra resepsjon til produksjon: litteraturkritikk som kulturell praksis“. *Litteratursosiologiske perspektiv*. Jofrid Karner Smidt, Tonje Vold og Knut Oterhold (ritstj.). Universitetsforlaget: 141-167.

Furuseth, Sissel. 2015. *Forfatteren som kritiker*. Novus Forlag. Oslo.

Furuseth, Sissel. 2016a. „Litteraturkritikkens retorikk“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870- 2010*. Sissel Furuseth, Jahn H. Thon og Eirik Vassenden (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget: 457-472.

Furuseth, Sissel. 2016b. „1945-1965: Etterkrigstid og kulturell nyorientering“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870 – 2010*. Sissel Furuseth, Jahn H. Thon og Eirik Vassenden (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:305-319.

Furuseth, Sissel. 2016c. „Norsk Litteraturkritikerlag (1946-1998) – en institusjon i institusjonen“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Sissel Furuseth, Jahn H. Thon og Eirik Vassenden (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:323-335.

Furuseth, Sissel. 2016d. „En pris for kunsten å vurdere: „Årets litteraturkritiker“ (1994-)“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Sissel Furuseth, Jahn H. Thon og Eirik Vassenden (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:548-555.

Furuseth, Sissel. 2016e. „1890-1905 – Profesjonalisering av kritikken“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Sissel Furuseth, Jahn H. Thon og Eirik Vassenden (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:75-85.

Furuseth, Sissel og Vassenden, Eirik. 2016. „Indledning“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Sissel Furuseth, Jahn H. Thon og Eirik Vassenden (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:13-23.

Gaard, Guðrun. 1999. „Úti á leysum oyggjum. Bókarummæli“. *Kvinnutíðindi*:57.

Gaard, Guðrun. 2007. „Eitt marglitt bregdað band“. *Dimmalætting* 18. oktober.

Gads Litteraturleksikon. 1999. Rasmussen, Henrik, Jakobsen, Kamilla Hygum og Camera, Jeanne Berman. Henrik Rasmussen (ritstj.). Keypmannahavn, Gads Forlag.

Gjesdal, Kristin og Lending, Mari. 1995. „Redaktørenes forord“. *Distinksjonen. En sosiologisk kritikk av dømmekraften*. Pierre Bourdieu. Oversatt av Annick Prieur. Upprunaliga útgivin sum *La distinction* (1979). Oslo, Pax Forlag A/S:5.

Gripsrud, Jostein. (1982). “„Den skjulte kritikk – finnes den?“ – eller: Om litterære normer og utforminga av litteraturhistorien.“ *Vinduet*. 3 (36): 58-62.

Grue, Jan. 2007. „Filmanmeldelsens retorikk: personlig ethos“. *Rhetorica Scandinavica: tidsskrift for skandinavisk retorikforskning* No. 42. Retorikförlaget AB: 20-30.

Guðjónsson, Pauli. 2004. "„Føroyingar liva ikki....". *Skái* í *Dimmalætting* nr. 36, 21. februar:8.

Guðjónsson, Pauli. 2005. „Patos úr Gulag o.a.". *Skái* í *Dimmalætting* nr. 124, 1. juli:48-49.

Gullbein, Sjúrður. 1997. „Páskaódnin í Havn". *Mentan og frítíð* í *Føroinginum* 18. desember:3.

Habermas, Jürgen. 2009. *Borgerlig offentlighed*. Henning Vangsgaard týddi. Upprunaliga útgivin sum *Strukturwandel der Öffentlichkeit* (1962). Informations Forlag.

Hagen, Erik Bjerck. 2004. *Litteraturkritikk. En introduksjon*. Oslo, Universitetsforlaget.

„Hagesalongen VI – Forfatterne og kritikken med Tomas Espedal". 2021. Samrøða við Tomas Espedal. Erlend Liisberg og Erik Bjerck Hagen leggja til rættis. https://soundcloud.com/bergenbibliotek/317-hagesalongen-vi (09.02.2022)

Handesten, Lars. 2018. *Litteraturen rundt. Aktører i det litterære felt*. Samfundslitteratur.

Hansen, Bergur. 1993. „Dreymurin um eina aðra leið". *Varðin* Bind 60. Tórshavn, Felagið Varðin:239-243.

Hansen, Bergur. 2000. „Grýtuta leiðin gjøgnum 20. øld". *Varðin* Bind 67. Tórshavn, Felagið Varðin:164-173.

Hansen, Bergur Djurhuus. 1997. „Tá orðini fara á flog". *Dimmalætting* 14. august:2.

Hansen, Bergur Djurhuus. 2015. „Tað góða og tað ónda eru í hvørjumøðrum". *Dimmalætting* nr. 34, 4. september:22-23.

Hansen, Bergur Djurhuus. 2017a. „Pallsetti yrkjarin". *Bók Jógvan. Heiðursrit til Jógvan í Lon Jacobsen á 60 ára degnum*. Zakaris Svabo Hansen, Anfinnur Johansen, Hjalmar P. Petersen og Lena Reinert (ritstj.). Fróðskapur:86-97.

Hansen, Bergur Djurhuus. 2017b. „Um kritikk, ummæli og Kinnu Poulsen". *Listamál*. Sprotin:8-10.

Hansen, Dorit. 2016. „Marjun Syderbø Kjelnæs: Við stillari torurødd. Rithøvundasamrøða". *Varðin* 83, 1.bd.:43-64.

Heinesen, William. 1937. „Hans Andrias kvøður". *Tingakrossur* nr. 3, árg. 37. 13. januar:1-2.

Heinesen, William. 1950. „Litteratur og aandsliv". *Livet paa Færøerne*. Hans A. Djurhuus (ritstj.). Dansk kulturforlag:145-169.

Heinesen, William. 1970. „Forord". *Færøerne. Natur og folk*. Tredje reviderede udgave. Tórshavn, Pf. H.N. Jacobsens Bókahandils Forlag.

Heinesen, William. 2009. „Dilletantisme og kunst". *Christian Matras' brevveksling med William Heinesen og Karsten Hoydal*. Anne-Kari Skarðhamar (riststj.). Tórshavn, Fróðskapur:77-80.

Heinesen, William (y). 1997. „Ójavnar søgur úr Port Janua". *Fjølnir* nr. 3:28-29.

Hertel, Hans. 1972. „Litteratursociologi – og noget at bruge den til" í Escarpit, Robert. 1972. *Bogen og læseren*. Udvidet dansk udgave – med tillæg om Det litterære system i Danmark ved Hans Hertel. Keypmannahavn, Hans Reizel:7-12.

Hjelm, René. 1997. „Heilaflukt – útbúgvið fólk í Føroyum". *Fjølnir* nr. 5:16-19.

Hjelm, René. 2001a. „Mjørki í heilum, men klárt í støðum“. *Skái* í *Dimmalætting* 13. oktober:4.

Hjelm, René. 2001b. „Níggju nýggjar pílagrímsferðir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 223, 17. november:2.

„Hóri“. 1997. „Skald undir hatti“. *Dimmalætting* 14. august:2.

Hoydal, Gunnar. 1998. „Jóanes er romantikari“. *Sosialurin* nr 25, 7. februar:15.

Hoydal, Marianna. 1997. „Gestsins eyga“. *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 9. januar:2.

Haarder, Jon Helt. 2014. *Performativ biografisme. En hovedstrømning i det senmodernes skandinaviske litteratur.* Gyldendal.

Isaksen, Jógvan. 1983. *Føroyski mentunarpallurin. Greinir og ummæli*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Isaksen, Jógvan. 1988. „At taka dagar ímillum. Hugleiðingar um at ummæla“. *At taka dagar ímillum. Um at ummæla og eitt úrval av ummælum*. Føroya skúlabókagrunnur:15-32.

Isaksen, Jógvan. 1995. „Var Kafka klaksvíkingur. Heimurin sæddur úr keikioskini“. *Sosialurin.* 19. apríl.

Isaksen, Jógvan. 1998a. „Í ævintýrheimi“. *Sosialurin* nr. 104, 6. juni:13.

Isaksen, Jógvan. 1998b. „Kosmisk eindarkensla“. *Sosialurin* nr. 234, 9. desember:10.

Isaksen, Jógvan. 1998c. „Beisk og lívsjáttandi skaldsøga“. *Sosialurin* nr. 242, 19. desember:13.

Isaksen, Jógvan. 1999a. „At tola at bíða“. *Sosialurin* nr. 197, 16. oktober:22.

Isaksen, Jógvan. 1999b. „At ummæla í Føroyum“. *Bragi* nr. 1:3-7.

Isaksen, Jógvan. 2000. „Anders And og Dante er ikke det samme. Om at anmelde på Færøerne“. *Nordisk litteratur*:72-74.

Isaksen, Jógvan. 2001. „Dvørgar, vargmenn og annað valafólk“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 14, 20. januar:17.

Isaksen, Jógvan. 2004. „Grát alt tað tú kanst, men flenn tað dupulta“. *Sosialurin* nr. 233, 4. desember:33.

Isaksen, Jógvan. 2006. *Loystur úr fjøtrum*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Isaksen, Jógvan. 2007a. „Mangt er til, sum ikki er til“. *Vikuskifti, Sosialurin* nr. 223, 16. november:18.

Isaksen, Jógvan. 2007b. „Handan rimar“. *Sosialurin* nr. 248, 21. desember:21.

Isaksen, Jógvan. 2007c. „Jóanesar opinbering“. *Sosialurin* nr. 248, 21. desember:21.

Isaksen, Jógvan. 2008. *Dulsmál og loynigongir.* Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Isaksen, Jógvan. 2019. „Hugleiðingar um ummælir og føroyska bókaútgávu“. *Dimmalætting.* nr. 39, 11. oktober:32-34.

Isholm, Páll. 2000a. „Tann ódeyðiliga sálin og óendaliga søgan“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 20, 29. januar:16.

Isholm, Páll. 2000b. „Har náttúran fær orð og menniskjaligar eginleikar“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 30, 12. februar:15.

Isholm, Páll. 2000c. „Kvinnulagna og siðamisbrot í átjandu øld“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 50, 11. mars:16.

Isholm, Páll. 2000d. „Føroysk hugløg í japonskum stíli“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 45, 4. mars:16.

Isholm, Páll. 2000e. „Sið- ella skaldsøga“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 198, 14. oktober:16.

Isholm, Páll. 2000f. „Løtumynd úr Hans Andriasarhúsi“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 238 , 9. desember:12.

Isholm, Páll. 2000g. „Eingin fer undan lagnuni“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 248, 23. desember:2.

Isholm, Páll. 2000h. „Mýtan livir í leikinum“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 243, 16. desember:2.

Jacobsen, Erhard. 2011.„Ummæli eru ikki tað, tey vóru“. Bloggur 15. nov. https://erhjac.wordpress.com/2011/11/15/ummaeli-er-ikki-tad-tey-voru/ 06.09.2018.

Jacobsen, Steinbjørn B. 2001. „Færøsk kulturpolitik“. *Færøsk kulturpolitik ved indgangen til et nyt århundrede*. Jette Forchhammer (ritstj.). Nordisk kulturpolitik under Forandring:82

Jacobsen, Steinbjørn B. 2002. *Karr.* Forlagið Fannir.

Jacobsen, Eyðun. 1998. „Ein rættilig narrifisa“. *Fjølnir* nr. 2:24.

Jákupsson, Tórfinnur. 2006. „Vit eri í tí, vit skriva“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 158, 18. august:46-47.

Jákupsstovu, Guðrun í. 2020. „Hennara framtíð er okkara framtíð“. *Varðin* bind 87. Rakel Helmsdal, Sanna Andrassardóttir Dahl og Sanna Klein (ritstj.). Felagið Varðin:181-186.

Jensen, Carl Jóhan. 1989. „Málið kemur ikki av sær sjálvum“. *Brá* nr. 13/14:120-122.

Jensen, Carl Jóhan. 1997. „Hugur, um hug, frá hugi, til hugs“. *Skeggin*, november:6-9.

Jensen, Carl Jóhan. 1999. „Mongum brestur ætlan“. *Dimmalætting.* 18. desember.

Jensen, Carl Jóhan. 2000a. „Millumstøðuspei“. *Dimmalætting* nr. 5, 8. januar.

Jensen, Carl Jóhan. 2000b. „Melur allar tættir saman“. *Sosialurin* nr. 218, 11. november:22-23.

Jensen, Carl Jóhan. 2000c. „Flogleysir veingir“. *Sosialurin* nr. 243, 16. desember:24-25.

Jensen, Carl Jóhan. 2001a. „Fjølmiðlatátturin“. *Fregnir* nr.4, 27. apríl.

Jensen, Carl Jóhan. 2001b. „Leitanin flákrar vill í øllum ættum“. *Fregnir* nr. 6, 10. mai.

Jensen, Carl Jóhan. 2001c. „Súmbol í einum sinnissjúkum máli“. *Fregnir.* 15. november.

Jensen, Carl Jóhan. 2002a. „Um forharmilsi“. *Fregnir* nr. 1, 11. januar.

Jensen, Carl Jóhan. 2002b. „Mín bústaður stendur ikki á kletti“. *Fregnir* nr. 42, 22. november:12.

Jensen, Carl Jóhan. 2002c. „Mjørki er ein sannleiki ið alla tíðina verður ein annar“. *Fregnir* nr. 44. 6. desember:16.

Jensen, Carl Jóhan. 2003. „Á ferð inn í eitt óendaligt suss“. *Fregnir*, 31. januar:15.

Jensen, Carl Jóhan. 2004. „Ein farri av skaldskapi“. *Fregnir* nr. 13, 16. apríl:8.

Jensen, Carl Jóhan: 2006a. „Skald, mál og tunnuposar“. *Sosialurin* 20. oktober:16-17.

Jensen, Carl Jóhan. 2006b. „Um blaðlýs og drekkamunsrealismu“. *Sosialurin* nr. 245, 19. desember.

Jensen, Carl Jóhan. 2015a. https://www.facebook.com/carl.j.jensen/posts/10156592535268593 (25.10.2018).

Jensen, Carl Jóhan. 2015b. „Ikki ein takkarrøða“ https://www.facebook.com/notes/carl-j%C3%B3han-jensen/ikki-ein-takkarr%C3%B8%C3%B0a/10153605364249354/ (10.10.2018).

Jensen, Carl Jóhan. 2015c. *Bókin um tað góða*. Vilhjálm við Hoygil greiddi til útgávu. Sprotin.

Jensen, Carl Jóhan. 2018. „25 minuttir: Carl Jóhan Jensen“. Samrøða við Sissal Kampmann í Kringvarpi Føroya 31. januar http://kvf.fo/25?sid=75175 (25.10. 2018).

Jensen, Meinhard. 2002. „Karr“. *Fregnir* nr. 43, 29. november:16.

Jensen, Petur Pólsson. 1997. „Tá deyðin bankar uppá“. *Sosialurin* nr. 224, 22. november:9.

Jensen, Petur Pólsson. 1998. „Ein spurningur um flog“. *Krydd* í *Dimmalætting* nr. 238, 16. desember.

Joensen, Edward. 1997. „Argumentini eru ov grunn“. *Sosialurin* nr. 147. 7. august.

Joensen, Poul F. 1988 (uppr. 1967). *Ramar risti hann rúnirnar*. Onnur útgáva. Tórshavn, Einars prent og forlag.

Joensen, Sigurð. 1987. „Hugskot uppi yvir einum hálvpiðaðum háryggi“. *Eg stoyti heitt*. Fyrra bind. Mentunargrunnur Studentafelagsins:162-165.

Johannesen, Malan. 1998a. „Framtíðarsøga um Havnina“. *Oyggjaskeggi* nr. 1, februar:8.

Johannesen, Malan. 1998b. „Faðirmorð við einum orði“. *Oyggjaskeggi* nr. 4. mai:7.

Johansen, Jørgen Dines. 1984. „Forsøg på en systematisering af vurderingskriterier for skønlitterære tekster“. *Litterær værdi og vurdering*. Jørgen Dines Johansen og Erik Nielsen (ritstj.). Odense Universitetsforlag.

Jógvansdóttir, Sonja. 1997. „Páskaódnin“. *Sosialurin* nr. 222, 20. november:8.

Jógvansson, Agnar. 2005a. „Ferðast ongantíð heim“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 104, 3. juni:48-49.

Jógvansson, Agnar. 2005b. „Hvat hava „Hvør var Nimrod“ og „Sebastians hús“ til felags?“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 119, 24. juni:44.

Jógvansson, Agnar. 2006. „Størstur av øllum er kærleikin“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 129, 7. juli:38-39.

Jógvansson, Agnar. 2007a. „Nøkur orð um Vencil yngra“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 72, 13. februar:32.

Jógvansson, Agnar. 2007b. „Søgur um fívilskap – ummæli av „Ó"". *Skái* í *Dimmalætting* nr. 81, 27. apríl:50-51.

Justesen, Andrias. 1997a. „Oh, what a wonderful war". *Mentan og frítíð* í *Føringurin* 10. apríl:3.

Justesen, Andrias. 1997b. „Mitt í eini krepputíð". *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 23. oktober:2.

Justesen, Andrias. 1997c. „Ólavur borar í framtíðini". *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 6. november:3.

Justesen, Andrias. 1997d. „Ung knekkprosa". *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 4. desember:2.

Jæger, Lív Maria Róadóttir. 2015. *Hvít sól.* Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Jæger, Lív Maria Róadóttir. 2020. *Eg skrivi á vátt pappír.* Forlagið Eksil.

Jørgensen, John Chr. 1971. *Litterær vurderingsteori og vurderingsanalyse: en introduktion*. Borgen.

Jørgensen, John Chr. 1979. *Litterær metodelære*. 2. útgáva, 2. upplag. Borgen.

Jørgensen, John Chr. 1994a. *Dagbladskritikeren*. Fisker & Schou.

Jørgensen, John Chr. 1994b. *Det danske anmelderis historie. Den litterære anmeldelses opståen og udvikling 1720-1906*. Fisker & Schou.

Jørgensen, John Chr. 1999. *Sprogblomster i spinatbedet. En bog om kritikersproget*. Keypmannahavn, Fremad.

Jørgensen, John Chr. 2013. „Habilitetsproblemet". *Spring.* nr. 33 (Barlynd, Marianne og Himmelstrup Kristian (ritstj.). Forlaget Spring:64-75.

Kamban, Hanus. 2006a. „Svala í sólarrisi". *Sosialurin* 15. november.

Kamban, Hanus. 2006b. „Esilssparkið hjá Carl Johan". *Sosialurin* nr. 246. 20. desember:11.

Kamban, Hanus. 2016. „Mentan og kyn í mótburði" https://www.facebook.com/notes/f%C3%B8roya-landsb%C3%B3kasavn/bergt%C3%B3ra-hanusard%C3%B3ttir-sjeyti/1197436046993066 (30.10.2018).

Kant, Immanuel. 2005. *Kritik af dømmekraften*. Cæaus Bratt Østergaard týddi. Upprunaliga útgivin sum *Kritik der Urteilskraft* (1792). Det lille forlag.

Kehler, Henning. 1932. „En Kritikers Bekendelser". *Poeter og pedanter.* Fjerde samling. Keypmannahavn, Wilhelm Hansen:158-180.

Kjelnæs, Marjun Syderbø. 2020. *Sum rótskot.* Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Kjølbro, Turið. 1999. „Carl Jóhan órógvar tann mentanarliga støðuhylin". *Sosialurin* nr. 223. 23. november.

Klein, Heðin M. 2007. „Havsins aldandi pulsur". *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 214, 5. november:14.

Kress, Helga. 1982. „At leita eftir sær sjálvari". *Brá* nr.1:22-32.

Kristensen, Nete Nørgaard og From, Unni. 2015. „From Ivory Tower to Cross-Media Personas". *Journalism Practice*: 1-19.

Kristensen, Tom. 1953. „Kritiker eller anmelder" (1940). *Til dags dato.* Carl Bergstøm-Nielsen valdi greinar og kronikkir. Gyldendal:309-314.

Kristiansen, Alexandur. 1999. „Við báðum beinum mitt í lívinum". *Viðskerin* í *Dimmalætting* 23. januar:3+15.

Kristiansen, Alexandur. 2005. *Báðumegin blátt*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Kristiansen, Sámal Matras. 2006. „Outsider leitar sær Inside“. *Dimmalætting* 13. juni:14-15.

Kyndrup, Morten. 2009. „Den nødvendige smagsdom“. *Standart* #2:43-45.

Larsen, Dag Eivind Undheim. 2017. „Kutter i kritikken“. *Klassekampen*. 11. november. http://www.klassekampen.no/article/20171111/ARTICLE/171119990 (18.01.2018).

Larsen, Steffen Hejlskov. 1969. *Sproget som et billede af Danmark*. Borgens Billigbøger 95.

Larsen, Svend Erik. 2017. „Nyttig og slidstærk national kritikhistorie“. *Norsk litteraturvitenskapelig tidsskrift*. Årg. 20, nr 2. Universitetsforlaget:158-163. https://www.idunn.no/file/pdf/66977950/sissel_furuseth_jahn_holljen_thon_og_eirik_vassenden_red.pdf (24.10.2018).

Lindqvist, Marit. 2017. „Kulturbevakning: Dagskritiken har minskat med 35% på tio år“. *Yle*. 26. desember 2017. Dagført 4. jan. 2018 https://svenska.yle.fi/artikel/2017/12/26/kulturbevakning-dagskritiken-har-minskat-med-35-procent-pa-tio-ar (11.03.2018).

Long, Rikard. 1935. „Um føroysk bókaummæli“. *Varðin* bind 15. Chr. Matras og Rikard Long (ritstj.). Tórshavn, Felagið Varðin:249-250.

Long, Rikard. 1937. „Um bókaummæli“. *Varðin* bind 17. Rikard Long (ritstj.). Felagið Varðin:64.

Magnussen, Høgni Egholm. 2002. „At snakka um bókmentir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 246, 21. desember:6.

Marnersdóttir, Malan. 1990. „At skriva um tað, hini skriva“. *Bókin undir lesiglasið. Fyrilestrar á bókatinginum á Føroya Landsbókasavni 12. januar 1990*. Føroya Landsbókasavn:79-85.

Marnersdóttir, Malan. 2000. *Hvør av øðrum. Samanseting, frásøgn og millumtekstleiki í føroyskari skaldsøgu eftir 1970*. Tórshavn, Føroya Fróðskaparfelag.

Marnersdóttir, Malan. 2005. „Ósøgur um djevulskap“. *Sosialurin* nr. 247, 23. desember:12.

Marnersdóttir, Malan. 2007. „Stovnsfæið“. *Vikuskifti, Sosialurin* nr. 223, 16. november:15.

Marnersdóttir, Malan og Sigurðardóttir, Turið. 2011. *Føroysk bókmentasøga 1*. Nám.

Matras, Christian. 1929. „Hin føroyski málspurningurin og støða hans í norrønum nýreisingarverki“. *Varðin* bind 9:46-59.

Matras, Christian. 1932. „Platon: Verjurøða Sokratesar. Kriton – Faidon“. *Varðin* bind 12:126-128.

Matras, Christian. 1935. „Heðin Brú: Fastatøkur. Varðin. Tórsh. 1935“. *Varðin* bind 15 (Chr. Matras og Rikard Long (ritstj.). Tórshavn, Felagið Varðin:247-249.

Matras, Christian. 1936. „Nýkomin yrkingabók. Hans A. Djurhuus: Yvir teigar og tún. Yrkingar í úrvali. Felagið Varðin. Tórshavn 1936. 352 bls.“ *Varðin* bind 16. Rikard Long (ritstj.). Felagið Varðin:251-253.

Matras, Christian. 1973. *Nøkur mentafólk*. Tórshavn, Emil Thomsen.

Matras, Christian. 1998. *J. H. O. Djurhuus: Yrkingar 1898-1948*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Mattsson, Anna. 1997a. „Bøðilin í speglinum“. *Oyggjaskeggi* nr. 5:6.

Mattsson, Anna. 1997b. „Orð, ið kunnu fáa andlit“. *Oyggjaskeggi* nr 7:6.

Mattsson, Anna. 2001. „Ikki at umbera seg“. *Bragi* nr. 1:52-53.

McDonald, Rónán. 2007. *The Death of the Critic*. New York, Continuum.

„M. I.“. 1984. „Jógvan Isaksen: Føroyski mentunarpallurin“. *Varðin*. Bind 51, hefti 1-2. Tórshavn, Felagið Varðin:140-149.

Mikkelsen, Jonhard. 1999. „Afturhvarvið uppafturrikið“. *Dimmalætting* nr. 238, 15. desember:6.

Moberg, Bergur Rønne. 2005a. „Heima í einari flótandi verð“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 157, 19. august:40-41.

Moberg, Bergur Rønne 2005b. „La Solitude. Ein stutt lýsing av outsidaranum sum bókmentaligt grundevni“. *Outsider Magazin* 1:7-16.

Moberg, Bergur Rønne. 2014. „Færøpolitisme – Faroepolitanism“. *Perspektiver på Henrik Stangerup – og andre nordiske forfattere*. Keypmannahavn, Beewolf Press:127-156.

Moberg, Bergur Rønne. 2017. „The Ultraminor to be or Not to be. Deprivation and Compensation Strategies in Faroese Literature“. *Journal of World Literature* 2:196-216.

Moberg, Bergur Rønne og Damrosch, David. 2017. „Introduction. Defining the Ultraminor“. *Journal of World Literature* 2:133-137.

Moretti, Franco. 1998. *Atlas of the European Novel 1800-1900*. Verso, London og New York.

Mukařovský, Jan. 1979. *Aesthetic Function, Norm and Value as Social Facts*. Upprunaliga útgivin í 1970. Týtt úr kekkiskum, skrivað notur og eftirmála: Mark A. Suino. Ann Arbor.

Niclasen, Ivan og Eide, Hugin. 2000a. „The spei that killed me“. *Bragi* nr. 1:17-19.

Niclasen, Ivan og Eide, Hugin. 2000b. „Nú søkka vit!“. *Bragi* nr. 2:24-26.

Nielsen, Jóanes. 1997a. „Eftirgangur“ í Tóroddur Poulsen. *Sót og søgn*. Fannir: 138-144.

Nielsen, Jóanes. 1997b. „Viðmerking til eitt „ummæli“. *Dimmalætting* 10. desember:7.

Nielsen, Jóanes. 2016. *Bommhjarta*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Norsk litteratur i tusen år. 1994. Fidjestøl et al. (ritstj.). Cappelens Forlag a.s.

Næs, Martin. 1983. „Rós og rís fyri ein lágan prís“. *Sosialurin* 29. oktober:10-11.

Næs Martin. 1995. *Hvør eigur flaggknappin?. Greinir, ummæli, røður og samrøður um mentanarligar spurningar*. Sprotin.

Næs. Martin. 2000. „Honum var eg verst sum eg elskaði mest“. *Bragi* nr. 1:46-47.

Nøjgaard, Morten. 2003. „Litterær vurdering“. *Om litteratur. Metoder og perspektiver*. Systime, Århus: 293-315.

Olsen, Aref T. 1998. „Alt er ein ferð“. *Mentan og frítíð. Føringurin*. 29. januar:3.

Olsen, Dagfinn. 2007. „Isaksen krimar“. *Vikuskifti, Sosialurin* nr. 243, 14. desember:9.

Olsen, Theodor E. D. 2007. „Hevði neyvan ummælt, um eg búði í Føroyum“. *Vikuskifti* í *Sosialinum* nr. 14, 19. januar:15-17.

Ólavsstovu, Vár í. 1999. „Í morgin er aftur ein dagur“. *Kvinnutíðindi*:58-59.

Patursson, Páll. 1937. „H.A. Djurhuusar yrkingar“. *Varðin* bind 17. Rikard Long (ritstj.). Felagið Varðin:61-63.

Pedersen, Frode Helmich. 2019. „Våre vigtigste kritikere“. *BLA Bokvennnen Litterær Avis* 5, http://www.blabla.no/metakritikk/2019/05/vare-viktigste-kritikere (22.05.2019).

Poulsen, Kinna. 1999a. „Dalurin fagri“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 231, 4. desember:2.

Poulsen, Kinna. 1999b. „Speispei spei?“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* 18. desember.

Poulsen, Kinna. 2000a. „William sum ummælari“. *Viðskerin* nr. 10:9.

Poulsen, Kinna. 2000b. „Intensiv blóðroynd“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 228. 25. november:23.

Poulsen, Kinna. 2001. „Tá tað at hvørva er at koma aftur sum orð“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 13. 19. Januar:2.

Poulsen, Kinna. 2002. „Yrkingamarglæti“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 231. 30. november:4.

Poulsen, Kinna. 2003. „Gráir týdningar av sonnum“. *Fregnir* 27. februar:11.

Poulsen, Kinna. 2006. „Skipslastir av spraklandi yrkingum“. *Sosialurin* nr. 251. 29. desember:30-31.

Poulsen, Kinna. 2011. „Víttfevnandi! At ummæla...“ *Listin* 15. januar http://listinblog.blogspot.com/2011/01/vittfevnandi.html (18.07.2019).

Poulsen, Kinna. 2013. „Um ummæli“. *Listin* 11. juni. http://listinblog.blogspot.com/2013/06/um-ummli.html (18.07.2019).

Poulsen, Kinna. 2015a. „Nýggj bók eftir Vilhjálm við Hoygil“. *Listaportal*. 22. mai. http://www.listaportal.com/bokmentir/2015/5/22/nggj-bk-eftir-viljlm-vi-hoygil (24.10.2018).

Poulsen, Kinna. 2015b. „Vilhjálm við Hoygil: Les bókina!“. *Dimmalætting* nr. 32, 21. august:17.

Poulsen, Kinna. 2017. „Poetisk einglavernd“. *Listaportal* 14. november http://faroe-aleph.hosted.exlibrisgroup.com/exlibris/aleph/a23_1/apache_media/1P9SREG59NPSQYUBUMHBBQULS13A6H.pdf (01.08.2019).

Poulsen, Malan. 1997. „Eitt ópakkað kuffert“. *Mentan og frítíð. Føringurin* 25. september:8-9.

Poulsen, Tóroddur. 1992a. „Eitt mótummæli: Hin blinda á listaframsýning“. *Fríu Føroyar* nr. 7. 10. apríl.

Poulsen, Tóroddur. 1992b. *Villur*. Fannir.

Poulsen, Tóroddur. 1994. *Reglur*. Fannir.

Poulsen, Tóroddur. 1996. „Skal skaldið síðismetast [sic] við tartalakráku? – Rúmið sum rúmskuskepping –“. *Oyggjaskeggi* nr. 5.

Poulsen, Tóroddur. 2001. *Húðsemi*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Poulsen, Tóroddur. 2006. *Hvat hevði Munch verið uttan dupultkvartettina í Ebenezer*. Mentunargrunnur studentafelagsins.

Poulsen, Tóroddur. 2016. „Gomul handrit og okkurt annað“. http://bloggoddur.blogspot.com/2016/04/gomul-handrit-og-okkurt-anna.html (31.01.2018).

Rasmussen, Oddfríður M. 1997. „Søgur úr Port Janua“. *Oyggjaskeggi* nr. 2:8.

Rasmussen, Oddfríður M. 2002a. „Húðsemi“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 8, 12. januar:6.

Rasmussen, Oddfríður M. 2002b. *Kvørkringar.* Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Rasmussen, Oddfríður M. 2005. „Ein ferð báðumegin blátt“. *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 125, 4. juli:10-11.

Rasmussen, Oddfríður M. 2011. „Nøkur viðmæli og frámæli um at ummæla í Føroyum“. *Listin* 23. januar http://listinblog.blogspot.com/2011/01/oddfriur-rasmussen-um-ummli.html (21.07.2019).

Rasmussen, Oddfríður M. 2013. „Vit mæla til, frá og um“. *Listin* 16. juni https://listinblog.blogspot.com/2013/06/vit-mla-til-fra-og-um.html (21.07.2019).

Reinert, Lena. 1997. „Framhøld?“. *Føringurin* 4. desember:3.

Riffaterre, Michael. 1994. „Litteraturkritikkens diskurs“. *Ny poetik: Tidsskrift for litteraturvidenskab*. 3 (97-110).

Rogne, Vebjørn. 2019. „Her er tidenes ti beste litteraturkritikere“. *Bok 365*. 23. mai. https://bok365.no/artikkel/her-er-tidenes-ti-beste-litteraturkritikere/ (15.07.2019).

Rognlien, Jon. 2019. „Høring om Kulturmeldinga – Kritikerlagets innspill“. *Kritikerlaget. Norwegian Critics' Association*. 21. februar https://kritikerlaget.no/saker/horing-om-kulturmeldinga-kritikerlagets-innspill?fbclid=IwAR1rTEOeCc9XT-HEdWPPCAJ5HGebUo1VElupTkXghD1e3YW-NQGKrbjPE14 (21.02.2019).

Rostrup, Henriette. 2017. „Kønt er det ikke“. *Forfatteren* nr. 2. Dansk Forfatterforening https://danskforfatterforening.dk/forfatteren/koent-er-det-ikke/ (03.11.2020)

Russ, Joanna. 1983. *How to Suppress Women's Writing.* University of Texas Press, Austin.

Rösing, Lilian Munk. 2013. „Forbrugervejledning eller kritisk refleksion?“. *Spring.* nr. 33. Barlynd, Marianne og Himmelstrup Kristian (ritstj.). Forlaget Spring:16-22.

Said, Edward W. 1983. *The World, the Text, and the Critic*. Cambridge og Massachusetts, Harvard University Press.

Samuelsen, Ingi. 2006. „Outsider større enn nakrantíð“. *Sosialurin* nr. 111. 13. juni:12-13

Sámalson, Andras. 1894. “„Vaagen“.“. *Føringatíðindi* 3. mars.

Sigurðardóttir, Turið. 1994. „Kappyrking og mótyrking“. *Sýnisstubbar. Greinasavn*. Forlagið Sprotin.

Sigurðardóttir, Turið. 1997. „Sjeresada um aldamótið 2000“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 90, 16. mai:12-13.

Sigurðardóttir, Turið. 1998. “...Okkurt ið eingin enn hevur sagt“. *Sosialurin* nr. 19, 30. januar:2-3 og 25.

Sigurðardóttir, Turið. 2000. „Tann sum ikki sigur sum fyrr kann siga ta nógv betur“. *Bragi* nr. 2:12-16.

Sigurðardóttir, Turið. 2002. „Kjakbók í brennidepli“. *Fregnir* 20. september:10.

Sigurðardóttir, Turið. 2004a. „Nýggjar tíðir – nýgjur sangur“. *Bókmentasøgur. Greinasavn*. Føroya Fróðskaparfelag:124-144.

Sigurðardóttir, Turið. 2004b. „Skaldskapurin – vakurleikin – veruleikin“. *Bókmentasøgur. Greinasavn*. Føroya Fróðskaparfelag: 268-293.

Sigurðardóttir, Turið. 2007. „Hvess míni eygu og tungu“. *Vikuskifti, Sosialurin* nr. 228, 23. november:9.

Simonsen, Kim. 2003. „Gud er danskari – *enn Guð*“. *Vikuskifti, Sosialurin* nr. 198, 18. oktober:3.

Simonsen, Kim. 2004a. „Svøvnlendingur rættar kumpass“. Fyrri partur. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 6, 10. januar:7.

Simonsen, Kim. 2004b. „Svøvnlendingur rættar kumpass“. Seinni partur. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 11, 17. januar:8.

Simonsen, Kim. 2004c. „Yrkingar liva ikki av meiningum eina“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 31, 14. februar:10.

Simonsen, Kim. 2004d. „Pathos á nátt“. *Skái* í *Dimmalætting* 19. juni.

Simonsen, Kim. 2004e. „Reyvbananir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 163, 28. august:2.

Simonsen, Kim. 2005a. „Lágmark ella eygnamark“. *Skái* í *Dimmalætting*, 14. januar:2.

Simonsen, Kim. 2005b. „Diddan og hini á Skálatrød“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 30, 12. februar:8.

Simonsen, Kim. 2005c. „Kynstrið at skriva seg sjálvan inn í bókmentasøguna“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 232, 2. desember:44-45.

Simonsen, Kim. 2005d. „Modernaða frambrotið „ultra light““. *Skái* í *Dimmalætting* nr 237, 9. desember:46-47.

Simonsen, Kim. 2005e. *Kodakmyndir frá sjeytiárunum*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.

Simonsen, Kim. 2005f. „Eitt neyðugt blað“. *Outsider Magazin* 1:6.

Simonsen, Kim. 2005g. „Melankoli sum mannarættindi. Bohemin sum outsidari í 20. øld“. *Outsider Magazin* 1:54-60.

Simonsen, Kim 2006a. „At skjalprógva og skapa nútíðina“. *Outsider Magazin* 2/3:8-11.

Simonsen, Kim 2006b. „At tora at siga okkurt vakurt aftur“. *Outsider Magazin* 2/3:12-24.

Simonsen, Kim. 2007. „Ein flott sjón, sum eingin sá“. *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 237, 6. desember:11.

Skarðhamar, Anne-Kari. 2012. “„Critical Tact and Educational Institution“? Literary Criticism in Faroese Journals.“ *Scandinavica*. Vol. 51 No 2:265-283.

Skarði, Bergljót av. 2001. „Mitt í einum ævintýri“. *Sosialurin* nr. 19. 27. januar:18.

Skarði, Bergljót av. 2007. „Endar burturferðin ongantíð?“. *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 227, 22. november:11.

Skemmuni, Jákup í. 2000. „Harmur og gleði í Dalinum Fagra“. *Bragi* nr. 1:48-49.

Skyum-Nielsen, Erik. 2002. „Efterskrift“. *Underspil. Litterær kritik i udvalg.* Christien Lund og Erik Skyum-Nielsen (ritstj.). Gads Forlag:369-379.

Skyum-Nielsen, Erik. 2017. „Litterær kritik er omgang med mennesker, trods alt“. *Information*. 6. oktober. https://www.information.dk/kultur/2017/10/litteraer-kritik-omgang-mennesker-trods (18.01.2018).

Skyum-Nielsen. 2019. „Følg aktørerne“. *Passage. Tidsskrift for Litteratur og Kritik*. Árg 34, nr. 81:140-144.

Skaale, Sjúrður. 2007. „Dugir Carli at skriva? Dugir Vígdis at dansa?“. *Sosialurin* 2. januar.

Solstad, Dag. 1966. „Rutinerte nødrop“. *Profil* nr. 5:50.

Stidsen, Marianne. 2018. *Levende litterater. Samtaler om kritikkens guldalder.* Keypmannahavn V, U Press.

Strøm, Ingilín. 2020. „Ein treiskur spíri í eini myrkari tíð“. *Varðin* bind 87. Rakel Helmsdal, Sanna Andrassardóttir Dahl og Sanna Klein (ritstj.). Felagið Varðin:187-194.

Sørensen, Inger Smærup. 2013. „Ummæli av ummæli av ummæli“. *Listin 2013*. Kinna Poulsen og Inger Smærup Sørensen (ritstj.). Forlagið í Støplum:89.

Thon, Jahn H. 2016. „Litteraturkritikk som institusjon“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Furuseth et al. (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:155-159.

Titchener, Campbell B. 2005. *Reviewing the Arts.* Third Edition. Upprunaliga útgivin í 1988. Routledge.

„Tóroddur á vektini“. 2016. *Mentanarkaféin*. Mentanarsending hjá KVF. Trygvi Danielsen ummælir *Skriftstød* hjá Tóroddi Poulsen í samrøðu við Sissal Kampmann. Sissal Kampmann og Suni Merkistein (ritstj.) 1. desember http://kvf.fo/mentanarkafein?page=13&sid=62107 (18.01.2018).

„Trop“. 1901. „Fra boghylden“. *Tingakrossur* nr. 29, 1. árg. 17. juli.

„Trop“. 1902. „Fra boghylden“. *Tingakrossur* nr. 12, 2. árg. 19. mars.

„Tvär smásövur“. 1890. *Føringatíðindi* nr. 12, 1. árg.

„Ummæli av ummælinum“. 2017. Mentanarsending hjá KVF. Sissal Kampman leggur til rættis. https://kvf.fo/sending/stakarsendingar?page=1&sid=64841 (30.07.2019).

„Ungmannafelagslimur“. 1964. „Sálarliga spillandi lestur“. *14. September.* 15. januar.

Vassenden, Eirik. 2016a. „Frå kristentru målreising til anarkistisk konfrontasjon. Arne Garborg og Fedreheimen (1877.1882)“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Furuseth et al. (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:45-52.

Vassenden, Eirik. 2016b. „En varslet sensasjon. Den tidlige mottakelsen av Knut Hamsuns *Sult*, sommeren og høsten 1890“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Furuseth et al. (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:87-99.

Vassenden, Eirik. 2016c. „Kritikkens fenomenologi. Kroppen i norsk litteraturkritikks historie“. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Furuseth et al. (ritstj.). Oslo, Universitetsforlaget:582-594.

Weyhe, Eivind. 1989. „Pól F og skaldskapur hansara“. *Brá* nr 13/14. 8. árg:2-21.

Weitz, Morris. 1956. „The Role of Theory in Aesthetics“. *The Journal of Aesthetics and Art Criticism* vol. 15, nr. 1:27-35.

Wiese, Duncan. 2019. „Op af skyttegraven“. *Vagant* 2. februar. http://www.vagant.no/op-af-skyttegraven/?fbclid=IwAR2whJtg5UneoidnopaBeLLch2qZrkLEB3l2z_2vinJJVHD9H19DIpOacZw (15.02.2019).

Wilde, Oscar. 1891. http://www.wilde-online.info/the-critic-as-artist.html (12.08.2019).

William-Olsson, Magnus. 2013a. „Inledning“. *Performativ kritik*. Magnus William-Olsson (ritstj.). Ariel Litterär kritik [3]:5-6.

William-Olsson, Magnus. 2013b. „Performativ kritik“. *Performativ kritik*. Magnus William-Olsson (ritstj.). Ariel Litterär kritik [3]:7-29.

William-Olsson, Magnus. 2018. „Innledning“. *Kritiken i den nya offentligheten*. Magnus William-Olsson (ritstj.). Ariel Litterär kritik [11]:5.10.

Wittgenstein, Ludwig. 1980. *Culture and Value*. G. H. Von Wright (ritstj.). The University of Chicago Press.

Worsøe-Schmidt, Lisbeth. 2018. „Nye aktører på det danske bogmarked“. *Nordisk Tidsskrift for Informationsvidenskab og Kulturformidling*. Árg. 7, nr 1.

Wung-Sung, Jesper. 2017. *Lynkineser*. Dansklærerforeningens forlag.

„X“. 1910. „Føroyskar bókmentur“. *Tingakrossur* nr. 26, 10. árg. 22. juni.

Zangenberg, Mikkel Bruun. 2007. „Krise og kritik i norden“. *Kritiker* #4 http://www.kritiker.nu/wordpress/krise-og-kritik-i-norden/ (22.08.2018).

„Årets litteraturkritiker 2018“. 2018. *Kritikerlaget. Norwegian Critics' Association*. 1. mars. http://kritikerlaget.no/saker/%C3%A5rets-litteraturkritiker-2018 (11.03.2018).

Fylgiskjal

Yvirlit yvir ummælini tíðarskeiðið 1997-2007

Beiti, Ólavur í. 1997a. „Leiðarljós – aftur eitt fjart suð“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 99, 31. mai:2.

Beiti, Ólavur í. 1997b. „Páskaódn og páskaóhumska“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 232, 6. desember:2.

Beiti, Ólavur í. 1997c. „Kensluborin og sterk lívsminni“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 237, 13. desember:2.

Brix, Kirsten. 1999. „Duldar leiðir“. *Kvinnutíðindi*:55-56.

Brix, Kirsten. 1999. „Sára Tummasardóttir – ein tragisk og óhugnalig kvinnulagna“. *Sosialurin* nr. 243, 21. desember:11.

Dahl, Marianna Debes. 2007. „Og hugurin ferðast so víða“...“. *Skái* í *Dimmalætting* nr 4., 5. januar: 44-45.

Dahl, Pætur M. 2006. „Myrk og døpur debut skaldsøga“. *Sosialurin* 14. mai:41.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2003a. „Orðligt smør“. *Fregnir* nr. 40, 12. desember:12.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2003b. „Tráðleysar yrkingar“. *Fregnir* nr. 40, 12. desember:13.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2005a. „Nýggjar yrkingar frá Oddfríði“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 237, 9. desember:45.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2005b. „Glansbílætasamlararnir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 242, 15. desember:45.

Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 2006. „Hálov av skaldskapi“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 10, 13. januar:45.

Debes, Hans J. 2000. „Um geilar og stræti. Eitt kvøld á Jóanes Nielsen stræti“ *Oyggjatíðindi* 31. mars:8-9.

Didriksen, Lydia og Nolsøe, Rógvi. 1997. „Leiðarljós – ein ótrúliga spennandi bók“. *Føringurin* 25. september:2.

Ellingsgaard, Anna V. 2004. „Køkutombola í Sebastians Húsi“ *Sosialurin* nr. 239. 14. desember: 9.

Ellingsgaard, Anna V. 2005a. „Listamaður í tríkantsdrama“. *Sosialurin* nr. 81. 30. apríl:38.

Ellingsgaard, Anna V. 2005b. „Gud og erotikkur“. *Sosialurin* nr. 110. 14. juni.

Ellingsgaard, Anna V. 2005c. „Djevulsettur menniskjaskapur“. *Sosialurin* nr. 232. 2. desember: 30-31.

Ellingsgaard, Anna V. 2005. „Soleiðis kann tað ganga“. *Sosialurin* nr. 237, 9. desember:32.

Ellingsgaard, Anna V. 2006a. „Ein føroyskur Marlowe fer í grind“. *Sosialurin* nr. 35. 17. februar: 31.

Ellingsgaard, Anna V. 2006b. „Postmodernisman er avblást“. *Sosialurin* nr. 105. 2. juni.

Gaard, Guðrun. 1999. „Úti á leysum oyggjum, Bókarummæli“. *Kvinnutíðindi*:57.

Gaard, Guðrun. 2007. „Eitt marglitt bregdað band“. *Dimmalætting* 18. oktober.

Gaini, Firouz. 2002. „Skeivar krepputíðir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 79, 26. apríl:7.

Guðjónsson, Pauli. 2004. “„Føroyingar liva ikki....“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 36, 21. februar:8.

Guðjónsson, Pauli. 2005. „Patos úr Gulag o.a.“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 124, 1. juli:48-49.

Gullbein, Sjúrður. 1997. „Páskaódnin í Havn“. *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 18. desember:3.

Hansen, Dorit. 2007. „Gandakendi gerandisdagurin“. *Sosialurin* nr. 192, 4. oktober:6.

Hansen, Bergur Djurhuus. 1997. „Tá orðini fara á flog“. *Dimmalætting* 14. august:2.

Hansen, Bergur Djurhuus. 2006. „Nýtt slóðbrótandi føroyskt tíðarrit“. *Sosialurin* 22. september.

Heinesen, William (y). 1997. „Ójavnar søgur úr Port Janua“. *Fjølnir* nr. 3:28-29.

Hjelm, René. 2001a. „Mjørki í heilum, men klárt í støðum“. *Skái* í *Dimmalætting* 13. oktober:4.

Hjelm, René. 2001b. „Níggju nýggjar pílagrímsferðir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 223, 17. november:2.

Hoydal, Gunnar. 1998a. „Jóanes er romantikari“. *Sosialurin* nr. 25, 7. februar:15.

Isaksen, Jógvan. 1998b. „Í ævintýrheimi“. *Sosialurin* nr. 104, 6. juni:13.

Isaksen, Jógvan. 1998c. „Kosmisk eindarkensla“. *Sosialurin* nr. 234, 9. desember:10.

Isaksen, Jógvan. 1998d. „Beisk og lívsjáttandi skaldsøga“. *Sosialurin* nr. 242, 19. desember:13.

Isaksen, Jógvan. 1999. „At tola at bíða“. *Sosialurin* nr. 197, 16. oktober:22.

Isaksen, Jógvan. 2001. „Dvørgar, vargmenn og annað valafólk“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 14, 20. januar:17.

Isaksen, Jógvan. 2004. „Grát alt tað tú kanst, men flenn tað dupulta“. *Sosialurin* nr. 233, 4. desember:33.

Isaksen, Jógvan. 2007a. „Mangt er til, sum ikki er til“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 223, 16. november:18.

Isaksen, Jógvan. 2007b. „Handan rimar“. *Sosialurin* nr. 248, 21. desember:21.

Isaksen, Jógvan. 2007c. „Jóanesar opinbering“. *Sosialurin* nr. 248, 21. desember:21.

Isholm, Páll. 2000a. „Tann ódeyðiliga sálin og óendaliga søgan“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 20, 29. januar:16.

Isholm, Páll. 2000b. „Har náttúran fær orð og menniskjaligar eginleikar“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 30, 12. februar:15.

Isholm, Páll. 2000c. „Kvinnulagna og siðamisbrot í átjandu øld“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 50, 11. mars:16.

Isholm, Páll. 2000d. „Føroysk hugløg í japonskum stíli“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 45, 4. mars:16.

Isholm, Páll. 2000e. „Sið- ella skaldsøga“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 198, 14. oktober:16.

Isholm, Páll. 2000f. „Løtumynd úr Hans Andriasarhúsi“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 238 , 9. desember:12.

Isholm, Páll. 2000g. „Eingin fer undan lagnuni“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 248, 23. desember:2.

Isholm, Páll. 2000h. „Mýtan livir í leikinum“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 243, 16. desember:2.

Jacobsen, Eyðun. 1998. „Ein rættilig narrifisa“. *Fjølnir* nr. 2:24.

Jacobsen, Marna. 2007. Adventus Domini“. *Dimmalætting* nr. 242, 13. desember:10-11.

Jákupsson, Tórfinnur. 2006. „Vit eru í tí, vit skriva“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 158, 18. august:46-47.

Jensen, Carl Jóhan. 1999b. „Mongum brestur ætlan“. *Dimmalætting*. 18. desember.

Jensen, Carl Jóhan. 2000a. „Millumstøðuspei“. *Dimmalætting* nr. 5, 8. januar.

Jensen, Carl Jóhan. 2000b. „Melur allar tættir saman“. *Sosialurin* nr. 218, 11. november:22-23.

Jensen, Carl Jóhan. 2000c. „Flogleysir veingir“. *Sosialurin* nr. 243, 16. desember:24-25.

Jensen, Carl Jóhan. 2001a. „Leitanin flákrar vill í øllum ættum“. *Fregnir* nr. 6, 10. mai.

Jensen, Carl Jóhan. 2001b. „Súmbol í einum sinnissjúkum máli“. *Fregnir.* 15. november.

Jensen, Carl Jóhan. 2002a. „Um forharmilsi“. *Fregnir* nr. 1, 11. januar.

Jensen, Carl Jóhan. 2002b. „Mín bústaður stendur ikki á kletti“. *Fregnir* nr. 42, 22. november:12.

Jensen, Carl Jóhan. 2002c. „Mjørki er ein sannleiki, sum alla tíðina verður ein annar“. *Fregnir* nr. 44. 6. desember:16.

Jensen, Carl Jóhan. 2004. „Ein farri av skaldskapi“. *Fregnir* nr. 13, 16. apríl:8.

Jensen, Carl Jóhan. 2006b. „Um blaðlýs og drekkamunsrealismu“. *Sosialurin* nr. 245, 19. desember.

Jensen, Finnur. 2001. „Øðrvísi stev“. *Dimmalætting* nr. 163, 25. august:5.

Jensen, Meinhard. 2002. „Karr“. *Fregnir* nr. 43, 29. november:16.

Jensen, Petur Pólsson. 1997. „Tá deyðin bankar uppá“. *Sosialurin* nr. 224, 22. november:9.

Jensen, Petur Pólsson. 1998. „ein spurningur um flog“. *Krydd* í *Dimmalætting* nr. 238, 16. desember.

Johannesen, Ása. 2001. „Heimurin forni – Hví jubla tit ikki?“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 54, 17. mars:16.

Johannesen, Malan. 1998a. „Framtíðarsøga um Havnina“. *Oyggjaskeggi* nr. 1, februar:8.

Johannesen, Malan. 1998b. „Faðirmorð við einum orði“. *Oyggjaskeggi* nr. 4. mai:7.

Jógvansdóttir, Sonja. 1997. „Páskaódnin“. *Sosialurin* nr. 222, 20. november:8.

Jógvansson, Agnar. 2005a. „Fjølbroytni“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 10, 14. januar:48-49.

Jógvansson, Agnar. 2005b. „Ferðast ongantíð heim“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 104, 3. juni:48-49.

Jógvansson, Agnar. 2005c. „Hvat hava „Hvør var Nimrod“ og „Sebastians hús“ til felags?“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 119, 24. juni:44.

Jógvansson, Agnar. 2005d. „Tey fýra góðu brotini“. *Outsider Magazin*, nr. 1, 1. árg.:165-167.

Jógvansson, Agnar. 2006a. „Ein deiliga føroysk skaldsøga“. *Outsider Magazin*, nr. 2/3, 2. árg.:260-261.

Jógvansson, Agnar. 2006b. „Fínasta slag“. *Outsider Magazin*, nr. 2/3, 2. árg.:257-259.

Jógvansson, Agnar. 2006c. „Syndarliga pretentiøs“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 10, 13. januar:44.

Jógvansson, Agnar. 2006d. „Størstur av øllum er kærleikin“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 129, 7. juli:38-39.

Jógvansson, Agnar. 2007a. „Nøkur orð um Vencil yngra“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 72, 13. februar:32.

Jógvansson, Agnar. 2007b. „Søgur um fívilskap – ummæli av „Ó"". *Skái* í *Dimmalætting* nr. 81, 27. apríl:50-51.

Justesen, Andrias. 1997a. „Oh, what a wonderful war". *Mentan og frítíð* í *Føringurin* 10. apríl:3.

Justesen, Andrias. 1997b. „Mitt í eini krepputíð". *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 23. oktober:2.

Justesen, Andrias. 1997c. „Ólavur borar í framtíðini". *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 6. november:3.

Justesen, Andrias. 1997d. „Ung knekkprosa". *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 4. desember:2.

Kamban, Hanus. 2006a. „Svala í sólarrisi". *Sosialurin* 15. november.

Klein, Heðin M. 2007. „Havsins aldandi pulsur". *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 214, 5. november:14.

Kristiansen, Alexandur. 1999. „Við báðum beinum mitt í lívinum". *Viðskerin* í *Dimmalætting* 23. januar:3+15.

Lamhauge, Agnar. 2007. „Yrkingar fyri yrkinganna skuld?". 13. desember. *Dimmalætting* nr. 242, 13. desember:17.

Magnussen, Høgni Egholm. 2002. „At snakka um bókmentir". *Skái* í *Dimmalætting* nr. 246, 21. desember:6.

Marnersdóttir, Malan. 2005. „Ósøgur um djevulskap". *Sosialurin* nr. 247, 23. desember:12.

Marnersdóttir, Malan. 2007. „Stovnsfæið". *Vikuskifti, Sosialurin* nr. 223, 16. november:15.

Mattsson, Anna. 1997a. „Bøðilin í speglinum". *Oyggjaskeggi* nr. 5:6.

Mattsson, Anna. 1997b. „Orð, ið kunnu fáa andlit". *Oyggjaskeggi* nr 7:6.

Mattsson, Anna. 2001. „Ikki at umbera seg". *Bragi* nr. 1:52-53.

Mikkelsen, Jonhard. 1999. „Afturhvarvið uppafturrikið". *Dimmalætting* nr. 238, 15. desember:6.

Moberg, Bergur Rønne. 2005. „Heima í einari flótandi verð". *Skái* í *Dimmalætting* nr. 157, 19. august:40-41.

Niclasen, Eivind. 1997. „Ein varligur dráttur í tara og aðrar stuttsøgur". *Fjølnir* nr. 1:28-32.

Niclasen, Ivan og Eide, Hugin. 2000a. „The spei that killed me". *Bragi* nr. 1:17-19.

Niclasen, Ivan og Eide, Hugin. 2000b. „Nú søkka vit!". *Bragi* nr. 2:24-26.

Næs, Katrin. 2000. „Aftur á slóðina". *Bragi* nr. 1:42-43.

Næs. Martin. 1999. „Smæruvinirnir". *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 236, 11. desember.

Næs. Martin. 2000. „Honum var eg verst sum eg elskaði mest". *Bragi* nr. 1:46-47.

Olsen, Aref T. 1998. „Alt er ein ferð". *Mentan og frítíð* í *Føringinum.* 29. januar:3.

Olsen, Dagfinn. 2007. „Isaksen krimar". *Vikuskifti, Sosialurin* nr. 243, 14. desember:9.

Ólavsstovu, Vár í. 1999. „I morgin er aftur ein dagur". *Kvinnutíðindi*:58-59.

Poulsen, Kinna. 1999a. „Dalurin fagri“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 231, 4. desember:2.

Poulsen, Kinna. 1999b. „Speispei spei?“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* 18. desember.

Poulsen, Kinna. 2000. „Intensiv blóðroynd“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 228. 25. november:23.

Poulsen, Kinna. 2001a. „Tá tað at hvørva er at koma aftur sum orð“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 13. 19. januar:2.

Poulsen, Kinna. 2001b. „Listarbók og bókarlist“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 95, 19. mai:8-9.

Poulsen, Kinna. 2002. „Yrkingamarglæti“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 231. 30. november:4.

Poulsen, Kinna. 2003. „Gráir týdningar av sonnum“. *Fregnir* 27. februar:11.

Poulsen, Kinna. 2006a. „Hvar er rák?“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 208. 27. oktober:36-37.

Poulsen, Kinna. 2006b. „Skipslastir av spraklandi yrkingum“. *Sosialurin* nr. 251. 29. desember:30-31.

Poulsen, Malan. 1997. „Eitt ópakkað kuffert“. *Mentan og frítíð* í Føringinum 25. september:8-9.

Rasmussen, Ingi. 2000. „Ein góð søga“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* 15. januar:3.

Rasmussen, Oddfríður Marni. 1997. „Søgur úr Port Janua“. *Oyggjaskeggi* nr. 2:8.

Rasmussen, Oddfríður Marni. 2002. „Húðsemi“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 8, 12. januar:6.

Rasmussen, Oddfríður Marni. 2005. „Ein ferð báðumegin blátt“. *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 125, 4. juli:10-11.

Ravnsfjall, Kartni. 1997. „Kristilig krimi“. *Mentan og frítíð* í *Føringinum* 9. oktober:2.

Reinert, Lena. 1997. „Framhøld?“. *Føringurin* 4. desember:3.

Sigurðardóttir, Turið. 1997. „Sjeresada um aldamótið 2000“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* nr. 90, 16. mai:12-13.

Sigurðardóttir, Turið. 1998. “...Okkurt ið eingin hevur sagt“. *Sosialurin* nr. 19, 30. januar:2-3 og 25.

Sigurðardóttir, Turið. 2002. „Kjakbók í brennidepli“. *Fregnir* 20. september:10.

Sigurðardóttir, Turið. 2007. „Hvess míni eygu og tungu“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 228, 23. november:9.

Simonsen, Kim. 2003. „Gud er danskari – *enn Guð*“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 198, 18. oktober:3.

Simonsen, Kim. 2004a. „Svøvnlendingur rættar kumpass“. Fyrri partur. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 6, 10. januar:7.

Simonsen, Kim. 2004b. „Svøvnlendingur rættar kumpass“. Seinni partur. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 11, 17. januar:8.

Simonsen, Kim. 2004c. „Yrkingar liva ikki av meiningum eina“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 31, 14. februar:10.

Simonsen, Kim. 2004d. „Pathos á nátt“. *Skái* í *Dimmalætting* 19. juni.

Simonsen, Kim. 2004e. „Reyvbananir“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 163, 28. august:2.

Simonsen, Kim. 2005a. „Lágmark ella eygnamark“. *Skái* í *Dimmalætting*, 14. januar:2.

Simonsen, Kim. 2005b. „Diddan og hini á Skálatrød“. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 30,12. februar:8.

Simonsen, Kim. 2005c. „Modernaða frambrotið „ultra light““. *Skái* í *Dimmalætting* nr. 237, 9. desember:46-47.

Simonsen, Kim. 2007. „Ein flott sjón, sum eingin sá“. *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 237, 6. desember:11.

Skarði, Bergljót av. 2001. „Mitt í einum ævintýri“. *Vikuskifti*, *Sosialurin* nr. 19, 27. januar:18.

Skarði, Bergljót av. 2007. „Endar burturferðin ongantíð?“. *Heimatíðindi* í *Dimmalætting* nr. 227, 22. november:11.

Skemmuni, Jákup í. 2000. „Harmur og gleði í Dalinum Fagra“. *Bragi* nr. 1:48-49.

Tróndheim, Jónheðin H. 1998. „Til kærleikin meg skilir“. *Viðskerin* í *Dimmalætting* 16. mai:14-15.

12. Leitorð

2002 nætur 67, 283, 295.

A
Aamund, Jane 315.
Adventus domini 66.
Aðalsteinsdóttir, Auður 21-22, 25-26, 123.
Alexandras rum 215.
Allende, Isabel 331.
Almenni 23-24, 28, 30, 36, 39, 41, 43, 46, 61, 77, 92, 94-95, 100, 148, 150-151, 174, 199, 219, 222, 311, 323, 369, 390, 399, 408.
Anderson, Benedict 299.
Andersson, Axel 41.
Andreasen, Uffe 19, 101, 103-104, 182, 209.
Andreassen, Eyðun 200.
Anker, Elizabeth S. 97-98.
Anmelderi 100.
Arge, Uni 291-292.
Aristoteles 23, 257, 268-296, 297.
Arnold, Matthew 22, 33-36, 43, 50, 74, 79, 107, 147, 398.

Askham, Tove 355.
At taka dagar ímillum 55, 200.
Attachment 93, 206, 232.
Auerbach, Erich 34.
Austen, Jane 314.
Avantgarde 53, 62, 108, 132, 145, 197, 228, 252-253, 256, 264, 278, 300.

B

Bakhtin, Mikhail 203.
Bang, Herman 345.
Barbara 11-12.
Barthes, Roland 31, 114, 153.
Baudelaire, Charles 189.
Bábelstornið 170.
Báðumegin blátt 118, 240, 242, 333.
Beauvoir, Simone de 73, 307, 309, 321, 391.
Beckett, Samuel 43.
Beiti, Ólavur í 182-285, 287, 199, 265, 332, 344, 363, 381.
Bergens Tidende 110.
Bergson, Henri 181.
Berlingske 323.
Bíblia 136-137, 230, 237, 276.
Blake, William 189.
Blixen Karen 350.
Bloggur 10, 39, 60, 80, 131, 154-155, 174, 188, 208, 219, 349-350, 407-408.
Bloom, Harold 148-149, 241, 338.
Blóðroyndir 352-353, 355, 358.
Boileau, Nicolas 107.
Bommhjarta 129, 253.
Booth, Wayne 85, 158-160.
Borges, Jorge Luis 190.
Borum, Poul 113, 118, 123, 261.
Bourdieu, Pierre 27-28, 86-87, 92-96, 108, 197, 389-390.

Botnfall 274.
Bókin um tað góða 219, 245-246, 247, 250, 255.
Bókmentalig ringrás 10, 27, 47, 91-92, 94, 186, 235, 247, 291, 294, 321, 389-390, 392.
Bókmentapallur 15, 27, 76-77, 94-95, 100, 120, 130, 163, 168, 178, 180, 198-199, 208, 218, 222, 226, 232, 278, 360, 404, 407.
Bókmentasosiologi 22, 27, 29, 86-87, 91, 93, 290, 389, 393, 394.
Bókmentastovnur 9, 11, 18, 21, 26, 29, 36, 46-47, 49, 51-53, 63-64, 72, 76, 79, 82, 88, 93-95, 99, 140, 198, 242, 372, 392, 396, 402-404, 406.
Bókmentasøga 11, 13-14, 25, 28-29, 46, 54, 56, 60, 64, 72, 74, 84, 87, 91, 112, 115, 124, 212, 221, 247, 279-280, 282, 290, 293-294, 309, 316, 325, 392, 394.
Brandes, Georg 32, 107, 169.
Bragi 50, 53, 55, 172, 176, 178, 188, 192, 195, 215, 274, 304, 403.
Brá 50, 52-53, 133, 200, 207, 248, 251, 323.
Bredsdorff, Thomas 18, 23, 81, 100-102, 111-112, 141-142.
Brenson, Michael 15, 36-37.
Brix, Hans 261.
Brix, Kirsten 143, 258-259, 278, 362, 365-367, 391, 405.
Brontë , Charlotte 308.
Brostrøm, Torben 99, 143, 145, 320.
Brú, Heðin 52, 63-64, 82, 143, 201-202, 345.
Brúgvar av svongum orðum 273, 275, 277, 353, 397-398.
Bukdahl, Lars 134, 155, 261, 316.
Burroughs, William S. 203, 239.
Burtur 123, 250, 254, 259-267, 309, 312, 314, 390, 397-398.
Búreisingur 169-170.
Bø, Líggjas í 300.
Bødker, Cecil 311.

C

Canterbury Tales, The 158, 188.
Cartland, Barbara 185.
Cervantes, Miguel de 190.

Chauser, Geoffrey 158, 188.
Cherry, Roger D. 85, 156-158, 161-163.
Christiansen, Atle 104-105, 109-110.
Coleridge, Samuel Taylor 147.
Critic with Gusto 147, 213, 294.
Critique and Postcritique 97.

D

Dagdvølja 62, 168.
Dahl, Árni 48.
Dahl, Marianna Debes 56, 148, 260, 266-267, 278, 309-310, 312, 362-364, 402, 405, 413.
Dahl, Regin 59, 217, 256, 271, 278, 359.
Dahl, Roald 200.
Dahlerup, Pil 73, 311-312.
Dalsgarð, Arnbjørn Ó. 48, 124, 175-176, 187, 222-232, 240, 280-281, 292, 316, 407.
Dalsgaard, Jóannes 133, 248-251, 261.
Dalurin fagri 203-206, 210, 360-361, 373-374, 380.
Dam, Rigmor 89.
Dam, Rólant 60-61.
Damrosch, David 46-47.
Danielsen, Trygvi 131, 136.
Dante, Alighieri 276.
Dass, Petter 127, 137, 230.
Death of the Critic, The 31, 39, 153.
Defence of Poetry, A, 196.
Deleuze, Gilles 154.
Demokratisering 31, 174.
Deskriptiv 72, 104, 146.
Deuxième Sexe, Le 73, 308.
Didriksen, Lydia 325.
Die Verwandlung 289.
Dimmalætting 73, 81, 87, 170, 175-176, 178, 188, 190, 207-210, 213, 215, 219, 234, 245-246, 256, 262, 266, 273, 275, 283-284, 286-287. 289, 292, 296, 301, 303, 315, 345-347, 349, 403, 407.
Diskursur 10, 11, 23-24, 49, 76, 86, 99, 112, 119-121, 134, 203, 311, 320, 336, 348, 399.
Distinction, La 108.
Ditte menneskebarn 364.
Dylan, Bob 43-44, 297.
Djurhuus, Hans Andrias 59, 64-65, 67, 179, 194, 271, 324, 359.
Djurhuus, Janus 67, 124, 167, 170-171, 275, 295, 330.
Donne, John 345-346.
Dostojevskij, Fjodor 212.
Dreymar um opin vindeygu 223, 292.
Drekkamunsrealisma 254, 260-261, 310, 312, 348, 362, 393, 395, 404.
Dryden, John 147.
Duldar leiðir 365.
Dulsmál og loynigongir 89, 200.
Dupulleiklutir 9, 150, 222, 369.
Duravørður 11, 29, 99, 104, 197, 396.
Dúgvan 168.

E

Eagleton, Terry 23-25, 36, 43, 62, 79, 146-147, 213, 248, 294, 352.
Edenborg, Carl-Michael 15, 40, 174.
Effersøe, Rasmus 167-168.
Eg skrivi á vátt pappír 324.
Eide, Hugin 66, 190, 192-197, 219, 274, 325.
Ein farri av kolvetni 205-206, 254, 330, 395.
Ein ódeyðilig sál 209, 211, 257.
Eygnamørk 275, 298, 301, 303, 337.
Eysteinsson, Ástáður 25, 116.
Ekkokamar 174, 208.
Eliot, T.S. 23, 35-36, 43, 62, 79, 146-147, 213, 248, 294, 352.
Ellingsen, Thor 162.

Ellingsgaard, Anna V. 89, 246, 279-280, 282, 286, 288-289, 302, 309, 326-334, 405, 407.
Elliot, Robert C. 158, 160.
Endurskin av Jákupi doktara 312.
Engdahl, Horace 37, 43, 74, 98, 114-115, 117-118, 236, 238, 322, 332, 355-356, 368.
Enzenberger, Hans Magnus 203.
Eriksen, Inge 320.
Eriksen, Jens-Martin 99.
Eru koparrør í himmiríki 220.
Escarpit, Robert 76, 91-93.
Espedal, Tomas 407.
Ethos 18, 77, 85-86, 156-157, 161-163, 184, 186, 190, 197, 211, 214-215, 218, 230, 242, 250, 317, 326, 334, 360-361, 365, 405.

F

Facebook 10, 174, 244, 403.
Faðirsuppgerð 148, 270.
Faðirsmorð 271, 278.
Fastatøkur 52, 63-64.
Felski,Rita 38, 93-95, 97-98, 206, 232.
Feminisma 13, 73, 144, 243, 264, 267, 278, 306-308, 310-311, 320-323, 362, 391, 405-406.
Ferðin til Zambora 82.
Fiskimenn 345-346.
Fjaldur kritikkur 13, 28-29, 75, 392-293.
Fjarstøða 34, 161, 166, 177-178, 199, 208, 245, 359.
Fjølnir 176, 178-179, 188.
Forfatteren som kritiker 40, 125, 148, 154, 282.
Forformur 56.
Forser, Tomas 9, 22, 25-26, 112, 150, 321, 370.
Foucault, Michel 29-30, 49, 89, 121-122,154, 196.
Framtidens kritik 116.
Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari 133, 248, 250-251, 261, 265.
Framin 198.

Fregnir 175-176, 222, 244, 335.
Frye, Northrop 18-19, 23, 34-35, 43, 74, 79, 113-114, 118, 122, 273, 339.
From, Unni 15, 77, 151-152.
Frænir eitur ormurin 329.
Fuglaframi 87.
Fuglar og fólk 64.
Funding, Elsa 56-57.
Funktión (ummælara/ummælis-) 22, 24, 33-37, 43, 49, 59, 63, 98, 103-104, 113, 126, 147, 198, 222, 231, 235, 238, 250.
Furuseth Sissel 21-22, 25-27, 29-30, 39-40, 79, 85, 95, 99, 110, 112-113, 119, 122, 124-125, 128-129, 133-134, 140, 148-151, 153-154, 156, 162, 178, 185, 221-223, 238, 241, 247-248, 282, 284, 290, 338, 369-370, 387-389, 391-392, 394, 407.
Færøerne: Natur og Folk 11.
Færøsk kulturpolitik ved indgangen til et nyt århundrede 58, 97.
Føringatíðindi 87, 126, 167-168.
Føroyatraga, ein sera støkkin og óskipað rannsókn inn í mentavald, føroyska samleikan og føroyska málið og onnur útvald smáverk 299.
Føroyingar liva ikki av fiski eina 223-224, 297.
Føringurin 172, 175-176, 178, 181, 187, 189, 215, 218, 306, 344, 403, 411.
Føroysk blaðsøga 175.
Føroyski mentunarpallurin 48, 200-201.

G

Gaard, Guðrun 362-363, 367, 371, 376, 378, 405.
Gaïni, Firouz 89.
Gaïni, Sigri 67, 123, 181, 185-186, 215-217, 283, 292, 295-297, 300, 368.
Garborg, Arne 148, 270.
Gávur skulu rindast aftur 89.
Geil, Kristin í 50, 58, 63, 77, 124, 167-171.
Gellner, Ernest 299.
Gerði, J. J. 303.

Gjestel, Kristin 108.
Glansbílætasamlararnir 231.
Goodreads 174.
Góðskumeting 13-14, 64, 105, 136, 217, 276.
Gráir týdningar 351, 357-359.
Greenwald, Ted 268.
Gregoriussen, J. P 126-127.
Gripsrud, Jostein 75.
Grue, Jan 85, 120-121, 161-163.
Grøndahl, Jens Chr 99.
Guattari, Félix 154.
Gud er danskari 300.
Gudahøvd 136.
Guðjónsson, Pauli 226-228, 282-283, 286, 289.
Guðmundsson, Einar Már 315.
Gullbein, Sjúrður 381.
Guru 190, 195-197.

H

Haarder, Jon Helt 72, 125, 221.
Habermas, Jürgen 23, 28, 30, 94, 390, 399, 408.
Haddal, Per 162.
Hagen, Erik Bjerck 43, 45, 135.
Hammershaimb V. U. 170.
Hamsun, Knut 129, 247.
Handesten, Lars 74-76, 93-95, 98, 108, 140, 389.
Hansen, Bergur Djurhuus 61-62, 220, 245-246, 253, 310, 357, 360.
Hanusardóttir, Bergtóra 123, 212, 214, 250, 254, 256, 260, 262-265, 267, 309-310, 312, 318, 321, 362, 368, 390, 397-398, 404.
Háttalag 13, 19, 71-72, 74, 88, 153, 160-161, 172, 327, 342.
Hávamál 212.
Heiberg, Johan Ludvig 32.
Helgason, Egil 115.
Heimurin forni 67, 82, 204.
Heinesen, Jens Pauli 200, 209-212, 257, 312, 317, 327-329, 331, 345.

Heinesen, William 11, 50-53, 57-58, 64-65, 173, 194, 201, 203, 223, 249-250, 275, 278, 296, 313, 319, 331, 334, 369.
Heinesen, William (yngri) 343-345.
Heystveingir 67, 214, 267, 269, 330.
Helmsdal, Guðrið 300.
Helmsdal, Rakel 81, 234, 300, 343-345, 347.
Hentze, Ebba 381.
Hertel, Hans 76, 93, 123.
Hjelm, René 66, 178, 188-192, 195-198, 202, 218-219, 269, 305, 389, 403.
Hobsbawm, E. J. 299.
Hoydal, Gunnar 203-206, 210, 310, 360-361, 368, 370-375, 377-384, 391-392, 397, 406.
Hoydal, Karsten 276, 341, 360.
Hoydal, Marianna 306.
Houellebecq, Michel 129.
Houm, Nicolai 128-129.
How to Suppress Women's Writing 73, 307.
Húðsemi 237, 241, 243, 254, 258.
Húsið o.a. stutt 181, 184.
Hvat hevði Munch verið uttan dupultkvartettina í Ebenezer 289.
Hvedekorn 113.
Hvirlan 300, 313-317, 395.
Hvít sól 309.
Hvør eigur flaggknappin? 57, 96.
Hvør var Nimrod? 317, 328, 319, 331.
Højgaard, Dánjal 175.
Højholt, Per 372.

I

Ibsen, Henrik 313-314.
Ideologi 84, 143-144, 151.
Ideologiski ummælarin 143-144, 151, 267, 377.
Ilionskvæði 159.

Impressionistisk 19, 24, 93, 102-103, 113, 122, 125, 138, 141-145, 162-163, 331, 341-342, 356, 361-362, 381, 382, 405.
Intentionali ummælarin 142-145, 212, 248, 259, 264, 274.
Information 40, 99, 320.
Isaksen, Jógvan 48, 52, 55, 65-66, 82-83, 89, 93, 103, 131, 178-181, 188, 198-208, 210, 218-219, 270, 309, 327, 329-330, 348, 360, 371, 374-378, 380-381, 388, 395-396, 403, 407.
Isholm, Páll 208-215, 219, 229, 380.
iTromsø 315.

Y

Yrkingar (JHOD) 167, 170.
Yrkingar (OMR) 231.
Yvir teigar og tún 59, 64, 179, 271.

Í

Í Grønlandi við Kongshavn 201, 276.
Í havsins hjarta 204-205, 207, 368, 370-371, 373-375, 377, 382, 384, 391.
Í morgin er aftur ein dagur 202-203, 364.
Ímyndaður felagsskapur 94-95, 99-100, 239, 243.

J

Jacobsen, Eyðun 381-382.
Jacobsen, Erhard 59, 80.
Jacobsen, Jørgen-Frantz 11, 51.
Jacobsen, Magnus Dam 201, 276.
Jacobsen, Marna 322.
Jacobsen, Sonni 209, 233, 213.
Jacobsen, Steinbjørn B. 45, 58, 97, 137, 181, 183-185, 213, 300.
Jakobsen, Jakob 143, 167.
Jane Eyre 308.
Janusfigurur 98, 332.
Jákupsson, Tórfinnur 286-287, 289, 329.

Jákupsstovu, Guðrun í 144.
Jensen, Carl Jóhan 12, 17, 53, 58-59, 69, 83, 123, 134, 126, 129-130, 132-133, 135-136, 148, 200, 219, 223, 231, 243-282, 291, 305, 309-310, 312, 314, 316, 318, 320, 325-327, 330, 337, 341-343, 348-349, 362, 367-369, 385, 388-390, 394, 397-398, 404, 407.
Jensen, Carsten 99.
Jensen, Jørgen Bonde 142.
Jensen, Meinhard 45-46.
Jyllands-posten 323.
Joensen, Dagny 121, 292, 300, 313-317, 366, 393, 395.
Joensen, Martin 54-55, 345-346.
Joensen, Poul F. 44-45, 137, 173.
Joensen, Sigurð 135.
Johannesen, Georg 112.
Johannesen, Malan 66, 323, 363.
Johannesen, Marius 180.
Johansen, Jørgen Dines 12.
Johansen, Oddvør 202-203, 205, 260, 266, 292, 310-315, 317-319, 322, 327, 330-331, 334-337, 362, 364, 366, 368, 393, 404.
Johnson, Samuel 147.
Joyce, James 122.
Jógvansdóttir, Sonja 381-382.
Jógvansson, Agnar 121, 280, 285, 287-288, 292, 299-300, 317-320, 334, 367, 368, 393, 405.
Justesen, Andrias 181-188, 215, 218-219, 232, 403.
Jæger, Lív Maria Róadóttir 309, 324.
Jørgensen, John Chr. 18, 21-23, 26, 71-72, 79, 81, 84-85, 88, 99-104, 111-113, 119-121, 123, 134-135, 141-142, 144-147, 151, 187, 213, 221, 239, 248, 260-261, 293, 325-326, 332-333, 336, 339, 359.

K

Kafka, Franz 190, 200, 289.
Kamban, Hanus 67, 127, 129, 133, 179, 188-191, 201, 214, 149-251, 253-254, 256, 260, 262-272, 276, 278, 305, 319, 321, 330, 333, 390-391, 398, 404-405.

Kampmann, Sissal 131, 246, 323, 393.
Kanon /kanonisering 13, 27, 29, 75, 92, 247, 308, 321, 389, 392.
Kant, Immanuel 24, 108-109, 111, 141, 274.
Kapitalur 27, 61, 86, 92-93, 186, 191, 197, 199, 243, 276, 360, 388, 396.
Kári P (Kári Leivsson) 300.
Kehler, Henning 32, 113, 118.
Keipuyrking 28, 133, 290, 394.
Kendisir, Nøste 178.
Kierkegaard, Søren 275.
Kyndrup, Morten 104.
Kjelnæs, Marjun Syderbø 12, 93, 144, 205-206, 254-256, 319, 323, 330, 393, 395.
Kjølbro, Turið 254.
Klein, Heðin M. 300, 319, 370-374, 377-378, 384, 392, 397, 406.
Kletti, Pól á 208.
Klisjé/kliché 27, 53, 60, 112, 119, 133, 135, 196, 216, 244, 314, 318, 329-330, 388.
Klysner, Finn 18, 23, 81, 100-102, 111-112, 141-142.
Knausgård, Karl Ove 129, 138.
Kodakmyndir frá sjeytiárunum 282-283, 285.
Koparskrínið 210-212.
Koreman, Rian 87.
Kreppa 15, 16, 31-32, 36, 38-40, 42, 46, 61, 68, 73, 76, 152, 154-155, 172, 175-176, 178, 181, 187, 370, 398, 406.
Kress, Helga 323, 325, 348.
Kristeligt dagblad 323.
Kristensen, Nete Nørgaard 15, 41, 77, 151-152.
Kristensen, Tom 18, 112-113, 141-143, 191, 350, 356, 362, 335.
Kristiansen, Alexandur 118, 234, 240-243, 292, 300-301, 319-320, 327, 333, 370, 383, 386.
Kristiansen, Sámal Matras 288.
Kritiken i den nya offentligheten 116-117.
Krokslett, Kristian 316.
Krossmessa 327-331.
Kvinnutíðindi 17, 176, 309, 362-363, 367, 391, 405.
Kvívíks-Jógvan 169.

Kvørkringar 236, 271-272, 353.

L

Lagercrantz, Olof 114.
Larsen, Dag Eivind Undheim 15, 40, 174.
Larsen, Steffen Hejlskov 142-145, 151, 187, 212, 248, 253, 259, 267, 299-300, 362.
Larsen, Svend Erik 22, 25.
L'art Poétique 107.
Latour, Bruno 93-94.
Leiðarljós 204-205, 344.
Leikari (aktørur) 27, 91, 93-95, 138, 172, 177, 187, 206, 232, 321.
Leikmaður 30, 151, 154, 180, 399.
Leikum fagurt 143.
Lending, Mari 108.
Les Misérables 189.
Lewis, C. S. 202.
Lindqvist, Marit 15, 40, 174.
Listamál 61.
Listfrøði 41, 52-53, 60, 75, 84, 86, 96, 104-105, 108, 120, 144, 145, 187, 221, 249, 268, 298, 316, 331, 356, 389, 404.
Líð, Regin í 170, 212, 365.
Lítilleiki 47, 68, 72.
Ljósini sloknað 183.
Loe, Erlend 128.
Lognbrá 59.
Logos 157.
Long, Rikard 51-52, 63-65, 171.
Longinus 297.
Losi tann fyrsti 182, 185.
Luhmann, Niklas 28.

M

Magritte, René 352, 359.

Malarmé, Séphane 359.
Marnersdóttir, Malan 14, 52, 55-56, 73, 149, 167, 281-282, 308, 323, 344-345, 368, 371-375, 378.
Masters, Edgar Lee 345.
Matland, Helge 315.
Matras, Chr. 50-55, 58-59, 63-65, 67-68, 73, 77, 118, 171, 179, 194, 201, 249-250, 271-272, 284, 295-296, 324, 330, 385.
Mattsson, Anna 215-219, 391.
Maupassant, Guy de 143, 167.
Máliskuskaldskapur 133, 251, 261.
McDonald, Rónán 15, 24, 31-32, 38-40, 43, 76, 153-154, 156.
Meditations on Salt 292.
Menningarummælarin 142-143, 145, 253, 299-300, 374.
Mentanarpolitikkur 57, 61, 96, 350, 356-357.
Mentanarstuðul 9, 321.
Mentir og mentaskapur 254.
Metafunktión 48, 63, 66-67, 226, 396, 406.
Michelsen, Sólrún 89, 205-206, 322-323, 327, 393.
Miðlasosiologi 29, 290, 393-394.
Miðlasøga 25-26, 29, 112.
Mikkelsen, Jonhard 203-204, 210.
Miller, Carolyn 95, 238.
Mimetiskt 119, 122, 161, 187, 201, 221.
Minor 47, 72, 198.
Mín jólabók 223.
Myndugleiki 10, 15-17, 28, 31, 38, 41, 46, 49, 60, 72, 76-78, 86-87, 92, 120-121, 134, 151-156, 159-160, 163, 173-174, 184-286, 188, 190-191, 197, 202-203, 207-208, 212, 214, 217-218, 220, 222-223, 226, 229-230, 239-243, 264, 266, 291, 293-295, 297-298, 306, 326, 328- 330, 334-335, 338, 343, 352, 355, 358-361, 363-365, 370, 374, 378, 388, 392, 399, 401-404, 406.
Mjørki í heilum 188, 190-191.
Moberg, Bergur Rønne 46-47, 57-58, 177-178, 198, 200, 284-285, 288.
More, Thomas 158.
Moretti, Franco 46, 47.

Morgenbladet 110.
Mortensen, Anker 355.
Mortensen, Elin 183, 185.
Mortensen, Jóhan 210, 212-213.
Mortensen, Rannvá Holm 323, 393.
Mótyrking 56, 68, 126-127, 167.
Mótummæli 63-64, 130, 133, 143, 249-250, 253-254, 266, 310, 381.
Mukařovský 75, 86, 107-108, 389.

N

Náðisólin 286-289, 306, 333, 394.
Námsfrøðiligi ummælarin 145, 213, 239, 259, 336.
New York Times Book Review 115.
Nexø, Martin Andersen 364-365.
Niclasen, Ivan 66, 190, 192-197, 219, 274, 325.
Nielsen, Jóanes 66, 89, 129, 131, 132, 136, 201-203, 226, 231, 253-254, 256, 272-273, 275-277, 285, 300, 327, 331, 334, 349, 352-353, 358-359, 370, 379-386, 397-398.
Ny Jord 247.
Nýkritikkur 13, 85-86, 103, 160, 190, 341.
Nordbrandt, Henrik 297, 300-301, 368.
Norðlandslúðurin 127, 137.
Normativ 26, 72, 104, 146, 317.
Norsk litteraturkritikks historie 19, 22, 26, 85, 125, 135, 221.
Nólsoyar Páll 213.
Nærup, Carl 113, 221.
Næs, Martin 57, 96, 200-201, 321.
Nøjgaard, Morten 96, 107, 129, 197, 278, 377, 395.

O

Odysseusarkvæði 122.
Oyggjaskeggi 132, 176, 215, 222, 234, 253, 344, 350.
Olsen, Aref 363.
Olsen, Dagfinn 66.

Olsen, Marius 355.
Olsen, Theodor E. D. 199-200, 202, 270, 309.
Ophav 306.
Orð og andlit 181, 185.
Ottarsdóttir, Katrin 220, 323, 393.
Outsider Magazin 50, 52-53, 173, 176-178, 228, 284, 286, 288-290, 292-293, 306, 403, 405.
Outsidarin 176, 178, 220, 289-291, 293.
Ovid 98.

Ó

Ó-søgur um djevulskap 231, 246, 266, 279-282, 287.
Ólavsstovu, Vár í 323, 362, 364-365, 367, 405.

P

Pallseting/pallseta 16-17, 77, 83, 85-86, 112, 121, 125, 138, 148, 156, 161, 165-166, 184, 189-190, 197, 218, 220-221, 228-229, 232, 239-240, 242-246, 248, 250, 269, 279-280, 291, 294-296, 299, 302, 304-306, 317, 338, 344, 346, 349, 352-353, 356, 358-362, 402-405.
Paradoks 15, 17, 22, 27-31, 107, 110, 118, 122, 166, 207, 234, 264, 290, 297, 301, 306, 339, 387-399, 401.
Parodi/parodiera 123, 130, 250-251, 253, 260-261, 290, 397.
Pastisja 23, 135, 138, 250, 260-261, 286.
Pathos 157, 283, 287, 295-296, 300, 378.
Patursson, Páll 64, 194.
Patursson, Rói 300.
Patursson, Sverri 64, 169.
Paul, Pamela 115.
Páskaódnin 66, 370, 379-382.
Pedersen, Frode Helmich 110-111.
Pentur 203, 370, 383.
Performativ 17, 72, 87, 116-117, 125, 166, 222-223, 236, 301, 305, 403, 411.

Performativ biografisme 220.
Performativ kritik 116.
Persona 18, 77, 85-86, 156-158, 160-163, 184, 186, 190, 207, 210, 215, 271-272, 326, 357, 359-362, 404-405.
Persona non grata 271-272.
Petersen, Fríðrikur 168.
Pisan, Christine de 266-267.
Pílagrímar 188-191, 267, 269.
Poetikk 88, 166, 222, 226, 248, 251, 261, 287-288, 291, 297, 299, 385-386, 404.
Politiken 323.
Postmodernisma 53, 129, 137, 145, 275, 283-288, 291, 300, 302-304, 306, 345, 404.
Poulsen, Kinna 57, 60-62, 93, 136, 245, 289, 306, 309, 326, 333, 348-362, 368, 405, 407.
Poulsen, Tóroddur 44, 93, 118, 122-124, 129-133, 135, 137-138, 192, 193, 215, 217, 220, 228-230, 234, 237-240, 243, 251-253, 256, 272-275, 277, 285, 287, 289-292, 298, 301-306, 337-339, 341-342, 348-349, 352-355, 358-359, 361, 389, 391, 394, 397, 404, 407.
Pólsson (Jensen), Petur 122-123, 126, 129-130, 190, 195-197, 215-217, 256, 271-272, 278.
Professionalisering 10, 24, 35, 51, 140, 145-146, 171, 173, 179-180, 207, 219, 233, 325, 334, 348, 362, 388, 398-399, 403, 405.

R

Rabelais, François 203.
Racine, Jean 147.
Raskolnikov 212.
Rasmussen, Oddfríður M. 191, 216-218, 223, 231-243, 256, 271-272, 278, 320, 343-344, 349, 351-353, 357-359, 378, 395, 407.
Rasmussen, Rasmus 170.
Rasmussen, Steintór 223-227, 229-231, 292, 297-298.
Rás/Sár 216, 218, 239.
Reglur: eitt brotsverk 123, 130, 132, 281.
Reinert, Katrin 319.

Reinert, Lena 132.
Reinert, Mina 362, 365.
Retorikkur 10, 18, 40, 46, 69, 86-87, 95, 119-121, 134, 156-159, 161, 163, 238-239, 272, 288, 330, 368.
Retorisk smitta 120, 122-123.
Retorisk spegling 122-123.
Reviewing the Arts 102.
Rhetoric of Fiction, The 159.
Rhetorica Scandinavica 162.
Rifbjerg, Klaus 99, 142.
Riffaterre, Michael 119-120, 125.
Rithøvundarummæli/rithøvundarummælari 84, 147, 149-150, 163, 166, 221-222, 228, 232, 241-244, 291, 305, 369-370, 378, 383, 386, 391, 403, 406.
Ryggi, Randi á 292-293.
Rognlien, Jon 98.
Royggj 274, 353.
Roos, Carl 383.
Room of One's Own, A 308.
Rostrup, Henriette 323, 325.
Rot 338, 340, 354, 397.
Russ, Joanna 73, 307, 308, 316, 318-319, 369.
Russiskur dansur 228.
Rúm 132-133, 135, 253, 310.
Rúm Alexandru 215.
Rösing, Lilian Munk 97, 129, 197.

S

Said, Edward 10, 18, 23, 33-35, 43, 91, 122, 140, 176-177, 208, 290, 293, 306.
Sainte-Beuve, Charles Augustin 146.
Sámalson, Andras 126.
Schiller, Friedrich 297.
Schlegel, Friedrich 301.
Schneider, Sonja 204-205, 344.

Sebastians hús 312-315, 317-319, 330-332.
Sennet, Richard 28.
Shelley P. B. 196.
Shopenhauer, Arthur 309.
Sigurðardóttir, Turið 52, 56, 68, 111, 124, 127, 167, 172, 304, 308-309, 311, 323, 325-326, 334-348, 354, 358, 388, 391, 395, 397, 405.
Simonsen, Kim 48, 67, 83, 121, 130, 143, 165-166, 173, 177-179, 223, 226, 253, 275, 279, 282-306, 312-317, 319, 327, 333-334, 337-340, 348, 366-368, 389, 393-395, 403-405, 407.
Sjálvpallseting 112, 156, 228, 269, 353.
Sjálvsmyndan 16-18, 72, 125, 156-157, 161, 163, 365.
Skarðhamar, Anne-Kari 50-54, 58, 68, 73, 173, 179, 249, 296.
Skarði, Bergljót av 82, 371, 373-378.
Skála, Annfinnur í 65, 82, 202, 204.
Skemmuni, Jákup í 210.
Skipið 185.
Skitsur 276.
Skyum-Nielsen, Erik 15, 93, 96, 123, 155-156, 162, 197, 320.
Skriftstød 131.
Skaale, Sjúrður 266.
Smaksdómur/smaksdómari 15, 24, 31, 36, 97, 104, 109, 111, 151, 156, 333-334, 340-341, 347, 386.
Smámunir 271.
Smásangir og sálmar 168.
Smith, Annika 79, 80.
Smitta (retorisk, málslig, bókmentalig) 100, 120, 122-123, 126, 129, 134, 142, 171, 187, 198, 201, 229, 238, 380.
Sociologie de la littérature 91, 93.
Soflúgv – og øvugt 123.
Solstad, Dag 261, 319-320.
Sontag, Susan 56, 196.
Sosialir miðlar 10, 14, 76-77, 151-152, 174, 220, 245-247, 357, 401, 403, 408.
Sosialurin 58, 81, 89, 133, 148, 175, 178-179, 198-200, 234, 249, 254, 256, 267, 270, 279, 286, 288, 292, 326, 342, 349, 403-404.

Sosiologi/sosiologur 27, 95, 100, 197, 262, 390.
Sót og søgn 122, 130-131, 193.
Spei/speiskur 12, 32, 64-65, 123, 133-134, 145, 170, 180, 182-184, 186-187, 194, 196, 225, 231, 249, 251, 254, 258, 260-261, 269, 271-275, 288-289, 307, 309-310, 312-313, 316, 332, 335, 346, 353, 367, 373, 375, 380.
Speispei Spei 124, 192, 273-274, 353, 359, 361.
Sprogblomster i spinatbedet 100, 119, 134, 144, 147, 339.
Stidsen, Marianne 37, 98, 101, 103, 114-115, 236, 322, 355-356, 368.
Stílummælarin 145, 239, 248.
Stovns-ethos 161-163, 197, 215, 326.
Straume, Anne Cathrine 40.
Strindberg, August 313-314.
Strøm, Ingilín Didriksen 144.
Suðar dýpið reyða 212, 214, 254, 256, 258, 261, 264, 321, 362.
Sult 247.
Sum rótskot 144.
Svartur ælabogi 210, 212.
Svøvnlendingur rættar kumpass 229, 275, 301, 303, 305.
Søgur úr Port Janua 80, 343-346.
Sørensen, Inger Smærup 60, 69, 119, 133, 349-350.
Sørensen, Villy 143.

T

Tá ið eg havi málað summarhúsið 311, 335.
Tey eru sum taka mánalýsi í álvara 89, 201, 203.
Tema við slankum 89, 205.
Thomsen, Søren Ulrik 279.
Thon, Jahn Holljen 25, 75.
Tign 12, 14, 27, 29-31, 33, 46, 49-50, 68, 89, 113-114, 124, 141, 150, 153, 163, 170, 266, 388, 393, 396, 398, 402.
Tilskueren 51.
Tilverutreyt 16, 21, 25, 31, 33, 38, 48, 76, 367, 398, 406.
Tingakrossur 63, 87, 124, 167, 168.
Titchener, Campbell B. 102, 139-141.

Tímar og rek 337, 341.
Tjóðarbygging 50-51, 167.
Trettandi mánaðin 136, 275, 277.
Trot/trotmentan 47, 72, 138, 233, 235, 406.
Trotzig, Birgitta 217.

U

Ultraminor 47, 72, 198.
Ulysses 122.
Ummælaraprofilur 17, 77-78, 83, 308, 324, 326, 402-403, 405, 407.
Ummælaratypa 15-16, 74, 79, 83-84, 139-152, 166, 187, 212-213, 221-222, 228, 232, 248, 253, 261, 294, 300, 305-306, 326, 336, 403.
Umskapanin 289.
Undanformur 68, 126, 127, 140, 167.
Undir suðurstjørnunum 374.
Upplivingarummælarin 142-143, 145.
Utopia 158.
Uttangarðsskaldskapur 133, 251-252, 261, 285, 404.

Ú

Úr támi tíðarinnar 209, 211.
Úti á leysum oyggjum 363.
Útisetaummælari 16, 83, 165, 176, 178, 187-188, 198, 208, 218-221, 269, 306, 396, 403.
Útiseti/útiseta 10, 16, 34, 51, 53-55, 73, 83, 95, 165-166, 172-173, 176-179, 181, 187-188, 192, 198, 200, 207-208, 215, 218-222, 234, 262, 269, 284, 290, 293, 305-307, 344, 348, 350, 391, 396, 403.

V

Vagant 155.
Vald 9, 12, 15, 23, 27, 37, 45, 76, 78, 87, 92-93, 96, 99-100, 114, 128, 147, 149, 150, 152-156, 163, 166, 174, 186, 191, 197, 199, 222, 224,

243, 254, 267, 278, 291-292, 295, 307, 321, 360, 369-370, 389, 391, 393, 396, 399, 401-402, 404, 407.
Vang, Vónbjørt 319, 323, 393.
Var Kafka klaksvíkingur? 200.
Varðin 50-52, 54, 58, 59, 61, 64, 144, 171, 173, 176, 180, 200, 276, 296.
Vassenden, Eirik 25-26, 85, 99, 120, 124, 135, 148-149, 221-222, 247, 270.
Vencil 176, 223, 319, 407.
Verjurøða 9, 33-35, 42, 62, 295, 401.
Verjurøða Sokratesar 295.
Verjustøða 9, 21-22, 31, 33, 38, 43, 61, 180, 199, 398.
Vik, Bjørg 261, 318, 320.
Villur 133, 251.
Virðisløn ir 11-12, 92, 190, 199, 239, 246, 255, 266, 321-324, 381, 392-393.
Virðisrelativisma 92, 107-110, 389.
Virðisskipan 27, 390-392.
Vold, Jan Erik 343.
Vøluspá 342.

W

Wandrup, Fredrik 150.
Weber, Max 28, 390.
Weekendavisen 323.
Weitz, Morris 105-107, 395.
Weyhe, Eivind 173.
Wich, Ole 293, 306.
Wiese, Duncan 155-156.
Wilde, Oscar 113.
William ummælir fagrar listir 57.
William-Olsson, Magnus 41, 87, 117-118.
Williams, William Carlos 240-241.
Winge, Mette 19, 101, 103-104, 182, 209.
Winthereig, Øssur 175.
Wittgenstein 108.

Woolf, Virginia 308.
World, The Text, and The Critic, The 176.
Wung-Sung, Jesper 12.

Z

Zangenberg, Mikkel Bruun 15, 38-40, 154-156.

Ø

Ørstavik, Hanne 129, 238.